# LØGTINGIÐ
# 150

# LØGTINGIÐ 150

## HÁTÍÐARRIT

*150 ár liðin, síðani Løgtingið varð endurstovnað*

# 1

Løgtingið 150
© 2002, Løgtingið og høvundarnir
Greitt til prentingar: Erling Isholm
Perma: Ingi Joensen
Umbróting, repro, prent og innbinding: Hestprent
Bókin er sett við Janson 11/14,5
Útgáva: Løgtingið, Tórshavn 2002

Bókaverk í trimum bindum:
I Løgtingið 150 – Hátíðarrit 1
Ritgerð: Hans Andrias Sølvará
ISBN 99918-966-4-3
II Løgingið 150 – Hátíðarrit 2
Sergreinar og ævisøgur
ISBN 99918-966-5-1
III Løgingið 150 – Hátíðarrit 3
Val og valtøl, leitorð og yvirlit
ISBN 99918-966-6-x
Øll trý bindini:
ISBN 99918-966-3-5

# *Innihald*


Frá norskum tingi til danskt amt
– umleið 800–1816 .................... 9
*Føroysku landnámsmenninir* .............. *11*
*Norsku tingini frá umleið 400 til 1000* ..... *15*
*Føroya alting frá umleið 800–1300* ........ *19*
*Frá altingi til løgting 1270-1350* .......... *39*
*Føroya løgting frá umleið 1300-1816* ....... *43*

Føroya amt – umleið 1720–1852 ........... 67
*Føroya amt verður sett á stovn* ............ *68*
*Heimildir amtmansins* .................. *72*
*Amtmenninir og virksemi teirra* ........... *75*

Danska grundlógin og Løgtingið – 1852–1906 81
*Fólkaræðið og endurreisn Løgtingsins* ....... *82*
*Nýggja Løgtingið og løgtingslógin* .......... *100*
*Løgtingsval – valrættur, valbæri*
*og valluttøka* ....................... *110*
*Nýggja og gamla Løgtingið* .............. *115*
*Nýggja Løgtingið og amtmaðurin* .......... *117*
*Nýggjar tíðir og nýggj krøv til heimildir*
*Løgtingsins* ....................... *130*

Fólkaræðisligar nýskipanir og politisk
menning – 1906–1940 ................. 149
*Politiska floksbýtið* ..................... *150*
*Royndir Sjálvstýrisfloksins at fáa*
*løgtingslógina broytta* ................. *155*
*Grundlógarbroytingar og fólkaræðisligar*
*nýskipanir* ........................ *160*
*Valskipanin til Løgtingið undan 1923* ....... *165*
*Løgtingslógin frá 1923* .................. *169*
*Landsnevnd Løgtingsins* ................ *185*
*Fíggjarligu viðurskifti Løgtingsins* ......... *187*
*Løgtingið og sjálvstýrisstríðið* ............. *192*
*Nýggjar tíðir og nýggir flokkar* ........... *210*

Løgtingið fær avmarkað
lóggávuvald – 1940–1948 . . . . . . . . . . . . . . . . 221
*Eitt ríki – tvær hersetingar* . . . . . . . . . . . . . . 222
*Stjórnarskipan Føroya frá 1940-1948* . . . . . . 231
*Fíggjarligu viðurskifti Løgtingsins*
*frá 1940-1948* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 240
*Føroyskur politikkur undir*
*bretskum valdi – 1940-1945* . . . . . . . . . . . 244
*Samráðingar, fólkaatkvøða*
*og heimastýri – 1945-1948* . . . . . . . . . . . . 256

Heimastýristíðin – 1948–2002 . . . . . . . . . . . . . 291
*Heimastýrislógin* . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 292
*Stjórnarskipanarviðurskifti Føroya* . . . . . . . . . 297
*Fíggjarligu viðurskifti heimastýrisins* . . . . . . . 312
*Føroyskur politikkur undir heimastýrisskipanini* 320
*Politisk eftirmeting og nýggj stjórnarskipan* . . 351
*Heimildir Løgtingsins – millum*
*heimastýri og fullveldi* . . . . . . . . . . . . . . . . 364
*Móti fullveldi – heimastýrisskipanin í kreppu* . 372

Kelduávísingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 386

Bókmenta- og keldulisti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 393

# *Fororð*

Ólavsøkudag eru 150 ár liðin, síðani Løgtingið helt sín fyrsta fund, eftir at tingið varð endurstovnað.

Á vári 1997 fór Formansskapurin í Løgtinginum undir at fyrireika, hvussu dagurin skuldi hátíðarhaldast, og í hesum sambandi varð so smátt farið undir at fyrireika at fáa til vega eina fullfíggjaða løgtingssøgu.

Norðmaðurin A.W. Brøgger skrivaði í 1930-unum eftir áheitan frá tinginum ta fyrstu bókina, sum Jóannes Patursson umsetti til føroyskt. Bókin kom út í 1937 undir heitinum: "Løgtingssøga Føroya. Hvussu Føroyar vórðu bygdar". Eitt handrit aftrat varð skrivað, mest um tíðina frá 1816 til 1852, tá einki ting var. Tað er ikki greitt, hvør skrivaði hetta handritið, sum ongantíð varð gjørt liðugt og heldur ikki varð prentað.

Á fundi 18. januar 2000 avgjørdi Formansskapur Løgtingsins, hvat løgtingssøgan í høvuðsheitum skuldi innihalda, og samstundis varð ein ritstjórn vald at standa fyri arbeiðinum. Í ritstjórnina komu: Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, Súsanna Danielsen, skrivstovustjóri, Jákup Thorsteinsson, søgufrøðingur, Demmus Hentze, advokatur og Pól á Kletti, blaðmaður. Nevndin skipaði seg við Finnboga Ísakson sum formanni. Sjúrður Rasmussen, ráðgevari, varð settur sum skrivari. Erling Isholm hevur greitt bøkurnar til prentingar.

Bókaverkið er í trimum bindum. 1. bind er um søgu Løgtingsins frá landnámi til 2002 við serligum denti á tíðina eftir 1852. Í 2. bindi eru greinar um seks ymisk evni við tilknýti til Løgtingið og arbeiði tess og ævisøgur tingmanna frá 1852 til 2002. 3. bind fatar um val og valtøl frá 1852 til 2002.

Í høvuðsheitum eru tað frøðingar, sum hava skrivað bókaverkið, men hetta er kortini atkomiligur lesnaður hjá øllum. Gjørt verður vart við, at høvundarnir sjálvir hava ábyrgdina av innihaldinum í tí, teir hava skrivað.

Tað er mín vón, at Føroya fólk fær mikla gleði av hesum verki.

Tórshavn 9. juli 2002

*Edmund Joensen*
løgtingsformaður



# I

# Frá norskum tingi til danskt amt – umleið 800–1816





**Hans Andrias Sølvará**

*f.* 1962 í Klaksvík. BA prógv í søgu í 1990 á Søgu- og Samfelagsdeildini, Fróðskaparsetur Føroya. Í 1994 cand.mag prógv á Aarhus Universitet við søgu sum høvuðsgrein og heimspeki sum hjágrein. Námsfrøðiligt prógv í 2000. Síðan 1996 fast starv sum lærari á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy. Undirvíst í heimsspeki á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði 1996-2001. Síðani 2000 undirvíst á Fróðskaparsetrinum í vísinda-ástøði, søguvísindaligum arbeiðslag og almennari søgu.

## Føroysku landnámsmenninir

Einasta kenda heimildin, sum sigur nakað um forna ting føroyinga, er *Føroyingasøga*. Aðrar spjaddar heimildir finnast ikki fyrr enn seinni í miðøld, men tað er ikki fyrr enn eftir siðaskiftið, serstakliga aftaná 1615, tá *Tingbøkurnar* taka við, at heimildargrundarlagið til tingsøgu føroyinga gerst so umfatandi, at til ber at gera sær eina álítandi mynd av tingviðurskiftum føroyinga.

Tað er tí stórt sæð einans í Føroyingasøgu, at leitast kann eftir upprunanum til føroysku tingsiðvenjuna. Áðrenn komið verður inn á tað, sum Føroyingasøga sigur um tingviðurskifti í Føroyum, skal verða hugt eitt sindur nærri at tí, sum hon og aðrar heimildir siga um føroyska landnámið. Spurningurin um nær føroyska landnámið var, og hvaðani landnámsmenninir komu, hevur týdning fyri, hvar leitast skal eftir upprunanum til fyrsta føroyska tingið.

Føroyingasøga er niðurskrivað í Íslandi fyrst í 1200-talinum. Søgan finst ikki longur sum sjálvstøðugt handrit, men partar av henni eru varðveittir í serstakliga trimum íslendskum handritum, sum ganga aftur til 14. øld.[1] Hesi eru *Ólavs søga Tryggvasonar*, *Flateyarbók* og eitt eldri handrit, ið er skrásett sum *AM 62 fol*. Høvuðsevnið í søguni er, tá føroyingar taka við kristnari trúgv um ár 1000 og so líðandi geva seg undir norskt vald. Søgugongdin fevnir um tíðarskeiðið frá umleið 940 til 1040.[2]

Í føroyskari týðing av Flateyarbók byrjar Føroyingasøga við hesum orðum: „*Maður er nevndur Grímur Kamban. Hann bygdi fyrstur Føroyar á døgum Haralds hins Hárfagra. Tá flýddi fyri hansara ovríki fjøld manna. Settust summir í Føroyum og bygdu har …*“.[3] Eftirsum Haraldur Hárfagri savnaði Noregi til eitt ríki og gjørdist kongur yvir øllum norðmonnum stutt fyri ár 900, so merkir hetta, at Føroyar á fyrsta sinni vórðu bygdar av norðmonnum um ár 900. Leita vit eftir upprunanum til føroyska tingið ella tingskipanina, so er tað – um Føroyingasøga sigur satt – í norskari siðvenju um ár 900, at leitast skal.

Teir norðbúgvar, sum hava búsett seg í Føroyum í 900-talinum, hava óivað tikið tær politisku og rættarligu siðvenjur, sum teir kendu úr Noregi, við sær til Føroyar.

Onkur ivamál eru kortini við hesi ástøðini. Fyri tað fyrsta er tað sjálv heimildin. Bæði í rúm og tíð er Føroyingasøga skrivað langt frá teimum hendingum, sum hon sigur frá. Hon er skrivað í Íslandi umleið 300 ár eftir, at Føroyar, sambært Føroyingasøgu, vóru bygdar. At „rithøvundurin" til Føroyingasøgu hevur gott innlit í føroysk viðurskifti, er kortini einki at ivast í. Staðarnøvn, bygdir og landafrøðilig viðurskifti, sum lýst verða í Føroyingasøgu, bera boð um tað, hóast feilir eisini eru í søguni. Spurningurin er einans, um Føroyingasøga lýsir politisk viðurskifti í Føroyum og vitan um Føroyar í samtíðarumhvørvi „høvundans" í 1200-talinum, ella um hon lýsir viðurskifti í Føroyum í 900- og 1000-talinum. Dømi finnast í Føroyingasøgu um, at „høvundurin" kann hava blandað viðurskifti í 1200-talinum, tá søgan varð niðurskrivað, við viðurskifti í 1000-talinum, sum søgan skal eitast at siga frá. T.d. verða føroyskir sýslumenn[4] – kongsins umboðsmenn – nevndir í søguni, sjálvt um sýslumenn ikki eru kendir í Noregi fyrr enn seinast í 12. øld.[5] Eisini sigur søgan, at føroyskir høvdingar hava sína jørð í len frá norskum kongum ella jarlum,[6] sjálvt um orðið len er eitt týskt lániorð, sum nýliga var komið inn í íslendska málið í 1200-talinum.[7]

Mistekur Føroyingasøga seg viðvíkjandi føroyskum sýslu- og lensmonnum, so er eisini hugsandi, at hon mistekur seg viðvíkjandi fyrstu føroysku búsetingini. Hesi ivamál gerast ikki minni av, at Føroyingasøga ikki samsvarar við aðrar heimildir, sum umtala fyrstu føroysku búsetingina. Írski munkurin Dicuil, sum starvaðist við hovið hjá Karlamagnusi í Achen í 9. øld, skrivar í árinum 825 eitt landafrøðiligt verk á latíni, *Liber de mensura orbis terrae*, har nakrar ónavngivnar oyggjar, ið út frá umrøðuni helst eru Føroyar, men Hetland er eisini ein møguleiki, verða nevndar. Í hesum verki, sum er varðveitt í handriti frá 843, sigur Dicuil seg hava tosað við ein prest, sum hevur verið í nevndu oyggjum, og hesin hevur sagt honum, at í eini 100 ár hava írskir munkar búð á oyggjunum, men nú – t.v.s. um ár 800 – eru teir riknir burtur av norskum ránsmonnum.[8] Verkið hjá Dicuil er, bæði tá hugsað verður um rúm og tíð, tættari at teimum hendingum, sum sagdar vera frá



Fyrstu ferð Føroyar helst verða nevndar í eini skrivligari keldu, er í landafrøðiliga verkinum „Liber de mensura orbis terrae“, sum írski munkurin Dicuil skrivaði í 825.

í verkinum, enn Føroyingasøga. Í tíð eru vit nærum so tætt at hendingunum, sum vit kunnu koma – í byrjanini av 800-talinum. Hugsa vit um rúmsliga frástøðu, so eru vit eisini heilt tætt at hendingunum, við tað at Dicuil hevur tosað við ein persón, sum hevur verið í Føroyum um ár 800. Hartil mugu vit eisini hugsa um, hvat slag av teksti vit hava við at gera. Meðan Føroyingasøga er ein frásøgn, sum er borin av mannamunni til undirhald hjá íslendingum í fleiri 100 ár, so er verkið hjá Dicuil eitt vísindaligt verk um heimsins landafrøði, sum er skrivað á latíni, ið var tíðarinnar vísindaliga mál. Hetta merkir óivað, at meðan stílurin og frásøguhátturin hevur verið tað mest týðandi í Føroyingasøgu, so hevur innihaldið verið tað, ið hevur verið mest umráðandi hjá Dicuil.

Verkið hjá Dicuil verður eisini styðjað av upplýsingum í øðrum íslendskum miðaldarbókmentum. Í *Landnámabók* frá

12. øld verður sagt, at abbasonur Grím Kambans, Tórolvur Smør, var í Íslandi á rannsóknarferð um ár 870.[9] Hetta samsvarar illa við upplýsingin í Føroyingasøgu um, at abbi Tórolv Smør, Grímur Kamban, kom til Føroya um ár 900 – t.v.s. umleið 30 ár eftir, at abbasonurin nam land í Íslandi. Eitt landnám í Føroyum við Grími Kamban stutt eftir 800 hevði hinvegin samsvarað betur við Landnámabók. Sostatt tykjast bæði verkið hjá Dicuil og Landnámabók at benda á, at norrøna landnámið í Føroyum fór fram stutt eftir ár 800.

Tíðarfestingin hjá Dicuil av norrønu búsetingini í Føroyum til um ár 800 passar eisini betur við gongdina í norrønu útbreiðsluni í víkingatíðini, enn stutt fyri ár 900, sum Føroyingasøga vil vera við. Íslendska búsetingin, sum eins og øll íslendsk viðurskifti í miðøld er nógv betur skjalprógvað enn føroysk viðurskifti, er vanliga sett at verða byrjað í 873, men landafrøðiligu viðurskiftini gera tað sannlíkt, at norðbúgvar nomu land í Føroyum, áðrenn teir funnu Ísland.

Tað er tí nógv, sum bendir á, at Dicuil hevur fatur í tí langa endanum, tá hugsað verður um, nær Føroyar vóru bygdar. Eru norðbúgvar hinvegin komnir til Føroya longu um ár 800, so fellur ástøðin í Føroyingasøgu um, at fyrstu niðursetumenninir í Føroyum vóru norskir høvdingar, sum ikki vildu geva seg undir norska kongin Harald Hárfagra, tá hesin royndi at savna Noregi til eitt ríki seinast í 9. øld. Undir øllum umstøðum vóru tað ikki politiskar og rættarligar skipanir í Noregi í 900-talinum, sum fyrstu norsku niðursetumenninir í Føroyum høvdu við sær til Føroya, men heldur norskar skipanir frá 800-talinum, tá Noregi enn ikki var savnað til eitt ríki.

Nýggjari rannsóknir av Føroyingasøgu lata eisini upp fyri tí tulkingarmøguleikanum, at landnámstíðin er farin fram í meira enn einum norskum umfari á døgum Haralds Hárfagra, soleiðis sum tað í byrjanini endurgivna brotið úr Føroyingasøgu leggur upp til. Útgávur av Føroyingasøgu, sum hesum viðvíkjandi styðja seg meira at Ólavs søgu Trúggvasonar, gera tað møguligt at lesa tað sama brotið á henda hátt: „*Svá er sagt, at Grímur Kamban bygdi fyrstur manna Føroyar. Men á døgum Haralds hins Hárfagra flýddi fyri hans ríki (t.e. valdi) fjøld manna. Settust summir í Føroyum og bygdu har…*“[10] Verður inngangurin til Føroyingasøgu lisin á henda hátt, so er søgan ikki í mótstríð við ta fatan, at norrønu landnámsmenninir komu til Føroya í

fleiri umførum í 800- og 900-talinum. Harumframt samsvarar ein tílík lesing av tekstinum betur við bæði tað, sum Dicuil skrivar um ár 825, og Landnámabók. Tað, sum heimildarmaðurin hjá Dicuil hevur sæð, hevur helst einans verið tann fyrsta av eini røð av norrønum niðursetumonnum, sum komu til Føroya í 800- og 900-talinum.

Nakað kundi eisini bent á, at norrønu landnámsmenninir ikki eru komnir beinleiðis til Føroya úr Noregi. T.d. verður navnið Kamban hildið at vera av keltiskum uppruna, og røddir hava verið frammi um, at norrønu niðursetumenninir eru komnir til Føroya umvegis tað keltiska Írland. Sambært hesi fatan skuldi Grímur Kamban, sum helst kom til Føroya stutt eftir 800, verið føddur í Írlandi. Trupulleikin er, at ein so gomul norrøn búseting neyvan finst í Írlandi. Tann møguleiki er tí settur fram, at Grímur Kamban var føddur á Isle of Man, tað einasta staðið í keltiska økinum, har ein væl skipað norrøn búseting hevur verið í tíðini stutt eftir 800.[11] Henda ástøðin er kortini veik, um samanborið verður við tað, sum Dicuil skrivar í 825, at fyrstu norrønu niðursetufólkini longu tá vóru komin til Føroya.

Einki kann við vissu sigast um, hvussu fyrstu føroysku niðursetumenninir komu til Føroyu úr Noregi, men alt bendir á, at tað er í Noregi í tíðini stutt fyri 800, at leitast skal eftir siðsøguliga upprunanum til tingsiðvenju føroyinga.

## Norsku tingini frá umleið 400 til 1000

Longu í 5. øld eftir Kristi føðing møttust norðmenn á skipaðum tingum runt um í Noregi, til tess at viðgera samfelagslig viðurskifti og ósemjur millum manna. Hetta sæst av teimum elstu lógum og rættarfyriskipanum, sum varðveittar eru í Noregi.[12]

Í tíðini fyri Kristi føðing, fleiri 100 ár áðrenn tey fyrstu tingini vóru sett á stovn í Noregi, var ættin tann grundleggjandi eindin í samfelagnum. Ymiskir ættarbólkar sótu á jørðini í ymiskum avmarkaðum økjum, og arbeiðið á jørðini varð útint í felag av teimum, sum hoyrdu til ættarbólkin. Trygdin og samleikin hjá tí einstaka vóru grundleggjandi tengd at ættarbólkinum. Fólk, sum búðu í Noregi, kendu seg ikki at hoyra til ein felagsskap, sum rakk útyvir dagliga samskiftið

innan ættina, og enn minni sum norðmenn. Grundarlagið undir felagsskapinum var ikki felags mentan, men felags blóð.

Ósemjur, sum stungu seg upp innan ein ættarbólk, vóru tí uttan stórvegis trupulleikar loystar av ættarfelagsskapinum. Hinvegin kundu ósemjur, ið stungu seg upp millum ymiskar ættarbólkar, ikki loysast av ættini, tí talan var um stríðsspurningar millum tvær grundleggjandi eindir, ið eingi felags virði høvdu. Í tílíkum trætum styðjaðu ættarbólkarnir ofta treytaleyst tí ella teimum, sum hoyrdu til ættina; tað var ættin, ikki einstaklingurin, sum var vorðin órættað. Tann upprunaliga loysnin uppá tílíkar stríðsspurningar var blóðhevnd. Ættarbólkurin, blóðfelagsskapurin, sum var vorðin órættaður, hevði rætt og skyldu til at verja sína æru við at hevna seg inn á ættarbólkin hjá tí, sum hevði framt órættin. Lív mátti bøtast við lívi – ikki endiliga lívið hjá tí seka fólkinum, men eitt lív úr tí seku ættini.

Blóðhevnd sum loysn uppá trætur millum ættir bygdi á ta fortreyt í gamla bóndasamfelagnum, at búsetingarmynstrið varð skipað eftir ættarviðurskiftum. Ymiskar ættir búðu ikki á sama øki, men tær hildu hvør sær til á væl avmarkaðum økjum. Nærum einki samstarv var millum ættarbólkarnar, teir vóru afturlatnar sosialar eindir. Tað var ikki gerandiskostur, at ættirnar komu í stríð við hvørja aðra, men tá tað hendi, so var einki felags virðisgrundarlag, sum kundi gjørt tað møguligt at loysa stríðsspurningar við samráðingum. Blóðhevndin var einasti møguleiki í stríði millum ættarbólkar.

Við byrjanina av okkara tíðarrokning setti fólkavøksturin gongd á eina menning av landbúnaðartøknini. Tað tíðarskeiðið í norðurlendskari søgu, sum verður nevnt jarnøldin, byrjaði, og nýggj amboð úr jarni høvdu so líðandi við sær, at ein verulig menning av landbúnaðinum í Noregi fór fram.[13] Landbúnaðarmenningin og nýggja tøknin vóru fortreytir fyri, at trýstið, sum fólkavøkstrinum legði á tey gomlu ættarstøðini, kundi lættast, tí fólk byrjaðu at flyta frá gomlu ættarstøðunum, nýggj landbúnaðarøki vóru uppdyrkaði og nýggir garðar vóru settir á stovn. So líðandi byrjaðu verulig bygdasamfeløg at vaksa fram, sum rúmdu fólk úr ymiskum ættarbólkum. Hetta hevði fyri tað fyrsta við sær, at ættarbólkarnir komu oftari beinleiðis í samband við hvønn annan, og í øðrum lagi gjørdust ættarbondini veikari. Sosialu eindirnar gjørdust størri, meira

samansettar og mobilar. Fólk búðu tættari at hvørjum øðrum, og marknastríð o.a. millum fólk, sum ikki høvdu felags blóð, gjørdist vanligari. Undir hesum umstøðum var tað bæði møguligt og neyðugt at finna nýggjar hættir at loysa trætur. Blóðhevndin var so líðandi avloyst av sekt. Ístaðin fyri at ættin hjá tí órættaða hevndi seg inn á ættina hjá tí, sum hevði framt órættin, varð tað í størri mun kravt av tí seka, at hann skuldi gjalda seg sakleysan við eini sekt.

Henda skipanin við sektum í staðin fyri blóðhevnd hevði tvær fortreytir. Fyri tað fyrsta noyddist ein semingsskipan at verða sett á stovn, sum hevði myndugleika til at áleggja tí seka at gjalda eina ávísa sekt, og í øðrum lagi noyddist tann seki at viðurkenna myndugleikan hjá semingsskipanini. Semjurnar skuldu tí vera almennar; tær skuldu binda partarnar yvirfyri hvørjum øðrum og yvirfyri uttanveltaðum pørtum. Tískil byrjaðu menn so smátt at møtast á almennum og óheftum støðum, til tess at finna loysnir á tílíkum trætum. So hvørt sum semjur vóru gjørdar, vaks fram ein rættarsiðvenja ella eitt lógargrundarlag, sum dømt varð út frá. Tann dømda sektin gjørdist so líðandi til almenna lóg.[14]

Á henda hátt vuksu *Fylkistingini* fram í Noregi í 5. øld – almennir stovnar, ið skuldu fyrisita og døma samsvarandi lógini. Tingini vóru størri almennar eindir, sum skuldu taka sær av nýggjum hættum at loysa ósemjur, nú tær smærru ættargrundaðu eindirnar vórðu afturúrsigldar av tí samfelagsligu menningini. Tingini vóru kortini ikki størri enn so, at upprunaliga kundu allir frælsir menn møta á ting í Noregi. Tey fyrstu norsku tingini vóru *Alting*, har beinleiðis umboðan var, og ikki *Umboðsmannating*, har einans nøkur umboð fyri bøndurnar høvdu rætt til at møta.

Móti endanum av 800-talinum var norska kongsvaldið við at koma fyri seg, samstundis sum gomlu og smærru ættarfelagsskapirnir vóru um at hvørva fullkomuliga. Harumframt byrjaðu tey smáu fylkistingini at vikna, og kongsvaldið fór undir at skipa tey í størri politiskar eindir, sum hóskaðu betri til teir størru samfelagsligu felagsskapirnar, sum byrjaðu at vaksa fram. Fleiri av teimum smáu fylkistingunum vóru løgd saman, soleiðis at tað einans vóru fýra høvuðsting í Noregi. Á Vesturlandinum var tað gamla tingið á Gulanum víðkað, og eitt nýtt *Gulating* var sett á stovn um 930. Hetta tingið kom at

fevna um alt Vesturlandið, og seinni eisini Suðurlandið. *Frostating* kom at fevna um alt økið á Tróndaløgum. Niðan á Upplondini og Eysturlandið rakk kongsvaldið í Noregi ikki, tí har høvdu smákongar gjørt seg sjálvstøðugar aftur, eftir at Haraldur Hárfagri var deyður í 931.[15] *Eiðsivatingið*, sum gjørdist tingið har, varð tí ikki stovnað fyrr enn seinni, einaferð í 1000-talinum. Í Víkini ella á leiðini kring Oslofjørðin høvdu danir valdið, og *Borgarting*, sum gjørdist tingið í Víkini, varð tí ikki til fyrr enn seinni.[16]

Hesar broytingar høvdu við sær, at tingini broyttust frá at vera sjálvstøðug alting, har allir frælsir menn høvdu rætt at møta og beinleiðis ávirka tingsins avgerðir, til at vera *Løgting*, har kongstilnevndir umboðsmenn vóru valdir til at sita og døma. Óivað var tað neyðugt, at tingini broyttust frá beinleiðis umboðan til óbeinleiðis umboðan, nú tingøkini vóru vorðin so stór, men samstundis hevði hetta við sær, at kongsvaldið fekk størri eftirlit við tingskipanini. Løgtingini og kongur avgjørdu í felag, at einans eitt ávíst tal av nevndarmonnum úr hvørjum fylki kundu sita á løgtingi, men tað var kongur ella kongsins umboðsmenn, sum tilnevndu nevndarmenninar, ið skuldu sita í løgtingunum. Kongsvaldið í Noregi gjørdist kortini ikki meira miðsavnað enn so, at tey fýra løgtingsøkini høvdu ymiskar løgbøkur at ganga eftir heilt upp til seinnu helvt av 13. øld. Talan var framvegis um sjálvstøðug løgdømir, sjálvt um kongsvaldið í 900- og 1000-talinum byrjaði at fáa ávirkan á, hvussu løgtingini vóru vald. Harumframt skuldu nevndarmenninir altíð vera bøndir, og einans teir kundu sita í løgrættini. Tað er helst rætt at siga, at við løgtingunum kom samstarv í lag millum bøndir og kongsvald, ið var til fyrimun fyri báðar partar. Kongsvaldið hevur helst fingið størri ávirkan á tingini, meðan bøndirnir hava fingið eina tryggari og regluligari skipan.

Nýggja kongstryggjaða tingskipanin við føstum reglum fyri vali av nevndarmonnum var neyvan til fyrimun fyri lokalar høvdingar og stórbøndur. Í øllum førum veit Føroyingasøga at siga, at tað var hendan byrjandi miðsavnanin av valdinum í Noregi undir Kongsvaldinum um ár 900, sum fekk nógvar norskar høvdingar at stinga í sekkin og fara sjóvegis vestureftir til tess at finna nýtt land. Umrøðan av føroyska landnáminum omanfyri vísti kortini, at tað helst hevur verið soleiðis, at

fyrstu norðbúgvarnir í Føroyum fóru úr Noregi longu um ár 800. Tað hevur tí helst verið ein altingsskipan, og ikki ein løgtingsskipan, sum hesi fólk høvdu við sær úr Noregi. Keltisku økini í bretsku oyggjunum, har norðbúgvar eisini nomu land um sama mundið, høvdu eisini altingsskipanir – t.d. í Orknoyum, Hetlandi[17] og Isle of Man. Seinni, tá kongsvaldið veruliga byrjaði at koma fyri seg í Noregi í tíðini stutt fyri 900, komu helst aðrir norskir niðursetumenn til Føroya, sum kendu løgtingsskipanina í Noregi, men hetta hevði neyvan nakra stórvegis ávirkan á føroysku altingsskipanina. Í fyrsta lagi hóskaði altingsskipanin helst betur til tey smáu føroysku viðurskiftini enn løgtingsskipanin, og í øðrum lagi knýttu hesi niðursetufólkini helst løgtingsskipanina at miðsavningarroyndunum hjá norska kongsvaldinum, sum tey vóru rýmd undan.

## Føroya alting frá umleið 800–1300

Flestu granskarar eru samdir um, at í nøkur 100 ár eftir búsetingina í Føroyum í byrjanini av 800-talinum var Føroyar eitt sjálvstøðugt land, sum stjórnaði sær sjálvum við egnum stjórnarstovnum. Sambært Føroyingasøgu góvu føroyingar seg undir norskan kong miðskeiðis í 11. øld, men Føroyar komu ikki veruliga undir norskt ríkisvald fyrr enn í 13. øld.[18] Í hesum tíðarskeiðinum, frá umleið 800 til 1300, høvdu føroyingar sítt egna ting, og tað kom ikki veruliga undir ávirkan uttanífrá fyrr enn seinast í 13. øld.

Tingið verður nevnt fleiri ferð í Føroyingasøgu; í samband við tingsetur verður tað nevnt 11 ferðir, fyrstu ferð er í samband við eina hending, sum skal hava gingið fyri seg um ár 970, og seinastu ferð í samband við hending, sum skal verða hend um ár 1029. Harumframt verður tingið nevnt tvær ferðir í øðrum sambandi.[19] Verður gingið út frá, at tingið kom saman eina ferð um árið, so eru 11 av 60 tingsetum í hesum tíðarskeiðinum nevndar í Føroyingasøgu. Veruliga talið er helst væl hægri, tí tingið varð eisini kallað saman millum vanligu tingseturnar í søguskeiðinum. Tað skal kortini viðmerkjast, at hóast tað ber til at seta rímuliga neyv árstøl á, nær tær einstøku tingseturnar skulu hava verið, so er helst nógv av tí søguliga innihaldinum í søguni vavt saman við viðurskiftum í 1200-talinum, tá søgan varð fest á blað. Samanumtikið ber til at

siga, at eitt rímuliga stórt heimildargrundarlag finst í Føroyingasøgu til tess at gera eina meting av tingviðurskiftum føroyinga í tíðarskeiðinum frá umleið 1000-1200.

Í fyrstu tingsetuni, sum nevnd verður í søguni, eru fleiri spjaddir upplýsingar um forna ting føroyinga. Søgan sigur, at Havgrímur í Suðuroy og brøðurnir Brestir og Beinir eru høvdingar yvir hvør síni helvt av Føroyum, sum teir ávíkavist skulu hava fingið í len frá norska konginum Haraldi Gráfeldi og jarlinum Hákuni Sjúrðasyni.[20] Einaferð kemur ein tænastumaður hjá Havgrími, ið varð nevndur Eldjarn Kambhatt, at sláa ein vinmann hjá Bresti og Beini við einum træi. Einar, sum hesin vinmaður var nevndur, hevndi seg, og slóg Eldjarn í høvdið við eini øks, soleiðis at hann fall í óvit. Einar fjalir seg nú hjá Bresti og Beini í Skúvoy, men Havgrímur vil hava uppreisn fyri Eldjarn, og hann spyr Brest og Bein, hvussu teir hava hugsað sær, at hetta kundi verið gjørt. Brestir og Beinir svara, at málið skal gevast yvir til „*teir bestu menn at døma*“, soleiðis at teir kunnu koma fram til eina rættvísa semju. Havgrímur avvísur hesi semingsroynd og sigur, at eingin semja verður teirra millum „*um ikki eg eina sleppi at ráða*“. So verður eingin semja, siga Brestir og Beinir. Endin verður, at Havgrímur stevnir Einari inn fyri „*Streymoyar-Ting*“ Har møtast so partarnir at royna semju, men eingin semja kemur burtur úr á tingi. Tvørturímóti eydnast tað Bresti og Beini at fáa Eldjarn dømdan eftir „*fornum landslógum*“ fyri at hava sligið sakleysan mann.[21] Havgrímur lovar nú hevnd, og seinni kemur tað til veruligt stríð millum høvdingarnar, og teir møtast í eini orrustu, sum tingið ikki hevur nakran leiklut í. Í hesu orrustu lata bæði Havgrímur, Brestir og Beinir lív.

Fleiri svar kunnu lesast burtur úr hesi søguni, har ting føroyinga fyrstu ferð verður nevnt í søguligum heimildum, men fleiri spurningar standa eisini ósvaraðir. Her skal, millum annað við støði í hesi frásøgn, verða gjørd ein roynd at viðgera nakrar av hesum spurningunum.

### Stovnsetanin av føroyska tinginum

Føroyingar, íslendingar og manbúgvar hava hvør í sínum lagi tvíhildið um, at teir eiga elsta ting í Europa, sum framvegis verður sett.

Tað er væl skjalprógvað, at íslendska Altingið varð sett á



Íslendska Altingið á Tingvøllum varð sett á stovn í árinum 930.

stovn á Tingvøllum í 930, og hetta er eisini tann dagur, sum íslendingar sjálvir meta seg eftir, tá teir hátíðarhalda stovnsetan Altingsins. T.d. hátíðarhildu íslendingar 1000 ára dagin fyri stovnsetan Altingsins í 1930. Tynwald tingið á Isle of Man var, sambært *Manx Søguni*, stovnað stutt eftir 914. Manx Søgan, sum eins og Føroyingasøga er fest á blað í 1200-talinum, hevur eisini tað til felags við Føroyingasøgu, at innihaldið er rættuliga hetju- og sagnkent. Týðandi munir eru kortini millum báðar søgurnar, tí meðan sjálv søgugongdin í Føroyingasøgu gongur aftur til umleið 940 og fevnir um fleiri ítøkiligar tingsetur í tíðarskeiðinum frá umleið ár 970 til 1029, so byrjar sjálv søgugongdin í Manx Søguni ikki fyrr enn við bardaganum á Stamford Bridge í 1066, tá søguhetjan Godfred Crovan, eftir at vera komin livandi frá bardaganum, fór undir eina langa hetjuferð, sum endaði á Man í 1079, har hann setti á stovn eitt kongsveldi.[22] Manx Søgan, sum eins og Føroyingasøga, er niðurskrivað langt eftir tær hendingar, sum verða umrøddar, er ikki nøkur álítandi kelda, men Føroyingasøga hevur tann fyrimun, at meir er at halda um, tá ræður um tíðina fyri ár 1000. Í øllum førum eru fleiri granskarar komnir til ta niðurstøðu, at hald er ikki í tí, sum Manx Søgan sigur um stovnsetanina av Tynwald, tí tingið á Isle of Man er helst ikki sett á stovn fyrr enn seinast í 970-unum.[23] Isle of Man búgvar

ganga eisini sjálvir út frá hesum granskingarúrslitum, tí í 1979 hátíðarhildu teir 1000 ára dagin fyri stovnanini av Tynwald.[24]

Føroyingar hava einki tílíkt árstal at halda seg til viðvíkjandi stovnan av føroyska tinginum, tí Føroyingasøga, tann einasta heimildin, sum sigur nakað um elstu føroysku tingviðurskiftini, nevnir einki beinleiðis um, nær tingið varð sett á stovn. Tað finnast kortini onkrar óbeinleiðis ábendingar um hendan spurningin í sjálvari søguni. Tað sær út til, at tingið hevur havt ein sjálvsagdan leiklut í føroyska samfelagnum í søgutíðarskeiðinum, tí nærum allar ósemjur høvdinganna millum í Føroyingasøgu koma fyri tingið, og tað er eisini líkt til, at tingsetur hava verið regluliga. Hetta kundi bent á, at í seinnu helvt av 900-talinum var altingsstovnurin í øllum førum ikki nýggjur. Hóast veikleikin í hesi tulking er, at hon ikki tekur hædd fyri tí veruleika, at søgan er niðurskrivað av fyrstan tíð í 1200-talinum, so ber til at siga, at tað er nakað í sjálvari søgugongdini, sum bendir á, at tingið hevur verið ein rótfestur stovnur í føroyska samfelagnum longu í seinnu helvt av 900-talinum, tá hendingarnar og tingseturnar í søguni verða sagdar at fara fram.

Hendan ábending í Føroyingasøgu um, at ting føroyinga varð stovnað væl fyri 970, tá fyrsta tingsetan í Føroyingasøgu verður søgd at hava verið, kann grundast betri, um samanborið verður við íslendsk viðurskifti. Um so er, at hald er í tí, at norðbúgvar búsettust í Føroyum stutt eftir 800, meðan teir búsettust í Íslandi ikki fyrr enn um ár 873, so er tað ræ̈ttuliga sannlíkt, at føroyska tingið er væl eldri enn íslendska Altingið, sum gongur aftur til 930. Omanfyri nevndu granskarar, sum halda uppá, at Tynwald tingið á Isle of Man ikki gongur longur aftur enn til 979, hava tí nakað at halda um, tá teir koma til ta niðurstøðu, at føroyska tingið er besta boðið uppá heiðurin sum elsta ting í Europa. Nakað kundi bent á, at teir hava rætt, hóast tað ikki finnast nakrar skrivligar heimildir, sum styðja undir hesa niðurstøðu.

Ein varislig niðurstøða kann gerast. Sannlíkindini tala fyri, at føroyska tingið er væl eldri enn íslendska Altingið. Heldur henda niðurstøðan, so er føroyska tingið eisini eldri enn Tynwald tingið á Isle of Man, sum sambært fleiri granskarum ikki var stovnað fyrr enn eftir 970. Vóru Føroyar bygdar um ár 800, so skulu vit neyvan inn í 10. øld, áðrenn eitt meginting

varð sett á stovn í oyggjunum.* Ímóti hesi niðurstøðu kann sigast, at um so var, at norðbúgvar komu til Isle of Man, áðrenn teir komu til Føroya – og tað er tað nakað, sum bendir á, t.d. ástøðin um, at Grímur Kamban skal vera føddur á oynni – so kann tað tykjast eitt sindur løgi, at føroyska tingið skal vera eldri enn Tynwald. Ástøðin um, at Grímur Kamban varð føddur á Man, er kortini ikki serliga sterk, tí vanliga verða tey fyrstu norrønu ránini á oynni ikki hildin at ganga longur aftur enn til um ár 800.[25] Sjálv búsetingin er helst nakað yngri.

**Tingstaður og tingseta**

Søgan um Havgrím og skúvoyarbrøðurnar sigur okkum, eins og fleiri aðrar hendingar í Føroyingasøgu, at ting føroyinga lá á Streymoynni. Aðrastaðni í søguni verður beinleiðis sipað til tingið í Tórshavn.[26] Fyrsta meginting føroyinga hevur helst verið Tórshavn, og helst hevur tað eisini ligið úti á Tinganesi.[27] Hóast einki beinleiðis verður sagt um, hvar tingstaðurin lá, so verður einastaðni nevnt, at tá eitt skipafylgi var komið úr Noregi og hevði lagt seg í Tórshavn á Streymoynni, varð stevnt til ting har.[28] Tætt samband kann tí hugsast at hava verið millum tingið og keypstaðin, og tað kundi bent á, at tingstaðurin lá niðri við sjóvarmálan – úti á Tinganesi. Hartil kemur, at tað var vanligt millum germansk fólkasløg, at tinghald var tætt við vatn.[29] Norsku tingini Gulating og Frostating lógu eisini við sjóvarmálan.

Í germanskum og norrønum høpi var tingstaðurin sum oftast lagdur á óheftum stað. Hetta var óivað ein av grundunum til, at tey norsku tingini Gulating og Frostating vóru løgd langt burtur frá bygdum øki. Hetta var ikki øðrvísi í Føroyum: Tórshavn lá miðskeiðis í landinum, staðið var óbygt, og eingin høvdingur hevði nakran fyrimun av, at tingið savnaðist har.[30] Sannlíkt er tí, at megintingstaðurin í Tórshavn upprunaliga varð valdur av bøndum ella høvdingum av landafrøðiligum og politiskum grundum: staðið var politiskt óheft og landafrøðiliga lá tað væl fyri miðskeiðis í landinum. Sambært hesi fatan var tað tingið, sum at byrja við varð lagt á einum óbygdum og óheftum stað, ið dróg keypstaðin til sín,

* Sí t.d. Trap 1968, síðu 211, har stovnanin av tinginum verður sett til um ár 900, og Madsen 1999, síðu 10, har stovnanin verður sett at vera nakað undan 900



Sólur vórðu rist í Tinganeshelluna, so tingmenn kundu halda skil á, nær ting skuldi haldast.

ikki umvent. Hendan niðurstøðan verður styðjað av tí veruleika, at heimatingið í Streymoynni allar tíðir hevur ligið í Kollafirði. Tað hevur tí neyvan verið soleiðis, at megintingið í Tórshavn er vaksið burtur úr einum heimatingi, sum var har frammanundan. Sannlíkari er, at tingstaðurin í Tórshavn varð valdur, tí staðið var tað mest óhefta, ið fanst í Føroyum.

Tingið varð sambært Føroyingasøgu sett undir opnum himli í Tórshavn, og tingbúðir og tjøld vóru reist á økinum, meðan tingsetan var.[31] Tingsetan vardi í minsta lagi ein dag.[32] Í aðra mátar sigur søgan nærum einki um, hvussu tingið var sett, men navnið Tórshavn kundi bent á, at ein átrúnaðarligur halgidómur fyri gudinum Tór hevur verið á staðnum. Sambært

germanskari siðvenju vóru átrúnaðarlig hov og ting tvey fyribrigdi, sum hoyrdu saman, og tað er tí sannlíkt, at tingið í fyrstuni hevur verið ein átrúnaðarligur halgidómur fyri gudinum Tór.[33] Í samsvar við germanska siðvenju varð tingfriður lýstur, tá tingið var sett, og vanligur tingdagur í norskt bygdum økjum var hósdagur. Sannlíkt er, at soleiðis hevur eisini verið í Føroyum. Hetta seinna verður styðjað av tí sannroynd, at føroyski tingstaðurin hevur fingið navn eftir norrøna gudinum Tór, sum hevur navngivið hósdagin (tórsdagin).

Tey norrønu tingini komu vanliga saman á jóansøku, meðan føroyska tingið sum tað einasta kom saman á ólavsøku. Spurningurin er tí, um føroyska tingið altíð er komið saman á ólavsøku, ella um hesin serstaki tingsiður føroyinga er komin seinni. Einki nágreiniligt verður sagt um hetta í Føroyingasøgu, men í 3 av teimum 11 tingsetunum, sum nevndar eru í søguni, verður sagt, at tingið kom saman um várið, og í einum føri verður sagt, at tað hendi um summarið. Tað er tí nakað sum bendir á, at upprunaliga er tingið ikki komið saman so seint á sumri sum á ólavsøku, men heldur kann hugsast, at tingið at byrja við er komið saman fyrr um summarið, í juni mánaði, eins og vanligt var í øðrum norrønum tingum. Henda niðurstøða verður styðjað av tí, sum áður er sagt um, at tað føroyska tingið upprunaliga var knýtt at tí heidna norrøna gudinum Tór. Í øllum førum kann tað ikki hava verið fyrr enn væl eftir deyða Ólav Halga í 1030, at ting føroyinga varð knýtt at ólavsøkuni, ið varð hildin til minnis um hetta kristna halgimennið.

Sannlíkt er, at øll tingsiðvenjan varð broytt, tá kristindómurin byrjaði at fáa ávirkan í Føroyum um ár 1000. Hugsast kann, at tingsetan varð flutt frá jóansøkuni til ólavsøkuna einaferð í tíðarbilinum millum 1100-1200. Hendan niðurstøða verður styðjað av *Seyðabrævinum* frá 1298, tí av tí framgongur, at tá var ólavsøkutingsetan ikki heilt nýggj.[34] Nakað kundi tí bent á, at føroyska tingið, sum upprunaliga helst kom saman á jóansøku, eins og onnur norrøn ting, byrjaði at koma saman á ólavsøku einastaðni í tíðarbilinum millum umleið 1100 og nakað fyri 1298, tá Seyðabrævið varð givið føroyingum.

### Heimating og meginting

Í Tórshavn var meginting Føroya, men kring landið vóru



Heimatingið í Norðuroyggjum varð hildið í Køtlum omanfyri Árnafjørð. Steinar, sum helst hava verið nýttir sum tingborð og sessir, síggjast enn tann dag í dag.

heimating, várting og heystting, hildin, har menn møttust at tingast um viðurskifti, sum hoyrdu til tey einstøku økini í Føroyum.

Í sambandi við megintingið í Tórshavn vóru heimatingini undirdómstólar, meðan Tórshavnar tingið var yvirrætturin, sum hartil tók sær av øllum viðurskiftum og lóggávu, sum høvdu týdning fyri alt landið. Eingin veit við vissu, hvussu nógv heimatingini upprunaliga vóru, men hópurin av staðarnøvnum miðskeiðis millum bygdir í Føroyum benda á, at ting hava verið hildin har einaferð. Dømi um tílík staðarnøvn eru hesi; í Norðuroyggjum, í Køtlum, omanfyri Árnafjørð; í Eysturoy, Tingfløtan omanfyri Gøtuvík og heyggurin Stevnuválur, sum liggur millum Fjarða; í Suðuroy, Uppi millum Stovur, millum Øravík og Vág; í Sandoy, í Trøðum; í Streymoy, á Kjalnesi; í Vágunum, við dómstólar i Kvíandali í Miðvági.[35] Summi eru betur grundaði enn onnur. Í Køtlum hevur við vissu verið hildið ting, tí har sæst framvegis, hvussu tingfólk hava sitið. Steinarnir eru heilt týðiliga settir av mannahond. Stevnuválur í Eysturoynni er dømi um tingstað, ið einans er kendur úr sagnatilfari. Fleiri tingstøð enn hesi hava uttan iva verið, og lítið er at ivast í, at skift hevur verið millum ymisk støð eisini.

Sannlíkt er, at heimatingini eru eins gomul ella eldri enn høvuðstingið í Tórshavn. Íslendsku heimatingini vóru eldri enn meginting Íslands á Tingvøllum, og tað sama gjørdi seg galdandi í Noregi, har føroysku landnámsmenninir komu frá í tíðini, áðrenn tey stóru tingini vóru sett á stovn. Tað var ikki fyrr enn ættin byrjaði at missa týdning sum samleikaskapandi eind, og ríkisvaldið byrjaði at vaksa fram um ár 900, at tey størru megintingini vunnu frama í Noregi. Tað er væl hugsandi, at soleiðis hevur eisini verið í Føroyum. Stovnanin av megintinginum í Tórshavn eigur helst at síggjast sum eitt tekin um, at upprunaliga býtið frá landnámstíðini í sjálvstøðugar høvdingaættir við egnum tingum var í ferð við at fara í upploysn og gerast partur av eini størri megintingsskipan. Um blóðhevnd, eins og í Noregi, hevur verið partur av tí upprunaligu skipanini, har sjálvstøðugar høvdingaættir helst hava havt sítt egna ting, veit eingin. Heldur ikki ber til nágreiniliga at siga, nær tær sjálvstøðugu høvdingaættirnar eru vorðnar partur av eini størri megintingsskipan, men hugsast kann, at hetta er hent nakað undan ár 900, tá megintingið í Tórshavn eftir øllum at døma varð sett á stovn.

Heimatingini eru ikki nevnd í Føroyingasøgu, men hetta merkir helst ikki, at tey ikki hava verið til í søgutíðarskeiðinum. Grundin til, at tey ikki eru nevnd, er óivað heldur tann, at ósemjur millum høvdingar, sum er høvuðsevnið í Føroyingasøgu, ikki hava verða viðgjørdar á heimatingunum, men einans á megintinginum í Tórshavn. Við vissu ber til at siga, at tá heimatingini verða nevnd í søguligum heimildum um ár 1300, eru tey longu gomul,[36] men tað er bæði møguligt og sannlíkt, at heimatingini eru nærum eins gomul og landnámið. Ongar heimildir eru kortini, sum stuðla hesa fatan.

### Altingið og høvdingasamfelagið

Føroyska samfelagið í 1000–1200-talinum var eitt høvdingasamfelag, har tann minni menti maðurin einans kundu verja seg og síni við at styðja seg at einum høvdingi. Hetta høvdingastýrið hevur kortini verið avmarkað av eini altingsskipan, ið hevur ásett reglur fyri, hvussu trupulleikar og trætur áttu at loysast.

Søgan um Einar og Eldjarn er eitt ítøkiligt dømi um, hvussu hetta samfelagið og tingskipanin hava virkað. Stríðið millum

teir báðar smámenninar verður skjótt til eitt stríð um hevnd og uppreisn millum høvdingarnar Brest og Bein á aðrari síðuni og Havgrím á hinari síðuni. Í hesum samanhangi kann vera spurt, hvønn leiklut tingið hevði í føroyska samfelagnum í hesum tíðarskeiðinum. Spurningurin er, um tingið hevur verið ein samfelagsstovnur, sum hevur verið mentur at givið tí minni menta føroyinginum nakra munagóða verju mótvegis valdi høvdinganna, ella um hesin stovnur í høvuðsheitum hevur verið eitt hent amboð hjá høvdingunum í Føroyum til tess at røkja egin áhugamál. Nógv í sjálvari søguni bendir á tað seinna: at tingið í høvuðsheitum hevur verið ein miðil hjá høvdingunum til at verja sína æru og áhugamál mótvegis øðrum høvdingum. Hetta sæst eisini av tí, at høvdingarnir altíð møttu við einum væl vápnaðum fylgi á tingi.[37]

Kortini hevur tann vanligi føroyingurin helst havt ein ávísan týdning fyri tingsins virksemi, tí fyrsta ting føroyinga var eftir øllum at døma eitt alting eftir fornum norskum mynstri. Hesin stovnur var helst skipaður á tann hátt, at allir „frælsir menn“ kundu møta fyri at loysa ósemjur og samráðast um felagsviðurskifti landsins.[38] Føroyingasøga nýtir einans orðið ting, men av samanhanginum gerst tað sannlíkt, at talan hevur verið um eitt alting. Sagt verður, at hvørja ferð tingið kom saman, møtti stór fjøld av fólki. Hartil kemur, at altingsskipanir vóru í gildi í Noregi í 800-talinum, tá fyrstu føroysku niðursetumenninir fóru haðani. Hugsast kann eisini, at fólkatalið í Føroyum hevur verið so mikið lítið, at altingsskipanin hevur hóskað betur enn ein umboðsmannaskipan. At talan var um eitt alting, verður eisini styðjað av Seyðabrævinum frá 1298, har forna ting føroyinga beinleiðis verður nevnt alting.[39]

Ein altingsskipan kann í sjálvum sær tykjast fólkaræðislig, men onkur brek hava verið við henni, um vit seta hana inn í føroyska samfelagið í 1000–1200-talinum. Neyvan hevur tað verið ein sjálvfylgja at verða føddur sum „frælsur maður“ í Føroyum um ár 1000. Einki beinleiðis verður nevnt um trælahald í Føroyum í Føroyingasøgu, men vanligt var at halda trælir í øllum tí norrøna heiminum í hesum tíðarskeiðinum, og soleiðis man eisini hava verið í Føroyum.[40] Í Íslandi varð trælahaldið avtikið um ár 1100[41] og tað hevur verið nevnt, at tað sama hendi í Føroyum um ár 1200.[42] Hvussu stórt talið av trælum man hava verið, veit eingin, men hvørki trælir ella

kvinnur hava havt atgongd til tingið. Hesir báðir samfelagsbólkarnir komu ikki inn undir hugtakið „frælsir menn“, og teir vóru tí útihýstir frá luttøku í politiska lívinum. Hartil er sannlíkt, at ein ávís ogn eisini hevur verið ein treyt fyri at fáa rætt til at møta á Føroya tingi,[43] eins og í Íslandi.[44]

Høvdingaræðið var neyvan fullkomið. Fleiri staðni í Føroyingasøgu verður nevnt, at høvdingarnir høvdu stóra fjøld við sær á ting.[45] Tað hevði helst stóran týdning fyri høvdingarnar, at teir høvdu so stórt tal av fólki við sær sum møguligt, tá farið varð til altings. Tann vanligi frælsi maðurin, sum hevði atkvøðurætt á tingi, hevði óivað ein ávísan týdning fyri høvdingarnar, men hinvegin var hann helst gjøgnum jarðarviðurskifti bundin at áhugamálum og meiningum hjá sínum høvdingi. Hugsast kann, at í meginregluni hevði hvør frælsur maður rætt til at siga og meina tað, hann vildi, men í veruleikanum var hann bundin at sínum høvdingi. Hvussu avgerðir annars vóru tiknar á altinginum, hvussu og nær atkvøtt varð, sigur Føroyingasøga einki um.

Umframt at taka sær av innlendis viðurskiftum í Føroyum og at virka sum dómstólur, hevur tingið tikið sær av viðurskiftum føroyinga við umheimin. Hetta sæst í Føroyingasøgu av tí, at tá norskir kongar royndu at krevja skatt frá føroyingum, so varð hetta lagt fyri tingið. Norski kongurin sendi eisini boð eftir umboðum fyri tingið, tá samráðast skuldi um ymisk viðurskifti Føroya og Noregs millum.

### Altingsskipan og dómsnevndir

Fleiri staðni í Føroyingasøgu verður sipað til ein annan semingsstovn, sum ikki kann hava verið eitt alting. Hetta framgongur eisini av tí, sum frammanfyri er sagt um ósemjuna millum Havgrím á aðrari síðuni og Brest og Bein á hinari síðuni. Tann fyrsta loysnin, sum Brestir og Beinir peika á, er ikki at leggja trætuna fyri Streymoyar ting, men at lata „teir bestu menn døma“ teirra millum. Hetta verður avvíst av Havgrími, og tí stevnir hann Einar inn fyri Streymoyar ting.

Fýra ferðir í Føroyingasøgu verður tilboðið um at lata „teir bestu menn døma“ sett fram av øðrum partinum í eini trætu. Fyrsta dømið hava vit longu nevnt. Aðru ferð er tað Øssur, sonur Havgrím, sum setur fram hetta tilboðið, eftir at Sigmundur hevur gjørt seg inn á hann í Skúvoy. Triðju ferð er tað



Allar útgávur av Føroyingasøgu hava tikið støði í „Flateyarbók“.

Tróndur í Gøtu, sum vegna Leiv Øssurson setur hetta tilboðið fram fyri Sigmund. Sigmundur hevur dripið faðir Leiv, Øssur, og hann verður tí kravdur at gjalda sekt fyri hesa gerð. Fjórðu ferð hetta tilboðið verður sett fram, er eftir deyða Sigmundar. Í hesum føri er tað aftur Tróndur, sum setur semingstilboðið fram, men nú fyri einkjuna eftir Sigmund, Turid. Í øllum fýra førum verður tilboðið um at lata „teir bestu menn døma“ avvíst av mótpartinum,[46] og ósemjurnar koma tískil fyri Streymoyar ting.

Av tí at orðingin „teir bestu menn døma“ kemur fyri fýra ferðir í Føroyingasøgu, ber ikki til at kveistra hana burtur við

teirri grundgeving, at talan er um eina tilvildarliga orðing, sum ongan týdning hevur. Spurningurin er heldur, hvat beinleiðis liggur í orðingini. Fyri tað fyrsta er spurningurin, hvørjir hesir „bestu menn" í Føroyum eru, og í øðrum lagi kann tað tykjast løgið, at tað verður hildið at vera betur at lata „allar frælsar menn" í Føroyum døma, heldur enn einans „teir bestu".

Gangast má út frá, at Føroyar í tíðarskeiðinum 1000-1200 umframt altingsstovnin hava havt ein semingstovn av onkrum slag, kanska ein stovn undir altinginum, men helst hevur talan verið um eina nevnd, sum partarnir í eini ósemju sjálvir hava valt til at døma í einstøkum málum.[47] Seinni, tá Løgtingið verður sett á stovn um ár 1300, verður tosað um teir kosnu menn, sum sita innan girðingina (vebanda), og almúguna, sum stendur uttanvert girðingina. Tað er væl hugsandi at girðingin millum nakrar útvaldar menn og fjøldina, sum er til staðar í løgtingsskipanini, hevur røtur aftur til altingstíðina. Hvussu reglurnar í hesum báðum samkomunum hava verið á Løgtingi, verður nærri komið inn á seinni, men longu í altingstíðini hava ymiskar reglur verið galdandi fyri hesar báðar semingsstovnarnar. Av Føroyingasøgu framgongur, at semja skuldi vera millum báðar partarnar í ósemjuni, um trætan skuldi kunna leggjast fyri „teir bestu menn at døma", meðan annar parturin hevði rætt til at stevna hin inn fyri altingið. Hetta merkir helst, at um partarnir í eini ósemju hava valt eina nevnd av „bestu monnum at døma" teirra millum, so hava teir fyri tað fyrsta givið málið upp í aðrar hendur, og í øðrum lagi hava teir bundið seg til at virða tann dóm, sum sagdur varð av nevndini.

Hesar reglur geva okkum eina ábending um, hvussu veikur hesin stovnur av kosnum monnum hevur verið. Uttan semju millum høvdingarnar hevur ikki verið møguligt at dømt í ósemjum teirra millum. Hetta kann eisini vera grundin til, at flestu ósemjurnar millum høvdingarnar í Føroyingasøgu koma fyri sjálvt megintingið. Høvdingarnir hava ikki viljað latið dómsmyndugleika í egnum viðurskiftum frá sær til aðrar, men teir hava sjálvir vilja loyst sínar ósemjur. Hetta kann eisini liggja í svarinum hjá Havgrími til tilboðið frá Bresti og Beini um at lata „teir bestu menn døma": at eingin semja verður „um ikki eg eina sleppi at ráa". Havgrímur vildi ikki geva seg undir nakran dóm hjá óheftari dómsnevnd, ið hann onga

ávirkan hevði á, men hann vildi sjálvur syrgja fyri, at fáa treytaleysa uppreisn og hevnd. Hetta hevur hann havt møguleika fyri á altingi, har hann sjálvur kundi møta við so stórum fylgi av trúgvum og alvápnaðum monnum, sum hann var mentur at savna saman, har hann sjálvur kundi føra sína sak, og har hann ígjøgnum beinleiðis altingsatkvøðugreiðslu hevur kunnað ávirkað endaligu avgerðina. Í tílíkum førum kann hugsast, at høvdingarnir hava kent seg tryggari á altingi, har teir ikki hava bundið seg at nakrari ávísari nevnd, men tvørturímóti hava teir kunnað víst sína styrki við stórum fylgi av handgingnum monnum, ið flest allir vóru alvápnaðir.

Samanumtikið kann sigast, at dómsnevndirnar vóru veikar, tí tær kundu ikki døma uttan so, at partarnir í eini ósemju vóru samdir um at lata tær døma, meðan altingsskipanin var veik, tí høvdingarnir høvdu ov stóra ávirkan á dómsviðgerðina. Hetta seinna var helst grundin til, at høvdingarnir sum oftast valdu altingsskipanina.

**Løgsøgumaðurin**

Í samband við tríggjar tær seinastu tingseturnar í Føroyingasøgu verður ein Gilli *Løgsøgumaður* nevndur,[48] men einki verður sagt um, hvør hann er, ella hvat heitið løgsøgumaður sipar til. Verður hugt eftir samanhanginum í søguni, er hann mest at samanlíkna við ein av teimum føroysku høvdingunum, sum møta á tingi við alvápnaðum fylgi.[49] Einastaðni er hann beinleiðis partur av eini orrustu á tingi, har ein av hansara monnum verður dripin. Tó sæst, at Gilli hevur verið ein hátt virdur maður, tí hann er millum teirra, sum Ólavur Halgi boðsendur at koma til Noregs at samráðast í 1024.[50] Meira verður ikki sagt um løgsøgumannin í Føroyingasøgu, og ongar aðrar heimildir siga nakað um hetta fyribrigdið í Føroyum.

Heitið løgsøgumaður er betri kent aðrastaðni, eitt nú í Íslandi, har Føroyingasøga er skrivað. Íslendska heitið sipar til altingsformannin, sum hevði til uppgávu at „*siga fram lógina*“.[51] Løgsøgumaðurin skuldi ikki døma á Altingi, men hann skuldi siga lógina fram á tingi eftir minninum, soleiðis at teir, sum døma skuldu á Altingi, vistu, hvørjum dømast skuldi eftir. Løgsøgumaðurin varð valdur fyri 3 ár í senn av íslendsku stórbóndunum (Goðunum).

Tað er ikki óhugsandi, at íslendski „høvundurin“ av Føroy-




Tingið er savnað á Tinganesi. Á myndini verður Leivur Øssursson biðin um at fara yvir í tjaldið hjá Gilla løgsøgumanni.

ingasøgu tilvitað hevur sett íslendska heitið løgsøgumaður inn í eitt føroyskt høpi, har tað ikki hoyrir heima, tá søgan er vorðin fortald fyri einum íslendskum lurtaraskara. Fyrr er víst á, at „rithøvundurin" hevur tikið orð og hugtøk, sum vóru kend í hansara samtíðarumhvørvi í 1200-talinum, – eitt nú orðini len og sýslumaður – og flutt tey inn í søguna, sjálvt um tey ikki vóru kend í norrønum høpi í søgutíðarskeiðinum. Tað sama kann vera hent við „íslendska løgsøgumanninum". Ein annar møguleiki er, at føroyska løgmansembætið, sum varð sett á stovn seinni, hevur røtur í einum eldri „føroyskum løgsøgumanni". Spurningurin er, hvør grundin hjá „rithøvundanum" skuldi verið til at sett ein íslendskan løgsøgumann inn í Føroyingasøgu, tí „Gilli løgsøgumaður" hevur ikki ein so týðandi leiklut í søguni, at hann er neyðugur fyri samanhangin. Hetta sæst t.d. av, at tað ongantíð verður gjørt greitt fyri lesaranum, hvør týdningurin av orðinum løgsøgumaður er. Tað skuldi tí ikki verið nøkur frásøguliga grundað orsøk hjá høvundanum at tillaga heitið á Gilla til íslendsk viðurskifti. Tað kann líka so væl hugsast, at Føroyingasøga sigur satt

viðvíkjandi tí føroyska løgsøgumanninum. Hetta verður styðja av tí, at løgsøgumaður eisini hevur verið brúktur í Noregi og Svøríki og í Danmark í eldri tíð.[52] Tað skuldi verið løgið, um hann ikki eisini var partur av føroysku altingsskipanini.

Rættast man vera at ganga út frá, at føroyska løgmansembætið hevur røtur í norrønari rættarsiðvenju, har løgsøgumaðurin hevur verið brúktur til at siga lógina fram, í einum samfelag, har hvørki skrivikynstrið ella lesikynstrið var kent. Á henda hátt er løgsøgumaðurin komin inn í íslendsku tingskipanina, men har misti hann sín týdning longu í 11. øld, tá íslendingar lærdu at lesa og skriva. Íslendska løgmansembætið stavar frá 1271.[53] Tað sama kann hugsast at vera hent í Føroyum, tá føroysku lógirnar vórðu niðurskrivaðar. Føroyska løgmansembætið stavar eftir øllum at døma eisini frá seinast í 1200-talinum.

### Heimildargrundarlag altingsins

Hóast Føroyingasøga veit at siga frá, at Ólavur Halgi longu í níggjunda stjórnarári sínum, t.v.s. í 1024, bæði setti lógir í gildi í Føroyum og kravdi skatt frá føroyingum,[54] so verður vanliga gingið út frá, at føroyska tingið hevði lóggevandi og dømandi myndugleika í 1000-1200 talinum,[55] eins og íslendska Altingið.[56] Nakað kundi bent á, at rithøvundurin, sum skrivaði í 1200-talinum, flytir viðurskifti, sum vóru galdandi millum Føroyar og Noreg í samtíð síni, aftur í søgutíðarskeiðið. Í øllum førum eru eingi tekin um, at norskir kongar veruliga fóru undir at seta norskar løgskipanir, rættarskipanir og lógir í gildi í Føroyum fyrr enn í 13. øld.[57] Føroyingasøga kann kortini hava rætt í tí, at Ólavur Halgi royndi at krevja skatt frá føroyingum longu í 1024, men neyvan hevur talan verið um regluliga skattainnkrevjing. Tað er heldur einki løgi í tí, at norski kongurin kravdi skatt frá føroyingum, samstundis sum føroyska tingið hevði bæði tann lóggevandi og tann dømandi myndugleikan um hendi, tí tegnskylda og skattskylda fylgdust ikki altíð at í miðøld.[58] Í heila tikið var statsrætturin, sum í dag verður nýttur til at skilmarka tann óavmarkaða yvirvaldsrætt, sum stjórnarstovnarnir í einum ríki hava yvir *innanhýsis* viðurskiftum í einum ríki, ikki skiltur burturúr fólkarættinum, sum snýr seg um viðurskifti *millum* ríki, sum hava yvirvaldsrætt. Eingin andsøgn er tí millum lóggevandi og dømandi yvirvalds-



Tróndur í Gøtu situr á tingi. Myndin er úr útgávuni av Føroyingasøgu frá 1904.

rætt altingsins í Føroyum, og ein møguligan skattamyndugleika, sum norski kongurin hevði í Føroyum longu í 11. øld.

Hartil kemur, at hóast eingin lóg verður samtykt á tingi í Føroyingasøgu, so framgongur tað av samanhanginum í søguni, at tingið hevði lóggevandi myndugleika í Føroyum. Tað verður t.d. ikki sett spurnartekin við, at kristindómurin skal setast í gildi í Føroyum við samtykt á tingi. Einastaðni vísir Tróndur í Gøtu beinleiðis á, at tað átti at verið samtykt ein lóg, sum bannaði, at menn komu vápnaðir á ting. Søgan sigur einki um, hvørt hendan lógin nakrantíð kom í gildi, men nevnt verður, at mótstøða var ímóti at seta eina tílíka lóg í gildi. Gilli løgsøgumaður helt, at nakrir fáir handgingnir menn, sum vóru í fylginum hjá høvdingunum, áttu at sleppa at bera vápn á tingi, men hann var samdur við Trónda í tí, at almúgan skuldi ikki hava loyvi til at bera vápn á tingi. Grundgevingin hjá Gilla var tann, at hann ikki hevði álit á Tróndi.[59] Sjálvt um henda søgan, um hon er sonn, helst hevur røtur í politiskum snildi høvdinganna millum í Føroyum, so bendir hon á, at tingið hevur havt lóggevandi myndugleika. Tað hevur eisini

verið víst á, at tað var tingið, sum um ár 1200 gjørdi tað ólógligt at halda trælir í Føroyum.[60]

Annar spurningur er, um nakrar yvirskipaðar løgskipanir hava verið í gildi í Føroyum, sum tingið hevur virkað undir. Nakað kundi bent á tað, tí í trætuni millum Havgrím og skúvoyarbrøðurnar, sum er nevnd í Føroyingasøgu, verður víst til „fornu landslógirnar“,[61] sum Eldjarn verður dømdur eftir á tingi. Einki verður nevnt um hvørjar hesar fornu landslógirnar vóru, men Brestir kendi tær, tí tað er hann, sum á tingi vísti á, at lógin var brotin av Eldjarni. Uttan iva hava Gilli løgsøgumaður og tann sambært Føroyingasøgu lógarkøni Tróndur í Gøtu eisini kent hesar lógir. Torført er at siga nakað við vissu um hesar lógir, men nakað kundi bent á, at tingið hevur virkað undir serstøkum føroyskum løgskipanum í altingstíðarskeiðinum.

Henda niðurstøðan verður styðjað av, at tað finnast greiðar ábendingar um, at føroyingar, áðrenn norskir kongar í 13. øld fóru at seta norskar løgskipanir í gildi í Føroyum, hava havt sína egnu lógbók. Í *Rættarbót Magnus Lógbøtara*, sum varð sett í gildi í Føroyum fyrst í 1270-unum, verður nevnt, at búnaðarbólkurin í „*bók tykkara sjálvs*“ framvegis skal vera galdandi í Føroyum.[62] Henda føroyska lógbók, sum sipað verður til í Rættarbótini, er burturblivin, men tað er væl hugsandi, at talan er um somu fornu lógina, sum nevnd verður í Føroyingasøgu. Ilt er at siga nakað um, hvørjar hesar lógir hava verið, men hugsast kann, at talan hevur verið um eina útgávu av *Gomlu Gulatingslógini*, sum var í gildi í øllum Gulatingsøkinum í Noregi frá umleið 930 og til 1270. Ein útgáva av hesi lóg var í gildi í Íslandi frá umleið 930 til 1271.[63] Sannlíkt er, at henda lógin eisini varð nýtt sum fyrimynd í Føroyum. Hugsast kann, at lógin er komin til Føroya við landnámsmonnunum í 900-talinum, síðan er hon varðveitt og tillagað til føroysk viðurskifti gjøgnum løgsøgumannin, og seinni er hon niðurskrivað í eina føroyska lógbók. Nær hetta kann hugsast at vera hent í Føroyum, veit eingin, men tann íslendska útgávan av Gulatingslógini varð niðurskrivað í lógbókina *Grágás* í 1117 og 1118, sum er varðveitt í handritum frá seinnu helvt av 1200-talinum.[64] Í Føroyum er sum nevnt eingin tílík løgbók varðveitt, men víst verður til hana fyrst í 1270-unum.

Hóast norska Gulatingslógin var nýtt sum fyrimynd í Ís-

landi, og helst eisini í Føroyum, so merkir hetta ikki, at hesi økini vóru samanrunnin við eitt av teimum norsku løgdømunum í tíðarskeiðinum undan 1200. Tað er meira sannlíkt, at fornu landslógirnar, sum víst verður til í Føroyingasøgu, vóru settar í gildi í Føroyum av føroyska tinginum, hóast tær vóru av norskum uppruna. Í Noregi høvdu tey fýra stóru løgdømini hvør sína sjálvstøðuga lógbók, og í Íslandi var Gulatingslógin sett í gildi av íslendska Altinginum, ikki av norskum kongi. Alt bendir á, at soleiðis hevur eisini verið í Føroyum. Føroyar hava helst verið eitt sjálvstøðugt løgdømi stjórnaðar við egnum stjórnarstovnum við støði í serstakari føroyskari lógbók til langt inn í 13. øld.

**Altingsræði ella høvdingaræði**

Í fleiri 100 ár eftir norrøna landnámið í 800-talinum, hava skipað politisk viðurskifti verið í Føroyum, sum umfataðu bæði eitt alting, heimating og settar dómsnevndir ella stovnar, sum skuldu taka sær av samfelagsligum viðurskiftum og ósemjum millum manna. Harumframt hava landslógir verið í gildi í landinum og ein løgsøgumaður til at siga upp lógina. Seinni er sjálvstøðug lógbók tikin í brúk í Føroyum. Í hesum tíðarskeiðinum vóru Føroyar eitt sjálvstøðugt løgdømi, á sama hátt sum tey norsku tingini í 800-talinum vóru tað, tá landnámsmenninir av fyrstan tíð fóru haðani. Alt bendir á, at Føroyar í tíðarskeiðinum 1000-1200 hava verið stjórnaðar av egnum stjórnarstovnum, sum bæði hava havt lóggevandi og dømandi myndugleika.

Rótfestu stjórnarstovnarnir hava í meginregluni havt vald til at hevda rættindini hjá øllum „frælsum“ føroyingum, men veruleikin hevur helst verið eitt sindur meira fjølbroyttur. Við støði í Føroyingasøgu kann staðfestast, at valdið hjá altingsstovninum var treytað av viljanum hjá høvdingunum til at finna semjur og loysnir. Tóku høvdingarnir ikki undir við tingsins avgerðum, so hevði tingið eingi amboð, sum kundu brúkast til at fáa høvdingarnar at geva seg undir tingsins vilja. Verður Føroyingasøga tikin í álvara, so kom tað heldur ikki so sjáldan fyri, at høvdingarnir annaðhvørt ikki virdu tingið ella ikki mettu, at stovnar tess kundu loysa ósemjur teirra millum á ein haldgóðan hátt. Flestu træturnar høvdinganna millum í Føroyingasøgu komu fyrst fyri tingið, men ofta eydnaðist ikki

at finna nakra semju har. Har tað eydnaðist at finna semju, var grundin ofta tann, at hótt varð við beinleiðis valdsnýtslu. Bert í einum føri verður beinleiðis sagt, at ein semingsroynd endaði við fullkomnari semju.[65] Tískil verða fleiri av ósemjunum millum høvdingarnar loystar í beinleiðis vápnaðari orrustu, uttan at tingið hevur nakran leiklut í hesum.

Hóast tað ber til at siga, at alt føroyskt stjórnarvald var í Føroyum í søgutíðarskeiðinum, so ber illa til at tosa um Føroyar sum eitt sjálvstøðugt ríki í nútíðar týdningi, tí alt vald lá ikki hjá *samskipaðum* stjórnarstovnum.[66] Spurningurin er, um tað yvirhøvur ber til at tosa um sjálvstøðug ríki í miðøldini í hesum týdninginum, tá ymiskir valdsharrar – høvdingar, vasallar, aðal, klerkar, kirkja, kongar og av og á keisarin eisini – við skiftandi eydnu hava havt *lut* í valdinum. Í Føroyum, eins og aðrastaðni í Europa, vóru stjórnarstovnarnir í 1000-1200 talinum alt ov veikir til at kunna savna *alt* vald undir sær. Høvdingarnir – feudalharrarnir í europeiskum samanhangi – vóru ov valdsmiklir til fullkomuliga at geva seg undir eitt tílíkt vald. Føroyingasøga gevur greiðar ábendingar um, at tað vóru høvdingarnir, sum sótu á hervaldinum, og tað vóru tí eisini teir, sum høvdu vald til at seta tingsins avgerðir í verk, ella at forða fyri, at tær vóru settar í verk.

Í tí statsrætti, sum byrjar at menna seg í Europa eftir tríatiára kríggið í 1648, og sum hugtøk verða sett á 100 ár seinni í verkinum *L'Espirit des Lois* hjá Montesquieu, verður ríkisvaldið greinað sundur í tríggjar partar: eitt lóggevandi, eitt útinnandi og eitt dømandi vald. Flyta vit hesi hugtøkini yvir á ting føroyinga, soleiðis sum tað verður lýst í Føroyingasøgu, so sæst týðiliga, hví tað ikki ber til at tosa um eitt sjálvstøðugt ríki í Føroyum í hesum tíðarskeiðinum. Tað er longu nevnt, at tingið kann sigast at hava havt lóggevandi og dømandi myndugleikan, men út frá Føroyingasøgu sæst eisini, at tað vóru høvdingarnir, ið høvdu útinnandi valdið. Tingið sjálvt tykist hvørki at hava havt heimildir ella valdsmiðlar til at stjórna landinum, sambært teimum lógum, sum tað samtykti. Tað fanst heldur eingin annar almennur stovnur, sum hevði hendan myndugleikan. Almennu stjórnarstovnarnir, altingið, heimatingini og dómsnevndirnar høvdu einans tann lóggevandi og dømandi myndugleikan, meðan tað útinnandi vald, sum var í oyggjunum, lá í hondunum á óheftum høvdingum, sum ofta




Í verkinum „L'Espirit des Lois" býtti Montesquieu ríkisvaldið í teir tríggjar partarnar, lóggevandi, útinnandi og dømandi vald.

lógu í innanhýsis stríði við hvønn annan. Almennu stjórnarstovnarnir vóru sostatt heftir at óheftum høvdingum, til tess at fáa lógir og dómar sínar útintar í verki, men tað er lítið sannlíkt, at høvdingarnir hava útint tílíkar avgerðir, um tær hava gingið teimum ov nær ella beinleiðis ímóti.

Nakað serstakt útinnandi vald hevur sostatt ikki verið partur av føroysku stjórnarskipanini í altingstíðarskeiðinum. Hartil hevur útinnandi vald høvdinganna verið veikt, av tí at teir ofta vóru í innanhýsis stríði við hvønn annan. Føroyar kunnu sostatt stórt sæð sigast at hava verið sjálvstøðugar í hesum tíðarskeiðinum, men ríkiseindin og stjórnarstovnarnir hava – sum so nógva aðrastaðni í miðøld – verið ov veikir, til at tað ber til at tosa um eitt sjálvstøðugt ríki.

## Frá altingi til løgting 1270-1350

Tá komið verður inn í 13. øld, er norska ríkisvaldið veruliga farið at koma fyri seg, og farið verður undir at seta norska ríkislóggávu í gildi í Noregi. Um somu tíð byrja norskir kongar eisini at seta norska ríkislóggávu í gildi í Føroyum. Uttan iva hevur tað manglandi ella veika útinnandi valdið í Føroyum gjørt uppgávuna hjá norsku kongunum lættari, tí einki skipað ella samlað vald fanst í Føroyum, sum kundi seta seg upp ímóti hesum. Tvørturímóti vísir Føroyingasøga, at ósemja var millum høvdingarnar um henda spurningin. Uttan nakra skipaða føroyska mótstøðu broyttist tingsins skipan og uppgávur grundleggjandi í hesum tíðarskeiðinum, og tað útinnandi og lóggevandi valdið hvarv so líðandi av landinum og kom at liggja í hondunum á norskum og seinni donskum kongum. Føroyska høvdinga- og tingræðið broyttist so líðandi til eitt miðsavnað norskt stjórnarræði. Serføroysk viðurskifti, so sum tað veika útinnandi valdið í oyggjunum, kunnu kortini einans hava verið ein partur av grundini til hesa miðsavnandi politisku gongdina, tí tey fýra norsku løgdømini, Gulating, Frostating, Eiðsivating og Borgarting, fingu somu lagnu sum tað føroyska. Handilsligar broytingar vóru eisini hendar í Norðureuropa, sum birtu uppundir politisku miðsavningina.

Føroyingasøga veit at siga frá, at um ár 1000 áttu fleiri føroyskir høvdingar skip, sum teir mannaðu og sendu til Noregs í handilsørindum.[67] Hetta kundi bent á, at føroyingar

sjálvir hava røkt handilin uppá Føroyar í 1000-1200 talinum. Í 1271 er tað nógv, sum bendir á, at føroyingar ikki longur eru mentir at røkja handilsáhugamál Føroya við umheimin, tí tá bindir norski kongurin seg til at senda tvey skip um árið til Føroya.[68] Íslendingar og grønlendingar høvdu longu í 1260-unum gjørt líknandi avtalur við norska kongin.[69] Høvuðsgrundin til hesa gongd í Norðureuropa er tann, at í 1200-talinum vaksa fram valdsmiklar handilssamgongur og ríkisstovnar, sum við øllum miðlum kappast um at gera seg galdandi í skjótt vaksandi handilsvirkseminum. Norska ríkisvaldið kom í harða kapping við *Hansabýirnar*, eina samgongu av norðurtýskum handilsbýum undir leiðslu av Lübeck, sum um miðjuna av 13. øld vóru so sterkir, at teir kundu seta norska kongsvaldinum handilsligar treytir. Handilsrættindi við Føroyar gjørdust eisini partur av hesi kapping.[70] Í hesum stríði millum ríkisvald og stórar handilssamgongur høvdu tey smærru sjálvstýrandi londini Ísland, Føroyar og Grønland ongan møguleika fyri at gera seg galdandi, og tey høvdu einki annað val, enn at geva seg undir verju og myndugleika hjá einum størri fyrisitingarligum valdi. Hjá norrønu fólkunum í Íslandi, Grønlandi og Føroyum var tað nátúrligt at geva seg alt meira undir norskt ríkisvald.

Undan 1274 høvdu øll tey norsku tingini sína egnu lógbók at ganga eftir, og tað hevði føroyska tingið eisini. Tískil fanst eingin felags lógbók, sum fevndi um alt Noregi, men í seinnu helvt av 1200-talinum fór norski kongurin Magnus Lógbøtari undir at samanskriva og samanarbeiða alla ta lóggávu, sum var í gildi í Noregi. Hetta arbeiðið var liðugt í 1273, og frá hesum ári og fram til 1276, varð hendan lógin, *Landslógin* kallað, samtykt á norsku løgtingunum og sett í gildi í øllum Noregi.[71] Harvið gjørdist Noregi eitt løgdømi, við eini felags lóg fyri alt ríkið. Í 1274 var norska Landslógin, eftir áheitan frá Magnusi kongi Lógbøtara, eisini samtykt á tingi í Føroyum, og hon kom sostatt eisini at galda í Føroyum. Frammanundan høvdu føroyingar treytað sær, at norski kongurin skuldi røkja handilin uppá Føroyar. Harvið gjørdist Føroyar ein partur av norska ríkinum, og kom undir norska ríkislóggávu.

Tað sær kortini ikki út til, at Føroyar við samtyktini í 1274 eru vorðnar ein fullkomuliga samanrunnin partur av norska ríkinum á sama hátt sum tey norsku løgdømini.[72] Longu undan



Kongsbókin hevur helst verið almenna lógbók føroyinga í meir enn 300 ár. Pætur Jákupsson, bóndi í Kirkjubø, sum var løgmaður 1588-1601, hevur skrivað navn sítt á bókina.

1274 hevði føroyska tingið verið í eini serstøðu, við tað at norsku tingini í 900 og 1000 talinum vóru umskipaði til løgting í samstarvi við Noregs kong, meðan tingið í Føroyum framvegis var eitt sjálvstøðugt alting. Við landslógini í 1274 hevur føroyska tingið framvegis eina serstøðu, tí meðan øll tey norsku tingini eru nevnd í Landslógini, so verður Føroya ting ikki nevnt í henni. Tá norska Landslógin í 1604 verður umsett til danskt, undir navninum *Norska Lóg Kristians IV*, og seinni, tá *Norska Lóg Kristians V* í 1688 verður sett í gildi í Føroyum, verður Føroya Løgting heldur ikki nevnt.[73] Hetta kundi bent á, at Føroyar ikki hava verið mettar sum ein fullkomuliga samanrunnin partur av norska ríkinum.

Einki er kortini at ivast í, at tá føroyingar á altingi í 1274 samtykkja Landslógina, avtekur altingið seg sjálvt og setur á stovn eitt løgting. Landslógin var í sjálvum sær ein felags lóg fyri alt tað norska ríkið, sum skipaði øll tingini, sum vóru umfataði av lógini, sum løgting, og eftir 1274 varð ting føroyinga eisini umfatað av hesi lóg, óheft av hvussu tær ríkis-



Seyðabrævið er elsta lógarheimild, sum serliga var gjørd fyri Føroyar.

rættarligu bindingarnar til Noreg annars vóru. Hesin veruleiki framgongur eisini av varðveittum føroyskum miðaldarbrøvum. Í innganginum til Seyðabrævið frá 1298 verður víst á, at Landslógin frá 1274 varð samtykt á altingi,[74] men í yngri samtyktum, *Hundabrævinum* og í *Skipanini um Tingfaratoll*, sum vóru samtyktar á tingi um ár 1350 og 1400, verður Føroya ting nevnt løgting.[75] Onkustaðni í tíðarbilinum millum 1274 og 1350 er skiftið frá altingi til løgting farið fram í verki.

Við endan av 13. øld varð farið undir at umskipa altingið í Føroyum til eitt løgting, eins og hent var við norsku tingunum í 900- og 1000-talinum. Føroyar vóru vorðnar ein partur av Noregs ríki, og lógargrundarlagið undir landsins stýri og tingsins skipan og virksemi vóru í høvuðsheitum norska Landslógin frá 1274 og Seyðabrævið frá 1298. Seinni komu danskar løgskipanir og ein íslendsk at galda í Føroyum.

## Føroya løgting frá umleið 1300-1816

Umskipanin av tinginum frá einum altingsstovni til ein løgtingsstovn, hevði tvær grundleggjandi broytingar við sær. Fyri tað fyrsta var tingið umskipað frá at vera eitt alting, har allir frælsir menn høvdu rætt og skyldu til at møta og taka lut í avgerðunum, til at vera eitt løgting, har einans vald umboð fyri fólkið høvdu rætt til at taka avgerðir. Í øðrum lagi gjørdist tingið í høvuðsheitum ein dómstólur, meðan lóggevandi og útinnandi valdið so við og við var flutt til norskar og seinni danskar kongar.

### Heimatingsskipanin

Frá gamlari tíð hava Føroyar verið býttar sundur í 6 sýslur, helst við grundarlagi í teimum gomlu heimatingunum (vártingunum). Heimatingini hava upprunaliga helst verið fleiri enn 6, og tey eru sum fyrr nevnt gomul, helst ganga tey heilt aftur til landnámstíðina. Tey eru ikki nevnd í heimildum fyrr enn í byrjanini av 1300-talinum, men tá eru tey longu gomul. Upprunaliga hava heimatingini verið hildin á uttanveltaðum støðum miðskeiðis millum bygdir, men seinast í 1600-talinum verða tey flutt til føst støð, millum húsini.[76] Í Vágum á Ryggi í Miðvági; í Streymoy við Sjógv í Kollafirði; í Eysturoy á Selatrað; í Norðuroyggjum var tingstaðurin tá heimi í Vági í núverandi Klaksvík, í Sandoy í Trøðum og í Suðuroy í Øravík. Tingstaðurin í Øravík varð fluttur til Hvalbiar í 1812, men í 1872 varð hann fluttur aftur til Øravíkar, og har var suðuroyartingstaðurin til 1896, tá vártingini endaliga vóru niðurløgd.[77]

Allir frælsir menn í einum heimatingsumráði høvdu upprunaliga rætt til at møta á tingi til at tingast og døma um øll viðurskifti, sum viðkomu heimatingsøkinum, men við samtyktini av norsku Landslógini í 1274 varð hetta broytt. Nú varð álagt kongsins manni í oyggjunum, sýslumanninum, gjøgnum umboðsmenn sínar, sum vóru tveir, at kalla inn til heimating (várting) um várið í hvørjari av teimum 6 sýslunum. Sýslumenn hava verið í Føroyum frá 1200-talinum. Teir vóru sum oftast føroyskir bøndir,[78] men teir høvdu løgreglumyndugleika og kravdu skatt inn fyri Noregs kong. Í sambandi við heimatingini gjørdist tað við Landslógini sýslumaðurin, sum

kongsins vegna tilnevndi nakrar nevndarmenn, sum skuldu velja 6 løgrættumenn til hvørt heimatingið. Hesir tilnevndu løgrættumenn, og ikki allir frælsir menn, skuldu frá 1274 døma á vártingunum, saman við løgmanni, ið var Løgtingsins formaður. Løgrættumenninir skuldu svørja eið uppá, at teir eina skuldu døma eftir tí, sum Guð og samvitska teirra beyð.

Upprunaliga var einans ein sýslumaður í oyggjunum, og hann var eisini ákæri á heimatingunum, men seinni, tá komið varð inn í 16. øld, varð tað fútin, kongsins ella lensharrans maður í Føroyum, sum bæði tilnevndi løgrættumenninar og var almennur ákæri í Føroyum. Upprunaliga búði fútin ikki alt árið í Føroyum, men einans um summarið, og tí var vanligt eisini at hava vetrarfútar. Tá komið varð inn í 1700-talið gjørdist tað meira vanligt, at fútin hevði fastan bústað í Tórshavn.[79] Sýslumenninir, sum nú gjørdust fleiri í tali, kundu framvegis verða ákærar á heimatingunum, um so var, at fútin ikki kundi møta. Fútar eru kendir í Noregi í 1300-talinum, og hava verið í Føroyum frá umleið 1500. Fútin var kongsins umboðsmaður, á sama hátt sum sýslumaðurin upprunaliga hevði verið tað, men í 14–1500-talinum verða sýslumenninir undirmenn fútans í Føroyum, og teir krevja skatt inn og halda lóg og rætt í teimum 6 sýslunum í Føroyum fútans vegna. Meðan sýslumenninir nú vóru hægstu løgreglumyndugleikar í einstøku sýslunum, so var fútin hægsti løgreglumyndugleiki í Føroyum.

Upprunaliga dømdi løgmaður saman við teimum 6 løgrættumonnunum á øllum heimatingunum, og sýslumaðurin – seinni fútin – var ákæri. Tí kundu heimatingini ikki verða sett í senn, men tey vóru sett í somu raðfylgju, sum tey eru nevnd omanfyri. Tað fyrsta var sett í Vágunum 1. mars.[80] Heimatingseturnar skuldu vera lidnar, áðrenn Løgtingið varð sett á ólavsøku.

### Løgtingsseta, løgtingsskipan og dómstólur

Løgtingið varð sett á ólavsøku, og tingsetan vardi frá klokkan 6 á morgni til klokkan 3 seinnapartin – frá tí at sól var í eystri og til nóns. Áðrenn tingið varð sett, skuldi løgmaður gera eina girðing (veband) rundan um tingstaðið, sum teir kosnu løgrættumenninir kundu rúmast innanfyri. Innan girðingina vóru, umframt løgmann og løgrættumenn, sýslumenn, fútin, prest-

arnir og tingskrivarin. Girðingin, sum hol framvegis síggjast eftir í helluni í Tinganesi,[81] skuldi skilmarka kosnu menn Løgtingsins frá uppmøttu almúguni, sum stóð uttanfyri girðingina. Tingíbúðir vóru reistar á tingstaðnum longu í altingstíðini, men sjálv tingsetan var hildin uttandura til 1557, tá tinghús sambært tingbókini á fyrsta sinni vóru bygd úti í Tinganesi.[82] Seinni vóru tinghús bygd í Gongini í Havn, og har varð tingið sett til 1816, tá tað varð niðurlagt.

Løgmaður bæði setti og segði upp tingið við at ringja við eini klokku. Síðan helt løgmaður eina setanarrøðu, har hann millum annað lýsti tingfrið, frá tí at menn fóru heimanífrá til tings, og til teir vóru heima aftur. Presturin Lucas Debes, sum skrivaði eina bók um Føroyar í 1673, greiðir frá, at kirkjugongd var hvønn dag teir 8 dagarnar, tingið vanliga sat.[83] Allir prestarnir í Føroyum, teir vóru 7 í tali, komu tí at halda gudstænastu, meðan tingseta var. Seinni í 1600-talinum metti kirkjan, at hesin siður var ov kravmikil fyri prestarnar,[84] og tað gjørdist vanligt einans at halda gudstænastu, tá tingið varð sett. Í aðra máta var tað løgmaður, saman við løgrættumonnunum, ið gjørdi av, hvussu leingi ting skuldi haldast. Tá tingsetan var av, segði løgmaður Løgtingið upp við eini røðu.

Teir, sum høvdu rætt at møta á tingi og taka lut í tingsins avgerðum, vóru ikki longur allir frælsir menn, men einans teir 36 løgrættumenninir (3 tylvtir) úr teimum 6 sýslutingunum. Á Løgtingi varð dømt í øllum viðurskiftum, sum høvdu týdning fyri alt landið. Týðandi mál kundu skjótast beinleiðis inn fyri Løgtingið, men dómar, sum vóru sagdir á heimatingunum, kundu eisini skjótast inn fyri Løgtingið. Hetta kom meir enn so fyri, serstakliga tá talan var um harðar revsingar, t.d. deyðarevsing. Tað hendi eisini ofta, serstakliga tá komið varð inn í 18. øld, at heimatingini ikki hildu seg til at døma í ávísum málum, og tey vóru tí beinleiðis skotin inn fyri Løgtingið. Sýslumaðurin hevði ábyrgdina av at fyrireika og leggja tílík mál fyri Løgtingið. Í aðra mátar var tað fútin, sum var ákæri á Løgtingi, eins og hann var tað á heimatingunum. Løgtingið virkaði sum Føroya yvirrættur, meðan heimatingini ella sýslutingini virkaðu sum undirrættir. Í meginregluni vóru tað teir 36 løgrættumenninir, sum saman við løgmanni dømdu á Løgtingi, men í veruleikanum vóru sjáldan fleiri enn 12 løgrættumenn (ein tylvt) til staðar, tá dómur varð feldur. Tá



Meðan Sámal Petersen var landsstýrismaður, leitaði hann eftir búmerkjum og holum frá vebondum í Tinganeshelluni. Útfrá tí, hann fann, gjørdi hann eitt uppskot til, hvussu tingstaðurin hevur verið skipaður.

minni týðandi mál vóru fyri, dømdu ofta ikki fleiri enn 6 løgrættumenn (hálv tylvt) og løgmaður.

Í síðsta enda var tað kongur, sum hevði evstu ábyrgdina av dómsvaldinum, og tí kundu løgtingsdómarnir skjótast inn fyri kong. Í 1380 arvaðust danska og norska ríkið saman, og í 1661, tá danski kongurin gjørdist einaveldiskongur í báðum ríkjunum, varð hægsti rættur settur á stovn í danska-norska ríkinum. Eftir hetta kundu dómarnir skjótast inn fyri hendan dómstólin, har einaveldiskongur sat við endan. Tað kom fyri, at dómar Løgtingsins vóru skotnir inn fyri kong, men tað var ikki væl dámt. Í 1672 varð eitt bræv frá kongi lisið upp fyri Løgtinginum, har kongur álegði løgmanni at fella endaligan dóm,[85] men longu í 1550 hevði danski kongurin Kristian III

kunnað føroysku almúguna um hesi viðurskifti.[86] Dómar Løgtingsins skuldu í verki vera endaligir.

Føroyingasøga nevnir dømi um, at menn vóru dømdir til deyða á tingi, og dómurin varð útintur á tingstaðnum, har menninir vóru hongdir.[87] Veruliga vitan um revsingar í Føroyum fáa vit kortini ikki fyrr enn í 1615, tá tingbøkurnar taka við. Her sæst, at vanligasta revsingin fyri lógarbrot var bót til kongs. Í siðamisbrotum, sum vóru nógv í tali, vóru tey seku ofta húðflongd, meðan tey vóru bundin at einum steyra.[88] Gjørdist ein kvinna við barn og var nærri í ætt við mannin enn annað lið, var deyðadómur vísur fyri báðar partar. Av fútaroknskapinum sæst, at Løgtingið hevur havt løntan bøðil. Deyðadómar hava verið útintir við hálshøgging ella við heinging. Hetta gongur aftur í staðarnøvnum í Føroyum, t.d. Á Gálg-



Gálgagjógv í Øravík hevur helst verið avrættingarstaður tíðliga í tíðini.

anum og Gálgagjógv í Øravík. Tað var ikki eins „virðiligt“ hjá einum manni at vera hongdur sum at vera hálshøgdur, men enn verri var hjá kvinnum, sum vóru deyðadømdar: tær vóru ofta søktar og druknaðar. Hesar revsingar vóru í samsvar við íslendsku løgskipanina *Stóradóm* frá 1564, sum eisini varð nýtt í Føroyum. Í tíðarskeiðinum frá 1615 til 1654 vóru 6 deyðadómar útintir. Av hesum vóru 4 fyri stuldur, 1 fyri óskilgitið barn, og 1 fyri neyðtøku.[89] Seinasti deyðadómurin í Føroyum varð útintur í 1706. Helst hava deyðadómarnir verið fleiri í tali, áðrenn tingbøkurnar taka við.[90]

Skipanin við tilnevndum løgrættumonnum var í meginregluni øðrvísi enn altingsskipanin, sum var galdandi undan 1274, har allir frælsir menn kundu møta á tingi og beinleiðis taka lut í avgerðunum. Søguligur samanhangur tykist kortini vera millum báðar skipanirnar. Sum fyrr nevnt kann lesast burturúr Føroyingasøgu, at tvær skipanir vóru bygdar inn í altingsskipanina: ein nevndarskipan, har „teir bestu menn“ dømdu, tá trætur tóku seg upp, og ein beinleiðis skipan, har „allir frælsir menn“ dømdu og tóku avgerðir í viðurskiftum, sum høvdu størri samfelagsligan týdning, eitt nú í stríði millum høvdingar, lóggávu og lóggávutulking kann hugsast (sí s. 29). Hendan skipanin var eisini innbygd í løgtingsskipanina, við tað at teir 6 ella 12 løgrættumenninir taka sær av dómsmálum, meðan teir 36 løgrættumenninir í felag – møguliga við støði í tí, sum sagt verður av teimum, sum standa uttanfyri girðingina – taka avgerðir, sum hava størri samfelagsligan týdning. Tað er tí hugsandi, at løgtingsskipanin, hóast hon á nógvum økjum var øðrvísi enn altingsskipanin, hevur søguligar røtur í altingsskipanini.

Umframt grundleggjandi munin millum altings- og løgtingsskipanina, at tann fyrra er ein beinleiðis skipan, meðan tann seinna er ein umboðsskipan, eru tveir aðrir høvuðsmunir. Fyri tað fyrsta vóru dómsnevndirnar í altingsskipanini settar í hvørjum einstøkum máli av sjálvum pørtunum í trætuni, meðan løgrættin í løgtingsskipanini var ein standandi skipan, sum varð vald eftir føstum reglum, óheft av teimum stríðandi pørtunum. Tann standandi skipanin við tilnevndum løgrættumonnum hevur óivað verið tryggari og óheftari enn gamla nevndarskipanin, sum var vald av pørtunum. Harumframt er skipanin vorðin sterkari, tí nú kundi skipanin sjálv, sýslu-



Henrik Bielke var í Føroyum fyri at taka ímóti hilniseiði føroyinga bæði í 1649 og 1662.

maðurin ella fútin, ella annar parturin í einu trætu, leggja eina sak fyri løgrættuna. Hetta var ikki møguligt í gomlu nevndarskipanini, har tað einans kundi gerast í semju millum partarnar. Broytingarnar hava óivað minkað um ávirkanina, sum lokalir høvdingar hava havt á skipanina, men samstundis hevur kongsvaldið fingið størri eftirlit við tingskipanini, eins og tað hendi í Noregi í 900-talinum. Tað útinnandi valdið, sum í 1000-1200-talinum lá hjá føroysku høvdingunum, fór, í tíðini eftir at løgtingsskipanin varð sett í gildi í 1274, so líðandi á hendurnar á kongsvaldinum. Í øðrum lagi høvdu teir frælsu menn, sum møttu á altingi, lóggevandi myndugleika, meðan teir 36 løgrættumenninir, sum á Løgtingi umboðaðu fólkið, ið stóð uttanvert girðingina, ongan veruligan lóggevandi myndugleika høvdu. Hetta varð endaliga staðfest í 1661, tá danski kongurin tók einaveldi, og í veruleikanum tilskilaði sær alt vald í ríkinum. Eftir hetta sendi kongur menn runt til øll tingini í ríkinum at taka ímóti trúskapareiði – hilniseiði. Hesir menn løgdu eisini leiðina um Føroyar, og Føroya løgting gav kongi hilniseið í fleiri umførum. T.d. vóru aðalsmenninir Henrik Bielke og Gabriel Akeleye Knudsøn í Føroyum í 1649, og í 1662 var Bielke aftur í Føroyum at taka ímóti hilniseiði. Í 1670 tók admiralurin Jens Rodsten móti hilniseiði føroyinga vegna Kristian V.[91]

Samanumtikið kann sigast, at Løgtingið var í høvuðsheitum ein undirdómstólur í danska-norska ríkinum, sum var undir eftirliti av kongsins embætismonnum, meðan altingið var ein sjálvstøðugur dómstólur, sum harumframt hevði lóggevandi myndugleika. Hetta sæst av norsku Landslógini frá 1274 og av seinni setanarbrøvum hjá løgmonnunum, har løgmaður einans verður nevndur dómari. Løgtingsskipanin var helst tryggari fyri føroysku almúguna enn altingsskipanin, men norska og seinni danska kongsvaldið fekk størri myndugleika í Føroyum við hesi skipan.

### Aðrar uppgávur Løgtingsins

Hóast Løgtingið í høvuðsheitum var góðkent sum ein dómstólur av kongsvaldinum í 1274, so hevur Løgtingið eisini havt aðrar uppgávur enn at døma. Løgskipanir sum Seyðabrævið, Skipanin um Tingfaratoll og Hundabrævið vóru t.d. samtyktar og settar í gildi í Føroyum av Løgtinginum. Harum-

framt hevði danski kongurin í 1569 viðurkent,[92] at Løgtingið var ein stovnur, ið tók sær av felagsviðurskiftum landsins.

Tá tingið tók sær av felagsviðurskiftum Føroya, luttóku ikki einans løgmaður og løgrættumenn, men eisini embætismenn innan vebanda og almúgan uttan vebanda. Føroyska almúgan hevði framvegis rætt til at møta á tingi fyri at lýða á viðgerðina í Løgtinginum, men hon hevði ikki rætt til beinleiðis at taka lut í avgerðunum, eins og í altingsskipanini. Almúgan, sum stóð uttanfyri vebanda, hevði kortini rætt til at taka orðið, tá onnur enn dómsmál vóru á skránni. T.d. hevði fútin skyldu til á Løgtingi at spyrja almúgu og embætisfólk, um nakrar klagur vóru yvir fyrisitingina av einahandlinum.[93] Eisini skilst, at almúgan onkuntíð hevur atkvøtt um serstøk viðurskifti, sum Løgtingið so annaðhvørt hevur góðkent ella vrakað. Góðkendi Løgtingið eina tílíka almúgusamtykt og førdi hana inn í tingbókina, so fekk hon sambært varapróstinum Begtrup, sum í 1808 skrivaði eina frágreiðing til ríkismyndugleikarnar um Løgtingið, „*en art af lovkraft*“.[94] Í verki kann hugsast, at almúgan hevði góðar møguleikar til at ávirka tingsins avgerðir, sjálvt um ongar formligar heimildir vóru fyri hesum.

Fleiri dømi eru um, at Løgtingið hevur sent sendinevndir til Danmarkar at bera fram klagu fyri kong yvir embætisførsluna hjá monnum hansara í Føroyum. Í 1570-71 var Guttormur Andrasson løgmaður vegna Løgtingið í Danmark og bar klagu fram fyri kong um handilsviðurskifti føroyinga. Serstakliga var tað viður, sum manglaði, og føroyingar fingu viðhald í klagunum.[95] Løgtingið sendi eisini eina nevnd til Danmarkar í 1673. Tá var klagað um fútan, sum skuldi hava tikið ov stórt festigjald frá bóndunum, tá festibrøvini skuldu endurnýggjast. Í høvuðsheitum fingu føroyingar viðhald frá kongi, og reglurnar fyri, hvussu festi vóru givin, vóru broyttar, soleiðis at festini nú kundu ganga í arv frá faðir til son, uttan at festibrøvini skuldu endurnýggjast. Harvið kundi fútin ikki longur gera sær dælt av hesum viðurskiftunum.

Harumframt umboðaði Løgtingið Føroyar mótvegis umheiminum uttanfyri danska-norska ríkið. Í 1591 var Løgtingið í samráðingum við skotska kongin Jakup VI um fiskirættindi við Føroyar.[96] Sostatt hevur Løgtingið eisini havt ein ávísan týdning fyri felagsviðurskifti føroyinga uttanfyri danska-norska ríkið.

Helst hevur tað havt stóran týdning fyri føroyska samfelagið, sum var ein fjarskotin útjaðari í danska-norska ríkinum, at Løgtingið, umframt at vera ein dómstólur, virkaði sum ein fólksins umboðsstovnur, sum tók sær av felags viðurskiftum føroyinga og hevði eftirlit við kongsins embætismonnum. Hesar uppgávur Løgtingsins vóru viðurkendar av kongsvaldinum í 1569.

**Broytingar í løgtingsskipanini í 1688**

Sambært Landslógini skuldu løgrættumenninir veljast millum bestu og vitugastu menn Føroya. Hetta merkti í veruleikanum, at løgrættumenninir aloftast vóru valdir burturúr tí múgvandi bóndastættini í Føroyum, og ofta sótu teir í langa tíð í løgrættuni. Sum dømi kann nevnast, at Jákup á Selatrað, ríki Jákup róptur, sum sat í løgrættuni, tá sakin móti Páll Fanga var fyri, var løgrættumaður frá 1643 til 1679. Heilt óvanligt var tað ikki, at menn sótu so leingi í løgrættuni. Løgrættumenninir høvdu møguleika fyri at vinna sær hollar royndir í løgtingsarbeiði, sum seinni kundu gera tað møguligt at náa hægri størv. Ofta vóru løgmenninir fyrrverandi løgrættumenn.

Tað er eyðsæð, at valskipanin til Løgtingið bæði hevði røtur í og var við til at varðveita eina føroyska samfelagsskipan, har

Ríki Jákup á Selatrað var ein av múgvandi bóndunum, sum sat heilt leingi á Løgtingi. Hann var løgrættumaður í 46 ár, frá 1643 til 1679.



stórbøndirnir vóru tann leiðandi stættin. Høvdingasamfelagið var farið í søguna, men stórbøndurnir sótu á løgtingsskipanini í Føroyum. Tað sama hevur verið galdandi aðrastaðni í danska-norska ríkinum, tí løgtingini vóru skipaði við støði í teimum yvirskipaðu ríkislóggávunum.

Hesa valdsstøðu stórbóndanna hava kongur og embætismenn hansara mett vera óhepna, tí í *Norsku Lóg Kristians V*, sum varð sett í gildi í Føroyum í 1688, varð ásett, at løgrættumenninir einans skuldu vera valdir fyri eitt ár. Størvini sum løgrættumenn skuldu aftaná 1688 ganga uppá skift millum allar búfastar menn í sýsluni. Harumframt varð talið av løgrættumonnum hækkað úr 6 til 8 í hvørjari sýslu, og talið av løgrættumonnum í Løgtinginum hækkaði samsvarandi úr 36 upp í 48. Broytingar hendu eisini í samsýningunum til løgrættumenninar. Undan 1688 høvdu størvini sum løgrættumenn verið lønt sambært ásetingunum í Landslógini frá 1274 og seinni sambært serføroyskum ásetingum í Skipanini um Tingfaratoll,[97] sum var samtykt á Løgtingi umleið ár 1400. Lønin hjá løgrættumonnunum, sum bóndirnir bóru kostnaðin av, hevði verið 4 skillingar fyri mílina, hvørja ferð farið var á ting. Hesa byrðu sluppu bøndurnir undan í 1688, tá tað var staðfest, at størvini sum løgrættumenn skuldu vera ólønt.[98] Við hesum broytingum gjørdist valskipanin meira almúguvinarlig, men avleiðingin var, at skipanin ikki longur kundi fíggjast av stórbóndunum, soleiðis sum fyrr hevði verið.

Broytingarnar í 1688, sum høvdu við sær, at løgrættumenninir einans kundu sita í eitt ár í Løgtinginum, høvdu helst við sær, at Løgtingið hevði torført við at uppbyggja ein løgfrøðiligan serkunnleika og varandi royndir í tingarbeiði.[99] Hetta var í øllum førum staðfest av Sámali Pætursson løgmanni og stórbónda í 1709, tá hann saman við tingskrivaranum í brævi til kong mælti til, at gamla skipanin, har veljast skuldu 8 „*af de forstandigste mænd*“ úr hvørjari sýslu til løgrættumenn, varð sett í gildi aftur.[100] Tað er helst rætt, at broytingarnar í 1688 høvdu við sær, at tingið gjørdist ein veikari stovnur, sum hevði truplari við at hevda sín myndugleika mótvegis kongsins embætismonnum. Hinvegin, so ber heldur ikki til at síggja burtur frá, at broytingarnar vóru til fyrimun fyri tað minni múgvandi fólkið í Føroyum. Stórbøndurnir høvdu ikki longur nakran sjálvsagdan framíhjárætt til at sita í

løgrættuni. Tvørturímóti gjørdist tað ein fólkaskylda eisini hjá tí fátækara partinum av fólkinum at sita í løgrættuni. At stórbøndur sum Sámal Pætursson vóru ónøgdir við skipanina, kann neyvan undra nakran, men var endamálið við broytingunum at styrkja umboðanina hjá tí fátækara partinum av fólkinum mótvegis stórbóndunum, so hevði betri samanhangur verið í, um lønin til løgrættumenninar hækkaði, heldur enn at hon fall burtur.

Samanumtikið ber til at siga, at broytingarnar hava styrkt um ávirkanina hjá kongsins embætismonnum á tingsins avgerðir, við tað at teir vóru teir einastu, sum vóru løntir og sótu so mikið leingi í sama starvi, at ein sakkunnleiki í løgtingsarbeiði kundi fáast til vega. Løgmaður var eisini fastsettur og fastløntur, men eisini hann gjørdist við tíðini í størri mun ein kongsins embætismaður, og í minni mun eitt fólksins umboð. Nýggja valskipanin gjørdi tingini veikari mótvegis embætismonnunum, men óivað gjørdi hon tað eisini torførari hjá føroysku stórbóndunum at røkja síni áhugamál gjøgnum Løgtingið. Í størri samanhangi hevur skipanin styrkt um kongsvaldið. Tað hevur óivað eisini verið ætlanin. Einaveldið var á veg fram í meginpartinum av Europa í seinnu helvt av 1600-talinum

**Løgmansembætið**

Løgmansembætið hevur helst røtur í løgsøgumanninum. Frá fornari tíð vóru lógir og dómar ikki niðurskrivaðir, men tað var uppgávan hjá løgsøgumanninum, sum helst hevur verið valdur av stórbóndunum í Føroyum, at siga fram lógina. Løgsøgumaðurin, ið eisini var tingformaður, var tann lógarkøni í tinginum, men tað var ikki hansara uppgáva at døma. Í altingsskipanini vóru tað teir frælsu menn, sum møttu á tingi, ella serstøku dómsnevndirnar, sum dømdu. Seinni, tá føroyingar lærdu at lesa og lógargrundarlagið gjørdist ov umfatandi til at kunna rúmast í minninum á einum manni, varð lógin fest á blað. Í Íslandi hendi hetta í 11. øld. Eitt sindur størri óvissa er um hendan spurningin í Føroyum, men í seinasta lagi í 1274, tá Landslógin varð sett í gildi, er lógin fest á blað, men helst er hetta hent fyrr, tí, sum víst hevur verið á áður, høvdu føroyingar helst havt sjálvstøðuga lógbók nakað frammanundan. Tað er ivaleyst í skiftinum frá munnligari framsigan av



Elsta mynd av skjaldrarmerki føroyinga er á einum av kirkjubøstólunum. Hetta merkið er í dag merkið hjá Føroya løgmanni.

lógini til skrivliga staðfestan av henni, at løgmansembætið í týdninginum sum høvuðsdómari er vorðið til. Tann lógarkøni tingformaðurin, løgsøgumaðurin, gjørdist so við og við eisini høvuðsdómari, løgmaður, tá tann upprunaliga uppgávan hjá honum fór í søguna. Løgmansembætið í Føroyum stavar helst frá 1200-talinum, tá stóru rættarligu nýskipanirnar fóru fram í Noregi og í Føroyum. Við nýskipanum í 1200-talinum gjørdist løgmaður høvuðsdómari bæði á heimatingunum og á Løgtingi, saman við løgrættumonnunum.

Løgmaður varð upprunaliga valdur av løgrættumonnunum, – ikki beinleiðis av stórbóndunum, eins og løgsøgumaðurin – og síðan var hann tilnevndur av kongi. Seinni, tá einaveldið varð sett á stovn í danska-norska ríkinum í 1661, gjørdist løgmaður í veruleikanum ein av kongsins embætismonnum, sum varð settur í starv av kongi. Vóru løgrættumenninir upprunaliga av føroyskari stórbóndaætt, so ber til at siga, at løgmenninir vóru millum størstu jarðardráttar í oyggjunum. T.d. átti J. H. Weyhe løgmaður, tá hann doyði í 1705, 42

merkur í óðalsjørð, ella umleið 2% av allari jørð í Føroyum, og áðurnevndi Sámal Pætursson løgmaður, sum doyði í 1755, átti 40 merkur í óðalsjørð.[101] Løgmenninir vóru næstan altíð valdir burtur úr nøkrum fáum múgvandi løgmansættum, og kongur tilnevndi aloftast tann persón til løgmann, sum løgrættumenninir valdu. Stórt vald hava hesir menn havt, áðrenn teir í heila tikið vóru tilnevndir løgmenn, og óivað er hendan valdsstøðan eisini ein av grundunum til, at teir vóru tilnevndir. Tað kom kortini fyri, at kongur tilnevndi annan løgmann enn tann, sum Løgtingið valdi. Í 1655 tilnevndi kongur danan Balzer Jacobsen til løgmann, sjálvt um Løgtingið hevði valt eysturoyarbóndan Jógvan Pállsson,[102] men hetta var eitt undantak, sum helst hevði samband við gablatíðina (sí s. 68).

Í veruleikanum hevur tað verið soleiðis, at nakrar fáar og valdsmiklar føroyskar løgmansættir hava sitið á løgmansembætinum. Tað var ikki, fyrr enn komið varð væl inn í 18. øld, at hetta byrjaði at broytast, og løgmenninir gjørdust sum ein fylgja av einaveldishugsjónini danskir embætismenn, sum kongur einsamallur setti í starv. Hetta framgongur beinleiðis av tí, sum vit vita um føroysku løgmenninar. Allir løgmenn, sum hava verið síðan 1524 eru kendir, meðan vit ikki vita so nógv um teir løgmenn, sum hava verið undan 1524. Av teimum 19 løgmonnunum, sum hava verið aftaná 1524, vóru 14 av føroyskari bóndaætt, meðan 5 vóru útlendingar. Av teimum 5 útlendsku løgmonnunum eru 3 at finna millum teir 4 seinastu, sum sótu aftaná 1769. Henda gongdin hevði við sær, at tað upprunaliga sambandið millum løgmann og løgrættumenn, og røturnar, sum løgmaður hevði í føroysku stórbóndastættini, viknaði.

Løgmaður var formaður Løgtingsins, og hann skuldi upprunaliga døma saman við løgrættumonnunum, men í 1700-talinum gerst tað alt meira vanligt, at løgmaður dømdi einsamallur á Løgtingi, meðan løgrættumenninir sótu hjá og staðfestu dómin. Hetta var beinleiðis ein avleiðing av Norsku Lóg Kristians V frá 1688, men í størri samanhangi hevur hetta helst eisini samband við broyttu reglurnar fyri vali av løgrættumonnum, sum ikki kundu annað enn gera løgrættustovnin veikari mótvegis løgmansembætinum. Meðan løgrættumenninir eftir 1688 einans kundu sita í eitt ár uttan løn, so sótu løgmenninir ofta leingi í hesum lønta embæti. Frá

1524 til 1816 sótu løgmenninir í miðal í 15 ár í løgmansembætinum. Upprunaliga var starvið lønt við einum serligum løgmanstolli, sum varð álagdur bóndunum at gjalda, men í 1555 varð serstakur løgmansgarður settur á stovn á Steig í Sandavági. Har var Føroya løgmansstólur til 1816, tá bæði Løgtingið og løgmansembætið vóru niðurløgd. Løgmanstollurin gav í byrjanini av 1800-talinum umleið 70 ríkisdálar um árið. Um sama mundið gav *Steigargarður* umleið 800 ríkisdálar í inntøku árliga.[103] Frá 1772 fingu løgmenninir harumframt fasta løn, 100 ríkisdálar um árið, frá kongi. Føroysku løgmenninir, sum ofta høvdu stórar garðar aðrastaðni í landinum, høvdu ikki allir fastan bústað á løgmansgarðinum í Sandavági í hesum tíðarskeiðinum.

Broytingarnar í løgtingsskipanini í 1600-talinum og lønarviðurskiftini hjá løgmanni kundu ikki annað enn styrkja løgmansembætið í mun til løgrættumenninar. Tað var ikki so løgið, at tað í veruleikanum gjørdist løgmaður, sum kom at siga dómin.

**Fólkadómstólurin og løgfrøðin**

Høvuðsrákið í 18. øld var, at kongsins embætismenn fingu størri og størri ávirkan. Løgmaður var í veruleikanum vorðin ein kongsins embætismaður, og løgrættumenninir høvdu fyri langari tíð síðan mist at kalla alla ávirkan. Serstakliga var tað tingskrivarin, *Sorinskrivarin* nevndur, sum fekk størri vald í Løgtinginum. At enda var tað hann, sum las upp lógina og framsegði dómin, eisini á Løgtingi. Tá Løgtingið varð niðurlagt í 1816, gjørdist sorinskrivarin einadómari.[104]

Søguligu fortreytirnar fyri hesi gongd eru at finna í 16. øld, tá tað sær út til at hava verið eitt rák í øllum tí danska-norska ríkinum, sum bar fram ímóti, at heimatingini ikki hildu seg til at døma. Dómsmálini vóru í størri mun enn áður beinleiðis skotin inn fyri løgtingini. Ein av grundunum til hesa gongd var ivaleyst tann, at lógargrundarlag og rættarpraksis, sum veruliga byrjaði at økjast og mennast frá byrjanini av 1500-talinum,[105] vóru vorðin ov umfatandi og samansett til, at óútbúnir bøndir kundu átaka sær at døma. Hetta sæst t.d., tá fastur eiðsvorin tingskrivari var settur á heimatingunum í Noregi í 1591, var grundgevingin tann, at maður skuldi setast, ið dugdi at skriva og at leiðbeina teimum 6 løgrættumonnunum



Innsigli løgrættumanna, almenna innsigli Føroya, sum Andras Guttormsson, løgmaður, tann 15. august 1533 setti fyri bræv til kong.

á heimatingunum. Í Føroyum høvdu løgrættumenninir harumframt tann trupulleika at dragast við, at seinast í 1500-talinum varð føroyska rættarmálið, sum hevði verið norrønt, um at broytast til danskt. T.d. varð Landslógin frá 1274 umsett til danskt í 1604, tá hon varð sett í gildi í Føroyum av nýggjum undir navninum Norska Lóg Kristians IV.[106]

Eitt av endamálunum við at seta sorinskrivara var ein roynd at forða fyri, at dómar, sum kundu verið avgreiddir á vártingunum, vóru skotnir inn fyri kostnaðartunga dómsviðgerð í løgtingunum. Seinast í 16. øld varð tað ikki óvanligt, at tingfundirnir vóru festir á blað í Noregi, men fastur eiðsvorin skrivari, sorinskrivari, var sum nevnt ikki settur fyrr enn í 1591. Í Føroyum eru allar tingbøkurnar varðveittar frá 1615, heimatingbøkurnar tó einans frá 1655 við onkrum gloppi, men tingskrivari hevði verið í starvi síðan 1584.[107] Sorinskrivarin skuldi upprunaliga skriva brøv, dómar og samtyktir niður í tingbókina, umframt at ganga løgrættumonnunum og løgmanni til handa, tá teir dømdu. Hetta starvið gjørdi so við og við sorinskrivaran til tann veruliga lógarkøna mannin í tinginum. Tað var eitt framhald av hesi gongd, tá tað í 1634 mestsum varð avgjørt, at sorinskrivarin skuldi døma á heima-

tingunum í Noregi. Við *Stóru Recess Kristians IV* frá 1643, sum eisini varð sett í gildi í Føroyum, varð sorinskrivarin í veruleikanum ábyrgdaður øllum dómum, sum sagdir vóru á heimatingi.[108] Norska lóg Kristians V, sum varð sett í gildi í Føroyum í 1688, gjørdi sorinskrivaran til einadómara á heimatingunum í Noregi, og sannlíkt er, at tað sama hendi í Føroyum.[109] Samstundis gjørdist løgmaður einadómari á Løgtingi. Aftaná 1688 sótu løgrættumenninir bæði á heimatingunum og á Løgtingi óvirknir hjá sum tingvitni, meðan ávíkavist sorinskrivarin og løgmaður dømdu.

Tann upprunaligi dómsmyndugleikin, sum hevði verið býttur millum løgmann og løgrættumenn á báðum rættarstigunum, varð í 1688 býttur millum løgmann og sorinskrivaran, soleiðis at teir einsamallir dømdu á hvør sínum rættarstigi. Hesar broytingar settu løgrættumenninar fullkomuliga til síðis, men tær fingu eisini stórar avleiðingar fyri arbeiðsøkið hjá løgmanni.

Í Stóru Recess Kristians IV frá 1643 var ásett, at sorinskrivarin og løgmaður skulu hava hvør sína tingbók við innsigli fútans, har alt, sum fór fram á tingi, skuldi skrivast í. Tingbókin skuldi latast fútanum í varðveitslu, og tey, sum tingsins samtyktir fevndu um, høvdu rætt til at fáa innlit í tingbøkurnar.[110] Tá tingfundirnir á vártingi og Løgtingi byrjaðu at vera festir á blað av sorinskrivaranum seinast í 16. øld, varð bøtt munandi uppá rættartrygdina, men hetta hevði eisini við sær, at sorinskrivarin fekk størri kunnleika um tingsins avgerðir og arbeiði enn nakað annað umboð í Løgtinginum. Partvíst av hesi grund var ávirkan sorinskrivarans á dómsviðgerðir Løgtingsins vaksandi. Hartil kom, at tær broytingar, sum vóru gjørdar í seinnu helvt av 1600-talinum, til tess at forða fyri, at ov nógvir dómar vóru skotnir inn fyri Løgtingið, vóru so mikið væleydnaðar, at talið á dómsviðgerðum á Løgtingi lækkaði munandi í 1700-talinum.[111] Hendan gongdin hevði við sær, at arbeiðsuppgávurnar hjá løgmanni á Løgtingið vóru skerdar munandi. Tá komið varð inn í seinnu helvt av 18. øld minkaði talið á løgtingsdómum nærum niður í einki. Í tíðarskeiðinum frá 1786 til 1805, tá norðmaðurin Lund var Føroya løgmaður, dømdi hann einans í 2 tingmálum. Í tilmælinum frá Dansk Kancelli tann 24. apríl 1816 um at niðurleggja Løgtingið varð sagt, at einans 3 mál vóru viðgjørd á Løgtingi



Innsigli Jóans Pálssonar, sum var løgmaður frá 1662 til 1677. Umskriftin er at lesa sum: „Ioen Povelsen Færø".

seinastu 3 árini.[112] Hesi viðurskifti kundu ikki annað enn úthola løgmansembætið, høvuðsdómaran á Løgtingi.

Henda gongdin, tey seinastu árini gamla Løgtingið var til, hevði røtur í rættarligum nýskipanum, sum vóru framdar í Noregi seinast í 18. øld. Í 1795 vóru serligar semingsnevndir settar á stovn í hvørjum prestagjaldi í Noregi, sum skuldu taka sær av borgarligum rættarmálum. Amtmaðurin skuldi velja tveir semingsmenn í hvørja av hesum nevndum, ein embætismann og ein bónda, sum skuldu royna semju. Tvey ár seinni var ein rættarskipan við einum rættarstigi, – umframt hægsta rætt – sett á stovn í Noregi. Grundgevingin fyri hesum broytingum var tann, at ein tílík skipan varð mett at vera bíligari og tryggari enn løgtingsskipanin, sum umframt hægstarætt hevði tvey rættarstig. Hartil kom, at løgtingini vóru óhandug, og ikki kundu koma saman fleiri ferð um árið.[113] Í Noregi og Íslandi, har nýggju skipanirnar eisini vóru settar í gildi, gjørdist avleiðingin tann, at norsku løgtingini og íslendska Altingið vóru niðurløgd í ávíkavist 1797 og 1800. Tann nýggja semingsskipanin frá 1795, sum í Noregi og Íslandi varð tvinnað saman við eini nýggjari rættarskipan og avtøkuni av løgtingum og Altingi, varð sett í gildi í Føroyum í 1797.[114] Í Føroyum varð Løgtingið ikki avtikið samstundis, men lítið man vera at ivast í, at í verki avtók nýggja semingsskipanin

føroyska Løgtingið sum dómstól. Í øllum førum komu nærum eingi rættarmál fyri Løgtingið, eftir at semingsskipanin varð sett í gildi í Føroyum. Undir tilíkum umstøðum var tað torført at hevda rættin hjá einum fólkadómstóli at vera til. Tíðin var um at fara frá honum.

Hartil kom, at seinast í 18. øld gjørdist tað eitt krav í danska-norska ríkinum, at kongsins embætismenn skuldu hava løgfrøðiligt embætisprógv.[115] Hetta sæst í Føroyum av, at hóast sorinskrivarin, sum nærum altíð var løgfrøðingur, hevði tikið meginpartin av uppgávunum frá løgmanni, so vóru teir seinastu løgmenninir í Føroyum allir løgfrøðingar. Tað sæst eisini, at annaðhvørt hevur løgmansembætið ikki havt stóran áhuga millum føroyingar, ella eisini hava fáir føroyingar havt neyðugu løgfrøðiligu førleikarnar til at røkja starvið, tá komið varð inn í seinnu helvt av 1700-talinum. Tá søkt varð eftir løgmanni í 1769, varð ikki mett, at skikkaður føroyskur umsøkjari var til starvið. Íslendski løgfrøðingurin Thorkil Fjeldsted varð settur, hóast tveir føroyskir umsøkjarar vóru til starvið – annar av teimum var Jens Christian Svabo. Fjeldsted tók ongantíð við løgmansembætinum og longu í 1772 varð søkt eftir løgmanni av nýggjum. Hvørki í 1772 ella í 1786, tá starvið aftur var lýst leyst, var nakar føroyskur umsøkjari. Í 1772 var norðmaðurin Jacob Hveding settur, í 1786 Johan Michael Lund, sum eisini var norðmaður. Báðir vóru løgfrøðingar, men hvørgin teirra tykist at hava havt stóran áhuga í føroyska løgmansembætinum. Meginpartin av tíðini, Hveding og Lund vóru í Føroyum, sóknaðust teir eftir øðrum starvi í Noregi.[116]

Sostatt gleið tað forna og í seinnu helvt av 18. øld nógv viknaða høvuðsdómaraembætið, sum føroyskir stórbøndur nærum altíð høvdu mannað, í hendurnar á útlendskum løgfrøðingum. Útlendsku løgfrøðingarnir høvdu ikki altíð so stóran áhuga í at verja løgtingsstovnin, men tað vóru ikki hesi viðurskifti, sum vóru høvuðsgrundirnar til, at stovnurin viknaði. Grundleggjandi vóru tað broytingar í rættarskipanini í danska-norska ríkinum, har tað m.a. varð gingið burtur frá fólkavaldum dómstólum til settar dómstólar, mannaðir við løgfrøðingum, sum vóru høvuðsgrundirnar til, at stovnurin viknaði.

**Avtøkan av Løgtinginum**

Tað var undir hesum fortreytum, at tað fyrstu ferð kom uppá tal at niðurleggja Løgtingið. Í 1772 legði Lund handilsforvaltari í Tórshavn – sama ár sum Jacob Hveding varð settur í løgmansembætið – uppskot fyri donsku ríkismyndugleikarnar um at niðurleggja Løgtingið og løgmansembætið. Hugsan hansara var, at løgmansgarðurin á Steig skuldi seljast, og peningurin, sum fekst fyri hann, skuldi leggjast í ein búskapargrunn fyri Føroyar. Lund hugsaði sær, at fútin skuldi yvirtaka høvuðsdómarauppgávuna hjá løgmanni. Á tann hátt meinti Lund, at meira fekst fyri teir miðlar, sum Løgtingið og løgmansembætið kostaðu.

Einki kom burturúr royndini hjá Lund handilsforvaltara at niðurleggja Løgtingið og løgmansembætið í 1772. Undirtøka fekst ikki fyri uppskotinum hjá ríkismyndugleikunum, sum stutt eftir komu til ta niðurstøðu „*at der i et så fjernt liggende land ikke kunne undværes en fornuftig overdommer*“.[117] Hendan grundgeving vigaði óivað nógv hjá ríkismyndugleikunum, serstakliga tá hugsað verður um, at tilmælið frá Lund varð lagt fyri ríkismyndugleikarnar, áðrenn rættarligu broytingarnar í Noregi vóru framdar seinast í 1790-unum. Tað vóru ongar ítøkiligar ætlanir í danska-norska ríkinum um at niðurleggja løgtingini um hetta mundið.

Tann 18. maj í 1816 – 44 ár eftir tilmælið frá Lund – varð avgerðin um niðurleggingina av Løgtinginum og løgmansembætinum tikin. Tá var tað ikki longur mett at vera neyðugt, at føroyingar í løgmanninum høvdu „*en fornuftig overdommer*“. Tey seinastu 44 árini vóru so nógvar rættarligar broytingar framdar í ríkinum, at „*en fornuftig overdommer*“ ikki longur varð mettur at vera neyðugur í Føroyum. Rættarligu nýskipanirnar, sum miðaðu ímóti eini professionalisering av dómsvaldinum, vóru framdar, og ríkismyndugleikarnir mettu tí ikki, at tað fólkavalda Løgtingið og løgmansembætið høvdu nakran rættarligan týdning longur.

Tá Løgtingið varð niðurlagt í 1816 høvdu ríkismyndugleikarnir í fleiri ár havt ætlanir um at taka Løgtingið av, men føroyingar lótu kortini ikki við seg koma. Eingir føroyingar mæltu ímóti ætlanunum, og heldur ikki kom nakað mótmæli, tá tingið varð niðurlagt. Bert í einum føri lata føroyingar hoyra frá sær í samband við ætlanirnar um at taka av Løgtingið

og løgmansembætið. Tá Lund fór frá sum løgmaður 26. juli í 1805, eftir at hann hevði fingið annað starv í Noregi, fóru tíðindi onkursvegna at ganga um, at løgmansembætið fór at verða niðurlagt. Í tí sambandi sendu 4 bøndur í Vágunum umsókn til fútan um, at fáa 8 merkur av Steigargarði lagdar undir síni festi.[118] Grundgevingin var, at jørðin hevði verið í hondunum á forfedrum teirra, áðrenn Steigargarður var settur á stovn í 1555. Av svarinum frá fútanum framgekk óbeinleiðis, at talan ikki einans var um tíðindi, men at ætlanir veruliga vóru frammi um at avtaka løgmansembætið: tíðindini vóru fyri tað fyrsta ikki avsannaði, og í øðrum lagi varð sagt, at um so var, at løgmansembætið varð niðurlagt, fór fútin at mæla til, at umsóknin frá teimum 4 bóndunum varð gingin á møti. Sostatt mótmælti eingin føroyingur ætlanunum um at niðurleggja løgmansembætið; tvørturímóti royndu nakrir bøndur í Vágunum at fáa nakað burturúr eini møguligari niðurlegging av stovninum.

At ætlanir hava verið frammi um at niðurleggja løgmansembætið longu í 1805 framgongur ikki einans óbeinleiðis av svari fútans til bøndurnar, men eisini av tí veruleika, at eingin løgmaður varð settur í fast starv, eftir at Lund fór úr starvinum í 1806. Í tíðarskeiðinum frá 1806 og fram til 1816 røkti føroyingurin og løgfrøðingurin Hammershaimb løgmansembætið, men hann var einans konstitueraður løgmaður. Einki bendir heldur á, at henn hevði nakran serligan áhuga í at verða settur í fast starv, tí hann søkti ongantíð sjálvur starvið. Harumframt økjast sannlíkindini fyri, at ætlanir hava verið frammi um at avtaka Føroya Løgting longu í 1805, um hugt verður eftir tí, sum hendi við restini av tingunum í ríkinum um hetta mundið. Norsku løgtingini vóru sum nevnt niðurløgd longu í 1797, íslendska Altingið var niðurlagt í 1800 og donsku landstingini vóru niðurløgd tann 25. januar í 1805. Flestu tingini í ríkinum vóru sostatt niðurløgd um hetta mundið, og donsku landstingini vóru niðurløgd nakrar fáar mánaðir frammanundan, at Lund var farin úr løgmansembætinum. Óivað hevur hendan avgerðin elvt til, at tíðindi fóru at ganga í Vágunum. Nú vóru einans løgtingini á Bornholm og í Føroyum eftir í danska-norska ríkinum, og tað skuldi tí verið løgi, um ætlanir ikki vóru í ríkisfyrisitingini um at avtaka hesi løgtingini eisini.

Tað hevur verið ført fram, at avgerðin um at niðurleggja Føroya Løgting var ein einvegis valdsgerð frá dønum mótvegis føroyska fólkaviljanum,[119] men tað er einki í samtíðini, sum bendir á, at soleiðis hevur verið. Tvørturímóti var tað eitt vanligt eyðkenni fyri tíðina, at fólksins umboðsstovnar vóru niðurlagdir. Einki serføroyskt var í hesum, men talan var um eitt felagseuropeiskt rák í 17. og 18. øld, sum gekk fram móti einaveldi, har alt ríkisvald varð savnað hjá kongi og embætismonnum hansara. Hendan gongdin, sum eisini gjørdi seg galdandi í danska-norska ríkinum, tømdi so líðandi allar fólksins umboðsstovnar fyri innihald. Hetta var eisini hent í Føroyum, og Føroya Løgting var tí ein stovnur, sum ikki longur hevði tann rættarliga týdning fyri føroyingar, sum hann hevði havt. Umsóknin frá bóndunum í Vágum bendir eisini á, at heldur ikki í Føroyum hevur samtíðin mett avtøkuna av Løgtinginum sum eina valdsgerð, sum danir framdu móti føroyska fólkinum.

Hetta merkir kortini ikki, at eingin ivaðist í tí rætta í at avtaka Løgtingið. Í sambandi við ætlanirnar um at niðurleggja føroyska Løgtingið hevði Dansk Kancelli í 1806 og 1808 biðið ávíkavist fyrrverandi løgmannin Lund, sum nú var í Bergen, og próstin Begtrup, um at gera eina frágreiðing um Løgtingið og løgmansembætið í Føroyum. Serstakliga frágreiðingin hjá Begtrup var nágreinilig, men báðir meintu, at tað fór at vera ein missur fyri Føroyar, varð løgtingsstovnurin niðurlagdur. Begtrup vísti á, at hóast Løgtingsins uppgáva sum dómstólur í veruleikanum var horvin, so hevði løgmaður, saman við fútanum og sorinskrivaranum, aðrar týðandi uppgávur at røkja yvirfyri føroysku almúguni; t.d. at taka sær av klagum yvir einahandilin, og at staðfesta ella vraka viðtøkur, sum almúgan gjørdi á tingi.[120] Av hesum sæst, at hóast einki mótmæli kom úr Føroyum í sambandi við ætlanirnar um at avtaka Løgtingið, so kom heldur einki tilmæli um at avtaka Løgtingið úr Føroyum. Donsku embætismenninir Lund og Begtrup meintu, at avtøkan fór at vera ein missur fyri landið, men teir mótmæltu ikki beinleiðis ætlanunum.

Helst hava ríkismyndugleikarnir tikið viðmerkingarnar frá Begtrup og Lund í álvara kortini, tí eftir hetta kom steðgur í málið. Meira hendir ikki við málinum fyrr enn í 1815, tá tann nýsetti sorinskrivarin Søren Sevel kærir sína neyð fyri Dansk

Kancelli um, at hann ikki hevur innivist í Tórshavn. Í hesum sambandi verður málið tikið upp aftur, og ætlanir eru frammi um at niðurleggja Løgting og løgmansembætið, og lata sorinskrivaranum Steigargarð. Bøndirnir í Vágunum fingu ikki sínar 8 merkur í jørð, tá avgerðin um niðurleggingina av løgtingsstovninum umsíður varð tikin í 1816, tí nú var grundgevingin tann, at sorinskrivaraembætið skuldi styrkjast við teimum miðlum, sum høvdu hoyrt til løgmansembætið. Tað vísti seg kortini, at sorinskrivarin als ikki var sinnaður at flyta inn í Steigargarð. Tí var avgjørt, at allar ognirnar hjá løgmansstólinum, eisini Steigargarður, skuldu seljast og brúkast til at betra um umstøðurnar hjá sorinskrivaranum. Steigargarður varð seldur í 1822, og sølan gav ríkinum eina inntøku uppá 15.845 ríkisdálar í silvuri. Peningurin varð brúktur til at betra um viðurskiftini hjá sorinskrivaranum og fútanum, og nakað var brúkt til skúlaskap. Tey dómsmál, sum fyrr komu fyri Løgtingið, skuldu nú koma fyri ein vanligan rætt undir leiðslu av sorinskrivaranum.

Hervið var aldargamla ting føroyinga farið í søguna saman við tí nærum eins gamla løgmanninum. Løgtingsstovnurin, sum, umframt at hava verið ein dómstólur, hevði verið fólksins umboðsstovnur, varð niðurlagdur, og eitt fullkomið danskt embætismannastýri, varð sett á stovn í Føroyum. Oyggjarnar fingu í 1816 serstakan amtmann, sum var búsitandi í Føroyum, og tær vóru í nógv størri mun enn áður stjórnaðar av donskum embætismonnum undir leiðslu av amtmanninum. Hetta var ein avleiðing av einaveldinum, sum bygdi á tað grundhugsjón, at alt vald, lóggevandi, útinnandi og dømandi, skuldi ganga út frá kongi, umvegis embætismenn hansara, og ikki gjøgnum fólkavaldar umboðsstovnar. Avtøkan av Løgtinginum hevði lítið og einki við serføroysk viðurskifti at gera, tí øll løgtingini í ríkinum vóru niðurløgd í 1816. Løgtingið á Bornholm, sum varð tað næstseinasta í ríkinum, varð niðurlagt í 1813. Tað er meira sannlíkt, at tað vóru serføroysk viðurskifti, sum gjørdu, at Føroya Løgting varð tað seinasta í ríkinum, sum var niðurlagt. Viðurskiftini í „*et så fjerntliggende land*“ vóru so nógv øðrvísi enn í restini av ríkinum, at Løgtingið hevði aðrar týðandi uppgávur í Føroyum enn at døma. Óivað var hetta høvuðsgrundin til, at endaliga avgerðin ikki kom fyrr enn í



Tá løgmansembætið varð niðurlagt, varð Steigargarður seldur. Toftirnar av gamla løgmansgarðinum síggjast enn í Sandavági.

1816. Heimatingini hildu áfram at virka sum tinglesingarstøð til 1896, tá tey eisini vórðu niðurløgd.

Tað hevur óivað verið uppgáva Løgtingsins sum fólksins umboðsstovnur, sum mest saknur var í aftaná 1816. Viðvíkjandi lóggávu og rættarskipan var menningin fyri langari tíð síðan farin frá fólkavaldum dómstólum. Løgfrøðin og dómsviðgerðin var vorðin so umfatandi og samansett, at einans fólk við løgfrøðiligari útbúgving høvdu førleika at ákæra og døma við útgangsstøði í lógini. Serstakir dómstólar, mannaðir við útbúnum løgfrøðingum, vóru tí so við og við settir á stovn í ríkinum, samstundis sum teir fólkavaldu dómstólarnir vóru avtiknir. Men hóast menningin innan fyrisitingina hevði havt við sær, at tíðin var farin frá fólkavaldum dómstólum, so var tíðin á ongan hátt farin frá fólksins umboðsstovnum. Tað var hetta, sum prósturin Begtrup hevði havt varhugan av longu í 1808, tá hann skrivaði eina frágreiðing um Løgtingið til ríkismyndugleikarnar. Løgtingið sum fólksins umboðsstovnur skuldi tí skjótt rísa aftur úr øskuni. Í kjalarvørrinum av fólkaræðisligu rembingunum í Europa í 1830- og 40-unum varð Løgtingið endurreist longu í 1852. Løgmansembætið, sum hevði verið ein samansjóðaður og týdningarmikil partur av tí gamla Løgtinginum, varð ikki endurstovnað aftur fyrr enn í 1948, men tá hevði heitið fingið ein annan týdning. Tað var tí eitt annað Løgting, sum var endurstovnað í 1852, enn tað, sum varð niðurlagt í 1816.



# II

# *Føroya amt – umleið 1720–1852*



## Føroya amt verður sett á stovn

Tá einaveldið varð sett á stovn í danska-norska ríkinum í 1661, var hetta úrslit av eini drúgvari søguligari gongd, sum hevði við sær, at ríkisvaldið styrktist á so gott sum øllum økjum. Allastaðni í Europa, har einaveldið varð sett á stovn, vóru avleiðingarnar, at fólkavald umboð máttu víkja fyri vælútbúnum embætismonnum í kongsins ríkisfyrisiting. Ferðin var kanska ikki tann sama allastaðni í einaveldislondunum, men rætningurin var tann sami. Stættartingini í danska-norska ríkinum, sum avmarkaðu kongsins vald, vóru avtikin longu í 1660, og fólkavaldu dómstólarnir, landstingini og løgtingini vóru niðurløgd um ár 1800.

Í Føroyum kom hetta at merkja, at eingin fólksins umboðsstovnur var í oyggjunum frá 1816 og til 1852. Allur myndugleiki í Føroyum, lóggevandi, útinnandi og dømandi, varð fyrisitin av kongi og embætismonnum hansara. Líka síðan 1200-talið høvdu norskir kongar havt sínar umboðsmenn í Føroyum. Sýslumaðurin er nevndur í landslógini frá 1274, og fúti og sorinskrivari hava verið í Føroyum síðan 1500-talið. Kongsins embætismenn høvdu allir serstakar fyrisitingarligar uppgávur í Føroyum. Eisini innan vebanda á tingi høvdu embætismenninir sæti, men tá fólksins umboðsstovnur, Løgtingið, varð tikin av í 1816, manglaði einaveldisskipanin ein miðsavnandi embætismyndugleika í Føroyum, sum kundi fyrisita kongsins vald í *„et så fjerntliggende land“*. Rættarligu broytingarnar í 1800-talinum, sum løgdu alt dómsvald í Føroyum til sorinskrivaran, kundu avloysa Løgtingsins uppgávur sum dómstólur, men fyrisitingarligu uppgávur Løgtingsins kundi sorinskrivarin ikki røkja. Hóast eingi prógv eru fyri, at nakar beinleiðis samanhangur er millum avtøkuna av Løgtinginum og setanina av sjálvstøðugum amtmansembæti í Føroyum,[121] so man lítið vera at ivast í, at í størri høpi eru báðar hendingarnar knýttar at tí umlegging av ríkisfyrisitingini, sum fór fram í danska-norska ríkinum undir einaveldinum.



Kristoffur Gabel rópti seg guvernør ella amtmann í Føroyum, men tað var ikki fyrr enn len gablanna fall aftur til kong, at Føroyar kundu gerast partur av amtskommunalu nýskipanunum frá 1661.

Í 1380 arvaðust norska og danska ríkið saman undir donskum kongsvaldi. Fyrisitingin av Føroyum varð flutt úr Bergen til Keypmannahavnar í 1620.[122] Oyggjarnar vóru kortini undir norskum løgskipanum meginpartin av 17. øld, men í seinnu helvt av 1600-talinum byrjaðu danskar løgskipanir sum ein avleiðing av fyrisitingarligum nýskipanum í danska-norska ríkinum undir einaveldinum at verða settar í gildi í Føroyum. Í 1661 vóru tey gomlu lenini avtikin, og ríkið varð býtt sundir í størri fyrisitingarligar eindir, nevnd amt. Yvir hvørjum amti varð ein amtmaður tilnevndur; nakrir av teimum vóru harumframt stiftsamtmenn, ið høvdu uppgávur at røkja saman við bispunum. Amtmenninir vóru kongsins hægstu embætismenn í amtunum, og teir høvdu rætt til at venda sær beinleiðis til kongsins stjórnarskrivstovu – Dansk Kancelli. Føroyar vóru, sum eitt undantak frá amtsskipanini, eitt len heilt til 1709.[123] Kongur hevði í 1655 givið Føroyar í len til Kristoffur Gabel fyri lívstíð, og tí kundu Føroyar ikki uttan víðari leggjast undir amtsskipanina.[124] Bæði Kristoffur Gabel og sonurin Fríðrikkur, sum tók við leninum í 1673, róptu seg kortini guvernørar ella amtmenn í Føroyum, men tað var ikki fyrr enn í 1709, tá lenið

fall aftur til kong, at oyggjarnar kundu gerast partur av amtskommunalu nýskipanunum frá 1661.

Føroyar gjørdust danskt amt longu í 1720,[125] men føroyskt amtmansembæti varð ikki sett á stovn fyrr enn í 1816.[126] Í 1720 var íslendski amtmaðurin, Peter Raben, sum eisini var stiftamtmaður Íslands, tilnevndur amtmaður í Føroyum. Íslendski stiftsamtmaðurin búði upprunaliga í Keypmannahavn. Føroyar vóru mettar at vera ov smáar til at fáa egnan amtmann, og tí var tað bæði høgligt og náttúrligt, at tær høvdu felags amtmann við Ísland. Viðurskiftini í hesum báðum oyggjasamfeløgunum í Norðuratlantshavi vóru í nógvar mátar so lík, at tann maður, sum hevði førleika til at røkja amtmansstarvið í Íslandi, eisini kundi hugsast at hava førleika til at røkja embætið í Føroyum.

Hendan skipanin hevur helst virkað væl, so leingi sum stiftsamtmaður Íslands helt til í Keypmannahavn, men tá hann í 1770 flutti til Íslands at búgva, var tað torført hjá honum at røkja amtsviðurskifti Føroya. Avtala var fingin í lag um, at ein avloysari skuldi setast í Føroyum og ein í Keypmannahavn, ið saman skuldu røkja amtsviðurskifti Føroya vegna íslendska stiftsamtmannin. Í Føroyum varð tað fútin Hammershaimb, ið kom at taka sær av amtsviðurskiftum Føroya í árunum fram til 1776, meðan tveir danir við stuttum millumbili vóru avloysarar í Keypmannahavn. Meðan tann fyrri avloysarin í Keypmannahavn átók sær arbeiðið ókeypis, so fekk tann seinni í 1773 frá eini stjórnarskrivstovu í Keypmannahavn boði at røkja uppgávuna móti gjaldi. Hetta seinna fekk týdning fyri amtsviðurskifti Føroya.

Stiftsamtmaðurin í Íslandi helt seg hvørki hava skyldu til ella møguleika fyri at útvega neyðuga peningin til at løna avloysaranum við. Í 1774 søkti hann tí í fyrsta lagi ríkismyndugleikarnar um neyðuga peningin, og í øðrum lagi helt hann, at avloysarin í Keypmannahavn var óneyðugur, um avloysarin í Føroyum fekk heimild til at venda sær beinleiðis til ríkisstovnarnar, eins og „*andre befuldmægtigede*" høvdu rætt til. Hetta seinna vóru ríkismyndugleikarnir í Keypmannahavn als ikki sinnaðir til at góðtaka. Endin varð, at *Dansk Kancelli* – kongsins stjórnarskrivstova – í 1775 vendi sær til stiftsamtmannin á Sælandi við fyrispurningi um at leggja Føroyar saman við Sælands stiftsamt. Hetta var stiftsamtmaðurin á

Sælandi á ongan hátt sinnaður til, tí hann helt seg ikki hava førleika til at røkja amtsviðurskiftini í Føroyum, sum vóru so nógv øðrvísi enn á Sælandi. Dansk Kancelli arbeiddi kortini víðari við málinum, og í 1776, eftir at stiftsamtmaðurin á Sælandi var deyður, vóru Føroyar lagdar saman við Sælands amt.

Tað var á ongan hátt eins nátúrligt at leggja Føroyar saman við Sælands stiftsamt, sum tað í síni tíð hevði verið at lagt oyggjarnar saman við Íslands stiftsamt. Grundgevingin fyri samanleggingini var heldur ikki tann, at talan var um eina nátúrliga fyrisitingarliga eind, men tvørturímóti var grundgevingin einans tann, at íslendski stiftsamtmaðurin ikki fekk røkt amtsviðurskifti Føroya, tá hann búði í Íslandi. Tað var tí ikki so løgið, at trupulleikar skjótt tóku seg upp aftur viðvíkjandi amtsviðurskiftum Føroya. Í 1788 gjørdi stiftsamtmaðurin avtalu við Lund løgmann um, at hesin skuldi taka sær av amtsviðurskiftum Føroya. Lund løgmaður røkti amtsviðurskifti Føroya í tíðarskeiðinum frá 1788 til 1804, tá hann endaliga fór úr Føroyum til Noregs.

Um hetta mundið byrjaðu hugsanir at koma fram um at seta serstakan amtmann í Føroyum. Í 1802 reisti Lund løgmaður málið yvirfyri donsku ríkismyndugleikunum, men onkursvegna datt málið niðurfyri. Í tíðarskeiðinum frá 1806 til 1816 vóru tað tann aldrandi fútin Hammershaimb og Løbner, kommandanturin á skansanum, sum í felag røktu amtsviðurskifti Føroya. Formliga var tað framvegis soleiðis, at Hammershaimb og Løbner røktu amtsviðurskifti Føroya vegna stiftsamtmannin á Sælandi, men í veruleikanum virkaði Løbner skjótt sum veruligur amtmaður. Eins og veruligir amtmenn byrjaði Løbner at samskifta beinleiðis við stjórnarstovnarnar í Keypmannahavn uttanum stiftsamtmannin á Sælandi. Tað var tí ikki so løgið, at tað júst var Løbner, ið varð settur sum fyrsti amtmaður í Føroyum, tá tað at enda varð samtykt at seta sjálvstøðugan amtmann í Føroyum.[127] Hóast tað ikki kann skjalprógvast, so var tað neyvan heilt tilvildarligt, at Løbner varð konstitueraður amtmaður tann 6. juli í 1816, knappar tveir mánaðir eftir, at Føroya Løgting var tikið av. Tað er heldur ikki óhugsandi, at Løbner sjálvur virkaði fyri, at hesar báðar ætlanirnar skuldu fremjast, tí hann var í Keypmannahavn



Longu meðan Løbner var kommandantur á skansanum, virkaði hann í veruleikanum sum amtmaður í Føroyum. 6. juli 1816 var hann konstitueraður sum fyrsti amtmaður Føroya.

í 1814-15, og hevði í fleiri umførum samband við danskar ríkismyndugleikar.

Avtøkan av Løgtinginum og stovnsetanin av amtmansembæti í Føroyum eiga kortini at setast inn í ein størri samanhang og skiljast sum ein partur av teimum fyrisitingarligu og løgfrøðiligu nýskipanunum í danska-norska ríkinum, sum vóru framdar undir einaveldinum. Hægsti útinnandi og fyrisitingarligi myndugleiki í oyggjunum skuldi liggja hjá amtmanninum, meðan dómsmyndugleikin kom at liggja hjá sorinskrivaranum. Tað var ikki longur rúm fyri Løgtinginum í hesi embætismannaskipan.

## Heimildir amtmansins

Í tíðini undan avtøku Løgtingsins, tá eingin amtmaður var í Føroyum, høvdu reglurnar viðvíkjandi ígildiskomu av lóggávu í Føroyum ikki verið greiðar. Lóggávuvaldið var hjá kongi, men tað var ongantíð gjørt heilt greitt, hvussu lógir vóru settar í gildi í Føroyum, og tí var ofta torført at fáa greiðu á, hvørjar lógir veruliga vóru galdandi í oyggjunum. Í tingbókini er dømi frá 1632 um, at fútin hevur ákært á tingi eftir eini lóg, meðan Løgtingið dømdi eftir aðrari.[128] Hóast tað við reskript

frá 12. mai 1668 varð staðfest, at lógir skuldu setast serstakt í gildi fyri Føroyar, um tær skuldi fáa gildi,[129] so vóru í veruleikanum fleiri ymisk sløg av lógum brúktar í Føroyum, ið vóru settar í gildi á ymiskan hátt. Í fyrsta lagi var talan um lógir, sum serstakt vóru givnar og settar í gildi fyri Føroyar. Hesar vóru Seyðabrævið frá 1298, Hundabrævið frá 1350 og Skipanin um Tingfaratoll frá um 1400. Í øðrum lagi var talan um lógir, sum vóru givnar fyri eitt annað lógarøki, men sum harumframt vóru settar í gildi í Føroyum. Dømi um tílíkar vóru Landslógin frá 1274 og møguliga Gamla Gulatingslógin frá umleið 930. Í triðja lagi hava lógir verið brúktar í Føroyum, sum ongantíð vóru settar í gildi í Føroyum.[130]

Hóast hetta var til at halda skil á í eini tíð, tá lóggávan var lítið rúgvusmikil og einføld, so var hetta hvørki løgfrøðiliga ella fyrisitingarliga nøktandi, tá lógarverkið og rættarskipanin gjørdust meira umfatandi við einaveldinum. Tí gjørdist tað í 1700-talinum vanligt, at allar danskar lógir vóru tinglisnar í Føroyum, men hetta skapti ein heilt annan trupulleika: nú var eitt ótal av lógum settar í gildi í Føroyum, sum als ikki hóskaðu til føroysk viðurskifti. Tílíkir trupulleikar vóru helst størstir í norsku skattlondunum í Norðuratlantshavi, t.d. Ísland og Føroyar, har viðurskiftini vóru so nógv øðrvísi enn í restini av ríkinum. Trupulleikarnir við teimum norsku skattlondunum gjørdust óivað størri í 1814, tá tað dupulta danska-norska kongsveldið, sum ein avleiðing av napoleonskríggjunum, fór í tvíningar: Noreg varð loyst úr ríkinum og fór undir Svøríki, meðan Danmark sat eftir við nøkrum øðrvísi og smáum oyggjasamfeløgum í Norðuratlantshavi, sum upprunaliga høvdu verið norsk. Í øllum førum gjørdist tað neyðugt hjá donskum stjórnarstovnum at menna serstakar mannagongdir fyri hesi smáu og øðrvísi økini, tá komið var inn í 1800-talið.

Fyrst í 1800-talinum varð farið undir at gera hetta arbeiðið. Við *Kancelliplacat frá 23. mars 1813* varð ásett, at vanligar danskar lógir ikki høvdu gildi í Føroyum uttan so, at tær vóru tinglisnar á øllum heimatingunum í teimum 6 sýslunum í Føroyum.[131] Heimatingini, sum upprunaliga høvdu verið undirdómstólar, fingu í 1813 eina nýggja uppgávu, og vóru varðveitt sum tinglesingarstøð hjá ríkismyndugleikunum, tá lógir og fyriskipanir skuldu setast í gildi í Føroyum.[132] Við *Kongaligari fyriskipan tann 6. juni 1821* vóru greiðar mannagongdir

ásettar fyri, hvussu farast skuldi fram, tá danskar lógir skuldu setast í gildi í Føroyum. Eftir hetta var greitt tilskilað, at meðan kongur hevði tann endaliga lóggevandi myndugleikan í øllum tí danska ríkinum, so lá lóggávuinitiativið hjá Dansk Kancelli, og tann ráðgevandi uppgávan hjá lokala myndugleikanum, amtmanninum. Stutt eftir vóru broytingar framdar, sum høvdu við sær, at Dansk Kancelli og amtmaðurin í felag høvdu lóggávuinitiativið.[133] Í meginregluni kom hetta at merkja, at vanligar danskar lógir ikki vóru settar í gildi í Føroyum, fyrr enn tær høvdu fingið góðkenning frá Dansk Kancelli, ella – um lógin skuldi setast í gildi í Føroyum í broyttum líki – beinleiðis góðkenning við kongaligari fyriskipan. Vóru hesar mannagongdir í kongaligu fyriskipanini frá 1821 fylgdar, so kundi amtmaðurin formliga seta lógina í gildi í Føroyum við at lata hana tinglesa. Tinglesingin var framvegis tað, sum løgfrøðiliga setti lógina í gildi. Í verki gjørdist mannagongdin tann, at Dansk Kancelli bað tann lokala sakkunnleikan, amtmannin, úttala seg um hvørt ein ávís lóg var egnað til at seta í gildi í Føroyum ella ikki, og honum varð eisini litið upp í hendur at tinglesa lógirnar.

Broyttu reglurnar viðvíkjandi ígildiseting av lógum í Føroyum góvu amtmanninum ómetaliga stórt vald, serstakliga tá hugsað verður um, at hann ongan lokalan fólkavaldan stovn hevði at ráðføra seg við. Í veruleikanum fekk amtmaðurin, sjálvt um einaveldis kongur formliga hevði lóggávuvaldið, myndugleika til bæði at avgera, hvørjar lógir áttu at verða settar í gildi í Føroyum og heimild til at seta tær í gildi.[134] Myndugleikin hjá amtmanninum kravdi, at hann, eins og aðrir amtmenn í ríkinum, hevði rætt til beinleiðis at venda sær til kong ella stjórnarskrivstovu hansara í Keypmannahavn.

Hóast amtmaðurin einsamallur fekk hesar heimildir, so fingu broytingarnar tann avgerandi týdning, at tað var endaliga avgjørt, at Føroyar vóru eitt serstakt lóggávuøki í danska ríkinum, har danskar ríkislógir ikki av sær sjálvum vóru settar í gildi.[135] Nýggju reglurnar gjørdu skipanina nógv greiðari. Nú kundi ivi ikki longur stinga seg upp um, hvørt ein lóg var í gildi í Føroyum ella ikki. Hartil vóru einans tær lógir settar í gildi í Føroyum, sum amtmaðurin helt hóska til føroysk viðurskifti. Lokali sakkunnleikin, sum í tíðarskeiðnum frá



Amtmanshúsini fyltu nógv í býarmyndini í Havn mitt í 19. øld. Manna millum fingu tey tí navnið amtmansborgin.

1816-1852 var amtmaðurin, skuldi fyrst góðkenna lógirnar og síðan lata tær tinglesa. Tástaðni fingu tær gildi í Føroyum.

Hesar reglur og mannagongdir vóru galdandi í øllum tí løgtingsleysa tíðarskeiðinum, men í 1855 varð tann broyting framd, at tað beinleiðis skuldi tilskilast í lógini, um hon ikki hevði gildi í Føroyum. Hereftir komu kendu orðini „*denne lov gælder ikke for Færøerne*“ at vera skoytt upp í allar lógir, sum ikki skuldu setast í gildi í Føroyum. Allar lógir, sum ikki høvdu hetta frámerkið, vóru við tinglesing á vártingunum settar í gildi í Føroyum. Harvið fór kongaliga fyriskipanin frá 1821 úr gildi, men „Kancelliplacatin“ frá 1813 varð verandi í gildi heilt til 1989, tó í broyttum líki aftaná avtøkuna av heimatingunum í 1896,[136] tá tinglesingin ikki longur skuldi fremjast í hvørjari sýslu sær, men í almenna kunngerðarblaðnum Dimmalætting.

## Amtmenninir og virksemi teirra

Tað stóra vald, sum amtmanninum varð litið upp í hendi, hevði ta avleiðing, at tað kom at hava stóran týdning, hvør tað var, sum sat í embætinum. Í løgtingsleysa tíðarskeiðnum frá 1816 til 1852 sótu 5 amtmenn í føroyska amtmansembætinum.

Tann fyrsti amtmaðurin, sum hevði fastan bústað í Føroyum, var Løbner. Hann var amtmaður Føroya frá 1816 til 1825, formliga kortini til 1828. Løbner varð ikki settur í embætið, tí hann formliga var skikkaður til tað. Formliga skuldu amtmenninir, sambært ásetingunum í kongaligu fyriskipanini frá 6. juni 1821, vera løgfrøðingar,[137] men Løbner, sum var kommandantur á skansanum í Havn, var ikki løgfrøðingur. Jóannes Patursson hevur borið fram, at Løbner varð settur í amtmansembætið, tí at hann hevði „*udvist konduite*", tá Havnar skansi varð tikin av bretum í 1808.[138] Sannlíkindini fyri, at henda grundgevingin, sum er endurtikin aftur og aftur í føroyskari søguskriving, kann hava verið høvuðsgrundarlagið undir avgerðini hjá donskum myndugleikum, tá Løbner varð settur í amtmansembætið, eru kortini ikki stór, tí eftir øllum at døma varð skansin treytaleyst yvirgivin til bretar í 1808. Tað finst heldur einki prógv fyri, at orðingin „*udmærket konduite*", sum bæði finst í einum brævi frá rentukamarinum til kong, dagfest tann 2. juli 1816, har mælt verður til at seta Løbner í amtmansembætið,[139] og í einum journali í rentukamarinum, hevur nakað við skansahertøkuna at gera. Tvørturímóti sipar orðingin „*udmærket konduite*" til arbeiðið hjá Løbner sum lækni, meðan Danmark var í kríggj við bretar.[140] Løbner var neyvan nakar avhildin maður í Føroyum, men mest sannlíkt man vera, at høvuðsgrundgevingin hjá ríkismyndugleikunum fyri at seta hann í amtsmansembætið í 1816 hevur verið tann, at hann var tann royndasti av teimum donsku embætismonnunum í Føroyum um hetta mundið.[141] Eingin fastsettur løgmaður var í oyggjunum, og tann gamli fútin Hammershaimb var farin frá í 1815. Fútin var sostatt nýsettur, og sorinskrivarin hevði ikki sitið í starvinum í meira enn 3 ár. Hartil kom, at Løbner frammanundan hevði tikið sær av amtsviðurskiftum Føroya, vegna stiftamtmannin á Sælandi. Løbner mundi vera tað mest upplagda valið til amtmann.



Christian Ludvig Tillisch var næsti amtmaður Føroya.



Frederik Ferdinand Tillisch tók við amtmansstarvinum eftir bróður sín Christian Ludvig, og gjørdist soleiðis triðji amtmaður Føroya.

Eftir Løbner varð Christian Ludvig Tillisch, ein formliga skikkaður løgfrøðingur, settur í amtmansstarvið í Føroyum. Tillisch var konstitueraður amtmaður í 1825, og settur í fast starv í 1828. Hann fór úr starvinum aftur longu í 1830, tá bróður hansara Frederik Ferdinand Tillisch, sum eisini var løgfrøðingur, tók við starvinum. Frederik Tillisch sat í starvinum til 1837. Báðir vóru teir framtakshugaðir menn, og



Christian Pløyen gjørdist amtmaður í 1837. Hann var helst fólkakærasti amtmaður Føroya.

virkaðu síðst í 1820-unum og fyrst í 1830-unum fyri fríhandli í Føroyum. Í 1828 var Christian Tillisch ein av stigtakarunum til stovnanina av „*Færø Amts Bibliotek*".[142]

Christian Pløyen, sum var Føroya amtmaður frá 1837 til 1848, var eisini framtakshugaður maður. Hann arbeiddi íðin fyri at avtaka einahandilin, sum hann meinti var ein forðing fyri øllum framburði í landinum. Í 1839 fór hann saman við 3 føroyingum til Orknoyar og Hetlands, har serstakliga varð hugt eftir vinnuviðurskiftunum. Donsku ríkismyndugleikarnir bóru meginpartin av útreiðslunum til ferðina. Tað, sum ítøkiliga kom burtur úr ferðini, var, at føroyingar lærdu at brúka langlínu eins og hetlendingar. Harumframt hevði Pløyen ein hetlendskan torvhaka við aftur til Føroya, sum gav føroyingum íblástur til at betra um teirra egna haka. Heimafturkomin skrivaði Pløyen eisini eina bók um ferðina, har ofta varð víst á, at vinnuviðurskiftini í hesum oyggjum vóru meira frammaliga enn í Føroyum, tí har var fríhandil.[143] Bókin hjá Pløyen fekk týdning fyri kjakið í Føroyum upp undir avtøkuna av einahandlinum í 1856. Pløyen var frælslyntur maður ikki einans á tí vinnuliga økinum men eisini á tí politiska økinum. Hann tók ofta onnur við uppá ráð, tá avgerðir skuldu takast um føroysk viðurskifti. Undir fyrireikingunum til eina føroyska skúlalóg í 1840 fingu allir prestarnir høvi til at koma við viðmerkingum til uppskotið. Sama ár, tá fyrireikingar vóru gjørdar til eina føroyska landbúnaðarlóg, kallaði Pløyen umboð fyri føroyska fólkið saman, og hesi vóru við til at tilevna lógaruppskotið. Nøkur ár seinni, í 1847, samráddust embætismenn og føroyskir bøndir um eitt uppskot til eina føroyska vallóg til stættartingið í Roskilde.[144] Stutt eftir hetta fór Pløyen frá sum Føroya amtmaður og fór í starv sum amtmaður í Danmark.

Í staðin fyri tann fólkakæra Pløyen verður Carl Emil Dahlerup amtmaður í 1848, einans 4 ár undan endurstovnanini av Løgtinginum. Dahlerup var amtmaður, fleiri ár eftir at Løgtingið var endurstovnað, men í 1861 varð hann noyddur til at fara frá sum amtmaður orsakað av eini ósemju millum hann og Løgtingið. Her skal heilt stutt vera komið inn á virksemi Dahlerups í tíðini undan endurstovnan Løgtingsins. Dahlerup var eins og undanmenn hansara ein væl skikkaður løgfrøðingur, men hann hevði ikki so gott orð á sær sum Pløyen.



Erindringer

fra

en Reise til Shetlandsøerne, Örkenøerne og Skotland

i Sommeren 1839

af

Christian Pløyen,
Amtmand og Commandant paa Færøerne.

Kjøbenhavn.
Forlagt af Universitets-Boghandler C. A. Reitzel.
Trykt i Bianco Lunos Bogtrykkeri.
1840.

Bókin hjá Pløyen um ferðina til Hetlands og Orknoyar fekk týdning fyri kjakið um avtøkuna av einahandlinum.

Hann var ein eitt sindur hástórur og knortlutur embætismaður, ið føroyingar ongantíð fingu nakran serligan tokka til, men hann hevði hollan fakligan førleika at hava sínar áskoðanir í. Hartil var hann neyvan so ófrælslyntur, sum eftirtíðin ofta hevur vilja gjørt hann til. Í øllum førum er tað nógv, sum bendir á, at Dahlerup eisini hevði fólkaræðislig sereyðkenni, sjálvt um hansara atferð og hugburður yvirfyri føroyingum kundu vera hástór. Í 1849 var hann t.d. ímóti, at kongur

fyribils tilnevndi føroysku umboðini til danska Ríkisdagin. Dahlerup helt, at føroyingar sjálvir skuldu velja hesar menn, og teir skuldu tí ikki umboðast á Ríkisdegi, fyrr enn ein vallóg fyri Føroyar varð gjørd til endamálið. Harumframt hevði hann ta áskoðan, at føroyingar áttu at fáa høvi til at úttala seg um, hvussu teir skuldu umboðast í danska Ríkisdegnum.[145] Seinni, tá uppskot til kommunallóg og amtsráð varð tilevnað av amtmanni, sorinskrivara, fúta og prósti í felag, boðsendi Dahlerup eftir boðum frá ríkisstjórnini 11 monnum kring landið til fundar í Havn tann 28. mars 1850. Úrslitið av fundinum við Dahlerup gjørdist kanska ikki tað, sum allir føroyingar høvdu ynskt, men tað var ikki einans ábyrgd Dahlerups, tí stjórnin hevði lagt ávísar treytir við arbeiðssetningin. Greitt verður nærri frá hesum seinni, men í hesum sambandi er týdningarmikið at staðfesta, at umboð fyri føroyska fólkið fingu høvi til at úttala seg um uppskotið.

Sjálvt um amtmenninir í Føroyum høvdu stórt vald, og í veruleikanum sjálvir kundu avgera, hvørjar lógir vóru egnaðar til at seta í gildi í Føroyum, so høvdu teir kortini ofta lyndi til ella fingu álagt at ráðføra seg við umboð fyri føroyska fólkið, tá týdningarmiklar lógir skuldu setast í gildi í oyggjunum. Í øllum førum hevur hetta ikki verið óvanligt í tíðini frá seinast í 1830-unum. Men tá vóru fólkaræðisligu rembingarnar longu farnar at gera seg galdandi í Danmark, og fleiri av amtmonnunum, sum komu hendan vegin frá seinast í 20-unum vóru týðiliga ávirkaðir av hesum frælslynta ráki. Spurningurin var, hvussu føroyska lóggávuøkið, sum fyrst í 19. øld var skilmarkað frá tí danska, kundi gerast ein partur av hesum fólkaræðisligu rembingum.



# III

# *Danska grundlógin og Løgtingið – 1852–1906*



## Fólkaræðið og endurreisn Løgtingsins

Í 1789 sendi franska kollveltingin ógvusligar politiskar og hugmyndafrøðiligar ristingar gjøgnum eitt í høvuðsheitum einaveldisstjórnað Europa. Sjálvt um einaveldiskongarnir skjótt eftir kollveltingina stórt sæð høvdu endurreist einaveldið, so var tað týðiligt, at einaveldistíðarskeiðið var farið at halla. Tær kollveltingarligu hugsjónirnar lótu seg í longdini ikki tøla, og í 1830 og í 1848 fóru aftur kollveltingar gjøgnum alt Europa, sum skakaðu grundarlagið undir einaveldinum. Hesar avleiðingar av fronsku kollveltingini komu at fáa avgerandi týdning fyri alt tað politiska lívið í Europa í 1800-talinum.

### Europeiska einaveldisskipanin í kreppu

Valdsgrundarlagið undir einaveldinum varð í høvuðsheitum aðalin, nakrir stórir jarðardráttar, ið sótu á meginpartinum av framleiðslugøgnunum í landbúnaðarsamfelagnum – jørðini. Hesa valdsstøðu í landbúnaðarsamfelagnum hevði aðalin, sum einans umfataðu nøkur heilt fá % av fólkinum, brúkt til at vinna sær nøkur samfelagslig serrættindi (privilegiir): undir einaveldinum var týdningarmiklasta serrættindi hjá aðalstættini hennara skattafrælsi. Aðalstættin fataði einaveldið sum ta politisku skipan, sum skuldi staðfesta og verja hennara aldargomlu politisku og búskaparligu serrættindi. Í tí einaveldisstýrda landbúnaðarsamfelagnum hevði aðalin tí eina politiska og búskaparliga serstøðu, sum grundaði seg á ta valdsstøðu, sum aðalstættin hevði, við tað at hon sat á framleiðslugøgnunum í samfelagnum.

Tá 18. øld fór at halla, var bæði tann samfelagsliga menningin og tann heimspekiliga fatanin farin frá serstøðu aðalstættarinnar. Við framvaksandi handilsvirkseminum, sum av álvara fór at taka seg upp í kjalarvørrinum av rannsóknarferðunum í seinnu helvt av 1400-talinum, vaks fram ein múgvandi og politisk tilvitað borgarastætt, sum í 1700-talinum byrjaði at seta krøv fram um at fáa lut í politiska valdinum. Harvið setti

borgarastættin eisini krøv fram um at avtaka samfelagsligu serstøðuna hjá aðalstættini. Meðan aðalstættin vildi verja sína samfelagsligu serstøðu við einum sterkum kongsvaldi, sum bæði hevði vald og myndugleika til at hevda hennara serrættindi, so vildi borgarastættin verja og menna síni handilsligu áhugamál við at avmarka rættin hjá kongsvaldinum ella aðalinum til at leggja seg út í hennara handilsliga virksemi. Borgarastættin var ikki vorðin múgvandi grundað á jørð, landbúnaðarframleiðslu ella serrættindi, men heldur var hon vorðin múgvandi gjøgnum handilsvirksemið á framvaksandi heimsmarknaðinum. Borgarastættin vildi tí hava allar forðingar – handilsligar eins væl og politiskar – avtiknar, tí hesar avlagaðu kappingina og settu forðingar fyri hennara handilsliga virksemi.

Heimspekiliga var tíðin eisini farin frá einaveldinum. Hugmyndir um rótfest rættindi og skyldur hjá tí einstaka borgaranum og tankar um upplýsing av almúguni til politiskt medvit byrjaðu at gera seg galdandi í upplýsta 1700-talinum. Liberalistiska frælsishugsjónin gjørdist tann ráðandi hugmyndafrøðin í tíðini – ein hugmyndafrøði, sum á tí búskaparliga økinum varð orðað í 1776 av skotska búskaparfrøðinginum Adam Smith. Liberalisman hjá Adam Smith var ein búskaparlig læra, ið segði, at búskapurin fór at laga seg til gagns fyri øll, um so var, at staturin ikki legði seg út í búskapin. Tí átti búskapurin í so stóran mun sum gjørligt at tillagast til ein frælsan marknað. Liberalisman var eisini ein politisk heimspeki, sum tosaði um, at øll menniskju vóru fødd við nøkrum frælsisrættindum, ið eingin hevði rætt til at taka frá henni. Staturin hevði ikki rætt til at leggja seg út í viðurskiftini hjá tí einstaka borgaranum, men hann átti einans at hava til uppgávu at verja rættindini hjá borgarunum, um so var, at hesi vóru hótt av øðrum borgarum. Statsvaldið átti í grundregluni at vera avmarkað. Tað var ikki so løgið, at borgarastættin tók liberalismuna til sín.

Síðst í 18. øld var tíðin búgvin til at gera upp við einaveldishugsjónina, og tá bøndurnir hartil reistust móti teirri kúgan og skattaoki, ið kongur og aðal løgdu á herðar teirra, var tíðin hjá borgarastættini komin, og tær upplýstu hugmyndafrøðirnar kundu roynast í verki. Kollveltingarnar seinast í 18. og í fyrru helvt av 19. øld vóru settar í gongd av ónøgdum og kúgaðum bóndum. Politiskt medvit og hugsjónir, sum rukku út yvir tað

ítøkiligu kúganina í gerandisdegnum, høvdu bøndurnir kortini ikki. Tí var tað tann máttmikla og politiskt tilvitaða borgarastættin, sum setti politiskt innihald, hugsjónir og rætning á kollveltingarnar. Kollveltingarnar í 1800-talinum vóru borgarligar kollveltingar, sum borgarastættin í stóran mun kom at seta síni eyðkenni á. Tað var tí meira ein tryggjan av politiska frælsinum og ognarrættinum, ið hevði týdning fyri múgvandi borgarastættina, enn ein tryggjan av sosialum rættvísi, – sum hevði gagnað teimum fátøku bóndunum – ið kom at eyðkenna hesar kollveltingar.

**Danska einaveldið og stættartingini**

Nógvastaðni gjørdist avleiðingin tann, at einaveldiskongur mátti geva valdið frá sær og lata sær lynda, at vald hansara varð avmarkað av eini grundlóg, ið tryggjaði borgarunum nøkur grundleggjandi rættindi, sum ikki kundu takast frá teimum. Soleiðis kom at ganga í Danmark, har tann framvaksandi borgarastættin tók hugmyndafrøðiligu rákini uttan úr Europa til sín. Nógvastaðni í Europa gingu hesar broytingar ikki friðarliga fyri seg, men í Danmark kom kollveltingin í høvuðsheitum at ganga friðarliga fyri seg.

Danska samfelagið var eins og onnur europeisk samfeløg í 1700-talinum eitt stættarsamfelag, har fólkið var býtt sundur í væl avmarkaðar stættir, ið høvdu hvør síni serstøku rættindi og skyldur í samfelagnum. Í Danmark vóru fýra stættir: aðalstættin, klerkastættin, borgarastættin og bóndastættin. Limirnir í bóndastættini, sum taldi meginpartin av fólkinum, skuldu kortini leita leingi fyri at fáa eygað á síni rættindi, men skyldurnar og skattabyrðurnar vóru avbera nærverandi fyri bóndan. Áðrenn einaveldið varð sett í gildi í 1661, var vanligt, at umboð fyri stættirnar vóru innkallaði við jøvnum millumbili, til tess at viðgera ymisk viðurskifti, t.d. hvussu nógvan skatt kongur kundi krevja inn frá borgarum og bóndum, men eftir at einaveldið varð sett í gildi, komu stættirnar ikki saman, og kongur stjórnaði landinum óheft av stættunum. Tað var hendan skipanin, sum bæði staðfesti ójavna millum fólkið og helt fólkið uttanfyri alla politiska ávirkan, sum kom undir vaksandi trýst allastaðni í Europa seinast í 1700-talinum – eitt trýst, sum kom í hæddina við kollveltingunum í Europa í 1830 og 1848.

Tá trýstið kortini ikki gjørdist so stórt í Danmark, at valdsharrarnir, sum so nógva aðrastaðni í Europa, mistu tamarhaldið á hendingunum, hekk tað saman við, at avgjørt varð at fremja nýskipanir í Danmark rættuliga tíðliga. Longu í 1831 fór kongur undir fyrireikingar til at innkalla umboð fyri tey fýra stættartingini í Danmark. Eitt stættarting fyri Oyggjarnar í Roskilde, eitt fyri Norðurjútland í Viborg, eitt fyri Suðurjútland í Slesvig og eitt fyri Holsten í Itzehoe. Ætlanin var, at tingini skuldu hava ráðgevandi myndugleika viðvíkjandi kongsins lóggávu, men tey skuldu ikki hava rætt til at leggja lógaruppskot fram. Lóggávuvaldið skuldi framvegis liggja hjá kongi. Talan var um *„rådgivende provinsialstænder“*, sum harumframt skuldu veljast av tí múgvandi partinum av mannfólkunum í danska ríkinum. Einans umleið 3% av fólkinum høvdu valrætt til stættartingini; í høvuðsheitum var talan um góðseigarar, borgarar og stórbøndur.[146] Kortini vóru tey fyrstu valini til stættartingini, sum gjørdust veruleiki í 1834, ein byrjandi miðspjaðing og demokratisering av teirri miðsavnaðu einaveldisskipanini í danska ríkinum.

**Donsku stættartingini og Føroyar**

Spurningurin var, hvussu donsku oyggjasamfeløgini Ísland og Føroyar skuldu umboðast á stættartingunum.[147] Grønland var mett sum eitt hjáland og skuldi tí ikki hava somu rættindi sum meginøkið. Lætt var at avgera, at Ísland og Føroyar skuldu umboðast á stættartinginum í Roskilde, tí á Sælandi lá frammanundan fyrisitingin av hesum oyggjum. Torførari var at avgera, hvussu hesi oyggjasamfeløg skuldu umboðast. Sum nevnt, so var danska samfelagið um hetta mundið eitt væl útviklað stættarsamfelag, har fólkið var býtt sundur í væl avmarkaðar stættir við væl avmarkaðum rættindum og skyldum. Gamla stættarskipanin gjørdist tí grundarlagið undir valunum til donsku stættartingini í 1834, men trupulleikin í Íslandi og Føroyum var tann, at hesi samfeløgini ikki vóru stættarsamfeløg, eins og Danmark og onnur europeisk samfeløg.[148] Sjálvandi var stórur munur á fólki í Føroyum, – onkur var kongsbóndi, meðan onnur vóru nærum ognarleys – men eingin væl avmarkað góðseigarastætt fanst í oyggjunum, sum livdi av arbeiðinum hjá eini eins væl avmarkaðari festibóndastætt. Hóast talan var um kongsbøndur ella almúgu, so var



Føroyar vóru umboðaðar á stættartinginum í Roskilde.

lívsgrundarlagið landbúnaður við fiskivinnu og tí, sum fekst úr havinum, sum ískoyti.

Skuldu føroyingar umboðast á stættartingunum á sama hátt sum danska fólkið, varð neyðugt at býta fólkið upp í stættir, sum ikki funnust í føroyska samfelagnum frammanundan. Hetta var av góðum grundum hildið at vera óheppið, og tí varð avgjørt í november 1833, at Føroyar og Ísland *fyribils* skuldu umboðast á stættartinginum í Roskilde av ávíkavist einum og tveimum kongstilnevndum umboðum.[149] Seinni, tá valskipan varð evnað til, skuldi endalig støða takast til, hvussu føroyska og íslendska umboðanin skuldi skipast.

Íslendsku umboðini á stættartinginum vóru altíð íslendingar, meðan føroyska umboðið altíð var ein fyrrverandi danskur embætismaður í Føroyum. Tað hevur ikki verið mett, at tað millum føroysku bøndurnar funnust menn, ið vóru nóg upplýstir til at umboða oyggjarnar á einum stættartingi. Ein trupulleiki við hesi skipan var, at tað ikki var nakar føroyingur á stættartinginum í Roskilde, sum kundi ráðgeva kongi í føroyskum viðurskiftum. Kortini kann sigast, at teir flestu av donsku embætismonnunum, sum umboðaðu Føroyar á stættartinginum, bæði vóru kønir og høvdu stóran áhuga í føroyskum viðurskiftum. Sum dømi kann nevnast, at fyrrverandi amtmenninir Christian og Ludvig Tillish, sum báðir vóru vælumtóktir í Føroyum, umboðaðu Føroyar á stættartinginum, og seinasta kongstilnevnda umboð føroyinga á stættartinginum var Christian Pløyen, ið eisini var nógv avhildin av føroyingum,

tá hann var amtmaður í Føroyum. So hepnir vóru føroyingar ikki altíð; onkur av kongstilnevndu føroysku umboðunum á stættartinginum røkti ikki føroysk áhugamál.

Í 1839 fingu íslendingar høvi til at siga sína hugsan um íslendsku umboðanina, og boðini til donsku ríkismyndugleikarnar vóru greið: íslendingar vildu als ikki umboðast á nøkrum av teimum fýra donsku stættartingunum.[150] Ístaðin ynsktu íslendingar at fáa sítt egna stættarting, sum skuldi hava ráðgevandi myndugleika viðvíkjandi íslendskum stjórnarviðurskiftum – eins og hini fýra stættartingini í Danmark høvdu tað. Hetta ynski íslendinga varð gingið teimum á møti. Í 1843 var íslendska *Altingið* endurreist sum stættarting íslendinga, ið skuldi ráðgeva kongi í íslendskum viðurskiftum. Harvið fingu íslendingar sítt egna ráðgevandi ting, og mistu umboðanina í Roskilde, men staðfest varð, at føroyingar *fyribils* skuldu halda áfram at vera umboðaðir av einum kongstilnevndum umboði á stættartinginum.

Sum norsk lond høvdu Ísland og Føroyar havt eina nærum felags stjórnarliga søgu í danska ríkinum, so lítið er at ivast í, at hesar týdningarmiklu hendingar í Íslandi hava skundað undir áhugan í Føroyum fyri at fáa Løgtingið endurreist. Hetta sæst eisini av tí, at bæði í 1844 og í 1846 komu umsóknir frá føroyingum um at fáa Løgtingið endurreist. Í 1844 sendu føroyingar umsókn til stættartingið í Roskilde um at fáa sett á stovn ein føroyskan umboðsstovn „*lig det gamle lagting*“,[151] og í 1846 kom umsókn frá 28 føroyingum um „*at der på Færøerne oprettes et Folketing til at give Raad med Hensyn til Landets Lovgivning, og Kommunalraad til at deltage i Landets bestyrelse*“.[152] Talan var sostatt um ein stovn við tveimum høvuðsuppgávum, ið nakrir føroyingar vildu hava settan á stovn: ein stovn sum 1) skuldi ráðgeva kongi í viðurskiftum viðvíkjandi serføroyskari lóggávu, og 2) skuldi hava lut í fyrisitingini av Føroyum. Stutt sagt vildu nakrir føroyingar hava eitt stættarting í Føroyum.

Ynski føroyinga um at fáa sítt egna stættarting varð ikki gingið á møti á hesum sinni. Ein nevnd, sum var sett í 1846 til at viðgera spurningin, grundgav fyri hesi støðutakan á henda hátt: „*Færøernes beboere, som ikkun udgør ca. 7000 individer, består udelukkende af simple for højere dannelse blottede almuesfolk, og en repræsentation, udvalgt af deres midte, ville upåtvivleligen savne den fornødne indsigt og dygtighed, som måtte være til stede i*

*en stænderforsamling*".[153] Um samanborið verður við fólkagrundarlagið undir teimum fýra stættartingunum í Danmark, so er einki at ivast í, at tann fyrra grundgevingin var haldgóð. Viðvíkjandi seinnu grundgevingini tykist ein av teimum fáu politiskt virknu persónunum í Føroyum, Niels Winther, sum bæði gjørdist fyrsti fólkatingsmaður føroyinga, og var valdur inn í nýggja Løgtingið, tá tað var endurstovnað í 1852, at vera samdur. At Winther, hóast hann íðin arbeiddi fyri at fáa Løgtingið endurreist, var í iva um, hvørt upplýsingarstøði føroyinga var á einum støði, ið gjørdi teir mentar at taka lut í politikki, sæst í nógvum av tí, sum hann skrivaði. Tá hann í 1852 fór undir at útgeva „Færingetidende" – Føroya fyrsta politiska blað – var grundgevingin tann, at hann sá tað sum sína uppgávu at „*vække den tildels slumrende sans hos mine landsmænd*".[154]



Niels Winther var politiskt virknasti føroyingurin síðst í 1840-unum.

Niels Winther og nevndin, sum sett varð í 1846, fóru helst ikki heilt skeiv í sínum metingum av upplýsingarstøði føroyinga, tí føroyingar høvdu ikki tikið lut í politikki, síðan Løgtingið varð niðurlagt í 1816. Heldur ikki fanst nøkur múgvandi og politiskt tilvitað borgarastætt í Føroyum, sum var ment at bera eitt virkið politiskt lív í oyggjunum. Føroyska yvirstættin var, um sæð verður burtur frá nøkrum fáum donskum embætismonnum í Havn, festibøndur, ið sjáldan í søguna hava víst nakað serstakt politiskt medvit. Umsóknirnar til stættartingið í 1844 og 1846 og ein líknandi umsókn hjá Niels Winther sjálvum til Ríkisdagin í 1851 vóru kortini tekin um, at politisku hugsjónirnar úr tí stóra Europa høvdu borið við Føroyar eisini.

Hóast einki fólkaligt krav var um tað í Føroyum, er lítið at ivast í, at umsøkjararnir frá 1844, 1846 og Niels Winther hava havt rætt í, at tað var tørvur á einum serstøkum fólksins umboðsstovni í Føroyum, har samfelagsligu viðurskiftini vóru so nógv øðrvísi enn aðrastaðni í danska ríkinum. Trupulleikin við at finna fram til hvussu Føroyar í heila tikið kundu umboðast á einum donskum stættartingi, var eitt talandi dømi um hetta. Av tí at samfelagsligu viðurskiftini í Danmark og í Føroyum vóru so ymisk, bar ikki til at brúka somu valskipan í Føroyum sum í Danmark. Harumframt førdi Niels Winther fram, at ein tílíkur stovnur hevði verið við til at birt upp undir eitt politiskt lív í Føroyum.[155]

Trupulleikin við vallógini forðaði kortini ikki fyri, at arbeitt varð víðari við at gera eina serstaka vallóg fyri Føroyar til stættartingið í Roskilde. Í 1843 – sama ár sum íslendingar fingu sítt egna stættarting – varð Pløyen amtmaður biðin um at gera uppskot til eina valskipan fyri Føroyar til stættartingið í Roskilde. Hetta arbeiðið kom av eini ella aðrari grund ikki í gongd fyrr enn í 1847, tá Pløyen samankallaði hægstu donsku embætismenninar í Føroyum og 15 umboð fyri føroyingar til fundar í Havn.

Í grein 1 í tí uppskoti til vallóg, sum hesin fundur tilevnaði, stendur: „*Færøerne skulle for fremtiden udgøre en egen valgklasse i Østifternes Stænderforsamling, og ved en selvvalgt deputeret deltage i dennes møder*“.[156] Stættir skuldu ikki setast á stovn í Føroyum eins og í Danmark. Hartil mælti fundurin í Havn til, at føroyska valið til stættartingið skuldi vera óbeinleiðis. Grundgevingarnar fyri, at valið skuldi vera óbeinleiðis, vóru partvíst praktiskar, tí mangul uppá hóskandi hølir og vánalig samferðsla millum oyggjarnar gjørdu tað torført at skipa fyri beinleiðis vali í Føroyum í 1800-talinum.

Eftir uppskotinum skuldi landið skipast í 8 sjálvstøðug valøki, sum tilsaman skuldu velja 48 valmenn, sum skuldu velja føroyska umboðið til stættartingið. Áhugavert er at leggja til merkis, at grundgevingin fyri, at tað júst skuldu vera 48 valmenn, var tann, at gamla Løgtingið hevði havt 48 løgrættumenn. Av hesum sæst, at føroyingar framvegis høvdu gamla Løgtingið í huganum, tá valskipanin til stættartingið skuldi tilevnast í 1847. Tað var kortini ikki eitt Løgting, við eini fastari løgrættumannaskipan, sum skuldi veljast, men 48 valmenn, ið høvdu til høvuðsuppgávu at velja føroyska umboðið til stættartingið. Fyrimunurin við eini óbeinleiðis valskipan var ikki einans praktiskur, tí teir 48 valmenninir, sum komu úr ymiskum prestagjøldum í Føroyum, kundu verið við til at skapt størri samstarv millum tey ymisku økini í Føroyum,[157] og harvið ment eitt felags politiskt lív í Føroyum.

Ein trupulleiki við hesi skipan var, at hon illa kundi fáast at virka, um ikki stovnar vóru skipaðir í Føroyum, sum kundu taka sær av at skipa fyri valunum. Samanumtikið kann sigast, at teir trupulleikar og tær loysnir, sum liggja í tilmælinum frá Pløyen, vísa á, at neyðugt var at skapa eina felags umboðan fyri allar Føroyar. Ein valskipan, ið gav føroyingum eitt umboð

til stættartingið, fór at fáa stórar trupulleikar við at virka sum ein felags føroysk umboðan, um hon ikki varð grundað á eina felags umboðan av onkrum slag heima í Føroyum. Tann óbeinleiðis valskipanin var eitt stig rætta vegin, men teir 48 valmenninir, sum ikki høvdu aðra uppgávu enn at velja umboðið til stættartingið, høvdu neyvan kunnað loyst uppgávuna. Tílíkir trupulleikar vóru óivað ein av grundunum til, at Pløyen amtmaður í februar í 1847 fekk boð úr Danmark um at gera eitt ítøkiligt uppskot til eina kommunalskipan fyri Føroyar, sum so eisini kundi taka sær av at skipa fyri valinum til stættartingini. Kommunalskipanin gjørdist kortini ikki til nakað á hesum sinni. Tá Pløyen fór frá sum amtmaður Føroya í 1848, høvdu donsku ríkismyndugleikarnir ikki fingið nakað tilmæli til føroyska kommunalskipan frá honum.

Tað vóru kortini aðrar grundir til, at uppskotið til føroyska vallóg til stættartingið í Roskilde ongantíð varð sett í gildi. Stutt eftir fundin í Havn rullaðu 1848 kollveltingarnar gjøgnum Europa, og neyðugt varð hjá danska konginum at taka meira víðfevnd stig móti fólkaræði, enn ætlanin upprunaliga hevði verið við innkallingini av stættartingunum í 1834. Við stættartingunum skuldi kongur ikki veruliga geva nakað av valdinum frá sær til fólksins umboð, men ætlanin var einans, at hann skuldi leita sær ráðgeving frá stættartingunum, men í 1848 noyddist kongur at góðtaka, at Danmark skuldi gerast eitt grundlógaravmarkað kongsveldi, har vald kongsins beinleiðis skuldi avmarkast av eini grundlóg, ið tryggjaði øllum borgarum persónligt frælsi og politisk rættindir. Einaveldið og stættarsamfelagið var endaliga farið í søguna.

### Danska grundlógin og Føroyar

Í 1848 varð eitt grundlóggevandi ríkisting sett, har kongur tilskilaði sær rætt til at tilnevna ein fjórðing av umboðunum. Føroyska umboðið í ríkistinginum var kongstilnevnt, eins og á stættartingunum. Valið fall á fyrrverandi amtmannin Pløyen, sum eisini hevði verið seinasta kongstilnevnda umboð føroyinga á stættartinginum í Roskilde – ikki eitt óheppið val fyri føroyingar. Restin av umboðunum í ríkistinginum vóru vald av danska fólkinum eftir ymiskum beinleiðis og óbeinleiðis valreglum. Grundlóggevandi ríkistingið skuldi fyri tað fyrsta viðgera eitt uppskot til danska grundlóg. Grundlógarviðgerðin

Eftir at grundlógin var samtykt, varð hon almannakunngjørd á hesum arkinum, har allir limirnir í grundlóggevandi ríkistinginum høvdu skrivað undir.



var liðug í 1849, og sama ár varð grundlógin sett í gildi í Danmark. Í grundlógini varð ásett, at útinnandi valdið lá hjá kongi, lóggevandi valdið lá hjá tí nýstovnaða Ríkisdegnum, og dømandi valdið skuldi liggja hjá óheftum dómstólum. Í øðrum lagi skuldi grundlóggevandi ríkistingið gera eina vallóg til tað nýstovnaða lóggávuvaldið. Ríkisdagurin skuldi sambært grundlógini verða samansettur av tveimum kømurum, einum *Fólkatingi*, sum meginparturin av tí mannliga fólkinum hevði valrætt og valbæri til, og einum *Landstingi*, sum einans tann múgvandi parturin av mannliga fólkinum hevði valbæri til. Valrættarreglurnar til Landstingið skuldu vera tær somu sum til Fólkatingið. Landstingið var í veruleikanum ein leivd frá einaveld-

inum og stættarsamfelagnum, sum tað hevði eydnast umboðunum hjá aðalinum og stóru góðseigarunum í grundlógargevandi ríkistinginum at fáa sett á stovn.

1849 grundlógin, sum staðfesti, at Danmark var ein eindarstatur, har alt lóggávuvald var miðsavnað hjá fólkavaldum ríkismyndugleikum í Keypmannahavn, var úrslit av eini politiskari ætlan, sum miðaði ímóti at forða fyri, at partar av danska ríkinum vóru mistir. Í miðøldini hevði danska ríkið fevnt um stórar partar av Skandinavia, men tey ymisku økini vóru, eins og vanligt var fyri ríki í miðøld, ikki skipaði eftir nakrari miðsavnandi meginreglu. Miðaldarríkini, sum ofta grundaðu seg á ymiskar fólkabólkar, vóru stjórnaði eftir fjølbroyttum fyrisitingarligum reglum. Talan var ikki um nakrar náttúrligar samfelagsligar eindir, men ofta var tað arvur ella krígseydna sum avgjørdi, hvørjar stjórnarligar broytingar ríkið kom út fyri. Hesi ótryggu statsligu viðurskiftini, sum ikki broyttust grundleggjandi í einaveldistíðini, høvdu havt við sær, at Danmark misti Skåne og Noregi – sum varð arvað saman við Danmark í 1380 – til Svøríki í ávíkavist 1658 og 1814. Hetta seinna, sum beinleiðis var ein avleiðing av, at Danmark hevði valt skeiva síðu í napoleonskríggjunum, var ein vanlukka fyri danska ríkið, sum fekk varandi ávirkan á danskan politikk og statshugsan í tíðini aftaná.

Tá komið var inn í 1840-ini, var økið, sum hoyrdi til danska ríkið, minkað so mikið nógv, at tað, burtursæð frá Íslandi, Grønlandi, Føroyum og hertogadøminum Slesvig-Holsten, sum eins og Noregi ongantíð høvdu verið samanrunnir partar av danska ríkinum, nærum einans fevndi um danskt kjarnuøki. Ein av teimum átrokandi spurningunum í donskum politikki í 1840-unum, tá grundlógararbeiði fór fram, var, hvussu hesi økini skuldu innlimast í og varðveitast sum partar av tí nýggja danska fólkaræðinum. Íslendingar, sum longu í 1262 høvdu gjørt sáttmála við Noregs kong, ið tryggjaði teimum rætt til sjálvræði,[158] og føroyingar, vóru sum norðbúgvar mettir at hoyra til Danmarkar Ríki. Í Grønlandi búði eitt fólkaslag, sum ikki var av norrønum uppruna, og oyggin varð tí mett sum eitt danskt hjáland, sum ikki átti at gerast ein partur av danska grundlógarøkinum. Trupulleikin var størstur í hertogadøminum Slesvig-Holsten, sum síðan 800-talið hevði verið partur av danska ríkinum, tí í Slesvig búðu í 1840-unum bæði danskt

og týskttalandi fólk. Hartil kom, at bæði tann týska og tann danska tjóðskaparliga tilvitanin var styrkt munandi í 1800-talinum. Leiðandi danskir politikarar mettu, at vandi var fyri, at Danmark fór at missa bæði Holsten og Slesvig til Preussen, sum setti krøv fram hesum viðvíkjandi. Hesi viðurskifti høvdu stóran týdning fyri danskan politik mitt í 1800-talinum.[159]

Danski eindarstaturin frá 1849, sum var grundaður á eina eftir tátíðarinnar máti framúr fólkaræðisliga grundlóg, kann í fyrsta lagi síggjast sum ein roynd uppá at leggja tað fjølbroytta økið, sum framvegis hoyrdi til danska ríkið, undir donsku grundlógina, og í øðrum lagi sum ein roynd uppá at byggja brúgv millum teir ymisku landspartarnar í ríkinum, soleiðis at upploysingartendensirnir í ríkinum, sum byrjaðu í 1658 og førdu til eina vanlukku í 1814, ikki skuldu halda áfram í 1848. Tann tjóðskaparliga eindarstatshugsanin, sum av hesi grund var sterk millum danskar politikarar í 1840-unum, var helst ein av høvuðsgrundunum til, at danskir myndugleikar ikki vildu taka nøkur fyrivarni viðvíkjandi grundlógarinnar gildi í Føroyum. Óttin fyri at danska ríkið fór at syndrast, hevði við sær, at lóggevandi valdið hjá ríkismyndugleikunum í Keypmannahavn skuldi staðfestast í øllum tí danska ríkinum, og grundlógin skuldi tí, uttan at fyrivarni varð tikið fyri, um føroyingar ynsktu grundlógina setta í gildi í Føroyum, setast í gildi í oyggjunum. Grundlógin var kortini ikki sett í gildi í Føroyum og í Danmark samstundis. Tað var ikki fyrr enn í 1850, at grundlógin, sambært ásetingunum í „Kancelliplakatini“ frá 1813 og kongaligu fyriskipanini frá 1821, varð tinglisin í teimum ymisku sýslunum í Føroyum. Harvið gjørdust Føroyar, uttan at føroyingar vóru eftirspurdir, ein partur av danska grundlógarøkinum, og oyggjarnar komu undir lóggávumyndugleika Ríkisdagsins, eins og aðrir landslutir í Danmarkar Ríki.

Í størri donskum ríkishøpi, tvs í samband við Slesvig spurningin, er tað væl skiljandi, at danskir myndugleikar *ynsktu* at seta grundlógina í gildi í Føroyum í 1849, men hetta merkir ikki, at teir eisini høvdu *rætt* til at gera tað. Hetta seinna skuldu føroyskir høvundar seta spurnartekin við seinni. Í 1939 skrivaði Jóannes Patursson í síni *Føroya Søga*, at føroyingar ongantíð høvdu svorið trúskapareið yvirfyri danska fólkinum, men einans yvirfyri donskum kongum. Kongur hevði tí ikki

rætt til at *„gera Føroyingar til danska fólksins tegnar“*,[160] tá danska grundlógin varð sett í gildi í Føroyum í 1850. Í nýggjari tíð hevur Zacharias Wang ført fram, at grundlógin varð tinglisin í Føroyum á sama hátt sum vanligar danskar lógir sambært ásetingunum í Kancelliplakatina frá 1813, og hon hevur tí ikki størri løgfrøðiliga megi í Føroyum enn ein vanlig donsk lóg.[161] Tað, sum liggur undir prógvførslunum hjá Patursson og Wang, er tað sjónarmið, at skuldi grundlógin havt grundlógarmegi í Føroyum, sum var eitt serstakt løgdømi í danska ríkinum, so átti hon at verið sett í gildi í Føroyum við samtykt frá Føroya fólki á sama hátt sum í Danmark. Í Danmark valdi danska fólkið umboð í eitt grundlógargevandi ríkisting, men føroyingar høvdu ikki valt nakað umboð – tað gjørdi kongur fyri teir. Føroyska fólkið, sum ongantíð hevði verið ein samanrunnin partur av tí danska fólkinum, varð ikki eftirspurt.

Helst er nakað um hetta sjónarmiðið, men aðrir serfrøðingar hava hildið uppá, at ásetingarnar í grundlógini, óheft av um rætt varð farið fram í 1850, við siðvenju hava vunnið hevd í Føroyum.[162] Hóast føroyska fólkið ikki hevði nakran umboðsstovn, sum tess vegna kundi havt mótmælt avgerðini at seta grundlógina í gildi í oyggjunum í 1850, so er tað ein sannroynd, at einki mótmæli kom úr Føroyum móti hesi avgerð; tvørturímóti fanst Niels Winther, ein av teimum fáu politiskt virknu føroyingunum í 1840-unum og 1850-unum, beinleiðis at donsku myndugleikunum í oktober 1849 fyri at bera seg ov seint at við at seta grundlógina í gildi í Føroyum.[163] Einstakir føroyingar settu spurnartekin við grundlógarinnar gildi í Føroyum, tá komið var inni í 20. øld,* men tann stóri meirilutin av Føroya fólki hevur líka síðan 1850 liva samsvarandi teimum rættindum og skyldum, sum grundlógin tryggjar og áleggur teimum. Sambært hesum sjónarmiðinum, har útgangsstøði verður tikið í tí siðvenju, sum hevur vunnið hevd síðan 1850, hevur føroyska fólkið givið seg undir meginreglurnar í donsku grundlógini, hóast tað ongantíð formliga hevur samtykt at seta grundlógina í gildi í Føroyum.

* Fyrstu ferð spurningur verður settur við grundlógarinnar gildi í Føroyum, er í eini grein í danska Morgunblaðnum frá 1888, sum Jóannes Patursson helst hevur skrivað. Debes 2001, síðu 155. Eitt grundað sjónarmið hesum viðvíkjandi finst kortini ikki fyrr enn í 1903, tá bóklingurin *Færøsk Politik* hjá Jóannes Patursson varð útgivin.



Hetta er ein tann elsta myndin av Havnini. Myndin er eldri enn 1865, tí tað árið varð Havnar kirkja heilt umbygd. Til vinstru á myndini stendur løgtingshúsið norðast í býnum.

Í Íslandi var Altingið, partvíst orsakað av at landið longu í 1262 hevði fingið staðfest sína serstøðu í Noregs Ríki, endurreist í 1843. Hetta fekk avgerandi týdning, tí íslendingar mótmæltu einmælt í Altinginum, tá danir ætlaðu at seta grundlógina í gildi í Íslandi. Hetta var høvuðsgrundin til, at tað ikki eydnaðist donskum myndugleikum at seta grundlógina í gildi í Íslandi. Ikki ber til at siga – og tað er eisini óviðkomandi – hvussu hevði verið í Føroyum, um Løgtingið varð endurreist um hetta mundi. Hinvegin er tað sum nevnt prógvfast, at Niels Winther beinleiðis hevði at donsku myndugleikunum í 1849 fyri at bera seg ov seint at við at fáa grundlógina setta í gildi í Føroyum. Niels Winther fataði donsku grundlógina sum eitt stórt fólkaræðisligt framstig, um hon fekk gildi í Føroyum, men hann metti tað neyvan sum ein trupulleika, at fólkaræðisliga menningin í Føroyum skuldi fremjast innanfyri karmarnar í danska eindarríkinum. Tann fólkaræðisliga danska grundlógin hevur, eins og leiðandi danskir politikarar høvdu ætlað, verið viðvirkandi til at knýta Føroyar tættari at donskum

ríkisvaldi. Júst her var munurin millum føroyskan og íslendskan politik í miðjuni av 1800-talinum. Tær tjóðskaparligu hugsjónir, sum politisku leiðarar Íslands høvdu longu í 1840-unum, vunnu ikki fótafesti í Føroyum fyrr enn fleiri ár eftir, at Niels Winther var farin úr føroyskum politikki.[164] Gangast má út frá, at í 1850-unum var løgfrøðingurin Niels Winther vitandi um, at fekk danska grundlógin gildi í Føroyum, so fór tað at merkja, at lóggávuvaldið í Føroyum fór at vera í Danmark, hjá danska Ríkisdegnum. Danska grundlógin ásetti, at Ríkisdagurin hevði lóggevandi myndugleikan í danska grundlógarøkinum, og undir teirri fortreyt, at grundlógin varð sett í gildi í Føroyum, kundi ein møguligur fólkaræðisligur stovnur í Føroyum ikki gerast annað enn ein ráðgevandi stovnur á lóggávuøkinum. Hetta samsvarar eisini við føroysku umsóknirnar til stættartingið í 1844 og 1846, har eingi spurnartekin vóru sett við tann veruleika, at lóggávuvaldið var í Danmark. Av støðuni hjá Niels Winther til donsku grundlógina sæst eisini, at hann viðvíkjandi lóggávuvaldinum stórt sæð var samdur við umsøkjarunum í 1844 og 1846, sjálvt um tað fyri hann var ein fólkavaldur Ríkisdagur, og ikki einaveldiskongur, sum við grundlógini fekk lóggávuvaldið í Føroyum litið upp í hendur. Hóast tjóðskaparligir spurningar høvdu ein ávísan týdning fyri bæði danskan og íslendskan politikk í fyrru helvt av 1800-talinum, so vóru tað stórt sæð einans fólkaræðisligar frælsishugsjónir, høvuðsrákið í Europa í fyrru helvt av 1800-talinum, sum rørdist í føroyskum politikki, tá danir settu grundlógina í gildi í Føroyum. Hetta sæst týðiliga av tí veruleika, at eingi føroysk mótmæli vóru í samtíðini ímóti, at danska grundlógin varð sett í gildi í Føroyum – heldur tvørturímóti.

Meðan eingi fyrivarni vóru gjørd viðvíkjandi Føroyum, tá talan var um, hvørt grundlógin skuldi setast í gildi í oyggjunum ella ikki, so vóru fyrivarni tikin viðvíkjandi eftirfylgjandi vallógini til Ríkisdagin. Hesi fyrivarni snúðu seg ikki, *um* føroyingar yvirhøvir skuldu umboðast á Ríkisdegi ella ikki, men spurningurin var, *hvussu* føroyingar skuldu umboðast. Á sama hátt, sum viðvíkjandi valunum til stættartingini í 1834, bar ikki til at nýta somu valreglur í Føroyum, sum nýttar vóru í Danmark. Fyri tað fyrsta ásetti grundlógin, at veljast skuldi ein fólkatingslimur fyri hvørjar 12.000 íbúgvar. Hendan treytin

var torfør at lúka í Føroyum, eftirsum tað ikki búðu fleiri enn umleið 8.000 fólk í oyggjunum í 1850. Í øðrum lagi var ein áseting í grundlógini, ið segði, at talið á landstingsmonnum skuldi vera umleið helvtina av talinum á fólkatingsmonnum.[165] Vóru hesar reglurnar í grundlógini fylgdar bókstavliga í Føroyum, so áttu føroyingar hvørki rætt til fólkatingsmann ella landstingsmann í danska Ríkisdegnum. Kortini var vilji til staðar í Danmark at lata føroyingar verða yvirumboðaðar í Ríkisdegnum við tveimum ríkisdagsumboðum. Grundgevingin var tann, at føroysk viðurskifti skiltu seg so nógv frá donskum viðurskiftum, at einans ein føroysk umboðan kundi røkja hesi viðurskifti nøktandi. Hartil skuldi umboðanin nýtast til at kveikja eitt politiskt lív í Føroyum. Ein tílík tulking av ásetingunum í grundlógini var helst í stríð við bókstavin í lógini, men spurningurin var, um hon ikki samsvaraði við fólkaræðisliga andan í henni. Í triðja lagi var trupulleikin tann, at hóast føroyingar fingu eina tílíka yvirumboðan í Ríkisdegnum, so var umboðanin so fáment, at hon hvørki kundi fáast at virka sum ein felags føroysk umboðan, ella nýtast til at menna eitt politiskt lív í Føroyum, uttan so at hon bygdi á eina umboðsskipan av onkrum slag heima í Føroyum. Í øllum førum mátti ein kommunal skipan av onkrum slag setast á stovn í Føroyum, sum tók sær av at skipa fyri valunum.

Hesir trupulleikar gjørdust eyðsýndir longu til fyrstu føroysku ríkisdagsvalini, tí tey vóru tilrættaløgd at vera fullførd í 1851, áðrenn ein kommunal skipan varð sett á stovn. Tað eydnaðist at gjøgnumføra valini á sumri í 1851, men fleiri praktiskir trupulleikar vóru, tí fleiri klagur komu um, at valini ikki høvdu gingið rætt fyri seg. T.d. rýmdu bæði veljarar og valstýrið av valstaðnum í Hvalba, tá grindaboð var fráboðað í Trongisvági.[166] Tað var eyðsæð, at neyðugt varð bæði at skipa fyrisitingarliga myndugleikan í Føroyum neyvari og at menna politisku tilvitskuna í Føroyum, skuldu fólkaræðisligu ásetingarnar í grundlógini fáast at virka í oyggjunum.

### Endurreisn Løgtingsins

Trupulleikar við at fáa eina føroyska valskipan at virka vóru ásannaðir av donsku ríkismyndugleikunum longu í 1847, tá Pløyen fekk til uppgávu at gera uppskot til kommunallóg fyri Føroyar, sum eisini skuldi fevna um val til stættartingini.

Pløyen varð ongantíð liðugur við arbeiðið, men í august 1849 tók Innanríkisráðið tráðin frá 1847 uppaftur og sendi boð til tann nýggja amtmannin í Føroyum, Carl Emil Dahlerup, um at hann saman við próstinum, fútanum og sorinskrivaranum skuldi gera eitt uppskot til eina kommunallóg fyri Føroyar. Innanríkismálaráðið legði upp til, at setast skuldi á stovn eitt amtsráð í Føroyum eftir donskum leisti, sum í fyrsta lagi skuldi taka sær av kommunalum viðurskiftum í oyggjunum. Í øðrum lagi skuldi ráðið hava rætt til at gera tilmæli til ríkismyndugleikarnar viðvíkjandi lóggávu í Føroyum. Hartil skuldi ráðið millum annað fyriskipað val til Ríkisdagin. Uppskotið hjá embætismonnunum skuldi síðan leggjast fyri eina samkomu, sum eisini skuldi telja 11 fólkavaldar føroyingar.[167]

Endaliga uppskotið frá samkomuni í Tórshavn, sum millum annað bar í sær, at veljast skuldu 18 mans til eitt „lagting", legði upp til, at 4 embætismenn, amtmaðurin, prósturin, fútin og sorinskrivarin, skuldu vera fastir limir í Løgtinginum. Ríkismyndugleikarnir høvdu millum annað sett ta treyt við arbeiðssetningin hjá nevndini, at amtmaðurin skuldi vera formaður í amtsráðnum. Grundgevingin fyri, at embætismenn skuldu hava sæti á tingi, var, at føroyskir bøndur ikki sjálvir vóru mentir at bera ein tílíkan stovn.[168] Harumframt skuldi stovnurin hava neyvt samskifti við myndugleikarnar í Danmark – serstakliga viðvíkjandi føroyskari lóggávu, og her var amtmaðurin sakkunnleikin. Tann 6. desember í 1851 varð endaliga uppskotið frá amtmanninum og samkomuni í Tórshavn lagt fyri Fólkatingið.

Ein mánað frammanundan, tann 10. november 1851, hevði tann nývaldi føroyski fólkatingsmaðurin Niels Winther lagt *Udkast til en kommunallov for Færøerne* fyri Fólkatingið. Her ímyndaði Winther sær, at eitt felags ráð, Løgting kallað, varð sett á stovn í Føroyum. Løgtingið skuldi, saman við 8 kommunum, ið skuldu leggjast undir Løgtingið, taka sær av fyrisitingini av Føroyum. Løgtingið skuldi einans hava fólkavaldar limir, og tað skuldi sjálvt velja sín formann. Amtmaðurin skuldi hava rætt til at taka lut í samráðingunum í Løgtinginum, tó uttan atkvøðurætt. Tað var serstakliga á tí fyrisitingarliga og fakliga økinum, at týdningur amtmansins lá, sambært Niels Winther. Løgtingið skuldi harumframt hava ráðgevandi mynd-

ugleika yvirfyri Ríkisdegnum, tá talan var um lóggávu, sum hevði týdning fyri Føroyar.[169]

Tá uppskotið hjá Dahlerup og fundarfólkunum í Havn varð lagt fyri Ríkisdagin, fanst Winther harðliga at tí. Serstakliga var hann ímóti, at embætismenn, ið ikki vóru fólkavaldir, skuldu sita í Løgtinginum. Hetta var eisini nakað, sum nakrir av teimum fólkavaldu føroyingunum átalaðu á fundinum við Dahlerup í Havn í 1849. Tá Løgtingið var endurreist við ríkisdagslóg tann 26. mars 1852, kom tann endaliga fólkaræðisliga skipanin av Løgtinginum at verða nakað, sum lá miðskeiðis millum tilmælið frá Dahlerup og útkastið hjá Niels Winther. Sambært ríkisdagslógini skuldu 16 limir veljast í Løgtingið, meðan amtmaðurin og prósturin vóru fastir limir. Amtmaðurin skuldi hartil verða føddur formaður í Løgtinginum. Sorinskrivarin og fútin komu ikki inn í tingið. Í aðra mátar var talan um eitt danskt stjórnaruppskot, sum „*Udkast til en kommunallov for Færøerne*“ hjá Niels Winther lítla og onga ávirkan fekk á. Nýggja Løgtingið var í høvuðsheitum eitt danskt amtsráð, sum danskir myndugleikar høvdu tikið stig til at fáa sett á stovn í Føroyum.

Í hesum sambandi er vert at leggja til merkis, at semja stórt sæð var millum danir og føroyingar um, at nýggi umboðsstovnurin einans skuldi hava ráðgevandi myndugleika yvirfyri lóggávuvaldinum í Danmark. Eingir føroyingar settu nakrantíð krøv fram um, at annað enn ein ráðgevandi umboðsstovnur skuldi stovnsetast í Føroyum. Hvørki í umsóknunum til stættartingið í 1844 og 1846, ella í „Udkast til kommunallov“ hjá Niels Winther í 1851, varð mælt til nakað annað enn ein ráðgevandi stovn í Føroyum. Vert er eisini at leggja til merkis, at tørvurin á einum tílíkum ráðgevandi stovni varð viðurkendur av donsku myndugleikunum, áðrenn nakað hoyrist um hetta úr Føroyum. Frá danskari síðu varð virkið farið undir at fyrireika ein tílíkan stovn í februar 1847, tá Pløyen fekk til uppgávu at gera eitt uppskot til kommunallóg, men tørvurin fyri stovninum var viðurkendur millum danskar myndugleikar fleiri ár frammanundan. Í 1843, tá føroyingar fyribils vóru umboðaðir av einum kongsvaldum umboðsmanni á stættartinginum í Roskilde, fóru ríkismyndugleikarnir undir arbeiðið at tilevna eina valskipan fyri Føroyar, men longu í 1833, tá føroyingar og íslendingar fingu eina felags fyribils

umboðan á stættartinginum, var tørvurin á eini føroyskari valskipan viðurkendur av ríkismyndugleikunum. Tað, sum skilti (nakrar) føroyingar og donsku ríkismyndugleikarnar, var ikki ósemja, *um* føroyingar skuldu hava ein umboðsstovn. Heldur ikki var stór ósemja um, hvat *slag* av stovni talan skuldi vera um, men høvuðsósemjan snúði seg einans um, *hvussu* tann ráðgevandi stovnurin ítøkiliga skuldi skipast. Her var ein ávís ósemja um, hvørt danskir embætismenn skuldu verða limir í Løgtinginum ella ikki.

Andsøgnin millum danskar embætismenn og fólkavaldar føroyingar í Løgtinginum kom at vera tann grundleggjandi stríðsspurningurin í nýggja Løgtinginum meginpartin av tíðarskeiðinum fram til 1906. Sjálv endurstovnanin av Løgtinginum og staðfestingin av teimum heimildum, sum Løgtingið skuldi hava, hevði hinvegin lítið og einki við eitt framtakssinnað føroyskt stríð mótvegis afturhaldssinnaðum dønum at gera. Endurreisn Løgtingsins var stórt sæð ein avleiðing av einum fólkaræðisligum ráki í Europa í 1800-talinum, sum fekk avgerandi týdning fyri nýskipanararbeiðið í øllum danska ríkinum. Líka síðan 1834 høvdu danskir politikarar og embætismenn arbeitt við eini fólkaræðisligari og fyrisitingarligari nýskipan av viðurskiftunum í danska ríkinum, og hetta arbeiði varð eisini tikið upp viðvíkjandi Føroyum – í øllum førum frá 1843. Endurreisn Løgtingsins var í høvuðsheitum ein avleiðing av hesum danska nýskipanararbeiði og í minni mun eitt úrslit av føroyskum stríði. Í so máta eiga bæði avtøkan og endurstovnanin av Løgtinginum at síggjast í einum størri donskum ella europeiskum samanhangi og ikki einans í einum serføroyskum samanhangi.

Hinvegin var lítið at ivast í, at endurreisn Løgtingsins fór at seta gongd á eina politiska menning í Føroyum, sum í longdini fór at hava við sær, at føroyingar fóru at seta størri krøv til heimildir Løgtingsins, enn ríkismyndugleikarnir upprunaliga høvdu ætlað.

## Nýggja Løgtingið og løgtingslógin

Tann stovnur, sum føroyingar fingu í 1852, var eitt amtsráð, ið skuldi ráðgeva stjórnini viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum. Harumframt skuldi Løgtingið taka sær av ymiskum innlendis



Tá tinghúsið varð bygt í 1854, stóð tað norðanfyri øll onnur hús í býnum. Tað ger tað eisini á hesi myndini, sum er tikin, áðrenn nýggi almúguskúlin varð bygdur í 1894. Gøtan oman í býin varð nevnd „Kærlighedsstien“.

viðurskiftum í Føroyum. Hetta amtsráðið var í veruleikanum ikki so langt frá tí umboðsstovni, sum (nakrir) føroyingar høvdu ynskt og søkt donsku myndugleikarnar um at fáa síðan 1844. Tað vóru kortini ongar smærri fyrisitingarligar eindir, kommunur, stovnaðar undir Løgtinginum á hesum sinni, soleiðis sum uppskotið hjá Niels Winther miðjaði ímóti. Kommunuskipan varð ikki sett í gildi í Føroyum fyrr enn í 1872.[170] Í fyrsta umfari sluppu føroyingar ikki at úttala seg um, hvussu føroyska amtsráðið skuldi skipast, men í lógini um endurreisn Løgtingsins varð ásett, at tað fyrst valda Løgtingið skuldi fáa rætt til at koma við broytingaruppskotum til lógina. Nýggj løgtingslóg, sum tað fyrst valda Løgtingið hevði havt ávirkan á, kom tí í gildi longu í 1854. Tað vóru ikki tær stóru broytingarnar, sum tann fyrsta løgtingsmanningin ynskti at fáa framdar í løgtingslógini, og tí kom ikki at vera tann stóri munurin millum løgtingslógina frá 1852 og løgtingslógina frá 1854.[171] Løgtingslógin frá 1854 var í gildi í Føroyum í stórt sæð óbroyttum líki til 1923. Broytingar vóru framdar í lógini í 1906 og í 1916.[172]

**Tingseta, valskipan og tingskipan**

Løgtingslógin frá 1852 ásetti, at føroyingar skuldu velja 16 umboð í Løgtingið. Streymoyar og Eysturoyar prestagjald skuldu velja 3 løgtingsumboð hvørt, meðan hini 5 prestagjøldini skuldu velja 2 løgtingsumboð hvørt. Harumframt skuldu amtmaðurin og prósturin vera føst umboð; amtmaðurin skuldi vera føddur formaður í Løgtinginum. Nýggja Løgtingið, ið var ein fólkaræðislig nýskipan av politisku viðurskiftunum í oyggjunum, fevndi sostatt um 18 umboð, harav vóru tvey ikki fólkavald.

Løgtingið skuldi koma saman hvørt ár á ólavsøku. Tinghúsið á Tinghúsvøllinum, sum við umfatandi um- og útbyggingum í 1907 framvegis er karmurin um virksemi Løgtingsins, varð bygt til endamálið í 1854. Upprunaliga vóru tinghúsini ikki stór, 10 ferðir 9 metrar, men tey skuldu ikki nýtast í meira enn 4 vikur um árið, ella ta tíðina, sum Løgtingið kundi verða saman til vanliga tingsetu. Tingsetan kundi verða longd í upp til 14 dagar, um helvtin av tingmanningini kravdi tað. Í aðra mátar kravdist samtykt frá amtmanninum, og tað var eisini hann, sum avgjørdi, um Løgtingið skuldi kallast saman til eykatingsetu. Valtíðarskeiðið hjá teimum fólkavaldu umboðunum skuldi verða 6 ár, men val til Løgtingið skuldi verða annað hvørt ár, tá ein triðingur av teimum fólkavaldu umboðunum skuldu standa fyri vali.

Nakrar av reglunum í 1852 lógini vóru eftir ynski frá nývalda Løgtinginum broyttar við nýggju løgtingslógini í 1854. Talið á fólkavaldum tingumboðum varð hækkað úr 16 til 18. Streymoyar og Eysturoyar prestagjald fingu hvør sín tingmann afturat. Sostatt vóru 20 umboð í Løgtinginum tilsaman – 18 fólkavald og tveir embætismenn. Valtíðarskeiðið varð stytt úr 6 niður í 4 ár, men val til Løgtingið skuldi framvegis verða annaðhvørt ár. Helvtin av teimum 18 fólkavaldu umboðunum, ikki ein triðingur sum í gomlu lógini, skuldi standa fyri vali hvørja ferð. Fyrstu ferð val skuldi verða aftaná 1854, skuldu løgtingsumboðini avtala sínamillum, hvørji 9 umboð skuldu standa fyri vali fyrst. Fekst eingin semja um henda spurningin, skuldi lutakast verða. Síðan skuldi val verða annað hvørt ár, men einans tey umboðini, sum høvdu sitið í Løgtinginum í 4 ár, skuldu standa fyri vali. Løgtingslimirnir, ið fóru frá, kundu stilla uppaftur.

Løgtingið varð valt á tann hátt, at tað valevnið, sum eftir eitt løgtingsval hevði flestar atkvøður í einum valdømi, var fyrst valt í Løgtingið, og tað valevnið, sum hevði fingið næstflest atkvøður, var næst valda umboðið. Soleiðis varð hildið áfram, til tað tal av umboðum, sum veljast skuldi í valdøminum, var valt. Talan var um persónligt val, har valevnini vóru vald sum einstaklingar og ikki sum umboð fyri flokkar. Politiskir flokkar vóru ikki settir á stovn í Føroyum fyrr enn í 1906. Av somu grund hendu ongar broytingar í reglunum fyri, hvussu Løgtingið var valt, fyrr enn komið varð inn í 20. øld.

Viðvíkjandi viðtøkuføri Løgtingsins stóð í løgtingslógini frá 1852, at „*Tilstedeværelsen af idetmindste halvdelen af tingets medlemmer er nødvendig, for at en beslutning kan tages*“, men orðingin í lógini frá 1854 var eitt sindur ógreiðari, tí har stóð, at „*Halvdelen af Tingets Medlemmer er nødvendig, for at en Beslutning kan tages*“. Í tingskipan Løgtingsins, sum Løgtingið sjálvt hevði heimild til at orða samsvarandi ásetingunum í løgtingslógini, vóru neyvari reglur settar fyri, hvussu atkvøðast skuldi í tinginum. Grein 26 í tingskipan Løgtingsins frá 1879, sum hevði røtur aftur til endurreisn Løgtingsins,[173] fylgdi løgtingslógini, tá hon ásetti, at „*En Beslutning kan tages, naar mindst Halvdelen af Tingets Medlemmer ere til Stede*“, men reglurnar vóru herdar í mun til løgtingslógina, tá skoytt var uppí „*og deltage i Afstemningen*“.[174] Helst er henda seinna orðingin skoytt uppí fyri at forða fyri, at tingmenn uttan avleiðingar kundu bera seg undan at taka lut í løgtingsarbeiðinum, sjálvt um teir vóru hjástaddir. Við hesi orðingini var Løgtingið ikki viðtøkuført, uttan so at í minsta lagi helvtin av tingmanningini tók lut í løgtingsarbeiðinum, tvs. tóku støðu og atkvøddu í Løgtinginum. Tað bar ikki til at bera seg undan at taka lut í løgtingsarbeiðinum, uttan at tað fekk avleiðingar fyri alt løgtingsarbeiðið. Stóð á jøvnum, tá atkvøtt varð, so var atkvøða amtmansins avgerandi.

Tá Løgtingið viðgjørdi tingskipanina í 1886 sæst, at aðrir trupulleikar hava verið við orðingini frá 1879, sum ásetti reglur um *kvalifiseraðan meiriluta*, tá samtyktir skuldu gerast í Løgtinginum. Tað kundi t.d. koma fyri, at eitt uppskot varð felt í Løgtinginum, sjálvt um tingið bæði var viðtøkuført, og meira enn helvtin av teimum uppmøttu tingmonnunum tóku undir við uppskotinum. Tað kundi t.d. vera soleiðis, at av 12

tingmonnum, sum møttir vóru til løgtingsfund, atkvøddu 9 fyri einum uppskoti, men av tí, at hinir 3 ikki greiddu atkvøðu, fall uppskotið, tí helvtin av teimum 20 tingmonnunum høvdu „*ikki tikið lut í atkvøðugreiðsluni*“. Verri var, um eitt uppskot, sum hevði undirtøku frá meirilutanum av teimum 20 tingmonnunum, varð felt, tí tá amtmaðurin legði uppskotið fyri Løgtingið, manglaði av tilvild ein ella fleiri av stuðlunum. Av viðgerðini av tingskipanini í 1886 sæst, at trupulleikin bæði var heimildin hjá amtmanninum til at leggja uppskot fyri tingið, tá tað hóvaði honum, og tingmenn, sum ikki tóku lut í atkvøðugreiðsluni.

Við grundarlagi í hesum trupulleikum við atkvøðureglunum varð uppskot í 1886 lagt fyri tingið, sum millum annað miðaði ímóti, at orðini í grein 26 í tingskipanini „*og deltager i Afstemningen*“ vóru strikaði. Hesa broyting í tingskipanini kundi Løgtingið samtykkja, uttan at tingskipanin, sum Løgtingið hevði ræði á, kom í stríð við ta yvirskipaðu løgtingslógina, sum ríkismyndugleikarnir høvdu ræði á, tí einki stóð beinleiðis um atkvøðuluttøku í løgtingslógini. Tá broytingarnar í tingskipanini vóru samtyktar, høvdu teir tingmenn, sum vóru ímóti uppskotinum, kortini lagað tað soleiðis, at eingin broyting varð framd í grein 26. Tað eydnaðist sostatt ikki at broyta viðtøku- og atkvøðuásetingarnar í tingskipanini í 1886.

Fittur partur av inntøku Løgtingsins í 19. øld kom frá grindadrápi. Her verður grind hildin til á Eystaruvág í 1896. Uttast til vinstru hómast norðari endin á Müllershús, sum upprunaliga var tingstovan í Gongini.



Heldur ikki í 1905, tá Løgtingið aftur framdi broytingar í tingskipanini, vóru atkvøðureglurnar í Løgtinginum broyttar. Harafturímóti samtykti Løgtingið hetta árið broytingar í tingskipanini, sum høvdu við sær, at fastar tíðarfreistir vóru settar fyri, nær tingmál skuldu vera tinginum í hendi, og freist varð sett fyri, hvussu seint amtmaðurin kundi leggja málini fyri tingið. Strangari reglur vóru eisini settar fyri, hvussu eitt samtykt uppskot kundi broytast í somu tingsetu. Tilvildarligar fráverur, sjúka o.a., sum kundu hava við sær, at eitt uppskot fall, tí onkur av stuðlunum hjá einum uppskoti var burturstaddur, tá amtmaðurin legði uppskotið fyri Løgtingið, kundu tí betri fyribyrgjast, hóast sjálvar atkvøðureglurnar ikki vóru broyttar.[175]

Atkvøðureglurnar í tingskipanini hava óivað havt við sær, at tær afturhaldandi kreftirnar í Løgtinginum høvdu lutfalsliga stóra ávirkan, tí tað var lætt at forða fyri, at broytingar vóru framdar, meðan tað var torført at fáa broytingar samtyktar. Harumframt hava tær styrkt um vald amtmansins í Løgtinginum, tí tess færri avgerðir Løgtingið tók, tess fleiri avgerðir kundi amtmaðurin taka einsamallur millum tingseturnar.

### Fíggjarligu viðurskifti Løgtingsins

Á tí peningaliga økinum staðfesti løgtingslógin, at Løgtingið skuldi avgera, hvussu stórar upphæddir skuldu álíknast til amtskommunalu grunnarnar, „Amtsrepartitionsfonden“, sum var tann týdningarmiklasti, og „Økonomiske fond“, og Løgtingið skuldi avgera, hvat peningurin í hesum grunnum skuldi nýtast til. Løgtingið skuldi eisini avgera, hvussu nógvur peningur skuldi gjaldast í stuðli úr „Amtsfattigkassen“ og „Fonden for Forulykkedes efterladte“. Hartil skuldi Løgtingið hava ræði á, hvussu peningurin í „Kirkjugrunnunum“ skuldi nýtast. Løgtingið hevði eisini ábyrgdina av, at stovnsfæið í nevndu grunnum varð varðveitt og økt.

Inntøkurnar í „Økonomiske fond“ komu í høvuðsheitum frá grind, inntøkurnar í „Amtsfattigkassen“ frá einum avgjaldi frá teimum, sum seldu brennivín, og inntøkurnar í „Amtsrepartitionsfonden“ komu í høvuðsheitum frá jarðarskatti,[176] men aðrar inntøkukeldur vóru eisini. Inntøkurnar í „Kirkjugrunnunum“ komu mest frá tíggjund, men hesin skattur varð avtikin í 1892, tá ein serstakur rúsdrekkatollur kom í staðin.[177]

Talan var ikki um stórar upphæddir, sum Løgtingið hevði at ráða yvir. Í tíðini eftir endurreisn Løgtingsins í 1852 og til nakað undan aldarskiftinum lógu hesar upphæddir millum 10.000 og 20.000 krónur.[178] Hetta var ikki stórt meira enn tær 10.000 krónurnar, sum einstakir føroyingar vóru mentir at gjalda fyri eina gamla enska slupp um sama mundið.[179] Tó sæst, at inntøkur Løgtingsins byrjaðu at økjast nakað, tá komið varð nakað inn í 20. øld. Í einum yvirliti yvir inntøkur ríkisins í Føroyum, sum Sjálvstýrisflokkurin gjørdi í 1906, ber til at rokna seg fram til, at Løgtingið tá hevði ræði á umleið 43.000 krónum árliga.[180]

Harumframt kom ein ávís upphædd úr ríkiskassanum. Í tíðarskeiðinum frá 1856 til 1874 var henda upphæddin 609.000 krónur, svarandi til knappar 34.000 krónur árliga. Í tíðarskeiðinum frá 1874 til 1895 var upphæddin 1.575.000 krónur, svarandi til 75.000 krónur um árið í miðal, men í tíðarskeiðinum frá 1895 til 1915 var upphæddin komin uppá 4.250.000 krónur, sum svaraði til umleið 200.000 krónur í miðal um árið.[181] Danski ríkiskassin hevði ofta yvirskot av Føroyum í einahandilstíðini, men síðan 1877 hava útreiðslur ríkiskassans av Føroyum á fíggjarlógini altíð verið størri enn inntøkurnar.[182]

**Løgtingsmannalønir**

Løgtingsmenn vóru sambært 1854-lógini løntir við 64 skillingum fyri hvønn dag, tingið var saman, men í 1865 varð samsýningin hækkað til 1 ríkisdála um dagin.[183] Tá skipanin við ríkisdálum, markum og skillingum fór úr gildi í 1873,[184] fingu løgtingsmenn sína samsýning útgoldna í krónum og oyrum, sum komu í staðin. Í tíðini fyri aldarmótið, og fram til 1906, vóru løgtingsmenn løntir við 2 krónum fyri hvønn dagin[185] í tær 4 vikurnar, sum tingið vanliga var saman, svarandi til umleið 40 til 50 krónur fyri alla tingsetuna. Til samanberingar kann nevnast, at ein fiskimaður um somu tíð hevði eina inntøku uppá ímillum 250 og 400 krónur í teir 6-7 mánaðarnar av árinum, ið sluppfiskiskapurin vardi.[186] Her skal sjálvandi havast í huga, at løgtingsarbeiði ikki var fult starv, sum nakar kundi liva av. Talan var ikki um stórt meir enn eitt summarferiu-arbeiði, tí tingið kundi ikki uttan amtmansins loyvi vera saman í meira enn 4 vikur.

Samsýningarnar til løgtingsumboð og nevndarumboð saman við ferðaútreiðslum og útreiðslum til skriviamboð vóru goldnar úr „Amtsrepartitionsfonden" – ein av teimum amtskommunalu grunnunum, sum tað varð litið upp í hendurnar á nýggja Løgtinginum at fyrisita.

**Uppgávur og heimildir Løgtingsins**

Tað Løgting, sum varð endurreist í 1852 líknandi einum amtsráði, var stórt sæð eitt úrslit av donskum nýskipanararbeiði, tilevnað eftir donskum leisti, og í minni mun ávirkað av føroyskum ynskjum. Løgtingið kom í høvuðsheitum at verða ein stovnur, sum bygdi á danskar fyrisitingarligar royndir, tillagaðar til føroysk viðurskifti. Løgtingið kom tí at yvirtaka nakrar vanligar fyrisitingarligar uppgávur hjá amtinum í Føroyum, eins og amtini í Danmark gjørdu tað.

Løgtingið skuldi t.d. velja valstýrini, sum skuldu fyriskipa løgtings-, fólka- og landstingsval. Her hómast sambandið millum føroysku ríkisdagsumboðanina og endurreisn Løgtingsins, sum vit hava verið inni á fyrr. Løgtingið skuldi eisini hava eftirlit við skjútsskipanini, viðlíkahalda og byggja almennar vegir, brýr o.s.fr. Hetta vóru alt amtskommunalar uppgávur, sum Løgtinginum var litið upp í hendi at fyrisita.

Kortini var nýggja Løgtingið meira enn eitt vanligt danskt amtsráð. Meðan donsku amtsráðini einans høvdu rætt til at ummæla uppskot, ið løgd vóru fyri tey, so fekk Løgtingið harumframt rætt til at leggja lógaruppskot fyri donsku stjórnina. Við øðrum orðum fekk nýggja Løgtingið, umframt *ummælisrætt*, tað, sum verður kallað *initiativrætt*, yvirfyri donsku ríkismyndugleikunum. Hetta merkti kortini ikki, at donsku ríkismyndugleikarnir høvdu skyldu til at fylgja tilmælinum frá Løgtinginum, tá talan var um lóggávu viðvíkjandi Føroyum. Lóggávuvaldið í øllum tí danska kongaríkinum var formliga hjá danska Ríkisdegnum, soleiðis sum grundlógin eisini ásetti.

Ummælis- og initiativrættur Løgtingsins var kortini týdningarmikil, av tí at føroysk viðurskifti vóru so nógv øðrvísi enn í restini av ríkinum. Sjálvt um grundlógin fekk gildi í Føroyum í 1850, so gjørdust Føroyar ongantíð ein samanrunnin partur av danska lóggávuøkinum. Tað varð staðfest longu í 1813 og í 1821, at danskar lógir ikki komu í gildi í Føroyum, uttan so at lokali myndugleikin hevði úttalað seg um tær og hevði

fingið tær tinglisnar á heimatingunum í teimum 6 sýslunum í oyggjunum (sí s. 72). Tað var sjálv tinglesingin, sum setti lógina í gildi, meðan kongaliga fyriskipanin frá 1821 ásetti, hvussu mannagongdin skuldi vera, tá lógir vóru settar í gildi í Føroyum. Undan 1852 hevði lokali myndugleikin verið amtmaðurin, men nú varð tað harumframt eitt fólkavalt Løgting, sum skuldi viðmæla donsku lógirnar, meðan amtmaðurin framvegis einsamallur hevði heimildina til at tinglesa tær. Í 1855 vóru mannagongdirnar frá 1821 broyttar samsvarandi hesum nýggja veruleika, tá tað varð ásett í einum rundskrivi, at gekk Ríkisdagurin ynski Løgtingsins á møti um ikki at seta eina ávísa ríkislóg í gildi í Føroyum, komu kendu orðini „*Denne lov gælder ikke for Færøerne*“ at verða skoytt uppí lógina. Allar danskar lógir, sum ikki høvdu hetta ískoytið, vóru eisini settar í gildi í Føroyum. Tað var kortini framvegis tinglesingin, sum amtmaðurin einsamallur stóð fyri, ið løgfrøðiliga setti lógina í gildi í Føroyum.

Uppgáva Løgtingsins sum stuðul og ráðgevi hjá donsku ríkismyndugleikunum í lógarsmíði, sum viðvíkti Føroyum, varð styrkt munandi í 1866, tá valskipanin til Landstingið – annað kamarið í danska Ríkisdegnum – varð broytt. Undan 1866 varð føroyski landstingsmaðurin valdur óbeinleiðis eins og í Danmark. Valið varð skipað á tann hátt, at føroysku veljararnir valdu 14 valmenn, tveir úr hvørjum valdømi, sum so endaliga valdu landstingsmannin. Í 1866 varð skipanin broytt, so tað skuldi verða Løgtingið, ið valdi landstingsumboðið. Harvið fekst betur samband í lag millum arbeiðið hjá Løgtinginum og føroysku landstingsumboðini.

Við tí upprunaliga ummælisrættinum, initiativrættinum og tilnevningini av landstingsmanninum aftaná 1866 gjørdist Løgtingið eitt víðkað amtsráð, ið eisini skuldi røkja serføroysk áhugamál á lóggávuøkinum – tó einans við ráðgevandi myndugleika. Tað sæst týðiliga, at Løgtingið, umframt at vera ein fyrisitingarligur stovnur í Føroyum, eisini hevur verið ætlað sum ein fólkaræðisligur stuðul hjá føroysku ríkisdagsmonnunum og donsku ríkismyndugleikunum í serføroyskum viðurskiftum.

Trupulleikin við ráðgeving av donsku ríkismyndugleikunum viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum, sum var viðurkendur av dønum longu í 1834, tá føroyingar fyribils fingu ein kongs-

tilnevndan umboðsmann í stættartingið í Roskilde, varð endaliga loystur við endurreisn Løgtingsins. Í øllum førum var hendan loysnin endalig, so leingi eingin í Føroyum setti spurnartekin við ríkiseindina, og tað gjørdi eingin fyrr enn fimmti ár seinni, tá sjálvstýrisrørslan byrjaði at gera vart við seg í Føroyum.

**Amtmaðurin**

Við initiativrættinum fekk Løgtingið umframt reint fyrisitingarligar uppgávur eisini politiskar uppgávur at røkja vegna Føroya fólk. Donsku ríkismyndugleikarnir mettu tað vera neyðugt at geva amtmanninum, sum eisini var føddur formaður í donsku amtsráðunum, víðfevndar fyrisitingarligar og løgfrøðiligar heimildir í Løgtinginum. Hetta var gjørt við at geva amtmanninum fastan sess í Løgtinginum, umframt at lógarfesta heimildir hansara á tí fyrisitingarliga og løgfrøðiliga økinum. Tað, sum eyðkendi løgtingslógina, kom tí at vera tað vald, hon gav einum embætismanni, amtmanninum, yvir einum løgtingi, sum hevði nógv størri fólkaræðisligar uppgávur at røkja enn donsku amtráðini, har amtmaðurin hevði eina líknandi støðu. Hetta mátti hava trupulleikar við sær.

Ynski ríkismyndugleikanna um at seta ein sterkan amtmann í nýggja Løgtingið, møtti kortini ikki stórvegis mótstøðu í Føroyum. Fyrsta føroyska løgtingsmanningin, sum var vald eftir løgtingslógini frá 1852, hevði einki ynski um at fáa amtmannin og próstin úr tinginum og harvið gera tingið til ein fólkavaldan stovn burturav. Tvørturímóti ynskti Løgtingið, at amtmaðurin skuldi hava størri fyrisitingarligt vald, enn hann hevði fingið í sín lut sambært løgtingslógini frá 1852.[187] Í 1852-lógini var ásett, at millum tingseturnar skuldi ein 3 manna nevnd, – amtmaðurin og tvey umboð í Løgtinginum, sum Løgtingið sjálvt valdi – taka sær av dagliga fyrisitingarliga arbeiðinum. Hesi nevndini varð heimilað at ávísa pening úr teimum grunnum, sum Løgtingið hevði ræði á, eftir teimum reglum, sum Løgtingið hevði samtykt. Henda nevndin varð eftir ynski Løgtingsins avtikin við 1854-lógini, har tað varð ásett, at amtmaðurin einsamallur skuldi standa við fyrisitingarligu ábyrgdini millum tingseturnar.[188]

Harvið fekk amtmaðurin í 1854 størri vald á Løgtingsins fyrisiting, enn honum var litið upp í hendur í 1852-lógini.

Hesin veruleiki gerst serliga sjónskur, tá havt verður í huga, at Løgtingið ikki kundi vera saman í stórt meira enn 4 vikur árliga, uttan so at amtmaðurin gav loyvi til tað. Hartil kom, at stungu átrokandi mál seg upp millum tingseturnar, sum ikki kundu útsetast til næstu tingsetu, so var tað upp til amtmannin einsamallan at meta um, hvørt málið var nóg týðandi til, at tingið átti at verið kallað saman, ella um hann sjálvur skuldi taka avgerðina. Tó skuldi Løgtingið altíð kunnast um tær avgerðir, sum amtmaðurin tók millum tingseturnar, næstu ferð tingið kom saman.

Umframt hesar víðfevndu fyrisitingarligu heimildir hevði amtmaðurin nakrar løgfrøðiligar heimildir, sum góvu honum nærum einaveldugan myndugleika yvir Løgtinginum: Amtmaðurin hevði rætt til at freista tingsins samtyktir, hevði hann varhuga av, at tingið hevði samtykt nakað, sum var í stríð við galdandi lóg. Avgerð amtmansins var galdandi, til hann hevði heintað endaliga avgerð frá hægri stað – tvs. frá ríkismyndugleikunum í Keypmannahavn. Hartil kom, at amtmaðurin altíð hevði rætt til at útseta tingarbeiðið, men so skuldi hann beinanvegin „*indhente kongens resolution*“, sum tað stóð í løgtingslógini. Kongur, tvs. danska stjórnin, hevði rætt til at upploysa Løgtingið og senda tað heim. Henda ásetingin í løgtingslógini var eitt amboð, sum danska stjórnin kundi brúka, um hon helt, at Løgtingið samtykti nakað, sum var ólógligt.

Hetta vald amtmansins hekk partvíst saman við tí politiska myndugleika, sum Løgtingið fekk, og tí tørvi á ráðgeving og eftirliti, sum hesin myndugleiki hevði við sær. Stór mótstøða var ikki ímóti hesi skipan í Føroyum, men tað skuldi skjótt vísa seg, at tann íbygda andsøgnin millum embætismenn og fólkaræði, sum lá í skipanini hevði óhepnar avleiðingar fyri samstarvið millum fólkavaldar og fastar limir í Løgtinginum.

## Løgtingsval – valrættur, valbæri og valluttøka

Val til Løgtingið var – sum vanligt var aðrastaðni í hesum tíðarskeiðinum – bæði munnligt og alment. Hvør veljari hevði líka nógvar atkvøður, sum tað vóru løgtingsumboð at velja í valdøminum. Tá valið byrjaði, las valfyriskiparin nøvnini á teimum, sum atkvøða kundu, og veljararnir komu so fram at




Um aldarskiftið vaks býurin eftir Tinghúsvegnum niðan um tinghúsið. Til vinstru sæst ein petroleumslykt. Møguliga er hon ein av teimum 20, sum vórðu tendraðar á fyrsta sinni jólaaftan 1872.

valborðinum í teirri raðfylgju, sum teir vóru lisnir upp. Tá atkvøtt varð, skuldi veljarin stilla seg fram at valborðinum, siga sítt egna navn og navnið ella nøvnini á teimum, ið atkvøtt varð fyri. Valfyriskiparin skrivaði navnið á veljaranum og navnið ella nøvnini á teimum, sum atkvøtt varð fyri, niður á eitt pappír. Áðrenn veljarin fór frá valborðinum, skuldi valfyriskiparin týðiliga lesa navnið á tí, ið atkvøtt hevði, og nøvnini á teimum, ið atkvøtt var fyri, til tess at tryggja sær, at rætta navnið ella nøvnini vóru niðurskrivaði.

Tann munnliga og almenna atkvøðugreiðslan ávirkaði óivað politiska áhugan hjá veljarunum tann skeiva vegin. Í øllum førum sæst á atkvøðuluttøkuni til fólkatingsvalini í seinnu helvt av 1800-talinum, at áhugin var lítil – onkuntíð atkvøddu ikki fleiri enn 4% av teimum, sum valrætt høvdu, men tað hendi eisini, at atkvøðuprosentið kom upp um tey 40%. Aðrar orsøkir enn tann munnligi og almenni atkvøðuhátturin vóru óivað til lítla áhugan fyri politikki í Føroyum í 1800-talinum. T.d. var samferðslan í Føroyum vánalig, og tað vóru nærum eins fá valstøð, sum tað vóru valdømi. Í 1906 var støðan batnað nakað, men tað vóru framvegis ikki fleiri enn 12 valstøð tilsaman í teimum 7 føroysku valdømunum.

Meðan munnliga og almenna atkvøðugreiðslan og óhøgg-

ligu umstøðurnar annars vóru óformligar forðingar fyri politiskum virksemi, so settu reglurnar fyri valrætti beinleiðis formligar avmarkingar fyri, hvør kundi luttaka í politikki í Føroyum. Hetta var ikki nakað serføroyskt, tí reglurnar fyri valrætti til Løgtingið vóru stórt sæð tær somu sum tær, ið vóru galdandi til fólkatingsval í Danmark.[189] Valrættaraldurin til Løgtingið varð í løgtingslógini frá 1852 settur at verða 30 ár, tað sama sum til fólkatingsval í Danmark.[190] Sum vanligt var allastaðni í hesum tíðarskeiðinum, vóru tað einans menn, sum høvdu valrætt. Harumframt var tað ein treyt, at menn høvdu fastan bústað í tí prestagjaldi, har valið var hildið. Valrætturin var eisini treytaður av, at ein ávísur skattur varð goldin til ríki ella kommunu (kommunur, sum ikki funnust í Føroyum fyrr enn aftaná 1872). Onnur treyt fyri valrætti var, at maður skuldi hava sjálvstøðugt húsarhald, húskallar og tænastufólk hjá bóndum høvdu ikki valrætt. Hevði ein maður tikið ímóti fátækrahjálp, sum ikki var afturgoldin ella eftirgivin, so hevði hann heldur ikki valrætt.

Hetta vóru somu reglur, sum vóru galdandi til fólkatingsval í Danmark, men tað fyrst valda Løgtingið, sum var valt í 1852, ynskti at knýta valrættin enn meira at ogn. Tí komu aðrar og strangari treytir inn í nýggju løgtingslógina frá 1854, sum avmarkaði veljaraskaran í Føroyum enn meira, enn hann var avmarkaður í restini av ríkinum. Valrætturin varð við 1854-lógini – umframt omanfyri nevndu treytir – antin treytaður av jarðarogn ella brúksrætti til jørð, svarandi til 3 gyllin, ella hann var treytaður av ogn av bygningum, sum høvdu eitt virði svarandi til minst 150 ríkisdálar. Óvist er kortini, hvussu nógv hetta minkaði um føroyska veljaraskaran, tí meðan valrættartreytirnar viðvíkjandi ræðis- ella ognarrætti vóru herdar, so var valrættaraldurin til Løgtingið lækkaður úr 30 niður í 25 í 1854-lógini,[191] men helst hava valrættartreytirnar forða nógvum av teimum 25-30 ára gomlu í at fara á val.

Treytirnar um ræðis- og ognarrætt fyri valbæri til Løgtingið vóru løgið nokk linari enn í valrættinum, tí her vóru treytirnar til fólkatingsval verandi í gildi við tí ískoyti, at talan skuldi vera um danskar ríkisborgarar, sum búðu í Føroyum og høvdu goldið minst 2 ríkisdálar í skatti til ríki ella kommunu. Einki krav til fasta ogn varð ásett, og valbærisaldurin til Løgtingið var 25 ár, sum hann var til bæði kømrini í danska Ríkisdegnum.

Umleið helvtin av løgtingsumboðunum í einum prestagjaldi skuldu kortini veljast millum menn, ið høvdu fastan bústað í prestagjaldinum.[192]

Sæð í samanhang við strongu treytunum fyri valrætti kunnu broytingarnar í valrættaraldrinum og tær í aðra máta lagaligu treytirnar fyri valbæri neyvan metast at vera serstøk fólkaræðislig framstig í Føroyum, men hinvegin tykist broytingin í valrættaraldrinum eitt sindur løgin, tá hugsað verður um, at í Danmark var 30 ára valrættaraldurin til fólkatingsval varðveittur líka til 1915.[193] Áhugavert er tí at spyrja, hví hesar løgnu valreglurnar, ið bæði bóru á tað fólkaræðisliga borðið og avmarkaðu fólkaræðið, vóru settar í gildi serstakt fyri val til Løgtingið. Lítið man vera at ivast í, at hóast valrættaraldurin var settur til 25 ár, so tryggjaðu valrættartreytirnar føroyskum festibóndum og ognarmonnum ræði yvir Løgtinginum. 25 ára valrættaraldurin og lagaligu valbærisreglurnar vóru einans fólkaræðisligt prýði, í mun til strongu avmarkingarnar av veljaraskaranum. Helst bendir hetta á, at bøndurnir, sum høvdu ræði á meginpartinum av jørðini í Føroyum, høvdu í hyggju at tryggja sær valdið yvir nýggja Løgtinginum eisini. Við broyttu valrættarreglunum høvdu menn, sum høvdu ræði á í minsta lagi 3 gyllum av jørð ella áttu minst 150 ríkisdálar í ogn, møguleika fyri at tryggja sær valdið yvir Løgtinginum, hóast fólkaræðisligar broytingar vóru framdar í valrættaraldrinum og valbærisreglurnar vóru eins fólkaræðisligar sum í Danmark.

Avmarkingarnar í valrættinum høvdu við sær, at tað bert var ein lítil partur av føroyska fólkinum, sum hevði valrætt ella var valbærur. Politiska virksemið varð avmarkað við sjálvari vallógini. Talið á teimum, sum høvdu valrætt, er ikki kent fyrr enn við fólkatingsvalið í 1876. Tá høvdu 1641 føroyskir menn valrætt. Til samanberingar kann vísast á, at í 1876 búðu umleið 10.500 fólk í Føroyum. Hetta merkir, at av samlaða fólkatalinum í Føroyum høvdu einans 15,6% valrætt. Í dag hava umleið 65% av samlaða fólkatalinum í Føroyum valrætt. Av teimum 1641, ið høvdu valrætt í 1876, vóru einans 128 fólk á vali til Fólkatingið; tvs. at av teimum 15,6%, sum høvdu valrætt, vóru einans 7,8% á vali.[194] Av hesum sæst fyri tað fyrsta, at ein ikki serliga stórur partur av fólkinum í Føroyum hevði vælrætt ella var valbærur, og í øðrum lagi sæst, at politiski áhugin millum tey, sum høvdu valrætt, ikki var serliga stórur.



Hetta er elsta mynd, sum er tikin inni í tingsalinum. Á formansplássinum situr Buchwald amtmaður, so hon er tikin, áðrenn Christian Bærentsen tók við í 1897. Fýra teir fremstu menninir eru frá vinstru Johan Hendrik Schrøter, Sørin Müller, Mikkjal Danielsen og Fríðrik Petersen. Jógvan Poulsen situr við síðuna av Buchwald høgrumegin. Tann mittasti av teimum trimum, sum standa, er Johan M. Hentze. Frammanfyri hann sita frá vinstru J.C. Evensen, N. Andersen, Óli Jacobsen og Djóni í Geil. Hvørjir hinir menninir eru, er óvist.

Tað sæst eisini av lógini um endurreisn Løgtingsins, at treytirnar fyri valbæri hava verið hildnar at vera heldur strangar til føroysk viðurskifti. Tí í fyrsta umfari stendur, at reglurnar til fólkatingsval í Danmark eru galdandi, men seinni verður sagt, at „*Fremkommer imidlertid herved ikke et så stort antal sådanne valgbare, at de udgør idetmindste 2 for hver 100 af folkemængden i hvert præstegjald, bliver dette forhold at tilvejebringe ved at medtage de derefter højst beskattede*".[195] At donsku valreglurnar ikki beinleiðis kundu nýtast í Føroyum, sæst eisini av, at valtreytirnar til Fólkatingið og Landstingið komu at víkja frá reglunum í Danmark. Meðan tað í Danmark skuldu 12.000 íbúgvar til, fyri at eitt fólkatingsumboð kundi veljast, so fingu føroyingar tryggjað ein fólkatingsmann, sjálvt um tað einans búðu umleið 8.000 fólk í Føroyum í 1850. Reglurnar til Landstingið máttu mýkjast enn meira, til tess at føroyingar kundu fáa tann eina landstingsmannin, sum donsku ríkismyndugleikarnir vildu geva føroyingum, tí her var danska valreglan í fyrsta lagi tann, at talið á landstingsumboðum skuldi vera umleið helvtin av umboðunum í Fólkatinginum, og í øðrum lagi var eitt inntøku- og ognarmark sett bæði

viðvíkjandi valrætti og valbæri, sum torført varð at ganga á møti í Føroyum, har eingir stórir góðseigarar ella ríkir borgarar funnust.

Avgjørt varð kortini, at føroyingar skuldu hava ein landstingsmann, og treytirnar fyri valbæri vóru linkaðar soleiðis, at tað altíð skuldi vera 1 valbærur fyri hvørjar 500 íbúgvar í Føroyum.[196] Við hesi linking av reglunum vóru kortini einans 16 føroyskir menn valbærir til Landstingið í 1850.[197] Av hesum sæst, hvussu torført tað hevur verið at tillaga fólkaræðisligu reglurnar í donsku grundlógini til føroysk viðurskifti. Men júst hetta var ein av grundunum til, at føroyingar fingu eitt amtsráð, sum hevði størri heimildir enn eitt vanligt danskt amtsráð.

## Nýggja og gamla Løgtingið

Tað hevur ofta verið ført fram, at tað Løgting, sum varð endurstovnað í 1852, als ikki kundi samanberast við forna Løgting føroyinga, ið var niðurlagt í 1816, serstakliga ikki tá hugsað verður um tann myndugleika, gamla Løgtingið hevði.[198] Ført hevur eisini verið fram, at føroyingar stórt sæð vóru ónøgdir við nýggja Løgtingið, eftirsum tað var tað gamla Løgtingið, sum livdi í minninum á føroyingum, ið føroyingar vildu hava endurreist.

Tað er rætt, at føroyingar ikki í øllum lutum vóru nøgdir við tann umboðsstovn, sum teir fingu í 1852. Í meginregluni kundi nýggja Løgtingið heldur ikki samanberast við gamla Løgtingið. Gamla Løgtingið var í høvuðsheitum ein dómstólur, meðan nýggja Løgtingið var eitt danskt amtsráð, sum hartil hevði initiativrætt á lóggávuøkinum.

Spurningurin er kortini, hvussu stórur munurin var millum tað Løgtingið, sum varð niðurlagt í 1816, og tað Løgtingið, sum varð endurstovnað í 1852. Sjálvt um gamla Løgtingið upprunaliga einans var góðkent av donsku ríkismyndugleikunum – tvs. einaveldiskongi – sum ein dómstólur, so hevði tað í 1569 vunnið sær rætt til at taka sær av øðrum týðandi uppgávum eisini – t.d. at hava eftirlit við donsku embætismonnunum vegna føroyska fólkið. Tað er heldur einki at ivast í, at í 1816 var tann fólksliga eftirlitsuppgávan hjá Løgtinginum týdningarmiklari enn formliga uppgáva Løgtingsins sum

dómstólur. Tíðin var farin frá fólkavaldum dómstólum í 1816, og dómar vóru nærum ikki avsagdir í Løgtinginum longur. Tað framgekk eisini týðiliga av teimum fáu atfinningum, sum yvirhøvur koma móti niðurleggingini av gamla Løgtinginum, at tað ikki var dómstólurin, sum fór at verða saknaður, men heldur tær fólkaligu eftirlitsuppgávurnar.[199] Tann lóggevandi myndugleikin var fyri langari tíð síðan farin frá Løgtinginum til danskar kongar, tá tað varð niðurlagt í 1816. Í øllum førum var lóggevandi myndugleikin hjá danska konginum í 1661, tá einaveldið varð sett í gildi í Danmark, men óivað var hetta ein veruleiki longu langt frammanundan.

Spurningurin er tí, um føroyingar ikki í veruleikanum høvdu fingið ein umboðsstovn í 1852, sum minti nógv um gamla Løgtingið – í øllum førum um hugsað verður um seinna tíðarskeiðið í søgu gamla Løgtingsins. Tað er heldur einki at ivast í, at ein av høvuðsgrundgevingunum hjá Niels Winther fyri at fáa Løgtingið endurstovnað var, at hesin stovnur skuldi hava eftirlit við donsku embætismonnunum í Føroyum. Nýggja Løgtingið varð ikki skipað júst soleiðis, sum Niels Winther hevði ynskt, men spurningurin er, um Løgtingið ikki kom at virka sum ein stovnur, ið hevði eitt ávíst eftirlit við embætisførsluni hjá embætismonnunum. Hóast amtmaðurin framvegis hevði stórt vald, so kundi hann ikki longur einsamallur taka fyrisitingarligar avgerðir, ella einsamallur geva tilmæli til donsku ríkismyndugleikarnar viðvíkjandi Føroyum, men Løgtingið skuldi vera við til at taka hesar avgerðir. Í einum føri eydnaðist tað meirilutanum í Løgtinginum beinleiðis at virka fyri, at amtmaðurin varð settur frá av donsku ríkismyndugleikunum (sí s. 117).

Kortini vóru týdningarmiklir munir millum gamla og nýggja Løgtingið. Gamla Løgtingið hevði 48 løgrættumenn, meðan nýggja Løgtingið einans hevði 20 løgtingsumboð. Hartil var løgtingsskipanin frá 1688 ein lutfalsskipan, har allir menn høvdu skyldu til at sita eitt ávíst tíðarskeið í løgrættuni uttan samsýning, meðan nýggja Løgtingið varð sett saman við støði í eini valskipan, ið gav einum avmarkaðum bólki av monnum rætt til at lata seg velja í Løgtingið fyri eina ávísa samsýning.

Týdningarmiklasti munurin tóktist vera, at meðan gamla Løgtingið nærum altíð hevði ein føroyskan løgmann sum formann, sum upprunaliga varð valdur av løgrættumonnunum,

so var hetta serføroyska embætið, ið hevði verið ein samansjóðaður partur av gamla Løgtinginum, ikki endurreist við nýggja Løgtinginum. Tvørturímóti gjørdist ein danskur embætismaður, amtmaðurin, fastur formaður í nýggja Løgtinginum. Nýggja Løgtingið hevði ikki rætt til sjálvt at velja sín formann, soleiðis sum gamla Løgtingið hevði gjørt.

Hesin munur kann tykjast størri, enn hann í veruleikanum var, tí teir seinastu løgmenninir vóru ikki beinleiðis valdir av Løgtinginum. Løgmansembætið gjørdist í 1700-talinum til eitt kongsins embætisstarv, og løgmenninir vóru tí beinleiðis tilnevndir av kongi, eins og formaðurin í nýggja Løgtinginum, amtmaðurin, var tað. Hartil vóru teir seinastu løgmenninir aloftast útlendingar, eins og amtmenninir aloftast vóru danir. Tað var ikki so stórur munur millum bæði embætini, sum ofta hevur verið ført fram.

## Nýggja Løgtingið og amtmaðurin

Tað var júst hetta, at amtmaðurin gjørdist føddur formaður, og at prósturin gjørdist føddur limur í Løgtinginum, sum føroyingar vóru mest atfinningarsamir yvirfyri í tíðini fyri og eftir endurstovnan Løgtingsins í 1852. Søgan hjá próstinum sum føddur limur í Løgtinginum gjørdist drúgv, um samanborið verður við donsk viðurskifti, tí longu í 1855 misti prósturin sæti í donsku amtsráðunum,[200] men hann varð sitandi í Løgtinginum til 1923. Samanberingin við donsk viðurskifti er nakað øðrvísi, tá talan er um amtmannin, tí meðan hann eisini misti rættin til at vera føddur formaður í Løgtinginum í 1923, so var hann føddur formaður í donsku amtsráðunum til 1970.[201] Hertil er at siga, at samanberingin millum Løgtingi og donsku amtsráðini er ikki heilt góð, tí Løgtingið hevði frá byrjan størri fólkaræðisligar uppgávur at røkja enn donsku amtsráðini.

### Dahlerupsakin

Stríðið millum Løgting og amtmann, fólkaræði og embætisveldi, kom til sjóndar longu tey fyrstu árini, nýggja Løgtingið var til. Tað eydnaðist ikki tí fólkaræðisliga sinnaða partinum av Løgtinginum at fáa amtmansembætið úr Løgtinginum í hesum tíðarskeiðinum, men tað eydnaðist einum meiriluta í

Løgtinginum at fáa sett ein av amtmonnunum frá embætinum. Hetta hendi í 1861, og var úrslit av einum stríði millum 12 fólkavaldar løgtingsmenn og amtmannin Carl Emil Dahlerup.

Dahlerup hevði verið amtmaður síðan 1848, tá tann fólkakæri Pløyen fór úr amtmansembætinum, og hann hevði staðið fyri øllum nýskipanararbeiðinum í Føroyum, sum hevði við endurreisn Løgtingsins at gera. Tað var Dahlerup, sum í 1849 eftir boðum frá donsku ríkismyndugleikunum kallaði 11 føroyingar til fundar í Havn at viðgera uppskotið hjá embætismonnunum til nýggja løgtingslóg. Í arbeiðssetninginum hjá Dahlerup var tann treytin sett, at amtmaðurin og prósturin skuldu hava sæti í tí føroyska amtsráðnum, á sama hátt sum í Danmark. Tað var mótstøða móti, at amtmaðurin skuldi vera formaður Løgtingsins, longu á fundinum í Havn í 1849. Müller sýslumaður talaði ímóti hesum, meðan bróður Niels Winther, Winther sýslumaður í Sandoy, talaði fyri, at amtmaðurin átti at verða formaður í Løgtinginum. Atkvøtt varð um hetta á samkomuni í Havn, og av teimum 15 monnunum (embætismenninir íroknaðir), atkvøddu teir 8 ímóti, at amtmaðurin skuldi verða formaður.[202] Henda atkvøðugreiðslan fekk ongan týdning fyri endaliga uppskotið til løgtingslógina, ið varð lagt fyri Ríkisdagin í 1850, tí hesi viðurskifti lógu uttanfyri tær heimildir, sum samkoman hevði. Tað var sostatt hvørki Dahlerup sjálvur ella føroyingarnir á fundinum í Havn, sum avgjørdu, at amtmaðurin – í hesum føri Dahlerup sjálvur – skuldi hava fast sæti í Løgtinginum. Kortini gjørdist persónurin Dahlerup á ein ella annan hátt høvuðstrupulleikin í Løgtinginum í 1860.

Tann 22. august í 1860, nakað eftir at Dahlerup hevði skotið upp fyri Løgmálaráðnum at hækka føroysku jarðarskattirnar, soleiðis at ein skúlaskipan kundi setast í verk,[203] rýmdu 12 av 18 fólkavaldum løgtingsmonnum úr tinginum. Í skrivi til amtmannin, dagfest sama dag, grundgóvu teir 12 soleiðis fyri síni avgerð: „*Paa Grund af de Udtalelser, som Deres Høivelbaarenhed i de sidste Dage har tilladt Dem mod Lagtingets Medlemmer, og navnligen i Dag mod Provst Djurhuus, Kjøbmand Bærentsen og Skolelærer Lützen, erklære vi herved: at vi ikke oftere kunne møde i Thinget. Ovenstående undlade vi ikke herved at meddele Dem*“.[204] Dagin eftir, tann 23. august sendu teir 12 boð til Løgmálaráðið um ta avgerð, sum teir høvdu tikið. Her gjørdu teir greitt, at tað var teimum „*en Umulighed i Fremtiden*



Carl Emil Dahlerup var amtmaður, tá Løgtingið varð endurstovnað, men hann dugdi illa at arbeiða saman við løgtingsmonnum.

*at arbejde i Færøernes Lagting, saalænge Her Amtmand Dahlerup er dettes Formand*“.

At løgtingsmeirilutin við hesum hevði fingið ein sterkan trumf, kann eingin ivi vera um. Hóast atkvøðureglurnar í Løgtinginum, sum ásettu, at Løgtingið ikki kundi taka nakra avgerð, uttan so at í minsta lagi helvtin av løgtingsumboðunum vóru møtt á tingi, undir vanligum umstøðum styrktu um støðuna hjá amtmanninum í Løgtinginum, so hevði løgtingsmeirilutin við síni víðgongdu avgerð í 1860 lagt alt løgtingsarbeiðið lamið. Spurningurin er, hvørjar umstøður vóru viðvirkandi til, at ein meiriluti í Løgtinginum tók eitt so víðgongt, óregluligt stig við tí fyri eyga at fáa amtmannin úr tinginum. Løgfrøðiliga hevði Løgtingið hvørki myndugleika til at velja ella avseta tingformannin. Tí var talan um eina óregluliga gerð, sum Løgmálaráðið ikki kundi lata fara aftur við borðinum.

Tann 30. oktober kom skriv frá løgmálaráðharranum til Løgtingið, har teir 12 løgtingsmenninir vóru bidnir um at „*indkomme med en fuldstændig og detailleret Fremstilling af de Grunde, der have motiveret deres ... Beslutning*“. Í skrivi til løgmálaráðharran, dagfest tann 8. november, grundgóvu teir 12 løgtingsmenninir fyri síni avgerð. Av brævinum frá teimum 12 framgekk, at amtmaðurin skuldi hava víst ein atburð, sum „*i den Grad har været egenraadig og hensynsløs*“. Dahlerup skuldi eisini hava „*viist en Haan og Foragt, som det umuelig lader sig beskrive*“ mótvegis teimum løgtingsmonnunum, ið vóru ósamdir við honum. Harumframt varð amtmaðurin ákærdur fyri at hava roynt at fingið løgtingsmenn, „*der i Thinget har optraadt imod Amtmanden*“, úr tinginum.

Tílíkar ósemjur millum amtmannin og partar av Løgtinginum tykjast ikki at vera nýliga íkomnar, tí í brævinum varð víst til eina tilíka ósemju longu í 1853, árið eftir endurstovnan Løgtingsins. Tá varð amtmaðurin skuldsettur fyri at hava noktað sýslumanninum Winther sæti í tinginum við teirri grundgeving, at Winther ikki hevði sett nakran fyri seg, tá hann var burturstaddur úr Løgtinginum. Harafturímóti hevði Weyhe sýslumaður sitið í fleiri ár í Løgtinginum, sjálvt um hann ongantíð hevði sett nakran fyri seg á ting, tá hann hevði verið burturstaddur. Hetta hevði Dahlerup latið um seg ganga,

„*rimeligvis fordi han (Weyhe) har været mere føjelig*“, varð sagt í brævinum.

Eina aðru ferð skuldi amtmaðurin hava lagt eina klagu fyri ein av teimum 12 løgtingsmonnunum, sum hann ikki vildi upplýsa upprunan til. Tá løgtingsmaðurin A. C. Lützen, sum eisini var lærari, á fyrsta sinni gjørdist ósamdur við Dahlerup í Løgtinginum, fekk hann at vita frá Dahlerup, at skúlanevndin hevði klagað um, at hann ikki røkti sítt lærarayrki, meðan hann sat í Løgtinginum. Tá skúlanevndin bað Dahlerup um at uppgeva, hvør tað var, sum klagað hevði, vildi amtmaðurin ikki svara. Av samanhanginum í brævinum framgongur óbeinleiðis, at teir 12 meina, at tað helst hevur verið soleiðis, at Dahlerup sjálvur stóð aftanfyri klaguna, soleiðis at hann á tann hátt kundi hótta ein av sínum mótstøðumonnum.



A.C. Lützen, lærari, var ein av tingmonnunum, sum gjørdist ósamdur við Dahlerup.

Dahlerup varð eisini ákærdur fyri ikki at útinna Løgtingsins samtyktir og ikki at kunna Løgtingið um tær avgerðir, sum hann sjálvur tók, tá Løgtingið ikki var saman. Harumframt klagaðu teir 12 um, at roknskapirnir fyri teir grunnar, sum Løgtingið hevði ábyrgdina av, t.d. „Amtsrepartitionsfonden“ og „Økonomiske Fond“, ikki vóru til staðar, tá Løgtingið kom saman tann 29. juli. Løgtingið hevði tí lítlar og ongar møguleikar fyri at kanna roknskapirnar, soleiðis at teir, áðrenn Løgtingið 4 vikur seinni fór til hús, kundu góðkennast út frá einum hollum kunnleika.

Nakað týdningarmikið álop á embætisførðslu amtmansins var ikki talan um. Løgfrøðiliga var talan um minni týðandi mál, meðan høvuðsákærurnar vóru rættaðar móti hugburði og atferð amtmansins mótvegis teimum fólkavaldu. Tað sær heldur ikki út til, at Løgtingið hevði havt nakað stórvegis at lasta embætisførslu amtmansins fyri, tí einki sæst til nakað veruligt stríð í Løgtinginum fyrr enn í 1858, hóast ónøgdin við amtmannin, sambært teimum 12, var nærum eins gomul sum Løgtingið. Kortini var tað rættuliga skjótt eftir endurstovnan Løgtingsins, at tey fólkavaldu løgtingsumboðini funnu eitt amboð í løgtingslógini, sum kundi nýtast móti amtmanninum; tey kundu lata vera við at atkvøða, og harvið leggja Løgtingið lamið. Í byrjanini vóru løgtingsumboðini varin við at taka hetta amboðið í nýtslu – helst hava tey ikki verið heilt greið um, hvørjar avleiðingar hetta kundi fáa fyri tey – men í 1858 sótu løgtingsumboðini tigandi á sínum plássum, tá eitt uppskot

um grindareglugerð var fyri í Løgtinginum, uttan at greiða atkvøðu yvirhøvur. Henda støða í Løgtinginum stóð við og vesnaði komandi tíðina; í fleiri vikur vildu løgtingsumboðini hvørki atkvøða fyri ella ímóti nøkrum uppskoti, sum varð lagt fyri tingið. Løgtingið var virkislamið, og amtmaðurin brúkti í fleiri umførum grindaboð og onnur kærkomin men einkisigandi høvi til at útseta tingarbeiðið.

Tá Lützen og 6 aðrir tingmenn beinleiðis rýmdu úr Løgtinginum í 1859 og heldur ikki komu aftur til næsta tingfundin, hevði Dahlerup fingið nóg mikið. Amtmaðurin legði uppskot fyri Løgtingið, ið álegði teimum tingmonnum, sum ikki møttu til løgtingsfundirnar, at rinda dagbøtir. Hóast fráverurnar var Løgtingið viðtøkuført, og uppskotið, sum hevði til endamáls at noyða tingmenninar aftur til arbeiðis við at raka teir fíggjarliga, varð samtykt í Løgtinginum. Dahlerup hevði nú fatur á tí langa endanum, men hann útsetti kortini innkrevjingina av dagbótunum, til hann hevði kunnað Løgmálaráðið um løgtingssamtyktina.

Svarið frá Løgmálaráðnum til Dahlerup staðfesti, beint ímóti ætlanum amtmansins, at Løgtingið ikki hevði heimild til at døma tingmonnum dagbøtir, møttu teir ikki til tingfundir.[205]

Harvið styrktist støðan hjá teimum fólkavaldu í Løgtinginum mótvegis amtmanninum, tí nú kundu teir leggja alt Løgtingið lamið, uttan at amtmaðurin hevði nakra heimild ella nakað amboð, sum kundi verða brúkt ímóti teimum.

Helst var tað henda styrkta støðan hjá teimum fólkavaldu í Løgtinginum, sum var avgerandi fyri atgerðir meirilutans, tá Løgtingið kom saman í 1860. Tað var í øllum førum ikki nakað samfelagsligt stórmál ella nakað týdningarmikið løgfrøðiligt mál, sum fekk bikarið hjá teimum 12 at flóta yvir tann 22. august. Henda dagin viðgjørdi Løgtingið umsóknir frá føroyskum handilsmonnum, – m.a. eina umsókn frá Restorff keypmanni – har søkt var um, at føroysk farmaskip skuldu sleppa undan at gjalda akkerspening. Fleiri av teimum 12 løgtingsmonnunum, t.d. Bærentsen, Lützen og próstúrin Djurhuus, høvdu orðið og talaðu fyri, at tað hevði verið ynskiligt, at føroysk skip sluppu undan hesi útreiðslu. Kortini vóru teir á einum máli um, at við verandi handilslóggávu bar ikki til at frítaka føroysk farmaskip fyri hesa útreiðslu, tí

lóggávan frítók einans føroysk fiskiskip, sum vóru til fiskiskap undir Føroyum, fyri gjaldið.

Dahlerup tulkaði støðutakanina hjá meirilutanum í Løgtinginum á tann hátt, at talan var um eina roynd at seta Restorff keypmanni, sum ikki sat væl um sátt við stórar partar av tinginum, forðingar í vegin. Tað var í hesum sambandi, at amtmaðurin, sambært brævinum frá teimum 12, skuldi hava tikið orðið og sagt, at „*han ikke vidste hvad han skulle sige om færøiske Lagthingsmænd, som ønskede at lægge Byrder paa sine Landsmænd*“. Tá Bærentsen og Lützen áhaldandi hildu uppá, at teir ikki kundu síggja, hvussu handilslógin kundi tulkast á annan hátt, enn teir fyrr høvdu hildið uppá, skuldi Dahlerup aftur hava tikið orðið og sagt: „*Jeg er den eneste Jurist her i Thinget, og altsaa den eneste, der forstaar sig paa Lovfortolkning, og det vil derfor vidst ikke falde vanskelig for Thingets øvrige Medlemmer at vælge mellem Bærentsens og Lützens Fortolkning og min*“. Dahlerup sjálvur noktaði fyri, at hann nakrantíð hevði sagt nakað líknandi í Løgtinginum.[206]

Ákærurnar frá teimum 12 steðgaðu kortini ikki við hesum. Í brævinum til Løgmálaráðið verður sagt, at tá amtmaðurin varð biðin um at greiða Løgtinginum frá, hvussu hann kundi útleggja lógina øðrvísi enn Bærentsen og Lützen, skuldi hann hava svarað, at høvdu farmaskipini fiskireiðskap umborð, so

Ein umsókn frá M.C. Restorff keypmanni førdi eisini til stríð millum Dahlerup og stóran part av tingmanningini. Her eru gomlu amtmanshúsini og húsini hjá M.C. Restorff avmyndaði av Tinghúsvøllinum á mynd frá 1870-unum.





Hans David Matras skrivaði um Dahlerup-málið í dagbók síni.

fóru tey at vera fataði sum fiskiskip, ið vóru til fiskiskap undir Føroyum. Við hesi áheitan á handilsmenn um at bróta lógina, skuldi løgfrøðingurin og amtmaðurin Dahlerup sambært brævinum hjá teimum 12 hava hugsað sær, at føroysku farmaskipini kundu sleppa undan at gjalda akkerspening.

Ákæran frá amtmanninum um at teir løgdu óneyðugar byrðar á herðarnar á egnum landsmonnum, var sambært brævinum frá teimum 12 til løgmálaráðharran tann beinleiðis grundin til avgerðina um at rýma úr tinginum og ikki møta aftur, fyrr enn Dahlerup ikki longur var Løgtingsins formaður. Eftir í Løgtinginum sótu amtmaðurin og 6 „*mamelukker*“, skrivar Hans David Matras, ein av teimum 12, í dagbók síni. Hesir 6 høvdu ikki „*Mod til at hævde Thingets Værdighed*“. Teir 12 nevnir Hans David Matras hinvegin sum „*brave Landsmænd! Sandhedens og Retfærdighedens elskere! Landets trofaste Forsvarere! Lagthingets urokkelige helte!*“.

Um tað var rættvísin og sannleikin, sum sigraðu í 1861, tá Dahlerup varð settur frá sum amtmaður, og nýggjur amtmaður, Peter Holten, tók við, er ilt at siga nakað við vissu um. Nógv bendir á, at málið eisini hevði eina meira kensluliga og lítið ítøkiliga síðu, sum lítið og einki hevði við løgfrøði ella embætisførslu amtmansins at gera. Lítið man vera at ivast í, at Dahlerup var ein heldur knortlutur embætismaður, sum illa dugdi at handfara tey fólkaræðisliga valdu umboðini í Løgtinginum. Hansara hugburður mótvegis føroysku løgtingsmonnunum vísir, at leivdir frá teirri uppalandi einaveldishugsjónini funnust í honum. Hendan hugburð og manglandi virðingina fyri teimum fólkavaldu løgtingsmonnunum, hevði Niels Winther eisini víst á. Í eini røðu í Ríkisdegnum í 1853 segði Niels Winther millum annað um Dahlerup, „*at han stadig taler siddende ... medens de andre medlemmer rejser sig op, når de har ordet, at han fløjter ad de medlemmer, hvis tale han ikki ynder ... og nægter de medlemmer ordet, der vil protestere derimod ...*“.[207] Í aðra mátar tykist Dahlerup at hava verið ein dugnaligur embætismaður, sum fólkavaldu løgtingsumboðini einans hava havt smáting at funnist at í tey 12 árini, hann var amtmaður.[208]

Tað vóru heldur ikki løgfrøðiliga ella samfelagsliga týðandi mál, sum fingu sinnini í kók hjá teimum fólkavaldu í Løgtinginum, men talan var um grindareglugerðir og trætur um akkerspening til ein ávísan keypmann. Hesi mál høvdu so lítið

uppá seg, at tey mest av øllum líktust undanførslum fyri at seta eina ætlan í verk, sum hevði heilt aðrar orsøkir. Brævaskiftið hjá teimum 12 við amtmannin og Løgmálaráðið bendir týðiliga á, at tað var hugburður amtmansins, og í minni mun embætisførsla hansara, sum gekk tingmonnunum ov nær. Fólkavaldu løgtingsumboðini kendu seg eftir øllum at døma eyðmýkt og niðurgjørd av tí sterka og lógarkøna amtmanninum, uttan at tey høvdu nakran løgfrøðiligan møguleika fyri at seta hann fastan ella fakligan førleika fyri at hevda seg yvirfyri honum. Men eftir løgtingssetuna í 1859 høvdu tey fingið eitt sterkt amboð, sum tann hástóri og køni amtmaðurin kundi knógvast við. Hartil kemur, at tað neyvan hóvaði óðalsmonnum og kongsbóndum, sum høvdu stóran meiriluta í Løgtinginum, at Dahlerup í 1860 hevði vent sær til Løgmálaráðið við tí í hyggju at hækka jarðarskattin.*

Ímóti hesi tulking kann vera ført fram, at eftirsum teir 12 løgtingsmenninir fingu sín vilja í 1861, tá Løgmálaráðið gjørdi av at seta Dahlerup úr amtmansembætinum, so er tað prógv um, at Løgmálaráðið lastaði Dahlerup fyri hansara embætisførslu. Avgerðin kann kortini tulkast á ein annan hátt. Tað er ikki óhugsandi, at avgerðin skal skiljast á tann hátt, at Løgmálaráðið metti, at skuldi Løgtingið fáast at virka sambært løgtingslógini, so var einasta loysnin at sleppa sær av við Dahlerup. Spurningurin, sum Løgmálaráðið sat við, snúði seg ikki einans um, hvør hevði ábyrgdina av trupulleikunum í Løgtinginum, men hann snúði seg eisini um, hvat kundi gerast fyri at fáa trupulleikan loystan. Sambært løgtingslógini hevði Løgmálaráðið ikki heimild til at skifta fólkavaldu umboðini út, men Løgmálaráðið kundi seta amtmannin úr starvi. Tann íkomna støðan, har samstarvið millum amtmannin og fólkavaldu umboðini var vorðið ómøguligt, gjørdi tað lættast at skifta amtmannin út. Hartil kom, at Dahlerup sjálvur tykist at hava fatað seg sum eitt offur fyri løgtingsskipanini, tí sum ein avleiðing av sínum stríði við Løgtingið tosaði hann sjálvur fyri, at Løgtingið sjálvt átti at sleppa at velja sín formann.[209] Eina tílíka broyting í løgtingslógini var Løgmálaráðið ikki

* Matras 1951, síðu 213-214. Av yvirlitinum hjá Matras framgongur, at 14 av teimum 18 fólkavaldu løgtingsumboðunum í 1860 vóru annaðhvørt óðalsmenn ella kongsbøndur; millum teir 12, sum rýmdu úr tinginum, vóru 10 óðalsmenn ella kongsbøndur. Uppskotið varð ikki samtykt í Løgtinginum fyrr enn í 1867.

sinnað til at fáa framda, og tí var lættasta loysnin at fáa Dahlerup av vegnum. Løgmálaráðið setti Dahlerup í starv sum undirrættarfúta í Odense, tá hann fór úr Føroyum. Hendan starvssetanin, sum ikki kann sigast at vera ein starvslig framflytan av Dahlerup, tvørturímóti, kundi kortini bent á, at Løgmálaráðið hóast alt lastaði Dahlerup fyri embætisførsluna í Føroyum.

Løgmálaráðið var sinnað at loysa tann ítøkiliga trupulleikan í Løgtinginum í 1861, men tað var ikki sinnað til at fara til rótina og loysa trupulleikan med alla. Dahlerup var óivað trupulleikin í 1860, men tann grundleggjandi trupulleikin var, sum Dahlerup sjálvur hevði ásannað, tann lítið fólkaræðisliga løgtingslógin, sum parkeraði trupulleikan hjá amtmanninum. Støðan hjá amtmanninum í Løgtinginum var ikki endaliga loyst við avgerðini hjá Løgmálaráðnum, men tá hugsað verður um, at amtmenninir ikki fóru frá sum føddir formenn í donsku amtsráðunum fyrr enn í 1970, so er tað, hóast samanberingina millum Løgtingið og donsku amtsráðini ikki er so líkatil at gera, ikki so torført at skilja støðuna hjá Løgmálaráðnum.

**Føroyskar royndir at fáa embætismenninar úr Løgtinginum**

Sum fyrr er greitt frá, var mótstøða móti limaskapi amtmansins longu á fundinum í Havn í 1849. Í 1851, tá uppskotið um endurreisn Løgtingsins varð lagt fyri danska Ríkisdagin, hevði Niels Winther hvassliga funnist at fødda rætti amtmansins og próstsins til at sita í Løgtinginum. Einki kom burtur úr hesi mótstøðu, tí treytirnar frá donsku ríkismyndugleikunum vóru, at talan skuldi vera um eitt amtsráð, sum í so stóran mun sum gjørligt minti um donsku amtsráðini, har prósturin og amtmaðurin vóru føddir limir.

Av løgtingstíðindum sæst, at støðan hjá amtmanni og prósti í Løgtinginum hevur verið umrødd á tingi í 1880, 1881, 1884, 1890, 1903 og í 1905, men helst er eitt uppskot um at broyta støðuna hjá embætismonnunum í Løgtinginum lagt fyri tingið longu í 1874.[210] Uppskotini vóru ymisk, og ikki øll bóru á sama borðið, men felags fyri tey var, at løgtingslógin skuldi broytast, soleiðis at støða embætismanna í Løgtinginum varð broytt á onkran hátt. Dahlerupsakin hevði víst, at trupult var at fáa løgtingsskipanina at virka fólkaræðisliga, tí ein embætismaður sat á nærum øllum teimum týdningarmiklu løgfrøðisligu

heimildunum og fakliga førleikanum. Fólkaræðisliga var eitt undirskot í skipanini, sum ikki kundi betrast, uttan so at støða amtmansins í Løgtinginum varð broytt. Tað eydnaðist kortini ikki at broyta støðuna hjá amtmanninum í Løgtinginum fyrr enn í 1920, tá heilt onnur viðurskifti gjørdu seg galdandi.

Ein av grundunum til at ongar broytingar hendu í Føroyum fyrstu tíðina, var óivað tann, at einasti føroyski politikarin, sum bæði hevði politiskar hugsjónir, persónligt dirvi og evni til at stríðast móti embætisveldinum, Niels Winther, rýmdi úr Føroyum longu í 1857. Niels Winther varð, umframt at vera fyrsti føroyski fólkatingsmaðurin, valdur inn í nýggja Løgtingið frá endurstovnanini í 1852 og til 1857. Grundirnar til stuttu politisku virkisleið Niels Winthers í Føroyum skulu óivað finnast bæði hjá embætismonnunum, hjá føroyingum og hjá Niels Winther sjálvum. Í fyrsta lagi hevur hann neyvan mett, at stríð hansara móti embætismonnunum vann frama millum føroyingar ella í Løgtinginum, og í øðrum lagi møtti hann harðari mótstøðu frá donsku embætismonnunum í Føroyum. Hartil kom, at hansara trupulleikar partvíst vóru sjálvskaptir, tí embætismenninir fingu ikki mjúka viðferð í blaði hansara, „Færingetidende“. Í 1852 høvdu embætismenninir fingið nóg mikið av Niels Winther, tá hann á sín framfýsna hátt skrivaði, at: „*Nu gaar det for vidt med Monopolhandelens Snyderi*“. Í somu grein ákærir hann tubbakshandlaran fyri at snýta við vektini á tubbakkinum við at vinda tað inn í „*tykt Sejlgarn*“ og at stinga „*en Mængde Træpinde af over én Tommes Længde og en ualmindelig Tykkelse*“ upp í tubbakkið. Hartil var tubbakkið so tjúkt, at tað kundi nýtast „*til deri at hænge en voxen Mand, ja selv en velmædsket Handelsdirecteur*“. Hartil ákærir Winther tubbakshandlaran og handilsbestýraran fyri korruptión.[211] Fleiri tílíkar orðingar og ákærur móti embætismonnunum høvdu við sær, at Niels Winther varð skuldsettur og dømdur at gjalda 400 ríkisdálar í bót.

Í 1857 hevði Niels Winther fingið nóg mikið av Føroyum, tá hann med alla rýmdi úr oyggjunum og búsettist í Danmark. Spurningurin er, um hann varð vorðin troyttur av donsku embætismonnunum, ella um hann var farin at troyttast av føroyingum. Hesin spurningurin verður ósvaraður, men helst metti hann ikki, at hann fekk nóg dyggan stuðul til sín politik í Føroyum.

Hesin stubbin kostaði Niels Winther 400 ríkisdálar í bót og var helst orsøkin til, at fyrsta blaðið í Føroyum gavst, eftir at einans 9 bløð vóru komin út.

— Nu gaar det for vidt med Monopolhandelens Snyderi. I Maj Maaned blev der fra Handelsstedet her i Thorshavn udleveret en Rulle Skraatobak af Jørgen Bechs Fabrik, der, da det skulde bruges, befandtes at være spundet omkring tvundet tykt Sejlgarn, og hvori der som sædvanligt fandtes indstukket en Mængde Træpinde af over én Tommes Længde og en ualmindelig Tykkelse (næsten en halv Tomme i Omkreds). Naar Tobakshandleren snyder Færingerne saa groft, da skulde det ikke forundre os, om han søgte at dæmpe Samvittighedens skjærende Røst paa andre Maader, t. Ex. ved — til liden Baade for Færingerne — at give Handelsbestyrerne, der forunde ham deres Søgning, kostbare Foræringer o. desl. Den konstige, noget sejge Indmad i denne Tobak er saa tyk, at den kunde benyttes til deri at hænge en voxen Mand, ja selv en velmædsket Handelsdirecteur.

Eftir Niels Winther varð eitt stórt tómrúm í føroyskum politikki. Torført er at fáa eyga á nakrar politiskar hugsjónarmenn í Føroyum í tíðini eftir Niels Winther; eingin megnaði at taka arvin upp eftir hann. Stríðið móti Dahlerup í 1860 kann neyvan fatast sum eitt politiskt og hugsjónarligt stríð, men rættari er helst at fata Dahlerupsakina sum eitt meira persónligt stríð hjá løgtingsmeirilutanum móti Dahlerup. Politiskar hugsjónir eru torførar at finna í Føroyum fyrr enn umleið 20 ár eftir Dahlerup.

Í 1880 var uppskot um broytingar í løgtingslógini lagt fyri Løgtingið, sum millum annað miðaði ímóti, at sett varð ein føst millumtinganevnd, amtmaðurin og 6 av Løgtinginum vald umboð, sum skuldi taka sær av fyrisitingini.[212] Sjálvt um

amtmaðurin skuldi verða formaður í nevndini, so hevði Løgtingið við hesum uppskotinum bæði fingið eitt ávíst fyrisitingarligt eftirlit við amtmanninum, og í longdini hevði fyrisitingarligur førleiki verið mentur hjá Løgtinginum. Hetta uppskotið vann ikki frama, men longu í 1881 legði tingmaðurin P.O. Effersøe eitt nýtt uppskot um broytingar í Løgtingslógini fyri tingið, sum m.a. miðaði ímóti, at prósturin skuldi úr Løgtinginum, meðan amtmaðurin framvegis skuldi verða formaður. Aðrar broytingar vóru eisini í uppskotinum, sum styrktu um upplýsingarskyldu ríkismyndugleikanna mótvegis Løgtinginum. Uppskotið kom ígjøgnum allar 3 viðgerðirnar í tinginum, og varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 9 ímóti, ein tingmaður atkvøddi ikki,[213] men tað gjørdist kortini ikki til lóg, tí tað vann ikki frama hjá donsku ríkismyndugleikunum. Helst hevði tað týdning fyri støðutakan stjórnarinnar, at løgfrøðiligi sakkunnleikin, Hannes Finsen, sum hevði tikið við amtmansembætinum í 1871, atkvøddi ímóti uppskotinum, og í øðrum lagi var meirilutin í Løgtinginum tepur.



Jóhan Hendrik Schrøter var ein av teimum tingmonnunum, sum veruliga royndi at lyfta arvin eftir Niels Winther í 1880-unum.

Ein av teimum løgtingsmonnunum, sum veruliga royndi at lyfta arvin eftir Niels Winther, var Jóhan Hendrik Schrøter úr Hvalba. Hann legði í 1884 eitt annað uppskot fyri tingið, sum var nógv víðgongdari enn undanfarnu uppskot. Eftir uppskotinum hjá Schrøter skuldi Løgtingið gerast ein fólkavaldur stovnur burturav. Schrøter legði upp til, at Løgtingið sjálvt skuldi velja sín formann og næstformann. Prósturin skuldi úr tinginum, meðan amtmaðurin framvegis skuldi hava rætt til at tala í Løgtinginum og taka lut í samráðingunum í tinginum, tó uttan atkvøðurætt. Hartil skuldi Løgtingið hava rætt til at leggja lógaruppskot beinleiðis fyri stjórnina til góðkenningar, uttanum Ríkisdagin. Uppskotið hjá Schrøter, sum var væl í tráð við hugsjónirnar hjá Niels Winther, var ov víðgongt fyri løgtingsmanningina, og tað fall í Løgtinginum. Einans 5 tingmenn atkvøddu fyri uppskotinum, meðan 12 atkvøddu fyri at útseta málið.[214] Somu lagnu fekk eitt líknandi uppskot, sum varð lagt fyri Løgtingið í 1890.[215]

Tað vóru ikki einans donsku ríkismyndugleikarnir, ið høvdu ta áskoðan, at amtmaðurin og prósturin áttu at hava fast sæti í Løgtinginum. Stórur partur av Løgtinginum hevði somu áskoðan. Tað er kortini ein ósvaraður spurningur, í hvønn mun løgtingsmeirilutin í 1884 og 1890 var ávirkaður av

støðutakan stjórnarinnar til løgtingstilmælið í 1881, tí tað kundi ikki vera serliga sannlíkt, at stjórnin fór at góðtaka uppskotið hjá Schrøter, tá hon ikki kundi góðtaka tað nógv minni víðgongda uppskotið hjá Effersøe. Uppskotið hjá Schrøter varð mett at vera so mikið víðgongt, at tað kravdi grundlógarbroyting.[216] Hartil kom, at setti amtmaðurin í 1854 Lorentz Højer Buchwaldt, sum formliga tók við eftir Hannes Finsen í 1885, var hart ímóti uppskotinum hjá Schrøter. Tað var tí ikki stórur møguleiki fyri, at stjórnin fór at taka undir við tí. Ein annar spurningur er, um tað hevði eydnast at fingið løgtingslógina broytta og fingið føstu limirnar úr tinginum, um stórur meiriluti var fyri tí í Løgtinginum. Endaliga avgerðin hevði í øllum føri komið at ligið í Danmark hjá danska Ríkisdegnum, men uttan breiða semju í Føroyum vóru útlitini ikki góð fyri, at ríkismyndugleikarnir fóru at taka undir við nøkrum tílíkum uppskoti.

Líka mikið hvørjar grundirnar vóru, so var eingin meiriluti í Løgtinginum fyri at fáa amtmannin frá sum føddan formann í tíðarskeiðinum frá 1852 til 1906. Hóast stríðið móti Dahlerup í 1860 var eitt stríð hjá einum stórum meiriluta í Løgtinginum fyri at fáa amtmannin úr løgtingsformanssessinum, so er tað ikki av teirri grund vist, at stríðið í 1860 kann fatast sum ein partur av einum størri stríði, sum hevði til endamáls at fáa amtmansembætið úr Løgtinginum. Amtmansembætið var ikki samlíkt við tann persón, sum sat í embætinum, og eitt stríð móti tí persóni, sum sat í embætinum, kann tí ikki av sær sjálvum fatast sum eitt stríð móti sjálvum embætinum. Tað er eisini nógv, sum bendir á, at stríðið hjá teimum 12 í høvuðsheitum var eitt stríð móti tí persóni, sum sat í amtmansembætinum, og í minni mun eitt stríð móti sjálvum amtmansembætinum. Í skrivinum frá teimum 12 løgtingsmonnunum til løgmálaráðharran varð ákæra ikki reist móti nøkrum øðrum enn persóninum Dahlerup, og teir 12 kravdu heldur ikki annað enn tað, at persónurin Dahlerup skuldi setast frá sum løgtingsformaður. Henda fatan verður eisini styðjað av tí veruleika, at løgtingarbeiðið varð tikið upp aftur undir nýggja amtmanninum Peter Holten sum løgtingsformanni, og síðan var friður um spurningin í 20 ár.

Føroyingar vóru atfinningarsamir mótvegis fasta formansskapi amtmansins, longu áðrenn Løgtingið varð endurreist,

men tað tykist kortini, sum føroyingar stórt sæð hava funnið seg í hesi skipan, sjálvt um teir ikki altíð funnu seg í tí persóni, sum sat í amtmansembætinum. Hetta sæst eisini av tí sannroynd, at tann fyrsta løgtingsmanningin, sum var vald í 1852, hevði einki ynski um at avmarka myndugleika amtmansins í Løgtinginum – heldur tvørturímóti. Løgtingsmeirilutin kundi semjast um at stríðast ímóti einum ávísum amtmanni ella at fremja minni týðandi broytingar í løgtingslógini, men tá uppskot um at fáa sjálvt amtmansembætið úr Løgtinginum komu fyri Løgtingið, vóru tað einstøk løgtingsumboð, ið stríddust fyri tí, og einans nøkur fá, ið tóku undir við tí. At stjórnin og amtmaðurin í stóran part av tíðarskeiðinum vóru ímóti at fremja tílíkar broytingar í løgtingslógini, hevði sjálvandi ein ávísan týdning fyri viðgerðina í Løgtinginum, men tað hevur helst havt avgerandi týdning, at Løgtingið, eins og donsku amtsráðini, ikki hevði fyrisitingarligan førleika til at átaka sær uppgávurnar hjá amtmanninum.

Royndirnar í 1880-unum, sum gjørdar vóru til tess at fáa løgtingslógina broytta, vóru kortini tekin um, at stríðið fyri at fáa amtmansembætið úr Løgtinginum so smátt byrjaði at menna seg í Føroyum, hóast mótstøða enn var móti hesum í Danmark. Tann ásannan, sum Dahlerup sjálvur var komin fram til, at sjálv løgtingsskipanin var trupulleikin, byrjaði so smátt at menna seg í Føroyum eisini, tá komið varð fram ímóti 1880-unum. Tá tjóðskaparrørslan veruliga hevði tikið seg upp í Føroyum, varð málið reist av nýggjum, men sjálvt um tíðarrákið í danska ríkinum í ein ávísan mun var við tjóðskaparrørsluni í hesum spurningi, tá komið var inn í 20. øld,[217] so spurdist einki burtur úr í 1903 og í 1905, tá málið aftur varð reist í Løgtinginum. Ein av grundunum var tann, at hóast tjóðskaparrørslan hevði ta fatan, at amtmansembætið skuldi úr Løgtinginum, so varð hetta ikki longur mett at vera tann mest átrokandi trupulleikin í løgtingsskipanini.

## Nýggjar tíðir og nýggj krøv til heimildir Løgtingsins

Tjóðskaparrørslan, sum av álvara vaknaði í Føroyum seinast í 1880-unum, fekk stóra ávirkan á tey krøv, sum føroyingar settu til løgtingsskipanina og heimildir Løgtingsins. Men eins



Jóannes Patursson fór tíðliga undir at virka fyri broyting av løgtingslógini.

og í 1850-unum vóru tað ikki einans serføroysk viðurskifti, ið birtu uppundir hendan nýggja áhuga fyri myndugleika Løgtingsins í Føroyum. Tjóðskaparrørslan í 1880-unum var eins og fólkaræðisligu hugsjónirnar í byrjanini av 1800-talinum ein europeisk rørsla, sum kom til Føroya uttan úr heimi. Eins og Niels Winther fór til Danmarkar at lesa løgfrøði og kom aftur til Føroya við teimum fólkaræðisligu hugsjónum, sum hann kom í samband við har, soleiðis fóru eisini føroyingar í seinnu helvt av 1800-talinum til onnur lond at nema sær kunnleika og komu aftur til Føroya við teimum hugsjónum, sum teir møttu har. T.d. hevði størsti føroyski tjóðskaparmaðurin í hesum tíðarskeiðinum, Jóannes Patursson, verið í Noregi og nomið sær útbúgving innan landbúnað. Harumframt var Jóannes Patursson komin í samband við íslendingar, og politisku royndir íslendinga komu at ávirka hugsjónirnar hjá Jóannesi Patursson nógv. Tað vóru ikki einans almennar hugsjónir um frælsi einstaklinga, ið hesir menn komu aftur til Føroya við, men tað vóru hugsjónir um felags rættindi hjá serstøkum tjóðskaparligum bólkum, ið hesir menn komu í samband við á hægri útbúgvingarstovnum í Europa.

Hartil kom, at føroyska samfelagið var fyri stórum broytingum í seinnu helvt av 1800-talinum. Kongaligi einahandilin, sum hevði tikið sær av øllum handilsviðurskiftum føroyinga síðan 1709, varð avtikin í 1856, tá fríhandil varð settur á stovn. Føroyska samfelagið kom tí í nógv størri mun enn áður undir ávirkan uttanífrá. Føroyska samfelagið var í ferð við at broyta seg frá einum stórt sæð sjálvberandi landbúnaðarsamfelagi til eitt marknaðarorienterað fiskivinnusamfelag, sum í nógv størri mun enn áður var heft at lættari atgongd til marknaðir uttanfyri Føroyar. Hendan samfelagsliga menningin var byrjað, longu áðrenn einahandilin varð avtikin, og hon var í grundini ein av atvoldunum til, at einahandilin varð avtikin. Einahandilin var ikki førur fyri at nøkta tann tørv, sum fiskivinnusamfelagið setti til lagaliga atgongd til marknaðin.

Henda gongdin hevði við sær, at nýggjar samfelagsstættir so líðandi vuksu fram, ið komu at hótta valdsgrundarlagið hjá kongsbóndunum í Føroyum. Ímóti endanum av 1800-talinum var ein máttmikil handilsmannastætt vaksin fram, sum var í ferð við at yvirtaka ta leiðandi støðuna í samfelagnum frá kongsbóndunum. Ríkidømi og vald kundi ikki longur einans

metast út frá fastari ogn ella atgongd til jørð, men reiður peningur gjørdist eisini eitt mát fyri ríkidømi. Hartil kom, at undirstættin í samfelagnum, húskallarnir hjá kongsbóndunum, í alt størri mun varð avloyst av eini fiskimannastætt.

Hagtøl vísa, hvussu nógv føroyska samfelagið broyttist í 1800-talinum. Í 1801 livdu 1% av teimum 5.000 fólkunum í Føroyum av fiskivinnu, meðan 85% livdu av landbúnaði. Tá komið varð fram móti endanum av øldini, livdu heili 53% av teimum nú 15.000 fólkunum í Føroyum av fiskivinnu, meðan einans 18,4% livdu av landbúnaði.[218]

Tað var eyðsæð, at tjóðskaparligu hugsjónirnar og samfelagsligu broytingarnar í seinnu helvt av 1800-talinum settu heilt øðrvísi krøv til politisku skipanina av føroyska samfelagnum, enn frælslyntu hugsjónirnar uttan úr heimi og føroyska landbúnaðarsamfelagið høvdu sett. Harvið vóru onnur krøv eisini sett til skipanina av Løgtinginum. Meðan fólkaræðisligu hugsjónirnar í byrjanini av 1800-talinum vóru almennar og kravdu, at øll menniskju høvdu somu rættindi, so kravdi tjóðskaparrørslan í seinnu helvt av øldini, at eitt serstakt fólk skuldi hava serstøk tjóðarrættindi. Í Løgtinginum fekk hetta tann týdning, at í sama mun sum tjóðskaparrørslan fekk ávirkan á løgtingsmenninar (og á føroyingar sum heild), vóru krøv sett fram um, at Løgtingið skuldi hava nøkur serstøk føroysk rættindi, tí Løgtingið umboðaði eina serstaka føroyska tjóð, sum ikki kundi samanberast við aðrar tjóðir. Stóru samfelagsligu broytingarnar í seinnu helvt av 1800-talinum høvdu við sær, at neyðugt var at fáa eina nýggja løgtingsskipan, sum gav Løgtinginum størri heimildir, soleiðis at hon kundi fáast at virka skjótari, nú samfelagið broyttist skjótari og skjótari.

### Føroysk krøv um størri heimildir til Løgtingið mennast

Seinast í 19. øld fóru tjóðskaparmenninir undir leiðslu av Jóannesi Patursson kongsbónda í Kirkjubø at virka fyri eini broyting av løgtingslógini.[219] Fyri Jóannes Patursson var tað eyðsæð, at hetta arbeiðið átti at verða gjørt við samráðingum millum føroyingar og danir í Danmark. Hetta arbeiðið kundi ikki gerast við støði í sjálvum Løgtinginum, helt Jóannes Patursson, tí her sótu embætismenninir og forðaðu fyri, at broytingar vóru framdar. Embætismenninir vildu ikki virka fyri, at donsku ríkismyndugleikarnir skuldu geva Løgtinginum

størri heimildir, óansæð hvat Løgtingið sjálvt helt, tí tað hevði komið at avmarka teirra myndugleika og vald í Løgtinginum. Jóannes Patursson helt tí, at einasti møguleiki var at stilla upp til fólkatingsvalið, og harvið koma beinleiðis í samráðingar við donsku ríkismyndugleikarnar.

Tað gjørdi tað heldur ikki verri, at øll tann danska stjórnarskipanin eisini stóð fyri at skula verða nýskipað. Í nærum øllum tíðarskeiðinum frá 1866, tá grundlógin varð broytt, hevði stríð verið í danska Ríkisdegnum millum eitt Landsting, sum í høvuðsheitinum varð mannað við kongstrúgvum høgramonnum, og eitt Fólkating, sum í alt størri mun varð mannað við vinstramonnum, ið vildu avmarkað valdið hjá kongi enn meira. Sjálvt um kongsins vald við grundlógini varð avmarkað av einum lóggevandi Ríkisdegi, so hevði kongur tilskilað sær rætt til at tilnevna sjálva stjórnina, og tað hevði hann gjørt uttan at taka hædd fyri, hvør flokkur hevði meirilutan í Ríkisdegnum. Kongur hevði altíð tilnevnt eina høgrastjórn, sjálvt um tað var Vinstra, sum móti endanum av 19. øld hevði stóran meiriluta í Ríkisdegnum – serstakliga í Fólkatinginum. Í 1898 vóru 114 ríkisdagsmenn í Fólkatinginum, og harav vóru teir 63 vinstramenn, meðan einans 16 vóru høgramenn. Kortini tilnevndi kongur eina høgrastjórn í 1898.

Tað var týðiligt, at hetta fór ikki at bera til í longdini. Hetta stríðið, sum snúði seg um rættin hjá kongi at tilnevna ta stjórn, hann hevði hug til, mátti enda við, at *parlamentarisman* – at ein stjórn ikki kundi verða sitandi, um so var, at hon fekk meirilutan í Ríkisdegnum ímóti sær – fór at vinna frama í Danmark.

Í Føroyum vóru eingir politiskir flokkar, og tí stillaðu føroysku valevnini til Ríkisdagin upp fyri danskar flokkar. Føroyingar høvdu altíð stillað upp fyri Høgraflokkin, men nú, tá tað sá út til at Vinstra fór at vinna stjórnarvaldið í Danmark, varð spurningurin, um tað ikki loysti seg betur at sameina seg við Vinstra. Hartil kom, at skuldi Løgtinginum verða heimilað størri vald í Føroyum, so fór hetta at seta krøv til størri inntøkur og møguliga stuðul úr danska ríkiskassanum, og tann flokkur, sum hevði meirilutan í Ríkisdegnum, sat eisini á ríkiskassanum – seinast í 19. øld var hetta Vinstra. Í øðrum lagi var Vinstra tann flokkur, sum vildi nýskipa donsku stjórnarskipanina, og tað kundi tí hugsast, at hesin flokkur eisini fór at

viðgera ynski føroyinga um at nýskipa løgtingsskipanina við vælvild.

Jóannes Patursson stillaði upp til fólkatingsval bæði í 1898 og í 1901. Hann segði seg í Fólkatinginum fara at arbeiða sum Løgtingsins umboðsmaður, og hann vildi arbeiða fyri, at Løgtingið altíð skuldi viðmæla danskar ríkislógir, áðrenn tær vóru settar í gildi í Føroyum. Í 1898 vann høgramaðurin Klæmint Olsen fólkatingssessin við 554 atkvøðum, meðan vinstramaðurin Jóhan Hendrik Schrøter fekk 447 atkvøður. Jóannes Patursson fekk einans 50 atkvøður í 1898, men í 1901 stillaði Jóannes Patursson upp fyri Vinstra og varð valdur á Fólkating við 356 atkvøðum. Áhugin fyri valunum tykist kortini ikki at hava verið serliga stórur. Av teimum umleið 15% av fólkinum, sum høvdu valrætt, atkvøddu 41,7% í 1898, meðan einans 21,9% av veljarunum atkvøddu í 1901. Valið av Jóannesi Patursson til Fólkatingið í 1901 sigur okkum tí ikki serliga nógv um, hvussu stóra undirtøku tankar hansara høvdu millum fólkið.



Christian Bærentsen var einasti føroyski amtmaðurin. Hann gjørdist amtmaður í 1897.

Sama árið – í 1901 – vann Vinstra stórsigur á fólkatingsvalinum í Danmark. Av teimum 114 umboðunum í Fólkatinginum hevði Vinstra nú 76, meðan Høgra einans hevði 8. Hetta hevði við sær, at kongur ikki longur helt seg kunna ganga uttan um meirilutan í Fólkatinginum, og kongur tilnevndi tí eina vinstrastjórn. Parlamentarisman og nýskipanarvongurin í danska Ríkisdegnum høvdu vunnið. Útlitini hjá tí nýggja føroyska fólkatingsmanninum, sum varð valdur fyri Vinstra, skuldu verið góð fyri at fingið danskar ríkisdagspolitikarar og donsku stjórnina til at taka undir við nýskipanum í føroysku løgtingsskipanini. Tað gjørdi tað ikki verri, at Løgtingið valdi tann nýskipanarhugaða føroyingin Christian Bærentsen til landstingsmann í 1901.

Sum umboðsmaður Løgtingsins á Fólkatingi helt Jóannes Patursson tað vera neyðugt, at hann eisini var løgtingsmaður. Hin føroyski ríkisdagsmaðurin Christian Bærentsen, sum hevði tikið við amtmansembætinum í 1897 eftir Lorentz Buchwaldt, var frammanundan føddur formaður Løgtingsins. Í 1901 lat Jóannes Patursson seg í trimum umførum stilla upp til Løgtingið, og triðju ferð varð hann valdur inn í Løgtingið í Suðuroynni. Áðrenn hevði hann latið seg stilla upp í Suðurstreymoy og í Sandoy, har hann ikki var valdur, men tvørtur-

ímóti hevði hann, tá hann at enda varð valdur í Suðuroy, skumpað tveir aðrar tjóðskaparmenn úr Løgtinginum – teir báðar Rasmus Rasmussen og Jóhan Hentze. Hetta kundi lata seg gera av trimum grundum. Fyri tað fyrsta var treytin fyri valbæri ikki heft at tí valdømi, ið tann uppstillaði var búsitandi í, í øðrum lagi vóru løgtingsvalini í teimum ymisku valdømunum ikki avgreidd samstundis, og í triðja lagi stillaðu valevnini upp sum einstaklingar og ikki sum umboð fyri listar. Av teimum 18 fólkavaldu løgtingsumboðunum í 1901 tóku 4 undir við sjálvsstýrispolitikkinum hjá Jóannesi Patursson.

Sostatt høvdu tær tjóðskaparligu hugsjónirnar, sum hildu uppá, at Løgtingið skuldi hava størri heimildir, so smátt fingið fótafesti í Løgtinginum. Hartil kom, at báðir føroysku ríkisdagsmenninir sótu í Løgtinginum, annar sum formaður. Saman við valsigrinum hjá Vinstra áttu fortreytirnar fyri eini nýskipan av løgtingslógini at verið til staðar í danska Ríkisdegnum eisini. Høvuðsendamálið hjá Jóannesi Patursson og Christian Bærentsen var at fáa Løgtinginum fleiri inntøkur úr ríkiskassanum og í Føroyum. Í 1903 eydnaðist tað teimum báðum at fáa Ríkisdagin at hækka játtanina til Føroya við tilsaman 57.000 krónum,[220] og málið var at fáa Løgtinginum eina skattainntøku í Føroyum uppá 125.000 krónur árliga.[221] Hesi viðurskifti skulu samanberast við, at Løgtingið undan aldarskiftinum hevði havt umleið 10 til 20.000 krónur at ráða yvir, meðan árligu útreiðslur ríkisins av Føroyum í miðal vóru 200.000 krónur í 20-ára skeiðnum undan 1915. Vilji var til staðar í Føroyum og í Danmark til tess at økja um fíggjarliga førleika Løgtingsins.

### Nýggjar hugsjónir um Løgtingið

Tað gjørdist greitt alt fyri eitt, at stór mótstøða var í Løgtinginum móti øllum broytingum, sum kundu hava við sær, at Løgtinginum varð heimilað at krevja inn meira skatt í Føroyum. Føroyska skattalóggávan, sum í høvuðsheitum var ein jarðarskattalóggáva, var fyri langari tíð síðan afturútsigld av samfelagsligu broytingunum í seinnu helvt av 1800-talinum, sum høvdu skapt fortreytirnar fyri stórum peningaligum ognum og inntøkum, ið skattalóggávan ikki fevndi um. Í 1902 legði Jóannes Patursson eitt uppskot til eina nýggja skattalóggávu fyri Løgtingið, sum miðaði ímóti, at eisini stórar

inntøkur gjørdust skattskyldugar. Ein tílík umlegging av skattalógini hevði fyri tað fyrsta samsvarað betur við samfelagsliga veruleikan í Føroyum um ár 1900, og í øðrum lagi hevði hon givið Løgtinginum størri inntøkur. Við sama endamáli legði Patursson uppskot fyri Løgtingið um at hækka tollin á brennivíni.

Av orsøkum, sum út frá samfelagsbúskaparligum og skattapolitiskum grundum eru torførar at skilja, vóru bæði uppskotini feld í Løgtinginum. Tað er torført at finna nakra sakliga grundgeving fyri, at eitt samfelag, har 53% av íbúgvunum liva av fiskivinnu, skal hava eina skattaloggávu, sum nærum einans leggur skatt á jørð. Tað er tí freistandi at halda, at veruliga grundin til, at hesi uppskotini vóru feld, var tann, at stórhandilsmenn, reiðarar og ríkmenn annars, ið sótu á stórum peningaligum ognum, høvdu fingið fótafesti í Løgtinginum. Sum nevnt (sí s. 110) vóru vælrættarreglurnar til Løgtingið háttaðar soleiðis, at hetta kundi lata seg gera, tí treytirnar fyri valrætti, sum beinleiðis vóru knýttar at ræðis- ella ognarrætti yvir jørð ella peningaognum, vóru høgt settar. Hetta kundi bent á, at tann mótstøða móti sjálvstýrispolitikkinum, sum av álvara byrjaði at taka seg upp um ár 1900, og sum í 1906 førdi til stovnanina av Sambandsflokkinum, hevði røtur í peningaligum áhugamálum hjá handilsmannastættini og peningasterkum monnum annars í Føroyum. Henda fatan verður styðjað av teirri sannroynd, at í tíðarskeiðinum frá 1906 til 1924 vóru 13 av leiðarunum í Sambandsflokkinum handilsmenn, meðan einans 2 av leiðarunum í Sjálvstýrisflokkinum vóru handilsmenn í sama tíðarskeiði.[222] Handilsmannastættin, sum aðrastaðni í heiminum gjørdist drívmegin aftanfyri politisku nýskipanirnar, gjørdist, um hald er í hesi tulking, ein forðing fyri politiskum og búskaparligum nýskipanum í Føroyum. Henda ástøðin kann ikki prógvast, men í øllum førum krevur mótstøðan móti eini nýskipan av skattalóggávuni eina nágreiniligari frágreiðing.

Í somu tingsetu sum Jóannes Patursson legði uppskot um nýggja skattalóg fyri tingið, legði Christian Bærentsen amtmaður uppskot um broytingar í løgtingslógini frá 1854 fyri tingið. Hetta uppskotið bar millum annað í sær, at valrætturin ikki longur skuldi vera treytaður av ræðis- ella ognarrætti yvir jørð ella peningaognum. Hartil skuldi Suðuroyggin hava tveir

tingmenn afturat. Stóra menningin í Suðuroynni, sum hevði verið í seinnu helvt av 19. øld, og tann fólkavøkstur, sum hon hevði borið við sær, var grundgevingin fyri hesum seinna, og hugsjónarliga var tíðin farin frá ognarmarkinum. Tað sæst eisini, at tíðin var um at verða farin frá tí munnliga og almenna atkvøðurættinum, tí uppskotið miðaði eisini ímóti, at atkvøðugreiðslan til løgtingsval skuldi vera skrivlig og loynilig. Harumframt skuldi valskipanin til Løgtingið broytast. Meðan meginreglan í gomlu skipanini hevði verið, at tað vóru tey valevnini, sum fingu flestar persónligar atkvøður, ið vóru vald, so legði nýggja skipanin upp til, at løgtingsumboðini skuldu veljast við støði í teimum atkvøðum, sum listin, ið tey vóru uppstillaði fyri, hevði fingið.[223] Valskipanin skuldi broytast á tann hátt, at hvør veljari einans skuldi hava eina atkvøðu, sum skuldi setast við ein lista. Politisku myndugleikarnir í Føroyum vóru so smátt farnir undir at tillaga valskipanina til eina flokspolitiska uppstillingarskipan. Uppskotið hjá Christiani Bærentsen fekk betri lagnu í Løgtinginum enn uppskotið hjá Jóannesi Patursson, hóast valrættarreglurnar í uppskotinum gingu áhugamálunum hjá ognarmonnunum ímóti, tí tað varð samtykt av Løgtinginum í 1902.

Tað skuldu ganga 4 ár, áðrenn uppskotið hjá Bærentsen kom aftur úr danska Ríkisdegnum sum lóg; tað var ikki fyrr enn í 1906, at atkvøtt varð á fyrsta sinni eftir nýggju løgtingslogini. Hetta er dømi um, hvussu óhandugar mannagongdirnar



Í 1901 varð Jóannes Patursson valdur í Fólkatingið.

í Løgtinginum hava verið. Løgtingsskipanin hevði við sær, at mannagongdirnar í Løgtinginum vóru trekar og seinar, tá lógir skuldu samtykkjast.

Í 1903 skrivaði Jóannes Patursson eina bók, *Færøsk Politik*, har hann greiddi frá sínum hugsanum um, hvussu Løgtingið í framtíðini átti at verða skipað, og hvørjar heimildir tað skuldi hava. Innihaldið í bókini var nógv ávirkað av teirri skipan, sum íslendingar fingu í 1870-unum. Høvuðsinnihaldið í bókini var, 1) at Løgtingið einans skuldi hava fólkavaldar limir, 2) kongsins umboðsmaður, amtmaðurin, skuldi hava rætt til at taka lut í samráðingunum í Løgtinginum, men hann skuldi ikki hava atkvøðurætt, uttan so at hann var valdur løgtingsmaður, 3) Løgtingið skuldi samtykkja allar lógir, sum skuldu setast í gildi í Føroyum, 4) samtykt løgtingsuppskot skuldu sendast beinleiðis til stjórnina, uttanum Ríkisdagin, til góðkenningar, og føroyska ríkisdagsumboðanin hevði tí mist sín týdning og 5) Løgtingið skuldi, undir ábyrgd stjórnarinnar, hava játtandi myndugleika í føroyskum fíggjarviðurskiftum.[224]

Ein tílík skipan, har heimildirnar hjá einum burturav fólkavaldum Løgtingi vóru víðkaðar frá einans at vera ráðgevandi mótvegis Ríkisdegnum til at vera beinleiðis staðfestandi og samtykkjandi enntá við sýtingarrætti á lóggávuøkinum, hevði gjørt arbeiðsgongdina í Løgtinginum nógv lagaligari. Játtanarskipanin hevði eisini verið lagaligari, við tað at Løgtingið sjálvt kundi samtykkja, hvussu nógvur skattur skuldi innkrevjast í Føroyum og ráða yvir skattainntøkunum. Undan aldarskiftinum skuldi Løgtingið – um tað samtykti at seta nakað í verk, sum hevði størri útreiðslur við sær enn tær umleið 15.000 krónurnar, ið Løgtingið hevði ræði yvir – í hvørjum einstøkum føri søkja donsku ríkismyndugleikarnar um játtan úr ríkiskassanum. Spurningurin var einans, um tær broytingar, sum Jóannes Patursson legði upp til at fremja, vóru í samsvari við eindarstatshugsanirnar í grundlógini, sum í fyrsta lagi søgdu, at Ríkisdagurin eina hevði lóggávuvaldið í Danmarkar ríki, og í øðrum lagi kundi skattur ikki krevjast uttan við lóg. Í øllum førum var avgerandi, hvussu danskir ríkismyndugleikar tulkaðu ásetingarnar í grundlógini.

Tann eftir nútíðar mátistokki sera óhanduga og stirvna føroyska løgtingsskipanin, sum var í gildi í tíðini undan 1906, hevði neyvan stórvegis trupulleikar við sær, so leingi sum

føroyska samfelagið var eitt í høvuðsheitinum sjálvberandi bóndasamfelag, ið ikki hevði tørv á stórum íløgum, men tá tað marknaðarorienteraða fiskivinnusamfelagið av álvara byrjaði at taka seg upp seinast í 19. øld, og íløgutørvurin í t.d. havna- og vegakervið gjørdist stórur, var skipanin ógvuliga óhandug, trupul og seinfør at arbeiða við. Tíðarandin og samfelagsliga menningin settu nýggj krøv til skipan og heimildir Løgtingsins.

Bókin hjá Jóannesi Patursson gjørdist skjótt hugsjónarliga grundarlagið undir sjálvstýrisrørsluni, og í 1903 varð eitt politiskt felag sett á stovn, Føroya Framburðsfelag, hvørs høvuðsendamál í fyrsta lagi var at vinna Løgtinginum so stórt vald, sum til bar í samstarvi við Ríkisdag og ríkisstjórn, og í øðrum lagi at økja um inntøkurnar hjá Løgtinginum. Í aðra mátar vóru stevnumiðini hjá Føroya Framburðsfelag ofta mótstríðandi, umboðandi ymiskar samfelagsligar bólkar, ymisk vinnulig og sosial áhugamál. Tað, sum bant saman, vóru sjálvstýrisstevnumiðini, ið t.d. løgdu upp til, at Løgtingið skuldi hava størri heimildir og eitt størri inntøkugrundarlag. Á sjálvstýrisøkinum samsvaraðu stevnumiðini væl við tær hugsjónir, ið Jóannes Patursson hevði sett fram í bóklinginum „Færøsk Politik“.

Føroya Framburðsfelag stillaði á fyrsta sinni upp til løgtingsvalið í 1905, tá helvtin av teimum 18 løgtingsmonnunum stóðu fyri vali. Valið gjørdist ein stórur sigur fyri Føroya Framburðsfelag. Av teimum 9 løgtingsmonnunum, sum vóru valdir í 1905, vann Føroya Framburðsfelag teir 6, og av teimum 9, sum vóru valdir í 1903, og sum tí ikki stóðu fyri vali í 1905, vóru teir tríggir sjálvstýrissinnaðir. Sostatt hevði Føroya Framburðsfelag helvtina av teimum 18 fólkavaldu løgtingsumboðunum aftanfyri seg í 1905. Atkvøðurnar hjá tí sjálvstýrissinnaða amtmanninum Christian Bærentsen og tí sambandssinnaða próstinum Fríðrikki Petersen komu tí at vera avgerandi, um á stóð.

### Nýggj løgtingslóg og „Tilboðið“

Við hesi undirtøku í Løgtinginum fór Jóannes Patursson um veturin 1905-1906 undir at samráðast við donsku myndugleikarnar um eina nýggja skipan av Løgtinginum. Jóannes Patursson segði seg hava verið í samráðingum við fleiri danskar ráðharrar, men serstakliga var tað løgmálaráðharran Alberti,

hann hevði havt samráðingar við. Í apríl 1906 kom Jóannes Patursson heim úr Danmark við einum „Tilboði“ til føroyingar, sum hann segði seg hava fingið frá donsku stjórnini. Høvuðsinnihaldið í sjálvum tekstinum, sum Jóannes Patursson sjálvur hevði skrivað, var, at Løgtingið sjálvt skuldi sleppa at ráða yvir *„øernes direkte og indirekte skatter imod at lagtinget så selv afholdt udgifterne til telefon-, vej-, og havne anlæg“*.[225] Harumframt kundi Løgtingið yvirtaka *„andre lokale anliggender, som nu helt eller delvis var statsanliggender“*. Av tí at hesar yvirtøkur kundu fara at kosta føroyingum nakað, var tað av stórum týdningi fyri undirtøkuna í tinginum, at donsku ríkismyndugleikarnir fóru at *„stille sig imødekommende, om lagtinget til bestridelse af sine forøgede udgifter skulle mene det påkrævet at søge om et bestemt årligt statstilskud“*.



Tilboðið var eitt úrslit av samráðingum, Jóannes Patursson hevði við serstakliga løgmálaráðharran Alberti.

Í Tilboðnum varð einki sagt um, at amtmaðurin og prósturin skuldu úr tinginum, men nevnt varð, at tann broytta løgtingslógin, ið varð samtykt á tingi í 1902, og sum skuldi koma í gildi í 1906, skuldi takast upp til nýggja viðgerð seinni. Tá skuldi endalig støða takast til støðu amtmansins í Løgtinginum. Hetta vóru týðiligar ábendingar um, at tað ikki longur var skipan Løgtingsins men heimildirnar hjá Løgtinginum, sum sjálvstýrisrørslan metti verða av størsta týdningi at fáa broytt. Tað hevði kanska heldur ikki so stóran skund at fáa amtmannin úr Løgtinginum, so leingi sum føroyingurin Christian Bærentsen sat í hesum embæti. Høvuðsbroytingarnar í løgtingslógini, sum skuldu koma í gildi í 1906, vóru, 1) at inntøkumarkið fyri valrætti skuldi burtur, 2) at atkvøðugreiðslan á fyrsta sinni skuldi verða skrivlig og loynilig, 3) at Suðuroyggin skuldi fáa tveir tingmenn afturat, soleiðis at talið á fólkavaldum løgtingsmonnum varð hækkað úr 18 upp í 20.

Ætlanin hjá løgmálaráðharranum og Jóannesi Patursson var, at eitt løgtingsval, har alt Løgtingið á fyrsta sinni skuldi veljast samstundis, skuldi útskrivast eftir ásetingunum í nýggju løgtingslógini, ið kundi snúgva seg um Tilboðið. Tað nývalda Løgtingið skuldi endaliga taka støðu til Tilboðið. Á tann hátt fekk føroyska veljarafjøldin høvi til at siga sína hugsan um Tilboðið, við tað at Løgtingið, alt sum tað var, var valt uppá tað. Tóku føroyski veljarin og tað nývalda Løgtingið undir við Tilboðnum, so skuldu samráðingar verða millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvussu Tilboðið endaliga skuldi

koma at síggja út. Tilboðið var ikki í sjálvum sær eitt endaligt uppskot frá donsku stjórnini til eina nýggja skipan av viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, men talan var um eitt samráðingaruppskot, orðað av Jóannesi Patursson sjálvum, sum skuldi liggja til grund fyri komandi samráðingum. Spurningurin var, um føroyska fólkið fór at taka undir við teimum sjálvbjargnishugsjónum, sum lógu í Tilboðnum.

**Tilboðið á Løgtingi**

Longu áðrenn Jóannes Patursson kom til Føroya við Tilboðnum í apríl í 1906, høvdu nakrar av hugsjónunum í tí fingið eitt skot fyri bógvin í Føroyum. Tað kom at verða avgerandi fyri lagnuna hjá Tilboðnum, at politiska stríðið í Løgtinginum, longu áðrenn Tilboðið í heila tikið varð til, var farið at snúgva seg um, hvussu sjálvstýrispolitikkurin skuldi fíggjast. Sum nevnt hevði Jóannes Patursson hugsað sær, at tollurin á rúsdrekka skuldi hækkast fyri á tann hátt at økja um inntøkurnar hjá einum Løgtingi, ið hevði fingið størri útreiðslur og heimildir. Hesum sjónarmiðum var meirilutin í Løgtinginum ikki samdur við honum í, tí longu í 1902 hevði Løgtingið vrakað eitt tílíkt uppskot frá Jóannes Patursson, og í 1905 samtykti Løgtingið at seta nakrar avmarkingar á rúsdrekkasøluna í verk, sum, um tær vóru samtyktar í Ríkisdegnum, vildu havt við sær, at møguligar tollinntøkur av rúsdrekka eisini fóru at verða avmarkaðar. Jóannes Patursson royndi beinleiðis at tillátursgera hetta uppskotið við at tosa niðursetandi um tað. Hartil segði hann seg vera ímóti uppskotinum við teimum grundgevingum, at Løgtingið í fyrsta lagi fór at missa inntøkur, og í øðrum lagi metti hann, at uppskotið fór at vera torført at fáa samtykt í danska Ríkisdegnum.

Við hesum var Jóannes Patursson ikki einans komin í stríð við tann máttmikla fráhaldsmannin Oliver Effersøe – høvuðsmannin aftanfyri uppskotið um avmarkingar í rúsdrekkasøluni – og meirilutan í Løgtinginum, men hann var eisini komin í andsøgn til stórar partar av føroyska fólkinum. Til tess at bera løgtingssamtyktina um avmarkingar í rúsdrekkasøluni ígjøg-

* Hóast danskir politikarar søgdu seg halda lítið um at seta eina so ófrælsa lóg í gildi í Føroyum, so slakaðu teir at enda fyri trýstinum úr Føroyum. Lógin varð samtykt í Ríkisdegnum tann 16. mai 1907. Jacobsen 1995, síðu 74.



Christian Bærentsen var landstingmaður føroyinga árini 1902 til 1906.

num danska Ríkisdagin, høvdu føroysku fráhaldsfeløgini í 1905 savnað ikki færri enn 5.600 undirskriftir, sum ætlanin var at senda til Danmarkar.* Í prosentum var talan um undirskriftir frá umleið 65% av øllum tí føroyska fólkinum, sum var omanfyri 20 ár. Til samanberingar kann upplýsast, at í 1903 høvdu 2.608 fólk valrætt í Føroyum, og harav vóru 966 ella 36,9% av veljarafjøldini á vali til Fólkatingið. Jóannes Patursson hevði sjálvur einans 488 atkvøður aftanfyri seg, tá hann varð valdur á Fólkating í 1903. Í 1905 var hann komin í andstøðu til 5.600 føroyingar.

Hesi tøl siga nakað um, hvørjar kreftir Jóannes Patursson var komin upp ímóti við at tillátursgera uppskotið um avmarkingar í rúsdrekkasøluni. Stóra undirtøkan hjá fráhaldsrørsluni í Føroyum hevði samband við teir trupulleikar við rúsdrekkamisnýtslu, sum føroyska samfelagið fekk at dragast við, tá einahandilin varð avtikin í 1856. Kongsbóndin Jóannes Patursson hevði í 1905 ikki havt eina nóg neyva fatan av teimum virðum og kenslum, sum bylgdust í tí vanliga føroyinginum hesum viðvíkjandi. Tað kom at fáa avgerandi týdning fyri lagnuna hjá Tilboðnum. Mótstøðumenninir hjá Jóannesi Patursson í Løgtinginum gjørdu greitt, at í Føroyum funnust einans tveir flokkar, „*brændevinspartiet*“ og „*afholdspartiet*“. At tað eisini var møguligt at avmarka rúsdrekkasøluna við einum høgum tolli, hevði minni at siga.

Soleiðis var politiska veðurlagið í Føroyum, tá Jóannes

Patursson kom til Føroya í apríl í 1906 við Tilboðnum. Politiski pallurin, ið Tilboðið skuldi viðgerast á, var longu settur, áðrenn Jóannes Patursson kom til Føroya við tí, og maðurin, sum kom við Tilboðnum, var komin í stríð við stórar partar av føroyska fólkinum. Stríðið kom ikki einans at snúgva seg um Tilboðið, men tað kom eisini at verða vent beinleiðis ímóti persóninum Jóannes Patursson.

Tá Tilboðið varð lagt fyri Løgtingið í mei mánaði í 1906, fekk tað ikki mjúka viðferð av mótstøðumonnunum hjá sjálvstýrisrørsluni. Ført var fram, at skattatrýstið í Føroyum fór at verða hægri, enn landið fór at kunna bera, og at størri sjálvræði kundi fara at bera í sær *„indlemmelse i en anden stat"*. Sambært Dimmalætting hevði Oliver Effersøe á einum fundi í kommunuskúlagarðinum sagt, at tóku føroyingar við Tilboðnum, so máttu føroyingar *„have både krigsminister, general og hær"*.[226]

Teir, sum vóru ímóti Tilboðnum, vildu eisini hava at vita, um Jóannes Patursson hevði nakra heimild til at leggja eitt tílíkt uppskot fyri Løgtingið. Vanligt var, at alt samskifti við donsku myndugleikarnar fór umvegis amtmannin. At enda samtyktu 10 løgtingsmenn at biðja Løgmálaráðið um nærri upplýsingar bæði viðvíkjandi heimildunum hjá Patursson til at leggja Tilboðið fyri Løgtingið og viðvíkjandi innihaldinum í tí. Amtmaðurin var millum teirra, sum tók undir við hesum uppskoti, óivað við teirri grundgeving at so kundi viðgerðin í Løgtinginum koma at snúgva seg um sjálvt Tilboðið og í minni mun um persónin Jóannes Patursson.

Í juni í 1906 kom svar frá løgmálaráðharranum, ið váttaði, at Jóannes Patursson hevði heimild til at leggja Tilboðið fyri Løgtingið. Viðvíkjandi innihaldinum í Tilboðnum varð eisini staðfest, at stjórnin *„hvis der ... viser sig at herske et vidt udbredt ønske derom på Færøerne"* var sinnað til at fremja eina nýskipan av viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, sum fyri tað fyrsta miðaði ímóti, at fyrisitingin av telefonverki, havnaviðurskiftum og vegakervinum vóru løgd undir Løgtingið, og í øðrum lagi at *„det overlades lagtinget under justitsministeriets sanktion at fastsætte sådanne skatter og afgifter, som måtte findes fornødne til gennemførelse af de nævnte og andre amtskommunale formål"*. Hóast einki beinleiðis varð nevnt um lóggávuvald til Løgtingið í brævinum, so var talan um víðfevndar fyrisitingarligar heimildir, sum Løgtinginum stóð í boði at fáa –



Gamla tinghúsið í Húsabø við vaksandi býnum í baksýni.

serstakliga tá hugsað verður um, at grundlógin ásetur, at tann lóggevandi og skattakrevjandi myndugleikin er hjá Ríkisdegnum. Tað ber illa til at siga, at politiskur vilji ikki var til staðar í Danmark fyri at geva Løgtinginum størri heimildir. Spurningurin var einans, um meirilutin av føroyingum vildi taka av danska tilboðnum.

Hóast svarið frá løgmálaráðharranum stórt sæð staðfesti innihaldið í brævinum hjá Jóannesi Patursson viðvíkjandi heimildum Løgtingsins, so hjálpti brævið ikki sjálvstýrisveinginum í Løgtinginum. Tvørturímóti, tí als einki varð nevnt um „*et bestemt årligt statstilskud*“, sum Jóannes Patursson hevði skrivað um í sínum Tilboði. Hetta kom at fáa avgerandi týdning fyri lagnuna hjá Tilboðnum. Orðingarnar um skattamyndugleika Løgtingsins, soleiðis sum tær stóðu í svarinum frá løgmálaráðharranum, vóru ikki í stríð við orðingarnar í Tilboðnum hjá Jóannesi Patursson, men vórðu tær settar í samanhang við ríkisstuðulin, fingu tær ein heilt annan týdning. Høvuðsinnihaldið í Tilboðnum hjá Jóannesi Patursson var, at ríkisstuðulin skuldi nýtast til at fíggja møguligar meirútreiðslur, ið stóðust av teimum yvirtøkum, sum Tilboðið heimilaði Løgtinginum at fremja. Tilboðið hjá Jóannesi Patursson miðaði sostatt ímóti, at Løgtingið skuldi fáa størri heimildir og skatta-

myndugleika í Føroyum, uttan at hetta fór at kosta nakað serligt fyri føroyingar. Brævið frá løgmálaráðharranum staðfesti hinvegin, at Løgtingið skuldi áseta teir skattir og tollir „*som måtte findes fornødne*“ til tess at fíggja tær yvirtøkur, sum tilboðið frá stjórnini heimilaði Løgtinginum at fremja. Orðingarnar í svarinum frá løgmálaráðharranum vóru ikki beinleiðis í stríð við orðingarnar í Tilboðnum hjá Jóannesi Patursson, men tær kundu tulkast at vera í stríð við høvuðsinnihaldið í tí. Tað var ikki einans soleiðis, at eingin trygd var fyri, at skattatrýstið og tollstøðið í Føroyum ikki fór at vaksa, um tikið var av Tilboðnum, men tvørturímóti kundi svarið tulkast á tann hátt, at hetta við vissu fór at henda.

Verður støði tikið í donsku fíggjarlógini fyri 1905/6, so sæst eisini, at skatta- og/ella avgjaldstrýstið í Føroyum mátti hækka, tóku føroyingar við Tilboðnum undir hesum treytum, tí inntøkur ríkiskassans í Føroyum vóru 56.000 krónur, meðan útreiðslurnar á fíggjarlógini vóru 300.000 krónur.[227] Eitt undirskot uppá 250.000 krónur. Onkur av mótstøðumonnunum hjá Jóannesi Patursson roknaði seg fram til, at skattirnir í Havn fóru at trífaldast, og á bygd fóru skattirnir at sjeyfaldast, tóku føroyingar við Tilboðnum.[228] Tílíkir pástandir kundu ikki vera annað enn gitingar, tí teir vóru treytaðir av, hvussu nógv og hvussu kostnaðarmikil málsøkini vóru, sum skuldu yvirtakast. T.d. vóru 60.000 krónur á donsku fíggjarlógini eyðmerktar til sjóverjuna í Føroyum,[229] og eingin hevði nevnt nakað um, at hon skuldi yvirtakast. Kortini var sjálvstýrisrørslan og serstakliga Jóannes Patursson hart kroyst upp undir valið í 1906.

### Fallið

Løgtingsvalið um Tilboðið, sum varð hildið tann 18. juli í 1906, gjørdist ein stórur ósigur hjá sjálvstýrisrørsluni. Meðan sjálvstýrisrørslan hevði havt 9 av teimum 18 fólkavaldu løgtingsmonnunum undan valinum í 1906, so hevði sjálvstýrisrørslan eftir valið einans 8 av teimum nú 20 fólkavaldu umboðunum. Við eini valluttøku uppá umleið 55% vrakaðu 961 av 1540 veljarum, ein meiriluti uppá 62,4%, Tilboðið.*

* Roknað eftir Waag 1967, síðu 1, og Debes 1982, síðu 318. Valluttøkuprosentið til løgtingsvalið er roknað við støði í teimum, sum høvdu valrætt til fólkatingsvalið, men vert er at hava í huga, at valrættarreglurnar vóru nakað strangari til løgtingsval enn til fólkatingsval.

Tað var ikki einans handilsmannastættin og peningamenn annars, men meirilutin av føroysku veljarunum, sum vóru ímóti eini nýskipan av politisku og búskaparligu viðurskiftunum í Føroyum.

Ein beinleiðis avleiðing av hesum varð, at tann 8. september í 1906 samtykti ein meiriluti í Løgtinginum, sum taldi 13 løgtingsmenn, at ikki skuldi takast við tilboðnum frá donsku stjórnini. Knappan mánaða frammanundan løgtingsvalinum 1906 hevði Jóannes Patursson mist fólkatingssessin til Oliver Effersøe, og tá prósturin Fríðrikur Petersen varð valdur í Landstingið í staðin fyri Christian Bærentsen gjørdist ósigurin hjá sjálvstýrisrørsluni fullkomin. Valluttøkan til fólkatingsvalið var so stór, sum hon ongantíð hevði verið síðan 1876, tá tøl eru tøk. 57,4% av veljarafjøldini, ella 1618 av 2818 veljarum, møttu á vali. Av teimum 1618 atkvøðunum fekk Effersøe 1129, meðan Patursson fekk 498 – eina atkvøðu meir enn hann fekk í 1903, tá hann varð valdur. Grundin til, at Patursson varð valdur í 1903, var tann, at valluttøkan einans var 37%.

Tað var ikki tí, at fólk høvdu skift meining, at Jóannes Patursson og Føroya Framburðsfelag taptu valini í 1906. Heldur mundi høvuðsgrundin vera tann, at veljarar, sum vanliga ikki vóru á vali, fóru fjølmentir á val í 1906 og atkvøddu

Býarmyndin broyttist nógv fyrstu árini í 20. øld. Her eru bæði Sparikassin, Ebenezer og fleiri onnur hús komin við Niels Finsensgøtu, og við brúgv um Havnará sæst nýggja Sverrisgøta. Gamla tinghúsið kom á henda hátt at standa mitt í býnum, áðrenn tey vórðu umbygd í 1906-7.



fyri mótstøðumonnunum hjá Føroya Framburðsfelag og Patursson. Nýggju valrættarreglurnar kunnu hava verið avgerandi fyri hetta, men svarið frá løgmálaráðharranum og niðurgerðingin hjá Patursson av uppskotinum til avmarkingar í rúsdrekkasøluni, hava óivað eisini havt stóran týdning fyri støðutakanina hjá vanliga føroyinginum.

Ósigurin hjá sjálvstýrisrørsluni var so stórur, at tað skuldi koma at ganga nærum ein hálv øld, áðrenn føroyingar tóku við eini løgtingsskipan, sum líktist henni, teimum stóð í boði í 1906. Kortini kann staðfestast, at tað var í tíðarskeiðinum frá 1852 til 1906, at lunnarnir vóru lagdir undir eitt tilvitað politisk stríð í Føroyum fyri størri heimildum til Løgtingið. Tað var hóast alt í hesum tíðarskeiðinum, at eitt føroyskt stríð, sum í byrjanini einans snúði seg um, hvussu Løgtingið innanhýsis skuldi skipast, broyttist og mentist til at vera eitt stríð, hvørs høvuðsendamál var at vinna Løgtinginum størri heimildir. Tær hugsjónir, sum styðjaðu undir hetta stríðið, vóru kortini ikki einans serføroyskar, tær komu uttan úr Europa, úr Danmark, Íslandi, Noregi o.s.fr., eins og tá Løgtingið varð endurreist. Hetta sæst av tí veruleika, at hóast hetta tíðarskeiðið í innanhýsis søgu Løgtingsins fyri ein stóran part var eitt stríð móti donskum embætismonnum í Løgtinginum, so gjørdist tað móti endanum av tíðarskeiðinum greitt, at nýggja stríðið fyri at vinna Løgtinginum størri heimildir hvørki var eitt stríð móti donskum embætismonnum í Føroyum ella eitt stríð móti ríkismyndugleikunum í Danmark, men tað var fyrst og fremst eitt stríð millum føroyingar sjálvar.





# IV

## *Fólkaræðisligar nýskipanir og politisk menning – 1906–1940*

## Politiska floksbýtið

Áðrenn 1906 vóru eingir veruligir politiskir flokkar í Føroyum. Til fólkatingsvalini og landstingsvalini var tað danska floksbýtið, sum føroyingar stillaðu upp eftir. Her stillaðu føroyingar antin upp fyri danska *Høgraflokkin* (sum oftast) ella *Vinstraflokkin*. Til løgtingsvalini stillaðu føroyingar upp sum einstaklingar við egnum stevnumiðum, ið umboðaðu ymisk lokal áhugamál millum føroyingar. Fyrstu ferð føroyingar stillaðu upp til løgtingsval fyri serstakan flokslista við serstakari floksstevnuskrá, var í 1905, tá *Føroya Framburðsfelag* stillaði upp til Løgtingið. Stevnumiðini hjá Føroya Framburðsfelag vóru kortini ikki so væl samansjóðaði, at tey umboðaðu eina samfelagsliga heildarfatan, men ofta var talan um ymisk seráhugamál í Føroyum, sum vóru í stríð við hvørt annað. T.d. umboðaði Føroya Framburðsfelag bæði smáfólk, ið vildu hava kongsjørðina útstykkjaða til traðir, og kongsbøndur, ið vóru hart ímóti hesum. Sjálvstýrishugsjónin var savnandi megin aftanfyri felagið.

Veruligar politiskar flokkar, sum høvdu samansjóðaðar stevnuskráir, ið grundaðu seg á samfelagsligar heildarfatanir, fingu føroyingar ikki fyrr enn í 1906, tá *Sambandsflokkurin* og *Sjálvstýrisflokkurin* sum avleiðing av politisku byltingunum í 1906 vóru settir á stovn. Tað gjørdist ikki eitt búskaparligt stríð millum høgra- og vinstraveingin, sum kom at eyðkenna arbeiðið í Løgtinginum í tíðini aftaná 1906, soleiðis sum tað gjørdist vanligt aðrastaðni, har nýggir samfelagsbólkar, sum ein avleiðing av stórum samfelagsligum broytingum, komu undan kavi, men tað var spurningurin um at varðveita ella at broyta viðurskiftini millum Danmark og Føroyar.

Fortreytirnar fyri politiska floksbýtinum í 1906 liggja í samfelagsligu broytingunum í Føroyum í seinnu helvt av 1800-talinum, og í framkomuni av tjóðskaparrørsluni í 1880-unum. Tá føroyska samfelagið í seinnu helvt av 19. øld, sum ein avleiðing av at einahandlin varð avtikin í 1856, varð latið upp



# Ein og hvör

bjóðast at koma í **tinghúsið** annan jóladag kl. 3 e. m., har. sum vit atla, at samráðast um at verja Förja mál og Förja siðir.

**E. D. Bærentsen. H. N. Jacobsen. D. Isaksen.**
**S. F. Samuelsen. R. C. Effersø.**
**Jens Olsen. Just Jacobsen.**
**C. L. Johannesen. J. Padurson.**

Innbjóðingin til jólafundin 1888, sum fekk stóra ávirkan á politisku søgu Føroya.

fyri umheiminum, byrjaði føroyskt samfelags- og mentunarlív at koma undir stóra ávirkan uttanífrá. Trýst elvir sum kunnugt til móttrýst, og við tí fyri eyga at verja føroyska siðaarvin móti tí hóttan, sum stóru broytingarnar høvdu við sær, kallaðu nakrir mentamenn allar føroyingar, sum høvdu áhuga í at verja Føroya mál og Føroya siðir, til fundar í tinghúsinum 2. jóladag í 1888. Á jólafundinum í 1888, sum var hildin í einum fullsettum tinghúsi, varð staðfest, at arbeiðast skuldi fyri at *„verja Førja mál og Førja siðir“*.

Til hetta endamál varð *Føringafelag* stovnað í 1889. Felagið skuldi sambært stovnarunum hava til endamáls: 1) At fáa Føroya mál til æru og 2) at fáa føroyingar at halda saman og ganga fram í øllum lutum, at teir mugu verða sjálvbjargnir. Upprunaliga var ætlanin, at felagið skuldi nevnast *Føroya Málfelag*, men semja var millum fyrireikararnar um at nevna felagið Føringafelagið.[230] Árið eftir, í 1890, byrjaði blaðið *Føringatíðindi* at koma út. Blaðið varð skrivað á føroyskum, og tað hevði somu stevnumið sum Føringafelagið.[231]

Føringafelagið var ikki ein politiskur flokkur í nýmótans merking. Felagið stillaði ikki upp til val, og talan var um eina breiða fylking, har rúm var fyri ymiskum mótstríðandi sjónarmiðum. Talan var ikki um nakra skipaða sjálvstýrisrørslu, men um eina breiða tjóðskaparliga fylking, hvørs høvuðsendamál var at verja føroyska mentan og menna føroyskt samfelagslív. Broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftum Føroya vóru als ikki á skránni í Føringafelagnum. Hetta sæst eisini av tí, at fleiri av

teimum monnum, sum seinni vóru við til at stovna Sambandsflokkin, vóru virknir í Føringafelagnum.

Kortini hómast longu her tann ósemja, sum í ávíkavist 1906 og í 1909 skuldi føra til stovnanina av Sambandsflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, tí verður hugt neyvari eftir stevnumiðunum hjá Føringafelagnum, so sæst, at talan var bæði um varðveitandi og mennandi endamál: Arbeiðast skuldi fyri at *verja* Føroya mál og Føroya siðir, men samstundis skuldi arbeiðast fyri, at føroyingar skuldu *ganga fram* í øllum lutum. Semja var millum limirnar í Føringafelagnum um, at eitt virkið arbeiði mátti verða gjørt til tess at verja føroysku mentanina, skuldi henni verða lív lagað, nú føroyska samfelagið var komið undir stórt trýst uttanífrá. Her var talan um eitt stevnumið, sum strembaði afturúeftir, eitt stevnumið, sum vildi varðveita tað gomlu føroysku landbúnaðarmentanina, sum var um at fara fyri bakka. Hinvegin, so skuldi føroyska samfelagið eisini mennast, soleiðis at tað varð ment at taka tær avbjóðingar á seg, sum tann nýggja tíðin hevði við sær. Her var talan um eitt stevnumið, sum strembaði frameftir, her var ikki einans talan um at varðveita tað gamla, men talan var eisini um at broyta tað gamla.

Tað vóru hesi bæði sjónarmiðini í tjóðskaparrørsluni, sum beinleiðis vóru í stríð við hvørt annað, ið komu til skarpskeringar í tíðarskeiðinum frá 1901, tá Jóannes Patursson varð valdur á Fólkating, til 1906, tá sjálvstýrisrørslan var fyri stóra ósigrinum.[232] Tað varðveitandi arbeiðið, sum hevði hildið rørsluni saman frá 1888 til 1901, var um at vera liðugt. Eingin setti longur spurnartekin við, at føroyingar høvdu sína egnu mentan og sítt egna sjálvstøðuga mál. Spurningurin var einans, um úrslitini av hesum í høvuðsheitum varðveitandi arbeiði skuldu fáa nakrar politiskar avleiðingar, sum grundaðu seg á mennandi sjálvbjargnishugsjónir.

Spurningurin um varðveiting ella menning hevði ligið óloystur í tjóðskaparrørsluni frá byrjan, men í 1906 høvdu samfelagsligu broytingarnar og mentanarliga menningin í Føroyum – sum tjóðskaparrørslan hevði verið við til at birt upp undir – gjørt spurningin um framburð og nýskipan av politisku viðurskiftunum í Føroyum til sjálvan høvuðsspurningin innan rørsluna.

Endin var, at rørslan skrædnaði og fór í tvíningar í 1906.



Fýra av sambandsmonnunum, sum vórðu valdir í 1906. Frá vinstru eru teir: Niclas Djurhuus úr Sumba, Jóhan C. F. Dam úr Kollafirði, Jógvan Poulsen av Strondum og Óli Niklái Skaalum úr Hvalba.

Burtur úr kom ein konservativur og afturhaldandi partur, Sambandsflokkurin (1906), sum ikki vildi at nýggja mentanarliga støðið skuldi fáa nakrar politiskar avleiðingar í Føroyum, og ein broytingarsinnaður partur, Sjálvstýrisflokkurin (1909), sum hevði ta fatan, at tann styrkta mentanarliga tilvitskan átti at fáa ta avleiðing, at føroyingar í størri mun enn áður royndu at gerast sjálvbjargnir, politiskt eins og búskaparliga. Í stevnuskrá Sjálvstýrisfloksins frá 1909 kom hetta at merkja, at flokkurin í anda Føroya Framburðsfelags fór at arbeiða fyri „*at skaffe lagtinget så stor indflydelse og så meget selvstyre, som man kan opnå i god forståelse med regering og rigsdag*", og „*at skaffe lagtinget større indtægter*". Í stevnuskrá Sambandsfloksins frá 1906, sum týðiliga ber brá av valstríðnum sama ár, kom hinvegin at standa, at høvuðsendamál floksins var, „*at ... arbejde for en frisindet udvikling for det færøske folk med særligt henblik på bevarelsen af de nuværende statsretlige forhold*". Flokkurin ásannaði harumframt „*nødvendigheden af, at der ved tingets arbejde haves sparsommelighed for øje, for at vi ikke skulle komme ind i sådanne usikre økonomiske tilstande, som ere til hinder for en solid fremgang*".[233] Meðan Sjálvstýrisflokkurin ásannaði, at allur framburður í Føroyum hevði sum treyt, at Løgtinginum varð givið størri heimildir og peningajáttanir, so helt Sambandsflokkurin uppá, at framburður í Føroyum varð treytaður av, at Løgtingið vísti sparsemi í sínum arbeiði. Politiska valstríðið

upp undir valini í 1906 liggur týðiliga aftanfyri orðingarnar í fyrstu stevnuskráum Sjálvstýris- og Sambandsfloksins.

Í skúla- og málspurninginum vildi Sjálvstýrisflokkurin berjast fyri at vinna føroyskum „*lige Ret med det danske i alle færøske Anliggender*“, meðan skúlaskipanin skuldi mennast „*med det færøske Sprog som første Grundlag*“. Í upprunaligu stevnuskrá Sambandsfloksins frá 1906 var eingin skúla- og málpolitikkur orðaður, men í 1916 fekk flokkurin nýggja stevnuskrá, har ein politikkur á hesum økinum varð orðaður: „*Partiet vil*“, treytað av at tey ríkisrættarligu viðurskiftini ikki vórðu broytt, „*Arbejde for Skolevæsnets Forbedring*“, og „*Man vil støtte Arbejdet for det færøske Sprogs Røgt og gode Udvikling, samtidig med at man fortsætter Arbejdet for Folkets dygtiggørelse i dansk Sprog*“.[234] Aðrar stórvegis broytingar vóru ikki framdar í stevnuskrá Sambandsfloksins.

Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum umboðaðu tær báðar síðurnar í Løgtinginum í 1906, komu einsamallir at mynda Løgtingið til 1928. Politiska floksbýtið í 1906 kann tí bæði síggjast sum ein avleiðing av tí, sum hendi upp undir valið í 1906, og sum ein staðfesting av, at henda politiska ósemjan, sum snúði seg um, hvørjar heimildir Løgtingið skuldi hava, rakk langt út yvir árið 1906. Politiska samansetingin av Løgtinginum í meginpartinum av tíðarskeiðinum frá 1906 til 1940 kann tí síggjast sum eitt framhald av politiska stríðnum um Tilboðið upp undir løgtingsvalið í 1906.

Stóru broytingarnar hendu ikki á sjálvstýrisleið í tíðarskeiðinum, tí Sambandsflokkurin hevði, saman við amtmanninum, meirilutan í Løgtinginum líka til 1928, við undantaki av tingsetuni frá 1918 til 1920, tá Sjálvstýrisflokkurin hevði 2 løgtingsumboð fleiri enn Sambandsflokkurin.[235] Tað var kortini ikki veljarin, men teknisk viðurskifti í valskipanini til Løgtingið, sum sviku Sambandsflokkin í 1918, tí tað var ikki fyrr enn í 1928, at flokkurin fyri fyrstu ferð misti meirilutan av føroysku veljarunum. Longu í 1932 fekk flokkurin aftur meirilutan av veljarunum í sín part, og flokkurin vann eisini meirilutan í Løgtinginum aftur hetta árið.

Løgtingstíðarskeiðið frá 1906 til 1940 kann ikki einans síggjast sum eitt framhald av stríðnum í 1906, men samansetingin av Løgtinginum største partin av tíðarskeiðinum vísir, at tað harumframt kann fatast sum ein staðfesting av politiska

ósigrinum hjá Sjálvstýrisflokkinum. Stórar fólkaræðisligar broytingar, sum bæði Sambandsflokkurin og ríkismyndugleikarnir kundu taka undir við, vóru framdar í og uttanfyri Løgtingið í tíðini undan 1928, men stevnumiðini hjá Sjálvstýrisflokkinum, sum miðaðu ímóti, at Løgtingið skuldi hava størri heimildir á lóggávuøkinum, høvdu trong kor meginpartin av hesum tíðarskeiðinum.

Stórar politiskar broytingar vóru kortini á veg í Føroyum móti endanum av tíðarskeiðinum, sum gjørdu stevnumið Sjálvstýrisfloksins meira viðkomandi í føroyskum politikki. Í 1936 misti Sambandsflokkurin fyri seinastu ferð meirilutan í Løgtinginum, og síðan hevur eingin politiskur flokkur einsamallur havt meirilutan í Løgtinginum. Nýggir politiskir flokkar, *Javnaðarflokkurin*, *Vinnuflokkurin* og *Fólkaflokkurin*, vóru í tíðini aftaná 1928 umboðaðir í Løgtinginum, og tað gjørdist nærum ómøguligt hjá nøkrum einstøkum flokki at savna meira enn helmingin av veljarunum aftanfyri seg. Felags fyri allar teir nýggju flokkarnar var, at teir vóru meira sjálvstýrissinnaðir enn Sambandsflokkurin, onkur var eisini meira sjálvstýrissinnaður enn Sjálvstýrisflokkurin.

Stóru broytingarnar í føroyskum politikki í 1930-unum skal komast nærri inn á seinni, men fyrst skulu fólkaræðisligu broytingarnar í politisku skipanunum í Føroyum í tíðini fram til miðuna av 1920-unum, sum vóru fortreytir fyri, at eitt fjøltáttað politiskt lív kundi mennast í Løgtinginum, viðgerast. Hesar broytingarnar vóru framdar, meðan Sambandsflokkurin hevði meirilutan í Løgtinginum, men tað var Sjálvstýrisflokkurin, sum fyrst reisti málið um eina nýskipan av løgtingslógini í Føroyum.

## Royndir Sjálvstýrisfloksins at fáa løgtingslógina broytta

Sjálvstýrisflokkurin hevði longu í 1906 ynskt eina broyting í løgtingslógini, sum miðaði ímóti at víðka heimildir Løgtingsins á lóggávuøkinum. Hesum kravi hevði Sjálvstýrisflokkurin ikki slept, men lítið hoyrdist til flokkin fyrstu árini aftaná politiska ósigurin um Tilboðið. Tað var ikki fyrr enn í 1915, at flokkurin so smátt byrjaði at finna tey gomlu stríðsmálini fram aftur.

Í august 1914 brast 1. veraldarbardagi á. Ríkisrættarliga



Tingmanning Sjálvstýrisfloksins 1906: Aftan frá vinstru: Jóhan Hendrik Poulsen, Skopun, Símun Pauli Konoy, Gøtu, Jóhan M. Hentze, Sandi, Mads Andreas Winther, Tórshavn. Framman frá vinstru: Dánjal Pauli Michelsen, Miðvági, Jóannes Patursson, Kirkjubø, Símun av Skarði, Føgrulíð og Zacharias Nielsen, Sandavági.

broyttust viðurskiftini millum Føroyar og Danmark ikki av teirri grund, men flutningsviðurskiftini millum báðar ríkispartarnar vóru ótrygg stórar partar av tíðini fram til november 1918, tá kríggið endaði. Í apríl 1915, meðan heimskríggið leikaði á, vóru fólkaræðisligar broytingar framdar í donsku grundlógini. Helst vóru ótryggu krígstíðirnar og íblásturin frá grundlógarbroytingunum í 1915 týðandi fortreytir fyri, at 6 sjálvstýrismenn í 1915 løgdu uppskot fyri Løgtingið, sum millum annað miðaði ímóti, at Løgtingið skuldi fáa lóggávuvald í serligum føroyskum viðurskiftum. Harumframt varð lagt upp til, at Løgtingið sjálvt skuldi velja sín formansskap. Hetta uppskotið var væl í tráð við ta hugsan, sum Jóannes Patursson hevði lagt fram í „Færøsk Politik“ longu í 1903, men av tí at Sambandsflokkurin hevði fingið meirilutan í Løgtinginum aftaná løgtingsvalið í februar 1914, bar ikki til at fáa uppskotið samtykt í Løgtinginum.

Krígstíðin og truplu samferðsluviðurskiftini millum Danmark og Føroyar vóru góð fyri Sjálvstýrisflokkin, tí flokkurin vann bæði krígsvalini til Løgtingið í 1916 og apríl 1918. Sambandsflokkurin varðveitti kortini meirilutan í Løgtinginum aftaná valið í 1916, tí val var einans í sunnaru helvt av Føroyum hetta árið, men aftaná løgtingsvalið í 1918 var støðan í Løgtinginum broytt. Tá samtykti eitt nýtt Løgting, har Sjálvstýris-

flokkurin hevði 2 løgtingsumboð í meiriluta, eitt uppskot til løgtingslóg, ið bar á sama borðið, sum uppskotið frá 1915. Løgtingið skuldi hava lóggávuvald, og tað skuldi hartil sjálvt velja formansskapin. Uppskotið varð samtykt við 11 atkvøðum móti 10. Amtmaðurin Svenning Rytter, sum hevði avloyst Christian Bærentsen í 1911, atkvøddi vanliga saman við Sambandsflokkinum, og tað gjørdi hann eisini hesu ferð.

Løgtingssamtyktin frá 1918 kom ongantíð til viðgerðar í danska Ríkisdegnum, hóast sama uppskotið varð samtykt í Løgtinginum bæði í 1919 og 1920. Í brævi til Løgtingið í 1921 staðfesti Løgmálaráðið, at uppskotið ikki „*i den Foreliggende Affattelse egnede sig til at ophøjes til Lov*“.[236] Aðra grundgeving gav Løgmálaráðið ikki Løgtinginum, men tað sæst, at ríkismyndugleikarnir hava havt í huga, at hóast Sjálvstýrisflokkurin hevði meirilutan av løgtingsumboðunum aftanfyri seg aftaná valið í 1918, so hevði hann neyvan helvtina av veljarunum aftanfyri seg. Tað var sum nevnt ikki einans veljarin, men eisini valskipanin, sum hevði svikið Sambandsflokkin í 1918.

Lítið man vera at ivast í, at tann størsta grundin til, at uppskot Sjálvstýrisfloksins ikki „*egnede sig til at ophøjes til Lov*“, var danska eindarstatshugsanin, ið lá aftanfyri ásetingarnar í grundlógini, sum góvu Ríkisdegnum einkarætt til at lóggeva í danska grundlógarøkinum. Í 1919 legði landstingsmaðurin Jóannes Patursson eitt uppskot fyri Ríkisdagin, sum miðaði ímóti, at grein 2 í grundlógini, „*Den Lovgivende magt er hos kongen og rigsdagen i forening*“ varð broytt, soleiðis at tað hartil kom at standa „*dog at rigsdagens myndighed, hvad særlige færøeske anliggender angår, ved lov skal overdrages Færøernes lagting*“.[237] Hetta uppskotið, sum skuldi gera tað møguligt hjá Ríkisdegnum at góðtaka uppskot Sjálvstýrisfloksins til nýggja løgtingslóg, hevði brotið einkarætt Ríkisdagsins til at lóggeva í danska ríkinum. Harvið hevði Danmark farið frá at verið ein *Eindarstatur* við einum lóggávuvaldi og til at vera ein *Ríkjastatur*, har tvey lóggávuvald vóru. Helst var hetta høvuðsgrundin til, at undirtøka ikki fekst fyri ætlanum Sjálvstýrisfloksins í Danmark.

Í 1849 varð staðfest í junigrundlógini, at Danmarkar Ríki var ein eindarstatur við einum lóggávuvaldi, sum skuldi vera tann miðsavnandi meginreglan, sum tann í aðra máta fólka-

ræðisliga stjórnanin av teimum økjum, sum lógu undir grundlógini, skuldi ganga út frá. Henda fatanin varð styrkt millum leiðandi danskar politikarar í tíðini áftaná 1849. Hóast danska ríkisvaldið vann tríárakríggið í 1848-1850, sum í veruleikanum var eitt borgarakríggj í Slesvig, sum Preussen eisini legði seg út í, so eydnaðist tað ikki politisku leiðarunum í Danmark í 1850-unum at leggja Slesvig undir danska grundlógarøkið.[238] Eftir tríárakríggið varðveitti Danmark hertogadømið Slesvig-Holsten sum part av ríkinum, men europeisku stórveldini vildu ikki góðtaka, at hesi økini vóru løgd undir donsku grundlógina. Tá politisku leiðararnir í Danmark kortini avgjørdu at leggja Slesvig, men ikki Holsten, undir grundlógina í 1863, gjørdist avleiðingin tann, at Danmark í 1864 varð álopið av Preussen. Hesuferð var Danmark fyri einum hernaðarligum ósigri, sum hevði við sær, at Slesvig, eitt gamalt danskt øki sum tað ikki hevði eydnast at fáa lagt undir grundlógina, eisini var mist til Preussen.

Eindarásetingarnar í grundlógini, saman við fólkaræðisligu meginreglunum, sum av leiðandi donskum politikarum vóru mettar at vera trygdin fyri, at Danmarkar Ríkið hekk saman, vóru styrktar enn meira millum danskar politikarar í tíðini aftaná ósigurin í 1864.* Slesvig trupulleikin hevði stóran týdning fyri danskan politikk líka frá 1848 til 1920,[239] tá Suðurjútland, eftir at fólkaatkvøða hevði verið, kom aftur undir danskt ræði. Hartil kom, at í 1864 var Danmark við at gerast eitt ríki, har ein fólkabólkur, danir, var nærum einaráðandi.[240] Gongdin í Íslandi, sum gekk fram ímóti, at landið eftir tógvið stríð fekk viðurkent fullveldi í sáttmálabundnum málsøkisfelagsskapi við Danmark í 1918,[241] styrkti um hesa gongdina í Danmarkar ríki. Eindarstatshugsanin, sum hóskar væl til ein stat, har ein fólkabólkur er nærum einaráðandi, var tí ein veruleiki, sum ikki fór at vera lættur at broyta, hóast – ella kanska júst tí – tað funnust smáir tjóðskaparligir minnilutar í ríkinum, sum kravdu tað. Í øllum førum kundi ikki roknast við, at ein stórur minniluti ella ein lítil meiriluti í Løgtinginum í 1915 til 1920, sum umboðaði umleið 20.000 danskar ríkis-

* Hóast leiðandi danskir politikarar høvdu viðurkent *sjálvsavgerðarrættin* í 1864, so gingu teir framvegis inn fyri *Ríkistankanum*, tá talan var um tey norðuratlantisku økini. Steining 1958, síðu 234-236



Nógv var gjørt burturúr, tá kongur vitjaði í 1907.

borgarar, sum høvdu ein annan tjóðskaparligan samleika enn teir umleið 3.000.000 danirnir, var nóg mikið til at broyta hesa statsrættarligu meginregluna.

Uppskot Sjálvstýrisfloksins hevði ikki einans tann trupulleika at dragast við, at sambandsmeirilutin í Løgtinginum ikki kundi taka undir við tí í 1915, men tann størsti trupulleikin var, at ríkismyndugleikarnir ikki tóku undir við uppskotinum, hóast lítil meiriluti var fyri tí í Løgtinginum frá 1918 til 1920. Løgtingssamtyktin samsvaraði ikki við tær politisku royndir, statsrættarligu siðvenjur og meginreglur, sum høvdu fingið fótafesti í donskum politikki í tíðini aftaná 1849.

Gongd kom ikki á málið um at fremja broytingar í løgtingslógini fyrr enn í 1920, tá bræv kom til Føroya Amt frá løgmálaráðharranum, Svenning Rytter – fyrrverandi amtmanni í Føroyum – har amtið varð biðið um at leggja málið um nýggja løgtingslóg fyri tingið. Treytir vóru lagdar við tilsøgnini frá Løgmálaráðnum, tí einans tvær høvuðsbroytingar í løgtingslógini skuldu viðgerast í Løgtinginum: 1) Støðan hjá amtmanni og prósti í Løgtinginum og 2) valskipanin til Løgtingið.[242] Báðar broytingarnar høvdu til endamáls at menna Løgtingið til ein fólkaræðisligan stovn, sum í størri mun enn áður umboðaði fólksins vilja, men treytin var, at Løgtingið

skuldi varðveitast sum ein ráðgevandi stovnur hjá ríkismyndugleikunum. Lóggávuvald til Løgtingið var ikki partur av tilboðnum frá løgmálaráðharranum.

Persónlig viðurskifti millum Rytter løgmálaráðharra og Sjálvstýrisflokkin kunnu hava gjørt seg galdandi í hesum sambandi, tí Sjálvstýrisflokkurin var komin í stríð við Rytter, meðan hann var amtmaður í Føroyum í tíðarskeiðinum frá 1911 til 1918 (sí s. 132), men helst hava statsrættarhugsjónirnar, sum vóru mentar í Danmark áftaná 1849, verið avgerandi fyri støðutakan løgmálaráðharrans. Løgtingið kundi av statsrættarligum grundum ikki fáa staðfest lóggávuvald, men hinvegin skuldu fólkaræðisligu nýskipanirnar, sum vóru settar í gildi í Danmark við grundlógarbroyting í 1915, setast í gildi í Føroyum. Hesar fortreytir fyri tilsøgn løgmálaráðharrans í 1920, skal nú komast eitt sindur nærri inn á.

## Grundlógarbroytingar og fólkaræðisligar nýskipanir

Tá danska grundlógin frá 1849 varð broytt á fyrsta sinni í 1866, hendu ikki tey stóru fólkaræðisligu framstigini. Tvørturímóti: Meðan føroyskir bøndur og ognarmenn fingu avmarkað fólkaræðið í Løgtinginum við teimum strongu treytunum fyri valrætti longu í 1854, so eydnaðist tað donsku góðseigara- og handilsmannastættini at fremja líknandi broytingar viðvíkjandi Ríkisdegnum í 1866. Danskir søgufrøðingar hava sagt, at „*det gode, som fandtes i 1866-Grundloven, var ikke nyt, og det nye var ikke godt*“.[243] Hinvegin hendu stór fólkaræðislig framstig í 1915, tá grundlógin varð broytt á øðrum sinni. Grundlógarbroytingarnar í 1866 og 1915 fingu stóran týdning í Føroyum, og tí skulu tær viðgerast nærri her.

### Vanligur valrættur

Í tíðini undan aldarskiftinum vóru valrættartreytirnar til Løgtingið so strangar, at einans umleið 15% av øllum føroyingum høvdu valrætt. Valrættartreytin til Løgtingið var atgongd til í minsta lagi 3 gyllin av jørð ella ein ávís ogn av jørð, bygningum ella peningi. Hartil kom, at bæði kvinnur og tænastufólk vóru útihýst frá veljaraskaranum. Ávegis broytingar vóru hendar í 1906, tá brúksrætturin til jørð, ogn av jørð, bygningum ella

peningi vóru avtikin sum valrættartreytir, men kvinnur og tænastufólk høvdu framvegis ikki vælrætt. Avmarkaði valrætturin, sum eisini var galdandi í Danmark (sí s. 110), varð ikki avtikin, fyrr enn komið varð langt inn í 20. øld.

Tá danska grundlógin varð broytt í 1915, fingu donsku kvinnurnar valrætt og valbæri á jøvnum føti við menninar. Í tí sambandi varð løgtingslógin tikin upp til nýggja viðgerð í Løgtinginum, og tann 28. apríl 1916 broytti Ríkisdagurin løgtingslógina, soleiðis at føroysku kvinnurnar fingu valrætt og valbæri eftir somu treytum sum menninir. Valrættartreytin um sjálvstøðugt húsarhald varð sett úr gildi samstundis, soleiðis at húskallar og tænastufólk eisini fingu valrætt. Harvið fóru seinastu avmarkingarnar í valrættinum, sum ikki settu allar samfelagsbólkar javnt, úr gildi.

Við hesum var *vanligur valrættur*, t.v.s. ein valrættur, ið gav øllum borgarum omanfyri eitt ávíst aldursmark, óheft av ogn, stætt, inntøku, skatti ella kyni, rætt til at atkvøða, settur í gildi í Føroyum. Vanligur valrættur, sum fevndi um kvinnur og menn frá 25 ára aldri, hevði verið eitt av punktunum í skránni hjá Føroya Framburðsfelag longu í 1903.[244] Føroya Framburðsfelag var frammanfyri sína tíð hesum viðvíkjandi, tí undan 1. veraldarbardaga høvdu kvinnur ikki valrætt nakra aðrastaðni í heiminum enn í New Zealandi, Finnlandi og Noregi, har tær ávíkavist fingu valrætt í 1890-unum, 1906 og 1913.[245] At føroysku kvinnurnar ikki fingu valrætt fyrr enn í 1916 var partvíst tí, at broytingarnar í Føroyum hendu sum ein partur av broytingunum í valrættarreglunum í Danmark í 1915. Valrættaraldurin til Løgtingið varð settur at vera 25 ár, eins og hann hevði verið síðan 1854.

Tann 28. februar 1916, tveir mánaðir áðrenn broytingarnar í løgtingslógini vóru samtyktar av Ríkisdegnum, hevði val verið til Løgtingið. Í Danmark hevði fólkatingsval verið tann 12. mai 1915, ein mánað áðrenn grundlógarbroytingarnar í Danmark vóru samtyktar. Føroysku og donsku kvinnurnar sluppu tí ikki at velja á fyrsta sinni fyrr enn í 1918, tá bæði Løgtings- og ríkisdagsval vóru. Hetta vóru størstu fólkaræðisligu broytingar nakrantíð, tí veljaraskarin var meira enn tvífaldaður í 1918.

Valrætturin, sum føroysku kvinnurnar fingu í 1916, broytti ikki grundleggjandi uppá ta samanseting av Løgtinginum,

sum hevði verið galdandi síðan 1906. Tó so, nakað kundi bent á, at kvinnurnar vóru meira sjálvstýrissinnaðar enn menninir, tí Sambandsflokkurin misti á fyrsta sinni meirilutan av løgtingsumboðanini 24. apríl 1918, tá kvinnurnar atkvøddu á fyrsta sinni. Hetta var kortini eitt undantak, og alt bendir á, at tað vóru heilt onnur viðurskifti enn atkvøðurnar hjá kvinnunum, sum elvdu til valsigur Sjálvstýrisfloksins í 1918. Í fyrsta lagi er tað nógv, sum bendir á, at krígstíðirnar og tey truplu samferðsluviðurskiftini millum Danmark og Føroyar vóru viðvirkandi til, at sjálvstýrisrørslan fekk stóra undirtøku millum veljararnar fyri sínum politikki (sí s. 163 og 192). Hartil kemur, at ein partur av valsigri Sjálvstýrisfloksins í 1918 var valtekniskur, tí Sambandsflokkurin varðveitti undirtøkuna frá meirilutanum av føroysku veljarunum, hóast Sjálvstýrisflokkurin fekk meirilutan í Løgtinginum (sí s. 163 og 170). At talan var um eitt undantak í 1918, sum hekk saman við omanfyri nevndu viðurskiftum, sæst av tí, at Sjálvstýrisflokkurin misti meirilutan í Løgtinginum í 1920, tá kríggið var av, og Sambandsflokkurin fekk greiðan meiriluta í Løgtinginum í 1924, tá valskipanin varð broytt. Grundleggjandi broyttist løgtingsumboðanin, sum hevði verið galdandi síðan 1906, ikki fyrr enn aftaná 1928, tá Sambandsflokkurin á fyrsta sinni misti undirtøkuna frá meirilutanum av føroysku veljarafjøldini, men tá vóru tað heilt onnur samfelagslig viðurskifti, nýggir flokkar, sum umboðaðu nýggjar samfelagsbólkar, ið gjørdu seg galdandi (sí s. 208).

Kynspolitiska samansetingin av Løgtinginum broyttist heldur ikki grundleggjandi, tá kvinnurnar fingu valrætt, og tað kom at ganga rúm tíð, áðrenn kvinnurnar yvirhøvur fingu nakað umboð í Løgtingið. Tann fyrsta kvinnan, sum kom inn um tinggáttina, var Malla Samuelsen, hon var varafólk fyri Sjálvstýrisflokkin í 1964, men tað var ikki fyrr enn í 1978, at tann fyrsta kvinnan var vald á ting. Hetta árið vóru Karin Kjølbro og Jona Henriksen valdar fyri ávíkavist Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin.[246] Í 2002 vóru 4 kvinnur valdar á ting.

### Støðan hjá amtmanni og prósti í Løgtinginum

Tá danska grundlógin varð broytt í 1866, eydnaðist tað donskum góðseigarum og stórkeypmonnum at fáa broytt

grundlógina í ein minni fólkaræðisligan rætning. Valrættarreglurnar til Landstingið, sum í 1849-grundlógini høvdu verið tær somu sum til Fólkatingið, vóru herdar. Fleiri av teimum óbeinleiðis valdu landstingsumboðunum skuldu nú veljast av eini meira avmarkaðari veljarafjøld, enn tá talan var um fólkatingsval. Sambært 1866-grundlógini skuldi kongur beinleiðis hava rætt til at tilnevna 12 landstingsumboð fyri lívstíð. Harumframt tilskilaði grundlógin stóru góðseigararunum og ríkum handilsmonnum rætt til at velja eitt frammanundan ásett tal av landstingslimum.[247]

Í Føroyum hevði landstingslimurin síðan fyrstu ríkisdagsvalini verið óbeinleiðis tilnevndur av valmonnum, eins og gjørt varð í Danmark. Føroysku valmenninir vóru valdir av somu veljarafjøld, sum hevði valrætt til Løgtingið. Valrættarreglurnar til Løgtingið og Landstingið í Føroyum vóru sostatt samlíkar, eins og donsku valrættarreglurnar til Fólkatingið og Landstingið vóru samlíkar.

Í 1866, tá grundlógin varð broytt, voru reglurnar viðvíkjandi vali av føroyska landstingsmanninum eisini broyttar; føroyski landstingsmaðurin skuldi nú veljast av Løgtinginum. Hetta styrkti støðu Løgtingsins sum ráðgevandi stovnur hjá danska lóggávuvaldinum viðvíkjandi føroyskari lóggávu (sí s. 106), men fólkaræðisliga vóru reglurnar í 1866-grundlógini eitt afturstig í Føroyum, eins og tær vóru tað í Danmark, tí nú fingu bæði amtmaðurin og prósturin ávirkan á, hvønn landstingsmann føroyingar valdu. Meðan kongur og góðseigarar í Danmark fingu rætt til at velja eitt ávíst tal av landstingsmonnum við 1866-grundlógini, so fingu kongsins embætismenn í Føroyum rætt til at ávirkað føroyska landstingsvalið. Hetta var eitt fólkaræðisligt afturstig, men í veruleikanum var tað løgtingslógin frá 1854, sum ásetti, at amtmaðurin og prósturin vóru føddir limir í Løgtinginum, sum var tann fólkaræðisligi trupulleikin í Løgtinginum.

Sjálvstýrisflokkurin hevði longu í 1906 fingið lyfti um, at løgtingslógin skuldi takast upp til nýggja viðgerð skjótt. Hóast tíðin sostatt var farin frá hesi skipan, tá komið varð inn í 20. øld, so komu at ganga fleiri ár afturat, áðrenn fyrsta veruliga stigið til at fremja broytingar í løgtingslógini kom frá donsku ríkismyndugleikunum.

Í Danmark varð landstingsmannavalskipanin broytt við

grundlógarbroytingini í 1915, tá tað varð ásett, at øll ríkisdagsumboðini skuldu veljast av teimum, sum valrætt høvdu, men landstingsmannaumboðini skuldu framvegis verða vald óbeinleiðis. Landstingsvalini skuldu vera fyriskipað á tann hátt, at valmenninir, ið endaliga skuldu velja landstingslimirnar, skuldu veljast av teimum, sum valrætt høvdu, og tað skuldu framvegis verða strangari reglur fyri valbæri til Landstingið, enn galdandi vóru til fólkatingsval, men valrættarreglurnar skuldu verða tær somu til fólkatings- og landstingsval. Hvørki kongur ella góðseigarar høvdu aftaná 1915 nakran framíhjárætt til at velja eitt ávíst tal av landstingsmonnum.

Hesar broytingar viðvíkjandi vali av landstingsumboðum í Danmark fingu við broyting av grundlógarinnar grein 37 í 1920 fólkaræðisligar avleiðingar í Føroyum eisini. Tað skuldi framvegis verða Løgtingið, sum valdi landstingsmannin, men amtmaðurin og prósturin skuldu ikki longur taka lut í hesum vali.[248] Føroyska landstingsumboðið skuldi, eins og í Danmark, framvegis veljast óbeinleiðis, men allir valmenninir (í Føroyum løgtingsumboðini) skuldu aftaná 1920 verða valdir av teimum, sum valrætt høvdu.

Samanumtikið kann sigast, at tá embætismenninir í Løgting-

Fríðrikur VIII kongur heldur talu fyri stórari mannfjøld, sum er savnað frammanfyri tinghúsið.



inum mistu atkvøðurættin til landstingsmannavalið, vóru fólkaræðisligu afturstigini frá 1866 ógildaði, men tann styrkti ráðgevandi myndugleikin, sum Løgtingið eisini hevði fingið í 1866, varð varðveittur. Harumframt vóru risastór fólkaræðislig framstig sett í verk í 1916, tá vanligur valrættur varð settur í gildi í Føroyum, eins og í Danmark. Langt var kortini eftir á mál fólkaræðisliga sæð, men glottar vóru at hóma fyri framman, tí íblásturin til fólkaræðisligu broytingarnar kom, eftir at grundlógin var broytt í 1915, úr Danmark. Tíðin róði fram undir eina størri endurskoðan av løgtingslógini frá 1854. Í 1916 varð vanligur valrættur settur í gildi millum tey, sum valdu Ríkisdagin og føroyska Løgtingið, men í Løgtinginum var tað framvegis soleiðis, at embætismenn, sum ikki vóru fólkavaldir, høvdu atkvøðurætt í øllum viðurskiftum. Einasta undantakið var landstingsmannavalið, sum gjørdist fólkaræðisligt í 1920. Hesin veruleiki, sum samsvaraði illa við fólkaræðisliga andan í tí broyttu grundlógini, var fyrra grundin til, at Løgmálaráðið í 1920 vendi sær til amtið viðvíkjandi broytingum í løgtingslógini. Við grundlógarbroytingini í 1915 var tíðin endaliga farin frá tí lítið fólkaræðisligu løgtingslógini frá 1854.

## Valskipanin til Løgtingið undan 1923

Seinna grundin til at Løgmálaráðið metti, at løgtingslógin átti at verða broytt – veikleikar í valskipanini – hekk ikki beinleiðis saman við grundlógarbroytingini í 1915. Óbeinleiðis var kortini ein samanhangur, tí tann nógv økti veljaraskarin, sum var ein avleiðing av grundlógarbroytingini, setti strangari krøv til valskipanina. Týdningarmiklari var, at tann flokspolitiska uppstillingarskipanin, sum byrjaði at taka seg upp í Føroyum aftaná aldarskiftið, setti heilt onnur krøv til valskipanina enn tann persónliga uppstillingarskipanin, sum hevði sermerkt føroyskan politik í tíðini undan aldarskiftinum.

Løgtingsvalið í 1918 hevði sum nevnt við sær, at Sjálvstýrisflokkurin fekk meirilutan av løgtingsumboðunum, sjálvt um Sambandsflokkurin fekk flestar atkvøður. Valskipanin til Løgtingið lagaði tað soleiðis, at Sjálvstýrisflokkurin fekk 11 løgtingsumboð, meðan Sambandsflokkurin fekk 9. Munurin millum báðar flokkarnar var kortini einans 0,3%, Sambands-

flokkurin fekk 29 atkvøður fleiri enn Sjálvstýrisflokkurin.* Tað er torført at gera eina valskipan, ið er so mikið rættvís, at hon tekur hædd fyri einum tílíkum valúrsliti, men tað var óheppið, at Sjálvstýrisflokkurin fekk 2 løgtingsumboð meir enn Sambandsflokkurin. Eftir valið í 1920 gjørdist tað hinvegin greitt, at stór brek vóru í valskipanini, tí tá býttu Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin tey 20 løgtingsumboðini javnt ímillum sín, hóast Sambandsflokkurin vann stórsigur á valinum. Sjálvstýrisflokkurin fekk 2462 atkvøður, meðan Sambandsflokkurin fekk 3472 atkvøður. Hóast Sambandsflokkurin fekk 58,5% av atkvøðunum, so fekk hann ikki meirilutan í Løgtinginum.

Vanligur valrættur í sjálvum sær var ikki nóg mikið til at tryggja veljarunum eina rættvísa umboðan í Løgtinginum. Neyðugt var at fremja broytingar í valskipanini eisini. Skilt verður millum *vanligan valrætt*, sum gevur øllum borgarum omanfyri eitt ávíst aldursmark atkvøðurætt, og *líka valrætt*, sum tryggjar veljarunum eina rættvísa umboðan í fólkavaldu stovnunum. Ein valskipan, sum miðaði ímóti hugmyndini um líka valrætt, varð sett í gildi í Danmark í 1920,[249] men lítið og einki var hent hesum viðvíkjandi í Føroyum.

Tann upprunaliga føroyska valskipanin varð orðað í løgtingslógini frá 1854. Henda skipanin var skapt til eitt bóndasamfelag, har valevnini stillaðu upp sum einstaklingar, ið umboðaðu ítøkilig áhugamál í lokalsamfelagnum. Listauppstilling var ikki møgulig. Umboðini vóru tí ikki vald vegna listar, sum høvdu eitt ávíst tal av atkvøðum, men tey vóru einans vald við støði í persónligum atkvøðum. Tey valevni, sum høvdu flest persónligar atkvøður – aðrar atkvøður funnust ikki – vóru eisini tey, sum vald vóru. Eingin fyrimunur fekst tí við at stilla ein lista upp, sum umboðaði eina samfelagsliga grundhugsjón; tað fór í øllum førum at verða soleiðis, at tað vóru tey valevni, sum fingu tær flestu persónligu atkvøðurnar, óheft av hvørjum lista tey vóru uppstillaði á, og óheft av hvussu nógvar atkvøður listin annars fekk, ið vald vóru. Valskipanin grundaði seg á eitt persónligt tilknýti millum

* Eftir Waag 1967, síðu 4. Í eini aðrari uppgerð yvir atkvøðubýtið í 1918 verður komið fram til, at munurin millum flokkarnar var enn størri, umleið 200 atkvøður, ella 8%. Wåhlin o.a.1994, síðu 131.




Í 1916 vóru tingmenninir avmyndaðir til hesa serligu uppsetingina av tingmanningini.

løgtingsumboð og veljara, eins og sosialu viðurskiftini í bóndasamfelagnum vóru lokal og persónlig.

Henda valskipanin varð mett at vera ein trupulleiki, tá bæði valevni og veljarar við tjóðskaparrørsluni og sjálvstýrishugsjónini so smátt byrjaðu at hugsa meira um ta størru samfelagsligu hugsjónina og minni um lokalu og persónligu viðurskiftini. Grundleggjandi broytingar vóru tí gjørdar í valskipanini í 1906, tá løgtingslógin eftir samtykt Løgtingsins frá 1902[250] varð broytt av Ríkisdegnum. Løgtingssamtyktin legði upp til, at tað ikki longur skuldi verða soleiðis, at tað vóru tey valevni, sum fingu tær flestu atkvøðurnar, ið vóru vald, men tað skuldi verða soleiðis, at tað var tann listin, sum fekk flestar atkvøður, ið átti tað fyrst valda løgtingsumboðið í valdøminum. Valevnini skuldu stillast upp á einum lista, navnið/nøvnini á tí ella teimum, sum uppstillaði vóru, skuldu standa í talrøð á listanum, nummar 1 ovast, nummar 2 næstovast o.s.fr. Veljarin skuldi ikki longur hava fleiri atkvøður, soleiðis sum fyrr hevði verið, men hann skuldi einans hava eina atkvøðu, sum skuldi setast fyri einum lista – ikki fyri



Soleiðis sá tingsalurin út í 1920-unum.

persónum á listanum. Tá atkvøðurnar vóru upptaldar, skuldi finnast fram til, hvørji valevni vóru vald í Løgtingið. Mannagongdin var tann, at tað samlaða atkvøðutalið, sum teir einstøku listarnir høvdu fingið í valdøminum, varð deilt við 1, síðan við 2, 3, 4 o.s.fr, alt eftir hvussu nógv umboð skuldu veljast í valdøminum. Skuldu t.d. 4 umboð veljast, so fullu tey til tann ella teir listarnar, sum áttu tey 4 størstu deiltølini. Hevði ein listi á henda hátt fingið tillutað 2 løgtingsumboð í einum valdømi, so vóru tað tey bæði ovastu nøvnini á listanum, ið vald vóru. Sama mannagongd varð nýtt í hinum valdømunum.

Tann persónliga valskipanin frá 1854 var fullkomuliga vend á høvdið í 1906. Tað vóru ikki longur valevnini, sum valskipanin tók útgangsstøði í, men listin gjørdist grundarlagið undir henni. Ein tílík skipan hóskaði óivað betur til eitt samfelag, har tann staðbundni og lokali samleikin so smátt byrjaði at víkja fyri eini meira samansjóðaðari heildarfatan av samfelagnum. Í øllum førum meinti løgtingsmeirilutin í 1902, at tað skuldi loysa seg at gera listauppstillingar, ið umboðaðu samfelagsligar heildarhugsjónir. Við nýggju valskipanini vóru allar atkvøður,

sum listin fekk, taldar við, tá avgjørt varð, hvussu nógv umboð listin fekk. Soleiðis hevði ikki verið í gomlu valskipanini, har allar atkvøður, sum ikki fullu til tey umboðini, sum fingu flestar atkvøður, vóru hildnar uttanfyri uppgerðina yvir hvørji umboð vóru vald.

Løgtingsvalini í 1918 og 1920, sum Sambandsflokkurin vann í atkvøðum, men ikki í løgtingsumboðum, vóru prógv fyri, at heldur ikki valskipanin frá 1906 megnaði at liva upp til fólkaræðisligu ásetingarnar í grundlógini. Aftaná 1906 vóru allar atkvøður taldar við, tá løgtingsumboðini skuldu veljast, men allar atkvøður taldu ikki líka nógv, tá umboðini vóru deild út til listarnar. Vanligur valrættur varð settur í gildi í Føroyum í 1916, tá løgtingslógin varð broytt, men illa bar til at siga, at líka valrættur var galdandi. Valskipanin frá 1906 varð ikki broytt í 1916, hóast fortreytirnar fyri henni vóru broyttar. Trupulleikin var, at tann flokspolitiska uppstillingarskipanin, sum við støði í samfelagsligum heildarfatanum hevði ment seg í Føroyum síðan aldarskiftið, ikki var fylgd upp við eini valskipan, sum tryggjaði, at tann flokkur, sum fekk flestar atkvøður tilsaman í Føroyum, eisini fekk flest løgtingsumboð. Hóast farið var frá *einstaklingavali* til *listaval* í 1906, so vóru øll løgtingsumboðini framvegis vald í teimum einstøku valdømunum, óheft av hvussu nógvar atkvøður listarnir, sum umboðini vóru vald á, fingu í Føroyum tilsaman.

## Løgtingslógin frá 1923

Sjálvstýrismenninir vóru alt annað enn nøgdir við, at ríkismyndugleikarnir í 1920 høvdu broytt grein 37 í grundlógini uttan at spyrja føroyingar eftir, tí ríkismyndugleikarnir høvdu ikki tikið til eftirtektar, at ein løgtingsmeiriluti heilar tríggjar ferðir, í 1918, 1919 og í 1920, hevði samtykt at biðja danir um at broyta grein 2 í grundlógini, soleiðis at Løgtingið fekk veruligan lóggevandi myndugleika.[251] Sjálvstýrisflokkurin var tí ikki serliga sinnaður til at fara undir eitt arbeiði uppá eina nýggja løgtingslóg, sum ikki kom at geva Løgtinginum lóggávuvald í føroyskum viðurskiftum. Sambandsflokkurin segði seg hinvegin vera til reiðar at fara undir arbeiðið at fyrireika eitt uppskot til eina nýggja løgtingslóg, men flokkurin setti ta treyt, at arbeiðið ikki skuldi umfata ríkisrættarligu viðurskiftini

millum Danmark og Føroyar, einans spurningin um støðuna hjá amtmanninum og próstinum í Løgtinginum. Tá donsku ríkismyndugleikarnir tóku stig til at fremja broytingar í løgtingslógini, hevði tað við sær, at Sambandsflokkurin eisini var sinnaður at fremja ávísar broytingar.

Ein nýskipan av løgtingslógini eftir treytunum hjá Løgmálaráðnum og Sambandsflokkinum kundi ikki fáast ígjøgnum Løgtingið, so leingi sum Sjálvstýrisflokkurin hevði meirilutan av løgtingsumboðunum, men aftaná løgtingsvalið í 1920 misti Sjálvstýrisflokkurin meirilutan í Løgtinginum: Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin fingu hvør síni 10 løgtingsumboð, men saman við amtmanninum hevði Sambandsflokkurin meirilutan í Løgtinginum. Undir hesum broyttu fortreytum í Løgtinginum tilevnaði Løgmálaráðið í 1921 eitt uppskot til løgtingslóg, sum bygdi á fortreytirnar hjá Sambandsflokkinum. Hetta uppskotið varð lagt fyri Løgtingið í 1922, og við smávegis broytingum varð tað samtykt av einum teprum meiriluta í Løgtinginum. Tann 28. mars í 1923 varð sama uppskotið samtykt sum lóg av danska Ríkisdegnum.[252] Nýggja løgtingslógin skuldi koma í gildi 1. januar 1924.

Harvið varð løgtingslógin frá 1854, sum við broytingum í 1906 og 1916 hevði verið løgfrøðiligi karmurin um Løgtingsins virksemi í sjeyti ár, avloyst av eini nýggjari løgtingslóg. Løgtingslógin frá 1923 var, við smávegis broytingum í 1930, 1935 og 1939, løgfrøðiliga grundarlagið undir virksemi Løgtingsins til 1948, tá heimastýrisskipanin varð sett í gildi.

**Løgtingsval**

Nýggja løgtingslógin ásetti, at val skuldi verða til Løgtingið fjórða hvørt ár, tá alt Løgtingið skuldi veljast. Í løgtingslógini frá 1854 varð ásett, at løgtingsval skuldi verða annað hvørt ár, meðan løgtingsumboðini skuldu verða vald fyri 4 ár í senn. Hetta skuldi gerast á tann hátt, at helvtin av løgtingsumboðunum skuldu standa fyri vali annað hvørt ár, meðan hin helvtin skuldi sita 2 ár afturat. Løgtingið skuldi sjálvt avgera, hvør helvt av løgtingsumboðunum skuldi standa fyri vali til tað fyrstkomandi løgtingsvalið, men fekst eingin semja í Løgtinginum, skuldi lutakast verða um spurningin. Í 1906 varð løgtingsskeiðið stytt niður í 2 ár, samstundis sum alt Løgtingið skuldi standa fyri vali, tá skeiðið var runnið, men longu til




Valúrslitini hava mangan verið tøtt. Í 1920 manglaðu nakrar heilt fáar atkvøður í, at Sambandsflokkurin fekk báðar menninar valdar í Norðstreymoy. Tá tað kom undan kavi, at eitt hol hevði verið í hesari hurðini í Vestmanna, kundi Sambandsflokkurin krevja umval. Flokkurin stillaði nýtt valevni úr Vestmanna upp, men úrslitið av umvalinum varð tað sama. Johannes Guttesen úr Sjálvstýrisflokkinum varð afturvaldur.

valið í 1908 var aftur farið at velja eftir tí gomlu skipanini, tó var tann broyting framd, at tað skuldu vera landafrøðislig viðurskifti, sum avgjørdu, hvørji løgtingsumboð stóðu fyri vali: Val skuldi skiftivís verða í sunnaru og norðaru helvt av landinum. Soleiðis var skipanin til 1918, tá farið varð aftur til skipanina frá 1906, har alt Løgtingið varð valt annað hvørt ár. Í 1923 staðfesti nýggja løgtingslógin, at løgtingsval skuldi vera fjórða hvørt ár, tá øll løgtingsumboðini skuldu standa fyri vali.

Í løgtingslógini vóru reglur ásettar fyri, hvussu atkvøðugreiðslan til løgtingsval, sum vanliga skuldu vera um veturin, í januar ella í februar mánað, skuldi fara fram. Av tí at tað ikki kundi roknast við, at veðrið altíð fór at vera til vildar um veturin, varð neyðugt at gera tað lættari at koma til valstøðini. Longu í 1916 varð ásett í løgtingslógini, at veljarar, sum búðu uttanfyri tveir kilometramarkið frá valstaðnum, skuldu hava høvi til at atkvøða tann fyrsta ella næsta sunnudagin, eftir at sjálvt valið hevði verið, um so var, at veðrið hevði verið so vánaligt, at tað hevði forða teimum í at fara á val. Valstýrið skuldi í semju avgera um ella nær veðrið hevði verið so mikið gott, at tað ikki longur kundi hugsast, at nakar ikki hevði verið á vali av teirri grund. Tann nógv økti veljaraskarin, sum var eitt úrslit av broytingunum í løgtingslógini, hevði m.a. við sær, at valstøðini gjørdust fleiri í tali.[253] Undan 1916 vóru 12 valstøð í teimum 7 føroysku valdømunum, men í 1916 varð talið hækkað upp í 48. Í 1924 vóru 55 valstøð í teimum 7 føroysku valdømunum[254] – á leið tað sama sum í dag. Hesar broytingar vóru allar staðfestar í 1923-lógini.

Umframt lógarfestar avmarkingar í valrættinum vóru týðandi praktiskar forðingar fyri eini høgari valluttøku fingnar av vegnum. Um aldarmótið vóru vanliga umleið 20-30% av teimum umleið 15% av fólkinum, sum høvdu valrætt, á vali. Í tíðini aftaná 1924 gjørdist tað ikki heilt óvanligt, at upp ímóti 60-70% av teimum umleið 65% av fólkinum, sum høvdu valrætt, vóru á løgtingsvali. Tað var ikki einans veljaraskarin, sum var nógv øktur, tá komið varð fram móti 1920, men tað var eisini nógv høggligari at fara á løgtingsval í Føroyum. Hetta fekk avgerandi týdning fyri valluttøkuna.

**Valskipan**

Størsta broytingin í løgtingsskipanini var tann, at Løgtingið umsíður gjørdist ein fólkavaldur stovnur burturav, tá prósturin fór úr Løgtinginum, og amtmaðurin misti atkvøðurættin og formanssessin í Løgtinginum. Talið á føstum løgtingsumboðum við atkvøðurætti varð ikki økt, tá embætismenninir fóru úr Løgtinginum, men tann broyting varð framd í valskipanini, at tað ikki longur varð ásett í løgtingslógini, at talið av fólkavaldum løgtingsumboðum skuldi vera 20, soleiðis sum tað hevði verið síðan 1906. Aftaná 1923 kundi tingmannatalið liggja ímillum 20 og 23, alt eftir hvussu atkvøðubýtið millum flokkarnar var. 20 av tingumboðunum skuldu verða beinleiðis vald í valdømunum, soleiðis sum ásett varð í gomlu skipanini, men hini 3 umboðini, sum nýggja løgtingslógin ásetti kundu veljast harumframt, skuldu veljast við støði í tí atkvøðutali, sum flokkarnir høvdu fingið tilsaman í øllum Føroyum. Hervið var tann meginreglan í valskipanini, sum staðfesti, at tingumboðini annahvørt kundu verða *valdømisvald* ella *eykavald*, sett í gildi í Føroyum.

Broytingarnar í tingmannatalinum og valskipanini vóru framdar, fyri at betur samsvar skuldi verða millum tær áskoðanir, sum funnust millum veljararnar, og tær áskoðanir, sum vóru umboðaðar í Løgtinginum. Skipanin var í stuttum henda. Fyrst var talið av atkvøðum, sum teir einstøku flokkarnir høvdu fingið í hvørjum valdømi, deilt við 1, 2, 3 o.s.fr., eins og í gomlu skipanini. Teir flokkar, sum áttu tey størstu deiltølini, áttu tey valdømisvaldu løgtingsumboðini. Í Eysturoyar valdømi skuldu t.d. 4 valdømisvald umboð veljast, og til løgtingsvalið í 1924 fekk Sambandsflokkurin 1373 atkvøður, meðan Sjálvstýrisflokkurin fekk 366. Verða tølini deild eftir tí leisti, sum nevndur er omanfyri, so sæst, at Sambandsflokkurin átti 3 tey størstu deiltølini, meðan Sjálvstýrisflokkurin átti tað 4. størsta deiltalið. Av teimum 4 valdømisvaldu løgtingsumboðunum í Eysturoynni átti Sambandsflokkurin tí 3, meðan Sjálvstýrisflokkurin átti 1 umboð. Sama mannagongdin varð nýtt í hinum 6 valdømunum.

Tað sæst kortini, at nógvar sambandsatkvøður høvdu farið fyri einki í 1924, um hendan skipanin hevði verið endalig. Sambandsflokkurin hevði nærum 4 ferðir so nógvar atkvøður sum Sjálvstýrisflokkurin í Eysturoynni, men flokkurin fekk




Hetta var tingmanningin í 1918.

einans 3 valdømisvald umboð móti tí eina hjá Sjálvstýrisflokkinum. Eisini á landsplani høvdu nógvar sambandsatkvøður farið fyri einki í 1924, varð henda skipanin endalig, tí hetta árið fingu Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin hvør síni 10 valdømisvaldu umboð, meðan tað samlaða atkvøðutalið hjá flokkunum var ávíkavist 2450 og 3676. Hetta býtið av valdømisvaldum umboðum millum flokkarnar, sum ikki samsvaraði væl við atkvøðubýtið flokkanna millum, var samlíkt við endaliga býtið av umboðum eftir løgtingsvali í 1920, tá atkvøðutølini fyri Sjálvstýrisflokkin og Sambandsflokkin vóru ávíkavist 2462 og 3472. Stórir veikleikar vóru í valskipanini í 1920.

Hesi viðurskifti høvdu við sær, at valskipanin varð útbygd við løgtingslógini frá 1923, soleiðis at eisini eykavald umboð kundu veljast, um so var, at stórt tal av atkvøðum fór fyri einki. Eykavaldu umboðini vóru vald við grundarlagi í tí samlaða atkvøðutali, sum flokkarnir høvdu fingið í Føroyum tilsaman. Við støði í omanfyri nevndu atkvøðutølum sæst, at í 1924 fekk Sjálvstýrisflokkurin eitt valdømisvalt umboð fyri hvørjar 245

atkvøður, meðan sama tal hjá Sambandsflokkinum var 367 atkvøður. Skuldi Sambandsflokkurin fingið eitt løgtingsumboð fyri hvørjar 245 atkvøður, eins og Sjálvstýrisflokkurin hevði fingið, so skuldi hann fingið 15 løgtingsumboð, tvs. 5 eykavald umboð umframt tey 10 valdømisvaldu. Løgtingslógin frá 1923 setti tó tað hámark, at í mesta lagi 3 eykavald umboð kundu veljast. Sostatt fekk Sambandsflokkurin 13 løgtingsumboð í 1924, 10 valdømisvald og 3 vóru eykavald, meðan Sjálvstýrisflokkurin varðveitti síni 10 valdømisvaldu løgtingsumboð.

Heilt rættvís var hendan skipanin ikki, tí Sambandsflokkurin átti í 1924 at fingið 15 umboð, um sama miðalatkvøðutal skuldi verða galdandi fyri umboðan Sambandsfloksins, sum galdandi var fyri Sjálvstýrisflokkin. Løgtingslógin frá 1923 tók hædd fyri tílíkum ójavnum, sum kundu koma at vísa seg seinni, tí tað varð ásett í løgtingslógini, at talið á eykavaldum løgtingsumboðum kundi broytast við kongligari fyriskipan, uttan at sjálv løgtingslógin varð broytt. Ein tílík broyting varð gjørd í 1930, tá hægst loyvda tingmannatalið varð hækkað úr 23 til 25.[255] Áftaná 1930 kundi tingmannatalið koma at liggja ímillum 20 og 25, har teir 20 vóru valdømisvaldir, meðan upp til 5 kundu verða eykavaldir. Upprunaliga kundu allir flokkar fáa eykavald umboð, men í 1939 varð tann broyting framd í grein 12, at einans teir flokkar, sum høvdu fingið í minsta lagi eitt valdømisvalt umboð, kundu fáa eykavald umboð.[256]

Valið skuldi fara fram á tann hátt, at veljarin, sum hevði eina atkvøðu, kundi atkvøða fyri einum lista, ikki fyri einum valevni. Umboðini vóru deild út til flokkarnar eftir teirri nummarrøð, sum tey stóðu á vallistanum. Soleiðis hevði verið valt síðan 1906, men í 1939 varð grein 11 í løgtingslógini broytt á tann hátt, at veljarin annaðhvørt kundi atkvøða fyri einum lista ella einum valevni. Persónligu atkvøðurnar høvdu kortini ikki nakran avgerandi týdning fyri, hvørji umboð vóru vald, uttan so at valevni, sum stóðu rættuliga niðarlaga á vallistanum, fingu heilt nógvar atkvøður. Meginreglan var framvegis tann, at valevnini vóru vald eftir teirri nummarrøð, sum tey stóðu á vallistanum, men persónligu atkvøðurnar kundu í undantaksføri fáa týdning fyri, hvat valevni varð valt.

Við broytingunum í 1923 var føroyska valskipanin tillagað til eitt samfelag, har veljarin og valevni ikki longur umboðaðu lokal áhugamál, men størri samfelagslig áhugamál og hugsjónir.

Við teimum eykavaldu løgtingsumboðunum varð ein ávísur landspolitiskur samanhangur bygdur inn í valskipanina, sum tryggjaði flokkunum – ella rættari, veljarunum – eina rættvísari umboðan í Løgtinginum. Hóast skipanin við einum framm-anundan ásettum talið av valdømisvaldum umboðum ikki tekur hædd fyri broytingum í fólkatali, sum yvir tíð henda í teimum ymisku valdømunum – í veruleikanum hevur skipanin ofta verið við til at tryggja teimum smáu valdømunum eina lutfalsliga stóra umboðan í Løgtinginum – so var valskipanin í 1923 komin nærri hugmyndini um tann líka valrættin, har allar atkvøður taldu eins nógv.

**Løgtingsseta og løgtingsskipan**

Løgtingslógin frá 1923 ásetti, at Løgtingið skuldi koma saman aftaná gudstænastu á ólavsøku, soleiðis sum aldargamal siður hevði verið, men í 1935 varð ólavsøkusiðvenjan broytt, tá tað við lóg varð ásett, at Løgtingið skuldi koma saman tann fyrsta týsdagin í oktober.[257] Broytingin í løgtingslógini varð grundað á eina samtykt í Løgtinginum. Grundgevingin fyri broytingini var tann, at tað var trupult hjá fiskimonnum at velja t.d. ein skipara inn í Løgtingið, tí ólavsøkutíð var besta fiskitíð. Oktober hóskaði betur til eina fiskivinnutjóð. Hendan broytingin, sum var brot á aldargomlu tingsiðvenju føroyinga, sum helst stavar frá 1100-talinum, varð aftur broytt til tað gamla í 1945, tá Løgtingið aftur fór at koma saman á ólavsøku.

Sambært tingskipanini frá 1924 skuldu tingmenn tala standandi frá sínum plássi í tingsalinum.



Gamla løgtingslógin hevði ásett, at Løgtingið ikki kundi verða saman í longri tíð enn 4 vikur, uttan so at helvtin av tingumboðunum kravdi tað. Tó kundi setan ikki leingjast meira enn 14 dagar uttan loyvi amtmansins. Í nýggju løgtingslógini varð henda ásetingin broytt, soleiðis at Løgtingið í mesta lagi kundi sita í 6 vikur, men tingsetan kundi leingjast útyvir tær 6 vikurnar, um helvtin av tingumboðunum kravdu tað. Avgerðin um at leingja tingsetuna var ikki longur treytað av loyvi amtmansins. Millum tingseturnar skuldi tingið koma saman til eykatingsetu, eins og tað eisini varð ásett í gomlu lógini, um í minsta lagi helvtin av tingumboðunum kravdu tað. Í aðra mátar var tað framvegis amtmaðurin sum avgjørdi, um tingið skuldi kallast saman millum tingseturnar.

Løgtingsskipanin varð eisini broytt við nýggju løgtingslógini. Amtmaðurin fór frá sum føddur formaður í Løgtinginum, og Løgtingið skuldi sjálvt velja og skipa formansskapin í tinginum. Í hesum sambandi samtykti Løgtingið í 1924 nýggja tingskipan,[258] sum millum annað ásetti mannagongdir fyri tí formansvali, sum nú gjørdist fastur táttur í Løgtinginum, hvørja ferð tingið kom saman. Á fyrsta løgtingsfundinum skuldi aldursforsetin, tvs. elsta tingumboðið, leiða arbeiðið í tinginum, men eftir at valbrøvini vóru kannaði og góðkend, skuldi formaður, næstformaður og 2 skrivarar veljast. Formaður og næstformaður skuldu veljast við lutfalsvali, soleiðis at tann, sum fekk flestar atkvøður, varð formaður, meðan tann, ið fekk næstflestar atkvøður, skuldi verða næstformaður. Høvuðsuppgávan hjá formanninum var at leiða samráðingarnar í Løgtinginum, hann skuldi boða til tingfundir, og í seinasta lagi á triðja tingfundi, eftir at tingmál vóru komin Løgtinginum í hendi, skuldi hann leggja tey fyri tingið. Formansstarvið hevði eina ávísa tign; tí kundi formaðurin ikki taka lut í sjálvum samráðingunum í Løgtinginum, men ynskti hann sum tingmaður at taka lut í viðgerðini í Løgtinginum, skuldi hann lata næstformannin sita í formanssessinum ímeðan. Við valinum av formanni, næstformanni og skrivarum varð Løgtingið formliga sett.

Tingskipanin ásetti eisini, at týðandi tingmál, og tá var serstakliga hugsað um ríkislógartilmæli, skuldu hava 3 viðgerðir. Tingmenn, ið bóðu um orðið, skuldu tala standandi frá sínum plássi í tingsalinum, og tosast skuldi beinleiðis til

formannin. Í 1936 vóru fastar talutíðir settar í tingskipanina; framsøgufólk fingu í mesta lagi 45 minuttir fyrstu ferð, og síðan 15 og 10 minuttir. Aðrir røðarar fingu 15, 10 og 5 minuttir í talutíð.[259] Tá uppskotini høvdu fingið 3 viðgerðir, skuldi endalig atkvøðugreiðsla fara fram.

Ásetingarnar um viðtøkuføri Løgtingsins vóru ikki broyttar í 1923, hóast reglurnar í sjálvari løgtingslógini hesum viðvíkjandi vóru broyttar. Meðan tað í gomlu løgtingslógini frá 1854 hevði staðið, at „*Halvdelen af Tingets Medlemmer er nødvendig, for at en Beslutning kan tages*“,[260] so stóð tað í løgtingslógini frá 1923, at „*Tinget kan ikki tage nogen Beslutning, naar ikke Halvdelen af dets Medlemmer er til Stede og deltager i Afstemningen*“.[261] Orðingin í løgtingslógini frá 1923, sum beinleiðis kravdi *atkvøðuluttøku* frá helvtini av tingmanningini, varð herd í mun til orðingina í lógini frá 1854, sum einans kravdi, at helvtin av tingmonnunum skuldu *vera á fundi*, men hon var samlík við ta orðing, sum stóð í gomlu tingskipanini. Tingskipanin fylgdi orðingini í løgtingslógini frá 1854, men harumframt varð lagt afturat í grein 26, „*og deltage i Afstemningen*“.[262] Høvuðsbroytingin í 1923 var, at meðan tann gamla atkvøðureglan hevði staðið í tingskipanini, sum Løgtingið hevði ræði á, so stóð tann nýggja orðingin í sjálvari løgtingslógini, sum einans Ríkisdagurin hevði heimild at broyta. Hartil kom, at atkvøðan hjá formanninum – sum ikki longur var amtmaðurin – skuldi ikki longur verða avgerandi, um tað stóð á jøvnum, tá atkvøtt varð. Vóru líka nógvar atkvøður fyri sum ímóti einum uppskoti, so varð uppskotið felt.

Ein av trupulleikunum við teimum *kvalifiseraðu* atkvøðuásetingunum í gomlu tingskipanini hevði verið, at uppskot kundu verða feld, hóast eingin tingmaður atkvøddi ímóti. T.d. varð eitt uppskot felt um 9 av teimum 20 tingmonnunum atkvøddu fyri, hóast eingin atkvøddi ímóti, men tað var samtykt um 9 atkvøddu fyri og 2 ímóti. Vóru hinvegin 10 atkvøður fyri, so var uppskotið samtykt, uttan so at tað eisini fekk 10 atkvøður ímóti, men við 11 atkvøðum fyri var tað altíð samtykt. Tilvildarligar fráverur, tá amtmaðurin legði uppskot fyri tingið, saman við einstøkum taktiskt hugsandi tingmonnum, kundu tí verða viðvirkandi til, at eitt uppskot varð felt, um so var, at teir lótu vera við at atkvøða, heldur enn at atkvøða „nei“, tí hetta

kundi hava við sær, at uppskotið varð felt, tí tingið ikki var viðtøkuført.

Hóast hesar trupulleikar, vildi løgtingsmeirilutin ikki broyta atkvøðuorðingina í tingskipanina í 1886, tá málið varð reist, tí aðrir trupulleikar, sum stóðust av eini broyting, vóru raðfestir hægri (sí s. 102). Trupulleikin við tilvildarligum fráverum var helst ikki so stórur í 1924, sum hann hevði verið framman-undan, tá amtmaðurin av sínum eintingum avgjørdi, hvussu og nær uppskot vóru løgd fyri tingið, tí nýggja tingskipanin ásetti í fyrsta lagi neyvar reglur og tíðarfreistir fyri, hvussu og nær formaðurin kundi leggja uppskot fyri tingið, og í øðrum lagi varð tingformaðurin aftaná 1924 valdur av Løgtinginum. Heimildir Løgtingsins mótvegis tí nýggja tingformanninum vóru tí nógv styrktar í 1924, men tann gamli tingformaðurin, amtmaðurin, hevði framvegis víðfevndar heimildir yvir Løg-tinginum.

**Amtmaðurin og heimildir Løgtingsins**

Tað gingu meira enn 70 ár, frá tí at eitt uppskot um at gera Løgtingið til ein fólkavaldan stovn burturav á fyrsta sinni varð lagt fyri ríkismyndugleikarnar av Niels Winther í 1851, til hetta gjørdist veruleiki í 1924. Fyrr hevur verið nevnt, at ein av grundunum til, at tað gekk so long tíð, frá tí at uppskot byrjaðu at koma fyri tingið um at fáa amtmannin úr Løgting-inum í 1880-unum, til hetta hendi í 1924, var tann, at eingin breið semja var í Føroyum um spurningin. Harumframt er vert at hava í huga, at í Danmark varð ikki farið undir at hugsa um at avtaka føðda formanssessin hjá amtmanninum í donsku amtsráðunum fyrr enn við byrjanina av 20. øld, men hetta gjørdist ikki veruleiki í donsku amtsráðunum fyrr enn í 1970. Tá føroyski amtmaðurin fór úr Løgtinginum í 1924, so hekk tað partvíst saman við, at um hetta mundið vóru allir danskir flokkar í *meginregluni* samdir um, at amtmaðurin átti at fara frá sum føddur formaður í donsku amtsráðunum.[263] Viður-skiftini í Føroyum og í Danmark kunnu ikki beinleiðis saman-berast, men gongdin í Danmark bendir á, at tað ikki var so fyrisitingarliga einfalt at fáa amtmannin úr amtsráðunum, – Løgtinginum í Føroyum – sum tað kundi síggja út til at vera. Helst vóru hesi viðurskifti viðvirkandi til, at semja heldur ikki



Tikið verður ímóti Kristiani X kongi. Almennu umboðini eru frá vinstru Anton Degn, býráðsformaður, Olrik, amtmaður, Hejse, sorinskrivari og Delbanco, fúti.

fekst um spurningin í Føroyum, fyrr enn komið var væl inn í 20. øld.

At spurningurin um støðuna hjá amtmanninum í Løgtinginum ikki var heilt einfaldur at loysa, ásannaði Sjálvstýrisflokkurin so seint sum í 1916, tá spurningurin var til viðgerðar í Løgtinginum: „*Det er anført som Grund for, at man ikke allerede er gaaet til at forandre de nævnte Embedsmænds Stilling i Tinget, at der foreligger praktiske vanskeligheder. Det skal indrømmes, at der ville foreligge saadanne, hvis et fuldstændigt kommunalt Selvstyre skal gennemføres. Men mindretallet mener, at man allerede nu uden praktiske Vanskeligheder eller i hvert fald uden nævneværdige Vanskeligheder kan gaa et godt Skridt fremad ved at lade Provsten udgaa af Tinget og fratage Amtmanden hans Stemme, samt ved at lade Tinget selv vælge en Formand til at lede Forhandlingerne, medens Amtmanden beholder Sæde i Tinget og Ret til at deltage i Forhandlingerne, ligesom han ekspederer Tingets Sager*“.[264] Trupulleikin var, at støðan hjá amtmanninum í Løgtinginum partvíst var grundað á hansara fyrisitingarligu førleikar og royndir. Hóast Løgtingið líka síðan 1852 hevði havt heimild til at seta millumtinganevndir, sum kundu taka sær av viðurskiftum tess, so hevði amtmaðurin framvegis

nærum alla fyrisiting Løgtingsins um hendi. Harumframt hevði amtmaðurin lógarfestar fyrisitingarligar uppgávur og heimildir, serstakliga millum tingseturnar. Hesi viðurskifti høvdu havt við sær, at Løgtingið á tí fyrisitingarliga økinum var ein veikur stovnur, sum hevði tørv á fyrisitingarligu førleikunum hjá amtmansstovninum. At enda hevði amtmaðurin nakrar nærum einaveldugar heimildir mótvegis Løgtinginum, sum t.d. góvu honum rætt til fyribils at ógilda ella útseta løgtingssamtyktir, sum hann metti vera ólógligar. Hesin myndugleikin hjá amtmanninum hevði sín uppruna í tí ríkisrættarliga veruleika, at føroyska amtsráðið, Løgtingið, sum eisini hevði fingið politiskar uppgávur at røkja í Føroyum, var ein ráðgevandi stovnur hjá ríkismyndugleikunum í Keypmannahavn. Amtmaðurin skuldi tí ríkisins vegna hava eftirlit við Løgtinginum.

Skuldi amtmaðurin úr Løgtinginum, var spurningurin fyri tað fyrsta, um hann skuldi missa allar sínar uppgávur og heimildir í Løgtinginum. Hetta vóru ríkismyndugleikarnir og Sambandsflokkurin ímóti, og Sjálvstýrisflokkurin kundi heldur ikki ímynda sær tað í 1916. Í øðrum lagi var spurningurin, hvørjar heimildir amtmaðurin skuldi missa í Løgtinginum. Sjálvstýrisflokkurin legði í fyrsta umfari upp til, at amtmaðurin skuldi missa atkvøðurættin og formansessin í Løgtinginum, meðan prósturin fullkomiliga skuldi úr tinginum. Fyrisiting Løgtingsins skuldi í fyrsta umfari vera verandi hjá amtmanninum, men flokkurin miðaði uppá longri sikt ímóti, at Løgtingið fekk størri fyrisitingarligar heimildir og lóggevandi myndugleika. Hetta hevði í longdini havt við sær, at Løgtingið gjørdist óheft av amtmanninum. Undirtøka fekst ikki fyri hesum í Danmark, og meiriluti var heldur ikki fyri tí í Føroyum. Hinvegin var tað við at gerast greitt bæði í Danmark og í Føroyum, tá fólkaræðisligu broytingarnar vóru framdar í grundlógini í 1915, at tað ikki longur var rímiligt, at amtmaðurin, tann løgfrøðiligi serkunnleikin, eisini skuldi røkja fólkaræðisligar uppgávur í Løgtinginum eins og tey fólkavaldu løgtingsumboðini.

Av viðmerkingunum hjá Løgmálaráðnum til uppskotið um nýggja løgtingslóg, ið varð lagt fyri Løgtingið í 1922, sæst, at Løgmálaráðið ynskti at varðveita amtmannin í Løgtinginum á ein ella annan hátt: „*Gennemførelsen af en saadan Ordning, hvorefter Tinget stadig vil kunne drage Nytte af den juridiske*

*Indsigt, som Amtmanden sidder inde med, maa anses for absolut paakrævet, allerede af den Grund, at Regeringen ikke vil kunne undvære en Repræsentant paa Færøerne, gennem hvilken dens Forhandlinger med Tinget kan Foregaa, og at Amtmanden vil være den, der lettest og naturligst vil kunne optræde som saadan*".[265] Sambært Løgmálaráðnum var tað „*absolut paakrævet*", at amtmaðurin varðveitti ein ávísan myndugleika í Løgtinginum; grundgevingin er heilt greitt tey ríkisrættarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Í endaliga uppskotinum til nýggja løgtingslóg, sum varð samtykt í Løgtinginum og staðfest sum lóg av Ríkisdegnum tann 28. mars 1923, sæst hetta sjónarmið týðuliga aftur. Amtmaðurin varðveitti so at siga allar sínar heimildir yvir Løgtinginum, hóast hann misti bæði formanssessin og atkvøðurættin í Løgtinginum. Harumframt varðveitti amtmaðurin rættin til at taka lut í samráðingunum í Løgtinginum, rættin til at leggja uppskot fyri Løgtingið og rættin til at taka orðið í Løgtinginum. Hetta var í veruleikanum tað, sum Sjálvstýrisflokkurin hevði skotið upp í 1916.

Hóast amtmaðurin ikki longur hevði beinleiðis ávirkan á tað fólkaræðisliga arbeiðið *í* Løgtinginum, so vóru heimildir hansara *yvir* Løgtinginum eins víðfevndar í 1924, sum tær høvdu verið frammanundan. Í grein 20 varð staðfest, at „*Dersom Amtmanden finder, at en af Lagtinget tagen Beslutning ikke er lovmedholdelig, er hann berettiget til at stille Udførelsen af den i Bero, indtil han har erhvervet højere Afgørelse af Spørgsmaalet*". Sama grein staðfesti eisini, at „*Kongen kan opløse Lagtinget*". Hesar víðfevndu heimildir amtmansins vóru ikki nýggjar, tær stóðu eisini í gomlu løgtingslógini. Harumframt varðveitti amtmaðurin fyrisitingarligu heimildir sínar til at taka avgerðir vegna Løgtingið, tá tingið ikki var saman. Nýggja løgtingslógin staðfesti, at Løgtingið framvegis var eitt amtsráð, ein ráðgevandi stovnur hjá donsku ríkismyndugleikunum, hóast stovnurin hevði størri heimildir enn donsku amtsráðini. Hesin veruleiki var helst høvuðsgrundin til, at amtmaðurin, eftirlitið hjá donsku ríkismyndugleikunum við Løgtinginum, varðveitti sínar víðfevndu hemildir yvir Løgtinginum í 1923. Ríkisrættarligu viðurskiftini vóru avgerandi fyri úrslitið, men tann manglandi fyrisitingarligi førleikin í Løgtinginum hevði helst eisini týdning.

Í meginregluni fekk Løgtingið ikki størri heimildir í 1923,



Hesa tíðina var ikki altíð gjørt so nógv burturúr ólavsøkuskrúðgonguni.

men í verki vóru týðandi broytingar framdar. Tann nýggja løgtingslógin gav ikki Løgtinginum lóggávuvald, men orðingarnar í henni viðvíkjandi ummælisrættinum bundu ríkismyndugleikarnar í nógv størri mun enn áður til at taka Løgtingið – ikki einans amtmannin – við uppá ráð, tá lógir skuldu setast í gildi í Føroyum. Meðan tað í gomlu løgtingslógini stóð, at „*Ligesom Lagtinget har at afgive Betænkning over de Færøerne vedkommende Lovudkast, der af Regeringen forelægges det, saaledes skal Tinget ogsaa være berettiget til at fremlægge Forslag til nye Love ...*“,[266] so kom tað í nýggju lógini at standa, at „*Lagtinget skal være berettiget til at fremsætte Forslag til nye Love ... Forslag til love, der udelukkende vedrører Færøerne, skal, for så vidt det er*

*muligt, forelægges Lagtinget til betænkning, forinden de ophøjes til Lov. Iøvrigt skal Færøerne vedkommende love som regel forelægges Lagtinget til Betænkning, forinden de sættes i Kraft paa Øerne. Har en saadan forelæggelse ikke fundet Sted, skal Loven snarest muligt tilstilles Tinget, der da kan fremkomme med de Udtalelser og Forslag, som Sagen maatte give Anledning til*".[267] Viðvíkjandi sjálvum initiativrættinum hjá Løgtinginum vóru orðingarnar stórt sæð tær somu, men meðan tað í gomlu lógini fult og heilt varð latið upp til stjórnina at avgera, *um* hon vildi leggja eina lóg fyri Løgtingið til ummælis, áðrenn hon varð sett í gildi í Føroyum, so gjørdist tað í 1923 meginreglan, at lógir, sum vóru settar í gildi í Føroyum, *skuldu* leggjast fyri Løgtingið til ummælis. Løgtingið fekk harvið tryggja ein *ummælisrætt*, tá lógir skuldu setast í gildi í Føroyum.

Í 1923 var tað endaliga staðfest, at lokali sakkunnleikin, sum sambært kongaligu fyriskipanini frá 1821 skuldi úttala seg um eina lóg, áðrenn hon varð sett í gildi í Føroyum, ikki longur var amtmaðurin men Løgtingið. Formliga hevði amtmaðurin havt tann ráðgevandi myndugleikan líka síðan 1821, sjálvt um hann í 1852 fekk próstin og 16 fólkavaldar føroyingar at ráðføra seg við, men við løgtingslógini frá 1923 varð ráðgevandi myndugleikin lagdur til eitt burturav fólkavalt Løgting. Tað var framvegis amtmaðurin, sum formliga setti lógir í gildi í Føroyum, tá hann lænt tær tinglesa, men Løgtingið skuldi nú hava høvi til at ummæla allar tílíkar lógir. Nýggja løgtingslógin bant ikki ríkismyndugleikarnir løgfrøðiliga til at fylgja tilmæli Løgtingsins, men moralskt vóru ríkismyndugleikarnar í nógv størri mun enn áður bundnir til at fylgja tí tilmæli, sum Løgtingið gjørdi.

Staðfestingin av, at ummælisrætturin lá hjá einum burturav fólkavaldum Løgtingi, var eitt stórt fólkaræðisligt framstig. Føroysku undangongumenninir í 19. øld, Niels Winther í 1850-unum og Schrøter í 1880-unum, høvdu helst verið nøgdir við fólkaræðisligu broytingarnar í nýggju lógina, hóast løgtingslógin ikki heimilaði Løgtinginum at leggja lógaruppskot beinleiðis fyri stjórnina til samtyktar, soleiðis sum Schrøter hevði skotið upp. Høvuðsbroytingarnar í løgtingslógini vóru tríggjar. Fyri tað fyrsta fekk Løgtingið sjálvt høvi til í nógv størri mun enn áður, ígjøgnum tann nýggja *formanskapin*, sum Løgtingið sjálvt valdi, at skipa og menna egnar mannagongdir

í løgtingsarbeiðinum á fólkaræðisligum grundarlagi. Hartil kom, at føroyska ráðgevingin til danskar myndugleikar viðvíkjandi føroyskari lóggávu veruliga gjørdist bæði *føroysk* og *fólkaræðislig*, eins og landstingsvalið var blivið tað í 1920. Í triðja lagi høvdu broytingarnar við sær, at eitt *greiðari arbeiðsbýti* varð gjørt millum tey fólkavaldu umboðini í Løgtinginum og amtmannin, sum í nógv størri mun enn áður varð avmarkaður í sínum virksemi í Løgtinginum, til at vera umboðsmaður ríkismyndugleikanna í Føroyum. Hetta hevði við sær, at fortreytirnar fyri stórum pørtum av stríðnum millum amtmann og Løgting, sum hevði eyðkent tíðina frammanundan, tá menn sum Niels Winther og Jóhan Hendrik Schrøter vóru drívmegin í føroyskum politikki, vóru burtur.

Hetta merkti ikki, at stríðið fyri at víðka Løgtingsins heimildir var hildið uppat í 1923. Tvørturímóti. Nógv var broytt í føroyskum politikki síðan 1850-ini, tí í 1923 kundi nærum helmingurin av løgtingsumboðunum ikki góðtaka nýggju løgtingslógina. Føroyskur politikkur var so nógv mentur hetta tíðarskeiðið, síðan Løgtingið varð endurreist, at ein broyting av løgtingslógini, sum einans fevndi um sjálva løgtingsskipanina, ikki var nøktandi fyri stóra minnilutan í tinginum. Tjóðskaparrørslan í 1880-unum og politisku byltingarnar í 1906 lógu ímillum politisku hugsjónirnar hjá Winther og Schrøter í 19. øld og hugsjónir Sjálvstýrisfloksins við byrjanina av 20. øld. Sæð úr sjónarhorni Sjálvstýrisfloksins vóru broytingarnar í løgtingslógini, sum førdu til, at amtmaðurin og prósturin fóru úr Løgtinginum, ikki serliga týdningarmiklar, samanborið við tær broytingar í heimildum Løgtingsins, sum flokkurin vildi hava framdar. Tað stríð, sum tók seg upp í Løgtinginum í 1920-unum og 30-unum, var ikki longur vent ímóti amtmanninum, men tað gjørdist meir og meir eitt tjóðskaparligt stríð, sum kom at verða vent beinleiðis ímóti donsku ríkismyndugleikunum.

Samanumtikið kann sigast, at sæð úr sjálvsstýrissjónarhorni Sjálvstýrisfloksins var løgtingslógin frá 1923 ikki kollveltandi. Hinvegin er lítið at ivast í, at fólkaræðisligu broytingarnar í løgtingsskipan, valrætti, valskipan og formansskapi, sum vóru framdar í 1923, vóru avgerandi fortreytir fyri teirri menning av føroyskum politikki, sum fór fram í árunum aftaná. Eitt fjølbroytt politiskt lív, sum bæði í og uttanfyri Løgtingið

grundaði seg á fólkaræðisligar meginreglur, byrjaði so líðandi at mennast í Føroyum. Løgtingið fekk ikki lóggávuvald í 1923, og amtmaðurin hevði framvegis sterkar løgfrøðiligar heimildir, men fyrisitingarliga styrktist stovnurin nógv mótvegis amtmanninum í árunum aftaná. Skjótt vóru politisk krøv sett fram um, at Løgtingið í størri mun enn áður skuldi hava fyrisitingina av viðurskiftum Løgtingsins um hendi.

## Landsnevnd Løgtingsins

Gamla løgtingslógin hevði heimilað Løgtinginum at seta millumtingsnevndir, sum skuldu taka sær av uppgávum Løgtingsins millum tingseturnar. Hesin rættur tingsins varð staðfestur í nýggju løgtingslógini frá 1923. Upprunaliga var ikki tann stóri áhugin millum tingmenn at seta fastar nevndir millum løgtingsseturnar. Í 1854 hevði Løgtingið frásagt sær rættin til at hava umboð í eini trímannanevnd, ið skuldi fyrisita Løgtingsins uppgávur millum tingseturnar, og tá hesin spurningur varð reistur av nýggjum í 1880, var undirtøka ikki fyri tí í



Tingmenn til arbeiðis. Hesir eru Mikkjal Samuelsen og Gunnar Winther.

Løgtinginum.[268] Hóast Løgtingið hevði møguleika fyri at átaka sær fyrisitingarligar uppgávur, so løgdu løgtingsumboðini í stóran mun fyrisitingina upp í hendurnar á amtmanninum.

Tá komið varð inn í 20. øld, og fólkaræðisliga støðan hjá amtmanninum í Løgtinginum varð burtur í 1924, gjørdist tað meira átrokandi hjá Løgtinginum at seta sínar egnu nevndir. Sjálvt um Løgtingið sum stovnur ikki fekk størri heimildir í 1923, so fekk tað kortini størri fólkaræðisliga ábyrgd yvirfyri sjálvum løgtingsarbeiðinum, nú amtmaðurin ikki longur var føddur formaður. Hetta hevði m.a. við sær, at í 1928 samtyktu Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum tá høvdu meirilutan í Løgtinginum, at seta eina fasta trýmannanevnd, *Landsnevndin*, sum skuldi taka sær av fyrisiting Løgtingsins millum tingseturnar. Høvuðsuppgávan hjá Landsnevndini, sum allir flokkar á tingi skuldu hava umboð í, var at fyrireika øll mál, sum skuldu leggjast fyri tingið. Landsnevndin varð løgd beinleiðis undir Løgtingið.

Upprunaliga ætlanin við Landsnevndini var, at nevndin skuldi yvirtaka allar fyrisitingarligar uppgávur amtmansins, soleiðis at fólkaræði eisini varð sett í gildi, tá talan var um fyrisiting Løgtingsins.[269] Einasta heimild, sum amtmaðurin eftir hesi ætlan skuldi hava eftir, var tann, sum var staðfest í grein 20 í løgtingslógini: At amtmaðurin hevði heimild til at freista Løgtingsins avgerðir, til hann hevði fingið vissu fyri, at samtyktin var í samsvari við galdandi ríkislóggávu í Føroyum.[270] Aðrar heimildir enn hesa, sum hekk saman við tí veruleika, at Løgtingið var ein ráðgevandi stovnur, sum var undir eftirliti ríkismyndugleikanna, skuldi amtmaðurin ikki hava. Ætlanin var sostatt, at Løgtingið, sum í 1923 hevði tikið fólkaræðisliga myndugleikan frá amtmanninum, eisini skuldi yvirtaka allar fyrisitingarligu uppgávur amtmansins, men hetta skuldi gerast, uttan at ríkisrættarligu viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum vóru broytt.

Ein landsnevnd, ið fekk allar fyrisitingarligu heimildir amtmansins, hevði millum annað havt ta týðandi broyting við sær, at amtmaðurin ongar fyrisitingarligar heimildir hevði havt millum løgtingsseturnar. Gjørdist uppskotið veruleiki, hevði vald amtmansins verið avmarkað munandi á tí fyrisitingarliga økinum, meðan Løgtingið hevði fingið ein avgerðandi leiklut í útinnandi valdinum.

Trupulleikin var, at ein tílík landsnevnd ikki kundi setast á stovn, uttan so at sjálv løgtingslógin varð broytt, tí fleiri av heimildum amtmansins á tí fyrisitingarliga økinum vóru lógarfestar í løgtingslógini. Sambandsflokkurin var ímóti, at tílíkar víðfevndar broytingar longu skuldu fremjast í nýggju løgtingslógini, men týdningarmiklari var, at ríkismyndugleikarnir heldur ikki tóku undir við uppskotinum. Úrslitið varð, at heimildirnar hjá Landsnevnd Løgtingsins hvørki vóru víðkaðar til at fevna um heimildir amtmansins ella lógarfestar í eini broyttari løgtingslóg, soleiðis sum ætlanin hjá løgtingsmeirilutanum hevði verið. Í 1939 vóru smávegis broytingar framdar í løgtingslógini, men eingin broyting hevði nakað við Landsnevndina at gera. Landsnevndin, sum varð sett á stovn í 1928, kom tí at virka sum ein millumtinganevnd, ið varð sett av Løgtinginum sambært teimum heimildum, sum tingið frammanundan hevði til at seta nevndir, við teimum uppgávum og heimildum, sum Løgtingið longu frammanundan hevði.

Tað ber ikki til at siga, at Landsnevndin løgfrøðiliga styrkti um vald Løgtingsins á tí fyrisitingarliga økinum, men í verki hevði Landsnevndin stóran týdning, tí við henni fekk Løgtingið eitt fyrisitingarligt amboð, ið gjørdi tað møguligt hjá tinginum at taka sær av fyrisitingini av teimum uppgávum, sum tað higartil hevði latið upp í hendurnar á amtmanninum. T.d. tilrættaleggingina av tingmálunum. Harumframt fekk Løgtingið størri eftirlit við amtmanninum millum tingseturnar. Landsnevndin kollvelti ikki løgtingsskipanina, men hon var ein týðandi fortreyt fyri, at Løgtingið kundi gagnnýta teir møguleikar, sum lógu í løgtingslógini, og harvið menna fyrisitingarliga førleika Løgtingsins.

## Fíggjarligu viðurskifti Løgtingsins

Stórvegis formligar broytingar hendu ikki við fyrisitingarligu uppgávum Løgtingsins í 1923. Løgtingið skuldi, eins og ásett var í gomlu løgtingslógini, fyrisita „Amtsrepartitionsfonden“, „Økonomiske Fond“, „Fonden for Forulykkedes efterladte“ „Amtsfattigkassen“ og „Kirkjugrunnunum“. Harumframt skuldi Løgtingið avgera, hvussu nógvur peningur skuldi álíknast í hesar grunnar, og hvussu nógvur peningur skuldi játtast úr teimum. Meginparturin av inntøkum Løgtingsins kom frá



Edward Mitens flytur fram røðu, tá standmyndin av Rasmusi Effersøe varð avdúkað á ólavsøku 1933.

jarðarskatti og ymiskum tollavgjøldum. Einki nýtt var í hesum, men kortini hendu týdningarmiklar broytingar í búskaparligu viðurskiftum Løgtingsins í hesum tíðarskeiðinum.

Í 1923 og 1925 vóru beinleiðis kommunuskattaskipanir og tollskipanir, sum hóskaðu til eitt peningasamfelag, settar í gildi,[271] men beinleiðis løgtingsskattur varð ikki álíknaður á fyrsta sinni fyrr enn í 1934. Í 1939, tá løgtingsskatturin varð hækkaður á fyrsta sinni, varð hann settur til at vera 1 króna av eina ársinntøku uppá 250 krónur, 412 krónur av 10.000 krónum, 13.162 krónur av 100.000 krónum, og 219.162 krónur av 1.000.000 krónum.[272] Í nevndu dømum er talan um ein skatt svarandi til ávíkavist 0,7%, 4,1%, 13,2% og 21,9% av skattskyldugu inntøkuni. Hóast skattastigin sostatt hækkaði í prosentum eftir støddini á inntøkuni, so var ikki talan um

nakað høgt sett skattaprosent fyri tann vanliga føroyingin, tí í 1938 vóru 6.000 av teimum 8.650 skattskyldugu inntøkunum í Føroyum undir 1000 krónur.[273]

Í 1928 hevði Landsnevndin fingið heimild til at leiga og bera útreiðslurnar av eini skrivstovu, sum skuldi fyrisita uppgávurnar hjá nevndini, men í 1935 fekk Løgtingið egna *Løgtingsskrivstovu*, frá 1939 við egnum skrivstovustjóra, sum eisini skuldi ganga Landsnevndini til handa millum tingseturnar. Tá tingseta var, skuldi skrivstovan gera tingmálini klár at leggja fyri tingið. Harumframt skuldi Løgtingsskrivstovan fyrisita allar inntøkur og útreiðslur, sum „Amtsrepartitionsfonden“ hevði; hon skuldi standa fyri innkrevjingini av øllum skatti til Løgtingið, og hon skuldi standa fyri øllum útgjaldingum Løgtingsins. Løgtingsskrivstovan skuldi eisini hava eftirlit við kommununum,[274] sum vóru settar á stovn í 1872. Undir eftirliti av eini í 1939 stovnsettari *Gjaldstovu*, sum var undir donskum ræði, skuldi skrivstovan fyrisita partar av donsku ríkisveitingunum til Føroyar.[275] Løgtingið skuldi hava beinleiðis ræði á og eftirlit við Løgtingsskrivstovuni, men millum tingseturnar skuldi Landsnevndin hava eftirlit við skrivstovuni Løgtingsins vegna. Harvið var fyrisitingin av peningaviðurskiftum Løgtingsins fyri ein stóran part komin á føroyskar hendur.

**Inntøkuviðurskifti Løgtingsins**

Løgtingsskatturin gav ikki Løgtinginum nakra stóra inntøku ta fyrstu tíðina; fyrsta árið hann var kravdur, í 1934, gav hann 30.000 krónur, og í 1939 gav hann 49.000 krónur.[276] Samlaðu peningaupphæddirnar í amtskommunalu grunnum Løgtingsins vóru kortini nógv størri í tíðarskeiðinum frá 1906 til 1940, enn tær høvdu verið undan politiska floksbýtinum. Í tíðarskeiðinum fyri aldarmótið høvdu amtskommunalu grunnarnir givið Løgtinginum heimild til at ráða yvir eini upphædd, sum svaraði til umleið 10.000 til 20.000 krónur. Í árunum eftir aldarskiftið hevði ætlanin hjá Jóannes Patursson verið at økja um skattagrundarlag Løgtingsins, soleiðis at Løgtingið fekk 125.000 krónur at ráða yvir árliga, men inntøkurnar vóru ikki størri enn umleið 43.000 krónur í 1906. Stórar broytingar hendu hesum viðvíkjandi í tíðarskeiðinum frá 1906 til 1940. Í 1939 hevði Løgtingið ræði á eini upphædd, sum svaraði til

umleið 750.000 krónur. Uppií hesi inntøku vóru tær 49.000 krónurnar, sum tann nýggi løgtingsskatturin gav sama árið. Inntøkur Løgtingsins høvdu kortini verið um milliónina fyrr í 1930-unum. Sostatt vóru upphæddirnar øktar, hóast løgtingsskatturin ikki gav tað stóra fyrstu árini.

Hartil vóru peningajáttanirnar úr ríkiskassanum øktar nógv síðan 1906. Játtanir úr ríkiskassanum vóru munandi hækkaðar longu fyrstu árini í 20. øld, tá tað eydnaðist Jóannesi Patursson og Christiani Bærentsen at fáa nýggjar játtanir gjøgnum Ríkisdagin, sum hækkaðu Løgtingsins fíggjarkarmar við 57.000 krónum. Seinastu 20 árini undan 1. veraldarbardaga vóru útreiðslur ríkiskassans av Føroyum í miðal umleið 200.000 krónur árliga (sí s. 106), men her vóru stórar broytingar á veg. Í 1913 játtaði ríkiskassin 1.300.000 krónur til eina verkætlan, sum miðaði ímóti at vega- og havnakervið í Føroyum skuldi útbyggjast munandi.[277] 1. veraldarbardagi, sum brast á í 1914, setti stórar forðingar fyri hesum stóru útbyggingarverkætlanunum, men tær vóru uppafturtiknar eftir kríggið. Seinni, í 1930-árunum, tá heimsbúskaparkreppan fór at gera um seg í Føroyum, komu beinleiðis kreppujáttanir úr ríkiskassanum. Tvær 5 ára ætlanir vóru samtyktar í 1934 og 1939, har ríkiskassin játtaði milliónaupphæddir til ymiskar útbyggingar í Føroyum. Tann fyrra ætlanin legði upp til, at ríkið skuldi lata Føroyum 100.000 krónur árliga í 5 ár, meðan tann seinna miðaði ímóti, at latast skuldu 5 ferðir 400.000 krónur komandi árini.[278] Ríkismyndugleikarnir settu sum treyt, at føroyingar skuldu fáa nakað av peningi til vega sjálvir. Løgtingsskatturin frá 1934 var føroyska ískoytið til 5 ára ætlanina, men hann gav sum nevnt ikki nógvan pening tey fyrstu árini. Øðrvísi var við ríkisstuðlinum. Tilsaman játtaði ríkiskassin tey seinastu 25 árini undan 2. veraldarbardaga 46,5 milliónir krónur til útbyggingar o.a. í Føroyum – tvs. í miðal nærum 2 mió. krónur árliga. Á ríkisroknskapinum hevði danski staturin stórt hall av Føroyum hetta tíðarskeiðið.[279]

Sostatt vóru peningaligu og fyrisitingarligu fortreytirnar fyri virksemi Løgtingsins nógv batnaðar, tá komið varð móti endanum av 1930-unum. Formligu heimildir Løgtingsins vóru ikki vorðnar nógv størri við løgtingslógini í 1923, men fólkaræðisligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu karmarnir rundan um virksemi Løgtingsins vóru nógv mentir, tá komið varð móti

endanum av nevnda tíðarskeiði. Øktu peningaupphæddirnar, ið Løgtingið hevði ræði á, settu størri krøv til fyrisiting Løgtingsins. Landsnevndin og Løgtingsskrivstovan, sum vóru settar á stovn í ávíkavist 1928 og 1935, vóru úrslit av hesi gongd. Tann styrknaða fyrisitingin hjá Løgtinginum skal kortini síggjast í samanhangi við tann veruleika, at í millumkrígstíðini gjørdist føroyski búskapurin í nógv størri mun enn áður heftur at stórum peningajáttanum úr danska ríkiskassanum. Hetta sæst beinleiðis av tí, at meðan Løgtingið í 1939 hevði eina samlaða inntøku uppá 750.000 krónur at ráða yvir, so játtaði ríkiskassin sama árið 2,4 mió. krónur til ymisk viðurskifti í Føroyum. Í 1939 hevði Løgtingið eina samlaða skuld uppá 500.000 krónur.

**Løgtingsmannalønir**

Undan 1906 hevði dagpeningur løgtingsmanna verið 2 krónur um dagin, men í uppskotinum hjá Christiani Bærentsen til nýggja løgtingslóg, sum varð samtykt av Løgtinginum í 1902, vóru løgtingsmannalønirnar settar at verða 3 krónur fyri hvønn dagin, tingið var saman.[280] Tá Ríkisdagurin í 1906 samtykti hetta uppskotið, hevði Løgtingið sett fram broytingaruppskot, ið hækkaði løgtingsmannalønirnar til 4 krónur um dagin fyrstu 6 vikurnar. Fyri teir dagar, ið tingið sat longur enn 6 vikur, skuldi dagpeningurin framvegis verða 2 krónur.[281]

Hendan upphædd varð skjótt hildin at vera ov lítil, og fleiri ferðir vóru uppskot løgd fyri Løgtingið við tí endamáli at hækka samsýningarnar. Í 1923 fingu løgtingsmenninir hækkaðar samsýningar, tá tað var ásett, at dagpeningurin til løgtingsmenn skuldi vera 12 krónur tær fyrstu 6 vikurnar, tingið var saman. Fyri ta tíð, ið Løgtingið var saman útyvir 6 vikur, skuldi dagpeningurin verða 6 krónur.[282] Sjálvt um Løgtingið nú einsamalt hevði heimild til at leingja tingsetuna útyvir tær 6 vikurnar, so skuldi tað ikki loysa seg fyri tingumboðini at draga tingsetuna út. Tó varð ásett í 1937, at samsýningarnar skuldu verða 12 krónur um dagin fyri alla tingsetuna, hóast hon var longri enn 6 vikur.[283]

Tað hendi ofta, at tingsetan varð longd útyvir tær 6 vikurnar, men var tingið saman í 6 vikur, so gav tað løgtingsmonnunum eina samsýning uppá umleið 500 krónur. Talan var ikki um stórar upphæddir, tí løgtingsmenninir vóru í bólki saman við

6.000 øðrum føroyskum skattgjaldarum, ið høvdu eina árliga skattskylduga inntøku, sum var niðanfyri 1000 krónur. Her skal kortini havast í huga, at tingarbeiði ikki var fult starv, men talan var um parttíðarstarv, sum vanliga ikki vardi í meira enn 6 vikur. Varð tingsetan longd, fingu umboðini hálva samsýning, aftaná 1937 fulla samsýning. Sæð í tí samanhangi vóru samsýningarnar kanska ikki heilt órímuligar.

Dagpeningur og ferðaútreiðslur skuldu, eins og ásett var í gomlu løgtingslógini, rindast úr „Amtsrepartitionsfonden". Løgtingsumboðini fingu onga aðra lønarhækkan, fyrr enn eftir at 2. veraldarbardagi var brostin á.*

## Løgtingið og sjálvstýrisstríðið

Tað er ein sannroynd, at undan 1936 hevði Sambandsflokkurin nærum alla tíðina einsamallur meirilutan í Løgtinginum ella meirilutan av veljarunum aftanfyri seg. Hetta hevði millum annað við sær, at tað ikki fekst breiður meiriluti fyri at fremja eini broyting av løgtingslógini fyrr enn í 1923, tá Sambandsflokkurin boygdi seg fyri trýsti frá teimum fólkaræðisligu rákunum í danska ríkinum.

Tað er kortini ikki heilt rætt, tá sagt verður, at alt politiska tíðarskeiðið frá 1906 til 1940, umframt at tað var eitt framhald av politisku ósemjunum í 1906, eisini var ein staðfesting av politiska ósigrinum hjá tjóðskaparrørsluni í 1906. Týðandi politiskar broytingar vóru um at henda, tá komið verður móti endanum av tíðarskeiðinum. Sjálvt um Sjálvstýrisflokkurin hevði kunnað tikið undir við 1923 løgtingslógini í 1916, so vóru hugsjónir floksins longu farnar frá løgtingslógini, tá hon varð sett í gildi. Hetta sæst av uppskotinum til nýggja løgtingslóg, sum Sjálvstýrisflokkurin legði fyri Løgtingið longu í 1915. Sjálvstýrisstríðið var hartil harðnað, tí donsku ríkismyndugleikarnir høvdu kveistrað uppskot Sjálvstýrisfloksins til nýggja løgtingslóg frá sær, sjálvt um tað var samtykt av Løgtinginum í 1918, 1919 og í 1920.

Sjálvstýrisflokkurin fekk nýggja stevnuskrá í 1924, og av henni framgongur týðiliga, at viðurskiftini millum føroysku

* Sama upphædd, 12 krónur um dagin, stendur í broyttu løgtingslógini frá 1939. Lovtidende for Kongeriget Danmark for Aaret 1939, Afdeling A II, síðu 1415



Sjálvsstýrismenn vitja formannin í Kirkjubø. Menninir eru aftast frá vinstu Jacob Johs. Matras, Niclas Niclasen, Edward Mitens og Nyholm Debes. Í miðjuni sita Kristian L. Kristiansen og Jóannes Patursson, og fremst sita Johan Hendrik Poulsen, Johan Kalsoy, Símun P. Zacharissen og Gunnar Winther.

sjálvstýrisrørsluna og donsku ríkismyndugleikarnar ikki vóru so góð, sum tey høvdu verið. Einki varð longur sagt um, at heimildir Løgtingsins skuldu víðkast í so stóran mun, sum tað var møguligt „*i god forståelse med regering og rigsdag*“, soleiðis sum stevnuskráin frá 1909 var orðað, men tað varð einans sagt, at „*Som særlig nation har færingerne ret til at råde over Færøerne, og der skal arbejdes for landets selvstyre*“. Hartil stóð eins og í gomlu stevnuskránni, at „*Ingen lov bør gøres gældende for Færøerne, uden at den i sin helhed er vedtaget på Lagtinget*“,[284] og at „*Lagtinget skal have lovgivningsmyndighed i særlige færøske Anliggender og Raadighed over Landets Indtægter*“.[285] Í grein 11 í stevnuskránni varð lagt upp til, at „*der optages forhandling med Danmark om alle Fællesanliggender*“. Løgtingslógin skuldi sostatt broytast aftur, men tað var ikki longur ein treyt, at hetta hendi „*i god forståelse med regering og rigsdag*“. Sjálvstýrisstríðið var veruliga byrjað.

**„Adressumálið"**

Helst hevði politiska stríðið um Tilboðið í 1906 sett nøkur skør í álitið millum Jóannes Patursson og donsku Vinstrastjórnina, men góða samstarvið millum sjálvstýrisrørsluna og ríkismyndugleikarnar helt áfram undir radikalu stjórnini, sum kom aftaná. Líka til 1918 vóru viðurskiftini millum sjálvstýrisrørsluna og stjórnina so mikið góð, at bæði amtmaðurin Svenning Rytter og andstøðan í danska Ríkisdegnum hildu, at danska stjórnin í veruleikanum hjálpti sjálvstýrisrørsluni, meðan hon arbeiddi ímóti Sambandsflokkinum. Amtmaðurin kendi seg beinleiðis sviknan av stjórnini.

Í 1920 var broyting komin í, og viðurskiftini millum partar av sjálvstýrisrørsluni og donsku ríkismyndugleikarnar vóru kølnað. Fortreytirnar fyri hesi gongd liggja í tíðarskeiðnum frá 1914 til 1918, tá 1. veraldarbardagi leikaði á. Hetta tíðarskeiðið vísti føroyingum, hvussu svikaligt sambandið millum Føroyar og Danmark kundi vera, tá stórpolitisku viðurskiftini vóru spent.

Í løgtingstíðindum sæst, at Løgtingið gjøgnum øll krígsárini metti vøruflutningin til Føroya at vera eitt stórt vandamál. Hesin ótti var ikki heilt ógrundaður, tí sjálvt um hvørki Danmark ella Føroyar vóru hersett undir 1. veraldarbardaga, so var handilsliga samskiftið millum londini nógv avmarkað gjøgnum alt kríggið. Tey krígsførandi londini, Týskland, Ongland og Frakland settu minusperringar út ymsastaðni í Norðuratlantshavi við tí fyri eyga at avbyrgja figgindan handilsliga. Avleiðingin varð, at Føroyar og Danmark partvíst vóru avbyrgd frá hvørjum øðrum. Tað gjørdist tí átrokandi fyri Løgtingið at royna at fáa vørur til Føroya umvegis Ísland ella Amerika. Støðan var ikki hættislig at byrja við, men seinni skuldi tað fáa stóran týdning fyri Føroyar, at bretar kravdu, at øll skip, sum komu inn í bretskt sjóøki, skuldu leggja leiðina fram við Kirkwall í Orknoyum til eitt sokallað „kontrabanda" eftirlit.

Løgtingið var saman í 1914, tá kríggið byrjaði, og í hesum sambandi varð ein *Vørunevnd* sett, sum taldi 5 umboð og amtmannin Svenning Rytter. Vørunevndin skuldi taka sær av øllum viðurskiftum og trupulleikum við vøruflutninginum til Føroya, sum kundu standast av krígsstøðuni.[286] Aðalmálið hjá Vørunevndini var at syrgja fyri, at tað altíð var so mikið av

vørum í Føroyum, at oyggjarnar kundu klára seg í 3 mánaðir uttan handilssamband.[287] Í 1916 avgjørdi Løgtingið at senda tveir handilskønar menn til Íslands, til tess at „*undersøge Mulighederne for en eventuel samlet islandsk-færøsk Forretningsforbindelse med Amerika*“.[288] Fuglafjarðarkeypmenninir S.P. Petersen og Jens Evensen vóru í hesum sambandi í Íslandi í 1917 og samráddust við íslendskar myndugleikar.

Í tíðarskeiðinum frá 1916 til 1917 var støðan viðvíkjandi vøruflutningi til Føroya versnað munandi. Týskland hevði tann 1. februar 1917, sum eitt mótspæl móti bretska handilsstongslinum mótvegis Týsklandi, avgjørt at fara undir eitt kavbátakríggj í Atlantshavi, sum skuldi vendast móti øllum skipum, sum sigldu uppá Ongland. Tá bretar undir hesum umstøðum hildu áfram við at krevja, at øll skip – eisini tey, sum sigldu til ella frá Føroyum – skuldu leggja leiðina fram við Kirkwall í Orknoyum til eitt „kontrabanda“ eftirlit, gjørdist støðan í Føroyum hættislig. Tað gjørdist enn meira átrokandi enn áður hjá myndugleikunum at finna aðrar vegir at fáa vøru til Føroya.

Hóast íslendska stjórnin vísti seg at vera hjálpsom mótvegis teimum báðum fuglafjarðarkeypmonnunum, sum fóru til Íslands í 1917, so fekst einki ítøkiligt úrslit burturúr ferðini. Ein avtala millum føroyingar og íslendingar um vøruflutning til Føroya úr Amerika, umvegis Ísland, var treytað av góðkenning frá bretum. Uttan eina tílíka bretska góðkenning, sum loyvdi skipum til og frá Føroyum at sleppa undan at leggja leiðina fram við vandamikla sjóøkinum runt bretsku oyggjarnar, hevði ein avtala við íslendingar einki virði. Eina tílíka góðkenning vildu bretar ikki geva.

Frá februar í 1917 bendir samskiftið millum amtmannin og Løgmálaráðið á, at komu ongar vørur til Føroya innan endan á mars, so fór støðan at gerast álvarsom í oyggjunum, tá komið varð inn í apríl mánað.[289] Ríkismyndugleikarnir og Vørunevndin arbeiddu við málinum, men partar av sjálvstýrisrørsluni og andstøðuni í Løgtinginum hildu ikki, at myndugleikarnir gjørdu nóg mikið við spurningin. Eftir at tað ikki hevði eydnast Jóannesi Patursson í februar mánað at savna helvtina av tingmanningini, soleiðis at Løgtingið kundi kallast saman til eykatingsetu at viðgera hetta málið, – tað eydnaðist heldur ikki Patursson at sannføra allar sjálvstýristingmenninar

um, at tingið átti at verða kallað saman – kallaði valfelag Sjálvstýrisfloksins, *Framburðsfelagið*, til fundar í Havn tann 18. mars 1917.[290] Á hesum fundinum varð samtykt, at eitt bræv skuldi sendast til ensku stjórnina við ynski um, at føroysk skip fingu frítt at fara millum Ísland og Føroyar, og sluppu undan at sigla gjøgnum vandasjógv til eftirlit í bretskari havn.[291] Brævið til bretar skuldi sendast saman við eini „fólkaadressu", sum skuldi savnast í Føroyum.

Amtmaðurin Svenning Rytter kallaði Løgtingið saman tann 28. mars 1917 at viðgera fólkaadressuna, og saman við sambandsmeirilutanum í Løgtinginum ávaraði hann føroyingar ímóti at skriva undir fólkaadressuna. Formansskapurin í Løgtinginum og løgtingsmeirilutin helt ikki, at tað var rætt, at føroyingar vendu sær beinleiðis til fremmanda stjórn í krígstíð. Hartil vísti løgtingsmeirilutin á, at adressan bygdi á skeivar fortreytir, tí íslendingar høvdu tann 23. mars boðað Løgtinginum frá, at eingin hjálp kundi koma úr Íslandi;[292] har var eisini vørumangul.[293] Ríkismyndugleikarnir og Vørunevndin arbeiddu hinvegin við spurninginum út frá teimum fortreytum, at vørur skuldu fáast til Føroya á ein ella annan hátt, og seinast í apríl 1917 eydnaðist danska Uttanríkismálaráðnum at fáa dampskipið „Island" til Føroya við 700 tonsum av vøru.[294]

Hóast ávaringarnar frá amtmanni og løgtingsmeiriluta fóru sjálvstýrismenninir móti endanum av mars mánaði undir at savna undirskriftir millum føroyingar, sum skuldu sendast til bretar saman við áheitanini um, at skip til og úr Føroyum sluppu undan „kontrabanda" eftirliti í Kirkwall. Ein adressa fór at ganga, og savnaðar vóru 3.242 undirskriftir millum allar føroyingar – kvinnur og menn, ið vóru omanfyri 18 ár.

Áheitanin til bretar og adressan vóru ikki send beinleiðis til bretsku myndugleikarnar, tí tá samanum kom tóku sjálvstýrismenninir ávaringarnar frá amtmanninum og løgtingsmeirilutanum til eftirtektar. Tann 17. apríl 1917 varð áheitanin og adressan, umvegis danska sendiharran í London, send til bretsku stjórnina.[295] Danski sendiharrin í London, sum sostatt fekk til uppgávu at bera bretsku stjórnini boðini, bað um nærri upplýsingar úr Keypmannahavn, men áðrenn nakað kom burturúr, var trupulleikin viðvíkjandi vøruflutningi til Føroya loystur. T.d. vóru 700 tons av vøru komnar til Føroya seinast

í apríl mánað. Áheitanin og adressan komu tí ongantíð bretsku myndugleikunum í hendi.

Adressan var ikki ein tilætlaður strategiskur liður í valstríði Sjálvstýrisfloksins upp undir løgtingsvalið 24. apríl 1918, men innanríkispolitiskt vóru krígsstøðan og adressumálið helst góð fyri Sjálvstýrisflokkin, tí í 1918 fekk flokkurin á fyrsta sinni meirilutan í Løgtinginum. Í maj í 1918 avgjørdi tann nýggi løgtingsmeirilutin at senda eina nýggja nevnd, ið varð sett saman av 5 løgtingsumboðum, til Reykjavíkar til tess at fáa í lag avtalu við íslendsku stjórnina um vøruflutning til Føroya. Hesu ferð gekk betur, tí út ímóti sumri í 1918 slakaðu bretar uppá krøvini til „kontrabanda“ eftirlit við skipum, ið sigldu millum Føroyar og Ísland.[296]

Í 1918 metti Løgtingið, at spurningurin um vøruflutning til Føroya var loystur,[297] men adressan hevði neyvan havt nakran avgerandi týdning fyri gongdina í málinum. Fyri tað fyrsta kom adressan ongantíð bretsku myndugleikunum í hendi,[298] og hon kann tí ikki hava ávirkað bretsku myndugleikarnar í síni støðutakan. Í øðrum lagi er tað heldur ikki serliga sannlíkt, at donsku ríkismyndugleikarnir, sum frammanundan gjørdu eitt stórt arbeiði fyri at fáa vørur til Føroya, orsakað av adressuni løgdu eitt enn størri trýst á bretsku myndugleikarnar, enn teir høvdu gjørt frammanundan. Í triðja lagi er tað greitt, at tað ikki var nýggja føroyska Løgtingið, sum átti høvuðsæruna av, at bretska „kontrabanda“ eftirlitið gjørdist lakari í 1918. Donsku ríkismyndugleikarnir megnaðu ikki at fáa bretar til at lætta um fortreytirnar fyri vøruflutningi til Føroya í 1917, og tað er tí óhugsandi, at Løgtingið einsamalt skuldi megna hetta í 1918.

Í 1917 var USA komið upp í kríggið á síðuni hjá Onglandi og Fraklandi. Hetta broytti í longdini valdsjavnvágina millum teir stríðandi partarnar. Tað var óivað tann stórpolitiski veruleiki, at Ongland, Frakland og USA vóru um at vinna kríggið móti Týsklandi og Eysturríki-Ungarn, sum var høvuðsgrundin til, at tað ikki longur var so átrokandi fyri bretar at varðveita stranga eftirlitið við skipaferðsluni í Norðuratlantshavinum. Tá komið var móti sumri í 1918, var spurningurin ikki longur *hvør* fór at vinna kríggið, men spurningurin var einans *nær* Týskland og Eysturríki-Ungarn fóru at geva seg yvir. Tann



Forsætisráðharrin Carl Theodor Zahle vitjaði í Føroyum á veg heim úr Grønlandi í 1922. Konan á myndini er bróðurdóttur hansara Ebba Müller við soninum Ebba.

11. november 1918 undirskrivaði Týskland vápnahvíldaravtaluna, og 1. veraldarbardagi var av.

Adressumálið var helst viðvirkandi til, at Sjálvstýrisflokkurin vann løgtingsvalið tann 24. apríl 1918, men í aðra mátar hevði tað lítlan týdning fyri vøruflutningin til Føroya. Harafturímóti fekk málið eitt politiskt eftirspæl í Danmark, sum kom at fáa týdning fyri politisku viðurskiftini millum Danmark og Føroyar. Danski stjórnarleiðarin Zahle metti, helst av røttum, at adressumálið var útint og endað á løgfrøðiliga rættan hátt. Tí vóru eingi rættarlig stig tikin móti fólkunum aftanfyri adressuna, men Rytter amtmaður, sum óivað helt seg hava stóran part av æruna av, at adressumálið spældi væl av, tá samanum kom, helt seg ikki í nóg stóran mun verða stuðlaðan av donsku ríkismyndugleikunum í sínum arbeiði í Føroyum undir krígnum. Tað fall heldur ikki í góða jørð hjá Rytter, at danski stjórnarleiðarin Zahle stuðlaði sjálvstýrismanninum Edward Mortensen (frá 1923 Edward Mitens) upp undir fólkatingsvalið, sum skuldi vera 22. apríl 1918, men heilt galið gjørdist tað tann 15. mars í 1918, tá Zahle í einum fjarriti til Rytter bað hann syrgja fyri, at Edward Mortensen varð kunnaður um støðu sína. Svenning Rytter kendi seg beinleiðis svíktan av Zahle, og saman við sorinskrivaranum og fútanum segði hann seg úr starvi tann 17. mars 1918.[299]

Nakrar mánaðir seinni kom danskur innanríkispolitikkur upp í málið. Tann konservativi meirilutin í Landstinginum fekk í juli í 1918 borið so í bandið, at sett varð ein 11 manna nevnd, sum í fyrsta lagi skuldi kanna adressumálið í Føroyum í 1917, og í øðrum lagi skuldi nevndin kanna, í hvønn mun radikala stjórnin hjá Zahle hevði hjálpt fólkunum aftanfyri adressuna í Føroyum upp undir fólkatingsvalið í 1918. Jóannes Patursson, sum kundi hugsast at vera ein av teimum høvuðsákærdu, var føroyska umboðið í 11 manna nevndini. Eftir drúgvar skjalakanningar og vitnisavhoyringar varð ein frágreiðing skrivað, sum saman við rúgvismiklum og fyri føroyska søgugransking týdningarmiklum fylgiskjølum og vitnisfrágreiðingum fevndi um nærum 1000 síður. Frágreiðingin, sum í Føroyum fekk tað óalmenna heitið *Fúlabók*, varð liðug tann 15. januar í 1920.[300] Nevndin býtti seg sundur í ein meiriluta uppá 7 og ein minniluta uppá 3. Jóannes Patursson var ikki í Danmark, tá tann endaliga frágreiðingin varð skrivað. Meirilutin í nevndini ákærdi radikalu stjórnina hjá Zahle fyri at hava hjálpt sjálvstýrismonnunum upp undir fólkatingsvalið í 1918. Um Jóannes Patursson, formann Sjálvstýrisfloksins, sum var limur í nevndini, varð sagt, at hann „*hørte hjemme paa den anden Side af Skranken*“, og hann varð ákærdur fyri at hava framt „*rigsskadelig Adfærd*“ í 1917, tá áheitanin og adressan vóru send til bretar.[301] Minnilutin metti ikki, at nakað beinleiðis óregluligt var hent í málinum.

Fúlabók og adressumálið fingu hvørki í Danmark ella í Føroyum nakrar *rættarligar* ella *stjórnarligar* avleiðingar, tí tá samanum kom, varð ikki mett, at grundarlag var fyri at reisa ákæra móti nøkrum í málinum, men málið fekk ta *politisku* avleiðing, at viðurskiftini millum Jóannes Patursson og partar av sjálvstýrisrørsluni á aðrari síðuni og danskar myndugleikar á hinari síðuni versnaðu skjótt.[302] Ákæran um ríkisskaðiliga atferð kundi ikki annað enn seta kílar í góðu viðurskiftini teirra millum. Stríð Sjálvstýrisfloksins móti donskum embætismonnum var um at broytast til eitt stríð móti donsku ríkismyndugleikunum, tá komið varð inn í 1920-ini.

### „Noregsmálið“

Kølnaðu viðurskiftini millum Sjálvstýrisflokkin og donsku ríkismyndugleikarnar síggjast beinleiðis í einum máli, sum

norski professarin Gjelsvik ótilvitað hevði birt upp undir í 1923 í norska blaðnum „17. maj". Sambært „17. maj" hevði norski professarin sagt, at føroyingar áttu at sloppið at valt ímillum, um teir vildu vera saman við Danmark ella Noregi. Viðurskiftini millum Danmark og Noregi vóru ikki tey bestu um hetta mundið, tí londini lógu í stríði um rættin til Eysturgrønland. Viðmerkingin hjá norska professaranum skuldi tí neyvan skiljast sum eitt *tilboð* til føroysku tjóðskaparrørsluna, men heldur var talan um eitt norskt tjóðskaparligt *álop* á donsku ríkismyndugleikarnar.

Orðini hjá Gjelsvik útloystu kortini eitt tjóðskaparligt stríð í Føroyum, tá danska blaðið „Nationaltidende" tann 13. juni prentaði eina viðmerking til orðini hjá Gjelsvik frá formanni Sambandsfloksins, Oliver Effersøe. Í 1906 hevði Effersøe staðfest á Fólkatingi, at „*vi Færinger føler os fuldstændig som Danske*".[303] Tað var tí upplagt at biðja hann um eina viðmerking til greinina í „17. maj". Effersøe svaraði sambært „Nationaltidende", at einki prógv var fyri, at føroysku landnámsmenninir vóru norskir. Harumframt var nógv danskt fólk komið til Føroya í nýggjari tíð, sum hevði havt við sær, at fólkið var vorðið meira blandað. Effersøe staðfesti eisini, at føroyingar høvdu samtykt at vera í politiskum felagsskapi við Danmark, og at tað ikki kom uppá tal, at Føroyar vóru lagdar undir Noregi. Føroyar vóru ein partur av danska ríkinum, og tær vóru ikki vanrøktar undir donskum stýri.

Jóannes Patursson, sum var í Noregi um hetta mundið, fekk kunnleika til orðini hjá Effersøe umvegis norsku bløðini, og tann 22. juni 1923 sendi hann eitt aftursvar til Effersøe gjøgnum norska telegramfelagið. Her segði Patursson m.a., at „*Naar repræsentanten* (tvs. Oliver Effersøe) *paastaar, at der intet ønske er paa Færøerne om at komme i forening med Norge, bør dette kun forstaas derhen, at der intet ønske er paa Færøerne om at komme under Norge, under den samme haardhændte politik, som Danmark for tiden haandhæver overfor os. Før færøingerne kan ta stilling til spørgsmaalet om gjenforening med Norge, maa der mellem Norge og Færøerne være opnaaet en overenskomst om de for begge parter bindende bestemmelser ved en saadan eventuel foreningsakt*". Hartil afturvísti Patursson allar pástandir hjá Effersøe um, at føroyingar ikki vóru av norskari rót. „*Færøingerne er av ligesaa ekte norsk herkomst, som deres frænder paa Norges*

Í Noreg var stórur áhugi fyri noregsmálinum. Tí varð alt orðaskiftið í Løgtinginum givið út í bók. Álitið hjá Sjálvstýrisflokkinum var týtt til norskt, meðan alt orðaskiftið annars var á føroyskum og donskum, soleiðis sum løgtingstíðindi tá vórðu skrivaði. Fyri at lætta um hjá norskum lesarum vórðu ein orðalisti og ein stutt frágreiðing um føroyska málløru prentaði aftast í bókini.



NORGESSAKEN
I FÆRØERNES LAGTING

*Officielt referat fra forhandlingerne*
*Med norsk oversættelse av selv-*
*styrepartiets indstilling*

BILAG
*Litt om færøysk sprog med en ordliste*
*ved*
AMUND B. LARSEN d. y.

TORSHAVN OG KRISTIANIA
1923

*Vestland og paa Island*". Sum grundgeving fyri, at Føroyar hava verið vanrøktar undir donskum valdi, segði Patursson, at „*Dansk styre paabyder, at dansk sprog (som ikke tales af en eneste færøing) skal være undervisningssprog i de færøiske folkeskoler*".[304]

Henda grundgevingin hjá Patursson og álop hansara á danskt vald í Føroyum fall Sambandsflokkinum fyri bróstið, og Oliver Effersøe reisti málið í Løgtinginum tann 31. juli við tí fyri eyga, at tingið skuldi taka støðu til orðini hjá formanni Sjálvstýrisfloksins. Hetta málið, sum fekk drúgva nevndarviðgerð í Løgtinginum, endaði ikki fyrr enn 15. september 1923, tá tilmælið frá meirilutanum í løgtingsnevndini varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Løgtingsmeirilutin staðfesti at „*Lagtinget betegner den Beskyldning, der*

*er blevet rettet mod dansk Rigsstyre i nyere Tid for Vanstyre og Undertrykkelse paa Færøerne og for Undertrykkelse af Færingernes Frihed, som ubeføiet og tilbageviser enhver Tanke om Øernes statsretlige tilknytning til noget andet land*". Sum sæst atkvøddi eingin ímóti uppskoti meirilutans, og sambært tilmælinum frá sjálvstýrisminnilutanum í nevndini hevði tað ongantíð verið ætlanin at knýta Føroyar at Noregi, tí minnilutin mælti eisini Løgtinginum „*frá at gera meir við hendan spurning*".[305] Ítøkiliga spurdist sostatt einki burtur úr viðgerðini í Løgtinginum.

Innanríkispolitiskt í Føroyum var „Noregsmálið" ein tjóðskaparlig rembing, sum lítið og einki veruligt (sjálvstýris) politiskt innihald var í. Gongdin í Noregsmálinum bar kortini boð um, at tað lítið ítøkiliga og kensluborna tjóðskaparstríðið var komið inn um tingsins gátt og var vorðið ein týðandi men ikki altíð mennandi partur av tí vanliga politiska arbeiðinum í Løgtinginum. Hinvegin fekk Noregsmálið politiskar avleiðingar fyri viðurskiftini millum Danmark og Føroyar.

Tær ákærur, sum Jóannes Patursson setti fram í Noregi móti donskum stýri í Føroyum, vóru av ríkismyndugleikunum og Sambandsflokkinum ikki mettar at vera heilt rættvísar. Nakað var helst um hetta, tí tann millum sjálvstýrisfólk illa dámda grein 7 í skúlalógini frá 1912, sum Jóannes Patursson sipaði til í sínum álopi á danskt vald í Føroyum, sum staðfesti, at danskt bæði var *høvuðsmálið* og *høvuðsendamálið* við frálæruni í føroysku skúlunum, varð ikki trýst oman yvir føroyingar av donskum valdi, soleiðis sum Jóannes Patursson legði upp til, men hon varð samtykt í Løgtinginum av einum stórum meiriluta – 15 løgtingsumboð (harímillum Rytter amtmaður) atkvøddu fyri at seta grein 7 í gildi, meðan 6 atkvøddu ímóti.[306] Løgtingssamtyktin gjørdi hana ikki til lóg, men tað hevði verið løgið av danska Ríkisdegnum at gingið ímóti einum so breiðum ynski frá Løgtinginum. Kortini gjørdist henda greinin ein stórur tjóðskaparligur stríðsspurningur í Føroyum. Louis Zachariassen, sum var lærari (ársvikarur) í Kirkjubø og á Velbastað, breggjaði sær alment av, at hann einans undirvísti á føroyskum. Lóg var brotin, og lóg skuldi brótast, hevði hann alment borið fram í 1913. Fyri hesi lógarbrot hildu donsku ríkismyndugleikarnir seg ikki kunna gera annað enn at nokta honum fast lærarastarv, til hann hevði góðtikið tær lógir og reglugerðir, sum skúlin virkaði undir. Tað vildi Zachariassen

ikki, og endin var, at hann fór frá sum ársvikarur í 1917 uttan nakrantíð at hava fingið fast starv.

Støðan var nakað øðrvísi í 1923, tí Løgtingið hevði í 1918, tá Sjálvstýrisflokkurin hevði fingið meirilutan í Løgtinginum, samtykt at seta grein 7 úr gildi, uttan at hetta varð tikið til eftirtektar av ríkismyndugleikunum. Løgtingssamtyktin varð endurnýggjað í 1919 við sama úrsliti. Í næstu tingsetuni, sum byrjaði í 1920, eydnaðist tað Sjálvstýrisflokkinum, saman við próstinum Jákup Dahl, í 1921, 1922 og í 1923 at staðfesta løgtingssamtyktina frá 1918, men ríkismyndugleikarnir lótu ikki við seg koma hesar ferðirnar heldur.[307] Ákærurnar hjá Jóannesi Patursson móti dønum í 1923 skulu síggjast í samanhangi við hesi viðurskifti.

Tað er kortini vert at leggja til merkis, at Sambandsflokkurin hevði lítlan meiriluta av veljarunum aftanfyri seg aftaná løgtingsvalið í 1918, hóast Sjálvstýrisflokkurin fekk meirilutan í Løgtinginum. Í løgtingssetuni frá 1920 til 1924 hevði Sambandsflokkurin stóran meiriluta av veljarunum aftanfyri seg, hóast báðir flokkarnir fingu sama tal av løgtingsumboðum.[308] Spurningurin var tí, hvussu rættvísar ákærurnar hjá Patursson móti dønum vóru, tí hóast meiriluti var fyri politikki Sjálvstýrisfloksins í Løgtinginum, so var tað meira ivasamt, um meirilutin av føroysku veljarunum tók undir við flokkinum. Í fólkaræðisligum samanhangi var tað kanska ikki so løgið, at spurningurin um at fáa løgtingslógina – og harvið eisini vallógina – broytta, varð raðfestur ovari av ríkismyndugleikunum enn málspurningurin, men tjóðskaparliga fall hetta ikki í góða jørð hjá Sjálvstýrisflokkinum, serstakliga ikki hjá Jóannesi Patursson, ið ákærdi Danmark fyri at noyða danskt mál oman yvir føroyingar.

Tað var í øllum førum greitt, at her var talan um ein stríðsspurning, ið eins nógv var eitt stríð millum føroyingar sjálvar, sum talan var um eitt stríð millum føroyingar og danir. Ákærurnar hjá Patursson móti ríkismyndugleikunum kunnu best skiljast út frá einum tjóðskaparpolitiskum samanhangi í Føroyum, sum hevði til endamáls at skapa eina tjóðskaparliga andsøgn millum Danmark og Føroyar, ið kundi brúkast til at savna føroyingar um sjálvstýrispolitikkin. Í øllum førum geva tær betri meining í einum taktiskum politiskum samanhangi enn í einum reinum fólkaræðisligum samanhangi.



Noregsmálið hevði við sær, at stjórnin hjá Neergaard orðaði ein meira sambandssinnaðan Føroyapolitikk. Her hava J.C. Christensen og Niels Neergaard júst verið á fundi við Kristian X í 1920. Av heilsuávum vildi J.C. Christensen, vinstrumegin, ikki halda fram sum stjórnarleiðari. Tí tók Neergaard við, meðan J.C. Christensen gjørdist kirkjumálaráðharri.

Hesar hendingarnar vísa í veruleikanum, hvussu óheppið politisku skipanirnar í Føroyum virkaðu, tá sjálvstýriskrøvini gjørdust størri. Í veruleikanum vóru tað føroyingar sjálvir, meirilutin í Løgtinginum, sum vildu hava grein 7 setta í gildi, men av tí at Løgtingið einans hevði ráðgevandi myndugleika á lóggávuøkinum, varð lógin løgfrøðiliga sett í gildi av danska Ríkisdegnum og tinglýst av amtmanninum. Eitt álop á lógina, sum tað hjá Louis Zachariassen, mátti tí í Danmark verða fatað sum eitt álop á danska ríkisvaldið, sjálvt um veruligi trupulleikin var í Føroyum. Tað sama kann stórt sæð sigast um ákærurnar hjá Jóannesi Patursson móti donskum valdi í Føroyum í 1923, hóast støðan tá var eitt sindur øðrvísi; tað, sum í veruleikanum var ein innanríkispolitiskur stríðsspurningur í Føroyum, kundi Patursson alt fyri eitt venda til at vera eitt tjóðskaparligt stríð millum føroyingar og danir. Tað var týðiligt, at løgtingslógin, sum einans gav Løgtinginum ráðgevandi myndugleika, ikki megnaði at handfara tað tjóðskaparliga stríðið, sum byrjaði at mennast í Føroyum. Fekk Løgtingið

ikki veruliga ábyrgd, so kundu tá saman um kom bert ríkismyndugleikarnir ábyrgjast fyri avgerðir tess. Donsku ríkismyndugleikarnir høvdu ábyrgdina av føroysku lóggávuni og skyldu til at syrgja fyri, at lóggávan varð hildin í Føroyum.

Tað er ikki vist, at Oliver Effersøe, tá hann reisti Noregsmálið í Løgtinginum, var politiskt tilvitaður um at brúka hesa ríkisrættarligu sannroynd við tí fyri eyga at seta kílar ímillum føroysku sjálvstýrisrørsluna og donsku ríkismyndugleikarnar, men Noregsmálið fekk ta avleiðing, at stjórnin hjá Neergaard í 1923 orðaði ein meira sambandssinnaðan Føroyapolitikk,[309] sum semja stórt sæð var um í Danmark í fleiri ár fram í tíðina: Donsku ríkismyndugleikarnir søgdu seg vilja samstarva við føroyingar um at verja og menna tað serføroyska, serstakliga føroyska málið, men treytin varð, at báðir partar máttu góðkenna, „*at såvel Grundloven som rigssproget, det danske sprog, skal bevares som fælles for hele riget*“.[310] Thorvald Stauning, sum gjørdist forsætisráðharri aftaná Neergaard, staðfesti hendan politikkin í 1924.

Sæð úr einum taktiskum politiskum sjónarhorni í Føroyum ber tí til at siga, at Oliver Effersøe vann á Jóannes Patursson, tá hann legði ákærurnar hjá formanni Sjálvstýrisfloksins móti donskum valdi fyri Løgtingið, men sæð úr einum størri donskum ríkissamanhangi var føroyska sjálvstýrisrørslan ment so mikið nógv hugsjónarliga, – men neyvan eins nógv í praktiskum politikki – at hon var komin í stríð við sjálva ta donsku eindarstatshugsanina. Helst var tað hetta seinna, sum uppá longri sikt fekk størstan týdning fyri politikkin hjá skiftandi donskum stjórnum mótvegis føroysku sjálvstýrisrørsluni, men ítøkiliga var tað Noregsmálið, sum í 1923 fekk stjórnina at velja síðu fyri Sambandsflokkinum í Løgtinginum. Óivað hevur tað havt stóran týdning fyri ríkismyndugleikarnar, at ákærurnar hjá Jóannes Patursson vóru settar fram í einum øðrum ríki, tí harvið vóru donsku trupulleikarnir við føroysku sjálvstýrisrørsluni, sum ríkismyndugleikarnir mettu at vera innanríkispolitiskar, settir inn í ein uttanríkispolitiskan samanhang.

Tað kom kortini ikki til skarpskeringar millum Sjálvstýrisflokkin og ríkismyndugleikarnar tað fyrstu tíðina aftaná 1923. Broytingarnar í løgtingslógini og vallógini, sum vóru framdar seinni í 1923, høvdu við sær, at betur samsvar var millum fólkaviljan og løgtingsmeirilutan. Hetta hevði við sær, at

Sambandsflokkurin fekk greiðan meiriluta í Løgtinginum aftaná løgtingsvalið í 1924. Í málspurninginum eydnaðist tað í 1925 Sambandsflokkinum at forða fyri, at eitt semingsuppskot frá ríkismyndugleikunum, sum miðaði ímóti, at føroyskt skuldi verða undirvísingarmálið í Føroyum við teimum undantøkum, at danskt skuldi verða undirvísingarmálið í lærugreinunum donskum, Danmarkar søga og geografi, varð samtykt í Løgtinginum.[311] Sjálvstýrisrørslan hevði tað trupult hetta valskeiðið.

### „Flaggstríðið“

Sæð í sjálvstýrispolitiskum samanhangi hevði tað hugsjónarliga Noregsmálið gjørt sjálvstýrisrørsluni stóran skaða. Donsku ríkismyndugleikarnir, sum fram til 1920 høvdu sæð við vælvild uppá politikk Sjálvstýrisfloksins, høvdu vent flokkinum bakið. Hartil kom, at Sambandsflokkurin fekk reinan meiriluta í Løgtinginum í 1924. Friður valdaði tí um tjóðskaparspurningin í nøkur ár, men tjóðskaparligu kenslurnar vóru veruliga farnar at gera um seg í føroyskum politikki. Tá Sambandsflokkurin í 1928 misti meirilutan í Løgtinginum, eftir at Føroya Javnaðarflokkur var komin á ting við 2 umboðum, skuldi tjóðskaparstríðið skjótt koma í hæddina aftur.

Í 1930, tá íslendingar saman við hinum nørrønu tjóðunum hátíðarhildu 1000 ára føðingardag Altingsins, kom stríðið millum føroysku sjálvstýrisrørsluna og donsku ríkismyndugleikarnar í hæddina. Stór fjøld av fólki, eisini føroyingar, var farin til Íslands at hátíðarhalda dagin saman við íslendingum. Norrønu fløggini vóru vundin á stong í Íslandi, meðan stjórnarleiðararnir í grannalondunum bóru fram sína heilsu fyri íslendingar. Eisini føroyska flaggið, sum var tilevnað í 1918 av føroyskum útisetum í Danmark, varð vundið á stong millum hini norrønu fløggini. Ætlanin var, at føroyska flaggið skuldi veitra, meðan Edward Mitens, sum tá var løgtingsformaður, bar fram heilsu til íslendingar vegna Løgtingið. Hetta varð kortini av ongum. Trupulleikin var, at føroyska flaggið ongantíð hevði vunnið viðurkenning frá donsku ríkismyndugleikunum, sum tvørturímóti høvdu hildið uppá, at Dannebrog átti at vera einasta flagg, sum umboðaði danska eindarstatin. Hetta krav vóru donsku ríkismyndugleikarnir ikki sinnaðir at sleppa, og teir kravdu tí av íslendingum, at føroyska flaggið skuldi



Merkið veitrar á Tingvøllum til 1000 ára hátíðarhald Altingsins.

takast niður. Edward Mitens slapp ikki at røða fyri íslendingum undir føroyska flagginum.

Henda hendingin í Íslandi, sum ikki var tann einasta, har danir sýttu føroyingum fyri at nýta føroyska flaggið, skapti stóra misnøgd millum sjálvstýrismenninar. Á ólavsøku sama árið, tá føroyingar hátíðarhildu 900 ára dagin fyri deyða Ólav Halga, løntu føroysku sjálvstýrismenninir ríkismyndugleikunum hetta aftur. Hendan dagin veitraði Dannebrog yvir tinghúsinum, men tað, sum ikki var vanligt henda dagin, var, at ein føroyskur sjálvstýrismaður kvetti danska flaggið niður úr flaggstongini. Føroysku sjálvstýrismenninir høvdu lønt dønum aftur við egnum heilivági.

Hetta málið varð eisini reist í Løgtinginum, og enn eitt álit varð skrivað. Ein løgtingsmeiriluti uppá 14 tingmenn, tingmenn Javnaðarfloksins, Sambandsfloksins og Edward Mitens, samtykti at „*udtale sin harme over det ... stedfundne ... og paataler alvorligt det skete Overgreb*“.[312] Edward Mitens, sum í veruleikanum hevði útloyst stríðið í Íslandi, atkvøddi fyri hesum uppskotinum, meðan restin av sjálvstýrismonnunum, teir vóru 9, atkvøddu ímóti. Helst var tað støða Mitens sum løgtingsformaður, sum noyddi hann at atkvøða, sum hann gjørdi, men hetta var eisini tekin um, at ikki allir í Sjálvstýrisflokkinum tóku undir við tí harða tjóðskaparliga politikkinum, sum Patursson stóð fyri.



Flagggølan á ólavsøku 1930. Tingmenn eru júst komnir í skrúðgongu av Tinganesi og hava sett seg. Til høgru standa merkismenninir, og ein teirra, Páll Patursson, biður tingformannin taka danska flaggið niður og heysa hitt føroyska í staðin. Á myndini hevur tingformaðurin í stavnhettu júst reist seg at svara, meðan amtmaðurin undir fjarðahatti lýður á.

Harða tjóðskaparstríðið endaði ikki fyrr enn í 1930, tá danski forsætisráðharrin Thorvald Stauning hótti við at lata føroyingar atkvøða, um teir vildu varðveita ríkisfelagsskapin við Danmark, ella um teir vildu loysa frá Danmark. Fólkaatkvøðan var meint sum ein *hóttan* mótvegis tí víðgongda partinum av Sjálvstýrisflokkinum, men við hesum góðtók Stauning í veruleikanum, at føroyingar *kundu* taka seg burtur úr ríkisfelagsskapinum. Hóast fólkaatkvøðan var samtykt í Løgtinginum, so varð hon kortini av ongum, hóttanin virkaði eftir ætlan, tí her bakkaðu sjálvstýrismenninir undan, og vístu aftur, at talan kundi verða um at hava eina tílíka fólkaatkvøðu í Føroyum.[313] Jóannes Patursson skrivaði í 1931 ein bókling, *Færøsk Selvstyre*, har hann grundgav fyri støðutakan Sjálvstýrisfloksins í hesum máli. Patursson helt fyri tað fyrsta uppá, at Sjálvstýrisflokkurin ongantíð hevði ætlað at loyst Føroyar frá Danmark, og í øðrum lagi mátti ein fíggjarlig uppgerð gerast millum Danmark og Føroyar frammanundan eini møguligari fólkaatkvøða um loysing ella samband.[314] Veruliga grundin til støðutakanina hjá Jóannes Paturson, sum helst var loysingarmaður um hetta mundið,[315] og tí víðgongda partinum



Páll Patursson hevur hongt føroyska flaggið út av vindeyganum.

av Sjálvstýrisflokkinum, var helst tann, at meiriluti neyvan fekst í Føroyum fyri at loysa oyggjarnar úr ríkisfelagsskapinum, um ein tílík fólkaatkvøða hevði verið hildin í Føroyum í 1930. Tað hevði verið meira sannlíkt, at úrslitið av fólkaatkvøðuni hevði verið, at Føroyar beinleiðis vóru limaðar inn í danska ríkið – nakað sum føroyingar ongantíð beinleiðis høvdu gjørt. Fyri meginpartin av tingmanning Sjálvstýrisfloksins hevði tað helst størri týdning, at hon, eins og Jóannes Patursson hevði

víst á, ongantíð hevði havt í kvittanunum at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum.

Føroyskur sjálvstýrispolitikkur hevði ikki nakað veruligt politiskt grundarlag í Løgtinginum ella í fólkinum í tíðini frá 1906 til umleið 1935. Høvuðsorsøkirnar til hetta vóru tríggjar. Í fyrsta lagi vóru millumkrígstíðirnar búskaparliga harðar, í øðrum lagi var føroyski búskapurin í árunum eftir 1. veraldarbardaga vorðin heftur at stórum peningajáttanum úr ríkiskassanum, og í triðja lagi rakti tann heimsumfatandi búskaparkreppan í 1929 Føroyar hart í 1930-unum. Tá komið varð um miðjuna av 1930-unum byrjaði búskaparliga gongdin so smátt at ganga tann rætta vegin aftur.[316] Politiskar broytingar, sum góvu sjálvstýrisrørsluni eitt veruligt politiskt innihald, vóru á veg í seinnu helvt av 1930-unum.

## Nýggjar tíðir og nýggir flokkar

Enski søgufrøðingurin John West hevur kallað tíðarskeiðið frá 1900 til 1928 í Føroya søgu fyri føroyska ídnaðarkollveltingin.[317] Í hesum tíðarskeiðinum mentist føroyska samfelagið frá at vera eitt ikki serliga kapitalkrevjandi sluppfiskisamfelag til at vera eitt motoriserað fiskivinnusamfelag, ið setti nógv størri krøv til miðsavnan av kapitali, sum kundi fíggja nýggja og kostnaðartunga skipaflotan. Til hetta endamál stovnaðu teir nýggju vinnulívsmenninir undir leiðslu av Thorstein Petersen Sjóvinnubankin í 1932. Tann miðsavnan av kapitali á fáum hondum, sum hendan samfelagsgongdin hevði við sær, førdi til mótstríðandi áhugamál millum arbeiðsgevarar og løntakarar. Ymiskar samfelagsstættir byrjaðu at skipa seg í áhugafeløg. *Føroya Reiðarafelag* varð stovnað í 1909, og í 1911 varð *Føroya Fiskimannafelag* stovnað. Elsta arbeiðarafelagið *Fylking* varð stovnað á Tvøroyri í 1915, tað landsumfatandi *Føroya Arbeiðarafelag* í 1925, og í 1943 varð *Føroya Arbeiðsgevarafelag* sett á stovn.[318]

Landbúnaðurin, sum hevði verið høvuðsvinna føroyinga fram til miðjuna av 19. øld, gjørdist í fyrsta fjórðingi av 20. øld til eina hjávinnu, sum fiskimenn kundu hava at taka til, tá fiskiskapurin var vánaligur. Hartil kom, at nýggja tíðin hevði við sær, at ein serstakur føroyskur fiskivinnubúskapur var mentur, sum setti nógv størri krøv til ein sjálvstøðugan før-



Eitt úrslit av flaggstríðnum í 1930 var, at ein flaggstong varð reist á Tinghúsvøllinum til føroyska flaggið í 1931. Her veitrar tað fyri fyrstu ferð á ólavsøku sama ár. Føroya Flaggfelag skipaði fyri smáu fløggunum á stabbasteinunum, sum børn eisini fingu at bera.

oyskan politikk, ið ikki var bundin at donskum politiskum skipanum, har búskaparligu viðurskiftini vóru grundleggjandi øðrvísi. Tann politiska skipanin í Føroyum kom tí undir trýst, tá komið varð móti endanum av 1920-unum.

Nýggja tíðin setti nýggj krøv til gamla Sjálvstýrisflokkin, sum líka síðani Framburðsfelagstíðina hevði megnað at hildið saman uppá áhugamál hjá bæði smáfólki og kongsbóndum. Sjálvstýrishugsjónin hevði hildið saman uppá tey í aðrar mátar mótstríðandi áhugamálini í flokkinum, men tá komið varð inn í 1930-ini, gjørdist tað eyðsæð, at tann nýggja tíðin fór at hava við sær, at onnur mál enn sjálvstýrishugsjónin fóru at gera seg meira galdandi í samfelagskjakinum. Hartil kom, at ikki allir í flokkinum vóru so víðgongdir í sjálvstýrispolitikkinum sum

Jóannes Patursson. Spjaðingin í Sjálvstýrisflokkinum, sum bæði hevði røtur í vinnu- og sjálvstýrispolitikkinum, sæst eisini av tí, at kongsbóndin Jóannes Patursson, sum hevði verið formaður í flokkinum síðani stovningina, mátti í 1936 lata formanssessin frá sær til stórhandilsmannasonin av Tvøroyri, Edward Mitens.

Søguligu og samfelagsligu fortreytirnar fyri hesi gongd ganga heilt aftur til aldarskiftið, tá føroyingar byrjaðu at kjakast um eina nýskipan av landbúnaðinum í Føroyum, sum millum annað skuldi hava við sær, at vanlig fólk fingu atgongd til jørð. Í 1911 hevði ein løgtingsnevnd, sum var sett í 1908, skrivað eitt drúgvt nevndarálit,[319] sum bar á sama borðið, men tað var eyðsæð, at sterkar kreftir í Sjálvstýrisflokkinum ikki tóku undir við hesum sjónarmiðum. Líka so eyðsæð var tað, at flokkurin ikki var samdur um hetta málið. Fleiri av teimum meira sosialt sinnaðu í flokkinum, sum ikki høvdu røtur í landbúnaðarsamfelagnum, vóru sinnaði til at taka undir við eini nýskipan av landbúnaðinum saman við tí meira handilsliga sinnaða Sambandsflokkinum.

Samfelagsligu broytingarnar í 1. fjórðingi av 20. øld høvdu eisini við sær, at nýggir politiskir flokkar umboðandi nýggj áhugamál vóru settir á stovn í Føroyum. Føroya Javnaðarflokkur, sum skuldi taka sær av áhugamálunum hjá verkamannastættini, varð settur á stovn í 1925. Tá Javnaðarflokkurin á fyrsta sinni stillaði upp til Løgtingið í 1928 og kom inn á ting við 2 umboðum, øktust sannlíkindini fyri, at meiriluti fór at verða fyri eini nýskipan av landbúnaðinum, sum eisini hevði eitt sosialt endamál. Í stevnuskrá Javnaðarfloksins frá 1927, sum í allar mátar var sosial í sínum innihaldi, stóð t.d., at kongsjørðin skuldi býtast upp í festir, sum í mesta lagi vóru 4 merkur til støddar, og fólkinum skuldi verða givin rættur „*til al den jord, der egner sig til opdyrkning*“. Grein 7 segði, at øll embætis- og prestajørð skuldi útstykkjast til „*husmandsbrug*“. Hartil kom, at Sambandsflokkurin hevði fingið nýggja stevnuskrá í 1931, sum bar á sama borðið. Ongar týðandi broytingar vóru framdar í stevnuskrá Sambandsfloksins viðvíkjandi teimum ríkisrættarligu viðurskiftunum, men í eini nýggjari grein 6 stóð, at arbeiðast skuldi fyri „*Lettere adgang til opdyrkningsjord, støtte til opdyrkning af haugejord eller til fortrinlig behandling af jord (grundforbedring etc.) særlig gennem premieringssystemet*“.[320]

Áhugamálini hjá kongsbóndunum vóru komin undir trýst frá øðrum samfelagsbólkum, sum byrjaðu at skipa seg politiskt seinast í 1920-unum.

Samfelagsligu broytingarnar í fyrsta triðingi av 20. øld virkaðu ímóti stórbóndunum í Sjálvstýrisflokkinum. Hartil kom, at tær búskaparliga truplu tíðirnar aftaná 1. veraldarbardaga saman við heimskreppuni í 1930-unum gingu hart út yvir verkamannastættina. Undir hesum broyttu samfelagsligu fortreytum tók nýtt kjak seg upp í Føroyum um at seta eina nýggja landbúnaðarlóggávu í gildi, sum eisini hevði eitt sosialt endamál. Bæði í 1927, 1928 og 1929 samtykti Løgtingið eitt tilmæli, sum miðaði ímóti at fáa broytingar framdar í landbúnaðarlóggávuni. Landbúnaðarmálaráðið, sum hevði ábyrgdina av økinum, tók undir hesum umstøðum tráðin frá 1911 uppaftur, og bað í 1930 Føroya Amt seta eina 5 manna nevnd, sum skuldi hava til uppgávu at endurskoða landbúnaðarlóggávuna í Føroyum. Hjalmar Ringberg amtmaður skuldi verða formaður í nevndini. Løgtingið skuldi velja 3 umboð í nevndina, og landbúnaðarráðgevin skuldi vera 5. umboðið. Í arbeiðssetninginum hjá nevndini stóð m.a., at nevndin skuldi gera uppskot til nýggja lóggávu, sum skuldi gera tað møguligt at *„skaffe Jord frem til Opdyrkning, dels ved Ændringer i Lov Nr. 56 af 13. April 1894 om Afhændelse af trøer og Grundstykker fra Statens Fæstegods...*“.[321] Nevndin hevði sín fyrsta fund í februar í 1931, men arbeiðið varð ikki liðug fyrr enn í 1932. Eitt drúgt álit, *Gráa Bók*, varð skrivað, sum millum annað legði upp til, at *„Landbrugsraadet kan sælge jord til Byggegrunde, Havelodder, Fisketørringspladser, Lagerpladser o.l.*“.[322] Í mun til gomlu lógina frá 1894 varð tað nú staðfest, at vanlig fólk kundu keypa jørð burtur av kongsjørðini til lagaligar gjaldstreytir.

Tá tilmælini í Gráu Bók vóru løgd fyri Løgtingið, tók meirilutin undir við teimum, og tey vóru í 1934 samtykt av tingmonnum Sambandsfloksins og Javnaðarfloksins, saman við 3 sjálvstýrismonnum. Í 1935 og 1936 kom uppskotið aftur í Løgtingið frá ríkisstjórnini við smávegis broytingum, men í 1938 varð tað endaliga samtykt av danska Ríkisdegnum.[323] Nýskipanirnar av føroyska landbúnaðinum, sum lunnar vóru lagdar undir í 1911, vóru umsíðir lidnar. Løgfrøðiligu karmarnir rundan um tað gomlu høvuðsvinnuna, vóru tillagaðir til tað nýggja fiskivinnusamfelagið.




Á ólavsøku 1932 vildi tingformaðurin Johan Poulsen ikki flagga við føroyskum flaggi á Tinghúsvøllinum, men læt gera ein reyðan vimpul at vinda á stongina. Á vimplinum stóð „Løgtingið“ í hvítum stavum. Henda myndin er frá 1937, tá Kristian X hevði verið kongur í 25 ár. Í samband við hátíðarhaldið varð ein ljóssúla reist vestanfyri løgtingshúsið.

Jóannes Patursson var alt annað enn nøgdur við, at sjálvstýrismenn høvdu atkvøtt fyri hesum uppskoti, sum beinleiðis fór at ganga út yvir áhugamál hjá kongsbóndunum. Landbúnaðarlóggávan í 1938 var ikki einasta grundin til ósemjuna í Sjálvstýrisflokkinum, men við henni komu gomlu ósemjurnar í flokkinum, sum vóru vorðnar størri í tíðini aftaná 1. veraldarbardaga, í hæddina. Úrslitið varð, at Jóannes Patursson og nakrir sjálvstýrismenn tóku seg burtur úr Sjálvstýrisflokkinum í 1938.

Í 1936 høvdu menninir aftanfyri Sjóvinnubankan sett Vinnuflokkin á stovn, og sama árið kom flokkurin á ting við 2 løgtingsumboðum. Meðan Javnaðarflokkurin umboðaði verkamannafjøldina í tí nýggja ídnaðarsamfelagnum, so umboðaði

Vinnuflokkurin sjálva vinnuna og arbeiðsgevarasíðuna. Í sjálvstýrispolitikkinum førdi Vinnuflokkurin sjónarmiðini hjá Føroya Framburðsfelag víðari. Staðfest var í stevnuskránni, at „*Løgtingið má fáa meira ræði í Føroyskum málum, og má tað skjótast vera tingað við statin um hetta*". Jóannes Patursson gjørdi valsamgongu við Vinnuflokkin í 1938, eftir at hann hevði tikið seg úr Sjálvstýrisflokkinum. Árið eftir fekk flokkurin nýggja stevnuskrá, har sjálvstýriskrøvini vóru herd í tráð við sjónarmiðini hjá Jóannesi Patursson í „Færøsk Selvstyre" frá 1930. Grein 1 ásetti, at „*Fyri føroyingar sum eitt serstakt fólk krevja vit uppgerð Føroya-Danmarkar millum fyri at fáa í lag eitt nýtt stýrislag*". Í teimum samráðingunum við danir, sum lagt varð upp til, skuldu øll mál Danmarkar og Føroya millum takast upp, og arbeiðast skuldi í fyrsta lagi fyri at „*Sáttmáli verður gjørdur um at byggja land okkara upp sambært onnur lond*", og í øðrum lagi at „*Føroya Løgting verður skipað á sama grundarlagi sum onnur norðurlanda ting*". Løgtingið skuldi hava rætt til at samráðast við onnur lond, og Gráa Bók við fylgiskjølum skuldi verða sett úr gildi aftur.

Meiriluti var ikki í Løgtinginum fyri at avtaka landbúnaðarlóggávuna, men hinvegin var tað eftir valið í 1936 stórur meiriluti fyri at avtaka grein 7 í skúlalógini. Javnaðarflokkurin, sum í 1936 fekk eitt avbera gott val og økti talið av løgtingsumboðum úr 2 til 6, hevði sama árið fingið nýggja stevnuskrá, har tað varð staðfest, at føroyskt mál skuldi hava „*fullan rætt í øllum føri*", og Løgtingið skuldi fáa „*ræði í øllum serstøkum føroyskum viðurskiftum*". Saman við Vinnuflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum hevði Javnaðarflokkurin stóran meiriluta í Løgtinginum, og hesir flokkar samtyktu eftir valið í 1936 við 16 atkvøðum at avtaka grein 7 í skúlalógini. Einans teir 8 sambandsmenninir atkvøddu ímóti. Aftaná løgtingsvalið í 1918, tá Sjálvstýrisflokkurin hevði tepran meiriluta í Løgtinginum, men ikki millum veljararnar, hevði Ríkisdagurin vrakað fleiri líknandi tilmæli, men í 1936 var talan um eitt so greitt tilmæli, at Ríkisdagurin ikki kundi síggja burtur frá tí. Løgtingssamtyktin varð staðfest av Ríkisdegnum í 1938.[324] Harvið var tann av sjálvstýrisfólki illa dámda grein 7 í skúlalógini farin í søguna.

Tær ringastu avleiðingarnar av búskaparkreppuni vóru av móti endanum av 1930-unum, og teir sjálvstýrissinnaðu flokk-




Tingmanningin 1936.

arnir høvdu partvíst av teirri grund fingið greiðan meiriluta í Løgtinginum. Sjálvstýrishugsjónin hevði fingið eitt veruligt politiskt grundarlag í Løgtinginum, sum Sambandsflokkurin ikki megnaði at byrgja upp fyri, soleiðis sum flokkurin ofta hevði gjørt fyrr. Tíðin aftaná valið í 1936 vísti, at vóru føroyingar samdir, so kundi nógv fáast ígjøgnum Ríkisdagin, sum bar á sjálvstýrisleið, men tómar tjóðskaparligar hóttanir, sum ikki grundaðu seg á ein greiðan meiriluta í fólkinum ella Løgtinginum, høvdu ikki stóran møguleika fyri at verða samtyktar av Ríkisdegnum. Í 1936 misti Sambandsflokkurin endaliga meirilutan í Løgtinginum og millum føroysku veljararnar, og fortreytirnar fyri sjálvstýrispolitikki í Løgtinginum vóru fullkomuliga broyttar.

Í 1939 stovnaðu Jóannes Patursson og menninir aftanfyri Vinnuflokkin ein nýggjan flokk, Fólkaflokkin, ið eisini hevði vinnupolitikkin raðfestan ovarliga. Fólkaflokkurin førdi sjónar-

miðini hjá Vinnuflokkinum viðvíkjandi sjálvstýrispolitikkinum og Løgtingsins heimildum víðari í stevnuskrá síni frá 1940. Í sjálvstýrisspurninginum gjørdist Fólkaflokkurin tann mest víðgongdi í Løgtinginum. Jóannes Patursson, formaðurin í flokkinum, var beinleiðis loysingarmaður, men so víðgongdir vóru ikki allir í flokkinum. Teir flestu, harímillum næstformaðurin Thorstein Petersen, meintu, at sáttmáli skuldi gerast millum Danmark og Føroyar, har staðfest varð, hvørji málsøki vóru felags. Hetta samsvaraði við stevnumiðini hjá Vinnuflokkinum, sum nú fór í søguna.

Samanumtikið kann sigast, at í tíðarskeiðinum frá 1906 til 1940 hendu ikki tær stóru broytingarnar í heimildum Løgtingsins, men fólkaræðisligu broytingarnar í løgtingslógini, sum vóru framdar í 1923, vóru formligu fortreytirnar fyri, at eitt fjøltáttað politiskt lív kundi mennast í Føroyum, sum umboðaði nærum allar bólkar í føroyska samfelagnum. Stórar fólkaræðisligar nýskipanir vóru framdar, sum í sjálvum sær styrktu um myndugleika Løgtingsins, og fyrisitingarliga styrktist Løgtingið nógv, tá Landsnevndin og Løgtingsskrivstovan vóru settar á stovn í ávíkavist 1928 og 1935. Føroyskur politikkur, sum síðan 1906 einans hevði snúð seg um samband ella sjálvstýri, var eisini farin at snúgva seg um vinstra og høgra. Tann politiska floksskipanin, sum framvegis eyðkennir føroyskan politik, var um at verða stovnsett, tá komið varð fram móti endanum av tíðarskeiðinum frá 1906 til 1940. Hartil kom, at sjálvstýrisstríðið, sum hevði røtur aftur til 1906, hevði ment seg so mikið nógv í hesum tíðarskeiðinum, at tá komið varð móti endanum av 1930-unum, kundi løgtingslógin frá 1923, sum einans gav Løgtinginum ráðgevandi myndugleika, ikki longur rúma politiska lívinum í Føroyum. Tað hugsjónarliga tjóðskaparstríðið, sum at byrja við ikki altíð hevði nakað veruligt innihald, fekk móti endanum av tíðarskeiðinum eitt veruligt politiskt grundarlag í Løgtinginum. Sambandsflokkurin hevði ikki longur einsamallur meirilutan í Løgtinginum, – tað hevði Sjálvstýrisflokkurin heldur ikki – men bæði Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin fluttu alt sjálvstýriskjakið í Føroyum longur út ímóti sjálvstýrissíðuni. Hendan broyting í føroyskum politikki sæst eisini av, at stórir tjóðskaparligir sigrar hóast alt vóru vunnir í tíðarskeiðinum. Týdningarmiklast var, at føroyska málið í 1938 hevði vunnið



Tingmenn avmyndaðir uttanfyri tinghúsið í 1939. Aftast frá vinstru eru teir: Hilbert, amtmaður, M.A. Jacobsen (sj), Andreas Andreasen (sb) og Hans Nolsøe (sj). 2. rað: Joen Simon Heinesen (jv), Johan Danbjørg (jv), J.P. Henriksen (jv), S.P. Zachariassen (sj) og Edw. Mitens (sj). 3. rað: Andras Samuelsen (sb), Kristian Djurhuus (sb), Jóhan Petur Davidsen (jv) og Johan Kalsoy (sj). Fremsta rað frá vinstru: Ole Fr. Joensen (sb), Petur Mohr Dam (jv), Johan Poulsen (sb), Jacob Nielsen (jv), Sámal Ellefsen (ff), Jógvan Rasmussen (sb), Jóannes Patursson (sj), Poul Niclasen (sb), Gunnar Winther (sj) og Hans Iversen (sb).

nakrar greiðar fyrimunir, tá grein 7 varð avtikin. Í málspurninginum hevði sjálvstýrisrørslan vunnið ein fullkomnan sigur á Sambandsflokkinum, sum longu í stevnuskránni frá 1916 noyddist at orða ein føroyskan málpolitik.

Fyrr ella seinni fór tað at gerast neyðugt at fremja broytingar í løgtingslógini, sum víðkaðu um heimildir Løgtingsins. Ríkismyndugleikarnir vóru framvegis ímóti at geva Løgtinginum størri heimildir, men aftaná løgtingsvalið í 1936 var meiriluti í Løgtinginum fyri at fremja tílíkar broytingar. Búskaparligu fortreytirnar í Føroyum fyri at taka við størri ábyrgd av landsins stýri vóru kortini ikki av teimum bestu. Hóast búskaparkreppan

stórt sæð var av í 1939, so var føroyska útflutningsvirðið framvegis lægri, enn tað hevði verið í 1934.[325] Men sum so ofta fyrr í søgu Løgtingsins vóru tað stórpolitiskar hendingar uttanfyri føroysku landoddarnar, sum komu at leggja lunnar undir broytingar í stjórnarskipan Føroya.



V

# *Løgtingið fær avmarkað lóggávuvald – 1940–1948*



## Eitt ríki – tvær hersetingar

Tá 2. veraldarbardagi brast á tann 1. september 1939, eftir at Týskland hevði gjørt innrás í Pólland, var politiska lívið í Føroyum ment nógv. Um ár 1900 snúði føroyskur politikkur seg í høvuðsheitum um tætt tilknýti at ella størri sjálvstýri í danska ríkinum, sum ein lítil partur av mannfólkunum hevði møguleika fyri at taka lut í. Í 1939 var eitt fjølbroytt politiskt lív ment í Føroyum, við einum burturav fólkavaldum Løgtingi sum grundarlagi, ið allir íbúgvar frá 25 ára aldri kundu taka lut í. Á lóggávuøkinum var Løgtingið framvegis ein ráðgevandi stovnur, sum umboðaði føroyska fólkið mótvegis donsku ríkismyndugleikunum, men bæði fólkaræðisliga og fyrisitingarliga var Løgtingið í 1939 ein stovnur, sum var nógv sterkari enn í 1906.

At byrja við var hvørki í Danmark ella í Løgtinginum meiriluti fyri, at Løgtingið skuldi hava størri heimildir á lóggávuøkinum, sjálvt um hetta var nakað, sum Sjálvstýrisflokkurin hevði havt uppskot frammi um longu í 1915. Hinvegin var tað við at gerast greitt, tá komið varð móti miðjuni av 1920-unum, at karmarnir í nýggju løgtingslógini frá 1923 longu vóru um at gerast ov trongir til tess at rúma politiska lívinum í Føroyum. Noregsmálið og Flaggstríðið í ávíkavist 1923 og 1930 vóru ítøkilig dømi um hetta. Gongdin í báðum málunum vísti kortini, at sjálvstýrisrørslan politiskt sæð var veik, sjálvt um hugsjónirnar vóru markantar.

Í sjálvstýrispolitikkinum vóru broytingar kortini á veg í Løgtinginum, tá komið varð móti endanum av 20-unum. Nýggir flokkar, Javnaðarflokkurin, Vinnuflokkurin og Fólkaflokkurin, vóru settir á stovn í tíðarbilinum frá 1925 til 1939, sum kravdu lóggevandi hemildir til Løgtingið. Hartil kom, at í 1936 var Vinnuflokkurin, sum beinleiðis setti spurnartekin við ríkiseindina, umboðaður í Løgtinginum við 2 umboðum, og aftaná løgtingsvalið tann 30. januar 1940 fekk Fólkaflokkurin, sum førdi sjónarmið Vinnufloksins víðari, heili

25,5% av atkvøðunum og 6 løgtingsumboð. Frá 1936 til 1940 mentist føroyskur sjálvstýrispolitikkur so mikið nógv, at hann ikki longur einans snúði seg um, *hvussu* stórt sjálvstýri Føroyar skuldu hava í Danmarkar ríki, men spurningurin var hartil, *um* Føroyar yvirhøvur skuldu vera ein partur av Danmarkar ríki. Tað nýggja var, at partar av sjálvstýrisrørsluni settu spurnartekin við ríkiseindina í seinnu helvt av tríatiarunum, og í 1940 var sjónarmið Fólkafloksins á økinum væl umboðað í Løgtinginum.

Meiriluti var kortini langt frá í Løgtinginum fyri at loysa oyggjarnar úr ríkisfelagsskapinum, men greiður meiriluti var í 1940 fyri, at Løgtingið skuldi hava størri heimildir í føroyskum viðurskiftum. Umframt Fólkaflokkin høvdu Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin sum mál í stevnuskráum sínum, at Løgtingið skuldi hava ræði á *serstøkum føroyskum viðurskiftum*, men sambært teimum báðum seinast nevndu flokkunum skuldi hetta gerast, uttan at spurnartekin varð sett við ríkiseindina. Eftir løgtingsvalið tann 30. januar 1940 høvdu hesir 3 flokkarnir meirilutan í Løgtinginum. Fólkaflokkurin hevði sum nevnt fingið 6 løgtingsumboð, Javnaðarflokkurin varðveitti síni 6, meðan Sjálvstýrisflokkurin misti helvtina av sínum 8 umboðum og hevði 4. Flokkar, ið ynsktu at víðka um heimildir Løgtingsins, høvdu sostatt 16 av teimum 24 løgtingsumboðunum aftaná valið í 1940. Sambandsflokkurin var framvegis størsti flokkur í Løgtinginum við 8 umboðum, men flokkurin stóð einsamallur við sínum sjónarmiðum. Aftaná løgtingsvalið í januar 1940 var tað frá føroyskari síðu greitt lagt upp til, at broytingar áttu at verða framdar í løgtingslógini, sum í øllum førum góvu Løgtinginum ræði á serstøkum føroyskum viðurskiftum.

### Danmark verður hersett

Broytingar skuldu skjótt henda viðvíkjandi heimildum Løgtingsins, men tað vóru hvørki ríkismyndugleikarnir ella meirilutin í Løgtinginum, sum birtu upp undir broytingarnar. Stórpolitiskar hendingar í apríl mánaði í 1940, sum hvørki donsku ríkismyndugleikarnir ella meirilutin í Løgtinginum høvdu nakra ávirkan á, komu at fáa avgerandi týdning fyri, hvussu viðurskiftini millum Danmark og Føroyar fóru at laga seg í tíðini aftaná 1940.



Tá týskarar hersettu Danmark, var flogvøllurin í Ålborg eitt tað fyrsta, teir tóku.

Ta fyrstu tíðina, aftaná at 2. veraldarbardagi var brostin á í september í 1939, valdaði aftur friður í nakrar mánaðir, men tann 9. apríl 1940 gjørdi týski herurin innrás í Danmark, sum eftir bardagar í nakrar tímar gav seg yvir. Harvið varð alt samband millum Danmark og Føroyar kvett. Í Føroyum gjørdist tað greitt alt fyri eitt, at tann í seinnu helvt av 30-unum nógv styrkta sjálvstýrisrørslan ætlaði at brúka týsku hersetingina av Danmark til tess at vinna Løgtinginum størri heimildir.

Longu frá fyrsta dagi var ósemja millum amtmannin Carl Aage Hilbert, sum hevði sitið í embætinum síðan 1936, og meirilutan í Løgtinginum. Tá amtmaðurin dagin eftir donsku hersetingina tann 10. apríl 1940 skuldi senda eina yvirlýsing út til Føroya fólk, sum viðvíkti fyrisitingini av oyggjunum, meðan kríggj leikaði á, fekk hann ikki Løgtingsins góðkenning av yvirlýsingini. Løgtingið ynskti nakrar broytingar í yvirlýsingini, sum vildu havt við sær, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark ikki fyltu so nógv, men hetta kundi amtmaðurin ikki góðtaka. Endin varð, at amtmaðurin sendi sína uppruna-ligu orðing gjøgnum Tórshavnar Radio tann 10. apríl uttan

Løgtingsins góðkenning.[326] Í yvirlýsingini gjørdi Hilbert amtmaður greitt, at danska stjórnin og amtið fóru at gera alt, sum til bar, til tess at tryggja Føroya land og fólk, „*der ikke på nogen måde er undergivet tysk myndighed*“ móti krígsins ólukkum. Sambært yvirlýsingini hjá Hilbert vóru Føroyar ikki umfataðar av donsku yvirgevingini til Týskland, og oyggjarnar skuldu framvegis stjórnast av „*Færøernes lovlige repræsentanter, nemlig lagtinget og amtet ...*“.[327] Tað var týðuligt, at tað var lagt upp til stríð millum amtmannin og stórar partar av Løgtinginum, um hvør hevði ræði í Føroyum, nú Danmark var hersett.

Fyrsta beinleiðis álopið á myndugleika amtmansins kom frá Fólkaflokkinum, tí mest víðgongda sjálvstýrisflokkinum. Longu sama dag, sum amtmaðurin sendi sína yvirlýsing til Føroya fólk, staðfesti Fólkaflokkurin, at tá Danmarkar ríki við týsku hersetingini var hildið uppat við at vera til og ikki longur megnaði at hevda yvirvaldsrættin í Føroyum, var hesin myndugleiki fallin aftur til føroyska fólkið. Sambært Fólkaflokkinum skuldi Løgtingið taka við *øllum* heimildum, sum donsku ríkismyndugleikarnir høvdu havt í Føroyum, og seta á stovn sjálvstøðugt føroyskt ríki. Var hetta ikki hent innan klokkan 18 sama dag, hótti flokkurin við at seta neyðug tiltøk í verk.

Hóast Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin eisini ynsktu størri heimildir til Løgtingið, so vildu teir ikki taka eitt so víðgongt stig, sum Fólkaflokkurin legði upp til. Saman við Sambandsflokkinum høvdu hesir báðir flokkarnir 18 av teimum 24 løgtingsumboðunum. Ætlanir Fólkafloksins at stovnseta eitt føroyskt ríki við Løgtinginum sum hægsta lóggevandi myndugleika vóru tí av ongum á hesum sinni, tí saman við Sambandsflokkinum atkvøddu Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin ímóti uppskoti Fólkafloksins, ið sostatt fall við 6 atkvøðum fyri og 14 ímóti.

**Føroyar verða hersettar**

Tann 11. apríl fingu føroyingar kunnleika til eina talu, sum bretski flotamálaráðharrin Winston Churchill helt í bretska Undirhúsinum henda sama dagin. Í røðuni segði Churchill millum annað: „*We are … at this moment occupying the Faroe Islands, which belong to Denmark and which are a strategic point of high importance, and whose people showed every disposition to receive*

*us with warm regard. We shall shield the Faroe Islands from all the severities of war and establish ourselves there conveniently by sea and air until the moment comes when they will be handed back to the Crown and people af a Denmark liberated from the foul thraldom in which they have been plunged by the German aggression*".[328] Føroyar vóru sostatt drignar inn í kríggið, tí tær vóru týdningarmiklar fyri verjuna av bretskum áhugamálum í Norðuratlantshavinum. Týdningarmikið er eisini at leggja til merkis, at Churchill staðfesti, at bretar høvdu í hyggju at lata oyggjarnar aftur til Danmark, tá kríggið var av.

Tann 13. apríl komu tey fyrstu bretsku herskipini og teir fyrstu hermenninir til Føroya. Sama dag staðfesti Løgtingið, at Føroyar skuldu verða uttanveltaðar og haldast uttanfyri allar hernaðarsamgongur. Samstundis sendi Løgtingið eitt formligt mótmæli móti hersetingini til tann einans 26 ára gamla bretska konsulin Frederic Mason, sum var komin til Føroya við skipi sama dag. Løgtingið skrivaði m.a., at „*Tinget ... gør Indsigelse imod, at andet, om end venligtsindet Rige, landsætter Soldater, men tvingende Omstændigheder bevirker, at intet andet Valg er. Færøernes Lagting, som gennem Aarhundreder og under skiftende Forhold har repræsenteret Færøerne med Hjemmel i skrevne og uskrevne Love, forudsætter og ønsker, at intet ændres Færøerne vedkommende uden Forhandling med Tinget*". Sum sæst, var mótmæli Løgtingsins av formligum slag, tí í veruleikanum góðtók Løgtingið bretsku hertøkuna, treytað av at broytingar ikki hendu viðvíkjandi fyrisitingini av Føroyum uttan samráðingar við Løgtingið.

Harvið vóru Danmark og Føroyar hersettar av hvør sínari síðu í veraldarbardaganum, og alt stjórnarligt, búskaparligt og politiskt samband ríkispartanna millum varð í veruleikanum kvett. Undir 1. veraldarbardaga vóru Danmark og Føroyar partvíst avbyrgd frá hvørjum øðrum á samferðsluøkinum orsakað av hernaðarligu atgerðunum hjá teimum stríðandi pørtunum, men stjórnarliga sambandið millum ríkispartarnar var ikki stórvegis órógvað, tí hvørki av londunum kom beinleiðis undir fremmant vald, meðan kríggið leikaði á. Undir 2. veraldarbardaga var øðrvísi, tí í apríl 1940 vóru bæði Danmark og Føroyar beinleiðis drigin inn í kríggið stórveldanna millum, tá londini vóru hersett av ymiskum stórveldum, sum stríddust ímóti hvørjum øðrum. Harvið var ikki einans samferðslan



Fyrstu bretsku hermenninir koma í land í Havn. Teir komu við einum vápnaðum trolara og hildu seg vera komnar til Noregs.

ríkispartanna millum vorðin trupul, men londini vóru, ímóti sínum vilja, skilmarkað sum fíggindar hjá hvørjum øðrum. Einki stjórnarligt samband av nøkrum formligum slag kundi tí verða millum Danmark og Føroyar, so leingi sum kríggið herjaði.

Tað var greitt, at meðan politiski meirilutin í Føroyum *ynskti* at fremja ávísar broytingar í Løgtingsins heimildum, so gjørdu stórpolitisku viðurskiftini tað beinleiðis *neyðugt* at fremja ávísar broytingar í innlendis fyrisitingini av oyggjunum. Churchill hevði longu tann 11. apríl sagt, at Føroyar skuldu latast aftur til eitt frælst Danmark, tá kríggið var av. Hetta kundi neyvan skiljast á annan hátt, enn at bretar helst ikki vildu hava, at ríkisrættarligu viðurskifti Føroya vóru broytt, meðan kríggj var, men spurningurin var, hvørja støðu bretska hersetingarvaldið hevði til spurningin um, hvørjar broytingar kundu fremjast í innlendis fyrisitingini av oyggjunum – tvs. viðvíkjandi møguligum broytingum av skipan og heimildum Løgtingsins, sum løgtingsmeirilutin hevði í hyggju at fáa framt.

Longu tann 14. apríl kom fyrsta ábendingin um, hvussu

bretar skiltu hendan spurningin, tá Mason svaraði uppá formliga mótmæli Løgtingsins frá 13. apríl. Í brævinum frá Mason stóð m.a: „*Det er at forudse, at de forholdsregler, som Hans Majestæts Styrker har taget for at varetage Færøernes Sikkerhed og Beskyttelse, blot vil medføre et Minimum af Forstyrrelse i Øernes normale Liv og ingen Indskrænkning i deres indenlandske Administration*“.[329] Tað kundi ikki sleppast undan, at bretska hersetingin fór at ávirka lívið í oyggjunum, men bretar vildu helst sleppa undan at leggja seg út í *innlendis* viðurskifti í oyggjunum. Við hesum varð greitt, at *uttanríkispolitiskt* og *verjupolitiskt* høvdu bretar tikið ræðið í Føroyum, so leingi sum kríggj var, men spurningurin var, hvussu boðini hjá Mason um, at bretar ikki fóru at leggja seg út í innlendis viðurskifti í oyggjunum, skuldu skiljast. Hesin spurningurin var ikki greitt svaraður av bretum tann 14. apríl, og hann skuldi koma at skapa órógv í Løgtinginum, serstakliga millum fólkafloksmenn, í tíðini eftir hersetingina.

**Beinleiðis avleiðingar av hersetingunum í Føroyum**

Stórpolitiski veruleikin í Norðureuropa fekk ta avleiðing, at Danmark – sum Fólkaflokkurin longu tann 10. apríl hevði staðfest – ikki megnaði at røkja sínar skyldur mótvegis Føroyum, so leingi sum landið var hersett av Týsklandi. Danmark hevði t.d. skyldu til at rinda 500.000 krónur árliga til Føroya í 5 ár sambært ætlanini frá 1939. Aðrar peningaligar skyldur mótvegis Føroyum hevði ríkiskassin eisini; tilsamans var talan um góðar 2 milliónir krónur árliga.[330] Hendan pening kundi ríkiskassin ikki gjalda til Føroya, sum umstøðurnar vóru.

Í fyrsta umfari eydnaðist tað amtmanninum at fáa pening til vega gjøgnum ymiskar peningastovnar, t.d. Føroya Banka, men longu seinast í apríl 1940 fór ein føroysk sendinevnd til London at samráðast um hesi viðurskifti.[331] Í samstarvi við donsku sendistovuna í London varð avrátt, at bretar skuldu røkja peningaligu skyldurnar hjá danska ríkinum í Føroyum, til kríggið var av. Skuld, sum danski staturin hevði til einstaklingar í Føroyum, skuldi „clearast“ yvir eina konto í Føroya Banka. Hartil játtaðu bretar at veita tann stuðul til føroysku fiskivinnuna, sum danski staturin frammanundan hevði latið. Tilsaman var talan um umleið 2,5 milliónir krónur árliga.

Ein annar peningaligur trupulleiki var, at donsku peninga-

seðlarnir, sum føroyingar higartil høvdu brúkt, einans kundu nýtast í týskt hersettum øki aftaná apríl 1940, meðan sterling pund varð gjørt til einasta lógliga fremmanda gjaldoyrað í Føroyum. Hetta hevði við sær, at peningaligu viðurskiftini í oyggjunum máttu skipast av nýggjum. At byrja við vóru yvirstemplaðir danskir peningaseðlar brúktir í Føroyum, men seinni – tá hesir fóru at slítast og ganga undan – gjørdist tað neyðugt at prenta serstakar føroyskar peningaseðlar í London, sum vóru knýttir at einum føstum kursvirði til pundið. Hesir pengaseðlar, ið ikki høvdu sama virði sum donsku seðlarnir, vóru brúktir í Føroyum restina av krígnum.

Tær báðar hersetingarnar av Danmarkar ríki gjørdu tað eisini trupult at varðveita eindarflaggið Dannebrog sum felags fyri ríkið. Donsku ríkismyndugleikarnir høvdu ongantíð viðurkent føroyska flaggið, men teir høvdu hildið uppá, at Danmark var ein eindarstatur við einum felags flaggi – Dannebrog. Hetta sjónarmiðið hjá ríkismyndugleikunum kom beinleiðis í stríð við sjónarmiðini hjá sjálvstýrisrørsluni í 1930 í Íslandi, tá danir kravdu, at føroyska flaggið varð tikið niður (sí s. 206). Aftaná apríl 1940 vóru tað hvørki donsk forboð ella føroysk krøv, men stórpolitisku viðurskiftini, sum komu at avgera lagnuna hjá føroyska flagginum. Tað var greitt, at føroysk skip ikki kundu sigla við donskum flaggi, meðan kríggið leikaði á, tí tá var vandi fyri, at tey fóru at vera mett sum fíggindaskip, komu tey inn í bretskt – tvs. eisini føroyskt – farvatn. Neyðugt var at kunna skilja ímillum donsk skip, sum vóru undir týskum yvirvaldi, og føroysk skip, sum vóru uttanveltaði.

Hetta gjørdist greitt longu tann 9. apríl 1940, sama dag sum Týskland leyp á Danmark, tá sluppin Eysturoy, sum var á veg til Aberdeen, varð steðgað av einum bretskum herflotaskipi. Skiparin á Eysturoynni varð biðin um at taka danska flaggið niður, og spurt varð, um Eysturoyggin ikki hevði nakað annað flagg umborð, ið kundi brúkast. Manningin á Eysturoynni bar skjótt at og vant eitt føroyskt flagg á stong, sum teir høvdu umborð. Við føroyska flagginum vundið á stong kom Eysturoyggin til Aberdeen. Fleiri onnur føroysk skip lógu við bryggju í Aberdeen, og alt fyri eitt fylgdu hesi skip Eysturoynni og vundu Merkið á stong.

Tað fyrsta av skipunum úr Aberdeen kom aftur til Føroya tann 21. apríl við Merkinum vundnum á stong. Hilbert amt-

maður royndi at forða fyri, at føroyska flaggið skuldi fáa viðurkenning á hendan hátt; hann skeyt upp, at føroysk skip skuldu sigla við einum grønum flaggi sum frámerki. Stórar mótmælisgongur, ið vóru stuðlaðar av Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum, vóru í Tórshavn ímóti ætlanum amtmansins. Endin varð, at Hilbert legði ábyrgdina frá sær og segði, at hann vildi loyva føroyskum skipum at sigla undir føroyskum flaggi, um so var, at krav kom um hetta frá bretum. Bretska kravið kom tann 25. apríl 1940, men víst varð greitt til, at talan kundi einans verða um at brúka føroyska flaggið á sjónum.[332] Tveir dagar seinni, tann 27. apríl, undirskrivaði amtmaðurin eina fyriskipan, ið segði, at føroyska flaggið skuldi brúkast á sjónum, meðan Dannebrog framvegis skuldi vera flaggið á landi.[333]

Avgerðin hjá bretum um at lata føroysk skip sigla við føroyskum flaggi varð ikki tikin av tjóðskaparligum grundum, men hon var grundað á praktiskar trupulleikar, sum tóku seg upp av krígsávum. Tað var kortini greitt, at bretska avgerðin fór at fáa tjóðskaparligar avleiðingar í Føroyum, tí talan var í veruleikanum um ein stóran tjóðskaparligan sigur hjá sjálvstýrisflokkunum í Løgtinginum. Tað stríð fyri føroyska flagginum, sum byrjaði at taka seg upp longu í 1919, men sum ikki



Trolarin Nýggjaberg heysaði av sínum eintingum føroyskt flagg longu 9. apríl.

kom í hæddina fyrr enn í 1930, var nú stórt sæð vunnið av sjálvstýrisrørsluni.

Tað kundi tí roknast við, at bretska avgerðin fór at geva amtmanninum trupulleikar við sjálvstýriskreftunum í Løgtinginum, tí avgerðin kundi tulkast á tann hátt, at bretar stuðlaðu meirilutanum í Løgtinginum ímóti amtmanninum. Boðini frá bretum til føroyingar í døgunum frammanundan vóru sum nevnt heldur ikki heilt greið. Meðan Churchill tann 11. apríl hevði sagt, at oyggjarnar: „*will be handed back to the Crown and people af a Denmark liberated from the foul thraldom in which they have been plunged by the German aggression*“, so hevði Mason tann 14. apríl sagt, at bretska hersetingin: „*blot vil medføre et Minimum af Forstyrrelse i Øernes normale Liv og ingen Indskrænkning i deres indenlandske Administration*“, sum tað fór at verða neyðugt at fremja ávísar broytingar í, nú alt samband við danska ríkisstýrið var kvett.

Spurningurin, sum sjálvstýrisvongurin í Løgtinginum setti sær, var tí, um hetta merkti, at meðan bretar fóru at seta seg upp ímóti, at oyggjarnar beinleiðis loystu frá Danmark, meðan kríggj var, so fóru bretar ikki at leggja seg út í møguligar føroyskar royndir, sum miðaðu ímóti at økja um Løgtingsins heimildir, soleiðis at amtmaðurin ikki longur hevði nakað vald yvir Løgtinginum. Tann fyrsta royndin hjá Fólkaflokkinum at fremja tílíkar broytingar var miseyðnað, tí *løgtingsmeirilutin* setti seg upp ímóti henni, men spurningurin var, um *hersetingarvaldið* fór at seta seg upp ímóti eini líknandi roynd, um so var, at løgtingsmeirilutin stóð aftanfyri. Flaggmálið kundi tulkast á tann hátt, at teir ikki fóru at seta seg upp ímóti løgtingsmeirilutanum, hóast amtmaðurin hevði aðra áskoðan enn løgtingsmeirilutin. Hesin spurningurin var ikki aktuellur í 1940, tá meiriluti ikki var í Løgtinginum fyri at fremja tílíkar broytingar, men tað kundi hugsast, at Fólkaflokkurin fór at royna aftur seinni.

## Stjórnarskipan Føroya frá 1940-1948

Sum nevnt legði Fólkaflokkurin longu sama dag, sum Danmark varð hersett tann 9. apríl 1940, uppskot fyri Løgtingið, sum miðaði ímóti, at Løgtingið skuldi yvirtaka allar heimildir í Føroyum, men uppskotið fall, tí eingin av hinum flokkunum

í Løgtinginum, Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, tóku undir við tí. Hesir 3 flokkarnir vóru, hóast ósemjur við amtmannin, samdir við honum í, at eitt stýri skuldi setast í Føroyum, sum ikki loysti Føroyar frá øllum bindingum til Danmark. Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin vóru kortini samdir við Fólkaflokkinum í, at teir ynsktu lóggevandi heimildir til Løgtingið.

Helst hevur tað havt týdning fyri støðutakanina hjá Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum til uppskot Fólkafloksins, at bretar vóru samdir við amtmanninum í tí, sum hann hevði sagt longu tann 10. apríl 1940: at Føroyar framvegis skuldu stjórnast av „*Færøernes lovlige repræsentanter, nemlig lagtinget og amtet ...*“. Hetta framgekk beinleiðis av einum kunnandi brævi frá amtinum til Løgtingið tann 3. mai 1940, har tað varð upplýst, „*at det i det hele taget er den britiske regerings ønske, at øerne fortsat skal administreres af amtmanden i samarbejde med lagtinget*“.[334] Tað var sostatt einki, sum bendi á, at bretar, sum høvdu tað veruliga valdið í Føroyum, fóru at gera tað møguligt hjá Løgtinginum at seta amtmannin uttanfyri alla *innlendis* fyrisitingarliga ávirkan, soleiðis sum boðskapurin í brævinum frá Mason til Løgtingið tann 14. apríl *kundi* tulkast. Amtmaðurin kundi tvørturímóti rokna við at verða stuðlaður av bretska hersetingarvaldinum, um so var, at Løgtingið hevði ætlanir um at seta hann frá valdinum. Viðurkenningin av føroyska flagginum tann 25. apríl 1940 var eitt undantak frá hesum politikki, sum krígsumstøðurnar høvdu gjørt neyðugt.

### „Midlertidig Styrelsesordning“ frá 9. mai 1940

Spurningurin var einans, hvussu fast bretar fóru at halda um samstarvspolitikkin millum Løgtingið og amtmannin, tí tað var eyðsæð, at broytingar máttu fremjast í stjórnarskipan Føroya, nú alt samband við donsku ríkismyndugleikarnar varð kvett.

Sjálvstýrisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, sum høvdu 18 løgtingsumboð, valdu í øllum førum, meir ella minni sjálvbodnir og partvíst undir ávirkan av stórpolitiska veruleikanum, at samstarva við amtmannin um eina nýggja skipan av politisku viðurskiftunum í Føroyum. Fólkaflokkurin vildi ikki ganga undir hesar treytir, hóast boðskapurin frá bretum var vorðin greiðari, men hetta hevði ikki tann stóra



Eitt flogfar av slagnum Sunderland flýgur framvið løgtingshúsinum.

týdning, tí við sínum 6 løgtingsumboðum stóð flokkurin einsamallur við sínum sjónarmiðum. Bólturin lá hjá hinum trimum flokkunum.

Longu tann 20. apríl 1940 hevði skrivstovustjóri Løgtingsins, Edward Mitens, tilevnað eitt uppskot til stjórnarskipan, sum samsvaraði við áskoðanirnar hjá meirilutanum í Landsnevnd Løgtingsins. Sambært grein 1 í hesum uppskoti skuldi galdandi lóggáva, fyriskipanir og rættarreglur vera verandi í gildi í so stóran mun sum eftir umstøðunum gjørligt. Grein 1 miðaði sostatt ímóti at varðveita sum mest av galdandi lóggávu í oyggjunum, men grein 2 staðfesti, at tað útinnandi valdið, sum hevði ligið hjá stjórnini, skuldi leggjast til amtmannin. Harvið hevði alt tað útinnandi valdið í oyggjunum komið at ligið hjá amtmanninum og ikki einans partar av tí, soleiðis sum tað hevði verið frammanundan. Vald amtmansins á tí útinnandi økinum í Føroyum skuldi kortini verða avmarkað á tann hátt, „*at anordninger og bekendtgørelser skal godkendes af den udvidede Landsnevnd*“. Í teirri týðandi grein 3 stóð stutt og greitt, at „*Den lovgivende myndighed udøves af lagtinget og amtmanden i forening*“. Tað framgekk ikki greitt av hesi grein, hvussu orðingin „i forening“ skuldi skiljast, men helst skuldi

hetta skiljast á tann hátt, at bæði amtmaðurin og Løgtingið høvdu sýtingarrætt á lóggávuøkinum. Dómsvaldið skuldi vera hjá sorinskrivaranum, stóð í grein 4, men ein appeldómstólur skuldi eisini setast á stovn, har amtmaðurin og 2 av Løgtinginum valdir løgfrøðingar skuldu hava sæti.[335] Aðrar greinar enn hesar 4 vóru ikki í uppskoti Mitens.

Amtmaðurin kundi ikki góðtaka allar orðingarnar í uppskoti Mitens, og tí var teksturin nakað broyttur, áðrenn hann tann 9. mai 1940 varð samtyktur av Løgtinginum undir navninum „Midlertidig Styrelsesordning".[336] Einans 5 greinar vóru í stjórnarskipanini, – 1 grein meir enn í uppskotinum hjá Mitens – og hon var týðuliga merkt av at vera ein fyribils skipan, eins og heitið á henni legði upp til. Í grein 1 var ásett, at tann lóggáva, sum var í gildi í Føroyum, í so stóran mun sum eftir umstøðunum gjørligt, skuldi verða verandi í gildi. Í grein 2 varð staðfest, at har danskur ráðharri hevði heimild til at taka fyrisitingarligar avgerðir, skuldi amtmaðurin hava hesa heimild eftir tilmæli frá Landsnevnd Løgtingsins. Í týdningarmiklu grein 3 varð í triðja lagi ásett, at „*lovforskrifter*", sum viðvíktu Føroyum, skuldu fyrst samtykkjast av Løgtinginum eftir uppskoti frá Løgtingi ella amti, og síðan skuldu tær staðfestast av amtmanninum. Grein 4 ásetti, at har lóggávan snúði seg um fæ ríkiskassans, skuldi amtmaðurin hava myndugleika til at samtykkja „*lovforskrifter*" eftir tilmæli frá Løgtingi ella løgtingsnevnd. At enda ásetti grein 5, at forskriftir viðvíkjandi kæru, klagu og rættaravgerðum skuldu gerast skjótast til ber. Annað stóð ikki í fyribils stjórnarskipan Føroya frá 9. mai 1940.

Nakrar broytingar vóru framdar í samtyktu stjórnarskipanini, um samanborið verður við uppskot Mitens frá 20. apríl. Tann fyrsta varðveitandi greinin varð ikki broytt, men grein 2 varð broytt á tann hátt, at Landsnevndin ikki skuldi hava sýtingarrætt yvirfyri avgerðum amtmansins á fyrisitingarliga økinum, soleiðis sum Mitens upprunaliga hevði skotið upp. Hartil kom, at tann týdningarmikla grein 3 í uppskotinum hjá Mitens, sum hevði staðfest, at „*Den lovgivende myndighed er hos lagtinget og amtmanden i forening*", í „Midlertidig Styrelsesordning" varð deild út á 2 greinar, sum snúðu seg um føroysk og donsk viðurskifti, har ávíkavist Løgtingið (saman við amtmanninum) og amtmaðurin (saman við Landsnevndini) fingu høvuðsleiklutin. Harumframt var tann týdningarmikla broyt-

ing framd í greinini, at orðið „*lovforskrifter*" varð nýtt í „Midlertidig Styrelsesordning" í staðin fyri „*lovgivende myndighed*", sum Mitens hevði brúkt í sínum uppskoti.

Serstakar reglur vóru eisini gjørdar, sum ásettu hvussu „*lovforskrifter*", ið vóru samtyktar undir „Midlertidig Styrelsesordning", skuldu kunngerðast og fáa gildi í Føroyum. Hesar reglur settu ikki ásetingarnar frá 1896 „Om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne" úr gildi (sí s. 72), men tær vóru galdandi harumframt, og „*indtil videre*".[337]

Hóast broytingarnar varð „Midlertidig Styrelsesordning" tann 9. mai samtykt í Løgtinginum av Sjálvstýrisflokkinum, Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum. Skipanin varð staðfest av amtmanninum og gjørdist stjórnarskipan Føroya undir krígnum. Tann grundleggjandi spurningurin var, hví amtmaðurin ikki kundi viðurkenna skipanina, fyrr enn hann hevði framt ávísar broytingar í upprunaliga uppskotinum hjá Mitens, og hvønn týdning hetta hevði fyri heimildir Løgtingsins undir krígnum.

### Amtmaðurin og heimildir Løgtingsins

Sambært donsku grundlógini var lóggávuvaldið hjá danska Ríkisdegnum, og Løgtingið kundi tí ikki fáa veruligt lóggávuvald, uttan so at Føroyar í stríð við krøvini frá amtmanni og hersetingarvaldi loystu frá Danmark og vóru fluttar út úr danska grundlógarøkinum. Spurningurin er tí, hvat slag av stýrisskipan „Midlertidig Styrelsesordning" var. Vóru Føroyar við Løgtingsins lóggávumyndugleika fluttar út um danska grundlógarmarkið í 1940, ella var myndugleiki Løgtingsins heimilaður í grundlógini? Hesin spurningurin hevði avgerandi týdning fyri ríkisrættarligu støðu Føroya undir krígnum og tann myndugleika, sum Løgtingið hevði.

Tá 2. veraldarbardagi brast á tann 1. september í 1939, samtykti Ríkisdagurin nakrar kreppulógir, sum góvu ríkisstjórnini heimild til fyribils at taka avgerðir í málum, sum vanliga hoyrdu undir Ríkisdagin. Viðvíkjandi Føroyum gav ríkisstýrið amtmanninum heimild til at útinna hesar heimildir eftir tilmæli frá Løgtingi og Landsnevnd.[338] Amtmaðurin hevði sostatt longu í 1939 fingið størri fyrisitingarligar heimildir, tá hann fekk víðkaðu fyrisitingarligu heimildir stjórnarinnar í Føroyum litnar upp í hendi. Tann 15. apríl 1940 staðfesti

Hilbert í Løgtinginum, at *„Amtmanden har under de nuværende Forhold samme Beføjelser som Den danske Regering“*.[339] Sambært Hilbert var stjórnarvaldið (tað útinnandi valdið) litið amtmanninum upp í hendi, meðan kríggj var. Hetta samsvaraði eisini við politikkin hjá bretska hersetingarvaldinum í Føroyum, ið viðurkendi amtmannin sum lógliga umboð ríkismyndugleikanna í Føroyum.

Stjórnarligu heimildir amtmansins hava týdning fyri, hvat slag av stýrisskipan „Midlertidig Styrelsesordning“ var, og hvørjar heimildir Løgtingið hevði samsvarandi hesi skipan. Tann grundleggjandi spurningurin er sum nevnt, um skipanin var heimilað í grundlógini, ella um hon flutti føroyska lóggávuøkið út um grundlógarmarkið. Nýggjari rannsóknir av dagbókini hjá Hilbert hava víst, at amtmaðurin hevði eina ávísa grein í grundlógini í huga, tá hann góðtók at seta „Midlertidig Styrelsesordning“ í gildi í Føroyum.[340] Talan var sambært Hilbert um táverandi grein 25, sum ásetti, at *„I særdeles påtrængende Tilfælde kan Kongen, naar Rigsdagen ikke er samlet, udstede foreløbige Love, der dog ikke må stride mod Grundloven og altid straks efter følgende Rigsdags Sammentræden skal forelægges denne, uden hvis Bekræftelse Loven bortfalder“*. Tá kongur verður nevndur í grundlógini, so verður í veruleikanum sipað til ríkisstjórnina. Sostatt merkir hendan greinin, at ríkisstjórnin, tað útinnandi valdið, hevur rætt til at seta fyribils lógir í gildi uttan góðkenning Ríkisdagsins *„I særdeles påtrængende Tilfælde“*. Tað ber neyvan til at hugsa sær nakað meira *„særdeles påtrængende Tilfælde“* enn eitt heimskríggj. Harumframt hevði Ríkisdagurin beinleiðis góðtikið, at talan var um serstakar umstøður, tá kreppulógirnar vóru samtyktar í 1939. Treytin, ið grundlógin legði á ríkisstjórnina, var einans tann, at fyribilslógirnar ikki máttu stríða ímóti grundlógini, og tær skuldu leggjast fyri Ríkisdagin, so skjótt sum hetta var gjørligt. Í 1940 var myndugleikin hjá ríkisstjórnini í Føroyum í hondunum hjá Hilbert, og tí var tað hann, sum hevði henda myndugleikan.

Er hendan útleggingin sonn, so hevði Hilbert í samsvari við grundlógina heimild til at seta fyribilslógir í gildi í Føroyum, sjálvt um lóggávuvaldið annars lá hjá Ríkisdegnum, og „Midlertidig Styrelsesordning“ var tí heimilað í grundlógini, sum framhaldandi var í gildi í Føroyum. Út frá hesum gerst tað



Tá bretar ikki skuldu nýta kanónirnar á Skansanum longur, fingu føroyingar tær sum gávu. Her sæst Hilbert í samband við hátíðarhaldið á Skansanum.

eisini greitt, at tað vóru ásetingarnir í grundlógini viðvíkjandi einkarætti Ríkisdagsins at lóggeva í danska grundlógarøkinum, ið fingu Hilbert til at arbeiða fyri, at orðingin „*lovgivende myndighed*“ í uppskoti Mitens, varð skift út við „*lovforskrifter*“ í „Midlertidig Styrelsesordning“. Hevði Løgtingið fingið veruligt lóggávuvald av sama slag sum danski Ríkisdagurin, so hevði stjórnarskipanin komið í stríð við ásetingarnar í grundlógini, men við teirri orðing, sum endaliga varð samtykt tann 9. mai 1940, slapst í fyrstu atløgu undan hesum.

Tað er tí helst rætt at siga, at „Midlertidig Styrelsesordning“ ikki broytti ríkisrættarligu viðurskifti Føroya. Um so var, at Føroyar vóru komnar inn undir grundlógina í tíðini aftaná 1850 (sí s. 90), so vóru Føroyar verandi partur av danska grundlógarøkinum í tíðarskeiðinum frá 1940 til 1945 eisini. Hóast Fólkaflokkurin hevði rætt í tí, at danski Ríkisdagurin ikki megnaði at røkja yvirvaldsrættin og lóggávuvaldið í oyggjunum undir krígnum, so vóru oyggjarnar ikki *formliga* fluttar út um grundlógarmarkið, tí amtmaðurin, hægsta „stjórnarumboðið“ í Føroyum, yvirtók heimildir Ríkisdagsins í *samsvar* við grein 25 í grundlógini. Henda stjórnarskipan varð harumframt samtykt í Løgtinginum við 18 atkvøðum fyri og 6 ímóti tann 9. mai 1940. Hartil kom, at bretska hersetingarvaldið

hevdaði yvirvaldsrætt Danmarkar í Føroyum undir krígnum, samstundis sum tað røkti tær skyldur, ið danski staturin hevði mótvegis Føroyum. Tað er torført at føra prógv fyri, at ríkisrættarligu viðurskifti Føroya broyttust undir krígnum, men ivi varð seinni sáddur um ríkisrættarligu støðu Føroya undir „Midlertidig Styrelsesordning".

Tað er kortini lítið at ivast í, at í *verki* hevði Løgtingið, saman *við* amtmanninum, lóggávuvald undir krígnum, – soleiðis sum tað eisini framgekk av viðmerkingunum til skipanina – sjálvt um orðið lóggávuvald ikki varð brúkt í „Midlertidig Styrelsesordning". Við løgtingssamtykt kundi galdandi ríkislóggáva í Føroyum verða sett úr gildi, og nýggj lóggáva sett í staðin. Sambært viðurkendum statsrættarligum meginreglum kann lóg einans broytast við lóg – ella við grundlóg – og „lovforskrifter" høvdu tí lógarmegi, líka mikið hvussu tær annars vóru nevndar.

Hetta merkir ikki, at Løgtingið virkaði óheft av ella í stríð við ásetingarnar í grundlógini. Í fyrsta lagi hevði Løgtingið ikki einsamalt lóggávuvaldið um hendi, men amtmaðurin skuldi staðfesta lógirnar, áðrenn tær komu í gildi. Talan var ikki einans um ein *formligan staðfestingarrætt*, eins og danska kongahúsið hevur, men amtmaðurin hevði *veruligan sýtingarrætt* á lóggávuøkinum, ið tryggjaði, at Løgtingið ikki setti nakra lóg í gildi í Føroyum uttan góðkenning ríkismyndugleikanna – tvs. góðkenning amtmansins undir krígnum. Í øðrum lagi ber til at siga, at lóggávuvald Løgtingsins og amtmansins var av tí fyribils slagnum, sum nevnt verður í grein 25 í grundlógini. Verður „Midlertidig Styrelsesordning" tulkaður á henda hátt, so er einki mótstríð millum lóggávuvald Løgtingsins og grundlógina, og soleiðis hevur Hilbert helst hugsað sær skipanina, tá hon varð sett í gildi. Navnið á skipanini „Midlertidig Styrelsesordning", bendir eisini á, at hon upprunaliga varð ætlað at skula tulkast á henda hátt.

Uppbýtið av lóggávuvaldinum í eina serføroyska lóggávu og ríkislóggávu samsvaraði væl við stevnumiðini hjá Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum, sum løgdu upp til, at Løgtingið fekk lóggávuvald í serstøkum føroyskum viðurskiftum, men hetta samsvaraði illa við stevnumið Fólkafloksins, ið løgdu upp til, at Løgtingið skuldi hava ræði á øllum føroyskum viðurskiftum. Tað var tí ikki so løgið, at Fólkaflokkurin ikki

vildi góðtaka „Midlertidig Styrelsesordning“, sum í fyrsta lagi einans gav Løgtinginum avmarkaðan lóggevandi myndugleika, og í øðrum lagi var talan um ein myndugleika, ið Løgtingið hevði saman við amtmanninum.

Samanumtikið ber til at siga, at við „Midlertidig Styrelsesordning“ fekk Løgtingið saman við amtmanninum lóggevandi heimildir. Hartil kom, at Landsnevndin, sum Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin høvdu sett á stovn í 1928, fekk avgerðandi lut í útinnandi valdinum í Føroyum. Meginreglan í „Midlertidig Styrelsesordning“ var tann, at meðan Løgtingið og amtmaðurin býttu loggávuvaldið ímillum sín, so býttu Landsnevndin og amtmaðurin tað útinnandi valdið sínamillum. Harvið var lóggávuvaldið og tað útinnandi valdið, sum síðan einaferð í 1200-talinum hevði verið í hondunum á fyrst norskum síðan donskum kongum og til síðst í hondunum á ávíkavist danska Ríkisdegnum og ríkisstjórnini, komið aftur til Føroya. Løgtingið hevði ikki einsamalt lóggevandi myndugleikan um hendi, men eingin uttanfyri Føroyar hevði beinleiðis ávirkan á tær lógir, sum vóru samtyktar at galda fyri Føroyar. Kríggið endaði í 1945, men „Midlertidig Styrelsesordning varð verandi í gildi í Føroyum til 1. apríl 1948.

**Valrættaraldur, valskipan og tingseta**

Meðan stórar broytingar vóru framdar í sjálvari stjórnarskipanini og heimildum Løgtingsins undir krígnum, so vóru einans smávegis broytingar framdar í øðrum viðurskiftum, sum høvdu týdning fyri Løgtingið. Tær týdningarmestu fólkaræðisligu tillagingarnar av Løgtings- og valskipanini vóru framdar longu í 1923, men onkrar smávegis fólkaræðisligar broytingar vóru kortini framdar í valskipanini til Løgtingið undir krígnum.

Í 1943 og í 1944 var valrættaraldurin til Løgtingið til viðgerðar í tinginum, og í 1944 varð samtykt, at hann skuldi setast niður úr 25 til 21 ár. Sama ár samtykti Løgtingið at fremja broytingar í valskipanini, sum skuldu gera tað lættari hjá smáum politiskum flokkum, sum við menningini av fleirflokkaskipanini byrjaðu at gerast meira vanligir í Føroyum, at fáa eykavald løgtingsumboð. Í fyrsta lagi varð talið á eykavaldum løgtingsumboðum hækkað úr 5, sum tað hevði verið síðan 1930, og upp í 10. Sostatt kundi tingmannatalið nú

koma upp í 30 – 20 valdømisvaldir og 10 eykavaldir – um so var, at tey 20 føstu umboðini ikki førdu til eitt eftir atkvøðutali rættvíst býti av umboðum millum flokkarnar. Harumframt var reglan um, at ein listi ikki kundi fáa eykavald løgtingsumboð, uttan so at listin frammanundan hevði fingið valdømisvald umboð, sett úr gildi (sí s. 172). Ístaðin skuldi ein listi kunna fáa eykavald umboð, treytað av at hann hevði í minsta lagi 10% av atkvøðunum.[341]

Hartil varð tingsetan flutt í 1945. Í 1935 hevði Løgtingið samtykt, at Løgtingið skuldi koma saman fyrsta týsdag í oktober og ikki á ólavsøku, sum siður hevði verið, men undir krígnum varð samtykt at fara aftur til gomlu skipanina, og frá juli 1945 varð tingið aftur sett á ólavsøku.[342]

## Fíggjarligu viðurskifti Løgtingsins frá 1940-1948

Krígstíðirnar vóru avbera góðar fyri føroyska búskapin, men tey nógv broyttu vinnuviðurskiftini høvdu við sær, at tað var ógvuliga misjavnt, hvussu nógv fólk fingu burtur úr teimum góðu tíðunum. Føroyski fiskiskipaflotin, sum undan krígnum hevði verið til fiskiskap við 20-30 monnum á hvørjum skipi, megnaði undir krígnum, við eini manning uppá umleið 6-7 fyri hvørt skip,[343] at flyta meira enn ein fimting av tí feskfiski til Onglands, sum bretar høvdu brúk fyri undir krígnum.[344] Tann minkaði eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi hevði við sær, at stórt arbeiðsloysi og stórir sosialir ójavnar vóru í Føroyum undir krígnum,[345] men virðið á føroyska útflutninginum vaks úr góðum 13 milliónum krónum í 1940 til góðar 38 milliónir krónur í 1941. Í 1943 var útflutningsvirðið góðar 41 milliónir krónur og í 1944 var tað slakar 50 milliónir krónur. Talan var nærum um ein ferfaldan vøkstur eftir 4 árum. Økti samhandilin við Ongland hevði við sær, at í tíðarskeiðinum frá 1941 til 1945 vaks føroyski sterlingágóðin í Onglandi úr 248.000 pundum til 2.297.000 pund, svarandi til umleið 50 mió. krónur í 1945. Við heimskrígnum komu Føroyar endaligu burturúr búskaparliga truplu millumkrígstíðini og búskaparkreppuni í 1930-unum.

Tað var kortini greitt, at búskaparligu uppgangstíðirnar vóru beinleiðis knýttar at teimum stórpolitisku viðurskiftunum



Meðan vandin fyri bumbuálopum lúrdi, hevði Løgtingið eitt bumbuskýli í norðara enda á húsinum.

undir krígnum; tær fóru ikki at halda áfram, tá friður aftur valdaði í Europa.

**Inntøkuviðurskifti Løgtingsins**

Búskaparligu uppgangstíðirnar undir krígnum høvdu í sjálvum sær við sær, at inntøkur Løgtingsins vuksu nógv, men økta vald Løgtingsins og tann harav styrkta føroyska fyrisitingin gjørdu tað eisini neyðugt at hækka tollsatsir og teir í aðra máta lágu beinleiðis løgtingsskattirnar, sum vóru kravdir á fyrsta sinni í 1934. Í 1941 samtykti Løgtingið at hækka skattin, soleiðis at t.d. 7 krónur skuldu gjaldast av eini ársinntøku uppá 1.000 krónur, og 502 krónur av 10.000 krónum. Í prosentum hækkaði skatturin eftir støddini á inntøkuni, men samanborið við viðurskiftini í dag var skattaprosentið ikki høgt – í hesum dømunum var tað ávíkavist 0,7% og 5%. Talan var kortini um eina skattahækkan, tí eftir gomlu skipanini frá 1939, tá skatturin seinast varð hækkaður, skuldu t.d. 412 krónur gjaldast av eini ársinntøku uppá 10.000 krónur, svarandi til 4,1%. Harumframt vóru tollsatsirnir sum nevnt hækkaðir.[346]

Seinast í 1930-unum vóru inntøkur Løgtingsins umleið

750.000 krónur tilsaman (sí s. 187), og í 1940 vóru tær slakar 800.000 krónur.[347] Inntøkurnar vóru bókaðar í amtskommunalu grunnunum, serstakliga í „Amtsrepartitionsfonden", sum var tann størsti og mest týðandi grunnurin. Gomlu grunnarnir, sum Løgtingið hevði havt ræði á síðan 1852, eitt nú „Økonomisk fond" og „Amtsfattigkassen" vóru niðurlagdir um hetta mundið, „Økonomisk fond" í 1944[348] og „Amtsfattigkassen" í 1954.[349] Upprunaliga komu inntøkurnar í „Amtsrepartitionsfonden" frá jarðarskatti, men seinni komu tollinntøkur av ymiskum slag eisini. Løgtingsskatturin, ið varð kravdur á fyrsta sinni í 1934, gav í 1939 Løgtinginum eina inntøku uppá 49.000 krónur, men krígstíðin og hækkaða skattaprosentið broyttu nógv hesum viðvíkjandi. Í 1940 gav løgtingsskatturin 233.000 krónur, í 1941 gav hann umleið 1,2 mió. krónur, og í 1945 gav hann 3,4 mió. krónur. Hartil kom, at aðrar inntøkur í „Amtsrepartitionsfonden", serstakliga tollinntøkurnar, eisini vuksu so mikið nógv, at í 1941 hevði Løgtingið ræði á 2,3 mió. krónum. Í 1945 varð henda upphædd vaksin til 5,4 mió. krónur.

Føroyski útflutingurin ferfaldaðist uppá 4 ár undir krígnum, meðan tann samlaða løgtingsfíggjarlógin 7 faldaðist í 5 ára skeiðinum, sum byrjaði í 1940. Nógv var broytt síðan tíðina fyri 1900, tá Løgtingið hevði havt ræði á 10-20.000 krónum.

Hartil kom, at Løgtingið fekk eina árliga játtan frá bretum, sum í 1940 varð sett til umleið 2 milliónir krónur, sum gjald fyri mista ríkisstuðulin undir krígnum.[350] Upphæddin skuldi í árunum, sum komu, viðgerast av eini nevnd, og í meðal var upphæddin 2,5 mió. krónur árliga undir krígnum. Hetta var ein stór upphædd, men hon var lítið vaksin síðan 1. veraldarbardagi endaði, tí danski staturin hevði í millumkrígstíðini í miðal havt eina útreiðslu í Føroyum uppá knappliga 2 milliónir krónur. Nógv var kortini broytt síðan tíðina undan 1. veraldarbardaga, tá útreiðslur ríkiskassans av Føroyum í miðal vóru umleið 200.000 krónur árliga (sí s. 187).

Inntøkur Løgtingsins í Føroyum hildu áfram at vaksa, tá 2. veraldarbardagi var av. Í 1946 hevði „Amtsrepartitionsfonden" eina inntøku uppá 6,2 mió. krónur, men løgtingsskatturin var nú minkaður niður í 3,1 mió. krónur. Í 1947 fóru friðartíðirnar og tann minkaði búskaparvøksturin at síggjast aftur í inntøkum Løgtingsins, tí samlaðu inntøkurnar í „Amtsrepartitionsfonden" vóru hetta árið 5,5 mió. krónur, meðan løgtings-

skatturin var minkaður niður í 2,3 mió. krónur. Hóast føroyska framleiðslan framvegis var metstór, so vóru longu í 1946 tekin um, at búskaparligu uppgangstíðirnar undir krígnum, sum høvdu fingið Føroyar burturúr búskaparkreppuni, vóru um at vera av. Tíðirnar vóru ikki góðar, men tað hepna var, at føroyingar høvdu væl av peningi at standa ímóti við, tá friður aftur valdaði.

Í 1945 áttu føroyingar 2.279.000 pund (umleið 50 mió. krónur) í Onglandi, svarandi til nærum 15 ferðir ta upphædd, ið løgtingsskatturin gav sama árið. Stóru yvirskotini, sum høvdu verið á Løgtingsins fíggjarlógum undir krígnum, høvdu havt við sær, at skuld Løgtingsins, sum í 1939 hevði verið 500.000 krónur, var burtur. Harumframt var nógvur peningur settur í ymiskar grunnar. T.d. átti *Vinnulánsgrunnurin*, sum varð stovnaður í 1941 við tí endamáli at fíggja endurnýggjanina av fiskiskipaflotanum, 1,3 milliónir krónur standandi á bók í 1945. Krígstíðin hevði harumframt havt við sær, at ríkisstuðulin í prosentum varð vorðin ein minni partur av kostnaðinum av at reka føroyska samfelagið, enn hann hevði verið í tíðini millum kríggini. Meðan ríkisveitingin í krónum stórt sæð hevði staðið í stað, síðan 1. veraldarbardagi endaði, so vóru inntøkur Løgtingsins í Føroyum 7 faldaðar undir 2. veraldarbardaga. Hesi viðurskifti fingu stóran týdning fyri styrkina í føroyskum sjálvstýrispolitikki bæði undir og beint eftir 2. veraldarbardaga.

Í 1948 var búskaparliga støðan heilt øðrvísi. Meðan føroyingar í 1945 áttu 2.297.000 pund til góðar í Onglandi, so skyldaðu teir í 1948 400.000 pund (umleið 9 mió. krónur) til Onglands.[351] Ein partur av grundini til hesa gongdini var tann, at føroyingar aftaná 1945, tá oyggjarnar aftur gjørdust partar av danska gjaldoyraøkinum, fóru at handla meira gjøgnum Danmark og minni gjøgnum Ongland. Sterlingágóðin í Onglandi varð tí í ein ávísan mun broyttur til ein krónuágóða í Danmark. Høvuðsgrundin til gongdina var kortini ein onnur. Føroyingar høvdu av krígsávum mist umleið ein triðing av fiskiskipaflotanum, og tí høvdu teir tey fyrstu 3 árini eftir kríggið sett meginpartin av uppsparda peninginum í Onglandi í eina endurnýggjan av fiskiflotanum. Í 1948 áttu føroyingar størsta trolaraflotan í Norðurlondum,[352] men trupulleikin var, at føroyingar høvdu nýtt uppsparda peningin saman við stórum

lánum, sum Vinnulánsgrunnurin veðhelt fyri, til at keypa gamlar trolarar úr Onglandi, sum høvdu ilt við at bera seg.

Stígur var komin í búskaparliga vøksturin, tá kríggið endaði í 1945, men tá komið varð móti endanum av 1940-unum vóru beinleiðis krepputíðir á veg í Føroyum. Hesi viðurskifti broyttu fullkomuliga fortreytirnar fyri føroyskum (sjálvstýris) politikki.

### Tingmannalønir

Góðu tíðirnar undir 2. heimsbardaga høvdu við sær, at tingmannalønirnar hækkaðu nakað eins og aðrar føroyskar inntøkur undir krígnum. Dagpeningurin hevði síðan 1923 verið 12 krónur fyri tær fyrstu 6 vikurnar, tingið var saman, tó so at aftaná 1937 fingu tingmenn 12 krónur um dagin, óheft av hvussu long tingsetan var.

Í 1940 varð upphæddin broytt á fyrsta sinni síðan 1923, tá løgtingsumboðini fingu eina dýrtíðarviðbót, sum var 3 krónur um dagin, afturat dagpeninginum. Grundin var tann, at krígstíðirnar høvdu við sær, at prísurin á flest øllum neyðsynjarvørum hækkaði, og prístalsskipan varð tí sett í verk í Føroyum.[353] Í 1942 samtykti tingið, at dýrtíðarviðbótin hjá tingmonnunum skuldi prístalsviðgerast við 85% av prístalinum.

Eftir kríggið vóru viðurskiftini hjá tingmonnum á bygd betrað munandi, tá Løgtingið í 1947 samtykti, at teir tingmenn, sum búðu uttanfyri Havnina, skuldu fáa eitt vistarískoyti uppá 8 kr. fyri hvønn dag, teir vóru heimanífrá í tingørindum.[354]

## Føroyskur politikkur undir bretskum valdi – 1940-1945

Gjøgnum meginpartin av stríðsárunum gjørdist sjálvstýris- og tjóðskaparspurningurin grundleggjandi fyri alt arbeiðið í Løgtinginum. Hetta kom at hava tann týdning, at hetta tíðarskeiðið í søgu Løgtingsins kom at snúgva seg nógv um viðurskifti Løgtingsins við bretska hersetingarvaldið og amtmannin.

### Styrkiroynd millum Løgting og amtmann í 1940-41

Longu tann 11. mai 1940, tveir dagar eftir at „Midlertidig Styrelsesordning“ varð sett í gildi, sendi næstformaður Fólkafloksins Thorstein Petersen nakrar drúgvar viðmerkingar til Mason, har hann staðfesti, at „Midlertidig Styrelsesordning“

var lítið fólkaræðislig, tí hon loyvdi amtmanninum, ið sambært løgtingslógini frá 1923 einans hevði fyrisitingarligar uppgávur, at fáa alt ov stórt politiskt vald. Fólkaræðisligu próvførslurnar hjá Thorsteini Petersen rinu kortini ikki við bretar, tí hann fekk einki svar frá teimum uppá viðmerkingarnar.

Nakrar mánaðir seinni, tann 12. oktober 1940, sendi formaður floksins Jóannes Patursson eitt bræv til Mason, har hann spurdi konsulin, um politikkurin hjá bretum skuldi skiljast á tann hátt, 1) at Føroyar skuldu stjórnast av amtmanninum og Løgtinginum í felag, og at bretar fóru at seta seg upp ímóti stovnsetanini av eini reinari føroyskari stjórnarskipan, ið ikki umfataði amtmannin, sum Løgtingið, við møguligari undirtøku frá meirilutanum av fólkinum, hevði sett í gildi, *ella* 2) at bretar ikki fóru at leggja seg út í innanhýsis føroysk viðurskifti. Í hesum føri hildu bretar, at spurningurin var so greitt settur, at teir kendu seg noyddar at svara. Bretska svarið til Patursson staðfesti, at bretski politikkurin var, at vóru stjórnarligu viðurskifti Føroya broytt, meðan oyggjarnar vóru undir bretskum yvirvaldi, so var tað at meta sum bretsk uppílegging í innanhýsis viðurskifti. Tí skuldu ongar broytingar fremjast í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, uttan so at ein góðkenning kundi fáast frá donsku stjórnini.[355] Hetta var tað sama sum at siga, at ongar broytingar kundu fremjast, so leingi sum kríggj var.

Spurningarnir hjá Thorsteini Petersen og Jóannesi Patursson til Mason eru týðuligar ábendingar um, at Fólkaflokkurin ætlaði at nýta krígstíðina til tess at fáa framt stjórnarligar broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, sum vildu havt við sær, at Løgtingið gjørdist eitt „veruligt parlament“. Men tað var eisini við at gerast greitt fyri leiðarum Fólkafloksins, at hetta fór ikki at verða góðtikið av bretska yvirvaldinum, heldur ikki um meirilutin av Føroya fólki tók undir við tí.

Spurningurin um ríkisrættarligu viðurskiftini var kortini ikki so átrokandi í 1940, hóast Fólkaflokkurin hevði skapt stórt rumbul um spurningin, tí tann stóri meirilutin í Løgtinginum, Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin, hevði ongar ætlanir um at fremja broytingar í ríkisrættarligu støðu Føroya. Hinvegin vóru onnur týdningarmikil ríkismál, sum Fólkaflokkurin kundi fáa bæði Sjálv-



Hilbert amtmaður og Jóannes Patursson formaður Fólkafloksins ganga á odda í ólavsøkuskrúðgongu.

stýrisflokkin og Javnaðarflokkin til at taka undir við. Málspurningurin var eitt upplagt evni, sum Fólkaflokkurin kundi nýta til at leggja veruligt trýst á samstarvið millum amtmannin og hersetingarvaldið við.

Føroyska málið hevði vunnið fyrimunir í skúlunum í 1938, men hóast tingið við stórum meiriluta hevði samtykt at gera føroyskt saman við donskum til rættarmál í 1938 og aftur í 1939, so var danskt framvegis einasta rættarmál føroyinga. Ríkismyndugleikarnir høvdu ikki vilja gingið løgtingsmeirilutanum á møti hesum viðvíkjandi, men eftir 9. apríl 1940 var støðan ein heilt onnur. Fólkaflokkurin legði í 1940 eitt uppskot fyri Løgtingið, sum miðaði ímóti, at samtyktin frá 1939 gjørdist lóg beinanvegin. Teir hóvligu sjálvstýrisflokkarnir, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, tóku undir við hesum uppskotinum, eins og teir høvdu gjørt í 1938 og 1939. Uppskotið varð samtykt við 15 atkvøðum.

Amtmaðurin hevði sýtingarrætt yvirfyri samtyktum Løgtingsins á lóggávuøkinum sambært „Midlertidig Styrelsesordning“, men spurningurin var, hvussu hugaður hann var fyri at brúka hendan rætt, tí tað kundi skapa óneyðuga øsing í Løgtinginum. Hilbert hevði sagt, at hann ikki fór at seta seg upp ímóti avgerðum í Løgtinginum, sum viðvíktu serstøkum føroyskum viðurskiftum, og sýtingarrætturin varð ikki nýttur

í tílíkum málum tað fyrsta hálvtannað árið, „Midlertidig Styrelsesordning" var í gildi.[356] Spurningin um rættarmálið metti amtmaðurin kortini at vera eitt ríkismál, og hann sýtti tí fyri at staðfesta løgtingssamtyktina frá 1940 við teirri grundgeving, at Ríkisdagurin átti at fáa høvi til at taka støðu til spurningin.[357]

Tað sæst, at amtmaðurin hevur borið ótta fyri, hvat fór at henda, um so var, at hann brúkti sýtingarrættin, tí áðrenn Hilbert brúkti sýtingarrættin móti Løgtinginum, vendi hann sær til enska konsulin Mason við fyrispurningi um, hvørt bretar vildu stuðla honum mótvegis meirilutanum av føroyska fólkinum í spurningum, sum høvdu avgerandi týdning fyri yvirvaldsrætt og myndugleika Danmarkar.[359] Svarið frá Mason, sum kom frá bretska Uttanríkismálaráðnum tann 13. januar 1941 var greitt, tí har var framhaldandi staðfest, at tað var „*den britiske Regerings Ønske .. , at Øerne fortsat administreres af Amtmanden i Samarbejde med Lagtinget*". Harumframt staðfesti Mason, at tað ikki kundi „*forventes, at den britiske Regering vil stille sig imødekommende over for en Ændring af den bestaaende forfatningsmæssige Stilling, medmindre det bliver godtgjort, at en saadan Forandring vilde være til almindelig Gavn for alle interesserede Parter, og kunde hidføres paa forfatningsmæssig Maade. Dette vilde blandt andet kræve dansk Lovgivning herom, og hverken den danske Regering eller den danske Lovgivningsmagt kan under de nu herskende Tilstande betragtes som værende i Besiddelse af den hertil nødvendige Handlefrihed*".[359]

Tað var møguligt, at brævið frá Mason tann 14. apríl 1940 ikki heilt greitt segði, hvønn politikk bretar fóru at føra í Føroyum, men eingin ivi var longur. Hetta svarið var fult og heilt í samsvar við taluni hjá Churchill frá 11. apríl 1940 og ein enn sterkari staðfesting av brævinum frá Mason til Løgtingið tann 3. mai 1940. Sæð í samband við spurningin hjá Hilbert gerst svarið enn greiðari, tí í hesum samanhangi verður beinleiðis sagt, at sjálvt um ein fólkaræðisligur meiriluti í Føroyum var fyri at broyta ríkisrættarligu viðurskiftini, so fóru bretar at seta seg upp ímóti hesum. Hetta var sama svarið, sum Jóannes Patursson hevði fingið frá bretum frammanundan. Tað gjørdist sostatt almennur bretskur politikkur í Føroyum, at ongar ríkisrættarligar broytingar skuldu henda í Føroyum, meðan kríggj var.

Tað sæst eisini, at bretar hava spælt við møguleikan fyri at leggja búskaparligt trýst á føroyingar, gjørdist tað neyðugt, tí Mason fekk eisini tað svar úr London, at peningaligi stuðulin, sum Føroyar fingu frá bretum, varð grundaður á ta fortreyt, at tey ríkisrættarligu viðurskiftini ikki vórðu broytt. Vórðu ríkisrættarligu viðurskiftini broytt, so fór tað at verða neyðugt at taka tann búskaparliga stuðulin til Føroya upp til nýggja viðgerð.[360] Styrkin í hesum møguleikanum kann síggjast, um hann verður settur í samband við tann veruleika, at meðan Løgtingsins inntøkur í 1941 vóru 2,3 mió. krónur, so var bretski stuðulin sama ár settur til at vera umleið 2,5 mió. krónur.

Hilbert læt svarið frá Mason prenta í bløðunum tann 18. januar 1941, beint eftir at Fólkaflokkurin hevði kravt sjálvstýri og hótt við, at annars fór fólkið at taka málið í egnar hendur. Svarið frá Mason legði helst lok á tær mest víðgongdu sjálvstýriskreftirnar í Fólkaflokkinum, og Hilbert kundi við bretska stuðlinum aftanfyri seg óttaleysur nýta sýtingarrættin í Løgtinginum.

**Semja millum Løgting og amtmann – 1941-1942**

Út á heystið í 1941 var aftur útlit til, at stríð fór at taka seg upp millum amtmann og Løgting. Samstarvsflokkarnir, Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vóru ósamdir um skattalógina fyri 1942, men tað, sum órógvaði amtmannin, var, at onkrir av samstarvsflokkunum eisini tosaðu um at fremja broytingar í „Midlertidig Styrelsesordning".[361] Amtmaðurin vildi undir ongum umstøðum góðtaka, at Løgtingið fekk størri vald, enn tað longu hevði sambært „Midlertidig Styrelsesordning". Tí var útlit fyri einum nýggjum stríði, har Fólkaflokkurin og tær víðgongdu sjálvstýriskreftirnar í Løgtinginum fóru at standa sterkari enn frammanundan.

Í hesum sambandi vendi amtmaðurin sær til bretska Uttanríkismálaráðið í september 1941. Hilbert ávaraði bretar ímóti, at tað vóru útlit til, at hann aftur fór at koma í stríð við Løgtingið. Hilbert vildi hava at vita, hvussu langt bretar fóru at fara til tess at forða fyri, at ríkisrættarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark vóru broytt. Hilbert spurdi beinleiðis, um bretar fóru at seta herin inn fyri at varðveita status quo, um tað gjørdist neyðugt. Her fekk amtmaðurin

eitt noktandi svar við teirri grundgeving, at tað hevði verið í stríð við politikkin hjá bretum, sum miðaði ímóti ikki at leggja seg út í innlendis stjórnarlig viðurskifti. Í aðra mátar varð tann sami bretski status quo politikkurin í Føroyum staðfestur, men sum nakað nýtt heittu bretsku myndugleikarnir nú á konsulin Mason um at royna at fáa amtmannin til at at finna semjur við Løgtingið, fyri á tann hátt at spjaða andstøðuna í Løgtinginum.[362] Tað hevði sjálvandi ikki verið klókt av bretum at lova Hilbert hernaðarligan stuðul, tí júst tann avgerðin kundi fingið amtmannin til at staðið so mikið lítið semjusøkjandi mótvegis Løgtinginum, at tað kundi blivið neyðugt hjá bretum at brúkt herin. Uttan lyfti um hernaðarligan stuðul varð trýst lagt á amtmannin til tess at finna semjur við Løgtingið, soleiðis at politiskur friður var um sjálvstýrisspurningin í Føroyum. Júst hetta, at friður var í Føroyum, meðan oyggjarnar vóru undir bretskum valdi, hevði óivað nærum eins stóran týdning fyri bretar, sum varðveitslan av ríkisrættarligu viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Bretar høvdu ikki hersett Føroyar við tí fyri eyga at halda skil á føroyskum sjálvstýris- og sambandsfólki, men teir ætlaðu við so lítlari manning sum møguligt at taka sær av stórpolitiskum áhugamálum í Føroyum.

Hetta gjørdist greitt seinni í 1941, tá gerðir hjá donsku stjórnini, sum einki høvdu við Føroyar at gera, komu at ávirka politisku viðurskiftini í oyggjunum. Nazitýskland og Japan høvdu grundað *Anti-komintern* sáttmálan í 1936, og fasistiska Italia undirskrivaði sáttmálan í 1937. Í sáttmálanum bundu hesi 3 londini seg til at berjast móti kommunismuni, samstundis sum tey lovaðu at vísa hvørjum øðrum vælvild, vóru tey fyri ágangi frá Sovjetsamveldinum. Ongland, Frakland og Sovjetsamveldið vóru í tíðini aftaná 1939 komin í kríggj við hesa fasistisku samgonguna, og tað kundi tí tulkast sum, at Danmark beinleiðis hevði valt síðu fyri fasistisku fíggundum Onglands, tá danska stjórnin tann 25. november 1941 læt seg trýsta til at undirskriva anti-komintern sáttmálan.

Hetta mátti hava við sær, at bretar, sum høvdu stóran áhuga í, at politiskur friður var í Føroyum, fóru at endurskoða sín stuðul til amtmannin í Føroyum. Amtmaðurin var vitandi um henda møguleikan, og hann royndi tí at kvetta alt samband við donsku stjórnina, eins og danska sendistovan í London hevði

gjørt. Í tí sambandi skeyt Mason upp at gera eina felags bretska-danska yvirlýsing, sum lovaði Føroya fólki at avgera síni egnu viðurskifti eftir kríggið.[363] Hetta vildi havt við sær, at slakað var fyri teimum hóvligu sjálvstýrisflokkunum, Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, meðan megin varð tikin úr tí víðgongda Fólkaflokkinum, tí spurningurin um sjálvstýri hevði verið útsettur til eftir kríggið. Tað varð kortini hildið at vera betur, um tað var amtmaðurin, sum kom við eini tílíkari yvirlýsing, men partvíst tí at samstarvsflokkarnir Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vóru ímóti einum ov tættum tilknýti til bretska hersetingarvaldið, kom eingin yvirlýsing frá amtmanninum í 1941.

Hilbert royndi í staðin at halda uppá, at hann hevði virkað óheft av donsku stjórnini, sum ikki longur kundi virka frælst, og at hann og føroyska fólkið fult út stuðlaðu teimum sameindu í krígnum móti Týsklandi og Italia. Eingin grund skuldi tí verið fyri at broytt stjórnarligu viðurskifti Føroya. Hetta fekk Fólkaflokkin at halda uppá, at amtmaðurin hevði sett seg sjálvan frá, tí vald hansara varð júst grundað á, at hann var ríkisins umboðsmaður í Føroyum. Fólkaflokkurin fekk einki burturúr sínum stríði, men amtmaðurin fekk heldur onga avtalu við løgtingsmeirilutan.

Í 1942 royndi amtmaðurin aftur at fáa eina semju í lag við Løgtingið um eina felags yvirlýsing. Tann 1. desember 1942 kunngjørdi amtmaðurin í Løgtinginum, at hann hevði limað seg inn í *Frit Danmark*, ein felagskap, sum danir, ið búðu í londum, sum týskarar ikki høvdu ræði á, høvdu stovnað. Slagorð felagsins var: „*Englands sejr – Danmarks befrielse*“. Samstundis kunngjørdi amtmaðurin, at „*Mit standpunkt er, at et befriet Danmark efter krigen ikke bør diktere det færøske folk nogen ordning af det indbyrdes forhold, men bør tage fuldt hensyn til det færøske folks egne ønsker. Jeg føler mig forvisset om, at et befriet Danmark vil tage dette standpunkt under de forhandlinger, som må komme efter krigen*“.[364] Harvið hevði amtmaðurin slakað fyri teimum hóvligu sjálvstýriskreftunum í Løgtinginum, samstundis sum hann hevði víst sín stuðul til sameindu krígsførsluna. Tað eydnaðist honum hesuferð at fáa stuðul frá samstarvsflokkunum til at seta fram yvirlýsingina, eftir at Mason enn einaferð hevði sent bræv til Løgtingið, har hann vísti á, at bretar vóru nøgdir við tiltøkini hjá amtmanninum, og at teir

ynsktu eitt samstarv millum amtmannin og Løgtingið. Fólkaflokkurin var alt annað enn nøgdur, og tingmenn floksins kravdu, at Føroyar vóru skipaðar sum fullveldi alt fyri eitt. Tað gekk hart fyri seg í tinginum hendan dagin, og tingumboð vóru um at fara til hendurs, sigur Edward Mitens í endurminningum sínum.[365] Endin varð, at Fólkaflokkurin fyri aðru ferð legði eitt fullveldisuppskot fyri tingið, sum fall. Einans fólkaflokstingmenninir atkvøddu fyri, meðan Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin atkvøddu ímóti.

Fólkaflokkurin helt áfram við at finnast at amtmanninum, men við semjuni við Løgtingið í desember 1942 hevði amtmaðurin, sum var undir einum ávísum trýsti frá bretska hersetingarvaldinum, lagt lok á ósemjurnar millum samstarvsflokkarnar, og hann hevði harvið tryggja sær stuðul frá stóra meirilutanum í Løgtinginum. Prísurin var, at hann hevði lovað Løgtinginum, at samráðingar skuldu verða millum føroyingar og danir eftir kríggið um, hvussu viðurskiftini millum londini skuldu skipast í framtíðini.

### Frá løgtingsvalinum í 1943 til krígslok í 1945

Nú valdaði friður í Løgtinginum í eina tíð um ríkisrættarliga spurningin, men í 1943 gjørdist tað greitt, at tað ikki var vist, at meirilutin av Føroya fólki tók undir við semjuni millum amtmannin og løgtingsmeirilutan.

Fólkatingsval hevði verið í Danmark tann 23. mars í 1943, og amtmaðurin hevði útskrivað val til Fólkatingið at verða í Føroyum tann 3. mai í 1943. Helst var høvuðsgrundin til, at fólkatingsval skuldi verða í Føroyum, tann, at hetta skuldi vísa, at Føroyar vóru partur av danska grundlógarøkinum; tann, sum vann valið, slapp í øllum førum ikki til Danmarkar, fyrr enn kríggið var av. Kortini nýtti næstformaður Fólkafloksins Thorstein Petersen saman við javnaðarmanninum Petur Mohr Dam og sambandsmanninum Johan Poulsen henda grundlógartryggjaða rætt føroyinga, tá hann læt seg stilla upp til fólkatingsvalið, men tað, sum fekk avgerandi týdning fyri politisku støðuna í Føroyum, var, at Thorstein Petersen varð valdur við so stórum meiriluta, at tað ikki var óhugsandi, at Fólkaflokkurin fór at vinna løgtingsvalið, sum skuldi verða tann 24. august sama ár. Thorstein Petersen fekk 3.452 av teimum tilsamans 7.145 atkvøðunum. Í prosentum

var talan um 48,3% av atkvøðunum. Bretar bóru beinleiðis ótta fyri, at Fólkaflokkurin fór at lýsa Føroyar sum eitt sjálvstøðugt ríki, um so var, at flokkurin vann løgtingsvalið tann 24. august 1943.

Bretski óttin var ikki heilt ógrundaður, tí í valskrá Fólkafloksins, sum varð almannakunngjørd upp undir løgtingsvalið í 1943, stóð m.a., at *„við herseting Danmarkar var danska ríkisstýrið ikki ført fyri at røkja fullveldisrættindi síni yvir Føroyum. ... Tí mátti ein umskipan til, og henda umskipan er, at ábyrgdin verður flutt frá ríkisins fyrrverandi umboð til Løgtingið Føroya fólks vegna. ... Sum tjóðarting Føroya hevur Løgtingið alt stjórnarvaldið í hondum.*“[366] Sjálvstýrisflokkurin var ikki so víðgongdur sum Fólkaflokkurin, men hann kravdi, at Føroyar skuldu fáa sjálvstýri, og Løgtingið skuldi hava lóggávuvald. Javnaðarflokkurin kravdi lóggávuvald til Løgtingið, men kongur skuldi staðfesta og seta í gildi tær av Løgtinginum samtyktu lógir. Landsnevndin skuldi vera landsstjórn Føroya, og hon skuldi hava rætt til at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið. Sambandsflokkurin fór ikki at góðtaka, at rættindi Føroya í Danmarkar ríki vórðu skerd. Í samsvar við bretsku lyftini skuldi fara fram „*genforening med Danmark, når krigen er forbi*“, og tá skuldu samráðingar takast upp við donsku ríkismyndugleikarnar, „*om form og vilkår for samhørighedens fortsættelse*“. Undir hesum samráðingum skuldi støða takast til, um úrslitið av samráðingunum skuldi samtykkjast av Løgtinginum, ella um tað skuldi til fólkaatkvøðu.

Vann Fólkaflokkurin løgtingsvalið tann 24. august 1943, sum fólkatingsvalið gav eina ábending um, at møguleiki var fyri, so var væl hugsandi, at flokkurin fór at royna at fáa lýst Føroyar sum sjálvstøðugt ríki. Óttin fyri, at hetta skuldi henda, hevði við sær, at Vorley, nýggi bretski konsulin í Føroyum, tann 31. juli 1943 fekk til uppgávu at almannakunngera eina yvirlýsing, har bretski politikkurin í Føroyum, sum miðaði ímóti, at oyggjarnar skuldu handast dønum aftur eftir kríggið, sum var staðfestur av Churchill longu tann 11. apríl, varð sligin fastur av nýggjum. Harumframt hildu bretar tað vera neyðugt fyri fyrstu ferð beinleiðis at venda sær til formann Fólkafloksins, Thorstein Petersen. Munnliga gjørdu bretar formanni Fólkafloksins greitt, at Føroyar „*have no constitutional right to secede from Denmark*“. Harumframt varð sagt, at eingin



Thorstein Petersen á veg á valfund í 1943.

„*reputable Government would recognize an independent Faroese state if this was proclaimed by the Lagting while consultation with the Danish Government is impossible*“. Hetta var greið tala. Bretar fóru ikki at góðtaka nakra broyting av nøkrum marki, sum ikki varð framt við frælsum samráðingum, sum ikki kundu fara fram, fyrr enn kríggið var av. Harumframt gjørdu bretar Thorsteini Petersen greitt, at stórpolitiska gongdin í heiminum „*is against the establishment of small states*“,[367] sum hvørki hernaðarliga ella búskaparliga vóru mentir at uppihalda eina óhefta tilveru.

Løgtingsvalið tann 24. august 1943 gjørdist ein stórsigur fyri Fólkaflokkin, sum fekk 4.010 atkvøður, svarandi til 41,5% av atkvøðunum, og flokkurin fekk 12 løgtingsumboð vald. Harvið hevði flokkurin tvífaldað sína løgtingsumboðan, men flokkurin manglaði eitt umboð í at hava reinan meiriluta í Løgtinginum. Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fingu ávíkavist 8 og 5 umboð, tvs. 13 løgtingsumboð tilsaman. Hesir báðir flokkarnir hildu nærum tørn, tí Sambandsflokkurin varðveitti síni umboð, meðan Javnaðarflokkurin misti 1 umboð. Valið gjørdist hinvegin ein vanlukka fyri Sjálvstýrisflokkin, sum misti øll síni umboð í Løgtinginum, hóast hann fekk 1.001 atkvøðu, sum svaraði til 10,3% av atkvøðunum. Grundin var tann, at Sjálvstýrisflokkurin ikki fekk nakað valdømisvalt umboð. Valskipanin aftaná 1939 og undan broytingunum í 1944 ásetti, at fortreytin fyri, at ein flokkur kundi fáa eykavald umboð, var tann, at flokkurin frammanundan hevði fingið valdømisvald umboð (sí s. 172). Tað var hesi regluni í valskipanini, sum Sjálvstýrisflokkurin fall fyri í 1943, og so hevði tað einki at siga, at flokkurin í aðrar mátar hevði so mikið nógvar atkvøður, at tær svaraðu til 2 ella 3 løgtingsumboð, um samanborið varð við tað talið á atkvøðum, sum hinir flokkarnir skuldu hava fyri at fáa løgtingsumboð valt. Hjá Fólkaflokkinum fullu atkvøðurnar best, tí flokkinum nýttist einans 334 atkvøður fyri at fáa eitt umboð valt. Tí fekk flokkurin heili 12 av 25 løgtingsumboðum, hóast flokkurin ikki hevði meira enn 41,5% av atkvøðunum. Hóast valsigur Fólkafloksins veruliga var stórur (í prosentum fór flokkurin frá 25,5% í 1940 til 41,5% í 1943), so átti valskipanin ein part av honum, tí tað, sum Sjálvstýrisflokkurin ikki fekk, kom Fólkaflokkinum til góðar. Valskipanin samsvaraði ikki heilt við hugmyndina um tann

líka valrættin, tá smærri flokkar vóru vorðnir partar av politisku skipanini í Føroyum.

Høvuðsgrundirnar til stóru framgongdina hjá Fólkaflokkinum vóru uttan iva tær búskaparligu uppgangstíðirnar undir krígnum. Føroyska útflutningsvirðið, sum í valárinum 1940 var góðar 13 milliónir, var í valárinum 1943 komið uppá góðar 41 milliónir krónur, men ríkisveitingin var framvegis 2,5 milliónir krónur – á leið tað sama sum í 1940. Tað var ikki so løgið, at nógvir føroyingar í 1943 høvdu ta fatan, at búskaparliga og politiskt fóru Føroyar at kunna gerast sjálvstøðugar innan heilt stutta tíð, soleiðis sum Fólkaflokkurin helt uppá.

Spurningurin var, hvat Fólkaflokkurin kundi nýta sín stóra valsigur til, tí samstarvsflokkarnir høvdu framvegis meirilutan í Løgtinginum. At byrja við vóru kreftir í Javnaðarflokkinum hugaðar fyri at velja at samstarva við Fólkaflokkin heldur enn Sambandsflokkin, men hesin møguleikin hevði við sær, at Vorley fekk boð um at venda sær til Javnaðarflokkin fyri at ávara hann um, at bretar ikki fóru at góðtaka eina føroyska óheftislýsing.[368] Úrslitið varð, at Javnaðarflokkurin tók samstarvið við Sambandsflokkin og amtmannin uppaftur, og hetta samstarvið vardi restina av krígnum. Hartil kom, at Fólka-

Tá kríggið var liðugt, varð skipað fyri sigursgongu í Havn. Her taka gentuskótar ímóti sigursgonguni frammanfyri løgtingshúsinum.



flokkurin greitt hevði fingið at vita frá bretum, at hersetingarvaldið fór ikki at góðtaka eitt sjálvstøðugt føroyskt ríki. Fólkaflokkurin tykist, hóast stóra valsigurin í 1943, at hava broytt politikk hesum viðvíkjandi, tí uppskot um at stovnseta føroyskt ríki, sum flokkurin 2 ferðir hevði lagt fyri tingið undan 1943, varð ikki lagt fyri Løgtingið aftur, meðan kríggið leikaði á. Fólkaflokkurin hevði skilt tann greiða boðskapin frá bretum undan valinum. Møguligar broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum og heimildum Løgtingsins vórðu útsettar til eftir kríggið.

Restina av løgtingstíðarskeiðinum fingu amtmaðurin og bretar ikki nakrar stórvegis trupulleikar við Fólkaflokkinum. Flokkarnir í Løgtinginum nýttu orkuna uppá at fáa framt broytingar, sum ikki beinleiðis høvdu nakað við ríkisrættarligu viðurskiftini at gera. Hinvegin var tað eisini týðuligt, at amtmaðurin var undir stórum trýsti frá nýggja og meira sjálvstýrissinnaða Løgtinginum. Hóast Fólkaflokkurin hevði skilt, at tað ikki fór at bera til at seta á stovn eitt føroyskt ríki, meðan kríggj var, so vóru nøkur mørk flutt í 1943. Longu í november í 1943 legði Fólkaflokkurin uppskotið frá 1940, sum miðaði ímóti at gera føroyskt til rættarmál, fyri tingið, har tað varð samtykt av nýggjum. Í 1940 hevði amtmaðurin sýtt fyri at staðfesta løgtingssamtyktina, men aftaná løgtingsvalið í 1943 varð trýstið á amtmannin so stórt, at hann valdi at staðfesta samtyktina tann 4. januar 1944. Harvið gjørdist føroyskt rættarmál í Føroyum saman við donskum. Hilbert nýtti heldur ikki sýtingarrættin, tá Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin samtyktu at taka danska flaggið, sum veitraði yvir tinghúsinum, niður.[369] Amtmaðurin var undir trýsti frá Løgtinginum aftaná løgtingsvalið í 1943, men tað hevði eisini stóran týdning fyri broytta politikk hansara mótvegis Løgtinginum, at bretar aftaná 1941, tá Danmark skrivaði undir anti-komintern sáttmálan, løgdu eitt ávíst trýst á hann fyri at fáa hann at finna semjur við Løgtingið.

Tað vóru ikki framdar nakrar broytingar í „Midlertidig Styrelsesordning", sum høvdu við sær, at Løgtingið fekk enn størri heimildir undir krígnum. Hóast stóra fólkaflokssigurin til løgtingsvalið í 1943, valdaði friður í Løgtinginum um sjálvstýrisspurningin restina av krígstíðarskeiðinum. Høvuðsgrundirnar til hetta vóru tvær. Í fyrsta lagi hevði amtmaðurin,

eftir at bretar høvdu lagt eitt ávíst trýst á hann, slakað fyri teimum hóvligu sjálvstýriskreftunum í Løgtinginum longu í desember í 1942, tá hann hevði lovað føroyingum samráðingar við danir eftir kríggið um ríkisrættarligu viðurskiftini. Í øðrum lagi høvdu bretar gjørt tað fullkomuliga greitt fyri Fólkaflokkinum, at teir undir ongum umstøðum fóru at viðurkenna eitt sjálvstøðugt føroyskt ríki, sum varð lýst, meðan kríggj var. Báðar grundirnar vóru – í samsvar við bretsku áhugamálini – við til at skapa frið um sjálvstýrisspurningin, so leingi kríggið leikaði á, men tað var líka so greitt, at júst tí, at spurningurin hevði verið hildin niðri av bretum undir krígnum, fór hann at taka seg upp aftur, tá kríggið var av.

## Samráðingar, fólkaatkvøða og heimastýri – 1945-1948

Í europeiskum samanhangi endaði 2. veraldarbardagi tann 14. mai 1945, tá tær seinastu týsku herdeildirnar góvu seg yvir, men lagnan hjá Týsklandi varð ikki avgjørd fyrr enn í tíðarbilinum frá 17. juli til 2. august, tá Churchill, Truman og Stalin samráddust í Potsdam. Fyri Danmark endaði kríggið tann 4. mai, tá landið varð fríðað av teimum sameindu. Spurningurin var nú, hvussu framtíðar viðurskiftini Danmarkar og Føroya millum skuldu skipast.

### Sambandið við ríkismyndugleikarnar verður tikið upp aftur

Tann 15. mars 1945, nakrar dagar áðrenn kríggið var av, hevði Hilbert amtmaður mælt donsku stjórnini til at taka upp samráðingar við føroyingar um eina nýggja skipan millum londini. Harumframt metti amtmaðurin, í samsvar við tað, sum hann hevði sagt í Løgtinginum í desember 1942, at fólkaatkvøða átti at vera um nýskipanaruppskotið í Føroyum. Amtmaðurin gav eisini donsku stjórnini tey ráð, at tað hevði verið *„yderst uheldigt, hvis man for Overgangstiden insisterede på en Tilbagevenden til den gamle Tilstand på Lovgivningsområdet“*.[370]

Danska savningarstjórnin hjá Vilhelm Buhl tók tilmælið frá amtmanninum til eftirtektar. Tann 12. mai 1945, nakrar fáar dagar eftir at Danmark varð fríðað, sendi stjórnin fjarrit til Løgtingið, har sagt varð frá, at *„regeringen godkender, at amtmanden under krigen sammen med lagtinget har administreret*



Bretsku hermenninir biðja farvæl.

*Færøerne, og at administrationen foreløbig føres videre på samme måde*". Samstundis kunnaði amtið um, at „*regeringen ønsker i nær fremtid at modtage en repræsentation fra lagtinget til drøftelse af den fremtidige ordning for Færøernes vedkommende*".[371]

Harvið vann „Midlertidig Styrelsesordning" og tað harí staðfesta lóggávuvald Løgtingsins og amtmansins eina viðurkenning frá donsku ríkismyndugleikunum, sum gekk út yvir tey „*særdeles påtrængende Tilfælde ... naar Rigsdagen ikke er samlet*", sum sipað verður til í grundlógarinnar grein 25. Skipanin skuldi halda áfram at virka, hóast viðurskiftini í Danmark og í Føroyum aftur vóru normal, og sambandið millum ríkispartarnar varð tikið upp aftur. Amtmaðurin og Løgtingið skuldu framhaldandi hava lóggávuvaldið í Føroyum um hendi, hóast sambandið við Ríkisdagin kundi verða tikið upp aftur. „Midlertidig Styrelsesordning" fall ikki burtur, hóast tað stóð í grein 25 í grundlógini, at „*foreløbige Love … straks efter følgende Rigsdags Sammentræden skal forelægges denne, uden hvis Bekræftelse loven bortfalder*". Harvið ber helst til at siga, at skipanin vann viðurkenning óheft av grein 25 í grundlógini. Ríkisdagurin fekk ikki endurreist sín lóggevandi myndugleika yvir Føroyum, tá kríggið var av, men hesin skuldi vera verandi í Føroyum – í øllum førum fyribils.

Hetta var týdningarmikið, tí við hesum góðtóku ríkismyndugleikarnir í einum frælsum Danmark, at tað ikki uttan víðari

fór at bera til at leggja føroyska lóggávuøkið inn undir myndugleika Ríkisdagsins aftur. Føroyska fólkið, ella umboð fyri føroyska fólkið, mátti fáa høvi til siga sína hugsan um hesi viðurskifti fyrst, soleiðis sum Hilbert hevði lovað Løgtinginum longu í 1942. Tað, sum hendi eftir kríggið, var ikki minni týdningarmikið enn tað, sum hendi undir krígnum.

Danska stjórnin var greið yvir, at so nógv var broytt í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, meðan kríggj hevði verið, at samráðingar máttu verða millum partarnar um, hvussu viðurskiftini skuldu skipast í framtíðini. Tað, sum var hent í Føroyum undir krígnum, hevði endaligaført oyggjarnar burturúr amtsstøðuni. Danir vildu helst hava eina nýskipan av viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, sum lá innanfyri grundlógarmarkið. Fortreytirnar fyri samráðingunum skuldu tí vera tíðin undan krígnum, men tað var greitt, at tað var krígstíðin, sum hevði gjørt samráðingar neyðugar. Krígstíðin hevði havt við sær, at frá føroyskari síðu var spurningurin ikki einans, *hvussu* viðurskiftini millum Danmark og Føroyar skuldu skipast í framtíðini; fyri nærum helvtina av tingmanningini var spurningurin, *um* Føroyar í heila tikið skuldu verða ein partur av Danmarkar ríki í framtíðini. Føroyingar, sum vóru komnir nakað upp í árini, tá 2. veraldarbardagi endaði, kundu ikki vera óávirkaðir av tí veruleika, at teir høvdu upplivað tvey heimskríggj, sum bæði høvdu prógvað, at Danmark ikki megnaði at røkja sínar skyldur mótvegis føroyska fólkinum, tá stórpolitisku viðurskiftini gjørdust spent. Harumframt høvdu føroyingar klárað seg væl búskaparliga og politiskt undir krígnum.

Hinvegin hevði 2. veraldarbardagi eisini gjørt tað greitt fyri føroyingum, at einar sjálvstøðugar Føroyar, sum høvdu avgerðandi trygdarpolitiskan týdning fyri stórveldini, fóru at hava trupult við at halda seg uttanfyri hernaðarligu áhugamálini hjá stórveldunum. Hetta var ein stórpolitiskur veruleiki, sum hevði hildið Fólkaflokkinum frá at leggja uppskot um Føroya fullveldi fyri Løgtingið aftaná stóra valsigurin í 1943, og tíðin aftaná kríggið skuldi prógva, at trygdarpolitiski týdningur Føroya ikki var vorðin minni, tá stórpolitisku viðurskiftini vóru komin í eina nýggja legu eftir kríggið.

**Løgtingsvalið í november 1945**

Longu um summarið í 1945 vóru umboð fyri føroysku flokkarnar í Keypmannahavn og kunnaðu donsku samgongustjórnina hjá Vilhelm Buhl um síni sjónarmið.[372] Tað gjørdist greitt alt fyri eitt, at eingin semja var millum flokkarnar í Løgtinginum um, hvussu viðurskiftini millum Danmark og Føroyar skuldu skipast eftir kríggið. Tað gjørdi tað ikki lættari, at eingin av flokkunum hevði meirilutan í Løgtinginum einsamallur.

Hóast Fólkaflokkurin var ímóti, so samdust løgtingsmeirilutin og ríkisstjórnin longu á fundinum í 1945 um, at Føroyar búskaparliga vóru gjørdar leysar av ensku gjaldoyraskipanini og limaðar inn aftur í donsku gjaldoyraskipanina. Ósemjurnar millum flokkarnar høvdu hinvegin við sær, at samráðingarnar um politisku og stjórnarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark vóru útsettar til eftir løgtingsvalið, sum skuldi verða tann 6. november 1945. Tað var serstakliga Fólkaflokkurin, sum einans manglaði eitt løgtingsumboð í einsamallur at hava meiriluta í Løgtinginum, ið hevði strongt á fyri at fáa eitt løgtingsval, áðrenn samráðingar skuldu verða við ríkismyndugleikarnar. Tað var ikki óhugsandi, at Fólkaflokkurin fór at fáa reinan meiriluta í Løgtinginum, nú kríggið var av, og trýst frá bretum ikki longur varð lagt á hugsjónir floksins viðvíkjandi einum sjálvstøðugum føroyskum stati. Hartil kom, at veljaraskarin var nakað broyttur, tí tey 21 ára gomlu høvdu fingið vælrætt síðan seinasta løgtingsval. Tað kundi hugsast, at tey ungu vóru meira broytingarsinnaði enn tey eldru.

Eina góða viku undan løgtingsvalinum tann 6. november almannakunngjørdi danski forsætisráðharrin Vilhelm Buhl eitt bræv til Føroya fólk í Dimmalætting, har hann lovaði føroyingum størri „*tjóðskaparliga og fyrisitingarliga sjálvstøðu í viðurskiftunum við Danmark*“. Viðvíkjandi Løgtinginum stóð, „*at Løgtingsins heimild og ávirkan verður víðkað í teimum førum, lóggávan snýr seg um føroysk viðurskifti*“. Harumframt lovaði Buhl føroyingum peningaligan stuðul, um so var, at teir valdu eina tílíka skipan, sum lá innanfyri ríkisfelagsskapin. Í aðrar mátar fór danska stjórnin at virða eitt føroyskt ynski um at taka seg burturúr ríkisfelagsskapinum, um so varð, at valið „*greitt og skilliga*“ vísti tað. Einki varð nevnt um nakran stuðul, varð tann møguleikin valdur. Danir vildu framvegis, eins og



Í Buhlbrævinum, sum forsætisráðharrin Vilhelm Buhl setti í Dimmalætting 6. november 1945, lovaði hann føroyingum størri tjóðskaparliga og fyrisitingarliga sjálvstøðu. Maðurin til vinstru er Erik Scavenius, sum var uttanríkisráðharri.

bretar undir krígnum, varðveita Føroyar innanfyri ríkisfelagsskapin, men tað, sum var broytt í mun til krígstíðina, var, at danir, sum nú høvdu yvirvaldsrættin í oyggjunum, søgdu seg vilja virða eitt greitt føroyskt ynski um at taka seg burtur úr ríkisfelagsskapinum. Hetta høvdu bretar beinleiðis sagt, at teir ikki fóru at gera, so leingi sum kríggj var.

Veljarafjøldin vísti seg ikki at vera ávirkað av teimum nýggju umstøðunum, tí eitt nýtt Løgting varð valt, sum var nærum samlíkt við tað, ið valt varð í 1943. Í nývalda Løgtinginum sótu 23 løgtingsumboð. Fólkaflokkurin átti 11, men Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin varðveittu meirilutan við 6 løgtingsumboðum hvør. Sjálvstýrisflokkurin varð heldur ikki umboðaður í Løgtinginum hesaferð, hóast valskipanin var broytt í 1943, soleiðis at tað ikki longur var ein treyt fyri at fáa eykavald løgtingsumboð, at listin frammanundan hevði fingið valdømisvald umboð. Meðan Sjálvstýrisflokkurin í 1943 fekk 10,3% av atkvøðunum, so fekk flokkurin í 1945 einans 9,4% av atkvøðunum, og hann fall tí fyri nýggja sperrimarkinum uppá 10%, sum varð sett í gildi, samstundis sum reglan um valdømisvald umboð sum treyt fyri teimum eykavaldu fór úr gildi. Sostatt var støðan í Løgtinginum óbroytt. Fólkaflokkinum manglaði framvegis eitt løgtingsumboð í at hava reinan meiriluta.

### Støðan hjá føroysku flokkunum til nýggja stjórnarskipan

Aftaná løgtingsvalið vóru veruligar samráðingar millum Løg-

tingið og ríkisstjórnina tiknar upp, og í januar í 1946 fór ein løgtingsnevnd til Danmarkar, ið umboðaði allar flokkar uttan Sjálvstýrisflokkin. Ein vinstrastjórn hevði tikið við stjórnarvaldinum í Danmark aftaná fólkatingsvalið í 1945, og nýggi forsætisráðharrin Knud Kristensen stóð á odda fyri donsku samráðingarnevndini. Samráðingarnar hildu áfram inn í mars mánað, men heldur ikki hesaferð eydnaðist tað føroysku flokkunum at semjast um eitt felags uppskot at leggja fyri stjórnina.

Sambandsflokkurin vildi helst hava eina skipan av viðurskiftunum millum ríkispartarnar, sum lá so tætt at amtsstøðuni, sum til bar, og tí vildi flokkurin helst ikki hava nakrar samráðingar um eina nýskipan av viðurskiftunum. Flokkurin ásannaði kortini, at neyðugt fór helst at verða at fremja ávísar broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, sum fóru at geva Løgtinginum størri heimildir, enn tað hevði havt undan 1940. Flokkurin fór kortini ongantíð at góðtaka eina nýskipan av viðurskiftunum millum ríkispartarnar, sum gekk út um grundlógarmarkið. Her var Sambandsflokkurin samdur við ynskjunum hjá donsku stjórnini, men í veruleikanum var flokkurin meira afturhaldandi enn stjórnin, tí meðan stjórnin hjá Vilhelm Buhl í 1945 miðaði ímóti at finna eina samráðingarloysn innanfyri karmarnar í ríkisfelagsskapinum, so hevði formaður Sambandsfloksins longu á tí fyrsta fundinum í 1945 ta áskoðan, at tað alt fyri eitt skuldi vera ein fólkaatkvøða í Føroyum, har føroyingar skuldu sleppa at velja, hvørt teir vildu verða verandi í danska ríkinum ella ikki. Hetta var framhald av tí politikki, sum Stauning hevði grundað í 1930, tá tað var nóg mikið hjá honum at hótta við eini fólkaatkvøðu fyri at fáa sjálvstýriskreftirnar í Føroyum at tagna. Hesa støðu helt flokkurin fast við í 1946 eisini.

Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin vóru samdir við Vilhelm Buhl hesum viðvíkjandi og vildu helst hava eina samráðingarloysn við danir, men samráðingarúrslitið skuldi á ein ella annan hátt verða lagt fyri Føroya fólk. Flokkarnir kundu kortini ikki semjast um stórt annað, tí teir megnaðu ikki at leggja eitt felags meirilutauppskot fyri stjórnina.

Tann 10. mars 1946, tá samráðingarnar við donsku ríkismyndugleikarnar veruliga vóru komnar í gongd, legði Javnaðarflokkurin eitt fullfíggjað uppskot um ein sáttmála millum

føroyingar og danir fyri stjórnina. Hetta uppskotið, sum fevndi um 18 greinar, staðfesti, at „*Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark*" við somu borgararættindum í Danmark sum danir, eins og danir skuldu hava somu rættindir í Føroyum sum føroyingar.

Uppskot Javnaðarfloksins miðaði ímóti, at Løgtingið „*fær ... lóggávuvald á teimum málsøkjum, har tað hevur tikið við fullari fíggjarligari, fyrisitingarligari og mentunarligari ábyrgd*", ella har føroyingar og danir vóru samdir um at gjalda útreiðslurnar í felag. Meðan amtmaðurin í „Midlertidig Styrelsesordning" skuldi staðfesta tær lógir, sum Løgtingið samtykti, so legði uppskot Javnaðarfloksins frá 1946 upp til, at „*Kongur kunnger og staðfestir bæði á føroyskum og donskum tær lógir, sum Føroya Løgting samtykkir*". Lóggávuvaldið skuldi ikki *alt* á føroyskar hendur, men samsvarandi stevnuskrá floksins skuldi Løgtingið fáa lóggávuvald í *serstøkum* føroyskum viðurskiftum. Í uppskoti Javnaðarfloksins varð útgreinað, hvørji málsøki Løgtingið saman við kongi kundi lóggeva fyri uttanum Ríkisdagin, meðan tey øki, sum ikki vóru nevnd, vóru undir ræði Ríkisdagsins – týdningarmiklast av hesum vóru uttanríkis- og verjumál, ið ikki kundu yvirtakast. Tað var kortini ásett í uppskotinum, at Ríkisdagurin ikki kundi seta nakra lóg í gildi í Føroyum, „*sum ikki frammanundan hevur fingið viðgerð og er góðkend av Føroya Løgtingi*". Løgtingið skuldi sostatt hava 1) *lóggávuvald* í serstøkum føroyskum viðurskiftum, og 2) *sýtingarrætt* yvirfyri felags ríkislóggávu, ið Ríkisdagurin ætlaði at seta í gildi í Føroyum – t.v.s. t.d. uttanríkispolitiskum og verjupolitiskum viðurskiftum. Sostatt skuldi eingin lóg kunna setast í gildi í Føroyum uttan góðkenning Løgtingsins, hóast Løgtingið ikki hevði lóggávuvald í øllum viðurskiftum. Fólkatingsumboðanin hevði tí mist sín týdning.

Tað útinnandi valdið skuldi eisini á føroyskar hendur, og javnaðaruppskotið legði upp til, at Løgtingið skuldi velja eitt burturav føroyskt „landsstýri", sum skuldi taka sær av føroysku fyrisitingini. Landsstýrið skuldi sjálvt velja sín formann – forseta – og tað skuldi í øllum lutum verða ábyrgdað Løgtinginum.

Fólkaflokkurin manglaði sum nevnt einans eitt løgtingsumboð í at hava meirilutan í Løgtinginum einsamallur, tá kríggið endaði í 1945, og tað var tí ikki so løgið, at flokkurin



Føroyska samráðingarnevndin er júst komin til Keypmannahavnar. Frá vinstru síggjast: Andreas Møller, Richard Long, Poul Petersen, Petur Mohr Dam, Arup, Johan Poulsen, Jákup Fredrik Øregaard, Kristian Djurhuus og Hilbert amtmaður.

helst vildi bíða við samráðingunum við danir til eftir tað løgtingsvalið, sum seinni varð ásett at verða í november í 1945. Kortini var Thorstein Petersen tað fyrsta umboðið fyri eina føroyska floksleiðslu, sum fór til Danmarkar, og longu í juli 1945 hevði Thorstein Petersen lagt tankar Fólkafloksins viðvíkjandi eini nýskipan av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark fyri donsku stjórnina. Thorstein Petersen hevði borið uppá mál fyri danska forsætisráðharranum, at Fólkaflokkurin ynskti eina *realunión* millum Danmark og Føroyar. Realunión skilti hann á tann hátt, at tvey sjálvstøðug ríki gingu saman í sáttmálabundið ríkjasamband. Hetta merkti, at Fólkaflokkurin hevði hugsað sær eina skipan, har grundlógin ikki longur var felags fyri Danmark og Føroyar. Fólkafloksmenn hildu uppá, at grundlógin varð sett úr gildi í Føroyum í 1940, og teir vildu stríðast fyri, at hon ikki varð sett í gildi aftur í Føroyum.[373]

Tá samráðingarnar veruliga byrjaðu eftir løgtingsvalið í november í 1945, legði Fólkaflokkurin eins og Javnaðarflokkurin eitt skrivligt uppskot fyri donsku stjórnina. Í uppskoti Fólkafloksins frá 13. mars 1946 varð staðfest, at „*Søguligi rættur Føroya til sjálvstøðugt at taka avgerð um fullveldi verður viðurkendur, tá og um Føroya fólk vil tað*“. Sjálv fullveldistøkan varð útsett, men sjálvsavgerðarrætturin skuldi staðfestast í sáttmálanum.

Viðvíkjandi lóggávuvaldi stóð stutt og greitt, at „*Føroya Løgting hevur lóggávu- og játtanarvald í føroyskum málum*“. Lóggávuvaldið skuldi ikki verða býtt sundur millum Ríkisdagin og Løgtingið, soleiðis sum javnaðaruppskotið legði upp til, men alt lóggávuvald í Føroyum skuldi verða hjá Løgtinginum. Hetta merkti, at føroyska ríkisdagsumboðanin misti sín týdning og fall burtur.

Tað var neyvan av tilvild, at uppskot Fólkafloksins nýtti orðingina „*Føroya Løgting hevur lóggávu- og játtanarvald ...*“, meðan uppskot Javnaðarfloksins nýtti orðingina „*Løgtingið fær lóggávuvald ...* “. Mest týðandi munurin millum uppskot Javnaðarfloksins og Fólkafloksins var, at meðan Javnaðarflokkurin ikki hevði nakað ímóti, at Løgtingið fekk lóggávuvald sum heimild *(delegatión)* frá danska Ríkisdegnum, so vildi Fólkaflokkurin fáa viðurkent, at Løgtingið hevði ómissandi lóggávuvald í Føroyum á jøvnum føti *við* tað lóggávuvald, sum Ríkisdagurin hevði í Danmark. Tað var ein fortreyt fyri uppskoti Fólkafloksins, at eingin lóg kundi setast í gildi í Føroyum uttan við samtykt á Løgtingi, og tí var ikki neyðugt at fyrihalda seg til danska ríkislóggávu, soleiðis sum javnaðaruppskotið gjørdi viðvíkjandi sýtingarrættinum til Løgtingið.

Tann grunnleggjandi munurin millum uppskot Javnaðarfloksins og Fólkafloksins var, at grundlógin setti mark fyri, hvussu víðgongt javnaðaruppskotið kundi verða, meðan Fólkaflokkurin ikki hevði hugsað sær eina skipan, sum var innanfyri grundlógarmarkið. Avtala skuldi tí ikki gerast við danir um, hvørji málsøki kundu yvirtakast av Løgtinginum, treytað av ásetingunum í grundlógini, men ein avtala (traktat) skuldi gerast við danir um, hvørji málsøki í heila tikið kundu koma at verða felags.[374] Í útgangsstøði vóru øll málsøki á føroyskum hondum, men spurningurin var, um tað kundi gerast ein sáttmáli við danir, sum miðaði ímóti, at danir fyrisótu nøkur málsøki fyri føroyingar, til føroyingar fyrisitingarliga og fíggjarliga vóru mentir at taka fult ræði á teimum. Her hugsaði Fólkaflokkurin um felags kong sum ímynd uppá ríkjasambandið, men í aðra mátar hægstarætt, sjóverjuna, og uttanríkismál. Hetta merkti ikki, at Ríkisdagurin kundi lóggeva og avgera, hvussu uttanríkispolitisk og verjupolitisk viðurskifti skuldu verða í Føroyum. Allar avgerðir Føroyum viðkomandi

skuldu takast av Løgtinginum. Danir skuldu einans fyrisita nøkur málsøki fyri føroyingar.

Fyrisitingin av Føroyum skuldi eisini á føroyskar hendur sambært fólkafloksuppskotinum, og Løgtingið skuldi velja eina Landsnevnd, sum skuldi ábyrgdast Løgtinginum, eins og javnaðaruppskotið legði upp til.

Sjónarmið Sjálvstýrisfloksins høvdu ikki so stóran týdning fyri samráðingarnar, tí flokkurin var ikki umboðaður í Løgtinginum í tíðarskeiðinum frá 1943 til 1946, og hann var tí heldur ikki umboðaður í sendinevndini, sum fór til Danmarkar í 1946, men flokkurin kravdi, eins og hann hevði kravt upp undir løgtingsvalið í 1943, at Løgtingið skuldi hava lóggávuvald.

**Stjórnaruppskotið og føroysku flokkarnir**

Sjálvt um Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin royndu at finna felags stev undan samráðingunum í 1946, so eydnaðist tað ikki at semjast um eitt uppskot, sum teir kundu leggja fyri donsku stjórnina. Føroyska sendinevndin stóð tí veik mótvegis donsku stjórnini, sum helt uppá, at framhald av ríkisfelagsskapinum merkti, at tað einans kundi verða talan um *eitt lóggávuvald*, sum Ríkisdagurin skuldi hava um hendi. Alt annað var í stríð við grundlógina og kundi ikki góðtakast. At enda legði danska stjórnin sítt egna uppskot fyri føroysku sendinevndina. Hetta hendi tann seinasta samráðingardagin, tann 25. mars 1946, og hetta var ein beinleiðis avleiðing av tí veruleika, at føroyska sendinevndin ikki kundi semjast um eitt meirilutauppskot.

„Stjórnaruppskotið" staðfesti í grein 1, at „*Sum higartil verða Føroyar partur av Danmarkar ríki við somu ríkisrættarligu støðu sum fyri 1940*". Henda orðingin bendir á, at danska stjórnin var í iva um, av hvørjum rættarligum slag „Midlertidig Styrelsesordning" var. Upprunaliga vildi danska stjórnin hava, at tað beinleiðis stóð „*Sum higartil verða Føroyar undir donsku grundlógini*", men Fólkaflokkurin vildi hava orðingina broytta, soleiðis at tað kom at standa: „*Støða Føroya í ríkinum verður sum higartil*".[375] Einki skuldi beinleiðis standa um, hvussu viðurskiftini millum Danmark og Føroyar vóru. Við hesi orðing hevði Fólkaflokkurin kunnað hildið uppá, at føroyingar ongantíð høvdu góðtikið, at Føroyar vóru lagdar undir donsku grundlógina (sí s. 90). Harumframt kundi flokkurin halda

uppá, at Føroyar í øllum føri vóru fluttar út um grundlógarmarkið í 1940, tá „Midlertidig Styrelsesordning" varð sett í verk. Í báðum førum hevði avleiðingin verið, at stjórnaruppskotið, um tað varð sett í gildi í Føroyum, hevði kunnað verið tulkað sum verandi uttanfyri grundlógina.

Orðingina hjá Fólkaflokkinum kundi danska stjórnin ikki ganga við til, og tí kom endaliga orðingin í „Stjórnaruppskotinum" at vísa til tíðina undan 1940. Við hesi orðingini slapp stjórnin uttanum í sjálvum stjórnaruppskotinum at taka støðu til próvførslur Fólkafloksins viðvíkjandi ríkisrættarligu støðu Føroya undir krígnum, men tað er eisini týdningarmikið at leggja til merkis, at við hesi orðing góðtók stjórnin í veruleikanum, at tað var ein grundleggjandi munur millum ríkisrættarligu viðurskifti Føroya undan 1940 og aftaná. Stjórnin góðtók í veruleikanum grundsjónarmið Fólkafloksins um, at grundlógin varð sett úr gildi í Føroyum undir krígnum.

Fólkaflokkurin kundi kortini ikki brúka orðingina hjá stjórnini til nakað, tí stjórnaruppskotið kom at taka útgangsstøði í tíðini undan 1940. Flokkurin kundi sjálvandi framvegis halda uppá, at Føroyar ongantíð vóru komnar undir grundlógina, men týdningarmiklari fyri støðutakan Fólkafloksins var, at við orðing stjórnarinnar hevði Fólkaflokkurin eisini komið at góðtikið, at tað var ein grundleggjandi munur millum ríkisrættarligu støðu Føroya undan og eftir 1940. Hevði flokkurin góðtikið stjórnaruppskotið, ið varð grundað á ríkisrættarligu viðurskifti Føroya undan 1940, so hevði flokkurin eisini góðtikið eina skipan, sum var grundleggjandi øðrvísi enn tann, sum var galdandi aftaná 1940. Fólkaflokkurin hevði tá góðtikið, at grundlógin varð sett í gildi í Føroyum í tíðini aftaná 1850.

Uppskot stjórnarinnar legði sostatt upp til eina skipan av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, sum týðuliga var innanfyri grundlógarmarkið. Hetta var beinleiðis ásett í grein 2, har tað stóð, at „*Henda skipan verður ásett við lóg eftir samráðing við Løgtingið innan karmar grundlógarinnar*". Hetta var nakað, sum Fólkaflokkurin ikki kundi góðtaka, meðan hetta ikki var so týdningarmikið fyri Javnaðarflokkin.

Viðvíkjandi Løgtinginum staðfesti uppskot stjórnarinnar, at 1) „*Løgtingið fær heimild til at geva rættarforskriftir og ásetingar og aðrar reglur, sum viðvíkja lóggávu og fyriskipanum* (á donskum „*af lovgivningsmæssig eller anordningsmæssig karakter*") *í serstøkum*



Føroyska samráðingarnevndin tók lut í eini sending hjá Danmarks Radio. Frá vinstru sita Petur Mohr Dam, Heine Heinesen, Johan M. Fr. Poulsen, Rikard Long, Jákup Fr. Øregaard, Kristian Djurhuus og Poul Petersen. Heine Heinesen, sum var ættaður úr Bø og fosturpápi Knud Heinesen, skipaði fyri sendingini, sum nevndist „Et samfund i støbeskeen".

*føroyskum málum ...*" og 2) viðvíkjandi ríkislóggávuni stóð, at tær „*skulu ikki koma í gildi í Føroyum fyrr enn Løgtingið hevur havt høvi at geva ummæli, møguliga við slíkum broytingum, sum umstøðurnar tala fyri*", við undantak av „*grundlógini, fíggjarlógini, lógum um ríkislán og øðrum lógum*". Tað var tí neyðugt at varðveita eina føroyska ríkisdagsumboðan undir hesi skipan, tí Ríkisdagurin fekk staðfest lóggávumyndugleika í Føroyum. Hartil skuldi Løgtingið fáa heimild til at krevja skattir inn í Føroyum og at ráða yvir skattainntøkunum.

Javnaðarflokkurin kundi góðtaka, at lóggevandi myndugleiki Løgtingsins varð givin sum heimild í serstøkum føroyskum málsøkjum, men spurningurin var, um uppskotið veruliga gav Løgtinginum lóggevandi myndugleika, tí orðið lóggávuvald varð ikki beinleiðis nýtt í uppskotinum. Verður sæð burtur frá ógreiðu orðingunum viðvíkjandi lóggávuvaldinum, so kann harumframt staðfestast, at onnur viðurskifti vóru í uppskotinum, sum beinleiðis vóru í andsøgn til uppskot Javnaðarfloksins. T.d. hevði Javnaðarflokkurin kravt *sýtingarrætt* til Løgtingið, tá ríkislóggáva skuldi setast í gildi í Føroyum, men stjórnaruppskotið gav einans Løgtinginum ein *ummælisrætt*, sum hartil varð avmarkaður av lógum „*sum eru av slíkum slagi, at tær tola ikki slíkar skerjingar, ella tá ráðharri metir, at tær ikki kunnu bíða eftir ummæli Løgtingsins*". Hetta merkti, at Løgtingið ikki hevði ræði og myndugleika á øllum føroyskum viður-

skiftum, og tað kundu hvørki Javnaðarflokkurin ella Fólkaflokkurin góðtaka.

Viðvíkjandi fyrisitingini stóð í stjórnaruppskotinum, at hon skuldi verða løgd undir eitt ráð (landsstýri), sum varð samansett av einum ríkisumboðsmanni sum formanni og fýra limum úr Landsnevnd Løgtingsins. Formaðurin í Landsnevndini skuldi vera varaformaður Landsstýrisins. Tá mál, sum vóru løgd til Løgtingið, vóru til viðgerðar, skuldu teir fýra limirnir í Landsnevndini einsamallir taka avgerðirnar, undir leiðslu av formanni Landsnevndarinnar, hvørs atkvøða skuldi verða avgerðandi, um tað stóð á jøvnum. Í málum, sum einans viðvíktu ríkisfyrisitingini, skuldi ríkisumboðsmaðurin einsamallur taka avgerðir. Í øllum øðrum málsøkjum skuldi Landsstýrið í felag taka avgerðir.

Hvørki Fólkaflokkurin ella Javnaðarflokkurin kundu góðtaka eitt samansett landsstýri, har ein ríkisumboðsmaður skuldi verða formaður, tí báðir flokkarnir høvdu sett krav fram um eitt reint føroyskt landsstýri. Sambandsflokkurin helt hinvegin, at stjórnin hevði slakað ov nógv fyri føroyskum sjálvstýriskrøvum, men flokkurin vildi kortini mæla til, at uppskotið varð samtykt, um so var, at meiriluti fekst fyri tí.

Í veruleikanum var eingin føroyskur flokkur nøgdur við stjórnaruppskotið, men spurningurin var, um ríkismyndugleikarnir vildu slaka meira fyri føroysku ynskjunum. Forsætisráðharrin Knud Kristensen hevði gjørt greitt undir samráðingunum í 1946, at valdu føroyingar eina skipan uttanfyri grundlógina, tvs. eina skipan, har Løgtingið fekk veruligt lóggávuvald, so kundi tað hugsast, at ein sáttmálaskipan av onkrum slag kundi gerast, men ein tílík traktat „*vil naturligvis ikke kunne indeholde økonomiske Forpligtelser for Danmark med Hensyn til de sociale og andre Opgaver på Færøerne*“.[376] Hetta var í veruleikanum tað sama, sum Vilhelm Buhl hevði skrivað í Dimmalætting upp undir løgtingsvalið í november 1945. Tá endaliga uppskot stjórnarinnar varð lagt fyri føroysku sendinevndina tann 25. mars 1946, segði Knud Kristensen hartil, at hetta var tað longsta, sum danska stjórnin kundi strekkja seg innanfyri ríkiseindina. Forsætisráðharrin var av teirri áskoðan, at stjórnaruppskotið átti at verið staðfest við eini fólkaatkvøðu, og fekst ikki meiriluti fyri tí, so mátti avleiðingin verða tann, at Føroyar gjørdust sjálvstøðugar. Fíggjarmálaráðharrin Thor-

kild Kristensen og uttanríkismálaráðharrin Gustav Rasmussen vóru ikki samdir við forsætisráðharranum í hesum, tí teir meintu báðir, at neyðugt var ikki við fólkaatkvøðu, um Løgtingið samtykti stjórnaruppskotið, men tóku føroyingar ikki við stjórnaruppskotinum, so fór avleiðingin at verða tann, at Føroyar fóru aftur í amtsstøðuna undan 1940.[377]

Hóast ósemjuna millum forsætisráðharran og fíggjar- og uttanríkismálaráðharran stuðlaði danska stjórnin í roynd og veru sjónarmiði Sambandsfloksins, tí talan var í øllum førum um ein „Stjórnaruppskotið ella einki politikk", sum legði trýst á Javnaðarflokkin, sum í aðra mátar als ikki var nøgdur við stjórnaruppskotið. Javnaðarstjórnin hjá Vilhelm Buhl hevði í 1945 ikki viljað stuðlað Sambandsflokkinum við hóttanum um eina fólkaatkvøðu, har kostirnir vóru annaðhvørt loysing *ella* framhald av ríkisfelagsskapinum, men í 1946 var tað júst hesin politikkur, sum vinstrastjórnin førdi undir leiðslu av Knud Kristensen. Tað er ikki vist, at Javnaðarflokkurin hevði viljað latið seg trýst til at samtykkja stjórnaruppskotið í Løgtinginum, um tað kom til atkvøðugreiðslu, men hóttanirnar um endurreisn av amtsstøðuni ella loysing og avtøku av øllum almannaveitingunum, um so var, at ikki varð tikið við stjórnaruppskotinum, mugu hava ávirkað tann sosialt sinnaða Sjálvstýrisflokkin, sum ongantíð hevði verið loysingarflokkur.



Knud Kristensen, fremst til vinstru, var forsætisráðharri, tá fólkaatkvøða var í Føroyum 14. september 1946.

Javnaðarflokkurin slapp undan at taka støðu til stjórnaruppskotið í Løgtinginum, tí áðrenn málið kom í Løgtingið, boðaði javnaðartingmaðurin Jákup í Jákupsstovu frá, at hann fór at atkvøða ímóti stjórnaruppskotinum. Harvið kundi tingið ikki samtykkja stjórnaruppskotið, tí meiriluti var ikki fyri tí í Løgtinginum, sjálvt um restin av Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkurin tóku undir við tí. Fólkið mátti fáa høvi til at tala, sum Sambandsflokkurin hevði hildið uppá frá byrjan, nú stuðlaður av forsætisráðharranum.

**Fólkaatkvøða um ríkisrættarligu støðu Føroya**

Undir hesum umstøðum skeyt Fólkaflokkurin upp at hava fólkaatkvøðu um stjórnaruppskotið. Flokkurin meinti, at tað týdningarmesta var at fáa stjórnaruppskotið vrakað, soleiðis at ein nýggj samráðingarheimild kundi fáast til vega frá Føroya fólki, har útgangsstøðið var ein skipan, ið var víðgongdari enn stjórnaruppskotið, men sum tó ikki hevði loysing við sær. Talan skuldi verða um eina vegleiðandi fólkaatkvøðu, ið skuldi verða grundarlag undir nýggjum samráðingum millum danir og føroyingar.

Við hesum útgangsstøði legði Fólkaflokkurin 3 uppskot um fólkaatkvøðu fyri Løgtingið. Tað fyrsta uppskotið legði upp til, at 4 spurningar skuldu leggjast fyri veljaran, har spurt varð, um framtíðarstøða Føroya skuldi verða løgd: 1. nærri støðuni fyri 1940 enn stjórnaruppskotið, 2. ta leið stjórnaruppskotið vísir á, 3. fríari enn stjórnaruppskotið vísir, ella 4. loysing Danmarkar og Føroya millum. Seinni var tann broyting framd í uppskotinum, at tann fyrsti spurningurin varð tikin burtur, soleiðis at einans tríggir spurningar vóru. Veljarin skuldi seta kross út fyri einum av spurningunum. At enda broytti Fólkaflokkurin uppskotið á tann hátt, at einans spurningurin: „*Ynskja tygum at stjórnaruppskotið skal setast í gildi í Føroyum?*“ skuldi leggjast fyri veljaran. Hendan spurningin skuldi veljarin svara „*Ja*“ ella „*Nei*“ til.

Varð fólkaatkvøðan løgd soleiðis til rættis, so vónaðu fólkafloksmenninir, at stjórnaruppskotið fór at verða vrakað, uttan at loysingin av teirri grund varð samtykt. Nýggjar samráðingar máttu tí takast upp millum Løgtingið og ríkismyndugleikarnar um eina fríari skipan, sum lá ímillum loysingina og stjórnaruppskotið. Helst var tað úrslitið av løgtingsvalinum í november

1945, sum hevði fingið Fólkaflokkin at koma til ta niðurstøðu, at meirilutin av føroysku veljarunum vildu hava eina skipan, sum var fríari enn stjórnaruppskotið, men ikki var loysing kortini.

Sjónarmið Fólkafloksins viðvíkjandi nýggjum samráðingum millum Løgting og ríkismyndugleikarnar, um so var, at stjórnaruppskotið varð vrakað, samsvaraði ikki við tað, sum forsætisráðharrin hevði sagt, tá samráðingarnar endaðu í mars 1946, tá hann legði upp til eina fólkaatkvøðu, har føroyingar annaðhvørt skuldu velja stjórnaruppskotið ella loysing. Hetta samsvaraði heldur ikki við sjónarmiðini hjá uttanríkis- og fíggjarmálaráðharrunum, sum høvdu sagt annaðhvørt stjórnaruppskotið ella amtsstøðan. Nýggjar samráðingar var ikki ein møguleiki, ið stjórnin hevði nevnt.

Uppskot Fólkafloksins um vegleiðandi fólkaatkvøðu, sum skuldi føra til nýggjar samráðingar millum føroyingar og danir, vóru øll feld í Løgtinginum, tí einans fólkafloksumboðini í Løgtinginum tóku undir við teimum.

Javnaðarmaðurin Jákup í Jákupsstovu, sum hevði vrakað stjórnaruppskotið, og harvið gjørt tað ómøguligt at fáa tað samtykt í Løgtinginum, vildi ikki taka undir við uppskoti Fólkafloksins um fólkaatkvøðu, tí hann var veruligur loysingarmaður, og hann vildi tí hava, at føroyingar skuldu sleppa at velja millum stjórnaruppskotið og loysing. Hetta var eisini hugsanin í Sambandsflokkinum og restini av Javnaðarflokkinum, og tí var eitt broytingaruppskot lagt fyri Løgtingið, ið segði, at einans tveir spurningar skuldu verða settir veljarunum: 1. Ynskja tygum danska stjórnaruppskotið sett í gildi? og 2. Ynskja tygum loysing Føroya og Danmarkar millum? Veljarin skuldi seta kross út fyri annan spurningin, alt annað var ein ógildug atkvøða. Hetta uppskotið varð samtykt av øllum tingmonnum Javnaðarfloksins og Sambandsfloksins, soleiðis at 12 atkvøður vóru fyri, meðan 11 vóru ímóti. Fólkaatkvøðudagurin varð settur at verða tann 14. september 1946.

Harvið hevði veljarin fingið tvinnar kostir í at velja: antin stjórnaruppskotið ella loysing. Helst hóvaði hetta væl Sambandsflokkinum, tí tað var lættari at fáa fólk at atkvøða fyri stjórnaruppskotinum, tá eingin annar møguleiki var enn loysingin. Javnaðarflokkurin vardi orðingina á tann hátt, at tá forsætisráðharrin hevði sagt, at tað einans vóru hesir báðir

møguleikarnir at velja ímillum, so var tað eingin meining í at orða atkvøðuspurningarnir á ein tílíkan hátt, at veljarin fekk ta fatan, at tað funnust aðrir møguleikar. Hinvegin hóvaði henda orðingin illa Fólkaflokkinum, tí nú var vandi fyri, at stjórnaruppskotið, sum flokkurin undir ongum umstøðum kundi góðtaka, fór at verða góðkent.

Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fóru undir valstríðið við tí fyri eyga at fáa stjórnaruppskotið samtykt. Grundgeving Javnaðarfloksins var tann, at hetta var tað longsta, sum ríkismyndugleikarnir vildu geva seg á hesum sinni, men hóast føroyingar góðtóku stjórnaruppskotið, so merkti hetta ikki, at føroyingar ikki kundu fáa størri sjálvstýri seinni. Fólkaflokkurin hevði ilt við at taka støðu, men at enda bað Thorstein Petersen teir veljarar, sum ynsktu at atkvøða fyri loysingini, um at gera tað. Í øðrum lagi segði hann, at teir veljarar, sum ikki hildu seg til at velja loysing, skuldu atkvøða „*Nei*“ út fyri spurninginum: „*Ynskja tygum danska stjórnaruppskotið sett í gildi?*“. Sambært Thorsteini Petersen skuldu hesar atkvøðurnar tulkast á tann hátt, at veljarin harvið vrakaði stjórnaruppskotið uttan at binda seg til loysingina. „Loysingaratkvøðurnar“ og „Nei atkvøðurnar“ í felag skuldu so skiljast á tann hátt, at hesin bólkurin tilsamans ynskti eina skipan, ið var víðgongdari enn stjórnaruppskotið, men kortini ikki var loysing. Harvið hevði Thorstein Petersen snýkt ein triðja møguleika inn í fólkaatkvøðuna, sum hann vónaði, at meiriluti fór at verða fyri. Trupulleikin var einans, at tað var at villeiða veljaran at biðja hann velja „*Nei*“, tí ein tílík atkvøða var sambært sjálvari løgtingssamtyktini um fólkaatkvøðu ógildug, og hon fór sjálvandi ikki at verða tald við, hóast løgtingsformaðurin og løgfrøðingurin Thorstein Petersen hevði lovað tað. Hetta gjørdu Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin eisini greitt í teirra blaðskriving upp undir fólkaatkvøðuna.

Tann einasti tingmaðurin, sum beinleiðis heitti á fólk um at atkvøða fyri loysing, var Jákup í Jákupsstovu. Loysingarmaðurin Jóannes Patursson, formaður Fólkafloksins, var deyður tann 2. august 1946. Uttanfyri politisku skipanina stóð eitt nýstovnað felag *Føroyingafelag*, sum beinleiðis heitti á fólk um at atkvøða fyri loysing. Hesi fólk, sum seinni stovnaðu *Tjóðveldisflokkin*, ferðaðust kring oyggjarnar og royndu at sannføra fólk um, at loysingin var tað rætta. Til hetta endamál gav




Úrslitið av fólkatkvøðuni kløkkaði onkran. Hesa myndina teknaði William Heinesen í ólavsøkuteitið 1948. Menninir eru Andras Samuelsen og Petur Mohr Dam.

felagið bóklingin *Føroyar*[378] út, ið varð sendur í hvørt hús í Føroyum, har uppskot til føroyska grundlóg og fíggjarlóg fyri komandi árið vóru prentað.

Helst hava „Føringafelagsmenninir" ávirkað føroyska veljaran nógv, tí tá atkvøðurnar vóru upptaldar, vísti tað seg heldur óvæntað fyri alla ta politisku skipanina, at fleiri høvdu valt loysing enn stjórnaruppskotið. Meirilutin fyri loysingini var ikki stórur, men stjórnaruppskotið hevði fingið 5.499 atkvøður, meðan loysingin hevði fingið 5.660 atkvøður; einans 161 atkvøður vóru á muni. Hartil kom, at 481 atkvøður, tvs. tríggjar ferðir so nógvar sum munurin millum loysingina og stjórnaruppskotið, vóru ógildugar. Millum tær ógildugu atkvøðurnar vóru eisini nógvar „Nei" atkvøður. Størsti triðingurin av veljarafjøldini, 5.900 veljarar, var ikki á vali. Verður sæð burtur frá teimum ógildugu atkvøðunum, so var valluttøkan 63,7%, verða tær taldar við, so kom valluttøkan uppá 66,4%. Bæði tølini finnast í fakligu bókmentunum um fólkaatkvøðuna,[379] men líka mikið hvat atkvøðuprosent verður nýtt, so kann ikki sigast, at valluttøkan var høg, serstakliga tá hugsað verður um, hvussu týdningarmikil atkvøðugreiðslan var. Til samanberingar kann nevnast, at til løgtingsvalið í 1945 var valluttøkan 75%,[380] og tá íslendingar í 1944 høvdu fólkaatkvøðu um íslendskt fullveldi, atkvøddu 97% av teimum meira enn 97% av íslendsku veljarafjøldini, ið vóru á vali, fyri íslendskum fullveldi.[381]

Føroyingar vóru í 1946 ikki eins sannførdir um loysingina, sum íslendingar vóru í 1944, og óivað var fólkaatkvøðuorðingin, ið einans gav føroyingum møguleika fyri at velja millum loysing og stjórnaruppskotið, ein av grundunum til, at valluttøkan heldur ikki kom í nánd av teirri íslendsku. Hugsast kann, at meginparturin av tí stóra triðinginum av veljarafjøldini, sum ikki var á vali, ikki helt síni sjónarmið verða umboðaði í teimum báðum spurningunum, ið settir vóru. Hetta broytir kortini ikki tann veruleika, at av teimum 63,7% av veljarafjøldini, sum gildugt nýttu sín rætt til at atkvøða í 1946, atkvøddi ein meiriluti uppá 50,7% fyri loysing, meðan 49,3% atkvøddu fyri stjórnaruppskotinum. Formliga høvdu føroyingar valt loysing, spurningurin varð, hvat nú skuldi henda.

**Tiltøk løgtingsmeirilutans og upploysn Løgtingsins**

Tær fyrstu politisku viðmerkingarnar úr Danmark harmaðust um úrslitið, men flestu donsku politikararnir søgdu, at metti Løgtingið, at fólkaatkvøðan bar boð um loysing, so fóru danir at góðtaka hetta. Forsætisráðharrin Knud Kristensen segði beinleiðis, at føroyingar høvdu valt loysing, og tí máttu Danmark og Føroyar fara frá hvørjum øðrum. Forsætisráðharrin helt sostatt fast um ta støðu, sum hann hevði tikið undan fólkaatkvøðuni. Aðrir danskir politikarar vóru ikki heilt ósamdir við forsætisráðharranum. Tann einasti, sum tosaði um nýggjar samráðingar, var fíggjarmálaráðharrin Thorkild Kristensen.

Undir hesum umstøðum var ikki so løgið, at løgtingsmeirilutin, teir 11 fólkaflokstingmenninir og Jákup í Jákupsstovu, fóru undir at fyrireika stovnsetanina av einum føroyskum ríki. Mannagongdin skuldi verða tann, at fyrst skuldi Løgtingið taka við stjórnarvaldinum í Føroyum, soleiðis at valdið varð flutt frá ríkismyndugleikunum til Løgtingið. Innleiðandi samráðingar skuldu takast upp við danir alt fyri eitt, um hvussu ítøkiliga skuldi farast fram, men løgtingsval skuldi vera, áðrenn endaligu samráðingarnar við danir skuldu vera. Eitt nýtt Løgting skuldi standa fyri teimum endaligu samráðingunum.

Helst hevur tann lítli meirilutin fyri loysingini havt við sær, at løgtingsmeirilutin ikki hevur verið fullvísur í, at løgtingsmeirilutin eftir eitt løgtingsval fór at verða tann sami sum

undan løgtingsvalinum, tí tann 18. september royndi Fólkaflokkurin og Jákup í Jákupsstovu at binda eitt komandi Løgting til at fremja loysingina. Hetta varð gjørt á tann hátt, at tað varð staðfest í gerðabók Løgtingsins, at „*Føroya fólk hevur við fólkaatkvøðuni 14. september 1946 klárt givið tinginum til kenna, at alt landræði fyri Føroyum er her á landi, og at Løgtingsins skylda tí er at útinna fólksins vilja*". Tann 21. september kom gerðabókin eftir uppskoti frá formanni Sambandsfloksins Andrass Samuelsen til atkvøðugreiðslu í Løgtinginum, har hon varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Harvið gjørdist orðingin í gerðabókini til eina løgtingssamtykt.

Sama dag kom eitt uppskot í Løgtingið frá somu 12 tingmonnum, ið m.a. segði, at við fólkaatkvøðuni var „*loysing Danmarkar og Føroya millum … samtykt. Hesin fólkadómur kunnger fólksins umboðsmonnum, Føroya Løgtingið, sína bindandi avgerð, at stjórnarræði Føroya nú er hjá Føroya fólki og áleggur á henda hátt Løgtinginum at fremja fólksins vilja*". Áðrenn Løgtingið tók stig til at fremja fólkaviljan, skuldi stjórnin gerast kunnug við avgerðir tess. Hetta uppskotið varð ikki samtykt í Løgtinginum hendan dagin, men bæði samtyktin og uppskotið vóru kunngjørd fyri donsku stjórnini umvegis amtmannin longu sama dag. Týdningarmikið er at leggja til merkis, at fólkaatkvøðan ikki longur varð mett at vera *vegleiðandi* av Fólkaflokkinum, men hon varð tulkað at vera ein „*bindandi fólkadómur*". Hetta skuldi fáa avgerandi týdning.

Tann 22. september kom bræv frá amtinum til Løgtingið, har amtmaðurin mótmælti, at Løgtingið einvíst hevði samtykt, at yvirvaldsrætturin var hjá Løgtinginum. Amtmaðurin vísti til grundlógarinnar grein 18, sum staðfesti, at „*kongur kann ikki uttan samtykki Ríkisdagsins … lata nakran landslut frá sær ella gera semju um skyldur, ið kunnu broyta ríkisrættarligu støðuna*". Próvførslan var sostatt tann, at fólkaatkvøðan í sjálvum sær ikki broytti ríkisrættarligu støðu Føroya, tí hetta kundi einans Ríkisdagurin gera. Skuldi fólkaatkvøðan verið løgfrøðiliga bindandi, soleiðis sum løgtingsmeirilutin nú tóktist at halda uppá, so skuldi hon verið samtykt av Ríkisdegnum, og ikki einans av Løgtinginum, við loyvi frá stjórnini. Við hesi grundgeving kunnger amtmaðurin fyri Løgtinginum, at løgtingssamtyktin um yvirvaldsrættin er at meta sum ólóglig, og hann ógildar tí samtyktina, til hann hevur fingið nærri upp-

lýsingar frá hægri stað. Hetta varð gjørt samsvarandi teimum heimildum, sum amtmaðurin hevði sambært ásetingunum í løgtingslógini frá 1923 (sí s. 178).

Løgtingsmeirilutin – Fólkaflokkurin og Jákup í Jákupsstovu – var nú komin í veruligan andróður, tí vinstrastjórnin undir leiðslu av Knud Kristensen, sum bæði undan og í døgunum beint eftir fólkaatkvøðuna hevði sagt, at loysingin gjørdist veruleiki, um so varð, at stjórnaruppskotið ikki varð samtykt, tóktist nú at hava skift støðu. Forsætisráðharrin Knud Kristensen legðist sjúkur nakrar dagar eftir fólkaatkvøðuna, og tann 23. september staðfesti virkandi forsætisráðharrin Thorkild Kristensen í einum brævi til Løgtingið, at løgtingssamtyktin um yvirvaldsrættin var ólóglig, og stjórnarstovnar, sum vóru samtyktir við støði í henni, vóru tí eisini ólógligir. Líka mikið, hvussu úrslitið av fólkaatkvøðuni í aðrar mátar varð tulkað, so hevði hon, sambært brævinum frá forsætisráðharranum, ikki í sjálvum sær við sær, at Føroyar vóru loystar úr grundlógarfelagsskapinum. Skuldu Føroyar loysast úr grundlógarfelagsskapinum, so kundi hetta lógliga ikki gerast á annan hátt enn við samráðingum millum Løgtingið og ríkismyndugleikarnar, ið at enda vóru staðfestar av Ríkisdegnum. Tástaðni varð yvirvaldsrætturin løgfrøðiliga fluttur frá Ríkisdegnum til Løgtingið.

Løgtingsmeirilutin var greiður yvir hesi statsrættarligu viðurskifti, men hann tulkaði støðuna soleiðis, at tá stjórnin hevði loyvt føroyingum at hava fólkaatkvøðu um ríkisrættarligu viðurskiftini, so átók hon sær harvið at syrgja fyri, at Ríkisdagurin gjørdi tær neyðugu samtyktirnar, soleiðis at fólkaviljin kundi verða framdur á lógligan hátt. Hinvegin ber til at spyrja, um fólkaatkvøðan ikki var løgfrøðiliga bindandi, tí tað ber til at halda uppá, at amtmaðurin, sum saman við Løgtinginum hevði alt stjórnarvaldið (lóggávu- og útinnandi vald) í Føroyum um hendi (sí s. 235), hevði staðfest fólkaatkvøðusamtyktina *vegna* Ríkisdagin. Løgtingsmeirilutin valdi kortini at kunna stjórnina um síni løgtingsuppskot, áðrenn tey vóru løgd fyri Løgtingið, soleiðis at stjórnin kundi fáa tey avgreidd í Ríkisdegnum, áðrenn tey vóru samtykt í Løgtinginum, men løgtingsmeirilutin skilti hesi viðurskifti sum ein avgreiðsluspurning og ikki sum ein spurning um at taka upp nýggjar samráðingar millum Løgtingið og ríkismyndugleikarnar. Úr sjón-

arhorni løgtingsmeirilutans var avgerðin um loysingina tikin, restin var formalitetir.

Einki løgið var í hesum sjónarmiði, tá hugsað verður um fyrstu politisku viðmerkingarnar úr Danmark til úrslitið av fólkaatkvøðuni, men soleiðis fataði stjórnin ikki longur støðuna. Formliga hevði „forsætisráðharrin" ikki skift støðu, tí hann segði ikki, at ríkismyndugleikarnir ikki fóru at virða úrslitið av fólkaatkvøðuni, men hann segði einans, at tann mannagongd, sum løgtingsmeirilutin nýtti til tess at fremja sína tulking av fólkaatkvøðuúrslitinum, var ólóglig. Hetta sjónarmið stjórnarinnar kann setast í samanhang við tað, sum tann danski statsrættarkøni løgfrøðingurin Alf Ross hevði sagt um fólkaatkvøður: at tað í veruleikanum eingin munur er



*Kongens Opløsning af Lagtinget.*

„Beklageligt, hvis Danmark og Færøerne ikke kan fortsætte."

BEKENDTGØRELSE

om

Opløsning af Lagtinget og Udskrivning af nyt Valg til Lagtinget.

*Fredag den 8. November 1946.*

Færø Amt, den 25. September 1946.

C. A. Vagn-Hansen,
kst.

Í eini eykaútgávu av Dimmalætting 26. september 1946 varð kunngjørt, at Løgtingið var uppleyst.

millum bindandi og vegleiðandi fólkaatkvøður, tí meðan tann fyrra er *løgfrøðiliga* bindandi, so er tann seinna *politiskt* og *moralskt* bindandi. Tvs. at tá danska stjórnin hevði loyvt føroyingum at hava fólkaatkvøðu um annaðhvørt loysing ella stjórnaruppskotið, so varð hon politiskt og moralskt bundin til at góðkenna úrslitið, sjálvt um fólkaatkvøðan í aðra mátar var løgfrøðiliga vegleiðandi. Alf Ross legði kortini áherðslu á, at skuldu Føroyar loysast úr grundlógarfelagsskapinum, so skuldi hetta fremjast á lógligan hátt, tvs. við samtykt í Ríkisdegnum, og ikki við einvísari løgtingssamtykt, grundað á eina vegleiðandi fólkaatkvøðu.

Spurningurin var, um ríkismyndugleikarnir *vildu* leggja eina tílíka samtykt fyri Ríkisdagin, soleiðis at føroyski fólkaviljin *kundi* fremjast á lógligan hátt. Løgfrøðiliga var stjórnin samd við Alf Ross, eins og løgtingsmeirilutin var tað, men í verki var lítið at ivast í, at stjórnin hevði vent politikkinum hjá Knud Kristensen bakið, tí nú varð skotið upp, at fyrst skuldi løgtingsval verða í Føroyum, og síðani skuldu umboð fyri nýggja Løgtingið samráðast við donsku ríkismyndugleikarnar. Hetta var ein onnur mannagongd enn tann hjá løgtingsmeirilutanum, ið vildi hava samráðingarnar at byrja, áðrenn løgtingsval varð. Óivað hevur stjórnin vónað, at eitt nýtt Løgting fór at verða sett saman av einum nýggjum løgtingsmeiriluta, sum tulkaði fólkaatkvøðuna á ein annan hátt enn verandi løgtingsmeiriluti. Hetta hevði stjórnin eisini góðar grundir til at halda.

Bæði Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin høvdu í tíðini eftir fólkaatkvøðuna hildið uppá, at føroyingar við fólkaatkvøðuni høvdu vrakað *bæði* stjórnaruppskotið og loysingina, tí hvørki av uppskotunum hevði fingið meirilutan av atkvøðunum. Henda tulkingin av fólkaatkvøðuni bygdi á ta fortreyt, at tær 481 ógildugu atkvøðurnar áttu at verða taldar við í samlaðu atkvøðuluttøkuna. Vóru atkvøðurnar taldar á tann hátt, so fekk loysingin ikki meirilutan av teimum, sum atkvøtt høvdu, men einans 48,7%, meðan stjórnaruppskotið fekk 47,2%. Ógildugu atkvøðurnar umboðaðu 4,1% av teimum, sum atkvøtt høvdu. Sambært hesi tulkingini vóru *bæði* loysingin *og* stjórnaruppskotið vrakað, tí hvørki av uppskotunum hevði fingið *vanligan meiriluta* – tvs. meirilutan av teimum, sum atkvøtt høvdu.

Hartil kom, at bæði umboð Sambandsfloksins, Sjálvstýris-

floksins og Fólkafloksins undan atkvøðuni høvdu sagt, at treytin fyri, at nakað av uppskotunum kundi sigast at verða samtykt, var, at annað av uppskotunum fekk millum 45 og 50% av teimum, sum *rætt* høvdu at atkvøða – tvs *kvalifiseraður meiriluti* var neyðugur. Samríkjaflokkarnir, Sjálvstýrisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin royndu sostatt at føra prógv fyri tí sjónarmiði, at tá allir flokkar undan fólkaatkvøðuni høvdu verið samdir um, at einki uppskot varð samtykt, uttan so at tað fekk helvtina av *allari* veljarafjøldini – ikki einans helvtina av teimum veljarunum, sum vóru á vali – fyri sær, so vóru bæði uppskotini feld.

Trupulleikin við hesum sjónarmiðinum var tann, at einki stóð um, at kvalifiseraður meiriluti var neyðugur í sjálvari løgtingssamtyktini um fólkaatkvøðu, sum Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin sjálvir høvdu samtykt, og spurningurin var tí, um tað ikki var *vanligur meiriluti*, sum var galdandi. Men her gjørdu samríkjaflokkarnir harumframt greitt, at vóru tær ógildugu „Nei“ atkvøðurnar taldar við, soleiðis sum Thorstein Petersen, ið gjørdist formaður Fólkafloksins eftir Jóannes Patursson í 1946, hevði lovað, so hevði einki av uppskotunum fingið vanligan meiriluta heldur.

Støðan var sostatt tann, at meðan samríkjaflokkarnir hildu uppá, at bæði loysingin og stjórnaruppskotið vóru feld, so helt Fólkaflokkurin og Jákup í Jákupsstovu uppá, at loysingin var samtykt. Hóast lítið var at ivast í, at *formliga* vóru „Nei“ atkvøðurnar ógildugar, sjálvt um Thorstein Petersen undan fólkaatkvøðuni hevði sagt nakað annað, og *formliga* var vanligur meiriluti galdandi til fólkaatkvøðuna, tá einki annað var viðmerkt, so var støðan ógreið, tí í *politiska virki* sínum høvdu føroysku politikararnir við Thorsteini Petersen á odda skapt so nógva óvissu um fólkaatkvøðuna, at enski søgumaðurin John F. West er á góðari leið, tá hann skrivar, at fólkaatkvøðan var *„a masterpiece of inconclusiveness“*.[382] Hóast tey reint løgfrøðiligu viðurskiftini søgdu, at loysingin varð samtykt, so vóru politisku realitetirnir so ógreiðir, at fólkaatkvøðan í veruleikanum kundi útleggjast uppá fleiri ymiskar mátar.

Fyri danskar myndugleikar høvdu hesi viðurskifti í Føroyum helst tann týdning, at teir mettu, at ein nýggjur meiriluti í Løgtinginum kundi hugsast at vilja *tulka* úrslitið av fólkaatkvøðuni á ein annan hátt enn verandi løgtingsmeiriluti, og tí

var besta loysnin at fáa val útskrivað til Løgtingið, *áðrenn* loysingin varð framd. At samríkjaflokkarnir hava roynt at ávirka donsku myndugleikarnar sama veg, sæst t.d. av, at javnaðarmenninir Petur Mohr Dam og Jóan Petur Davidsen tann 20. september sendu eitt bræv til konservativa danska politikaran Christmas Møller, har teir m.a. skrivaðu: „*Henstiller konfidielt, at De gør Deres yderste for at foranledige udtalelse fra dansk autoritativ side snarest muligt helst inden lørdag aften, at man anser udskrivelse af nyt lagtingsvalg med påfølgende optagelse af nye forhandlinger for påkrævet*“.[383] Leiðandi føroyskir andstøðupolitikarar royndu at fáa ríkismyndugleikarnar til at upploysa Løgtingið, og fáa teir at taka upp nýggjar samráðingar við eitt nývalt Løgting. Stjórnin var helst hugað fyri at senda tingið heim, tá komið varð fram móti 20. september, og harumframt vóru kreftir í Føroyum, sum beinleiðis virkaðu fyri at fáa hetta framt.

Tá Løgtingið tann 23. september hóast ávaringar frá amtmanninum staðfesti áðurnevnda uppskot frá 12 tingmonnum, at við fólkaatkvøðuni tann 14. september 1946 var „*loysing Danmarkar og Føroya millum … samtykt. Hesin fólkadómur kunnger fólksins umboðsmonnum, Føroya Løgtingi, sína bindandi avgerð, at stjórnarræði Føroya nú* **er** *hjá Føroya fólki og áleggur á henda hátt Løgtinginum at fremja fólksins vilja*“, fekk stjórnin frá løgtingsmeirilutanum eina góða próvgrund fyri at handla. Við heimild í grein 20 í løgtingslógini frá 1923 og við teirri grundgeving, at løgtingsmeirilutin hevði brotið grein 18 í grundlógini, varð Løgtingið upployst tann 25. september, og val varð útskrivað til Løgtingið at verða tann 8. november 1946. Fólkaflokkurin góðtók hesa avgerð stjórnarinnar við teirri grundgeving, at flokkurin ikki vildi kasta tjóðina út í oyðandi bróðurstríð. Einans Jákup í Jákupsstovu møtti til næsta tingfund, ið avtalaður var at verða tann 27. september.

Tað ber til at grundgeva fyri tí sjónarmiði, at løgtingsmeirilutin, – tvs. Fólkaflokkurin og Jákup í Jákupsstovu – sum at síggja til stóð í eini sterkari støðu eftir fólkaatkvøðuna, telvaði sær sigurin av hondum, tá yvirvaldssamtyktin – eftir uppskoti Sambandsfloksins – tann 21. september varð samtykt í tinginum, og enn verri gjørdist støðan í fullveldistalvinum tann 23. september, tá uppskotið frá 12 tingmonnum varð samtykt, tí tað vóru júst hesir leikirnir, ið vóru løgfrøðiliga

grundarlagið undir avgerð stjórnarinnar at upploysa Løgtingið. Veruligi trupulleikin hjá løgtingsmeirilutanum var kortini tann, at meirilutin í Føroyum fyri loysingini var so lítil, at Fólkaflokkurin ikki tordi at útseta løgtingssamtyktina um yvirvaldsrættin til eftir eitt løgtingsval. Tí kundi Fólkaflokkurin illa vinna fullveldistalvið móti stjórnini, um so var, at stjórnin ikki vildi spæla eftir fortreytum løgtingsmeirilutans. Í veruleikanum høvdu bæði Fólkaflokkurin undan fólkaatkvøðuni og samríkjaflokkarnir eftir fólkaatkvøðuna havt rætt, tí hóast loysingin formliga varð vald tann 14. september 1946, so vísti tíðin aftaná, at meirilutin av føroysku veljarunum í veruleikanum ynsktu eina nýskipan av viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, sum lá ímillum loysingina og stjórnaruppskotið.

Búskaparligu uppgangstíðirnar undir krígnum høvdu givið nógvum føroyingum trúnna uppá, at Føroyar kundu klára seg uttan ríkisstuðulin, sum gjørdist ein minni og minni partur av inntøkum Løgtingsins, men tá komið varð út á heystið í 1946, kundu leiðandi føroyskir politikarar og vinnulívsmenn og helst eisini føroyska veljarafjøldin ikki vera óvitandi um, at búskaparligu uppgangstíðirnar vóru um at vera av (sí s. 240). Vánaligu búskaparligu útlitini kunnu hava verið viðvirkandi til, at eisini Fólkaflokkurin valdi at geva seg undir donsku harraboðini tann 25. september 1946. Løgtingsvalið seinni sama árið prógvaði í øllum førum, at meirilutin av føroysku veljarunum ikki tók undir við sjálvstýrispolitikki Fólkafloksins.

### Løgtingsval, nýggjar samráðingar og heimastýri

Ein donsk sendinevnd undir leiðslu av ráðharranum Erik Eriksen kom til Føroya 1. oktober 1946, og hon hevði samráðingar við politisku flokkarnar í Føroyum. Fólkaflokkurin vildi ikki taka lut í samráðingunum, uttan so at danir frammanundan viðurkendu, at yvirvaldsrætturin við fólkaatkvøðuni varð fluttur til Føroya løgting. Danska sendinevndin noktaði at viðurkenna hetta, men hon segði kortini, at danir viðurkendu sjálvsavgerðarrætt føroyinga.[384] Einki úrslit kom burturúr donsku vitjanini, og tann 4. oktober, ein mánað undan løgtingsvalinum, fór hon aftur til Danmarkar.

Valstríðið upp undir løgtingsvalið tann 8. november 1946 kom nærum einans at snúgva seg um ríkisrættarligu viðurskiftini. Fólkaflokkurin segði seg framvegis vilja arbeiða fyri at



Ein sendinevnd við Erik Eriksen á odda kom til Føroya 1. oktober 1946 at samráðast við politisku flokkarnar. Seinni gjørdist Erik Eriksen forsætisráðharri. Her gongur hann á odda í ólavsøkuskrúðgonguni í 1952. Hetta var í samband við, at Løgtingið varð 100 ár.

fremja loysingina, um so var, at flokkurin fekk meiriluta í Løgtinginum. Sjálvstýrisflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin søgdu allir, at bæði stjórnaruppskotið og loysingin vóru feld, og tí vildu flokkarnir fara niður til Danmarkar at samráðast um eina loysn, sum lá onkustaðni ímillum loysingina og stjórnaruppskotið. Tað var týðuligt, at flokkarnir ikki tulkaðu úrslitið av fólkaatkvøðuni á sama hátt.

Uppstillingin var eitt sindur broytt hesaferð í mun til løgtingsvalið í 1945. Til tess at sleppa undan sperrimarkinum uppá 10%, sum Sjálvstýrisflokkurin var fallin fyri í 1945, avgjørdu Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin at ganga saman í valsamgongu. Á tann hátt komu atkvøður Sjálvstýrisfloksins at telja við, tá umboðini skuldu deilast út til listarnar, hóast flokkurin ikki fekk 10% av atkvøðunum, tí tær komu at verða bólkaðar saman við atkvøðum Javnaðarfloksins. Henda uppstillingin skuldi givið samríkjaflokkunum ein fyrimun fram um Fólkaflokkin, sum til løgtingsvalið í 1945 hevði fingið lutfalsliga nógv løgtingsumboð, men av tí at javnaðarmaðurin Jákup í Jákupsstovu, sum hevði verið 12. fullveldismaðurin í Løgtinginum, varð koyrdur úr Javnaðarflokkinum, stillaði upp einsamallur á uttanflokkalista – tó einans í Vága

valdømi – vóru sannlíkindini fyri, at hansara atkvøður fóru fyri einki hesuferð, stór.

Valluttøkan til løgtingsvalið tann 8. november 1946 var 75%, tann sama sum til løgtingsvalið í 1945. Um samanborið verður við valluttøkur til løgtingsval um sama mundið, so var luttøkan høg, men hetta gerst meira eyðsýnt, um sammett verður við ta lágu valluttøkuna til ta týdningarmiklu fólkaatkvøðuna 14. september 1946, tá einans 63,7% av veljarafjøldini var á vali. Høga valluttøkan til løgtingsvalið í 1946 vísti eins og í 1945, at meiriluti ikki var fyri sjálvstýrispolitikki Fólkafloksins, men valið gjørdist harumframt ein stórur ósigur fyri Fólkaflokkin, sum misti 3 av sínum 11 løgtingsumboðum. Ósigur Fólkafloksins var kortini ikki so stórur, sum hann tóktist, tí atkvøðurnar fullu so væl í 1946, at eingi eykavald løgtingsumboð vóru neyðug fyri at gera umboðanina rættvísa, og tí vóru einans tey 20 valdømisvaldu umboðini í nýggja Løgtinginum, móti 23 valdømis- og eykavaldum í tí gamla. Sambandsflokkurin varðveitti hinvegin síni 6 umboð, meðan valsamgongan millum Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin gav flokkunum ávíkavist 4 og 2 løgtingsumboð. Sostatt høvdu samríkjaflokkarnir nú 12 løgtingsumboð tilsaman í Løgtinginum, móti teimum 8 hjá Fólkaflokkinum.

Sæð í mun til afturgongdina í atkvøðum var ósigur Fólkafloksins stórur, tí flokkurin gekk einans 2,5% aftur, meðan hann misti 3 av 11 løgtingsumboðum. Týdningarmesta grundin til broytingina í samansetingini av Løgtinginum var tann, at við valsamgonguni millum Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin fingu hesir flokkar gagnnýtt sínar atkvøður betri enn seinast, tá nærum 10% ella 1.235 „sjálvstýrisatkvøður“ fóru fyri einki. Í 1946 fóru tær 304 „fullveldisatkvøðurnar“ hjá Jákupi í Jákupsstovu, ið umboðaðu 2,3% av samlaða atkvøðutalinum, fyri einki, men her var talan um eitt atkvøðutal, sum undir ongum umstøðum hevði útloyst eitt løgtingsumboð, meðan atkvøður Sjálvstýrisfloksins í 1945 svaraðu til tað tal av atkvøðum, sum hinir flokkarnir fingu 2 løgtingsumboð vald uppá. Eitt løgtingsumboð kostaði í 1945 í miðal 572 atkvøður, meðan tað í 1946 kostaði 658 atkvøður, og tí hevði Jákup í Jákupsstovu ikki verið valdur við sínum 304 atkvøðum, hóast einki sperrimark var. Sjálvt um eingir veljarar høvdu broytt støðu í mun til løgtingsvalið í 1945, so hevði valsamgongan




Føroysku fólkatingsmenninir Petur Mohr Dam og Thorstein Petersen svala sær á í vandrehøllini á Christiansborg, meðan samráðingar um heimastýrislógina fara fram í mars 1948.

millum Sjálvstýrisflokkin og Javnaðarflokkin í sjálvum sær givið samríkjaflokkunum ein fyrimun fram um Fólkaflokkin, sum til løgtingsvalið í 1945 hevði fingið lutfalsliga nógv løgtingsumboð.

Tað er áhugavert at seta spurningin, hvat hevði hent millum løgtingsvalið í 1945 og fólkaatkvøðuna í 1946, um so var, at einki sperrimark var í valskipanini, ella um so var, at Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin høvdu umgingið sperrimarkið í 1945, eins og teir gjørdu í 1946, tí hetta hevði havt við sær, at Fólkaflokkurin eftir løgtingsvalið í 1945 – eins og eftir valið í 1946 – hevði mangla 3 løgtingsumboð í at havt meiriluta í Løgtinginum. Atkvøðan hjá Jákupi í Jákupsstovu hevði tá ongan týdning havt, tí samríkjaflokkarnir høvdu framvegis havt eitt løgtingsumboð í meiriluta. Spurningurin er hypotetisk sæð sera áhugaverdur, men í verki hevur hann ongan týdning, tí valsamgonga varð ikki gjørd millum flokkarnar í 1945. Tað, sum hinvegin *er* áhugavert í hesum sambandi, er tann veruleiki, at meðan tað var sperrimarkið til løgtingsvalið í 1945 og lága valluttøkan til fólkaatkvøðuna í 1946, sum góvu loysingarsíðuni fyrimunin, so var tað til løgtingsvalið í 1946 valsamgongan millum Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin, ið tryggjaði flokkunum eitt eftir atkvøðutali rættvísari býti av løgtings-

umboðum, sum gav samríkjaflokkunum sigurin. Meirilutin av føroysku veljarafjøldini hevði helst ongantíð tikið undir við loysingini.

Nýggja Løgtingið, har samríkjaflokkarnir høvdu 3 løgtingsumboð í meiriluta, kom saman á fyrsta sinni tann 20. november 1946, og stjórnarskipanarmálið kom fyri longu tann 21. november. Fólkaflokkurin helt framvegis uppá, at fólkaatkvøðan var bindandi, og at eitt nýtt Løgting ikki kundi broyta úrslitið, meðan hinir flokkarnir hildu uppá, at samráðast skuldi um eina skipan, sum lá ímillum loysingina og stjórnaruppskotið. Sjálvt Sambandsflokkurin ásannaði nú, at tann stýrisskipan, sum hevði verið galdandi undan krígnum, ikki longur var hóskandi. Amtmaðurin boðaði Løgtinginum frá, at danska stjórnin bjóðaði Løgtinginum til Danmarkar at taka upp nýggjar samráðingar um ríkisrættarligu støðu Føroya.[385]

Eftir drúgt nevndararbeiði í Løgtinginum heitti eitt samt Løgting tann 21. mars 1947 á donsku stjórnina um at geva Løgtinginum lóggávuvald undir teirri fortreyt, at Føroyar framhaldandi skuldu verða verandi ein partur av danska kongaríkinum.[386] Samráðingar fóru fram millum Løgting og ríkismyndugleikar í fleiri mánaðir, og semja fekst at enda um eina skipan, sum varð nevnd heimastýrisskipanin. Eftir hesi skipan, sum tann 1. apríl 1948 skuldi avloysa „Midlertidig Styrelsesordning“, skuldi Løgtingið fáa lóggávuvald í *serstøkum føroyskum viðurskiftum*, meðan *uttanríkismál* og *verjumál* skuldu verða undir Ríkisdagsins myndugleika. Allir flokkar á tingi góðtóku heimastýrislógina, uttan Fólkaflokkurin. Almenna grundgevingin var tann, at heimastýrislógin varð givin føroyingum innanfyri ríkisfelagsskapin, men í verki góðtók flokkurin skipanina longu í 1950, tá hann gjørdist partur av eini heimastýrissamgongu saman við Sambandsflokkinum. Búskaparligu trupulleikarnir í Føroyum vóru tá vorðnir týdningarmiklari enn ríkisrættarligu viðurskiftini. Heimastýrisskipanin samsvaraði hinvegin heilt væl við stevnumiðini hjá Javnaðar- og Sjálvstýrisflokkinum, ið kravdu lóggávuvald í serstøkum føroyskum viðurskiftum.

**Stórpolitisk viðurskifti og heimastýrislógin**

At enda kann tað vera vert at spyrja, hvørjar grundirnar vóru til, at danska stjórnin í 1946 valdi at síggja burtur frá lyftum

forsætisráðharrans um at virða og standa við tulking løgtingsmeirilutans av fólkaatkvøðuni. Enn áhugaverdari er at spyrja, hví danska samráðingarnevndin, sum undir samráðingunum í 1946 hevði verið samd um at avvísa, at talan kundi vera um nýggjar samráðingar, beinleiðis skifti støðu aftaná fólkaatkvøðuna, tá stjórnin upploysti Løgtingið og bjóðaði føroyingum til nýggjar samráðingar, har hon royndi at fáa eina skipan í lag millum Føroyar og Danmark, sum lá innanfyri ríkisfelagsskapin.

Tað er ikki vist, at hetta skal setast í samband við størri broytingar í donskum Føroyapolitikki um hetta mundið. Mest sannlíkt er, at semjan í donsku samráðingarnevndini undan fólkaatkvøðuni hevði sum høvuðsendamál at „hótta" føroyingar til at taka við stjórnaruppskotinum. Hetta var ein Føroyapolitikkur, sum Stauning hevði havt góðar royndir við í 1930, tá tann sama hóttanin fekk sjálvstýrisrørsluna at tagna. Hartil kom, at í 1943, meðan Danmark var hersett av Týsklandi, hevði Ísland, sum tað ongantíð hevði eydnast at fáa inn undir grundlógina, endaliga loyst frá Danmark. Hesa íslendsku avgerðina, sum var staðfest av 97% av íslendsku veljarunum í 1944, kundu danskir ríkismyndugleikar ikki seta seg upp ímóti, men hon setti nærum eins djúp skør í tjóðskaparliga stoltleikan í Danmark, sum missurin av Slesvig hevði gjørt í 1864. Leiðandi danskir politikarar, sum framvegis hildu fast um, at varðveitanin av danska eindarstatinum var besta trygdin móti upploysingarrákum í ríkinum, vildu helst forða fyri, at íslendska ávirkanin breiddi seg til Føroyar, sum vóru komnar undir grundlógina í 1850. Heldur henda tulkingin, so var høvuðsendamálið við danska politikkinum bæði undan og eftir fólkaatkvøðuna at varðveita Føroyar í danska eindarríkinum. Danska stjórnin hevði ikki skift støðu aftaná fólkaatkvøðuna, men tá politiski taktikkur stjórnarinnar at „hótta" føroyingar at velja eina skipan innanfyri danska eindarstatin ikki vísti seg at virka eins væl sum í 1930, valdi stjórnin at skifta taktikk. Endamálið við danska politikkinum var framvegis at varðveita Føroyar í danska ríkinum, hóast fólkaatkvøðan í sjálvum sær viðurkendi rætt føroyinga til at taka seg úr ríkisfelagsskapinum. Tann lítli meirilutin fyri loysingini, ógreiðu viðurskiftini eftir fólkaatkvøðuna, áheitanir frá føroyskum politikarum um at senda tingið heim og ivasomu tiltøk løgtingsmeirilutans í døgunum

aftaná fólkaatkvøðuna vóru góðar undanførslur, sum kundu *rættvísgera* danska politikkin, men hesi viðurskifti vóru neyvan grundleggjandi *orsøkirnar* til danska politikkin. Tann grundleggjandi orsøkin til, at danska stjórnin sendi Løgtingið heim og tók upp nýggjar samráðingar við føroyskar myndugleikar, var óivað tann, at einhvør statur hevur sum eitt av sínum høvuðsendamálum at varðveita sín egna *territoriala integritet*. Hetta høvuðsmálið er ikki minni umráðandi hjá einum lítlum ríki sum Danmark, sum hevur havt ringar royndir av upploysingarrákum, sum hava gjørt seg galdandi upp ígjøgnum søguna.

Í altjóða samanhangi hava stórpolitisk viðurskifti eisini havt ein ávísan týdning fyri støðutakanina hjá donsku stjórnini til ríkisrættarligu viðurskifti Føroya. Longu tann 17. september segði fíggjarmálaráðharrin Thorkild Kristensen, ið var virkandi forsætisráðharri í tíðini undan upploysn Løgtingsins, í danska blaðnum *Information*, at sjálvt um Føroyar var ein tilvitað tjóð, so fór tað at verða „*vanskeligt at undgå at komme i afhængighed af fremmede … For hver gang en bid river sig løs af den nordiske kreds, vokser faren for, at visse stormagter vil interessere sig for andre dele. Det er i hele Nordens interesse, at alle dele af Norden bevares inden for den nordiske kreds. Det vil forhåbentlig lykkes med Færøerne*“. Fíggjarmálaráðharrin, sum ikki var samdur við Knud Kristensen í, at Føroyar skuldu loysa frá Danmark, um stjórnaruppskotið ikki varð samtykt, gevur her eina stórpolitiska grundgeving fyri sínum sjónarmiði. Tað sæst eisini, at danir hava borið ótta fyri, at Rusland og Ongland „*på grund af Færøernes store strategiske betydning*“[387] fóru at vísa oyggjunum størri áhuga, um so var, at tær gjørdust sjálvstøðugar.

Hetta vóru sama slag av próvførslum, sum bretar høvdu lagt fyri Fólkaflokkin í 1943, men stórpolitisku viðurskiftini í heiminum vóru í 1946 um at broytast, í sama mun sum viðurskiftini millum nýggju stórveldini USA og Sovjetsamveldið gjørdust spentari og spentari. Kalda kríggið var um at taka seg upp, og tað er ikki neyðugt at kanna heimskortið gjølla fyri at staðfesta, hvussu týdningarmikið tað var fyri tey bæði nýggju stórveldini at hava eftirlit við skipa- og loftferðsluni í Norðuratlantshavi. Í nýggja stórpolitiska veruleikanum fingu norðuratlantiska økið og Føroyar enn størri hernaðarligan týdning fyri nýggju stórveldini, enn tey høvdu havt fyri Ongland undir 2. veraldarbardaga. Tað var illa hugsandi,



Stórpolitisk viðurskifti høvdu helst týdning fyri danska politikkin mótvegis Føroyum í tíðini eftir kríggið. Her verður NATO-sáttmálin undirskrivaður í Washington 4. apríl 1949. Amerikanski uttanríkisráðharrin Dean Acheson skrivar undir fyri USA, meðan Truman, forseti, og A.W. Barkley, varaforseti, hyggja at. Til vinstru sita uttanríkisráðharrarnir hjá hinum 11 londunum. Triður frá vinstru í fremru røð er íslendski Bjarni Benediktson, og síðani kemur Gustav Rasmussen, danski uttanríkisráðharrin.

at stórveldini fóru at góðtaka, at nakrar smáar, men hernaðarliga týdningarmiklar oyggjar, kundu liggja sum ein uttanveltað trygdarpolitisk hóttan í Norðuratlantshavi. Oyggjarnar vóru so mikið týdningarmiklar fyri vesturlendska trygdarpolitikkin, at neyðugt var at gera tær til ein samansjóðaðan part av vesturlendsku trygdarskipanini. USA hevði beinleiðis ta fatan, at hernaðarligu áhugamál tess vóru best røkt, um so var, at Danmark hevði yvirvaldsrættin yvir Føroyum.[388] Her hevði Danmark nøkur góð altjóða kort á hondini, sum kundu rættvísgera danska politikkin mótvegis Føroyum.

Helst høvdu stórpolitisku viðurskiftini týdning fyri danska politikkin mótvegis Føroyum í tíðini eftir kríggið. Sæð úr hesum sjónarhorni var heimastýrislógin, sum gav Løgtinginum ræði yvir *serligum føroyskum viðurskiftum*, meðan *uttanríkispolitikkurin* og *verjupolitikkurin* kom undir danskt yvirræði, skræddaraseymað til stórpolitiska veruleikan undir kalda krígnum. Aftaná 1949, tá Danmark gjørdist limur í vesturlendsku verjusamgonguna *NATO (North Atlantic Treaty Organisation)*, loyvdi heimastýrislógin donsku ríkismyndugleikunum at lima Føroyar inn í samgonguna, uttan at føroyskir myndugleikar

vóru spurdir. Hetta hendi, hóast Løgtingið longu í apríl 1940 hevði staðfest, at Føroyar skuldu haldast uttanfyri allar hernaðarsamgongur.

Samanumtikið ber til at siga, at Føroya søga aftaná 1946 sum so mangan fyrr prógvaði, at uttan breiða semju í Føroyum vóru tað stórpolitiskir veruleikar uttanfyri føroysku landoddarnar, sum komu at verða avgerandi fyri politisku viðurskiftini í oyggjunum og ikki formligu úrslitini av atkvøðugreiðslum í Føroyum ella í Løgtinginum. Tann breiða politiska semjan hevur hinvegin sjáldan verið til staðar í Føroyum – í øllum førum ikki viðvíkjandi teimum ríkisrættarligu viðurskiftunum.





# VI

## *Heimastýristíðin – 1948-2002*

## Heimastýrislógin

Tá heimastýrislógin varð sett í gildi í Føroyum tann 1. apríl 1948, avloysti hon „Midlertidig Styrelsesordning“ frá 9. mai 1940, sum fór úr gildi samstundis. Lógin varð samtykt av teimum 12 tingmonnum Sjálvstýrisfloksins, Javnaðarfloksins og Sambandsfloksins, meðan 6 fólkaflokstingmenn atkvøddu ímóti.[389]

Harvið vóru stjórnarskipanarviðurskifti Føroya, sum høvdu verið løgfrøðiliga og statsrættarliga ógreið, síðan Danmark varð hersett av Týsklandi tann 9. apríl 1940, komin í eina nýggja legu. Heimastýrislógin hevur síðan virkað sum løgfrøðiligi karmurin um politiska lívið í Føroyum.

Vísandi til tjóðskaparligu, søguligu og landafrøðiligu serstøðu Føroya í Danmarkar ríki staðfesti heimastýrislógin, at „*Innanfyri ríkismarkið*“ skuldi føroyska *Heimastýrið*, – tvs. eitt fólkavalt Løgting og eitt nýstovnað *Landsstýri* – taka við ræðinum yvir føroyskum viðurskiftum. Tjóðskaparliga viðurkendu donsku ríkismyndugleikarnir við heimastýrislógini, at føroyska málið og føroyska flaggið, sum høvdu vunnið viðurkenning frá bæði amtmanni og hersetingarvaldi undir krígnum, vóru høvuðsmál og høvuðsflagg føroyinga. Á politiska økinum fekk Løgtingið, sum saman við amtmanninum hevði havt lóggevandi heimildir síðan 9. mai 1940, tillutað lóggevandi myndugleikan yvir *serføroyskum viðurskiftum.* Harumframt skuldi tað nýstovnaða Landsstýrið, sum kann síggjast sum eitt framhald av Landsnevndini frá 1928, hava tann fyrisitingarliga myndugleikan yvir føroyskum málsøkjum um hendi.

Lóggávuvald og størri fyrisitingarligar heimildir til føroyskar myndugleikar í serstøkum føroyskum viðurskiftum, sum føroyska sjálvstýrisrørslan hevði stríðst fyri síðan byrjanina av øldini, varð veruleiki við heimastýrislógini. Hinvegin staðfesti heimastýrislógin í grein 6, at tey málsøki, sum „*ikki samsvarandi hesi lóg hoyra undir føroyska heimastýrið, verða umsitin sum ríkisins felagsmál av ríkisvaldinum*“. Hetta merkir, at tey

málsøki, sum ikki beinleiðis vóru nevnd í lógini sum hoyrandi til heimastýrið, skuldu verða verandi undir lóggevandi og útinnandi valdi ríkismyndugleikanna. Lóggávuvaldið í Føroyum varð sostatt býtt millum føroyska heimastýrið og donsku ríkismyndugleikarnar. Hetta hevði við sær, at neyðugt var at skilmarka tey málsøki, ið vóru undir ræði heimastýrisins, og tey málsøki, ið ríkisvaldið hevði ræði á. Hesir báðir bólkarnir av málsøkjum, føroysk *Sermál* og *Felagsmál* ríkisins, vóru settir á tveir listar, sum vóru heftir uppí sjálva heimastýrislógina, *lista A* og *lista B*. Føroysk sermál stóðu á *lista A*, meðan felagsmálini stóðu á *lista B*.

Tey mest týðandi føroysku sermálini á *lista A* vóru stýriskipanarviðurskifti, kommunumál, heilsumál, almenn forsorg, beinleiðis og óbeinleiðis skattur, skúlamál, samferðslumál, orkumál, postmál og landbúnaðarmál. Eitt sindur ógreitt er kortini, hvat eitt sermál er, tí hóast málsøkini á *lista A* vóru nevnd føroysk sermál, sum vóru undir ræði heimastýrisins, so vóru tey harumframt felagsmál, sum vóru undir lóggevandi og útinnandi myndugleika ríkisins. Henda ógreiða støðan hjá einum málsøki á *lista A* varð ikki broytt, fyrr enn annaðhvørt heimastýrið ella ríkismyndugleikarnar kravdu, at tað skuldi undir lóggevandi og útinnandi myndugleika heimastýrisins. Ikki yvirtikin sermál vóru sostatt eisini felagsmál, áðrenn tey vórðu yvirtikin, men neyðugt var ikki við semju millum føroysku heimastýrismyndugleikarnar og donsku ríkismyndugleikarnar, til tess at eitt málsøki, sum stóð á *lista A*, kundi yvirtakast av heimastýrinum. Heimastýrislógin varð givin undir teirri fortreyt, at annar parturin kundi krevja, at sermálini vóru flutt til føroyska heimastýrið.

Tey veruligu felagsmálini, sum vóru sett á *lista B* í heimastýrislógini, vóru: Fólkakirkjan, løgregla, ráevni í undirgrundini, radio, loftferðsla, Jarðargrunnurin og eftirlit við inn- og útflutningi. Málsøkini á *lista B* vóru, eins og tey ikki yvirtiknu málsøkini á *lista A*, undir lóggevandi og útinnandi myndugleika ríkismyndugleikanna, men munurin var, at hesi málsøki ikki kundu yvirtakast av heimastýrinum, uttan so at *semja* varð gjørd um hetta við ríkismyndugleikarnar. Komu heimastýrið *og* ríkismyndugleikarnir við samráðingum ásamt um, at málsøki á *lista B* kundu yvirtakast av heimastýrinum, so vóru tey flutt yvir á *lista A*, og harvið gjørdust tey føroysk sermál, ið einvíst

*kundu* yvirtakast av heimastýrinum. Eitt málsøki á *lista B* kundi sostatt ikki yvirtakast, uttan so at báðir partar vóru samdir, meðan annar parturin kundi krevja, at eitt málsøki á *lista A* skuldi yvirtakast av heimastýrinum.

Yvirtøkumeginreglan í heimastýrislógini varð staðfest í grein 2, har tað stóð, at tók heimastýrið ræði á einum málsøki, ið stóð á *lista A*, so varð fylgjan tann, at „*heimastýrið tekur uppá seg tær útreiðslur, ið fylgja við teimum*". Grundreglan var, at tann, sum vildi valda yvir einum málsøki, skuldi eisini gjalda fyri tað, sum málsøkið kostaði. Rættindi og skyldur skuldu sambært heimastýrisskipanini fylgjast at. Høvdu ríkismyndugleikarnir ræðisrættin yvir einum málsøki, so høvdu teir eisini skyldu til at gjalda fyri tað, men fekk ella tók heimastýrið ræðisrættin yvir málsøkinum, so fylgdi skyldan til at gjalda fyri tað við. Henda yvirtøkumeginreglan hevði við sær, at heimastýrið fekk viðurkent rætt til at áseta og krevja inn skattir í Føroyum. Tað var neyðugt, at Løgtingið fekk staðfest, at tað hevði játtandi myndugleika í Føroyum, tá heimastýrið skuldi gjalda fyri tær yvirtøkur, sum tað í fyrsta lagi sjálvt avgjørdi at fremja, og tær, sum tað í øðrum lagi kundi fáa álagt at fremja av ríkismyndugleikunum. Í veruleikanum var hetta yvirtøkumeginreglan í Tilboðnum frá 1906 (sí s. 139), sum 40 ár aftaná politiska ósigurin hjá tjóðskaparrørsluni varð sett í gildi í Føroyum.

Heimastýrið hevði kortini møguleika fyri at yvirtaka fyrisitingina av tungum málsøkum á *lista A* ella *lista B* frá ríkismyndugleikunum uttan at taka á seg allar útreiðslurnar av teimum, soleiðis sum ásett var í grein 2. Grein 9 í heimastýrislógini staðfesti, at eftir samráðing millum heimastýrið og ríkismyndugleikarnar kundi avtala verða gjørd um, „*í hvørjum føri og í hvørjari vídd*" heimastýrið kundi yvirtaka fyrisitingina av einum málsøki, ið varð verandi felagsmál – tvs. ikki yvirtikin sermál á *lista A* ella málsøki á *lista B*. Grein 9 var sostatt eitt undantak frá yvirtøkumeginregluni í grein 2 og ásetingunum um ræðisrætt ríkismyndugleikanna í felagsmálum, sum var staðfest í grein 6, tí hon heimilaði ríkismyndugleikunum og heimastýrinum at gera avtalu um, at heimastýrið *partvíst* kundi taka við ræði og ábyrgd av málsøkjum, hóast tey vóru verandi felagsmál, ið vóru undir lóggevandi myndugleika ríkisins. Rættarliga styrkin í grein 2 yvirtøkum var tí tyngri

enn í grein 9 yvirtøkum, tí meðan heimildir Løgtingsins í fyrra førinum vóru lóggevandi, so vóru tær í seinna førinum at líkna við kunngerðir, ið statsrættarliga eru á einum lægri støði enn lógir.[390]

Útyvir teir báðar høvuðsbólkarnar, sermálini á *lista A*, ið einvíst kundu yvirtakast, og felagsmálini á *lista B*, ið ikki kundu yvirtakast uttan semju partanna millum, finst ein triði listi av málsøkjum í heimastýrislógini, sum als ikki kann yvirtakast. Grein 5 í heimastýrislógini staðfestir, at viðurskifti ríkisins við umheimin, t.d. uttanríkis- og verjumál, eru ríkismál, og tey kunnu tí als ikki yvirtakast av heimastýrinum. Hetta varð eisini staðfest í grein 19 í grundlógini, sum harumframt ásetti, at hægsta dómsvaldið ikki kann latast nøkrum øðrum stovni upp í hendi, og tað sama var galdandi viðvíkjandi peningaviðurskiftum og eftirlitsskylduni hjá statinum. Hesi málsøki kunnu hvørki heilt ella partvíst yvirtakast av heimastýrinum, men tey eru sambært grundlógini undir lóggevandi og fyrisitingarliga ræði ríkismyndugleikanna.

Ræðisrættur heimastýrisins í Føroyum varð í grundregluni avmarkaður til bólkin av málsøkjum, sum vóru yvirtikin frá *lista A*. Hetta hevði við sær, at ummælisrættur føroyinga yvirfyri felagslóggávu Ríkisdagsins, ið varð staðfestur longu í 1852, tá Løgtingið varð endurreist, framvegis var týdningarmikil. Hesin rættur hjá føroysku myndugleikunum varð tí varðveittur í grein 7 í heimastýrislógini í stórt sæð sama líki sum í løgtingslógini frá 1923 (sí s. 178). Sambært hesi grein skuldi heimastýrið fáa høvi til at ummæla stjórnaruppskot, sum *„bert viðvíkja Føroyum“* umframt allar danskar ríkislógir, *„sum viðvíkja lokalum føroyskum viðurskiftum“*, áðrenn tey/tær vórðu sett/ar í gildi í oyggjunum. Hesi viðurskifti høvdu eisini við sær, at føroyingar skuldu hava minst 2 umboð í danska Ríkisdegnum; til 1953 høvdu føroyingar 2 fólkavald umboð í Fólkatinginum, og 1 av Løgtinginum valt umboð í Landstinginum, men tá Landstingið varð niðurlagt í 1953, fall hendan umboðanin burtur. Ríkislógir kundu framvegis verða settar í gildi í Føroyum uttan samtykt á Løgtingi, og tí varð neyðugt at tryggja føroyingum eina ávísa ávirkan á og umboðan *í* tí stovni, sum hevði heimild til at seta hesar lógir í gildi í oyggjunum.

Útgreiningin í heimastýrislógini av málsøkis- og ábyrgdarbýtinum millum heimastýri og ríki, sum varð ein neyðug

fylgja av teimum nógv víðkaðu heimildum, sum Løgtingið fekk ella kundi fáa í føroyskum viðurskiftum, hevði við sær, at amtmaðurin, nú nevndur *Ríkisumboðsmaðurin*, misti sínar løgfrøðiligu og fyrisitingarligu heimildir yvir Løgtinginum. Í 1923, tá amtmaðurin misti sínar heimildir *í* Løgtinginum, gjørdist Løgtingið ein føroyskur stovnur burturav fólkaræðisliga sæð. Við heimastýrislógini varð farið eitt stig víðari, tí nú gjørdist Løgtingið, eisini hvat viðvíkti lóggávu og fyrsiting av føroyskum viðurskiftum, ein føroyskur stovnur burturav. Ríkisumboðsmaðurin varðveitti kortini sín óskerda talu- og samráðingarrætt í Løgtinginum, og hann hevði eisini rætt til at leggja uppskot fyri Løgtingið, tá felagsmálini vórðu viðgjørd. Í aðra mátar hevði ríkisumboðsmaðurin ongar heimildir *í* ella *yvir* Løgtinginum, sum amtmaðurin frammanundan honum hevði havt. Tey málsøki, sum heimastýrið yvirtók sambært grein 2 í heimastýrislógini, vóru fult og heilt í hondunum á føroyskum myndugleikum.

Tað var kortini greitt, at tá tvey lóggávuvald vóru í Føroyum, so kundi ósemja taka seg upp um, hvør hevði ræði á einum ávísum málsøki. Hesin vandi gjørdist ikki minni, tí at heimastýrislógin heimilaði heimastýrinum í semju við ríkismyndugleikarnar at fremja partvísar yvirtøkur. Í øllum førum fekk danski forsætisráðharrin í grein 6 stk. 3 í heimastýrislógini staðfest gomlu heimild amtmansins til fyribils at ógilda eina løgtingssamtykt, um so var, at hann metti, at Løgtingið var farið út um tær heimildir, sum tað hevði. Tað var henda heimildin í løgtingslógini frá 1923, sum amtmaðurin hevði nýtt tann 23. september 1946, tveir dagar áðrenn stjórnin sendi Løgtingið heim. Nýggja heimildin hjá forsætisráðharranum var kortini meira avmarkað enn tann heimildin, sum amtmaðurin hevði havt sambært løgtingslógini frá 1923, tí stk. 2 í grein 6 í heimastýrislógini ásetti, at tað ikki longur vóru ríkismyndugleikarnir, sum av sínum eintingum skuldu avgera, um ein løgtingssamtykt var í samsvar við avtalaða ábyrgdarbýtið millum heimastýrið og ríkismyndugleikarnar, men avgerðin skuldi leggjast fyri eina nevnd, ið var sett saman av 3 hægstarættardómarum, og 2 av ríkismyndugleikunum og 2 av heimastýrinum valdum umboðum. Henda nevndin skuldi eftir ávísum reglum taka endaligu avgerðina. Fekst semja millum umboðini hjá føroyska heimastýrinum og donsku



C.A. Vagn-Hansen gjørdist í 1948 fyrsti ríkisumboðsmaður Føroya. Hann rókti starvið til 1954, tá hann fekk starv sum amtmaður í Åbenrå.

ríkismyndugleikunum, so var trætan loyst, men fekst ikki semja í lag, so skuldu teir 3 hægstarættardómararnir taka avgerðina. Stk. 2 í grein 6 hevur ongantíð verið brúkt, og tí hevur forsætisráðharrin ongantíð nýtt heimild sína til fyribils at ógilda løgtingssamtyktir. Teksturin í heimastýrislógini heimilaði ikki ríkisstjórnini at senda Løgtingið heim, soleiðis sum staðfest hevði verið í løgtingslógini frá 1923.

Heimastýrisskipanin frá 1948 bygdi í nógv størri mun enn undanfarnu løgtingsskipanir frá 1852, 1854 og 1923 á eina viðurkenning av, at talan var um tveir sjálvstøðugar partar, sum avtala varð gjørd ímillum. Hetta framgekk beinleiðis av innganginum til lógina, har tað stóð, at hon var givin føroyingum í samsvar við „*Vedtagelse i Færøernes Lagting*". Statsrættarkønir eru kortini ikki samdir um henda spurningin, og tað hevur tí verið eitt sindur av óvissu um, hvørjar grundleggjandi heimildir Løgtingið hevur (sí s. 363).

## Stjórnarskipanarviðurskifti Føroya

Burtursæð frá, at Løgtingið var eitt fólkavalt umboð, ið hevði lóggávuvald í serstøkum føroyskum viðurskiftum, sum vóru yvirtikin frá *lista A*, stóð lítið og einki í heimastýrislógini um heimildir ella skipan Løgtingsins. Eitt landsstýri skuldi setast á stovn, sum hevði ein landstýrisformann, men einki varð nevnt um, hvussu Landsstýrið skuldi veljast, ella hvussu tað skuldi skipast. Tað stóð heldur einki um, hvussu sambandið millum Løgtingið og Landsstýrið skuldi vera, burtursæð frá at Løgtingið samtykti løgtingslógirnar, meðan landsstýrisformaðurin staðfesti tær. Heldur einki stóð um løgtingsval ella atkvøðureglur í Løgtinginum, eins og tað hevði staðið í øllum øðrum løgtingsskipanum, sum Løgtingið hevði virkað undir síðan 1852.

Grundin til, at lítið og einki er nevnt um hesi viðurskifti í sjálvari heimastýrislógini, er tann, at heimastýrislógin er ein rættuliga víð rammulóg, sum einans ásetur *hvørji* lóggevandi og fyrisitingarlig málsøki heimastýrið kann fáa ræði á, meðan tað er upp til heimastýrið at avgera, *hvussu* lóggevandi og fyrisitingarligi myndugleikin yvir hesum málsøkjum verður skipaður. Stýrisskipanarviðurskifti vóru sambært heimastýrislógini føroysk sermál, ið stóðu á *lista A*, og tey vóru yvirtikin



Tinghúsið skrýtt til at taka ímóti kongi í 1947.

av heimastýrinum alt fyri eitt. Longu ein mánað seinni var løgfrøðiliga stórarbeiðið at tilevna eina stýrisskipanarlóg liðugt, og løgtingslóg nummar 1 um *Stýrisskipan Føroya í sermálum* varð samtykt í Løgtinginum tann 13. mai 1948.[391] Samstundis varð nýggj tingskipan – sum Løgtingið líka síðan endurreisnina í 1852 hevði havt heimild til at samtykkja – sett í gildi. Harumframt varð lóg um umboðsvald Føroya, tvs. Landsstýrið, samtykt. Tá Løgtingið setti stýrisskipanarlógina í gildi, setti tað samstundis gomlu ríkislógina frá 1923, sum hevði verið løgfrøðiligi karmurin um virksemi Løgtingsins í 25 ár, úr gildi.

Stýrisskipanarlógin, sum var tann týdningarmiklasta av hesum lógum, kann samanberast við eina grundlóg, sum liggur til grund fyri, skipar og avmarkar lóggevandi og fyrisitingarliga virksemið hjá ríkisins stjórnarstovnum, tó við tí undantaki, at meðan ein verulig grundlóg er galdandi fyri alt stjórnarligt virksemi í einum ríki, so var føroyska stýrisskipanarlógin einans galdandi fyri tey málsøki, sum heimastýrið hevði yvirtikið sambært heimastýrisskipanini. Av tí at ein grundlóg er ein yvirskipað lóg, sum allar aðrar lógir eru heimilaðar í, er tað vanligt, at hon ikki kann broytast eins lætt og vanligar lógir. Í

Danmark kann grundlógin ikki broytast uttan so, at í fyrsta lagi tvey fólkating, við einum fólkatingsvali ímillum, samtykkja broytingarnar, og í øðrum lagi skal broytta grundlógin leggjast fyri veljaran við fólkaatkvøðu, har í minsta lagi 40% av samlaðu veljarafjøldini skal atkvøða fyri broytingunum. Somu reglur vóru galdandi í Føroyum viðvíkjandi stýrisskipanarlógini við tí týdningarmikla undantaki, at tað ikki var neyðugt at hava fólkaatkvøðu fyri at fáa broytingarnar staðfestar. Stýrisskipanarlógin frá 1948 var, við smávegis broytingum í 1985, verandi í gildi til 1994, tá stóra búskaparkreppan í byrjanini av 90-unum gjørdi tað neyðugt at seta eina grundleggjandi øðrvísi stýrisskipanarlóg í gildi. Her skulu vit í høvuðsheitum halda okkum til tað gomlu stýrisskipanarlógina, og ta tingskipan, sum grundar seg á hana.

**Løgting, løgmaður og Landsstýrið**

Í tíðini undan 1940 var einans ein kravdur stjórnarstovnur í Føroyum, Løgtingið, men við heimastýrislógini skuldi ein nýggjur stjórnarstovnur setast á stovn, Landsstýrið, soleiðis at føroyska stjórnarskipanin fevndi um tveir stovnar. Løgtingið skuldi hava lóggevandi myndugleikan yvir yvirtiknum málsøkjum, meðan Landsstýrið skuldi hava fyrisitingina um hendi.

Stýrisskipanarlógin frá 1948 ásetti yvirskipaðar reglur fyri, hvussu hesir báðir stjórnarstovnarnir í Føroyum skuldu skipast, bæði innanhýsis og mótvegis hvørjum øðrum, eins og ein verulig fólkaræðislig grundlóg ger tað. Í tingskipanini vóru neyvari reglur settar fyri arbeiðið í tinginum. Innihaldsliga vóru kortini frávik millum vanligar fólkaræðisligar grundlógir í fullveldisríkjum, har ríkisvaldið sum oftast var greitt liðað sundur í eitt lóggevandi og eitt útinnandi vald, og føroysku stýrisskipanarlógina, tí Løgtingið ynskti at varðveita ta gomlu amtskommunalu skipanina, har eisini tann fyrisitingarliga ábyrgdin lá hjá Løgtinginum. Tað útinnandi valdið, sum skuldi hava ábyrgdina av, at fyrisitið varð samsvarandi lógini, varð tí verandi hjá Løgtinginum. Landsstýrið fekk ikki fult fyrisitingarligt vald, men tað kom at vera ein fyrisitingarlig nevnd, ið skuldi verða undir ræði Løgtingsins, sum – umframt tann lóggevandi myndugleikan – skuldi hava ta endaligu fyrisitingarligu ábyrgdina um hendi. Gjøgnum løgtingsnevndir, sum høvdu heimild til at taka fyrisitingarligar avgerðir, skuldi

Løgtingið hava ávirkan á og eftirlit við fyrisitingarligu avgerðum Landsstýrisins. Hartil kom, at bæði landsstýrisformaðurin, ið fekk tað søguliga heitið *Løgmaður*, og Landsstýrið, ið skuldu hava ta dagligu fyrisitingina av lógini um hendi, skuldu veljast beinleiðis av Løgtinginum. Í praksis fór hetta fram á tann hátt, at meirilutin í Løgtinginum undir samráðingunum um eitt samstarvsgrundarlag samdist um eitt løgmansevni og landsstýrismenn, sum flokkarnir so løgdu fyri Løgtingið at tilnevna.

Løgmansembætið, sum varð endurreist í 1948, fekk eitt annað innihald enn tað gamla, sum varð niðurlagt í 1852, tí meðan tann gamli løgmaðurin var formaður Løgtingsins, so var nýggja løgmansembætið eitt fyrisitingarligt formansembæti í Landsstýrinum mest at líkna við amtmansembætið í løgtingslógini frá 1923, sum varð niðurlagt í 1948. Løgmaður hevði rætt til at vera hjástaddur í Løgtinginum og fylgja við í viðgerðini í Løgtinginum; hann hevði rætt til at seta fram lógaruppskot í Løgtinginum, og hann hevði heimild til at taka orðið í Løgtinginum. Síðan 1956 hevur tað verið siðvenja, at løgmaður hevur hildið eina røðu í tinginum um støðu landsins, tá tingið kom saman á ólavsøku, men hvørki í stýrisskipanini ella í tingskipanini stóð nakað nevnt um *Løgmansrøðuna*.[392] Harumframt hevði løgmaður, tá vanlig tingseta var, heimild til at senda tingið heim í upp til tveir mánaðir uttan tingsins loyvi, men hesa heimildina misti hann til tingformannin í 1985. Løgmaður hevði ikki atkvøðurætt í tinginum, uttan so at hann eisini var valdur tingmaður. Hetta vóru stórt sæð somu heimildir, sum amtmaðurin hevði havt í einum burturav fólkavaldum Løgtingi síðan 1923, tá hann misti atkvøðurættin í Løgtinginum. Tað var ikki kravt, at løgmaður, um so var, at hann eisini var løgtingsmaður, skuldi lata løgtingssessin frá sær, meðan hann var løgmaður.

Heimildir løgmans *í* Løgtinginum kunnu samanberast við myndugleikan hjá amtmanninum í tíðini undan 1948. Tað sama ger seg stórt sæð galdandi viðvíkjandi heimildunum *yvir* Løgtinginum. Amtmaðurin hevði umframt sýtingarrættin undir „Midlertidig Styrelsesordning“ havt rætt til at freista tingsins samtyktir. Hetta kundi í síðsta enda hava við sær, at kongur upploysti Løgtingið og útskrivaði nýval, tað var tað, sum hendi tann 25. september 1946. Heimastýrislógin ásetti, at Løgtingið skuldi samtykkja løgtingslógirnar, meðan løg-



Fyrsta ólavsøkuskrúðgongan eftir at heimastýrislógin varð samtykt. C.A. Vagn-Hansen og Andras Samuelsen ganga á odda.

maður skuldi staðfesta tær. Løgmaður hevði sostatt sama sýtingarrætt mótvegis Løgtinginum, sum amtmaðurin hevði havt undir „Midlertidig Styrelsesordning". Tað er fleiri ferð komið fyri, at løgmenn hava sýtt fyri at staðfesta lógir, sum tingið hevði samtykt.[393] Kortini var støðan hjá Løgtinginum nakað sterkari mótvegis løgmanni aftaná 1948, enn hon hevði verið mótvegis amtmanninum. Undan 1948 hevði Løgtingið ikki havt nakra heimild at taka til móti amtmanninum, sýtti hann fyri at staðfesta eina løgtingssamtykt, soleiðis sum hann t.d. gjørdi í 1941. Og hóast tað var Løgtingið, sum setti løgmann í starv, so hevði Løgtingið sambært stýrisskipanarlógini ikki nakra beinleiðis heimild til at seta hann úr starvi aftur. Tað sama gjørdi seg galdandi viðvíkjandi amtmanninum undan 1948, men munurin var, at meðan amtmaðurin varð

sitandi í amtmansembætinum, til ríkismyndugleikarnir settu hann úr starvi, so varð løgmaður sitandi, til Løgtingið, sum fólkaræðisligt eftirlit var við, útskrivaði løgtingsval at vera. Tá løgtingsval varð útskrivað, noyddust bæði løgmaður og Landsstýrið at leggja frá sær.

Landsstýrismenninir, sum skuldu vera minst tveir í tali, vóru, eins og løgmaður, settir í starv av Løgtinginum, og teir vóru, eins og løgmaður, sitandi í landsstýrissessunum, til teir søgdu seg úr starvi, ella til løgtingsval varð útskrivað. Løgmaður, landsstýrisformaðurin, hevði hvørki heimild til at seta landsstýrismenn í starv ella koyra teir úr starvi. Tey smáu fyrisitingarligu viðurskiftini í Føroyum í 1948 høvdu við sær, at Løgtingið valdi at skipa Landsstýrið sum eitt *kollegium*, har allir landsstýrismenninir og løgmaður í felag høvdu fyrisitingina um hendi. Hvørki løgmaður ella landsstýrismenn tóku einsamallir nakrar fyrisitingarligar avgerðir, men atkvøtt varð á landsstýrisfundi við vanligari meirilutaatkvøðugreiðslu um øll landsstýrismál. Stóð á jøvnum, tá atkvøtt varð, so varð atkvøðan hjá løgmanni avgerandi. Einans Landsstýrið, ikki hvør landsstýrismaður sær, hevði rætt til at leggja uppskot fyri Løgtingið. Landsstýrismenn høvdu, eins og løgmaður og ríkisumboðsmaðurin, óskerdan rætt til at møta og at taka orðið í Løgtinginum. Landsstýrismenn, sum frammanundan vóru valdir tingmenn, kundu, eins og løgmaður, varðveita tingsessin og atkvøðurættin í Løgtinginum.

Í Løgtinginum, har Landsstýrið skuldi fáa síni lógaruppskot samtykt, vóru atkvøðugreiðslurnar øðrvísi enn í Landsstýrinum. Sambært grein 26 í stýrisskipanarlógini skuldu allar atkvøðugreiðslur í Løgtinginum fremjast eftir reglum um *kvalifiseraðan* meiriluta, sum høvdu verið galdandi í tí gamla Løgtinginum, líka síðan tað varð endurreist í 1852. Í stýrisskipanarlógini frá 1948 vóru reglurnar kortini herdar enn meir. Meðan atkvøðumeginreglan í løgtingslógini frá 1923 var, at „*Tinget kan ikke tage nogen Beslutning, naar ikke Halvdelen af dets Medlemmer er til Stede og deltager i Afstemningen*“,[394] so kom tað at standa í grein 26 í stýrisskipanarlógini, at „*Løgtingið kann ikki gera samtykt um nakað mál, uttan at meir enn helmingurin av tingmonnum er á fundi og fyri málinum*“.[395] Hugsa vit okkum, at 17 av 32 valdum løgtingsumboðum møttu til løgtingsfund, so var Løgtingið viðtøkuført sambært orðing-

unum í báðum lógunum, men atkvøddu 9 av teimum 17 møttu tingmonnunum fyri einum uppskoti, meðan 8 atkvøddu ímóti, so varð uppskotið samtykt sambært løgtingslógini frá 1923, meðan tað varð felt sambært stýrisskipanarlógini frá 1948. Skuldi uppskotið verið samtykt sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini frá 1948, so skuldi tað fingið allar 17 atkvøðurnar fyri sær, meðan tað var felt, um 16 atkvøddu fyri og 1 ímóti.

Hesar atkvøðureglurnar, sum stórir partar av Løgtinginum líka síðan 1852 høvdu verið ónøgdir við (sí s. 102 og s. 175), tryggjaðu í veruleikanum óvirknum og afturhaldssinnaðum kreftum í Løgtinginum lutfalsliga stóra ávirkan, meðan tær virknu og broytingarsinnaðu kreftirnar høvdu lutfalsliga lítla ávirkan. Í so máta gjørdist tað ikki betri í 1948. Upprunaliga vóru strongu atkvøðureglurnar helst settar í gildi við tí fyri eyga, at noyða løgtingsumboð, sum til dagligt høvdu annað lívsstarv, at møta og taka støðu í Løgtinginum, men tær hava havt ta óhepnu avleiðing, at støða Løgtingsins mótvegis amtmanninum gjørdist veik, tí tær avgerðir, sum Løgtingið, orsakað av strongu atkvøðureglunum, ikki megnaði at taka, hevði amtmaðurin heimild til at taka ístaðin. Støðan var eitt sindur øðrvísi í 1948, tí Løgtingið varð tá ein fólkavaldur stovnur burturav, sum sjálvt valdi formansskap, Landsstýrið og løgmann. Eingin hevði longur nakrar formligar heimildir til at taka avgerðir Løgtingsins vegna, men Landsstýrið, sum skuldi hava fyrisitingina av teirri lóggávu, sum Løgtingið samtykti, um hendi, kundi fáa stórt vald.

Sæð í tí samanhangi var tað kanska ikki so løgið, at Løgtingið herdi gomlu viðtøkuregluna frá 1852, tá stýrisskipanarlógin varð samtykt í 1948, tí henda reglan styrkti um støðu Løgtingsins mótvegis Landsstýrinum. Hon tryggjaði, at Landsstýrið altíð handlaði vegna løgtingsmeirilutan. Við hesum hevði Løgtingið, ella løgtingsmeirilutin, í útgangsstøði tryggja sær so stórt vald yvir bæði løgtingsminniluta og Landsstýri, at hesi umboð ongan møguleika høvdu fyri at seta seg upp ímóti løgtingsmeirilutanum. Eitt minnilutalandsstýri, sum frá máli til máls tryggjaði sær, at tað ikki fekk ein vaknan minniluta av teimum valdu tingfólkunum, sum kundi vera ein meiriluti av teimum uppmøttu ella atkvøðandi (virknu) løgtingsumboðunum, ímóti sær, var ikki ein møguleiki, sum var til staðar í

stýrisskipanarlógini. Landsstýrið skuldi í fyrsta lagi veljast av Løgtinginum, og í øðrum lagi skuldi tað í hvørjum einstøkum føri hava meirilutan av teimum *valdu* tingumboðunum fyri sínum lógaruppskotum.

Hóast atkvøðureglurnar í Løgtinginum høvdu við sær, at Landsstýrið kundi gerast fullkomuliga óarbeiðsført, um so var, at einans eitt umboð í parlamentariska grundarlagnum undir tí skifti støðu, so vóru ongar ásetingar í stýrisskipanarlógini um, at Landsstýrið skuldi leggja frá sær av hesum. Sæð í samanhangi við strongu atkvøðu- og viðtøkuførisreglurnar í stýrisskipanarlógini, sum øktu sannlíkindini fyri, at hetta kundi henda, var tað eitt sindur margháttligt, at ongar tílíkar ásetingar vóru. Grundin var helst tann, at ætlanin við stýrisskipanarlógini var, at bæði løgting og landsstýri skuldu noyðast at sita í tey 4 árini, sum valskeiðið vardi. Var hetta endamálið við stýrisskipanarlógini, so virkaði hon eftir ætlan í langa tíð, tí tað skuldu ganga fleiri enn 30 ár, áðrenn tað fyrstu ferð hendi, at ósemjur í eini landsstýrissamgongu gjørdust so stórar, at tað misti meirilutan í Løgtinginum, uttan at tað vóru útlit fyri, at ein loysn fór at finnast á trupulleikanum.

Í stýrisskipanarlógini vóru tveir møguleikar at taka til, um so var, at Landsstýrið gjørdist óarbeiðsført, tí tað misti stuðulin frá meirilutanum av teimum fólkavaldu løgtingsumboðunum. Í fyrsta lagi kundi landsstýrið í felag, ella ein landsstýrismaður av sínum eintingum, taka avgerð um at leggja frá sær. Gjørdi landsstýrið ella ein landsstýrismaður tað, so kundi Løgtingið velja eitt nýtt landsstýri/landsstýrisumboð, sum samsvaraði við áskoðanirnar hjá meirilutanum av løgtingsumboðunum. Vildu landsstýrið ella landsstýrisfólk hinvegin ikki leggja landsstýrissessin ella sessirnar frá sær, ella var ikki møguleiki fyri at skipa nýtt landsstýri uttan nýval, so kundi Løgtingið ikki gera annað enn at upploysa seg sjálvt og útskriva nýval til Løgtingið at vera, áðrenn tey 4 árini vóru runnin. Hesa heimildina til at útskriva løgtingsval í ótíð var tað einans Løgtingið sum hevði, og varð hon tikin í nýtslu, so varð avleiðingin tann, at alt landsstýrið fór frá samstundis, tí løgtings- og landsstýrisskeiðini fullu saman. Eftir løgtingsvalið skuldi eitt nýtt Løgting so velja eitt nýtt landsstýri.

Í 1980, tá ein landsstýrissamgonga fyri fyrstu ferð, síðan heimastýrislógin fór at virka, ikki megnaði at finna eina loysn

uppá eina ósemju í einum valskeiði, valdi Løgtingið at útskriva nýval. Uppskotið um nýval varð samtykt at vera tann 8. november 1980 av øllum teimum 32 tingumboðunum.[396] Í 1988 var hin møguleikin valdur, tí tá valdi landsstýrismaðurin Niels Pauli Danielsen sjálvboðin at leggja frá sær, eftir at trupulleikar høvdu tikið seg upp í landsstýrissamgonguni, og Løgtingið valdi Karolinu Petersen til nýggjan landsstýrismann.[397] Í 1989, tá samstarvstrupulleikar aftur tóku seg upp í eini samgongu, gekk tað ikki so lætt. Tá samgongan millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Kristiliga Fólkaflokkin, nakrar fáar mánaðir eftir at hon varð skipað í januar 1989, legði frá sær orsakað av samstarvstrupulleikum, varð nýggj samgonga skipað millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin. Nýtt landsstýri varð valt av Løgtinginum tann 22. juni 1989. Landsstýrismaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum, Karl Heri Joensen, valdi undir hesum umstøðum at leggja frá sær, men Tordur Niclasen, sum var landsstýrismaður fyri Kristiliga Fólkaflokkin, noktaði at gera tað sama.[398] Hvørki Løgtingið, Landsstýrið ella løgmaður høvdu heimild til at seta landsstýrismannin frá, men at enda




Ólavsøkuskrúðgongan 1950 kemur niðan eftir Bryggjubakka á veg í kirkju.

valdi Tordur Niclasen sjálvur at siga seg úr landsstýrissessinum. Hetta hendi tann 31. juli 1989, ein góðan mánað eftir at nýtt landsstýri varð valt. Í 1990, tá samgongusamstarvið millum Sambandsflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin slitnaði, upploysti Løgtingið seg sjálvt og útskrivaði nýval til Løgtingið at verða tann 17. november 1990. Tá Fólkaflokkurin í 1993 trekti seg burturúr landsstýrissamstarvinum við Javnaðarflokkin, spældi alt friðarliga av, og Javnaðarflokkurin skipaði tann 24. apríl nýtt landsstýri saman við Tjóðveldisflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum. Landsstýrismenn Fólkafloksins søgdu sjálvbodnir landsstýrissessinar frá sær.

*Parlamentarisman*, sum sigur, at ein stjórn ella ein stjórnarlimur ikki kann vera sitandi, um so er, at hon/hann fær meirilutan av lóggevandi valdinum ímóti sær, var ikki ein tilætlaður partur av føroysku stýrisskipanini frá 1948, men tá komið varð inn í 1980-ini, byrjaði parlamentarisman so smátt at vinna hevd í politisku skipanini. Landsstýri ella landsstýrisfólk, sum fingu meirilutan av Løgtinginum ímóti sær, byrjaðu so smátt sjálvboðin at leggja frá sær, ella eisini valdi Løgtingið at útskriva nýval fyri á tann hátt at fáa landsstýrið frá. Nakrar løgfrøðiligar orðingar um parlamentarismu funnust kortini ikki í stýrisskipanini.

## Tingseta og tingskipan

Løgmaður skuldi stevna tinginum at koma saman hvørt ár á ólavsøku aftaná gudstænastu. *Ólavsøkuskrúðgongan*, har prestar, løgtingslimir, próstur, amtmaður/ríkisumboðsmaður og løgmaður fóru úr tinginum í kirkju og aftur í tingið, hevur helst røtur aftur í elligamlan sið, sum varð uppafturtikin í 1852, tá tingið varð endurreist. Síðan hevur skrúðgongan verið fastur táttur á ólavsøku, tá tingið kom saman, men ongar formligar ásetingar vóru gjørdar um hana í 1948.

Harafturímóti vóru neyvar reglur ásettar í tingskipanini frá 1948 um, hvussu arbeiðsgongdin í tinginum skuldi vera. Hevði løgtingsval verið, skuldu valbrøvini kannast og góðkennast. Elsta umboðið í tinginum skuldi standa fyri tingarbeiðinum, til nýggjur formanskapur varð valdur. Tingskipanin ásetti, eins og vanligt hevði verið síðan 1923, at formaður, tveir næstformenn, tveir skrivarar og allar løgtingsnevndir skuldu veljast, hvørja ferð tingið varð sett. Tingformaðurin, sum



Tingmenn, prestar og landsstýrismenn koma niðan eftir Tinghúsvegnum við ríkisumboðsmanni og løgmanni á odda.

óheftur skuldi leiða samráðingarnar í tinginum og syrgja fyri, at góður tingsiður varð hildin, kundi ikki, eins og eisini var ásett í undanfarnu tingskipan frá 1924, taka lut í teimum partapolitisku samráðingunum í tinginum uttan so, at hann gjørdi tað sum vanligt løgtingsumboð. Tá skuldi hann lata formanssessin frá sær til annan næstformannin ímeðan. Av tí at tingformaðurin, hægsta tignarliga starv í Løgtinginum, skuldi veljast *hvørja* ferð tingið kom saman, var formansembætið veikt mótvegis Løgtinginum. Hartil kom, at 7 tingmenn, frá 1984 10 tingmenn, kundu krevja, at formaðurin varð valdur av nýggjum.

Landsstýrismenn, løgmaður og ríkisumboðsmaðurin høvdu óskerdan talurætt í tinginum umframt rætt til at leggja uppskot fyri tingið, men atkvøðurætt høvdu einans vald tingfólk. Tingformaðurin skuldi tilluta uppskotsstillarum upp til ein hálvan tíma talutíð í tinginum, soleiðis at hesi fingu høvi til munnliga at bera uppskot fram fyri Løgtingið. Løgtingsumboðini skuldu kortini hava uppskotini í hendi skrivliga í minsta lagi tveir dagar, áðrenn tey vóru løgd fyri tingið. Tingskipanin ásetti, at øll lógaruppskot ikki einans ríkislógartilmæli, sum tað hevði staðið í gomlu tingskipanini, skuldu hava tríggjar viðgerðir. Uppskotsstillarar, framsøgufólk, løg-

maður, landsstýrismenn og tingumboð fingu tillutað fastar talutíðir. Gamla tingskipanin frá 1924 hevði ásett, at tingmaður, tá hann hevði fingið loyvi frá formanninum til at taka orðið, skuldi tala standandi frá sínum plássi í tingsalinum, meðan hann vendi sær móti formanninum, men í tingskipanin frá 1948 varð tann broyting framd, at røðast skuldi frá røðarastólinum, sum var gjørdur í tingsalinum til endamálið.

Tá atkvøðast skuldi eftir ásetingunum í stýrisskipanarlógini, skuldu tingfólk reisast av sínum plássi, og atkvøðast skuldi annaðhvørt fyri ella ímóti einum uppskoti. Var atkvøðuluttøkan ov lág til tess at fáa eitt uppskot samtykt, kundi tingformaðurin lata navnakall fara fram. Skrivararnir skuldu telja atkvøðurnar, og samtykt uppskot skuldu undirskrivast av tingformanninum og øðrum skrivaranum, áðrenn tey vóru send løgmanni til endaliga staðfesting.

Tað stóð ongastaðni í stýrisskipanini ella í tingskipanini nakað um, hvussu leingi tingið kundi ella skuldi vera saman til vanliga tingsetu, soleiðis sum tað hevði verið ásett í undanfarnu heimildarkarmum Løgtingsins. Í løgtingslógini frá 1923 varð t.d. ásett, at vanliga tingsetan ikki skuldi vara longur enn 6 vikur, uttan so at helvtin av tingumboðunum kravdu tað, men í stýrisskipanarlógini frá 1948 varð hetta vent á høvdið, tí í

Í 1970 samtykti Løgtingið at seta valrættaraldurin niður í 20 ár.



grein 8 stóð, at løgmaður hevði heimild til at slíta vanligu tingsetuna í upp til tveir mánaðir uttan tingsins samtykt. Í aðra mátar var tað løgmaður, sum avgjørdi nær vanliga tingsetan varð slitin. Løgmaður hevði eisini eins og amtmaðurin undan honum heimild til at kalla tingið saman til eykatingsetu, og hann *skuldi* gera tað, um so var, at helvtin av tingmanningini kravdi tað. Í 1985, tá stýrisskipanarlógin varð broytt, var formansskapurin í tinginum styrktur nakað, tí tá fekk løgtingsformaðurin heimild løgmans til at slíta løgtingssetuna í upp til 2 mánaðir uttan samtykt tingsins, og tað var eisini løgtingsformaðurin, sum fekk heimildina til at kalla tingið saman til eykatingsetu. Harumframt skuldi tað nú vera tingformaðurin, sum sleit vanligu tingsetuna.

**Valrættaraldur og valskipan**

Í Danmark var valrættaraldurin til Ríkisdagin 25 ár líka til 1953, men føroyska Løgtingið hevði longu í 1944 sett valrættaraldurin til Løgtingið heilt niður í 21 ár. Valrættaraldurin til Løgtingið varð ikki broyttur við stýrisskipanarlógini frá 1948, hóast talan var um eitt føroyskt málsøki. Neyvan hevði tað verið í tráð við rák í tíðini, um valrættaraldurin varð settur longur niður í Føroyum í 1948, tí tá danska grundlógin varð broytt í 1953, var valrættaraldurin í Danmark settur niður í 23 ár; tað var ikki fyrr enn í 1961 at danski valrættaraldurin gjørdist 21 ár, eins og hann hevði verið í Føroyum síðan kríggið. Broytingar í valrættaraldrinum hendu ikki aftur í Føroyum fyrr enn í 1970, tá Løgtingið samtykti, at hann skuldi lækkast úr 21 niður í 20 ár. Árið eftir framdu danir somu broyting í valrættaraldrinum, og í 1978 varð valrættaraldurin til Fólkatingið settur niður í 18 ár. Hendan broytingin varð ikki framd í Føroyum fyrr enn í 1984, tá valrættaraldurin til Løgtingið eisini gjørdist 18 ár.[399]

Harafturímóti var sjálv valskipanin broytt við løgtingslóg longu í 1948. Sperrimarkið frá 1944 uppá 10%, sum til løgtingsvalið í 1945 hevði verið grundin til, at Sjálvstýrisflokkurin einki løgtingsumboð fekk, fall burtur í 1948, tá Løgtingið samtykti at fara aftur til gomlu valskipanina í løgtingslógini frá 1923.[400] Treytin í vallógini um, at ein uppstillingarlisti skuldi hava minst eitt valdømisvalt umboð, sum kom inn í lógina í 1939, ella ein ávísan prosentpart av atkvøð-

unum, sum var komin í staðin í 1944, fyri at hava møguleika fyri at fáa eykavald umboð, fór burtur úr valskipanini í 1948. Smáir flokkar, sum ikki høvdu nóg mikið av atkvøðum í nøkrum valdømi til tess at fáa eitt valdømisvalt umboð, kundu aftur fáa eykavald umboð, um so var, at teir á landsplani fingu so mikið nógvar atkvøður, at tær svaraðu til miðal kostnaðin av teimum valdømisvaldu umboðunum.

Hægst loyvda tingmannatalið, sum varð ásett at vera 30 í 1944, tey 20 valdømisvaldu, sum altíð skuldu veljast, plus í mesta lagi 10 eykavald, varð ikki broytt í 1948, men uppskot varð lagt fyri tingið um at hækka talið á valdømisvaldum umboðum úr 20 upp í 23, soleiðis at Suðuroyggin, Eysturoyggin og Norðuroyggjar fingu hvør sítt umboð afturat. Uppskotið um at hækka talið á valdømisvaldum tingmonnum, sum uppskotsstillararnir grundgóvu fyri við at vísa á, at stórur fólkavøksturin hevði verið í nevndu valdømum, fall, tá atkvøtt varð um tað í tinginum. Hinvegin varð tað staðfest í grein 13 í stýrisskipanarlógina frá 1948, at Løgtingið skuldi í minsta lagi hava 23 og í mesta lagi 30 umboð. Sostatt var einasta broytingin í tingmanningini tann, at meðan tað frammanundan hevði verið soleiðis, at tingmannatalið kundi koma at liggja einastaðni ímillum 20 og 30, so var hetta í 1948 broytt á tann hátt, at tað altíð skuldu vera 23 umboð – 20 valdømisvald plus minst 3 eykavald – í Løgtinginum, men tingmannatalið kundi framvegis ikki fara upp um tey 30.

Soleiðis var býtið av tingumboðum til 1978, tá ásetingin um hægst loyvda tingmannatalið varð tikin burtur úr stýrisskipanarlógini. Samstundis var hægst loyvda tingmannatalið við løgtingslóg hækkað upp í 32,[401] og talið á valdømisvaldum umboðum varð hækkað úr 20 og upp í 27, soleiðis at tað í mesta lagi kundu verða 5 eykavald umboð í Løgtinginum móti 10 frammanundan. Tey valdømisvaldu umboðini skuldu býtast soleiðis, at Norðoya valdømi fekk hækkað sína føstu umboðan úr 2 upp í 4, Eysturoyar valdømi fekk 1 umboð afturat og hevði 5, Norðstreymoyar valdømi varðveitti síni 2 umboð, Suðurstreymoyar valdømi fekk tvífaldað sína umboðan úr 4 upp í 8, Vága valdømi varðveitti síni 2 umboð, Sandoyar valdømi varðveitti somuleiðis síni 2 umboð, og Suðuroyar valdømi hevði framvegis 4 valdømisvald umboð í Løgtinginum.[402] Eykavaldu løgtingsumboðini skuldu, eins og í gomlu



Í 1978 varð talið av valdømisvaldum tingmonnum hækkað úr 20 upp í 27. Her klappa landsstýris- og løgtingsmenn fyri kórsangarum á ólavsøku 1979.

vallógini frá 1923, veljast við støði í teimum atkvøðum, sum flokkarnir fingu í øllum Føroyum tilsaman. Løgtingslógin, sum ásetur hendan býtislykil til býti av teimum 32 løgtingsumboðunum, er framvegis galdandi, men tá nýggj stýrisskipanarlóg varð sett í gildi í 1995, var áseting um hægst loyvda tingmannatal, sum nú gjørdist 33, aftur sett inn í lógina. Tingmannatalið kann tí ikki hækkast upp um 33 við vanligari løgtingslóg, tað kann einans gerast við broytingum í sjálvari stýrisskipanarlógini.

Í 1948 var uppskot eisini frammi um at broyta valskipanina á tann hátt, at tað ikki longur skuldi vera raðfestingin á uppstillingarlistanum, ið avgjørdi, hvørji umboð vóru vald á einum lista, soleiðis sum skipanin hevði verið síðan 1906, men harafturímóti skuldi tað vera persónliga atkvøðutalið hjá teimum, sum uppstillaði vóru á listanum. Hetta uppskotið fall í 1948, og málið var ikki tikið upp aftur fyrr enn knappliga 20 ár seinni. Í 1965 samtykti Løgtingið at broyta valskipanina, soleiðis at tey umboð, sum ein listi fekk tillutað, fullu til teir persónar á listanum, sum høvdu flest persónligar atkvøður.[403] Harvið var ein valskipan, ið bygdi á ta dupultu grundregluna um, at tað vóru tær atkvøður, sum listin fekk tilsamans, ið

avgjørdu, hvussu *nógv* umboð ein listi fekk vald, meðan tað vóru tær persónligu atkvøðurnar hjá teimum valevnum, sum stillaðu upp á listanum, sum vóru avgerandi fyri, *hvørji* valevni vóru vald. Meginreglan um persónligt val, soleiðis sum vit kenna hana í dag, varð harvið sett í gildi í Føroyum.

Løgtingsvalskeiðið skuldi vera fýra ár, og alt Løgtingið skuldi veljast uppá ein gang, soleiðis sum siður hevði verið síðan 1923. Undan 1948 høvdu løgtingsmeirilutin *og* stjórnin havt heimild til at senda tingið heim og útskriva løgtingsval at verða, áðrenn tey fýra árini vóru runnin, men heimastýrislógin heimilaði ikki ríkismyndugleikunum at senda tingið heim. Løgtingið fekk beinleiðis staðfest í stýrisskipanarlógini frá 1948, at tað einans var Løgtingið, sum hevði myndugleika til at útskriva nýval at verða, áðrenn tey fýra árini vóru runnin.

## Fíggjarligu viðurskifti heimastýrisins

Løgtingið hevði síðan 1934 kravt beinleiðis løgtingsskatt inn í Føroyum, men hetta var gjørt við heimild í danskari ríkislóg.[404] Allar inntøkur Løgtingsins, eisini løgtingsskatturin, vóru í tíðini undan 1948 bókaðar sum ríkisinntøkur í Amtsgrunninum,[405] men Løgtingið hevði havt fyrisitingarligt ræði á inntøkunum í amtskommunalu grunnunum síðan 1852.

Við heimastýrislógini fingu føroyskir myndugleikar endaliga staðfest játtandi myndugleika í Føroyum. Løgtingið fekk við føroyskari løgtingslóg óskerda heimild til at krevja skatt inn í Føroyum, og Landsstýrið fekk heimild til at fyrisita peningin í samsvar við lóggávu Løgtingsins. Amtskommunalu grunnarnir vórðu avtiknir, og settur varð á stovn ein føroyskur *Landskassi*, sum skuldi fyrisita fíggjarviðurskifti Løgtingsins. *Løgtingsskrivstovan* varð sett á stovn í 1935, partvíst við tí endamáli at fyrisita allar inntøkur og útgjaldingar Løgtingsins í Føroyum, men skrivstovan fekk seinast í 1930-unum eisini til uppgávu at fyrisita partar av ríkisveitingunum, eitt nú 5 ára fíggjarætlanina frá 1939. Fult fyrisitingarligt ræði á hesum peningi hevði Løgtingsskrivstovan ikki, tí Gjaldstovan, sum varð sett á stovn í 1939, hevði ríkisins vegna eftirlit við nýtsluni av ríkisstuðulinum. Tá Gjaldstovan tann 1. apríl 1949 varð yvirtikin av heimastýrinum, fekk hon til uppgávu at fyrisita allar inntøkur og útreiðslur landskassans, meðan Løgtings-

skrivstovan skuldi fyrisita viðurskifti Løgtingsins. Føroyskir myndugleikar fingu kortini ikki fult ræði á ríkisveitingunum fyrr enn í 1988, tá tær vóru lagdar um til *Heildarveiting* (sí s. 329). Síðani 1988 hevur ríkisveitingin staðið á løgtingsfíggjarlógini, ið Løgtingið hevur fult ræði á.

Skattirnir, sum seinast vóru hækkaðir í 1941, hækkaðu nakað, tá heimastýrislógin fór at virka. Í 1949 samtykti Løgtingið nakrar fyribils broytingar í skattalógini, sum øktu nakað um skattabyrðu føroyinga, men tað var ikki fyrr enn í 1951 og 1952, tá kreppútíðir vóru í Føroyum, at munandi skattahækkingar vóru framdar. Av eini árligari skattskyldugari inntøku uppá 3.000 krónur skuldu í 1952 gjaldast 20 krónur, av 4.000 krónum skuldu 90 krónur gjaldast, av 8.000 krónum skuldu 365 krónur gjaldast, av 20.000 krónum skuldu 2.165 krónur gjaldast, av 50.000 krónum skuldu 12.165 krónur gjaldast, av 100.000 krónum skuldu 36.415 krónur gjaldast, og var inntøkan 400.000 krónur, so skuldu 196.415 krónur gjaldast í løgtingsskatti. Í sjálvum sær var hetta ikki ein stór skattahækking, men Løgtingið samtykti harumframt ein eykaskatt uppá 20% av øllum inntøkum, sum vóru størri enn 6.000 krónur og minni enn 8.000 krónur, og 30% skuldi leggjast á allar inntøkur, sum vóru omanfyri 8.000 krónur.[406] Við eykaskattinum kom skattaprosentið fyri omanfyri nevndu upphæddir upp í ávíkavist 0,7%, 22,2%, 34,6%, 40,9%, 54,3%, 66,4% og 79,1%. Harumframt vóru tollgjøldini hækkaði munandi í 1951,[407] soleiðis at tey komu at samsvara við gjøldini í Danmark. Grundgevingin fyri skatta- og avgjaldshækkingunum var, at inntøkurnar vóru nógv minkaðar, tá ein stór búskaparkreppa fór at gera um seg í Føroyum í 1951 (sí s. 321).

Fyribilsskattalógin frá 1948, endurnýggjað við eykaskatti í 1951, var við smávegis broytingum staðfest av Løgtinginum á hvørjum ári til tann 2. juli 1963, tá nýggj skattalóg varð sett í gildi. Í 1966 skuldu 2.755 krónur gjaldast í skatti av eini skattskyldugari inntøku uppá 20.000 krónur, meðan 31.065 krónur skuldu gjaldast av eini skattskyldugari inntøku uppá 75.000 krónur. Í prosentum var talan um ávíkavist 13,8% og 41,4%. Hesi skattaprosent eru kortini nakað høgt sett, tí frádráttir vóru eisini, sum gjørdu skattskyldugu inntøkuna nakað lægri. Sum dømi kann nevnast, at løgtingsumboð høvdu

eina árliga inntøku, sum var um 20.000 krónur um hetta mundið, meðan landsstýrismenn høvdu umleið 60.000 krónur í árligari inntøku.

Skattabyrðan hjá føroyingum byrjaði so smátt at økjast, tá heimastýrislógin fór at virka, men tað var í veruleikanum ikki fyrr enn í 1980-unum, at skattaprosentið veruliga fór at minna um tað, sum galdandi er í dag.[408] Skattalógin frá 1963 varð fleiri ferðir broytt av Løgtinginum, men hon varð ikki endaliga sett úr gildi fyrr enn tann 1. september 1983, tá ein heilt nýggj skattalóggáva varð samtykt. Samstundis samtykti Løgtingið at seta í verk *samtíðarskattaskipan*, sum fór at hava við sær umfatandi broytingar í innkrevjingini av løgtingsskattinum.[409] Nýggja skattaskipanin fór at virka í 1984.

**Inntøkuviðurskifti landskassans**

Jarðarskatturin, sum hevði verið høvuðsinntøka Løgtingsins í 19. øld, var í 1947 einans 9.000 krónur, men tá heimastýrislógin fór at virka, hvarv hann úr fíggjarlógini. Toll- og skattainntøkurnar øktust harafturímóti munandi.

Í 1948 vóru inntøkur landskassans tilsaman 7,8 milliónir krónur, harav vóru løgtingsskatturin og tollinntøkur ávíkavist 3,8 og 3,4 milliónir;[410] í 1952, tá nýggja skattalóggávan var farin at virka, vóru inntøkurnar vaksnar upp í 10,3 milliónir, harav var løgtingsskatturin við tollinntøkum 9,5 milliónir.[411] Í 1969 javnvigaði løgtingsfíggjarlógin við 90 milliónum krónum. Harav vóru løgtingsskatturin og tollinntøkur ávíkavist 37 og 54 milliónir krónur. Í 1975 góvu løgtingsskatturin og tollinntøkur ávíkavist 102 og 128 milliónir krónur av eini samlaðari løgtingsfíggjarlóg uppá góðar 236 milliónir krónur. Tá komið varð inn í 1980-ini vóru inntøkur landskassans øktar uppí 660 milliónir og í 1985 vóru samlaðu inntøkurnar farnar upp um milliardina. Í 1990-unum, tá stórir partar av ríkisveitingini vóru komnir at standa á løgtingsfíggjarlógini, fóru samlaðu inntøkur landskassans upp um 2 milliardir og í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2000 vóru inntøkurnar settar at vera góðar 3,4 milliardir krónur. Løgtingsskatturin einsamallur, sum tað fyrsta árið, hann varð kravdur, í 1934, hevði givið Amtsgrunninum 30.000 krónur í inntøku, gav í 2000 landskassanum 1,3 mia. krónur.[412] Nógv var broytt síðan seinnu helvt av 19. øld, tá Løgtingið tilsaman hevði ræði á 10-20.000 krónum.

Útreiðslur ríkiskassans í Føroyum øktust eisini munandi í heimastýristíðarskeiðinum. Í 1939 hevði ríkiskassin eina útreiðslu á fíggjarlógini í Føroyum uppá 2,4 milliónir krónur. Henda upphæddin broyttist nærum einki øll krígsárini, men tey fyrstu 20 árini eftir kríggið, serstakliga í árunum aftaná búskaparkreppuna í 1950-unum[413] (sí s. 321), 20 faldaðust útreiðslur ríkiskassans í Føroyum. Í 1965 vóru tær góðar 49 milliónir krónur, í 1969 umleið 60 milliónir krónur,[414] og í 1973 vóru tær slakar 180 milliónir krónur.[415] Útreiðslur ríkiskassans í Føroyum byrjaðu veruliga at økjast í 1970-unum, tá stórur prísvøkstur var. Í 1986 vóru tær góðar 723 milliónir krónur,[416] og tá meginparturin av útreiðslum ríkisins í Føroyum vóru lagdar um til heildarveiting í 1988, var samlaða játtanin til Føroya 889 milliónir krónur. Í 2000 vóru útreiðslur ríkiskassans í Føroyum umleið 1,3 milliard krónur.

Løgtingið hevði við heimastýrislógini í 1948 formliga fingið ræði á føroyskum fíggjarviðurskiftum, men veruleikin var eitt sindur meira fjølbroyttur. Hóast Løgtingið ikki var so heft av donskum veitingum í 1948, sum tað hevði verið í tíðini undan heimsbardaganum, so var tann almenni føroyski búskapurin í 2000 eins tætt knýttur at donskum ríkisveitingum, sum hann hevði verið, tá heimastýrislógin fór at virka. Í 1939 hevði Løgtingið eina inntøku í Føroyum uppá umleið 755.000 krónur, meðan ríkiskassin hevði eina útreiðslu í Føroyum, ið var meira enn 3 ferðir so stór, umleið 2,4 mió. krónur. Í 1945, tá búskaparliga stóð væl til í Føroyum, var býtið heilt øðrvísi: Ríkisstuðulin var á leið tann sami sum í 1939, men inntøkur Løgtingsins í Føroyum, sum vóru meira enn 7 faldaðar, vóru í 1945 meira enn dupult so stórar sum ríkisveitingin, umleið 5,4 mió. krónur. Í 2000 var lítið og einki broytt hesum viðvíkjandi, tí býtið var á leið tað sama sum í 1945: Landskassin hevði eina inntøku í Føroyum uppá umleið 2,7 mia. krónur, meðan ríkiskassin hevði eina útreiðslu uppá umleið 1,3 mia. krónur í Føroyum.

Hesar einføldu samanberingar kundu bent á, at meðan landskassin var nógv minni heftur at ríkisveitingini í 1948, enn Amtsgrunnurin hevði verið í 1939, so vóru nærum ongar broytingar hendar hesum viðvíkjandi í tíðini frá 1948 til 2000. Veruleikin er kortini eitt sindur meira fjølbroyttur, tí tølini kunnu ikki beinleiðis samanberast. Føroyska samfelagið var í

2000 eitt væl útbygt vælferðarsamfelag, við einum stórum og útreiðslukrevjandi almennum sektori, sum hevði eitt høgt skatta- og avgjaldstrýst, meðan nærum ongar vælferðarskipanir og lágir skattir eyðkendu ta fyrstu tíðina aftaná, at heimastýrisskipanin var farin at virka. Hetta sæst beinleiðis av, at hóast ríkisveitingin ikki var vaksin nakað serligt í mun til skatta- og tollinntøkur Løgtingsins í heimastýristíðarskeiðinum, talan var um ein lítlan vøkstur frá 44% til 48%, so var ríkisveitingin frá 1962 til 1997 vaksin úr 10,5% upp um 20%, sæð í mun til tað samlaðu føroysku framleiðsluna.[417] Føroyska samfelagið sum heild gjørdist tí nógv meira heft at donskum veitingum í heimastýristíðarskeiðinum, hóast ríkisveitingin ikki gjørdist ein størri partur av inntøkum Løgtingsins.

Tað hevði eisini stóran týdning fyri møguleikarnar í føroyskum búskapar- og sjálvstýrispolitikki í tíðarskeiðinum aftaná 1948, at Løgtingið, sum í 1945 átti fleiri milliónir krónur á bók, longu í 1947 hevði átikið sær eina skuld uppá 8 milliónir krónur.[418] Í 2001, tá skuld landskassans var 4,2 milliardir krónur,[419] vóru hesar avmarkingar ikki minni. Glottar vóru kortini at hóma fyri framman, tá komið varð móti endanum á 20. øld (sí s. 384).

**Løgtingsmannalønir**

Samsýningarnar til tingmenn vóru fyrstu árini aftaná 1948 eins og frammanundan goldnar tingmonnum sum dagpeningur, men í 1955 varð tann broyting framd, at eisini umboð í føstum millumtinganevndum skuldu fáa somu samsýning sum tingumboð. Samsýningin skuldi framvegis vera 12 krónur fyri hvønn fundardag, men harumframt skuldi hvør ferðadagur geva 6 krónur.[420] Dagpeningasatsurin hevði verið 12 krónur fyri hvønn fundardag líka síðan 1923, men í 1940 fingu tingmenn eina viðbót uppá 3 krónur um dagin afturat dagpenginginum. Harumframt høvdu allar lønir í Føroyum verið prístalsviðgjørdar síðan 1942. Tann prístalsviðgjørdi dagpeningurin hjá tingmonnum saman við viðbótum var í 1960 komin uppá 41,28 krónur fyri dagin. Vistarsamsýningin uppá 8 krónur, sum tingmenn á bygd síðan 1947 høvdu fingið fyri hvønn dag, teir vóru heimanífrá í tingørindum, var komin uppá 25 krónur fyri hvønn dag.[421]

Hóast tingarbeiði við heimastýrislógini ikki gjørdist fulltíð-



Tingmanningin á 100 ára degnum í 1952. Á formanspallinum sita frá vinstru: J.H. Danbjørg, 2. tingskrivari, Johan Poulsen, løgtingsformaður og Jens Chr. Olsen, 1. tingskrivari. Tingmanningin er annars frá vinstru: Hans Iversen, Andreas Djurhuus, Sámal Ellefsen, J.P. Henriksen, Einar Waag, Frederik Bláhamar, Antinis Sørensen, Hákun Djurhuus, landsstýrismaður, Rikard Long, landsstýrismaður, Kristian Djurhuus, løgmaður, O.F. Joensen, Martin Holm, Søren Danielsen, D.P. Danielsen, J.P. Davidsen, C.A. Vagn-Hansen, ríkisumboðsmaður, Poul Petersen, S.P. Zachariasen, Thorstein Petersen, J.Fr. Øregaard, Johan Kallsoy og Trygve Samuelsen.

arstarv burturav, so var dagpeningaskipanin ikki longur nøktandi, tá tingarbeiði ikki longur var avmarkað til ávísar partar av árinum. Hetta hevði við sær, at í 1961 samtykti Løgtingið, at tingmenn skuldu fáa fasta løn, 8.000 krónur um árið, sum skuldi gjaldast við einum tólvtaparti eina ferð um mánaðin. Tingmannalønin skuldi prístalsviðgerast eftir ásetingunum í tænastumannalógini. Tingmenn av bygd skuldu harafturat fáa vistarhaldspening uppá 4.000 krónur um árið. Løgmaður og landsstýrismenn, sum longu í 1948 høvdu fingið fasta løn, ávíkavist 12.000 og 10.000 krónur árliga,[422] fingu í 1961 ávíkavist 28.300 og 24.000 krónur árliga.[423]

Tá lógin um samsýning tingmanna varð broytt í 1971, vóru lønirnar komnar uppí 20.000 krónur árliga. Løgmans- og landsstýrismannalønirnar vórðu settar at vera ávíkavist 68.000

krónur og 61.000 krónur um árið. Samstundis varð avgjørt, at tingmenn skuldu fáa bíðipening í fýra ár, eftir at teir fóru frá. Ein tingmaður, sum hevði sitið á tingið í tvey ár, skuldi fáa 4.000 krónur árliga, men hevði hann sitið í tólv ár ella meira, so fekk hann 10.000 krónur um árið í bíðipeningi. Bíðipeningurin hjá landsstýrismonnum, sum var komin í 1961, varð hækkaður í 1971, soleiðis at hann kom at liggja ímillum 6.000 og 30.000 krónur um árið.[424]

Í 1975 var kostnaðarendurgjaldið til løgtingsmenn sett at vera millum 4.000 og 25.000 krónur, alt eftir hvussu langt frá miðstaðarøkinum tingmenn høvdu bústað. Bíðipeningurin til tingmenn varð eisini hækkaður, soleiðis at hann kom at liggja ímillum 12.000 og 30.000 krónur um árið.[425] Í 1975 var tingmannalønin saman við viðbótum góðar 50.000 krónur um árið.

Helvtin av tingmannalønini hevði verið skattafrí líka síðan ta tíðina, tá tingmenn vóru samsýntir eftir dagpeningaskipanini. Hetta varð ikki broytt, tá tingmenn fingu fasta løn í 1961, men í 1976 ynskti Landsstýrið, at tingmenn eins og vanligir skattaborgarar skuldu skattast av allari inntøkuni. Hetta hevði við sær, at lønirnar vórðu hækkaðar uppí góðar 70.000 krónur árliga. Tingformaðurin, tingskrivarin og fíggjarnevndarformaðurin skuldu harafturat fáa eina eykasamsýning uppá 14.900 krónur árliga.

Tá løgtingslógin um samsýningar o.a. til tingmenn varð broytt í 1993, varð tingmannalønin 192.000 krónur um árið. Bíðipeningurin hjá løgtingsmonnum varð avtikin, samstundis sum tingmenn fingu rætt til eftirløn, tá teir fyltu 67 ár. Hevði ein tingmaður sitið á tingið í tvey ár, so fekk hann eina eftirløn, sum svaraði til 20% av eftirlønini í tí lønarflokki, sum hann var løntur í, men hevði hann sitið í sekstan ár ella meir, so fekk hann 90% í eftirløn. Tað skattafría kostnaðarendurgjaldið varð hækkað, soleiðis at tað kom at liggja ímillum 25.000 og 90.000 krónur árliga.[426] Viðbótin til løgtingsformannin varð hækkað uppí 74.000 krónur um árið í 1993. 1. skrivari, 2. skrivari og formaðurin í Fiskivinnunevndini fingu eina viðbót uppá 50.000 krónur um árið. Landsstýrismenn mistu eins og tingmenn bíðipeningin í 1993, men teir fingu samstundis rætt til eina ávísa eftirløn, tá teir fyltu 67. Fasta mánaðarlønin hjá einum landsstýrismanni, sum í 1993 var nakað omanfyri 30.000



Fríðrikur IX vitjaði í 1963. Her prátar hann við Kjartan Mohr frammanfyri formanspallin. Teir kendust frá ungdómsárum.

krónur, var í 2001 knappar 37.000 krónur. Løgmaður fekk í 2001 góðar 43.000 krónur um mánaðin. Harumframt fekk løgmaður 60.000 krónur um árið í borðfæi, meðan landsstýrismenn fingu 20.000 krónur.

Lógin um samsýning tingmanna varð broytt í 1998, tá tingmannalønirnar vórðu munandi hækkaðar, soleiðis at tær skuldu verða ein virðilig samsýning fyri eitt høvuðsstarv.[427] Samsvarandi broytingunum í 1998 skuldu løgtingsmenn fáa eina fasta løn, sum var umleið 25.000 krónur um mánaðin. Frammanundan høvdu tingmenn umframt tað føstu lønina uppá umleið 16.000 krónur um mánaðin, í miðal fingið 2.500 krónur í nevndarpeningi, soleiðis at mánaðarlønin í veruleikanum var umleið 18.500 krónur. Við broytingunum í 1998 mistu tingmenn nevndarpeningin við teirri grundgeving, at nevndararbeiði var partur av tingarbeiðinum. Sostatt hækkaði

tann mánaðarliga tingmannalønin í miðal úr 18.500 krónum og upp í 25.000 krónur í 1998. Í 2001 var tingmannalønin 26.500 krónur um mánaðin. Ásetingarnar viðvíkjandi kostnaðarendurgjaldi fyri ferðing hjá tingmonnum uttanfyri Havnina varð broytt nakað í 1999, tá tað eisini varð ásett, at allir tingmenn skuldu hava eitt skattafrítt kostnaðarendurgjald uppá 2.000 krónur um mánaðin. Eftirlønin, sum tingmenn høvdu rætt til at fáa, tá teir fyltu 67, varð eisini broytt í 1999.[428] Meðan tingmenn frammanundan ikki uppspardu rætt til eftirløn, fyrr enn teir høvdu sitið í tvey ár, so fingu teir í 1999 rætt til lægstu eftirløn, sum var 4,5% av tingmannalønini, longu tá teir høvdu sitið í eitt ár, og ein tingmaður, sum hevði sitið í sekstan ár á tingi, fekk hægstu eftirlønina, sum var 60% av lønini, tá hann fylti 67 ár. Tingformanslønin varð munandi hækkað longu í 1995, og síðan 1998 hava lønarviðurskiftini hjá tingformanninum verið tey somu sum hjá løgmanni.

## Føroyskur politikkur undir heimastýrisskipanini

Tað løgtingið, sum hevði staðið fyri samráðingunum við donsku ríkismyndugleikarnar aftaná fólkaatkvøðuna í september í 1946, varð valt í november sama árið, og tað var sitandi 4 ára skeiðið út. Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum samtyktu heimastýrislógina á tingi, høvdu meirilutan í Løgtinginum við ávíkavist 6, 4 og 2 umboðum, meðan Fólkaflokkurin, sum atkvøddi ímóti heimastýrislógini, hevði 8 umboð í Løgtinginum. Longu tann 12. mai 1948, dagin fyri at stýrisskipanarlógin varð samtykt á tingi, skipaðu Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin tað fyrsta landsstýrið í søgu heimastýrisins. Løgtingið valdi Andrass Samuelsen úr Sambandsflokkinum til løgmann. Sum landsstýrismenn vórðu valdir Kristian Djurhuus úr Sambandsflokkinum, Jóan Petur Davidsen úr Javnaðarflokkinum og Louis Zachariasen úr Sjálvstýrisflokkinum.

Tann 13. mai 1948, samstundis sum stýrisskipanarmál vórðu yvirtikin frá *lista A* í heimastýrislógini, vórðu fleiri onnur málsøki yvirtikin við heimild í grein 2 í heimastýrislógini. Hesi vóru kommunumál, meinigheitsmál, byggiviðtøkur, sløkkilið, reglur viðvíkjandi arbeiði og lærlingaútbúgving,

beinleiðis og óbeinleiðis skattir, aðrar almennar inntøkur enn skattir, havnagjøld, bókasøvn, fornminnissøvn, skjalasøvn, friðing av bygningum og landslagi, ferðsluviðurskifti, landbúnaðarviðurskifti, fiskiskap innanfyri fiskimarkið, viðurskifti viðvíkjandi føðivørum og príseftirliti o.a., kunngerð av lógum, ferðamannamál, líkarættur, fólkaháskúlin og sjóvinnuskúlin. Harumframt vórðu málsøkini lokalt útvarp og eftirlit við inn og útflutningi í semju við ríkismyndugleikarnar yvirtikin frá *lista B*.[429]

Talan var ikki um nøkur útreiðslutung málsøki, sum heimastýrið yvirtók í 1948. Týdningarmiklasta málsøkið, sum varð yvirtikið í 1948, var skatta- og játtanarvald, sum fór at geva Løgtinginum stórar inntøkur. Tey útreiðslutungu málsøkini á *lista A* heilsumál, almannamál og skúlamál vórðu ikki yvirtikin í 1948, hóast hetta kundi verið gjørt einvíst av heimastýrinum. Átrokandi búskaparligir trupulleikar vóru um at taka seg upp í Føroyum, tá komið var móti endanum av 1940-unum, sum gjørdu, at spurningin um fleiri yvirtøkur varð útsettur í fleiri ár.

### Kreppután, búskaparlig endurreisn og politisk stabilisering

Í 1950 var fyrsta løgtingsvalið í Føroyum, eftir at heimastýrisskipanin varð sett í gildi. Umframt teir gomlu flokkarnar stillaði ein nýggjur flokkur, Tjóðveldisflokkurin, upp til valið. Hesin flokkurin varð stovnaður í 1948 av monnunum aftanfyri Føringafelag, ið beinleiðis høvdu tosað fyri loysingini í 1946. Talan var m.a. um Jákup í Jákupsstovu, Sigurð Joensen, Hanus við Høgadalsá og Erlend Patursson, ið var sonur Jóannes Patursson. Teir meintu, at føroyski fólkaviljin var svikin aftaná fólkaatkvøðuna í 1946. Í sjálvstýrispolitikkinum gjørdist tann nýggi flokkurin víðgongdari enn Fólkaflokkurin og hevði sum aðalmál at loysa Føroyar úr ríkisfelagsskapinum, men á búskaparligu síðuni var flokkurin sosialistiskur og var longur úti á vinstraveinginum enn Javnaðarflokkurin.

Tjóðveldisflokkurin fekk eina góða byrjan og kom inn á ting við 2 løgtingsumboðum í 1950. 4 ár seinni fekk flokkurin eitt enn betur val, tá hann fekk 6 umboð í Løgtinginum. Stóra undirtøkan, ið Tjóðveldisflokkurin fekk rættuliga skjótt, hekk partvíst saman við, at tá Danmark gjørdist limir í vesturlendsku verjusamgonguni NATO í 1949, varð sáttmálin settur í gildi í

Føroyum, uttan at hann hevði verið til ummælis hjá heimastýrinum. Tað vóru ikki einans sjálvstýrissinnaðir føroyingar, sum meintu, at hetta var brot á grein 7 í heimastýrislógini um ummælisrætt heimastýrisins. Føroyski landstingsmaðurin Poul Niclasen, ið var valdur á ting fyri Sambandsflokkin, setti í 1949 fyrispurning til forsætisráðharran Hans Hedtoft hesum viðvíkjandi. Hedtoft svaraði Poul Niclasen, at NATO sáttmálin var ein avtala *„af almindelig politisk karakter"*,[430] sum fall uttanfyri grein 7 í heimastýrislógini. NATO sáttmálin, sum formliga varð settur í gildi í Føroyum tann 3. desember í 1952,[431] fall uttanfyri ummælisrættin, tí ásetingarnar í sáttmálanum ikki *„bert viðvíkja Føroyum"*, og tí hevði stjórnin ikki skyldu til at leggja hann fyri Løgtingið til ummælis. Henda tulkingin av ummælisrætti heimastýrisins tey fyrstu árini var strong, serstakliga tá hugsað verður um, at Løgtingið longu tann 13. apríl 1940, tá oyggjarnar vórðu hersettar av bretum, hevði samtykt, at Føroyar skuldu haldast uttanfyri allar hernaðarsamgongur. Tíggju ár seinni, í 1959, tá avgerð varð tikin um at byggja eina NATO radarstøð í Føroyum, vóru stórar mótmælisgongur í Tórshavn,[432] og í 1970 staðfesti Løgtingið av nýggjum uttanveltaðu støðu Føroya. Samtyktir Løgtingsins vórðu ikki tiknar til eftirtektar av ríkismyndugleikunum, helst



NATO-málið var við til at geva Tjóðveldisflokkinum eina góða byrjan. Her vitja tingmenn á Sornfelli í 1964.

tí at Føroyar høvdu avgerandi hernaðarligan týdning fyri vesturlendskan trygdarpolitikk í tíðini aftaná 1947, tá kalda kríggið av álvara hevði tikið seg upp. Hartil kom, at uttanríkis- og verjupolitikkur sambært heimastýrislógini vóru ríkismál, sum ríkismyndugleikarnir í grundregluni høvdu ræði á.

NATO-málið hevði týdning fyri góðu byrjan Tjóðveldisfloksins, tey fyrstu árini aftaná at heimastýrislógin varð sett í gildi, men flokkurin varð hildin uttanfyri politiska ábyrgd til 1963, tá hann fyrstu ferð var við í eini landsstýrissamgongu. Øðrvísi var við hinum flokkinum í Løgtinginum, sum ikki hevði viðurkent heimastýrislógina. Longu í 1950 kom Fólkaflokkurin uppí eitt landsstýrissamstarv við Sambandsflokkin. Fólkaflokkurin var í veruleikanum stóri taparin á valinum í 1950, tí hóast flokkurin varðveitti síni 8 løgtingsumboð, so fór flokkurin frá 40,9% av atkvøðunum í 1946 til 32,2% í 1950. Hartil kom, at 25 umboð vóru í nývalda Løgtinginum móti 20 í tí gamla. Heimastýrisflokkarnir, Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin fingu ávíkavist 7, 6 og 2 umboð í Løgtingið og høvdu framvegis greiðan meiriluta í Løgtinginum, men tá samanumkom vóru tað gomlu fíggindarnir í sjálvstýrisspurninginum, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin, sum við sínum 15 umboðum í Løgtinginum gingu saman um at skipa landsstýri í 1950. Løgtingið valdi sambandsmannin Kristian Djurhuus til løgmann og fólkafloksmenninar Thorstein Petersen og Richard Long til landsstýrismenn. Hetta landsstýrissamstarvið, sum saman við Sjálvstýrisflokkinum helt áfram í valskeiðinum frá 1954 til 1958, hevði nakrar avgerandi samfelagsligar fortreytir.

Hóast føroyska útflutningsvirðið í reinum tølum var metstórt í 1948, so var føroyski búskapurin á veg móti eini kreppu. Føroyingar høvdu av krígsávum mist ein triðing av fiskiflotanum undir krígnum, og tí stóð endurnýggjanin av fiskiflotanum ovast á politisku dagsskránni eftir kríggið. Í 1948 var meginparturin av teimum samlaðu føroysku peningaognunum, sum føroyingar høvdu spart saman undir krígnum, settar í brúktar trolarar, sum føroyingar høvdu keypt úr Onglandi. Útflutningsvirðið, sum í tíðarskeiðinum frá 1944 til 1948 var vaksið úr 50 milliónum uppí 75 milliónir krónur, skyldaðist, at í 1948 áttu føroyingar størsta trolaraflotan í Norðanlondum. Tey 227 skrásettu fiskiskipini, harav 40 trolarar, lastaðu 29.483



Allir tjóðveldismenn vildu ikki rópa leingi livi fyri kongi. Her situr Erlendur Patursson, meðan Hanus við Høgadalsá stendur uppi, og millum teirra stendur Hans Iversen, við riddarakrossi í 1955.

tons.[433] Endurnýggjanin av fiskiflotanum hevði í 1948 kostað góðar 35 milliónir krónur. Løgtingið hevði gjøgnum tann í 1941 stovnaða Vinnulánsgrunnin stuðlað undir endurnýggjanina. Stórir partar av yvirskotunum á løgtingsfíggjarlógunum undir krígnum vóru settir í grunnin, sum við árslok 1945 hevði 1,3 millión standandi á bók. Í 1948 hevði landskassin sett meira enn 5 milliónir í grunnin, men íløgutørvurin var so mikið stórur, at grunnurin harumframt fekk heimild til at taka lán úr peningastovnunum, sum landskassin veðhelt fyri. Í 1947 hevði Vinnulánsgrunnurin eina samlaða lántøku uppá 7,9 milliónir, og samlaðu útlánini úr grunninum til vinnuna vóru umleið 11 milliónir krónur. Eisini tann privati Sjóvinnubankin, sum varð stovnaður í 1932 við tí fyri eyga at stuðla og nútímansgera fiskivinnuna, hevði, undir leiðslu av formanni Fólkafloksins Thorstein Petersen, sett stórar peningaupphæddir í endurnýggjanina av fiskiflotanum. Tilsamans setti

Sjóvinnubankin 28,7 milliónir krónur í endurnýggjanina av vinnulívinum, serstakliga í trolaraflotan. Tann stóri íløguhugurin var helst høvuðsgrundin til, at tann samlaða føroyska ognin í Onglandi, sum í 1945 hevði verið 50 milliónir krónur, var broytt til eina skuld uppá umleið 9 milliónir krónur, tá komið varð inn í 1948 (sí s. 240).

Trupulleikin var, at trolararnir, sum nærum allur peningurin var settur í, vóru gamlir og ótíðarhóskandi. Hartil kom, at teir góðu figgingarmøguleikarnir í árunum eftir kríggið høvdu havt við sær, at teir ofta vóru keyptir fyri alt ov høgan prís.[434] Úrslitið var, at teir høvdu ilt við at bera seg í kappingini við nýggjar trolarar. Tá enska pundið í 1949 varð nógv niðurskrivað í mun til dollaran, øktust útreiðslurnar til rakstur og viðlíkahald, sum ofta varð rindað í dollarum, munandi. Ein trolari fyri og annar eftir byrjaði at fara av knóranum í 1949, og skjótt stóð bæði tann almenni og tann privati føroyski búskapurin fyri hóttafalli. Tá fiskaprísirnir harumframt byrjaðu at falla í 1951, kom Sjóvinnubankin í stórar gjaldføristrupulleikar. Landskassin, sum hevði mist allar íløgurnar, hevði ikki møguleika at loysa trupulleikarnar hjá bankanum. Samstarv fekst í lag millum ríkismyndugleikarnar og heimastýrið, sum stuðlaðu við og veðhildu fyri 3 milliónum krónum, sum vóru settar í bankan. Hetta var kortini ikki nóg mikið, tí Sjóvinnubankin kom aftur í gjaldføristrupulleikar í 1952, tá allur partapeningurin var mistur. Við eini hálvari millión í nýggjum partapeningi, 3 milliónum úr ríkiskassanum, sum landskassin partvíst veðhelt fyri, og 5 milliónum úr Tjóðbankanum, eydnaðist tað at endurreisa Sjóvinnubankan á øðrum sinni.[435] Síðan hevði bankin nøkur góð ár, men í 1956 noyddist bankin at endurreisast á triðja sinni, eisini hesuferð við hjálp frá Tjóðbankanum, men uttan at almenningurin varð kunnaður um tað. Klaksvíksstríðið, sum legði stórt trýst á viðurskiftini millum Danmark og Føroyar, var helst orsøkin til, at henda endurreisingarætlanin varð framd í loyndum, men málið varð skjótt avdúkað, og Tjóðbankin almannakunngjørdi ætlanina.[436] Eftir hetta kom Sjóvinnubankin veruliga fyri seg aftur og gjørdist sum frá leið ein týðandi liður í endurreisnini av føroyska búskapinum. Hin stóri føroyski bankin, Føroya Banki, sum varð stovnaður í 1906 av *Den Danske Landmandsbank*, hevði ført ein meira varnan útlánspolitikk í árunum eftir

kríggið,* og kom tí ikki í gjaldføristrupulleikar, tá kreppan kom í byrjanini av 50-unum.

Politiskt varð avleiðingin, at Thorstein Petersen, sum var stjóri í Sjóvinnubankanum, mátti leggja frá sær sum landsstýrismaður tann 15. september í 1951. Í 1953 staðfesti ein kanningarnevnd, sum Forsætismálaráðið hevði sett at kanna viðurskiftini í Sjóvinnubankanum, at bankaleiðslan ikki var heilt ósek í teimum trupulleikum, sum bankin var komin í. Leiðslan í Sjóvinnubankanum varð ákærd fyri „*den hensynsløshed, hvormed de har udsat de midler, der var dem betroet til forvaltning*“ og „*den grove forsømmelighed, de har lagt for dagen overfor de selskaber, hvis ledelse var overladt dem*“.[437] Rættarlig ákæra varð reist móti Thorsteini Petersen, sum í 1955 varð dømdur í 40 daga hefti fyri sín leiklut í tí virksemi, sum førdi til, at Sjóvinnubankin fór av knóranum. Politiskt og vinnuliga hevði Thorstein Petersen spælt sín síðsta leik. Hákun Djurhuus tók við landsstýrissessinum eftir hann í 1951.

Tá komið varð móti miðjuni av 1950-unum, var sjálv búskaparkreppan av, men høvuðsuppgávan í føroyskum politikki gjøgnum meginpartin av 1950-unum var at endurreisa føroyska búskapin. Sjálvstýrisstríðið varð lagt til síðis í Løgtinginum, í øllum førum fyribils. Framgongd Tjóðveldisfloksins í 1950-unum hekk heldur ikki einans saman við NATO-málinum og sjálvstýrisstríðnum; framgongdin hjá flokkinum hekk eisini saman við teimum samfelagsligu viðurskiftunum. Tær búskaparliga trongu tíðirnar høvdu við sær, at ófriðarligt var á arbeiðsmarknaðinum; stættastríð og umfatandi verkføll vóru bæði í 1952, 1953 og í 1954. Formaður Tjóðveldisfloksins Erlendur Patursson, ið eisini varð formaður í Fiskimannafelagnum, hevði sjálvur tikið virknan lut í stríðnum hjá fiskimonnunum, sum millum annað snúði seg um at tryggja teimum eina minstuløn. Undir valstríðnum upp undir løgtingsvalið í 1954 sat Erlendur í varðhaldi í Havn, dømdur fyri at hava nýtt harðskap móti verkfalsbrótarum um borð á einum trolara, sum ætlaði at bróta seg út úr havnini í Tórshavn. Harða stættastríðið í 1950-unum var avgerðandi fortreyt fyri stóru framgongd Tjóðveldisfloksins.

* Føroya Banki hevði móti endanum av 1950 umleið 18 milliónir krónur útistandandi í Føroyum, meðan Sjóvinnubankin hevði sett góðar 28 milliónir krónur í føroyska vinnulívið. Mikkelsen 1996, síðu 264.

Undir hesum samfelagsligu fortreytum kundi tann arbeiðsgevaravinarligi Fólkaflokkurin og tann arbeiðaravinarligi Tjóðveldisflokkurin, sum í aðra mátar vóru stórt sæð samdir í sjálvstýrispolitikkinum, ikki finna felags stev í Løgtinginum. Hinvegin kundu Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin, sum báðir vóru vinnuflokkar, semjast um eitt samstarv um vinnupolitikkin. Aftaná løgtingsvalið í 1954 varð tann flokspolitiska skipanin við 4 stórum flokkum veruleiki. Flokkarnir umboðaðu ta dupultu andsøgnina millum sjálvstýri/samband, og vinstra/høgra, sum skiftust um at vera høvuðsspurningurin í føroyskum politikki, alt eftir teimum samfelagsligu viðurskiftunum. Tað kom eisini at eyðkenna føroyskan politikk í tíðini aftaná 1954, at tann fyrr so máttmikli men nú so lítli Sjálvstýrisflokkurin, sum bæði viðvíkjandi loysing/samband og vinstra/høgra spurninginum var ein miðflokkur, kom at vera í eini lyklastøðu, tá landsstýrissamgongur skuldu skipast.

Tá Sjóvinnubankin varð bjargaður, fór landsstýrissamgongan millum Sambandsflokkin og Fólkaflokkin, frá 1954 eisini Sjálvstýrisflokkin, saman við donskum myndugleikum undir at endurnýggja føroyska fiskiflotan. *Realkreditstovnurin*, sum fekk heimild til at veita upp til 50% í lánum til keyp av fiskiskipum, varð settur á stovn við løgtingslóg í 1955. Stovnsfæið í grunninum var 10 milliónir krónur, sum føroyingar



Tingveteranarnir Hans Iversen og Petur Mohr Dam fáa sær eitt prát.

fingu í *Marshallhjálp*, umframt eitt rentufrítt lán uppá 2 milliónir, sum grunnurin fekk úr danska Tjóðbankanum. Aðrar lánslógir, sum gjørdu tað enn lagaligari hjá vinnulívsmonnum at gera íløgur í skip, komu seinni í 1950-unum. Í 1958 vóru lánsmøguleikarnir so mikið góðir, at tað var møguligt at keypa stór og nútímans fiskiskip við einans 10% av keypsprísinum í eginpeningi.[438] Hetta fekk stóran týdning fyri endurreisingina av føroyska búskapinum.

Í 1955 taldi føroyski fiskiflotin 186 gomul skip – fyri tað mesta var talan um ótíðarhóskandi sluppir, skonnartir og damptrolarar – ið lastaðu 19.383 tons brutto. Tíggju ár seinni lastaðu tey 175 føroysku fiskiskipini, sum fyri ein stóran part vóru nýmótans stállínuskip, heili 35.444 tons brutto.[439] Í sama tíðarskeiði vaks føroyska útflutningsvirðið úr 75 milliónum krónum og upp í 172 milliónir krónur.[440] Føroyski búskapurin var um at koma á føtur aftur, tá komið var móti endanum av 1950-unum, og endurreisingin var stórt sæð liðug í 1964.

Aftaná løgtingsvalið í 1958 varð landsstýrissamstarvið millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin, sum í høvuðsheitinum hevði snúð seg um búskaparpolitikkin, ikki tikið uppaftur. Samgongan misti meirilutan í Løgtinginum, tá tann búskaparliga endurreisingin av føroyska samfelagnum í góðum samstarvi millum føroyskar og danskar myndugleikar var komin langt áleiðis. Heimastýrisskipanin hevði víst seg at virka í verki, og føroyski veljarin hevði fingið álit á skipanina. Hetta sæst t.d. av, at valluttøkan til løgtingsval, sum í 1950 og 1954 hevði ligið væl niðanfyri 70%, kom uppá 71,1% í 1958, og hon skuldi seinni fara væl upp um 80%. Stóri taparin fyrstu heimastýrisárini var Fólkaflokkurin, sum, hóast hann við landsstýrissamstarvinum við Sambandsflokkin hevði gagnnýtt teir møguleikar, sum lógu í skipanini, ongantíð hevði viðurkent skipanina. Til løgtingsvalið í 1954 hevði Fólkaflokkurin mist 2 av sínum 8 umboðum, og til valið í 1958 misti flokkurin enn eitt løgtingsumboð. Fólkaflokkurin, sum í stórtíð síni í 1940-unum hevði 12 umboð í Løgtinginum, hevði 5 løgtingsumboð í 1958. Fólkaflokkurin hevði helst mist nógvar sjálvstýrisatkvøður til Tjóðveldisflokkin, men tað var Javnaðarflokkurin, ein av heimastýrisflokkunum, sum við sínum 8 løgtingsumboðum, 2 fleiri enn seinast, gjørdist stóri sigursharrin í 1958. Flokkurin varð fyri fyrstu ferð størstur í Løgtinginum,

og saman við hinum báðum heimastýrisflokkunum hevði hann stóran meiriluta í Løgtinginum. Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin varðveittu síni 7 og 2 løgtingsumboð.

Heimastýrisskipanin, sum ikki hevði stóru undirtøkuna millum føroyingar, tá hon varð sett í gildi í 1948, knappliga tvey ár eftir fólkaatkvøðuna, hevði stillisliga vunnið viðurkenning frá politisku skipanini, tá komið varð móti endanum av 1950-unum.

**Vælferðarsamfelagið, yvirtøkur og heildarveiting**

Aftaná tær fyrstu yvirtøkurnar í 1948, sum ikki vóru serliga kostnaðartungar fyri landskassan, kom steðgur í yvirtøkupolitikkin. Tær næstu yvirtøkurnar vóru ikki framdar fyrr enn í 1956, tá Jarðargrunnurin og kongsjørðin í semju við ríkismyndugleikarnar vórðu yvirtikin sum sermál frá *lista B*, og í 1957 vórðu partar av útvarpsøkinum yvirtiknir, áðrenn *Útvarp Føroya* varð sett á stovn sama árið.[441]

Tá tær ringastu avleiðingarnar av búskaparkreppuni vóru av seinast í 1950-unum, fingu heimastýrisflokkarnir, Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin, greiðan meiriluta í Løgtinginum. Tann 9. januar 1959 varð eitt heimastýrislandsstýrið skipað undir leiðslu av Javnaðarflokkinum við Petur Mohr Dam sum løgmanni. Hetta landsstýrið framdi ongar yvirtøkur. Heldur ikki sjálvstýrislandsstýrið, sum í 1963 varð skipað millum Fólkaflokkin, Sjálvstýrisflokkin, Tjóðveldisflokkin og tann í 1956 stovnaða *Framburðsflokkin* – ið hevði nærum somu valskrá sum Fólkaflokkurin – undir leiðslu av fólkafloksmanninum Hákun Djurhuus sum løgmanni, framdi nakrar yvirtøkur. Tað gjørdu heimastýrislandsstýrini, sum vórðu skipaði í 1967 og 1971 undir leiðslu av javnaðarmonnunum Petur Mohr Dam og Atla Dam stórt sæð heldur ikki.

Høvuðsgrundin til tann varna yvirtøkupolitikkin tey fyrstu árini var, at tann stóra búskaparkreppan, sum rakti Føroyar fyrst í 1950-unum, hevði havt við sær, at búskaparligu trupulleikarnar í Føroyum, sum einans kundu loysast í samstarvi við danskar myndugleikar, gjørdust meira átrokandi enn sjálvstýrisspurningurin. Í størri samanhangi hevði tað kortini avgerandi týdning fyri tann afturhaldandi yvirtøkupolitikkin í tíðini aftaná kreppuna, at tey málsøki, sum eftir vóru at yvirtaka frá *lista A*,



Í 1960-unum kom gongd á at byggja vælferðarsamfelagið út. Her er tingmanningin hjá Javnaðarflokkinum 1962-66. Aftan frá vinstru eru teir Dion Nolsøe, Haldor Hansen og Jacob Lindenskov. Framman frá vinstru Poul Jacob Olsen, Jóan Petur Davidsen, Petur Mohr Dam og J.H. Danbjørg.

vóru so mikið kostnaðartung, at eingin landsstýrissamgonga hættaði sær at fara undir tær. Hartil kom, at júst hesi málsøki gjørdust tey týdningarmestu í 1960-unum.

Í Danmark varð veruliga farið undir at útbyggja vælferðarsamfelagið í 1960-unum. Serstakliga teir vinstrahallu flokkarnir í Føroyum, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, ynsktu at fremja líknandi útbyggingar av føroyska samfelagnum. Trupulleikin var, at vælferðarmálsøkini, heilsumál, almannamál og skúlamál, sum nærum vóru tey einastu, sum eftir vóru at yvirtaka frá *lista A*, vóru so mikið kostnaðartung, at tað ikki varð mett, at landskassin bæði kundi yvirtaka og bera stórar útbyggingar á hesum økjum einsamallur. Tí var semja stórt sæð millum føroyskar flokkar um, at hesi viðurskifti skuldu útbyggjast í samstarvi við ríkismyndugleikarnar og ikki við kostnaðartungum yvirtøkum sambært grein 2. Heimastýrisskipanin, sum í 1950-unum hevði verið ein trygd fyri, at føroyskir og danskir myndugleikar í felag megnaðu at endurreisa føroyska búskapin, skuldi nú tryggja føroyingum somu vælferð sum danir.

Longu í mars 1959 kom Petur Mohr Dam aftur av síni

fyrstu ferð sum løgmaður í Danmark, har hann hevði verið til væleydnaðar samráðingar við danskar myndugleikar. Við sær úr Keypmannahavn hevði løgmaður fingið lyfti um 175 milliónir krónur úr ríkiskassanum, sum skuldu nýtast til íløgur í Føroyum, og fólkapensiónina, sum danir høvdu fingið í 1957.[442] Hóast fólkapensiónin fór at hava við sær, at ríkisstuðulin til Føroya fór at økjast, so atkvøddu allir flokkar á tingi, eisini Tjóðveldisflokkurin, fyri at seta hana í gildi í Føroyum.[443] Seinni í 1960-unum komu aðrar útbyggingarverkætlanir av havnum, vegum og sjúkrahúsum, sum partvíst skuldu fíggjast úr danska ríkiskassanum. Vanliga rindaði ríkiskassin helvtina av teimum útreiðslum, sum landskassin hevði av rakstri og útbygging av hesum málsøkjum, men ofta rindaði ríkiskassin meir enn helvtina, og í einkultum førum bar ríkiskassin allan kostnaðin.[444]

Henda gongdin hevði við sær, at útreiðslur ríkiskassans til m.a. vælferðarviðurskifti í Føroyum øktust munandi, tá komið varð inn í 60-ini. Í 1950, tá landskassin hevði eina samlaða inntøku uppá 9,8 milliónir krónur, var landskassans partur av skúla- og heilsumálunum knappar 3,5 milliónir krónur.[445]



Útvarpið fekk stóran týdning í stríðnum um atkvøðurnar. Her sita tingmenn til valdyst í Útvarpinum í 1966. Frá vinstru síggjast Jákup Fr. Øregaard, Marius Johannesen, Karsten Hoydal, Sigurð Joensen, Hanus við Høgadalsá, Hákun Djurhuus, Kjartan Mohr og Niels Juel Arge, útvarpsstjóri, sum var orðstýrari.



Áskoðaraplássini vóru fullsett, tá Løgtingið valdi nýtt landsstýri í januar 1975.

Útreiðslur ríkiskassans í Føroyum, sum tilsaman vóru 4,2 milliónir krónur í 1949, vóru helst nakað minni enn partur landskassans, tá talan var um skúla- og heilsumálini, men í 1966 rindaði ríkiskassin 63% av teimum samlaðu útreiðslunum til heilsu- og almannamál í Føroyum.[446] Útreiðslurnar til heilsumál, skúlamál og almannamál, sum í 1966 vóru knappar 33 milliónir krónur, vóru vaksnar uppí 83 milliónir krónur í 1973. Landskassin skuldi rinda sín part av útreiðslunum, og tí vaks føroyski parturin eisini úr 22 milliónum krónum upp í knappar 72 milliónir krónur í sama tíðarskeiði.[447] Hóast omanfyri nevndu málsøki stóðu á *lista A*, so vóru tey ikki yvirtikin, og tí varð lóggávan, fyrisitingin og stórir partar av útreiðslunum av teimum verandi hjá ríkinum.

Verulig broyting kom ikki í tann varna yvirtøkupolitikkin fyrr enn í seinnu helvt av 1970-unum,[447] serstakliga aftaná at tann sokallaða „yvirtøkusamgongan" í 1975 varð skipað millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin, undir leiðslu av formanni Javnaðarfloksins Atla Dam. Henda samgongan, sum helt áfram aftaná valið í 1978, yvirtók tann 1. apríl 1976 Postverkið av *lista A*, sum sostatt bæði viðvíkjandi lóggávu, fyrisiting og útreiðslum/inntøkum endaliga kom á føroyskar hendur. Postverkið var fyrisitingarliga tyngri enn tey málsøki, sum vóru yvirtikin frammanundan, men tað var eins og undanfarnu yvirtøkur ikki serliga rakstartungt, og tað

kundi als ikki samanberast við tey fyrisitingarliga og rakstrarliga tungu heilsu-, almanna- og skúlamálini. Postverkið hevði havt nakrar milliónir í undirskoti í árunum undan yvirtøkuna, men tað var mett, at tað fór at vera lætt at fáa stovnin at bera seg undir føroyskum ræði, tí nógvur peningur kundi vinnast gjøgnum sølu av føroyskum frímerkjum. Postverkið var at byrja við ein yvirskotsyvirtøka, sum í árunum fram til 1981 hevði umleið 1,8 millión krónur í árligum yvirskoti.[449]

Landsstýrið ynskti eisini at yvirtaka tey eftirverandi málsøkini á *lista A*, heilsumál, almannamál og skúlamál, sum bæði fyrisitingarliga og rakstrarliga vóru nógv tyngri enn Postverkið. Trupulleikin var, at sambært grein 2 í heimastýrislógini kundi hetta ikki gerast, uttan so at Landsstýrið eisini tók á seg allar útreiðslurnar av málsøkjunum. Hinvegin ynsktu donsku ríkismyndugleikarnir eisini at lata fyrisitingina av heilsumálum, almannamálum og skúlamálum til heimastýrið, tí í Danmark høvdu amtini yvirtikið hesi málsøki tann 1. apríl 1970, tá nýggj amtskommunal skipan varð sett í gildi.[450] Tað var óheppið fyri ríkisfyrisitingina, at nøkur málsøki í Føroyum, sum í Danmark vóru fyrisitin av amtunum, skuldu fyrisitast av ríkinum, men sambært grein 2 í heimastýrislógini høvdu ríkismyndugleikarnir ikki heimild til at lata heimastýrinum fyrisitingina av hesum málsøkjum í hendi, uttan so at bæði lóggávuvald og útreiðslur fylgdu við. Av tí at hesi málsøki stóðu á *lista A* í heimastýrislógini, kundu ríkismyndugleikarnir einsamallir taka avgerð um, at heimastýrið skuldi yvirtaka tey, men hetta varð ikki gjørt, tí Landsstýrið ynskti ikki at fremja tílíkar yvirtøkur.

Tí var farið at hyggja nærri at grein 9 í heimastýrislógini, sum staðfesti, at ríkismyndugleikarnir kundu gera avtalu við heimastýrið um, *„í hvørjum føri og í hvørjari vídd"* heimastýrið kundi yvirtaka fyrisitingina av málsøkjum, sum vóru verandi felagsmál, ið grundleggjandi vóru undir lóggevandi og fyrisitingarliga myndugleika ríkisins. Skjótt kom gongd á yvirtøkurnar aftur. Longu í 1975 varð avtala fingin í lag um, at heimastýrið skuldi yvirtaka partar av fyrisitingini av almannaøkinum. Fyrisitingin av fólkapensiónini, avlamispensiónini og almennari forsorg varð yvirtikin hetta árið. Í 1976 vórðu partar av heilsuverkinum latnir heimastýrinum upp í hendi at fyrisita, og í 1979 varð fyrisitingin av fólkaskúlanum latin heima-

stýrinum. Seinni komu aðrir fyrisitingarligir partar av hesum málsøkjum á føroyskar hendur. Allar yvirtøkurnar viðvíktu málsøkjum á *lista A*, og tær vóru framdar við heimild í grein 9.

Hesin yvirtøkuháttur gjørdi tað møguligt hjá Løgtinginum at yvirtaka uppgávuna at gera fyrisitingarligar reglur fyri málsøki, sum vóru verandi felagsmál. Landsstýrið yvirtók sjálva fyrisitingina, samstundis sum ríkiskassin skuldi halda áfram við at gjalda sín part av rakstrinum. Avleiðingin fyri Løgtingið av hesum „hálvu" yvirtøkum var, at tann endaligi lóggevandi myndugleikin varð verandi hjá Fólkatinginum: ein løgtingslóg, sum viðvíkti einum málsøki, ið var yvirtikið við heimild í grein 9, hevði einans kunngerandi megi, meðan hon hevði lóggevandi megi, um hon viðvíkti einum málsøki, sum var yvirtikið við heimild í grein 2. Harvið hendi ein grundleggjandi broyting í yvirtøkupolitikkinum undir heimastýrislógini, tí nú var møguligt hjá føroyskum myndugleikum at fáa fyrisitingarligt ræði á einum málsøki, sjálvt um tað endaliga lóggávuvaldið og stórir partar av útreiðslunum til raksturin av málsøkinum vóru verandi í Danmark.

Hóast Løgtingið ikki fekk endaligt lóggávuvald yvir teimum tungu málsøkjunum á *lista A*, sum í 1970-unum vóru yvirtikin við heimild í grein 9, soleiðis sum tað hevði fingið yvir teimum smærru málsøkjunum á *lista A*, sum í 1940-unum og 1950-unum vóru yvirtikin við heimild í grein 2, so høvdu tær fyrisitingarligu yvirtøkurnar við sær, at heimildirnar og arbeiðsbyrðan hjá Løgtingi og Landsstýri øktust nógv í tíðini aftaná 1975. Í verki kom Løgtingið við løgtingslógum at áseta fyrisitingarligar reglur og mannagongdir viðvíkjandi málsøkjum, sum í meginregluni vóru undir donskum ræði. Hesar løgtingslógir og fyrisitingin av teimum høvdu harumframt ein ávísan týdning fyri, hvussu stór ríkisveitingin fór at verða. Útreiðslur landskassans til raksturin av málsøkjum, sum vóru yvirtikin eftir grein 9, vóru endurrindaðar úr ríkiskassanum eftir eini prosentvísari endurgjaldsskipan (*refusiónsskipan*), sum gav donskum myndugleikum lítlan møguleika fyri at tálma útreiðslurnar. Hartil kom, at Løgtingið, sum saman við Landsstýrinum fyrisat málsøkini, einans hevði ábyrgd av at játta ein part av peninginum. Tí hevði Løgtingið neyvan tann stóra áhugan í at samtykkja fyrisitingarligar broytingar, sum tálmaðu útreiðslurnar.



Valevni til fólkatingsvalið 1971 fara á valfund í Suðuroy. Frá vinstru eru teir Krisian Djurhuus, Zakarias Wang, Jógvan Sundstein, Hilmar Kass, Kjartan Mohr, Hákun Djurhuus og Demmus Hentze.

Hesi viðurskifti vóru saman við stóra prísvøkstrinum í 1970-unum og 1980-unum høvuðsgrundin til, at útreiðslur ríkiskassans til heilsuverk, skúlaverk og almannaverk í Føroyum, sum í 1973 høvdu verið 83 milliónir krónur, øktust uppí 614 milliónir krónur í 1986.[451] Yvirtøkumeginreglan í grein 2 í heimastýrisskipanini, sum staðfesti, at tann, sum skuldi valda, eisini skuldi gjalda, varð ikki nýtt, tá yvirtøkurnar í seinnu helvt av 1970-unum vórðu framdar. Fíggjarlig ábyrgd og lóggevandi og fyrisitingarlig rættindi fylgdust ikki longur at.

Nakað eftir amtskommunalu nýskipanina í Danmark í 1970, tá amtini høvdu yvirtikið fyrisitingina av fleiri statsligum uppgávum, eitt nú heilsumál, skúlamál og almannamál, vóru veitingarnar úr ríkiskassanum til donsku amtini lagdar um til árligar heildarveitingar, sum avtalaðar vóru millum partarnar frammanundan hvørjum fíggjarári. Tá útreiðslur ríkiskassans í Føroyum, partvíst sum ein avleiðing av grein 9 yvirtøkunum, byrjaðu at økjast í 1980-unum, ynsktu ríkismyndugleikarnir eisini at fáa eina tílíka skipan við føroyska heimastýrið. Hetta gjørdist veruleiki í 1988, tá stórir partar av ríkisveitingunum vóru lagdar um til árligar heildarveitingar, sum danskir og føroyskir myndugleikar frammanundan avtalaðu í eitt ella



Stórur áhugi var millum áhoyrararnar, tá tingið viðgjørdi EEC-málið fyrst í 1970-unum.

fleiri ár fram í tíðina. Ríkismyndugleikarnir fingu harvið eftirlit við, hvussu stórar upphæddir vóru veittar til raksturin av teimum felagsmálum, sum heimastýrið í 1970-unum hevði fingið heimild til at fyrisita vegna ríkismyndugleikarnar. Hóast heildarveitingin var ætlað sum ríkisins partur av útreiðslunum til tey málsøki, sum ikki fult og heilt vóru yvirtikin eftir grein 2 í heimastýrislógini, so høvdu heimastýrismyndugleikarnir, tá upphæddin varð avtalað, fulla ábyrgd av, at veitingin varð nýtt á skilabesta hátt. Hetta hevði við sær, at aftaná 1988 stóð heildarveitingin á løgtingsfíggjarlógini eins og aðrar inntøkur landskassans í Føroyum.

Tað eydnaðist helst ríkismyndugleikunum at tálma ríkisútreiðslurnar í Føroyum nakað í øllum førum í reinum tølum. Tó so, heildarveitingin, sum í 1988 var 486 milliónir, var í 1993 økt uppí 681 milliónir. Í 1994 vóru útreiðslur ríkiskassans til almannamál í Føroyum, sum í árunum frammanundan høvdu ligið ímillum 200 og 300 milliónir krónur árliga, eisini lagdar um til heildarveiting, og tí hækkaði veitingin í 1994 uppí 826 milliónir. Í avtaluni frá 1998, sum ríkismyndugleikarnir og Landsstýrið gjørdu um heildarveitingina, var semja um, at veitingin skuldi vera 932 milliónir krónur árliga í 1999, 2000 og 2001.[452] Tann prístalsviðgjørda upphæddin, sum stóð á fíggjarlógini fyri 2001, var góðar 993 milliónir krónur.

Samanumtikið kann sigast, at grein 9 yvirtøkurnar, sum farið varð undir at fremja í 1970-unum, høvdu við sær, at í verki, men ikki í meginregluni, var føroyska samfelagið í nógv størri mun enn áður lagt undir ræði Løgtingsins og fyrisiting Landsstýrisins. Føroyskir myndugleikar komu í nógv størri mun enn áður at hava ræði á málsøkjum, sum vóru fyrisitingarliga krevjandi. Harumframt kom Løgtingið at hava ræði á stórum peningaveitingum úr danska ríkiskassanum. Hesi viðurskifti settu heilt onnur krøv til eftirlit og fyrisiting av føroyska búskapinum, enn stýrisskipanin frá 1948 var gjørd til. Tá ríkisstuðulin varð lagdur um til heildarveiting í 1988, varð ikki oyramerkt, hvat peningurin skuldi nýtast sum stuðul til, men longu frammanundan heildarveitingini hevði tann stóra ríkisveitingin frígjørt pening á føroysku fíggjarlógini, sum kundi nýtast til at stuðla øðrum samfelagsligum viðurskiftum. Uttan neyvt eftirlit og eina sterka fyrisiting kundi tað gerast torført at fyrisita og gagnnýta peningin á rættan hátt.

## Stuðulsbúskapur og húsagangur

Tað var ikki einans ríkisstuðulin, sum vaks nógv í 1970-unum. Føroyska útflutningsvirðið, sum í 1964 var 172 milliónir, var í 1973 vaksið uppí 470 milliónir krónur. Vøksturin helt áfram í 1980-unum, og í 1988 var útflutingsvirðið komið upp í 813 milliónir krónur. Búskaparliga sá út til at standa væl til, tí nógv virksemi var í samfelagnum, men trupulleikin var, at ein fiskivinna, sum fekk størri og størri stuðul úr landskassanum, stóð fyri meira enn 95% av útflutningsvirðinum. Í 1989 var stuðulin til fiskivinnuna 450 milliónir krónur, ella umleið helvtin av samlaða útflutningsvirðinum.

Fortreytirnar fyri hesi gongd eru at finna seinast í 1970-unum, tá tey flestu strandalondini settu fiskimørkini út á 200 fjórðingar. Føroyingar, sum í 1964 høvdu sett fiskimarkið út á 12 fjórðingar, gjørdust í nógv størri mun enn áður heftir at egnum sjóøki. Harumframt hevði Løgtingið í 1974 avgjørt, at Føroyar skuldu vera uttanfyri *EF (Europeiski Felagsskapurin)*. Tá føroyska fiskimarkið í 1977 varð flutt út á 200 fjórðingar, gjørdist tað umráðandi at gagnnýta hetta økið so gott sum møguligt. Løgting og Landsstýrið byrjaðu at stuðla undir íløgur, sum kundu gera tað møguligt at gagnnýta sjóøkið kring Føroyar til fulnar. Hartil kom, at oljukreppan í 1973

hevði víst, at føroyingar høvdu ein búskap, sum var ómetaliga nógv heftur at viðurskiftunum á heimsmarknaðinum. Fiskimenn, serstakliga útróðrarmenn, sum í 1975 høvdu stovnað ein landsumfatandi felagsskap *MFÚ (Meginfelag Føroyska Útróðrarmanna)*, ynsktu at fáa eina skipan, sum tryggjaði teimum eina javna inntøku, hóast fiskaprísurin á heimsmarknaðinum var óstøðugur.

Í 1975 samtykti Løgtingið eitt uppskot frá Landsstýrinum um at seta á stovn *Ráfiskagrunnin*, sum skuldi fáa stóra ávirkan á gongdina í føroyska búskapinum í tíðini aftaná.[453] Upprunaliga varð ætlanin, at høvuðsendamálið við grunninum skuldi vera at tryggja fiskimonnum eina javna inntøku yvir long tíðarskeið, sum vinnan sjálv skuldi fíggja, men aftaná hart trýst frá vinnuni, serstakliga frá *Føroya Fiskasølu*, setti Fólkaflokkurin landsstýrissamstarvið við Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin uppá spæl, og endin var, at Landsstýrið góðtók eina skipan av Ráfiskagrunninum, sum eisini kundi koma at vera ein fjaldur íløgustuðul úr landskassanum til vinnuna.

Stuðulin ella prísjavningin skuldi ikki leggjast í søluliðið, soleiðis sum upprunaliga var ætlað, men virkini skuldu fyrst tryggjast sína inntøku, og stuðulin skuldi síðan leggjast í veiðiliðið sum kilostudningur. Hetta skuldi gerast á tann hátt, at grunnurin út frá rakstrartølum frá fiskavirkjunum skuldi taka støðu til, hvussu nógv fiskavirkini skuldu keypa fiskin fyri, um tey skuldu bera seg fíggjarliga við einum ávísum avlopi. Rakstrarútreiðslur og vinningur hjá fiskavirkjunum skuldu síðan dragast frá tí prísi, sum virkini fingu fyri fiskin á heimsmarknaðinum. Munurin millum prísin á heimsmarknaðinum og rakstrarútreiðslurnar hjá virkjunum, ið varð nevndur *avrokningarprísur*, varð goldin skipunum/fiskaseljarunum. Úrslitið av hesum roknihátti kundi gott verða, at tá fiskavirkini høvdu fingið sítt, so var lítið ella einki eftir til fiskaseljaran. Grunnurin skuldi tí eisini taka støðu til, hvussu nógv skipini skuldu selja fiskin fyri, um tey skuldu megna at gjalda sínar útreiðslur til rakstur, lønir o.s.fr. Henda metingin, sum bæði kundi koma at liggja omanfyri og niðanfyri avrokningarprísin, varð nevnd *avreiðingarprísur*. Var avreiðingarprísurin hægri enn avrokningarprísurin, so skuldi grunnurin gjalda munin til skipini, meðan skipini skuldu gjalda inn í grunnin, tá avrokningarprísurin var hægri. Meginreglan var, at fiskur, sum lítið

fekst fyri á heimsmarknaðinum, skuldi fáa stuðul úr grunninum, meðan fiskur, sum hevði ein høgan prís á heimsmarknaðinum, skuldi gjalda inn í grunnin. Talan var um eina samhaldsfasta skipan, sum javnaði inntøkurnar hjá fiskimonnum yvir tíð, hóast prísirnir á heimsmarknaðinum vóru skiftandi. Hóast skipanin skuldi vera búskaparliga sjálvberandi, so skuldi landskassin játta møgulig undirskot í grunninum.

Grunnurin skuldi stjórnast av eini 7 manna nevnd, sum skuldi verða sett saman av 2 umboðum fyri ráfiskakeypararnar (søluliðið), 1 umboði fyri Fiskimannafelagið (veiðuliðið), 1 umboði fyri útróðrarmenninar (veiðuliðið) og 2 umboðum fyri Landsstýrið. Formaðurin, sum gjørdist 7. umboðið, skuldi veljast av hesum 6 í felag. Tað vísti seg skjótt, at umboðini hjá Ráfiskakeyparafelagnum og Fiskimannafelagnum gingu saman um at økja stuðulin til tey bíligu fiskasløgini, sum, um tað skuldi loysa seg at fiska tey, høvdu stuðul *úr* grunninum fyri neyðini. Hesa gongdina megnaði tað einsamalla umboðið fyri útróðrarmenninar, sum fiskaðu tann dýra fiskin, ikki at forða fyri. Ráfiskakeypararnir, sum áttu virkini, kundu tí byrja at gera stórar íløgur í vælútgjørd fiskiskip, sum kundu fiska stórar nøgdir av bíligum fiski til virkini. Íløgurnar vóru gjørdar út frá teirri fortreyt, at skipini fingu stuðul úr Ráfiskagrunninum. Fiskimannafelagið fekk tryggjað fleiri arbeiðspláss til fiskimenn umborð á skipunum. Harvið gjørdist Ráfiskagrunnurin eisini

Seinasti tingfundurin fyri løgtingsvalið í 1974.



ein almenn stuðulsskipan, sum eggjaði vinnulívinum til at gera íløgur í fiskiskip, sum høvdu stuðul fyri neyðini.

Stuðulin úr landskassanum til fiskivinnuna vaks í árunum frá 1975 til 1989 úr 50 milliónum krónum upp í umleið 450 milliónir krónur.[454] Samstundis var føroyska útflutningsvirðið vaksið upp í 813 milliónir krónur.[455] Tað var týðuligt, at ein vinnubygnaður, har helvtin av útflutningsvirðinum var beinleiðis stuðul, avlagaði kappingarførið hjá vinnuni, og í longdini var skipanin ikki búskaparliga burðardygg. Tilsamans kostaði stuðulin til fiskivinnuna í 1980-unum landskassanum 3 milliardir krónur.[456] Tann stóri stuðulin var møguligur orsakað av stóru veitingunum úr ríkiskassanum, sum frígjørdu pening á fíggjarlógini til onnur endamál, men seinni varð stuðulin fíggjaður við lántøku til landskassan. Ráfiskagrunnurin førdi óivað til, at nakrar skilagóðar íløgur í fiskiskip vórðu framdar í seinnu helvt av 1970-unum, tá 200 fjórðinga sjóøkið skuldi gagnnýtast til fulnar, men trupulleikin var, at lóggávan ikki varð endurskoðað í 1980-unum, tá stuðulin úr grunninum hevði elvt til skaðiligan yvirkapasitet, sum var viðvirkandi til, at fiskastovnarnir vórðu niðurfiskaðir.

Hartil kom, at landskassin veðhelt fyri risastórum lánsupphæddum, sum vinnan hevði tikið. Longu síðst í 1940-unum hevði landskassin veitt stuðulslán til vinnuna gjøgnum Vinnulánsgrunnin, sum hevði havt við sær, at alt yvirskotið á løgtingsfíggjarlógunum undir krígnum fór fyri einki í kreppuni í 1950-unum. Í 1960-unum samtykti Løgtingið nýggjar stuðulslógir, sum gjørdu tað møguligt hjá Landsstýrinum landskassans vegna at veðhalda fyri stórum lánum til vinnuna. Í 1970-unum og 1980-unum komu fleiri veðhalds- og stuðulslógir. Tilsamans veðhelt landskassin í 1980-unum fyri lánsupphæddum hjá vinnuni, sum svaraðu til umleið 2,3 milliardir krónur.[457] Í ringasta føri kundi øll upphæddin enda í landskassanum.

Stuðuls- og veðhaldslógirnar, sum Løgtingið bæði samtykti og fyrisat saman við Landsstýrinum, høvdu við sær, at privati íløguhugurin í Føroyum var ovurstórur, tá komið varð inn í 1980-ini. Landskassin bar nærum allan tapsvandan, verkætlanirnar vóru av somu grund illa gjøgnumhugsaðar, og ofta vóru skipini yvirfíggjaði fyri at sleppa undan krøvunum um 10% í eginpeningi. Úrslitið var, at raksturin gjørdist nógv tyngri enn neyðugt.



Tingmanningin 1980-84.

Hartil kom, at føroyska rentuskattalógin, sum ikki var endurskoðað síðan 1953, hevði verið viðvirkandi til, at bankarnir vóru á tremur við peningi. Føroyska lóggávan var nógv øðrvísi enn í grannalondunum, t.d. skuldi eingin skattur gjaldast av rentuinntøku. Tað loysti seg tí betur at seta uppspardan pening inn í føroyskar peningastovnar enn at seta teir í útlendskar bankar. Føroyska rentuskattalógin gjørdi tað harumframt óneyðugt hjá føroysku bankunum at fylgja rentustøðinum í grannalondunum. Tá altjóða rentustøðið fall í 1970-unum og 1980-unum, fylgdi føroysku bankarnir ikki við rentufallinum. Hetta hevði við sær, serstakliga eftir at donsku kreditfeløgini fingu atgongd til føroyska peningamarknaðin í 1985, at risastór spekulatiónslán vórðu tikin heim úr Danmark. Frá 1980 til 1990 øktust innlánini í føroysku bankunum úr 2 milliardum og upp í 9 milliardir krónur.[458] Landsstýrið góðkendi øll spekulatiónslánini, men tað var einki veruligt eftirlit við peningastreyminum til og úr Føroyum. Hóast lóg um *Landsbanka* varð samtykt í Løgtinginum í 1978, so var Landsbankin, sum kundi havt eitt ávíst eftirlit við peningastreyminum, ikki settur á stovn fyrr enn í 1988, og lógargrundarlagið undir virkseminum hjá bankanum var ikki liðugt fyrr enn í

1995. Stóru innlánini í privatu bankunum, sum tí uttan eftirlit men við góðkenning Landsstýrisins streymaðu til Føroya í 1980-unum, øktu enn meira um tann frammanundan stóra íløguhugin í Føroyum. Bankarnir, sum fáa sín vinning frá muninum millum innláns- og útlánsrentu, lántu peningin útaftur til íløgufúsar føroyskar vinnulívsmenn – ofta við landskassaveðhaldi.

Stuðulsskipanirnar til vinnulívið, landskassaveðhaldini og høga føroyska rentustøðið høvdu við sær, at ovurstórt virksemi var í føroyska samfelagnum í 1980-unum. Hartil kom, at búskaparpolitikkur Landsstýrisins í 1980-unum, tá tað nógva virksemið hevði havt við sær, at skattainntøkur landskassans vóru metstórar, í stríð við allar búskaparligar forskriftir var íløgustimbrandi heldur enn íløgutálmandi. Hetta setti enn meira ferð á føroyska búskapin.

Trupulleikin var, at tað ovurstóra virksemið grundaði seg á lántan pening og ósunnar stuðuls- og veðhaldsskipanir, sum høvdu við sær, at íløgurnar hjá vinnuni vóru ósunnar og grundaðu seg á óveruligar fortreytir. Tann samlaða føroyska uttanlandsskuldin, sum fyri ein stóran part var privat, var seinast í 1980-unum 8 milliardir krónur – 173.000 krónur í miðal fyri hvønn íbúgva. Tá tey yvirfíggjaðu skipini í seinnu helvt av 1980-unum byrjaðu at fara av knóranum, byrjaði tann privata uttanlandsskuldin sum ein avleiðing av landskassaveðhaldunum at streyma inn í landskassan. Í fyrsta umfari fíggjaði landskassin veðhaldini yvir undirskot á fíggjarlógini, men seinni varð neyðugt at taka fleiri uttanlandslán. Tá tey búskaparligu ávaringarljósini veruliga fóru at lýsa móti endanum av 1980-unum, gjørdist tað neyðugt at fremja nakrar tillagingar av búskapinum, t.d. varð Ráfiskagrunnurin avtikin í 1990, men neyðugt var eisini at taka stór uttanlandslán. Í 1988 skyldaði landskassin saman við almennum grunnum 1,4 milliard krónur, men í 1992 var skuld landskassans vaksin upp í 3,9 milliardir krónur. Harumframt skyldaðu kommunurnar 1,4 milliard, sum landskassin veðhelt fyri.[459] Tann almenna skuldin, sum tilsamans var 5,3 milliardir krónur í 1992, var so stór, at heimastýrismyndugleikarnir ikki høvdu møguleika fyri at taka fleiri uttanlandslán, sum tey effektivu veðhaldini og stuðulin til vinnuna kundu fíggjast við. Tann samlaði stuðulin

til vinnuna í 1980-unum hevði tá kostað landskassanum góðar 6 milliardir krónur.[460]

Tá fiskivinnan, sum ikki megnaði at klára seg uttan stuðul, eisini varð rakt av fiskaloysi í byrjanini av 1990-unum, partvíst orsakað av landskassastuðlaðari ovurfisking í 1980-unum, gjørdist tað greitt, at alt tað føroyski samfelagið stóð frammanfyri einum búskaparligum skræðli. Teir nógvu húsagangirnir høvdu í fyrsta umfari við sær, at alt tað føroyska bankakervið kom í stórar gjaldføristrupulleikar.

### Donsk kreppuhjálp og krepputreytir

Danska *Fíggjareftirlitið*, sum ríkisins vegna skuldi hava eftirlit við bankakervinum í danska ríkinum, var í Føroyum í 1992 og kannaði føroysku bankarnar. Leygardagin tann 3. oktober fekk leiðslan í Sjóvinnubankanum at vita, at fekk bankin ikki nýggjan kapital tilførdan, so læt bankin ikki upp aftur mánadagin 5. oktober. Fór Sjóvinnubankin av knóranum, so fór hann at draga restina av føroyska vinnulívinum og harvið alt tað føroyska samfelagið við sær. Bankin vendi sær til Landsstýrið, sum alt fyri eitt fór til Keypmannahavnar at samráðast við ríkismyndugleikarnar. Í Danmark vóru Atli Dam løgmaður og Jógvan Sundstein varaløgmaður kunnaðir um tær treytir,

Eftir hendingarnar 6. oktober 1992 var Landsstýrið fleiri ferðir á fundi við donsku stjórnina fyri at finna eina loysn á búskaparkreppuni.



sum danska stjórnin setti fyri at bjarga bankanum frá húsaganginum. Landsstýrið hevði minni enn ein mánað frammanundan vunnið sín størsta sigur, tá tað aftaná eitt áralangt stríð tann 11. september 1992 eydnaðist at fáa semju í lag við donsku stjórnina um at yvirtaka málsøkið ráevni í undirgrundini frá *lista B* sum føroyskt sermál. Nú hevði Landsstýrið ikki annað í at velja enn at ganga undir treytirnar hjá donsku stjórnini.

Tann 6. oktober í 1992 og í árunum fram til 1997 gjørdu føroyskir og danskir myndugleikar fleiri avtalur, sum høvdu við sær, at uttanlandaskuld landskassans varð umfíggjað til lán úr danska ríkiskassanum.[461] Í 1992 var lántøka landskassans úr ríkiskassanum 500 milliónir krónur, men nýggj lán vórðu tikin seinni, og í 1997 hevði landskassin lænt knappar 6 milliardir krónur úr ríkiskassanum. Ein partur av lánsveitingum ríkiskassans til Landsstýrið skuldi setast í Sjóvinnubankan, og seinni fekk Føroya Banki eisini nýggjan kapital á henda hátt. Bankarnir skuldu fáa nýggja kapitalin tilførdan gjøgnum tann til endamálið stovnaða *Fíggingargrunnin frá 1992*, sum skuldi stjórnast av eina 5 manna nevnd. Hóast Landsstýrið átti peningin/lánini í grunninum, so høvdu ríkismyndugleikarnir meirilutan í nevndini. Formaðurin og 2 onnur umboð vórðu vald av ríkismyndugleikunum, meðan landsstýrið valdi næstformannin og eitt umboð afturat. Í 1992 fekk Sjóvinnubankin 300 milliónir í nýggjum kapitali, men árini aftaná vístu, at neyðugt var við nógv størri kapitaltilføring. Nýggjar avtalur millum ríkismyndugleikarnar og Landsstýrið vóru gjørdar um størri lántøku úr ríkiskassanum, sum kundi setast í grunnin. Tilsaman fingu Sjóvinnubankin og Føroya Banki ávíkavist 1500 og 1185 milliónir krónur í nýggjum kapitali - íalt slakar 2,7 milliardir krónur.[462] Burtursæð frá 200 milliónum, sum tann danski *Íleggingargrunnurin* fyri Føroyar setti í Sjóvinnubankan í 1992, kom allur peningurin úr landskassanum, umvegis Fíggingargrunnin.

Danska endurreisingarætlanin var ikki treytaleys. Ríkismyndugleikarnir settu beinleiðis krøv til Landsstýrið um at føra ein ávísan búskaparpolitikk gjøgnum øll kreppuárini. Fíggjarlógin skuldi javnviga, og vinnulívið skuldi umskipast eftir donskum krøvum. Landsstýrið bant seg til ikki at fara út á altjóða lánimarknaðin at taka uttanlandslán. Í veruleikanum

var heimastýrið umvegis Fíggingargrunnin sett undir fyrisiting av donskum myndugleikum í 1990-unum, men treytirnar hjá stjórnini vóru kortini samtyktar av Landsstýrinum við góðkenning Løgtingsins.

Ein avleiðing av bankabjargingunum var, at øll tann eftirverandi privata føroyska uttanlandaskuldin varð broytt til almenna skuld, sum Landsstýrið, ella rættari føroyski skattgjaldarin, hefti fyri. Landskassin, sum í 1988 hevði eina skuld uppá 1,4 milliard krónur, hevði tilsamans veðhildið fyri 2,4 milliardum krónum av privatu skuldini í 1980-unum. Tilsamans gjørdust 1,6 milliard av hesum veðhaldum effektiv.[463] Við byrjanina av 1990-unum vóru veðhald fyri meira enn 1 milliard krónur endaði í landskassanum, og skuldin var partvíst av teirri grund komin uppí góðar 3,9 milliardir krónur í 1992. Tá endurreisingarætlanin hjá ríkismyndugleikunum var av í 1997, hevði landskassin eina skuld uppá knappar 6 milliardir krónur í ríkiskassanum, men tann privata skuldin, sum í 1988 hevði verið 5,1 milliardir krónur og knappar 2,5 milliardir í 1992, var vend til eina ogn uppá 41 milliónir krónur í oktober 1993.[464]

Hóast útlendskir lánveitarar mistu 1,5 milliard krónur í Føroyum av kreppuni,[465] so hevur tað verið ført fram frá føroyskari síðu, at útlendskir og føroyskir lánveitarar og spekulantar, sum høvdu spunnið gull í Føroyum í 1980-unum, sluppu nærum snikkaleysir burturúr kreppuni.[466] Hildið hevur verið uppá, at stórir partar av landskassalánunum úr ríkiskassanum, sum komu til Føroya í tíðini aftaná 6. oktober 1992 umvegis Fíggingargrunnin og bankarnar, fóru beinleiðis aftur til danskar kreditorar. Sambært hesi fatan var danska hjálpin til Føroya í veruleikanum ein hjálp til danskar fíggingarstovnar, sum vóru komnir illa fyri í Føroyum, meðan landskassin kom at bera meginpartin av tapunum av privatu og útlendsku íløgunum í 1980-unum. *Partabrævabýtið* í 1993, tá Landsstýrið keypti Føroya Banka, fekk tær stóru samansvørjingsástøðirnar at koma undan kavi í Føroyum.

Føroya Banki, sum eftir áheitan frá Løgtinginum varð stovnaður av Den Danske Landmandsbank í 1906, varð ikki tikin við í bankabjargingina í 1992. Grundgevingin var, at høvuðspartabrævaeigarin, Den Danske Landmandsbank, – frá 1976 *Den Danske Bank* – hevði fíggjarligu ábyrgdina av Føroya



Í apríl 1994 kundi Richard Mikkelsen einsamallur vegna Fíggingargrunnin atkvøða fyri at leggja bankarnar saman.

Banka. Den Danske Bank var ein risi í danska fíggjarheiminum, og somu krøv vórðu tí ikki sett til Føroya Banka viðvíkjandi nýggjum kapitali og avsetingum móti tapi, sum sett vórðu Sjóvinnubankanum. Tá kreppan byrjaði at gera um seg í Føroyum seinast í 80-unum, varð tað kortini greitt, at Den Danske Bank hefti fyri stórum tapum hjá Føroya Banka. Tveir mánaðar eftir búskaparliga skrædlið tann 6. oktober 1992, noyddist Den Danske Bank at seta 332 milliónir krónur av nýggjum partapeningi í Føroya Banka, men tá samanum kom, mátti Den Danske Bank taka við einum tapi uppá 630 milliónir krónur orsakað av sínum skyldum mótvegis tí kreppurakta Føroya Banka.[467]

Tað var ikki heilt óvæntað, at Den Danske Bank, sum saman við stórum pørtum av danska fíggjarheiminum var í kreppu fyrst í 90-unum, tá órógv var á altjóða gjaldoyramarknaðinum, ynskti at sleppa burturúr sínum skyldum í Føroyum, tá peningaligu tapini hjá Føroya Banka byrjaðu at vísa seg. Longu í 1990 hevði Den Danske Bank givið Landsstýrinum tilboð um at keypa Føroya Banka, men gongdin aftaná 6. oktober 1992 hevði við sær, at ynskið um at sleppa burtur úr skyldunum mótvegis Føroya Banka varð sett fram av nýggjum, men nú fyri donsku ríkismyndugleikunum. Høvuðsgrundgevingin í 1992 var, at tað var kappingaravlagandi, at annar bankin í Føroyum fekk almennan stuðul, meðan hin ikki fekk. Partvíst

orsakað av tí trýsti, sum Den Danske Bank harvið legði á Fíggingargrunnin, men helst eisini tí at nevndin í grunninum, hvørs høvuðsuppgáva var at endurreisa føroyska búskapin, hevði stóran áhuga í at fáa ræði og stýring við føroyska bankakervinum, sum var í stórari kreppu um hetta mundið, gjørdi grunnurin í mars 1993 eina avtalu við Den Danske Bank, sum miðaði ímóti at loysa bankan frá sínum skyldum í Føroyum. Avtalan, sum skuldi góðkennast av donsku stjórnini og Landsstýrinum, miðaði ímóti, at Landsstýrið og Den Danske Bank, sum vóru meirilutapartaeigarar í ávíkavist Sjóvinnubankanum og Føroya Banka, eftir ávísum reglum skuldu býta um partabrøv, soleiðis at Fíggingargrunnurin, tvs. Landsstýrið, eftir býtið átti meirilutan av partabrøvunum í báðum bankunum. Hóast eitt sindur av óvissu hevði verið um virðið á partabrøvunum í Føroya Banka, serstakliga tí krøvini til nýggjan kapital og avsetingar ikki høvdu verið tey somu sum til Sjóvinnubankan, ið undan partabrævbýtinum hevði fingið 825 milliónir í nýggjum kapitali tilførdan úr landskassanum og Íleggingargrunninum,[468] hevði Landsstýrið tann 22. mars 1993 undir trýsti frá bæði donsku stjórnini og Den Danske Bank góðkent partabrævabýtið.

Harvið fingu ríkismyndugleikarnir og Landsstýrið umvegis Fíggingargrunnin ræði á øllum tí føroyska bankakervinum, men Landsstýrið hevði einsamalt tikið á seg møgulig tap, sum seinni kundu standast av Føroya Banka. Í apríl 1994 vórðu báðir bankarnir lagdir saman undir navninum Føroya Banki.

Ein týðandi fortreyt fyri, at Landsstýrið góðkendi partabrævabýtið, var, at stjórin í Den Danske Bank, Peter Straarup, á fundi í Tjóðbankanum tann 17. mars 1993 hevði givið Maritu Petersen, løgmanni, lyfti um, at Føroya Banki ikki hevði fyri neyðina at fáa meira kapital tilførdan – tvørturímóti helt hann uppá, at Landsstýrið fekk meira enn tað læt, um partabrævabýtið varð framt.[469] Seinni, í 1998, staðfesti ein óheft kanning, at skuldu somu meginreglur verði nýttar viðvíkjandi avskrivingum og avsetingum móti tapi í Føroya Banka sum í Sjóvinnubankanum, so hevði Føroya Banki avsett millum 200 og 300 milliónir ov lítið móti endanum av mars 1993.[470] Hartil kom, at stutt aftaná partabrævabýtið hevði m.a. gongdin í føroyska búskapinum, sum versnaði gjøgnum alt 1993, havt við sær, at Føroya Banki, sum Landsstýrið nú hevði

fíggjarligu ábyrgdina av, hevði tørv á eini nógv størri upphædd í nýggjum kapitali. Longu tann 24. mars 1993, einans tveir dagar eftir at Landsstýrið hevði góðkent partabrævabýtið, gav Fíggjareftirlitið bankunum boð um at senda eftirlitinum roknskapir, sum skuldu vera settir upp eftir treytunum í donsku bankalógini. Nakrar dagar seinni, tann 31. mars 1993, varð Fíggjareftirlitið í skrivi frá Føroya Banka kunnað um, at bankin ikki leyk krøvini um gjaldføri í bankalógini. Føroyskir myndugleikar fingu varhugan av, at alt ikki stóð væl til í Føroya Banka tann 28. mai 1993, tá Landsstýrið noyddist at gera eina nýggja avtalu við stjórnina um endurfíggjan av lántøku landskassans, sum bant landskassan til at seta 560 milliónir krónur afturat í bankarnar, skuldi tað gjørst neyðugt. Tá Fíggjareftirlitið hevði gjøgnumført eina fullfíggjaða kanning av roknskapunum í september 1993 varð staðfest, at Føroya Banka tá tørvaði nýggjan kapital uppá knappa 1,2 milliard krónur, meðan Sjóvinnubankanum tørvaði 675 milliónir krónur. Landsstýrið, sum átti Føroya Banka, varð ikki kunnað um, hvussu hættislig støðan í bankanum var, fyrr enn tann 11. oktober 1993. Dagin eftir gjørdist tað neyðugt hjá Landsstýrinum at taka eitt nýtt lán úr ríkiskassanum uppá 1,3 milliard krónur, sum saman við teimum 560 milliónunum skuldu setast í bankarnar.[471]

Tað, sum Peter Straarup tann 17. mars 1993 hevði upplýst fyri Maritu Petersen viðvíkjandi støðuni í Føroya Banka, sum sjálvandi ikki fult út kundi taka hædd fyri gongdini í føroyska búskapinum, var hvørki í mars 1993 ella í tíðini stutt eftir partabrævabýtið í samsvar við veruleikan. Landsstýrið hevði tann 22. mars 1993 keypt ein banka, sum ikki leyk krøvini í bankalógini, og heilt stutt eftir keypið vísti bankin seg harumframt at hava tørv á eini risastórari upphædd í nýggjum kapitali. Hartil kom, at bæði danska stjórnin og tað óhefta Fíggjareftirlitið, sum stutt eftir partabrævabýtið staðfesti, at bankin hevði tørv á stórum upphæddum í nýggjum kapitali, høvdu verið við í teimum samráðingunum, sum vóru fortreytirnar fyri, at býtið varð góðtikið av Landsstýrinum; danska stjórnin, sum frammanundan hevði góðkent partabrævabýtið, hevði beinleiðis trýst Landsstýrið til at taka av tilboðnum. Í Føroyum byrjaðu røddir at hoyrast, sum hildu uppá, at danska stjórnin og Fíggjareftirlitið høvdu hjálpt Den Danske Bank til at turka eitt milliardatap í Føroyum av uppá Landsstýrið. Høvuðs-

grundin skuldi vera, at danska stjórnin vildi forða fyri, at kreppan í danska fíggjarheimininum, sum hevði tikið seg upp fyrst í 90-unum, skuldi versna, og harvið leggja donsku krónuna og danska lánførið undir uppaftur størri trýst.

Atfinningarnar móti leiklutinum hjá Fíggjareftirlitinum, donsku stjórnini og Den Danske Bank, tá partabrævabýtið varð framt, vóru stórar í Føroyum gjøgnum alt 1994.[472] Tann sokallaða *Gørtz-nevndin*, sum Landsstýrið og ríkisstjórnin í felag høvdu sett til at kanna ta búskaparligu síðuni av banka-bjargingunum, var í august 1994 komin til ta niðurstøðu, at „*Der er ingen tvivl om, at Færøerne er kommet dårligt fra bank-krisen, mens den danske stat og den danske banksektor er sluppet nådigt*". Nevndin hevði sambært arbeiðssetninginum ikki heimild til at taka støðu til spurningin um, hvør hevði ábyrgd-ina av, at føroyingar vóru komnir illa frá partabrævabýtinum, og hon kundi tí ikki annað enn staðfesta, at „*det var uklogt af Landsstyret at indvillige i aktiebyttet*". Kortini staðfesti nevndin í síni niðurstøðu, at júst trupulleikin við greitt at staðfesta ábyrgd talaði fyri, at „*også den danske stat bidrager til den endelige finansiering af tabet ved bankrekonstruktionerne*".[473] Niðurstøðan hjá nevndini varð kortini ikki tikin til eftirtektar av donsku stjórnini.

Í Føroyum var misnøgdin stór við Gørtz-frágreiðingina, sum ikki staðfesti, hvar ábyrgdin fyri partabrævabýtinum lá, og trýst varð lagt á donsku stjórnina fyri at fáa eina nýggja kanning setta í verk, sum eisini staðfesti rættarliga og politiska ábyrgd. Í fyrsta umfari vísti danska stjórnin øllum tílíkum krøvum frá sær, men aftaná stórt politiskt trýst úr Føroyum, sum tann 19. januar 1995 førdi til, at eitt einmælt Løgting álegði Landsstýrinum at venda sær til stjórnina við umbøn um at fáa eina *dómarakanning* framda av partabrævabýtinum, sum hevði heimild til at staðfesta rættarliga ábyrgd, valdi stjórnin at slaka. Stjórnin vildi kortini ikki ganga einmælta ynski Løgtingsins á møti um at seta eina dómarakanning í verk av partabrævabýtinum, men hon trýsti ein meiriluta í Løgting-inum til at góðtaka, at ein óheft *serfrøðinganevnd* skuldi „*under-søge og klarlægge det samlede begivenhedsforløb i forbindelse med de initiativer, der fra 1992 blev taget for at redde SB og FB fra økonomisk sammenbrud og frem til sammenlægningen af bankerne i 1994*".[474] Serfrøðinganevndin skuldi ikki staðfesta rættarliga

ábyrgd, men frágreiðingin frá nevndini skuldi fáa politiska viðgerð í Fólkatinginum.

Serfrøðinganevndin, sum fór til arbeiðis tann 8. juni 1995, varð ikki liðug við tað ræ ttuliga drúgva arbeiðið fyrr enn tann 5. januar 1998, tá ein 1400 síður long frágreiðing saman við 800 síðum av fylgiskjølum varð almannakunngjørd.[475] Frágreiðingin staðfesti m.a., at Landsstýrið ikki hevði fingið allar týðandi upplýsingar um virðið á bankanum, sum tað keypti í 1993. Hóast frágreiðingin ikki skuldi staðfesta rættarliga ábyrgd, so fingu bæði danska stjórnin, Fíggjareftirlitið og Den Danske Bank harðar ábreiðslur frá nevndini. Við støði í frágreiðingini stevndi Landsstýrið bæði donsku stjórnini og Den Danske Bank. Eingin dómur varð kortini feldur í málinum, tí danska stjórnin, sum vildi sleppa undan einum rættarmáli, ið kundi skaða umdømið hjá danska ríkinum í altjóða høpi, valdi tann 10. juni 1998, eftir at aðalorðaskifti hevði verið í Fólkatinginum um niðurstøðurnar í serfrøðingakanningini, at gera eina avtalu við Landsstýrið, sum gav føroyingum eitt rættuliga stórt endurgjald fyri m.a. partabrævabýtið.[476] Samstundis tók Landsstýrið stevningina móti donsku stjórnini aftur, meðan stjórnin yvirtók stevning Landsstýrisins móti Den Danske Bank. Avtalan frá 1998 millum Landsstýrið og donsku stjórnina skarvaði 900 milliónir krónur av skuld landskassans til ríkiskassan. Harumframt varð rentan av skuld landskassans til ríkiskassan lækkað nakað, og landskassin fekk eitt rentufrítt lán uppá 500 milliónir úr ríkiskassanum, sum skuldi gjaldast aftur, um so varð, at føroyingar fingu stórar oljuinntøkur innan 20 ár. Hesa upphædd ella partar av henni kundi danski ríkiskassin royna at fáa aftur frá Den Danske Bank, sum heldur ikki var sinnaður at skaða sítt altjóða umdømi við einum rættarmáli. Allar búskaparligar bindingar, sum vóru lagdar á Landsstýrið í árunum aftaná 1992 vórðu samstundis ógildaðar, og Landsstýrið fekk ræði á føroyska búskapinum aftur.

Í 1998 høvdu danskir myndugleikar framvegis ein leik eftir í bankamálinum mótvegis Den Danske Bank. Hetta málið endaði við semju tann 23. mars í 2000, sum hevði við sær, at Den Danske Bank, sum frammanundan hevði mist 630 milliónir krónur í Føroyum, skuldi gjalda danska statinum 300 milliónir krónur í endurgjaldi fyri partabrævabýtið.[477] Hartil



Frágreiðingin frá bankakanningini verður almannakunngjørd.

kom, at ein umfatandi donsk kanning av leiklutinum hjá Fíggjareftirlitinum í 1980-unum og 1990-unum, tá stóru donsku fíggingarstovnarnir Hafnia, Baltica og Den Danske Bank vóru í kreppu og sluppu burtur úr stórum fíggjarligum skyldum, m.a. Den Danske Bank í Føroyum, varð sett í verk av meirilutanum í Fólkatinginum uttan um stjórnina í desember 1998. Hendan kanningin verður ikki liðug fyrr enn á heysti í 2003.

Føroyskir myndugleikar høvdu hinvegin endaliga lagt lok á bankamálið við teirri búskaparliga sæð góðu avtaluni frá 10. juni 1998, men tey politisku viðurskiftini í Føroyum í 1980-unum, búskaparkreppan og donsku krepputiltøkini í 1990-unum høvdu havt við sær, at høvuðsspurningurin í føroyskum politikki í fyrru helvt av 1990-unum gjørdist politiska og fyrisitingarliga skipanin í Føroyum, meðan høvuðsspurningurin í seinnu helvt av 1990-unum gjørdist ríkisfelagsskapurin við Danmark.

## Politisk eftirmeting og nýggj stjórnarskipan

Tann stóri politiski spurningurin í Føroyum í fyrru helvt av 1990-unum var, hvussu tað bar til, at tann politiska skipanin



Formaðurin í §19-nevndini, Lisbeth L. Petersen, handar løgtingsformanninum Finnboga Ísakson frágreiðingina um 80-árini.

ikki megnaði at byrgja fyri teirri stóru búskaparkreppuni, sum rakti Føroyar fyrst í 1990-unum. Løgtingið kravdi kortini hvørki eina dómarakanning ella eina óhefta serfrøðingakanning av leiklutinum hjá føroyskum myndugleikum, tá orsøkirnar til kreppuna skuldu staðfestast, eins og tað hevði kravt av leiklutinum hjá donskum myndugleikum í partabrævabýtinum. Í 1995 setti Løgtingið við heimild í grein 19 í stýrisskipanarlógini eina ikki heilt óhefta *løgtingsnevnd*, sum skuldi kanna politisku og fyrisitingarligu fortreytirnar fyri teimum mistøkum, sum vórðu framd í 1980-unum. Nevndin varð mannað við 5 politikarum, sum allir komu úr teimum flokkum, sum vóru umboðaðir á tingi í 80-unum.

Løgtingsnevndin, sum fór til verka 2. oktober 1995, varð ikki liðug við sítt arbeiði fyrr enn í 2000, tá *Frágreiðing um 80-árini* varð almannakunngjørd.[478] Fleiri av niðurstøðunum í kanningini vóru kendar, áðrenn nevndin fór til arbeiðis, men nevndin hevði gjørt eitt stórt arbeiði við at savna tilfar og frágreiðingar, sum skjalprógvaðu niðurstøðurnar. Frágreiðingin um 80-árini vísti á, at bæði viðvíkjandi lóggávu og fyrisiting vóru stór mistøk framd í 1980-unum. Millum annað varð staðfest, at Landsstýrið manglaði arbeiðsmegi til at smíða lógaruppskot og fyrisita lóggávuna, og Løgtingið, sum skuldi

havt eftirlit við fyrisitingini, var, gjøgnum tær ymisku nevndirnar og lóggávu, sum beinleiðis var smíðað til endamálið, partur í fyrisitingini. Ofta vóru lógirnar beinleiðis orðaðar soleiðis, at Landsstýrið saman við eini løgtingsnevnd, serstakliga *Fíggjarnevndini*, hevði heimild til at áseta ymisk gjøld, veita studning ella veðhalda fyri lánum.[479] Úrslitið var, at sjálvt lóggávu- og eftirlitsarbeiði Løgtingsins varð misrøkt. Lóggávan varð ofta veik, orðingarnar vóru óneyvar, og lógir vóru ikki endurskoðaðar, sjálvt um tað beinleiðis var ásett, nær lógin skuldi endurskoðast.[480] T.d. var ein veðhaldslóg frá 1967, sum skuldi endurskoðast í 1969, framvegis í gildi í 1980-unum, hóast samfelagsligu fortreytirnar vóru fullkomuliga broyttar. Fyrisiting og eftirlit var vavt upp í hvørt annað á ein tílíkan hátt, at hvørgin av uppgávunum varð røkt til lítar.

Viðvíkjandi búskapargongdini í 80-unum vórðu føroyingar ávaraðir ferð aftaná ferð av ráðgevandi nevndini hjá danska Forsætismálaráðnum,* sum á hvørjum ári gjørdi eina frágreiðing um føroyska búskapin, sum kjak stóðst um í Føroyum, men bæði viðvíkjandi eftirliti og fyrisiting var politiska skipanin í Føroyum so mikið veik, at einki varð broytt kortini. Føroyskir politikarar høvdu ikki nakað fullfíggjað yvirlit yvir fíggjarviðurskifti landskassans. T.d. sóust stórir partar av útreiðslum landskassans ikki á fíggjarlógini, tí tær vóru fjaldar í 92 ymiskum landskassagrunnum. Hartil kom, at landskassaroknskapirnir sum oftast ikki vóru grannskoðaðir fyrr enn fleiri ár aftaná. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði seinast í 80-unum ikki atgongd til líkinda tøl viðvíkjandi gjaldsjavna og uttanlandaskuld – í onkrum føri var munurin millum tølini hjá landsstýrismanninum og tey veruligu tølini, sum vórðu almannakunngjørd seinni, meira enn tvífaldur.[481] Í nýggjárstalu síni tann 31. desember 1988 staðfesti løgmaður, at uttanlandaskuldin var 4,6 milliardir krónur. Tríggjar mánaðar seinni varð upplýst, at rætta talið var 6,7 milliardir, men tá endaliga uppgerðin kom í 1990, varð staðfest, at uttanlandaskuldin við endan av 1988 var 7,7 milliardir – 3,1 milliard hægri, enn

---

* T.d. segði nevndin í 1989, at vórðu eingi politisk inntriv gjørd, so var vandi fyri, at føroyska uttanlandaskuldin, sum „allerede (er) af en størrelsesorden, som ikke kan genfindes i noget andet land, hvis man bortser fra visse lande i den 3. verden … på eksempelvis 10 år … kunne fordoble“ og koma á eitt støði „hvor dens finansiering vil kunne blive umulig“. Det rådgivende udvalg for Færøerne 1989, síðu 5-6.

løgmaður hevði upplýst í nýggjársrøðuni 1988.[482] Kortini, ella kanska júst av teirri grund, at talgrundarlagið var ófullfíggjað, afturvístu leiðandi føroyskir politikarar meginpartinum av tí, sum ráðgevandi nevndin hevði at siga um gongdina í føroyska búskapinum. Úrslitið var, at einki varð gjørt fyri at venda gongdini.

Fyrisitingarligu veikleikarnir, sum eru nevndir omanfyri, vóru ikki einastu orsøkirnar til ábyrgdarloysið í 80-unum, men teir gjørdu tað nærum ómøguligt hjá Landsstýrinum at hava eftirlit við búskapinum. Harumframt var eingin trygd fyri, at eitt Løgting, sum viðvíkjandi fyrisitingarligum eftirliti nærum var ógegnigt, fór at hava neyvt eftirlit við, at lóggávan varð fyrisitin á rættan hátt. Og veljarin, sum kundi lagt trýst á Løgtingið, visti ikki, hvussu illa stóð til, fyrr enn ov seint var. Hesi viðurskifti kundu einans fáast í rættlag við at endurnýggja allan bygnaðin í teirri stjórnarligu og fyrisitingarligu skipanini í Føroyum, soleiðis at í fyrsta lagi varð eitt greitt *ábyrgdar-* og *valdsbýtið* gjøgnumført millum *fyrisiting* og *eftirlit*, Landsstýri og Løgting, og í øðrum lagi máttu bæði *fyrisiting* og *lógarsmíð* styrkjast.

Verða omanfyri nevndu viðurskifti í 1980-unum sett í samband við stýrisskipanarlógina frá 1948, sum nærum óbroytt var í gildi til 1994, so kann staðfestast, at avgjørdir veikleikar vóru í henni. Strongu viðtøkureglurnar í Løgtinginum góvu í útgangsstøði Løgtinginum stórt *vald* yvir Landsstýrinum, men hinvegin høvdu tær eisini ta óhepnu avleiðing við sær, at *eftirlit* Løgtingsins við Landsstýrinum ikki gjørdist so neyvt, sum tað hevði verið, um Løgtingið ikki hevði havt tryggjað sær nærum alt vald frammanundan. Minnilutin í Løgtinginum, sum ikki tók undir við landsstýrissamgonguni, varð orsakað av atkvøðureglunum í útgangsstøði settur uttanfyri alla ávirkan. Hóast landsstýrið misti meirilutan í Løgtinginum, so bar tað ikki til at seta landsstýrið frá, uttan so at nýval varð útskrivað til Løgtingið. Heimildin at útskriva nýval, sum einans løgtingsmeirilutin hevði, varð einans nýtt tvær ferðir í tíðarskeiðinum frá 1948 til 1994. Hartil kom, at løgmaður og landsstýrismenn, sum kundu varðveita atkvøðurættin í Løgtinginum, meðan teir sótu í Landsstýrinum, høvdu góðar møguleikar fyri at ávirka samtyktir Løgtingsins til fyrimuns fyri Landsstýrið. Landsstýrið kundi loyva sær nógv, áðrenn tey fólkavaldu

løgtingsumboðini settu sín løgtingsssess í vága við tí fyri eyga at fáa landsstýrið frá valdinum. Hesar ásetingar styrktu í sjálvum sær valdið hjá fyrisitingini mótvegis eftirlitinum. Í veruleikanum tryggjaði stýrisskipanarlógin eitt valdsbýti, sum var til fyrimuns fyri fyrisitingina.

Fyrisitingarligu heimildir Løgtingsins mótvegis Landsstýrinum høvdu somu óhepnu avleiðingar. Hóast hesar heimildir góvu Løgtinginum beinleiðis ávirkan á avgerðir Landsstýrisins, so varð sjálvt eftirlitið og lóggávuarbeiðið, sum Løgtingið skuldi standa fyri, ikki røkt til lítar, tá Løgtingið beinleiðis var partur av fyrisitingini. Hartil kom, at Landsstýrið, sum hevði ta dagligu fyrisitingina um hendi, hevði trupult við at taka ábyrgdarfullar fyrisitingarligar avgerðir, tá hesar ofta vóru tiknar í samráði við løgtingsnevndir, sum høvdu fyrisitingarligt ræði. Heimildirnar hjá løgmanni, sum var landsstýrisformaður, í Landsstýrinum vóru hartil so mikið veikar, at hann ikki megnaði at hevda nakað veruligt eftirlit við Landsstýrinum. Saman við teirri kollegialu skipanini av Landsstýrinum vóru hesi viðurskifti viðvirkandi til, at ábyrgdin hjá tí einstaka landsstýrismanninum varð forfjónað. Samanumtikið kann sigast, at hvørki arbeiðs- ella ábyrgdarbýtið varð greitt tilskilað í stýrisskipanarlógini.

Stýrisskipanin frá 1948 hóskaði helst væl til eitt lítið fyrisitingarligt øki sum tað føroyska í fyrru helvt av 20. øld, men hon hevði avgjørdar veikleikar, tá lóggávan og fyrisitingin í 1970-unum gjørdist so umfatandi, at tað var nærum ómøguligt hjá eini *eindarfyrisiting*, sum harumframt grundaði seg á eina *kollegiala meginreglu*, at hava yvirlit yvir alla lóggávuna og alla fyrisitingina. Nakrar einfaldar samanberingar kunnu ítøkiliggera, hvussu nógv krøvini til lóggávu og fyrisiting vórðu økt í heimastýristíðarskeiðinum. Í 1948 skuldi heimastýrið lóggeva og fyrisita málsøki, sum kostaðu 7,8 milliónir krónur í rakstri. Talan var um eitt samfelag, sum hevði ein lítlan almennan vælferðarsektor, og tær útreiðslur, sum vóru á almannaøkinum, vóru undir lóggevandi og fyrisitingarliga ræði ríkismyndugleikanna. Um miðjuna av 1990-unum skuldi heimastýrið lóggeva og fyrisita málsøki, sum kostaðu góðar 3 milliardir krónur at reka. Í 1990-unum var talan um eitt samfelag, sum hevði ein væl útbygdan almennan vælferðarsektor. Tey 3 stóru málsøkini, almannamál, heilsumál og undirvísing, sum ikki

vórðu yvirtikin av heimastýrinum fyrr enn í 1970-unum, høvdu mitt í 1990-unum eina játtan á fíggjarlógini, sum var knappliga 1,5 milliard krónur tilstøddar.[483] Tað var greitt, at hesi viðurskifti settu heilt onnur krøv til føroysku stýrisskipanina.

Havandi í huga tær nógv øktu lóggevandi og fyrisitingarligu uppgávurnar, sum vórðu lagdar á heimastýrið seinast í 1970-unum, so er helst rætt at siga, at stýrisskipanarlógin átti at verið broytt longu tá. Trupulleikin var, at meðan heimastýrislógin heimilaði Løgtinginum at yvirtaka bæði lóggávuna og fyrisitingina av fleiri og fleiri málsøkjum, uttan at ein bókstavur varð broyttur í heimastýrislógini, so var tað nógv torførari at tillaga stýrisskipanarlógina til tey øktu fyrisitingarligu krøvini, tí broytingar í henni skuldu samtykkjast av tveimum løgtingum við løgtingsvali ímillum. Atkvøddi ikki meira enn helmingurin av løgtingsmanningini fyri broytingunum, so var uppskotið felt. Í øllum førum hendu ongar broytingar fyrr enn í 1990-unum, tá stóra búskaparkreppan gjørdi tað neyðugt at fara undir grundleggjandi stýrisskipanarligar nýskipanir.

**Stýrisskipanin og tingskipanin frá 1994**

Tann 1. apríl 1993 samtykti Landsstýrið at seta eina nevnd, sum skuldi gera uppskot til nýggja stýrisskipanarlóg. Í arbeiðssetninginum hjá nevndini stóð m.a., at bólkurin skuldi kanna, um arbeiðsbýtið millum Løgtingið og Landsstýrið var hóskandi. Uppskotið, sum nevndin skuldi tilevna um nýggja stýrisskipan, skuldi bygga á eina skipan av Landsstýrinum, har farið varð burtur frá teirri kollegialu skipanini, sum hevði verið galdandi síðan 1948, til eina *ráðharraskipan*, sum staðfesti ábyrgdina hjá teimum einstøku landsstýrismonnunum. Arbeiðsbólkurin varð liðugur við sítt arbeiði tann 22. desember 1993, tá *Álit um Stýrisskipanarviðurskifti Føroya* varð almannakunngjørt.[484] Nýggj stýrisskipan, sum tók útgangsstøði í hesum áliti, varð samtykt av Løgtinginum 26. juli 1994, og lógin skuldi koma í gildi á ólavsøku 1995. Sama ár varð nýggj tingskipan, sum tók støði í nýggju stýrisskipanini, samtykt. Høvuðsinnihaldið og høvuðsbroytingarnar í skipanini skulu nevnast her.

Stýrisskipanin ásetti, at Løgtingið skuldi koma saman ólavsøkudag, aftaná gudstænastu og skrúðgongu, og tingsetan vardi



Sjúrður Rasmussen, Annfinn V. Hansen og Bjørn á Heygum, handa vegna Stýrisskipanarnevndina løgmanni, Maritu Petersen, frágreiðing sína.

til næstu ólavsøku. Tingskipanin frá 1995, sum seinast varð broytt í 1999, ásetti, at tingformaðurin skuldi avgera, hvussu skrúðgongan á ólavsøku skuldi fara fram. Viðvíkjandi formansskapinum varð ásett í tingskipanini, at formansskapurin, tvs. løgtingsformaðurin og 3 næstformenn, var hægsta fyrisiting tingsins, sum umboðaði tingið úteftir. Stýrisskipanarlógin frá 1948 hevði ásett, at tingformaður og løgtingsnevndir skuldu veljast av Løgtinginum, hvørja ferð tingið kom saman, og nýtt formansval skuldi verða, um 7 løgtingsumboð, í 1985 broytt til 10, kravdu tað. Hetta hevði havt við sær, at tingformaðurin, sum skuldi vera samráðingarleiðari í tinginum, í útgangsstøði var veikur. Ofta varð hann valdur sum ein liður í árligum avtalum flokkanna millum um nevndarsessir, sum hvørki tæntu nevndunum ella formansskapinum. Í stýrisskipanarlógini frá 1994 varð hetta broytt, tí tingformaður og 3 næstformenn skuldu eins og tær føstu nevndirnar veljast fyri alt valskeiðið. Tá tingið kom saman, skuldi elsta tingumboðið biðja um uppskot til løgtingsformann, og atkvøðast skuldi uttan umrøðu. Nýtt formansval í einum valskeiði kundi ikki fara fram, uttan so at fýra fimtingar av tingmanningini kravdu tað. Tingformaðurin fór heldur ikki frá, tá Løgtingið varð uppløyst og val útskrivað, men hann varð sitandi og varðveitti sínar heimildir, til eitt nýtt ting kom saman.

Grundin til, at støðan hjá tingformansskapinum í Løgtinginum varð styrkt í 1994, var tann, at tingformaðurin hevði fingið størri heimildir við nýggju stýrisskipanarlógini. Løgmaður, sum frammanundan hevði verið valdur beinleiðis av Løgtinginum, skuldi sambært nýggju stýrisskipanarlógini tilnevnast av løgtingsformanninum. Løgmansevnið skuldi tingformaðurin finna fram til í samráð við floksformenninar. Løgtingið kundi vraka uppskotið hjá tingformanninum til løgmann, men so skuldi meira enn helvtin av øllum tingmonnum atkvøða ímóti. Í aðra mátar varð uppskotið hjá løgtingsformanninum til løgmann samtykt. Tá løgmaður varð tilnevndur, varð hann sitandi í løgmansembætinum, til hann sjálvur segði seg úr starvi, ella til Løgtingið við misáliti frá meira enn helminginum av allari tingmanningini setti hann frá.

Sambært gomlu stýrisskipanarlógini hevði Løgtingið sett bæði løgmann og Landsstýrið í starv, men hetta varð broytt í 1994. Meðan tað var løgtingsformaðurin, sum tilnevndi løgmann, so gjørdist tað í 1994 løgmaður, sum setti landsstýrismenninar í starv. Heimildir løgmans í Landsstýrinum vórðu munandi styrktar við nýggju stýrisskipanarlógini, samstundis sum ábyrgdin hjá hvørjum landsstýrismanni varð staðfest. Høvuðsuppgávan hjá løgmanni var at hava eftirlit við Landsstýrinum, sum hann bæði setti í og loysti úr starvi. Løgmaður setti ikki landsstýrismenninar sum eina felags eind, soleiðis sum fyrr hevði verið, men teir vóru settir sum einstaklingar. Landsstýrið var ikki longur skipað sum eitt kollegium, sum í felag hevði fyrisitingina um hendi, men tað var skipað sum eitt ráðharrastýri, har landsstýrismenninir hvør í sínum lagi høvdu fulla fyrisitingarliga ábyrgd av teimum málsøkjum, sum løgmaður hevði litið teimum upp í hendi at fyrisita. Avgerðir, sum landsstýrismenn tóku, skuldu ikki til atkvøðugreiðslu á landsstýrisfundi, soleiðis sum fyrr hevði verið, men teir einstøku landsstýrismenninir høvdu høvuðsábyrgdina av sínum málsøki. Myndugleikin hjá landsstýrismanninum varð einans avmarkaður av teimum yvirskipaðu avtalum, sum landsstýrissamgongan hevði gjørt, og teirri lóggávu, sum Løgtingið hevði samtykt. Í lóg um ábyrgd landsstýrismanna varð staðfest, at landsstýrismenn rættarliga kundu verða drignir til svars fyri gerðir sínar sum landsstýrismenn. Í stýrisskipanarlógini frá

1994 varð sum nakað nýtt staðfest, at løgmaður og landsstýrismenn, sum eisini vóru valdir tingmenn, skuldu lata løgtingssessin frá sær, meðan teir sótu í Landsstýrinum. Landsstýrið, sum skuldi fyrisita lóggávuna, skuldi ikki longur hava nakra beinleiðis ávirkan á lógarsamtyktir, sum vóru gjørdar í Løgtinginum.

Heimildir løgmans mótvegis Løgtinginum vórðu kortini styrktar munandi á annan hátt í 1994. Gamla stýrisskipanarlógin hevði staðfest, at einans Løgtingið sjálvt kundi útskriva nýval at verða áðrenn tey 4 árini, ið valskeiðið varði, men við nýggju lógini fekk eisini løgmaður heimild til at uppløysa Løgtingið og útskriva løgtingsval at verða, nær tað skuldi vera. Hendan heimild løgmans mótvegis Løgtinginum var sterk, tí hann varðveitti hana í eina viku eftir, at Løgtingið við einum møguligum misáliti hevði sett hann frá.

Eins og Landsstýrið einans skuldi hava fyrisitingina av lóggávuni um hendi, so skuldi Løgtingið ikki longur hava nakað við fyrisitingina av lógini at gera. Løgtingið skuldi einans fáast við at smíða og samtykkja lógir og fólksins vegna hava eftirlit við Landsstýrinum, sum skuldi fyrisita lógirnar. Tí var sjálvt lógararbeiðið í Løgtinginum styrkt munandi. Við rundskrivi vóru ásetingar gjørdar, sum kravdu, at lógaruppskot skuldu hava eitt nærri skilmarkað lógarsnið. Í tingskipanini varð ásett, at lógaruppskot, sum einans løgtingsmenn, landsstýrismenn og løgmaður høvdu rætt til at leggja fyri tingið, skuldu vera tingmonnum í hendi tríggjar dagar áðrenn framløguna. Øll lógaruppskot skuldu hava tríggjar viðgerðir, og til hvørja viðgerð fingu røðarar 15, 10 ella 5 minuttir í talutíð, mest til 1. viðgerð og minst til 2. og 3. viðgerð. Løgmaður, landsstýrismenn, framsøgumenn og nevndarlimir fingu longst talutíð, meðan vanligir tingmenn fingu stytst. Tríggir yrkadagar skuldu vera millum 1. og 2. viðgerð, og tveir millum 2. og 3. viðgerð. Løgmaður fekk 1 tíma til løgmansrøðuna á ólavsøku, og landsstýrismenn fingu ein hálvan tíma til frágreiðingar av ymiskum slag.

Burtursæð frá at løgmansrøðan fekk innivist í nýggju tingskipanini, so vóru sjálvar talutíðirnar stórt sæð óbroyttar í mun til gomlu tingskipanina. Týdningarmiklari var, at nevndararbeiðið varð broytt og styrkt munandi. Við 1. viðgerð kundi løgtingsformaðurin beina uppskot í nevnd, sum ikki

vóru nóg væl fyrireikaði, men við 2. og 3. viðgerð kundi hann einans geva tilmæli til Løgtingið um at beina eitt uppskot í nevnd ella at burturvísa tað. Tann týdningarmiklasta broytingin var, at løgtingsnevndirnar, ið frammanundan høvdu avmarkað heimildir Landsstýrisins á fyrisitingarliga økinum, ikki longur skuldu hava nakað fyrisitingarligt vald, men tær høvdu einans rætt til at viðgera lógaruppskot, sum vórðu beind í nevnd av formansskapi ella løgtingsmeiriluta.

Tað beinleiðis eftirlit, sum Løgtingið harvið misti við fyrisiting Landsstýrisins, varð styrkt á annan hátt. Tingskipanin ásetti sum nakað nýtt, at tingformaðurin regluliga skuldi hava munnligar fyrispurningar frá tingmonnum til landsstýrismenn og løgmann á skránni. Spurningar frá løgtingsmonnum skuldu vera viðkomandi landsstýrismanni ella løgmanni í hendi tríggjar dagar frammanundan, at svarast skuldi. Tingformaðurin kundi eisini loyva ófráboðaðum fyrispurningum í tingsalinum. Harumframt kundu tingmenn seta skrivligar fyrispurningar til landsstýrismenn ella løgmann, um teir ynsktu eitt meira nágreiniligt svar uppá ein eitt sindur meira fløktan spurning. Tingið kundi áleggja landsstýrismanni ella løgmanni at svara.

Løgtingsarbeiðið, sum líka síðan endurreisn Løgtingsins í 1852 hevði verið eitt hjáarbeiði, sum tey fólkavaldu høvdu við síðuna av høvuðsstarvinum, varð við nýggju stýrisskipanini gjørt til eitt høvuðsstarv. Broytingarnar í lønar- og eftirlønarviðurskiftum tingmanna, sum vórðu framdar í 1998, høvdu sum høvuðsendamál at gera tað fíggjarliga møguligt hjá tingmonnum at liva upp til hesi krøv.

Í gomlu stýrisskipanarlógini var tað Løgtingið, sum setti Landsstýrið í starv, meðan tað ikki var møguligt at loysa tað úr starvi aftur, uttan so at nýval til Løgtingið varð útskrivað. Nýggja stýrisskipanarlógin gav Løgtinginum heimild til at loysa bæði løgmann og landsstýrismenn úr starvi – hvønn landsstýrismann/løgmann sær ella í felag – uttan at tað harvið noyddist at upploysa seg sjálvt og útskriva nýval til Løgtingið. Til tess at loysa ein landsstýrismann ella løgmann úr starvi kravdist, at ein meiriluti av allari tingmanningini atkvøddi fyri einum misáliti. Eitt løgtingsval hevði í sjálvum sær ikki longur við sær, at Landsstýrið legði frá sær. Broytingarnar vóru ætlaðar at styrkja um bæði møguleikan og viljan hjá Løgtinginum at hevda sín eftirlitsmyndugleika mótvegis Landsstýrinum, sum

nú hevði fulla fyrisitingarliga ábyrgd. Løgtingið skuldi ikki longur velja Landsstýrið, men tað skuldi hava lættari við at loysa tað úr starvi.

Týdningarmikið var eisini, at atkvøðureglurnar í Løgtinginum, sum líka síðan 1852 høvdu bygt á strangar ásetingar um kvalifiseraðan meiriluta, vóru broyttar í 1994. Síðan 1948 hevði Løgtingið ikki verið viðtøkuført, uttan so at meira enn helvtin av tingfólkunum var á fundi og atkvøddi *fyri*, men stýrisskipanarlógin frá 1994 staðfesti í grein 18, at „*Løgtingið ikki kundi taka avgerð um mál, uttan at meira enn helmingur av tingmonnum er á fundi. Løgtingsmál er samtykt, tá ið fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti*“. Hetta hevði við sær, at aftaná 1994 var tað møguligt hjá einum landsstýri bæði at verða sitandi og fáa uppskot samtykt í Løgtinginum, uttan at tað hevði meirilutan av teimum valdu løgtingsumboðunum *fyri* sínum uppskotum. Landsstýrið skuldi einans tryggja sær, at tað ikki fekk meirilutan av allari tingmanningini *ímóti* sær, tí so noyddist Landsstýrið at leggja frá sær. Løgtingið var viðtøkuført, tá 17 av 32 tingmonnum vóru á fundi, og lógaruppskot vóru samtykt, um 9 av teimum 17 atkvøðunum vóru fyri tí. Atkvøddu 9 av teimum 17 uppmøttu løgtingsumboðunum ímóti einum lógaruppskoti, so var *uppskotið* hinvegin felt, men fekk eitt týðandi landsstýrisuppskot 17 av teimum tilsamans 32 atkvøðunum ímóti sær, so var *Landsstýrið* felt og noyddist at leggja frá sær.

Tann parlamentariska meginreglan, sum formliga ikki var til staðar í gomlu stýrisskipanini, men sum byrjaði at vinna hevd í 1980-unum, varð at enda staðfest í stýrisskipanarlógini frá 1994. Harumframt vóru ásetingarnar um, nær tingið var viðtøkuført, gjørdar linari. Endamálið við hesi seinnu broytingini var helst at fáa andstøðuna í Løgtinginum at verða meira virkna, tí nú hevði Landsstýrið ella løgtingsmeirilutin ikki í útgangsstøði tryggjað seg mótvegis minnilutanum. Meðan tær gomlu atkvøðureglurnar høvdu styrkt um tær óvirknu kreftirnar í Løgtinginum, so styrktu hesar broytingarnar tær virknu kreftirnar í Løgtinginum. Úrslitið skuldi helst verið eitt meira virkið og atfinningarsamt Løgting, sum hevði neyvt eftirlit við Landsstýrinum.

Við stýrisskipanarlógini frá 1994 varð ein bygnaður settur á stovn í politisku og fyrisitingarligu skipanini í Føroyum, sum samsvaraði við tær skipanir, sum fólkaræðislig lond í granna-



Finn Normann Christensen gjørdi eitt uppskot til nýggjan bygnað av føroysku fyrisitingini. Her situr hann saman við fyrsta løgmansstjóranum, Marjuni Hanusardóttir.

lagnum hava. Eitt greitt valds- og ábyrgdarbýtið varð sett millum tann lóggevandi og tann útinnandi myndugleikan, og við tí styrkta løgmanninum, sum hevði somu heimildir sum ein veruligur forsætisráðharri, tá talan var um yvirtikin sermál, varð eftirlitið við tí útinnandi valdinum nógv styrkt.

**Bygnaðarbroytingar í fyrisitingarligu skipanini**

Tá farið varð burtur frá teirri kollegialu skipanini av Landsstýrinum, har Landsstýrið í felag hevði fyrisitingini av málsøkjum Landsstýrisins um hendi, sum Løgtingið hevði endaligu ábyrgdina av, til eina ráðharraskipan, har landsstýrismenninir hvør í sínum lagi høvdu fulla ábyrgd av sínum egna málsøki, varð fyri tað fyrsta neyðugt at broyta bygnaðin í sjálvari fyrisitingini, og í øðrum lagi varð neyðugt at styrkja um fyrisitingina hjá teimum einstøku landsstýrismonnunum.

Hetta varð gjørt í 1996. Landsstýrið hevði biðið ein danskan serfrøðing, Finn Normann Christensen, gera eitt uppskot til nýggjan bygnað av føroysku fyrisitingini, sum skuldi taka støði í stýrisskipanarlógini. Úrslitið varð ein bygnaður, har hvør landsstýrismaður fekk sítt egna aðalstýri, eina sjálvstøðuga fyrisiting, ið skuldi fyrisita tey málsøki, sum landsstýrismaðurin hevði ábyrgdina av. Sett vórðu á stovn *Undirvísingar- og mentamálastýrið (síðan 2001 Mentamálastýrið)*, *Vinnumálastýrið*, *Fiski-*

*málastýrið*, *Almanna- og heilsumálastýrið*, *Fíggjarmálastýrið*, og *Løgmansskrivstovan*, sum skuldu liggja undir teimum einstøku landsstýrismonnunum og løgmanni, tó soleiðis at løgmaður var omanfyri allar aðrar landsstýrismenn. Seinni varð *Oljumálastýrið* sett á stovn, og í 2002, tá *Løgmálaráð* varð sett á stovn, varð heitið á stýrunum í samsvar við ráðharraskipanina broytt til ráð. Eftir hesi skipan skuldu t.d. øll fíggjarmál Landsstýrisins verða fyrisitin av Fíggjarmálaráðnum, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina av. Teir flestu av teimum knappliga 100 landskassagrunnunum, sum frammanundan høvdu fyrisitið stórar partar av inntøkum landskassans, vórðu tí avtiknir. Í 1997 vóru einans 3 grunnar eftir.[485]

Hesin bygnaður, sum var ein fylgja av, at farið varð frá eini kollegialari skipan til eina ráðharraskipan, hevði við sær, at fleiri embætisfólk, stjórar og deildarstjórar skuldu setast í starv í føroysku miðfyrisitingini. Í 2001 arbeiddu 167 embætisfólk í teimum 6 aðalstýrunum, sum kostaðu góðar 54 milliónir krónur í lønum.[486] Harvið skuldi ein av teimum størstu trupulleikunum í 1980-unum, vantandi fyrisitingarligur bygnaður og arbeiðsmegi, verið loystur. Úrslitið skuldi helst verið, at bæði lógarsmíð og lógarfyrisiting vórðu styrkt munandi.

Síðani nýggja stýrisskipanarlógin og bygnaðarbroytingarnar fóru at virka, hevur einki løgtingsval verið í ótíð. Landsstýrissamgongan millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Verkamannafylkingina, sum slitnaði í 1996, tá Javnaðarflokkurin tók seg burtur úr samgonguni, varð umskipað tann 11. juni 1996 saman við Fólkaflokkinum, uttan at løgtingsval varð útskrivað. Eitt minnilutalandsstýri, sum er ein møguleiki í stýrisskipanarlógini, hava vit ikki sæð enn. Tað sjónligasta úrslitið av tí styrkta eftirlitinum við Landsstýrinum og teirri øktu fyrisitingarligu ábyrgdini hjá landsstýrismonnum, sum stýrisskipanarlógin hevði við sær, hevur verið, at ikki færri enn 10 landsstýrismenn hava lagt frá sær síðan 1994. Í einum føri var tað løgmaður, sum koyrdi landsstýrismannin úr starvi.

## Heimildir Løgtingsins – millum heimastýri og fullveldi

Hóast smávegis byrjunartrupulleikar, so var eftirlit Løgtingsins

og ábyrgd Landsstýrisins við bygnaðarbroytingunum og nýggju stýrisskipanarlógini í 1990-unum komið á hædd við tær statsrættarskipanir, sum vóru galdandi í øðrum framkomnum fólkaræðisligum londum. Løgtingið og løgmaður høvdu somu heimildir í stýrisskipanini, sum lóggávuvald og forsetar í framkomnum fólkaræðisligum londum høvdu staðfest í grundlógum teirra.

Spurningurin var, um Løgtingið, føroyska lóggávuvaldið, kundi sammetast við lóggávuting í øðrum fólkaræðisligum londum. Løgtingsins lóggávuvald var í fyrsta lagi avmarkað til bólkin av yvirtiknum málsøkjum á *lista A* í heimastýrislógini, og í øðrum lagi var spurningurin, um Løgtingið hevði veruligt lóggávuvald yvir hesum málsøkjum, tvs. eitt lóggávuvald, sum hevur somu rættarligu styrki, sum lóggávuting í fullveldisríkjum hava. Statsrættarkønir hava verið ósamdir um henda spurningin, líka síðani heimastýrislógin fór at virka. Spurningurin er, um heimastýrislógin í sjálvum sær og tann harí staðfesti lóggevandi myndugleiki Løgtingsins er at meta sum ein vanlig donsk *fólkatingslóg*, sum einvíst kann takast aftur av danska Fólkatinginum, ella um talan er um eina *avtalu* millum Føroyar og Danmark, sum ikki kann setast úr gildi uttan semju millum báðar partarnar. Hesin spurningurin skal takast upp til nærri viðgerð her, tí hann hevur týdning fyri rættarligu styrkina í lóggevandi heimildum Løgtingsins.

Heimastýrislógin varð samtykt av Løgtinginum 5. desember 1947 og kunngjørd sum lóg av amtmanninum 31. mars 1948. Í Danmark varð sama lóg samtykt av Ríkisdegnum, staðfest av kongi og kunngjørd sum lóg í Danmark tann 23. mars 1948. Føroyska kunngerðin og tann frammanundan kunngjørda danska útgávan av heimastýrislógini hava elvt til nakað av ósemju millum serfrøðingar um, hvat slag av skipan talan er um, tí ávísir munir eru millum samtyktirnar. Umframt tann veruleika, at føroyska løgtingssamtyktin av heimastýrislógini, ið varð kunngjørd sum lóg av amtmanninum 31. mars 1948, varð kunngjørd í tvíteksti á føroyskum og donskum, meðan danska útgávan einans varð kunngjørd á donskum, eru einstakir munir millum tann í Føroyum og í Danmark kunngjørda tekstin. T.d. verða Føroyar viðurkendar sum „*sjálvstýrandi tjóð*“ í tí í Føroyum kunngjørda tekstinum, meðan orðingin „*selvstyrende folkesamfund*“ verður nýtt í tekstinum, sum varð kunn-

gjørdur í Danmark. Statsrættarliga og fólkarættarliga er hugtakið „tjóð“ rættuliga neyvt allýst, meðan orðingin „folkesamfund“ var bæði ógreið og ókend innan stats- og fólkarættin í 1948. Hartil kemur, at danska útgávan av lógini ongantíð varð kunngjørd í Føroyum sambært ásetingunum frá 1896 „Om kundgørelser af love og bekendtgørelser på Færøerne“, meðan føroyski útgávan varð kunngjørd sambært ásetingunum í „Midlertidig Styrelsesordning“ frá 9. mai 1940. Hetta sæst t.d. av, at talmerkingin av teirri lógini, ið varð kunngjørd í Føroyum, var framhald av teirri talmerking, sum varð brúkt, tá lógir vórðu kunngjørdar sambært „Midlertidig Styrelsesordning“, meðan danska lógin fylgir eini aðrari talmerking. Formliga er tí ikki talan um eina men tvær lógir.

Hesi viðurskifti hava verið tulkað á tann hátt, at tað er tann føroyska útgávan av heimastýrislógini, sum er sett í gildi í Føroyum, meðan danska samtyktin ongantíð hevur fingið gildi í oyggjunum.[487] Grundgevingin er tann, at sambært „Kancelliplacatini“ frá 1813 varð staðfest, at eingin lóg fekk gildi í Føroyum, uttan so at hon varð tinglisin í øllum sýslunum í oyggjunum. Henda meginreglan varð í broyttum líki førd víðari í ásetingunum í „Om kundgørelse af love og anordninger på Færøerne“ frá 1896 (sí s. 72). Hereftir skuldu føroyskar lógir ikki tinglesast í øllum sýslunum í Føroyum hvør sær, men einans í almenna kunngerðarblaðnum „Færø Amtstidende“. Reglurnar frá 1896 vóru í gildi til 1989, tá „Færø Amtstidende“ (Dimmalætting) misti støðu sína sum alment kunngerðarblað[488]. Tað, sum hevur týdning í hesum sambandi, er, at í tíðarskeiðinum frá 9. mai 1940 til 1. apríl 1948 kundu lógir harumframt setast í gildi í Føroyum sambært ásetingunum í „Midlertidig Styrelsesordning“. Danska útgávan av heimastýrislógini varð ongantíð kunngjørd í „Færø Amtstidende“, hvørki sambært ásetingunum í „Midlertidig Styrelsesordning“ ella sambært reglunum í „Om kundgørelser af love og anordninger på Færøerne“.Ført hevur tí verið fram, at tá heimastýrislógin varð sett í gildi í Føroyum sambært ásetingunum í „Midlertidig Styrelsesordning“, meðan danska staðfestingin als ikki er kunngjørd í Føroyum, so er tað tann føroyska útgávan av lógini, sum hevur gildi í Føroyum, meðan danska útgávan ikki hevur gildi í Føroyum.

Verður hartil tikið útgangsstøði í, at Løgtingið saman við

amtmanninum hevði alt lóggávuvaldið í Føroyum um hendi sambært „Midlertidig Styrelsesordning“, so ber neyvan til at siga, at talan einans var um eina vanliga danska ríkislóg, sum varð sett í gildi í Føroyum, tí lógin varð sett í gildi av Løgtinginum *og* amtmanninum í felag, meðan danska ríkisdagslógin ongantíð fekk gildi í Føroyum. Henda tulkingin byggir á ta fatan, at „Midlertidig Styrelsesordning“ vann sær hevd óheft av grundlógarinnar grein 25 eftir kríggið, og tann lóggáva, sum varð samtykt við støði í henni, var tí óheft av lóggávumyndugleika Ríkisdagsins (sí s. 235). Tað hevur eisini verið ført fram, at heimastýrislógin skilir seg frá vanligum ríkislógum á tann hátt, at hon byrjar við einum inngangi, sum leggur upp til, at lógin ikki byggir á einvísa samtykt í Ríkisdegnum, men eisini *„i Overensstemmelse med Vedtagelse i Færøernes Lagting“*. Harvið kemur lógin mest av øllum at minna um eina *avtalu* millum tveir sjálvstøðugar partar, og ikki um eina *heimild*, sum annar parturin (Føroya Løgting) fær frá hinum partinum (danska Ríkisdegnum). Sambært hesi fatan er tann í Føroyum kunngjørda lógin føroyski parturin av avtaluni, sum er samtykt av Løgtinginum og staðfest av amtmanninum, og hon kann tí heldur ikki takast aftur av nøkrum øðrum stovni enn Løgtinginum. Tann av Ríkisdegnum samtykta og av kongi kunngjørda lógin er danski parturin av avtaluni, og hon kann einans avtakast av Ríkisdegnum. Sambært hesi tulking handaðu Løgtingið *og* amtmaðurin, sum í felag høvdu alt lóggávuvaldið í Føroyum frá 1940 til 1948, lóggávuvaldið til Løgting *og* løgmann í 1948. Løgmaður fekk í 1948 tann sýtingarrætt mótvegis Løgtinginum, sum amtmaðurin hevði havt frammanundan. Sostatt var lóggávuvaldið endaliga handað Løgtingi og løgmanni í 1948. Málsøkini á *lista B* eru tí at rokna sum málsøki, sum Løgtingið heimilaði donsku ríkismyndugleikunum at fyrisita vegna Føroya fólk. Hesi málsøki kunnu tí takast aftur av føroyingum, um føroyingar ynskja tað. Samsvarandi hesi fatan hevur eingin myndugleiki rætt til at nokta føroyingum til einvíst at avtaka heimastýrislógina og taka ræði á øllum viðurskiftum í Føroyum.

Statsrættarkønir eru kortini ikki samdir um henda spurningin. Summir meina, at statsrættarliga og løgfrøðiliga sæð er heimastýrislógin ikki annað enn ein vanlig donsk fólkatingslóg, sum Fólkatingið einvíst hevur heimild at broyta ella avtaka.

Hesa tulkingina slóðaði danski serfrøðingurin í statsrætti Alf Ross fyri, longu tá lógin varð sett í gildi í 1948. Alf Ross, sum stóð fyri tí løgfrøðiliga forarbeiðinum viðvíkjandi heimastýrislógini, hevði ta fatan, at við heimastýrislógini fingu føroyingar „*et kommunalt selvstyre af usædvanlig vidtgående omfang*“.[489] Alf Ross metti ikki, at nakar grundleggjandi munur var á tí sjálvstýri, sum ein donsk kommuna hevði, og tí sjálvstýri, sum føroyingar fingu við heimastýrislógini, hóast stórur munur var á, hvussu nógv sjálvræði føroyska heimastýrið og ein donsk kommuna høvdu fingið í lut at fyrisita. Í báðum førum var talan um, at lokalir myndugleikar fingu heimild til at fyrisita nøkur lokal viðurskifti vegna ríkismyndugleikarnar, sum høvdu tann endaliga lóggevandi ræðisrættin yvir nevndu málsøkjum.

Aðrir serfrøðingar á økinum halda uppá, at heimastýrislógin við siðvenju hevur vunnið sær hevd sum ein *fólkarættarlig avtala* millum Danmark og Føroyar, sum í ein ávísan mun er vorðin leys av donskum statsrætti og lóggávuvaldi. Tann danski statsrættarkøni Poul Meyer slóðaði fyri eini tílíkari tulking av heimastýrislógini longu í 1947, tvs. áðrenn lógin varð sett í gildi,[490] og tann føroyski landsrættarsakførarin og sjálvstýrismaðurin Edward Mitens royndi at føra prógv fyri líknandi sjónarmiðum í 1950.[491] Mitens royndi at føra prógv fyri teirri fatan, at lóggávuvald Løgtingsins mátti vera av sama slag sum lóggávuvald Ríkisdagsins, tá Løgtingið við løgtingslóg hevði heimild til at krevja skatt inn í Føroyum, tí skattur kundi sambært grundlógini einans krevjast inn við lóg. Í nýggjari tíð hava aðrir serfrøðingar roynt at føra prógv fyri líknandi sjónarmiðum. T.d. hevur Frederik Harhoff í doktararitgerð síni frá 1993 grundgivið fyri, at heimastýrið á fleiri økjum hevur gjørt avtalur við ríkismyndugleikarnar, sum benda á, „*at forestillingen om Rigets enhed ikke længere kan forsvares … Riget (må) karakteriseres som et fællesskab mellem flere dele*“.[492] Sambært hesum serfrøðingum byggir heimastýrislógin ikki einans á eina vanliga danska ríkislóg, men harumframt á ta serstøðu, sum oyggjarnar til allar tíðir hava havt í danska ríkinum.

Sostatt finnast tvey mótstríðandi svar uppá spurningin um, hvat slag av stýrisskipan heimastýrislógin er. Spurningurin er, hvør veruligi munurin er millum hesar báðar tulkingarmøguleikarnar. Áðurnevndi Alf Ross segði upp undir føroysku fólkaatkvøðuna í 1946, at eingin veruligur munur var á bind-

andi og vegleiðandi fólkaatkvøðum, tí meðan tann fyrra var *løgfrøðiliga* bindandi, so var tann seinna *politiskt og moralskt* bindandi.[493] Sama sjónarmið hevði Alf Ross í 1947 viðvíkjandi heimastýrislógini, sum hann løgfrøðiliga metti at vera eina vanliga danska ríkislóg, ið einvíst *kundi* takast aftur av ríkismyndugleikunum, men politiskt og moralskt metti hann heimastýrislógina at vera eina avtalu millum Føroyar og Danmark, sum ikki *átti* at vera broytt uttan í semju millum partarnar.[494] Danska stjórnin tulkar framvegis heimastýrisskipanina soleiðis, men teir flestu óheftu serfrøðingarnir hava í dag slept sjónarmiðunum hjá Alf Ross. Donsku ríkismyndugleikarnir halda helst fast við fatanina hjá Alf Ross, tí henda tulkingin ger tað møguligt at fata skipanina sum verandi í samsvar við eindarstatshugsanina í grundlógini, sum ger tað lættari hjá donskum myndugleikum at forða fyri, at altjóða samfelagið viðurkennir, at Føroyar loysa frá Danmarkar Ríki, meðan hin tulkingarmøguleikin setur heimastýrisskipanina inn í eitt størri altjóða- og fólkarættarligt høpi, sum ger tað torførari hjá ríkismyndugleikunum at forða fyri, at Føroyar verða viðurkendar sum sjálvstøðugt ríki.

Helst er her talan um eitt ástøðiligt og løgfrøðiligt kjak, sum ikki reingir tann veruleika, at í verki er heimastýrislógin á fleiri økjum at meta sum ein avtala millum Føroyar og Danmark, sum bindir donsku ríkismyndugleikarnar eins nógv, sum hon bindir føroyskar myndugleikar. Hóast ásetingarnar í grundlógini um einkarætt Ríkisdagsins at lóggeva í danska grundlógarøkinum, so leggur heimastýrislógin lóggávuvaldið í serstøkum føroyskum viðurskiftum til Løgtingið. Líka mikið hvat stendur í grundlógini, so er Danmark ikki longur ein eindarstatur í vanligari merking. Bæði Føroyar og Grønland, sum gjørdist ein partur av danska grundlógarøkinum í 1953 og fekk eina heimastýrislóg eftir føroyskum leisti í 1979, hava eina serstøðu í danska ríkinum. Fólkatingið kann ikki ógilda føroyskar løgtingslógir, – ella grønlendskar landstingslógir – sum viðvíkja lóggávu av sermálum, ið eru yvirtikin sambært grein 2 í heimastýrislógini, uttan so at heimastýrislógin verður avtikin, øll sum hon er, og tað kann neyvan gerast við einvísari fólkatingssamtykt.[495] Hinvegin kann Fólkatingið einvíst avtaka løgtingslógir, ið viðvíkja felagsmálum, sum eru yvirtikin sambært grein 9, hóast hetta neyvan hevði verið lætt, men tað er

júst her, at grein 2 yvirtøkurnar skilja seg frá grein 9 yvirtøkunum. Heimastýrislógin kann illa skiljast á annan hátt, enn at Fólkatingið hevur frásagt sær rættin til at lóggeva í serstøkum føroyskum viðurskiftum, ið sostatt endaliga eru flutt til Løgtingið sambært grein 2, meðan grundlógin framvegis er galdandi á øðrum økjum í Føroyum. Hesin spurningurin hevur nærum ongan praktiskan týdning fyri arbeiðið í Løgtinginum, men hann hevur ein ávísan týdning, tá talan er um, hvar evsta vald í Føroyum liggur.

Í aðrar mátar ber til at peika á, at søguliga er tað ein løgin próvførsla, tá sagt verður, at serstøða Føroya í Danmarkar ríki er grundað á ta sannroynd, at Fólkatingið hevur givið føroyingum heimastýrislógina, tí Føroyar høvdu eisini eina løgfrøðiliga og fyrisitingarliga serstøðu í Danmarkar Ríki undan heimastýrisskipanini. Í veruleikanum hava Føroyar altíð havt eina løgfrøðiliga og fyrisitingarliga serstøðu í fyrst tí norska og seinni tí danska ríkinum. Upprunaliga vóru Føroyar eitt sjálvstøðugt løgdømi við einum lóggevandi og dømandi tingi, sum harumframt hevði sjálvstøðuga lógbók. Í 13. øld, tá Føroyar komu undir norskt vald, varðveittu oyggjarnar Løgtingið, sjálvt um tann sjálvstøðuga lógbókin varð skift út við ta norsku landslógina frá 1274. Tað sæst eisini, at føroyska løgdømi ongantíð gjørdist ein samanrunnin partur av norska ríkinum, tí í fyrsta lagi var føroyska Løgtingið ikki nevnt í landslógini eins og hini norsku tingini, og í øðrum lagi vóru løgskipanir ofta settar í gildi serstakt fyri Føroyar – t.d. Seyðabrævið frá 1298. Tá Føroyar í 1380 gjørdist partur av danska-norska ríkinum og seinni, í 1604, 1643 og 1688, partvíst komu undir danskar løgskipanir, varð Føroya løgting heldur ikki nevnt, og danskar lógir vóru heldur ikki settar í gildi í Føroyum á sama hátt sum í Danmark. Tá einaveldið varð sett á stovn í danska-norska ríkinum í 1661, varð lóggávuvaldið so líðandi miðsavnað hjá danska konginum, men so seint sum í byrjanini av 1800-talinum eru tekin um, at løgtingssamtyktir framvegis høvdu *„en art af lovkraft“*.[496] Í 1813 vóru serstakar tinglesingarreglur gjørdar fyri Føroyar, og lokali myndugleikin, sum í tí løgtingsleysa tíðarskeiðinum frá 1816 til 1852 var amtmaðurin, skuldi ummæla lógirnar, áðrenn tær vóru settar í gildi í oyggjunum. Harvið vóru Føroyar, sum ongantíð høvdu verið ein fullkomuliga samanrunnin partur av danska lóggávu-

økinum, beinleiðis skilmarkaðar sum eitt serstakt lóggávuøki í Danmarkar Ríki. Lóggávan í oyggjunum, sum ongantíð hevði verið samlík við ta donsku, gjørdist sum frá leið grundleggjandi øðrvísi enn í restini av ríkinum. Hesar serstøku ígildiskomureglur viðvíkjandi ríkislógum í Føroyum vórðu heldur ikki broyttar í 1850, tá oyggjarnar beinleiðis vórðu limaðar inn í danska grundlógarøkið, og harvið komu undir lóggávuvald Ríkisdagsins. Í 1855 gjørdist tað meginreglan, at ríkislógir, sum lokali myndugleikin ikki metti vera egnaðar til at seta í gildi í Føroyum, fingu frámerkið „*denne lov gælder ikki for Færøerne*“. Ríkislógir skuldu framvegis ikki koma í gildi í Føroyum, fyrr enn lokali myndugleikin hevði havt høvi til at siga sína hugsan um tær, og tær skuldu framvegis tinglesast og setast í gildi serstakt fyri Føroyar. Skipanin varð harumframt gjørd meira fólkaræðislig í 1852, tá tann lokali myndugleikin, sum síðan 1816 hevði verið amtmaðurin, fekk eitt fólkavalt Løgting at ráðføra seg við. Ásetingarnar í „Kancelliplacatini“ frá 1813, sum greitt skilmarkaðu føroyska lóggávuøki frá tí danska, vóru í gildi til 1989, men í 1940 fekk Løgtingið sjálvt lóggávuvald í serstøkum føroyskum viðurskiftum. Føroyska lóggávuøkið og lóggávuvald Løgtingsins vóru staðfest í heimastýrislógini frá 1948, men økið hevði ongantíð verið ein samansjóðaður partur av danska lóggávuøkinum.

Tað er tí nógv, sum bendir á, at tað er skeivt at halda uppá, at Føroyar hava eina serstøðu í danska ríkinum eina og aleina av teirri grund, at ein serstøk heimastýrislóg gevur føroyingum „*et kommunalt selvstyre af usædvanlig vidtgående omfang*“, sum Alf Ross tók til. Rættari er helst at siga, at Føroyar hava eina heimastýrislóg, tí oyggjarnar altíð hava havt eina løgfrøðiliga og fyrisitingarliga serstøðu í danska ríkinum. Tað er ikki heimastýrislógin, ið gevur føroyska Løgtinginum eina serstøðu í danska ríkinum, men við siðvenju hevur Løgtingið altíð havt eina serstøðu í danska ríkinum. Er hetta rætt, so er tað ikki einans heimastýrislógin og danskur statsrættur, ið er galdandi í Føroyum, men fólkarætturin og siðvenjan, sum heimastýrislógin er grundað á. Í so fall er tað óhugsandi, at heimastýrislógin einvíst kann verða sett úr gildi av danska Ríkisdegnum, tí lógin grundar seg ikki einans á eina heimild frá danska Ríkisdegnum, men hon er í nógv størri mun grundað

á eina siðvenju, sum til allar tíðir hevur skilmarkað føroyska lóggávuøkið frá tí danska.

Trupulleikin er, at meðan fleiri og fleiri statsrættarkønir halda uppá, at heimastýrislógin er at meta sum ein fólkarættarlig avtala millum Danmark og Føroyar, sum ikki kann broytast uttan semju millum báðar partar, so hevur skipanin ikki vunnið eina tílíka viðurkenning frá donsku ríkismyndugleikunum, sum so seint sum í 1997 hava staðfest, at teir framvegis halda fast við tulkingina hjá Alf Ross.[497] Tílíkar mótstríðandi tulkingar av somu løgskipanini hava havt við sær, at tað ongantíð heilt greitt er staðfest, hvørjar heimildir og hvørja ábyrgd ávíkavist ríkismyndugleikarnir og heimastýrismyndugleikarnir hava í Føroyum. Risastóra uttanlandaskuld føroyinga í 1980-unum vísti t.d., at útlendskir lánveitarar loyvdu føroyingum at taka lán uppá lánførið hjá danska búskapinum. Hartil kom, at spurningurin um hvørt Fíggjareftirlitið tók sær av serstøkum føroyskum ella yvirskipaðum ríkisáhugamálum í 1990-unum, tá danski fíggjarheimurin og føroyska bankakervið vóru í kreppu, varð nógv viðgjørdur í Føroyum í 90-unum. At tílíkir spurningar í heila tikið vórðu reistir í Føroyum, var viðvirkandi til, at ríkisrættarligu viðurskifti Føroya gjørdust høvuðstrupulleikin í føroyskum politikki, tá tær ringastu avleiðingarnar av kreppuna í fyrru helvt av 1990-unum vóru farnar afturum.

Við stýrisskipanarlógini og bygnaðarbroytingunum var

15. september 1994 skipaðu Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Verkamannafylkingin nýggja samgongu. Frá vinstru eru landsstýrismenninir Ivan Johannesen, Óli Jacobsen, Jóannes Eidesgaard, Edmund Joensen, løgmaður, Andreas Petersen, Sámal Petur í Grund og Eilif Samuelsen.



greiða fingin á ábyrgdarbýtinum í innanhýsis politisku skipanini í Føroyum, og fyrisitingarligi førleikin var nógv mentur, men spurningurin var, um ríkisrættarligu viðurskiftini millum Danmark og Føroyar ikki eisini vóru búgvin til at taka upp til nýggja viðgerð.

## Móti fullveldi – heimastýrisskipanin í kreppu

Tann fyrsti bakslátturin frá føroysku veljarunum uppá kreppu-tiltøkini hjá donsku ríkismyndugleikunum í byrjanini av 1990-unum bendi ikki á, at neyðugt var at taka ríkisrættarligu viðurskifti Føroya í Danmarkar ríki upp til nýggja viðgerð. Tvørturímóti vísti løgtingsvalið tann 7. juli 1994, at føroyski veljarin legði høvuðsábyrgdina fyri kreppuna á føroysku politikararnar. Fleiri nýggir flokkar, sum beinleiðis høvdu sum endamál at gera upp við gomlu politisku flokkarnar, stillaðu upp til valið, men tað var einans *Verkamannafylkingin*, sum fekk nóg nógvar atkvøður til at koma inn á ting. Verkamannafylkingin fekk 3 løgtingsumboð, meðan eitt nú Javnaðarflokkurin, sum frammanundan hevði havt 10 løgtingsumboð, einans fekk 5. Valið gjørdist ein stórur ósigur fyri alla ta rótfestu politisku skipanina við einum undantaki; sambandsflokkurin gjørdist stóri sigursharrin á valinum og fekk 8 løgtingsumboð. Boðskapurin var greiður; føroyski veljarin hevði ikki álit á teimum gomlu føroysku politikarunum, men ynskti tvørturímóti at knýta Føroyar tættari at danska ríkinum.

Landsstýrissamgonga varð 15. september 1994 skipað millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Verkamannafylkingina. Edmund Joensen úr Sambandsflokkinum gjørdist fyrsti løgmaðurin, sum skuldi virka undir nýggju stýrisskipanarlógini, sum skuldi koma í gildi á ólavsøku 1995.

Í november 1994 fór Edmund Joensen, løgmaður, til Danmarkar at samráðast við donsku stjórnina um bankabjargingarnar. Nakrar fáar mánaðir frammanundan, í august 1994, hevði Gørtz-nevndin staðfest, at „*Set ud fra en* ***rimeligheds-betragtning*** *må resultatet af bankkrisen anses for utilfredsstillende*". Hóast nevndin ikki staðfesti nakra politiska ella rættarliga ábyrgd, so metti hon, at tann fløkti ábyrgdarspurningurin talaði fyri „*at også den danske stat bidrager til den endelige finansiering af tabet ved bankrekonstruktionerne*".[498] Hesa búskap-

arligu frágreiðingina hevði Edmund Joensen, løgmaður, m.a. at halda seg til í november 1994, tá hann yvirfyri ríkismyndugleikunum setti krav fram um, at ríkiskassin átti at bera tær umleið 3 milliardir krónurnar, sum hann metti, at bankabjargingarnar høvdu kostað landskassanum. Høvuðsgrundgevingin var kortini tann, at bankaviðurskifti vóru ríkismál sambært heimastýrislógini.

Kravið var stórt og í veruleikanum eisini órímuligt, men við støði í Gørtz-frágreiðingini var tað ikki heilt av leið av løgmanni at bera fram ynski um, at ríkiskassin hefti fyri einum parti av teirri upphædd, sum bankabjargingarnar høvdu kostað landskassanum. Danskir myndugleikar vóru kortini ikki samdir við løgmanni ella Gørtz-nevndini í, at føroyingar í heila tikið høvdu krav uppá at fáa nakað endurgjald úr ríkiskassanum. Tvørturímóti helt stjórnin fast um, at ríkiskassin ikki átti at gjalda nakað fyri bankabjargingarnar, sum hon metti vóru neyðugar fylgjur av eini búskaparligari kreppu, sum føroyingar sjálvir høvdu skapt. Stjórnin tulkaði heldur ikki heimastýrislógina á sama hátt sum sambandsløgmaðurin.

Tá Edmund Joensen, løgmaður, kom aftur úr Danmark, hevði hann ikki fingið eftirgivið eina krónu av skuld landskassans til ríkiskassan, men hann hevði, sum eitt tekin uppá tað, sum lá fyri framman, fingið eitt lán úr ríkiskassanum uppá 100 milliónir krónur. Bankarnir fingu ikki meira pening úr landskassanum aftaná 1994, tá tað so smátt byrjaði at ganga framá aftur í føroyska búskapinum, men lántøka landskassans úr ríkiskassanum vaks við 1,8 milliard krónum, meðan Edmund Joensen var løgmaður.[499] Í 1997, tá føroyska búskaparkreppan stórt sæð var av, var skuld landskassans til ríkiskassan knappar 6 milliardir krónur. Tá var øll tann eftirverandi privata skuldin broytt til almenna landskassaskuld.

Hóast føroyski búskapurin stórt sæð kom fyri seg aftur í løgmanstíðini hjá Edmundi Joensen, so var tann kaldliga móttøkan, sum løgmaður fekk í Danmark í 1994, helst ein av grundunum til, at føroyski almenningurin so smátt byrjaði at skifta støðu til ríkisfelagsskapin seinni í 1990-unum. Tann stóra skuldin, sum partvíst orsakað av bankabjargingunum var endað í landskassanum, legði stórt trýst á viðurskiftini millum Danmark og Føroyar. Einmælta krav Løgtingsins frá 19. januar 1995 um at fáa eina dómarakanning framda av partabræva-



Landsstýrið, sum Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin skipaðu í 1998, fekk skjótt navnið Fullveldislandsstýrið. Frá vinstru landsstýrismenninir Eyðun Elttør, Høgni Hoydal og Finnbogi Arge, Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, Anfinn Kallsberg, løgmaður, Rúni Joensen, løgmansritari, og landsstýrismenninir Signar á Brúnni, Karsten Hansen og Helena Dam á Neystabø. John Petersen landsstýrismaður vantar á myndini.

býtinum var eitt greitt tekin um, at viðurskiftini millum londini vóru versnað nógv síðan 1992. Bankabjargingarnar og endurreisingin av føroyska búskapinum í 1950-unum, sum eisini elvdi til, at ein kanning varð gjørd, ið partvíst legði ábyrgdina fyri kreppuni á leiðsluna í Sjóvinnubankanum, var hóast alt farin fram í einum so mikið góðum samstarvi millum danskar og føroyskar myndugleikar,[500] at heimastýrisskipanin tigandi varð góðkend av teirri politisku skipanina. Bankabjargingarnar og krepputiltøkini hjá ríkismyndugleikunum í 1990-unum, sum ofta vórðu trýst omanyvir føroyskar myndugleikar við so mikið strongum treytum, at nógvir føroyingar mettu tær at vera beinleiðis eyðmýkjandi, høvdu hinvegin skapt eitt grundleggjandi misálit á sjálvan ríkisfelagsskapin í Føroyum. Hetta gjørdist týðuligt til løgtingsvalið tann 30. apríl 1998, tá høvuðsspurningurin gjørdist viðurskiftini millum Danmark og Føroyar.

Allir teir stóru flokkarnir vóru sinnaðir at fremja broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar, hóast allir ikki vóru líka víðgongdir. Sambandsflokkurin ynskti helst at varðveita heimastýrislógina, men tosaði kortini um møguligar „*dagføringar*“ av henni. Javnaðarflokkurin tosaði um eina „*sjálvstýrislóg*“, sum skuldi geva Føroyum fult sjálvstýri innan-

fyri ríkisfelagsskapin. Tjóðveldisflokkurin var farin til val við eini ætlan um at fremja føroyska fólkaviljan, soleiðis sum hann hevði givið seg til kennar longu í 1946. Flokkurin tosaði um at fremja eina „*skipaða loysing*“. Sjálvstýrisflokkurin miðaði ímóti at skapa ein burðardyggan føroyskan búskap, sum skuldi verða støði undir einum fullkomnum føroyskum sjálvstýri. Fólkaflokkurin fór til val við eini ætlan, sum líktist donsk-íslendsku sambandslógini frá 1918, sum skuldi geva Føroyum fullveldi, samstundis sum ein millumtjóða sáttmáli varð gjørdur millum Føroyar og Danmark.

Tann stóri vinnarin á valinum gjørdist Tjóðveldisflokkurin, sum fyri fyrstu ferð síðan stovnanina í 1948 varð størsti flokkur á tingi. Flokkurin, sum frammanundan hevði 4 løgtingsumboð, tvífaldaði sína løgtingsumboðan upp í 8. Sjónvarpstíðindamaðurin Høgni Hoydal, sum í 1997 hevði gjørt nakrar atfinningarsamar sjónvarpssendingar um leiklutin hjá donskum myndugleikum og Den Danske Bank í kreppuárunum, ið grundaðu seg á skjalatilfar, sum sjónvarpið hevði fingið hendur á úr Danmark, varð fyrst valdur inn á ting við størsta atkvøðutali nakrantíð til eitt løgtingsval. Saman við Sjálvstýrisflokkinum og Fólkaflokkinum, sum fingu ávíkavist 2 og 8 løgtingsumboð, hevði Tjóðveldisflokkurin greiðan meiriluta av




Hvítabók var grundarlagið undir fullveldisætlanum Landsstýrisins.

teimum 32 løgtingsumboðunum. Meirilutin av føroysku veljarafjøldini hevði mist álitið á ríkisfelagsskapin og ynskti at fremja grundleggjandi broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar.

Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum allir vóru farnir til val uppá ætlanir um at seta kósina fram móti fullveldi, samdust um at skipa eina fullveldissamgongu 15. mai 1998. Eftir uppskoti frá samgonguni valdi løgtingsformaðurin fólkafloksmannin Anfinn Kallsberg til løgmann. Høgni Hoydal varð settur sum landsstýrismaður í sjálvstýrismálum og skuldi hava høvuðsábyrgdina av fullveldismálinum. Sámráðingar skuldu takast upp við donsku stjórnina um treytirnar fyri eini tilíkari ætlan, og miðað varð ímóti, at ein millumtjóða sáttmáli varð gjørdur millum Føroyar og Danmark, sum staðfesti, at danir í eini skiftistíð uppá 15 til 20 ár eftir sjálva fullveldistøkuna skuldu røkja nakrar fyrisitingarliga og fíggjarliga tungar uppgávur Føroya vegna. Tað skuldi eisini verða staðfest í sáttmálanum, at heildarveitingin, sum var góðar 900 milliónir krónur til støddar, skuldi minkast burtur eftir umleið 15 árum. Setast skuldi á stovn ein *Búskapargrunnur*, har m.a. heildarveitingin skuldi leggjast í, hvørs endamál var at tryggja eina javna skiftistíð. Harumframt skuldi ein grundlógarnevnd setast í Føroyum, sum skuldi gera uppskot til eina føroyska grundlóg. Miðast skuldi ímóti, at seinast í 2000 skuldi ein fólkaatkvøða verða í Føroyum um sáttmálan við Danmark, og ein fólkaatkvøða skuldi síðani verða um sjálva grundlógina og fullveldistøkuna, sum skuldi staðfesta, at Løgtingið hevði evsta vald í Føroyum.

Ein arbeiðsbólkur varð settur, sum skuldi kanna búskaparlig, politisk og løgfrøðilig viðurskifti viðvíkjandi einum sjálvstøðugum Føroyum, og ein nevnd varð sett at fyrireika eina føroyska grundlóg. Grundlógararbeiðið varð nakað seinkað, men arbeiðsbólkurin gav í 1999 út *Hvítabók*, eitt verk í trimum bindum,[501] sum viðgjørdi møguleikar at ganga móti einum sjálvstøðugum Føroyum. Hvítabók nevndi 4 møguleikar at ganga, sum ikki allir miðaðu móti fullveldi, men útgangsstøðið hjá Landsstýrinum var tann dansk-íslendska sambandslógin frá 1918, sum gav íslendingum fullveldi, samstundis sum ein fólkarættarligur sáttmáli varð gjørdur landanna millum. Hesin sáttmáli staðfesti, at danir í eini skiftistíð skuldu fyrisita



Meðan løgtingshúsið varð umbygt, helt tingmanningin til í Útvarpshøllini.

uttanríkismál, verjumál, hægstarætt og gjaldoyrað fyri íslendingar, og bæði londini skuldu harumframt hava felags kongahús. Búskaparlig viðurskifti millum londini í skiftistíðini vórðu eisini nevnd í sáttmálanum. Báðir partar kundu siga sáttmálan at fara úr gildi, tó kundi hann í fyrsta lagi sigast upp í 1943. Hvítabók metti ikki, at nakrar løgfrøðiligar ella fólkarættarligar forðingar vóru fyri fullveldisætlanum Landsstýrisins.

Landsstýrissamgongan fekk ikki undirtøku fyri fullveldisætlanini frá teimum báðum stóru andstøðuflokkunum í Løgtinginum, Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, men tann lítli kristiligi *Miðflokkurin*, sum fyrstu ferð var komin inn á ting í 1994, stuðlaði ætlanini hjá Landsstýrinum, hóast flokkurin ikki fór at taka støðu í málinum, fyrr enn eitt samráðingarúrslit fyrilá. Saman við tí eina umboðnum hjá Miðflokkinum, hevði Landsstýrið greiðan, men sæð í mun til uppgávuna ikki stóran, meiriluta í Løgtinginum fyri fullveldisætlanini – 19 av 32 løgtingsumboðum.

Í størri samanhangi var tað tann góða byrjanin, sum tað nýggja Landsstýrið fekk í samskiftinum við donsku stjórnina, sum var avgerandi fyri tað stóra bjartskygnið, sum Landsstýrið kortini legði fyri føroyingar viðvíkjandi teimum komandi samráðingunum um fullveldi. Longu 10. juni 1998 eydnaðist tað at fáa avtalu við stjórnina um, at búskaparligu bindingarnar, sum stjórnin hevði lagt á Landsstýrið í kreppuárunum, skuldu avtakast. Harumframt góðtók stjórnin, sum ein avleiðing av niðurstøðunum í serfrøðingakanningini um partabrævabýtið,

sum var almannakunngjørd 5. januar 1998, at skarva 900 milliónir krónur av skuld landskassans til ríkiskassan. Saman við rentufyrimuninum og teimum 500 milliónunum í rentufríum ríkisláni, sum møguliga skulu gjaldast aftur um 20 ár, hevði avtalan eitt virði fyri Landsstýrið uppá umleið 1,5 milliard krónur. Við støði í avtaluni frá 1998, sum eisini staðfesti, at danska stjórnin skuldi virka við til at menna ein sjálvberandi føroyskan búskap, metti landsstýrissamgongan ikki, at tað fór at vera trupult at sannføra ríkismyndugleikarnar um, at Føroyar áttu at fáa fullveldi. Harumframt fór hetta at spara ríkiskassanum fyri milliardaupphæddir í framtíðini.

Tá samráðingarnar um sjálva fullveldisgongdina byrjaðu 17. mars 2000, gjørdist tað kortini greitt, at landsstýrissamgongan hevði feilmett støðuna hjá donsku stjórnini til eitt føroyskt fullveldi. Í fyrsta umfari vildi stjórnin als ikki samráðast um eina skipan, sum lá uttanfyri grundlógarmarkið, men tá Landsstýrið helt fast um hesa fortreytina, gjørdist høvuðsspurningurin ríkisveitingin, sum danskir myndugleikar søgdu fór at fella burtur eftir 4 árum, um fullveldi var endamálið við samráðingunum. Í aðrar mátar viðurkendi danska stjórnin, at Føroya fólk sjálvt skuldi avgera, um tað skuldi hava eina framtíð innanfyri ella uttanfyri danska ríkið, men veljarakanningar í Føroyum vístu, at meiriluti fór ikki at fáast fyri eini fullveldisætlan við eini búskaparligari skiftistíð uppá 4 ár. Eftir at 4 drúgvir men úrslitaleysir samráðingarfundir høvdu verið millum Landsstýrið og donsku stjórnina, sleit Landsstýrið samráðingarnar 26. oktober 2000. Danska stjórnin, sum hevði gjørt eina fyri Føroyar búskaparliga góða avtalu í 1998, var ikki sinnað til eisini at hjálpa føroyingum til at taka fullveldi, soleiðis sum landsstýrissamgongan hevði hildið uppá, áðrenn samráðingarnar byrjaðu.

Landsstýrissamgongan, sum fór til Danmarkar fyri at sannføra ríkismyndugleikarnar um, at ríkiskassin fór at spara eina milliardaupphædd á hvørjum ári, um so varð, at Føroyar fingu fullveldi, hevði helst fullkomuliga feilmett tann týdning, sum tjóðskaparligu ósigrarnir hjá danska statinum í tíðini aftaná 1864 høvdu havt fyri danska statshugsan. Danmarkar Ríki hevði mist Noregi longu í 1814, Slesvig í 1864, Ísland í 1944, og tað var um at missa Føroyar í 1946. Fyri at forða fyri, at tað sama skuldi endurtaka seg viðvíkjandi Grønlandi, varð heimsins

størsta oyggj løgd undir donsku grundlógina í 1953. Grønlendingar fingu, sum ein avleiðing av at teir komu undir donsku grundlógina, somu rættindi og skyldur sum aðrir danskir statsborgarar, men ein sjálvstøðugur føroyskur statur, sum varð settur á stovn við støði í eini lagaligari avtalu millum føroyska Landsstýrið og ríkismyndugleikarnar í Keypmannahavn, fór við vissu at seta ferð á ta veiku grønlendsku sjálvstýrisrørsluna. Úr einum donskum sjónarhorni snúði føroyska fullveldisgongdin seg um statsrættarlig viðurskifti, sum vóru nógva ferð týdningarmiklari fyri danska ríkið, enn tann milliardin, sum ríkiskassin sendi til Føroyar á hvørjum ári; hesi viðurskifti vóru eisini týdningarmiklari enn sjálvt tað at varðveita Føroyar sum ein part av ríkinum, hesi viðurskifti snúði seg um sjálvan samanhangin í danska eindarríkinum. Áðrenn farið varð til Keypmannahavnar at samráðast í mars 2000, hevði Landsstýrið ikki gjørt nakra veruliga greining av yvirskipaðum donskum ríkisáhugamálum, sum vísti, hvussu eitt møguligt føroyskt fullveldi sá út av Kristiansborg. Hetta vísti seg at vera ein stórur feilur.

Hartil kom, at teir stórpolitisku trupulleikar, sum komu undan kavi í kjalarvørrinum av kalda krígnum í 1989, serstakliga snúðu seg um tjóðskaparligar minnilutar, ið royndu at ríva seg leysar frá heimsins statum. Limalondini í altjóða felagsskapinum *ST (Sameindar Tjóðir)*, sum eru statir við fullveldi, hava nærum øll størri ella minni trupulleikar av tjóðskaparligum minnilutum, sum teir hava innanfyri sítt øki. Í altjóða høpi fekk føroyska sjálvstýrisrørslan tí ikki stuðul frá ST í fullveldisstríðnum móti Danmark, soleiðis sum hon hevði roknað við, hóast føroyska fólkið sambært serfrøðingum í altjóða rætti líkur øll krøv til at verða viðurkend sum ein tjóð, ið sjálv hevur rætt til at avgera sína framtíð. Stórpolitisku viðurskiftini vóru broytt í tíðini aftaná 1989, tá kalda kríggið var av, men forðingarnar fyri einum sjálvstøðugum føroyskum stati vóru ikki horvnar av teirri grund, tær vóru einans broyttar. Heldur ikki hesum broyttu stórpolitisku viðurskiftunum hevði Landsstýrið gjørt nakra djúptøkna greining av undan 17. mars 2000, men tann 26. oktober var tað vorðið greitt fyri Landsstýrinum, at gongdin móti fullveldi fór at vera bæði torførari og einsligari enn frammanundan mett.

Ásannandi hesi viðurskifti legði Landstýrið á annan bógv



Áhugin var stórur, hvørja ferð Landsstýrið hevði tíðindafund um gongdina í fullveldismálinum.

aftaná 26. oktober, men fullveldið varð kortini ikki slept úr eygsjón. Tann 1. februar í 2001 varð ein nýggj fullveldisætlan løgd fyri føroyska almenningin, sum miðaði ímóti, at Landsstýrið sjálvt skipaði eina skiftistíð uppá 12 ár í Føroyum uttan hjálp frá Danmark ella beinleiðis stuðul frá altjóða samfelagnum. Málið var framvegis fullveldi, men fólkaatkvøðan um sjálva fullveldistøkuna skuldi ikki verða fyrr enn í 2012, tá ríkisstuðulin skuldi verða burtur, og tær flestu yvirtøkurnar skuldu verða framdar. Ætlanin skuldi leggjast fyri Løgtingið til samtyktar, men hon skuldi ikki staðfestast sum lóg av løgmanni, fyrr enn ein fólkaatkvøða, sum skuldi vera 26. mai 2001, hevði góðkent hana. Fullveldislógin, sum ikki bygdi á eina avtalu við andstøðuna í Løgtinginum, kundi ógildast av einum nýggjum løgtingsmeiriluta, men fólkaatkvøðan skuldi politiskt og moralskt binda komandi løgting til at fremja ætlanina. Fólkaatkvøðan hevði styrkt munandi um ætlan Landsstýrisins í Føroyum, um føroyska fólkið tók undir við henni, men veikleikin við ætlanini var, at eingin avtala varð fingin við donsku stjórnina, sum nakrar dagar seinni boðaði Føroya fólki frá, at tá hon framvegis metti, at talan var um eina fullveldisætlan, fór ríkisveitingin at fella burtur eftir 4 árum, varð hendan ætlanin samtykt.

Undir hesum umstøðum var vandi fyri, at uppskot Landsstýrisins fór at fella við tað ætlaðu fólkaatkvøðuna 26. mai. Fólkaflokkurin valdi tí at slaka fyri danska trýstinum, og tann

23. februar avlýsti løgmaður fólkaatkvøðuna, uttan at semja var um avgerðina í samgonguni. Hetta hevði við sær, at landsstýrissamgongan var um at fara fyri skeytið nakrar dagar seinni. Tjóðveldisflokkurin og Høgni Hoydal, sum hevði sjálvstýrismálini um hendi, vildu ikki boyggja seg fyri donskum trýsti, men hildu fast um, at uppskotið skuldi leggjast fyri Løgtingið, sum avtalað. Løgmaður, sum var uttanlands í arbeiðsørindum, hótti við at seta Høgna Hoydal frá sum landsstýrismann, fór hann í Løgtingið við uppskotinum. At enda valdi Tjóðveldisflokkurin at bakka fyri Fólkaflokkinum, og ein nógv viknað fullveldissamgonga var bjargað.

Eftir nakrar vikur við truplum samráðingum innanhýsis í samgonguni, samdust teir 3 samgonguflokkarnir um eina nýggja og minni víðgongda sjálvstýrisætlan. Í apríl 2001 var eitt uppskot til samtyktar um *Sjálvstýri Føroya Fólks*, sum hvørki løgfrøðiliga ella moralskt kom at binda komandi samgongur, lagt fyri Løgtingið. Báðar fólkaatkvøðurnar vóru tiknar burtur úr hesum uppskotinum, sum varð samtykt í Løgtinginum tann 20. apríl. Nýggja ætlanin miðaði ímóti, at Landsstýrið á vanligan hátt skuldi fremja allar tær yvirtøkur, sum kundu fremjast innanfyri karmarnar í heimastýrislógini. Í fyrsta umfari skuldu tey kostnaðartungu almanna- og skúlamálini, sum fyrisitingarliga vóru yvirtikin í 1970-unum við heimild í grein 9 í heimastýrislógini, fáast fult og heilt undir føroyskt ræði við eini grein 2 yvirtøku. Hesi málsøkini, sum stóðu á *lista A* í heimastýrislógini, skuldu yvirtakast longu í 2001, við teimum fylgjum at landskassin kom at bera allan kostnaðin av teimum. Landsstýrið mælti til, at heildarveitingin, sum í høvuðsheitum var endurgjald fyri tær fyrisitingarligu grein 9 yvirtøkurnar, skuldi minkast við 356 milliónum krónum í 2002, soleiðis at hon kom niður í 626 milliónir krónur. Heildarveitingin, sum framhaldandi skuldi minkast burtur eftir 12 árum, skuldi á hvørjum ári setast í ein búskapargrunn, sum yvir 15 ár skuldi seta eina fyri hvørt ár minni upphædd aftur á fíggjarlógina. Í 2012, tá øll málsøki í heimastýrislógini eftir ætlan skulu vera yvirtikin, og heildarveitingin er minkað niður í einki, er ætlanin, at ein fólkaatkvøða um sjálva fullveldistøkuna skal vera í Føroyum.

Hesa ætlanina, sum var í samsvar við heimastýrislógina, kundi danska stjórnin ikki seta seg beinleiðis upp ímóti, men trupulleikin hjá Landsstýrinum var, at yvirtøkur av málsøkjum,

sum standa á *lista B* í heimastýrislógini, t.d. fólkakirkjan og løgreglan, krevja semju við danskar myndugleikar. At byrja við var tað nakað, sum bendi á, at danska stjórnin ikki var sinnað til at viðvirka til, at tílíkar semjur vórðu gjørdar. T.d. knýtti danska stjórnin yvirtøkuna av løgregluni saman við rættarmálunum, sum hon ikki metti kundu yvirtakast, uttan at heimastýrislógin varð broytt, men móti endanum av 2001 tóktist stjórnin at vera meira samstarvssinnað mótvegis Landsstýrinum, tá talan var um yvirtøkur innanfyri karmarnar í heimastýrislógini.

Størsti veikleikin við teirri nýggju yvirtøkuætlanini hjá Landsstýrinum var ikki longur tann, at tað ikki fyrilá ein avtala við donsku stjórnina. Fólkatingið hevur samtykt eitt uppskot frá stjórnini um at skerja heildarveitingina við eini prístalsviðgjørdari upphædd uppá 366 milliónir í 2002, soleiðis at almanna- og skúlamálini samstundis kundu yvirtakast tann 1. januar 2002; veikleikin í yvirtøkuætlanini var heldur tann, at tað ikki fyrilá ein politisk avtala ella fólkaatkvøðusamtykt í Føroyum, sum løgfrøðiliga ella moralskt bindur komandi løgtingsmeirilutar til at fremja ætlanina hjá samgonguni. Hetta gjørdist greitt longu til løgtingsvalið tann 30. apríl 2002. Eitt var, at Tjóðveldisflokkurin mátti víkja fyri Sambandsflokkinum sum størsti flokkur á tingi; týdningarmiklari var, at samgongan beinleiðis misti meirilutan í Løgtinginum. Fullveldisflokkarnir komu kortini ikki í minniluta í Løgtinginum, – býtið av tingumboðum millum samgongu og andstøðu gjørdist 16–16 – men meirilutin av føroysku veljarunum atkvøddu fyri andstøðuflokkunum. Føroyingar tykjast at vera eins ósamdir um hendan spurningin í 2002, sum teir altíð hava verið.

Tann nýggjasta fullveldisætlanin hjá samgonguni frá 1998 er í sjálvum sær veik, men tann búskapur, sum skal bera hana, er í løtuni sterkur. Landskassaroknskapurin, sum í árunum undan kreppuni vísti undirskot uppá í miðal 400-500 milliónir, hevur tey seinastu trý árini havt eitt yvirskot uppá umleið 600 milliónir krónur árliga. Føroyingar, sum í tíðarskeiðinum frá 1962 til 1989 brúktu 13% meir, enn teir framleiddu, hava í tíðini frá 1990 til 1999 brúkt 7% minni, enn teir framleiddu.[502] Í 2001 var netto uttanlandaskuld Føroya, sum seinast í 80-unum hevði verið 8 milliardir krónur, vend til eina ogn uppá eina góða milliard krónur, skuld landskassans til ríkið, sum í

1997 var knappar 6 milliardir krónur, var minkað niður í 4,2 milliardir krónur – tvs. tríggjar ferðir so stór sum í 1988, men einans 300 milliónir størri enn í 1992 – og landskassin átti 1,8 milliard krónur á bók í Landsbankanum.[503] Hartil kemur, at niðurskurðurin í heildarveitingini uppá 366 milliónir krónur, sum hevur við sær, at samlaðu útreiðslur ríkisins í Føroyum minka niður í 1 milliard krónur í 2002,[504] saman við eini føroyskari bruttutjóðarframleiðslu, sum frá 1997 til 2001 vaks úr 6,2 milliardum krónum upp í góðar 9,3 milliardir krónur,[505] og sum Landsbankin í november 2001 í eini varisligari forsøgn metti fór at verða 9,7 milliardir krónur í 2002,[506] hevur við sær, at útreiðslur ríkisins í Føroyum, sum í 1997 vóru omanfyri 20% av tí samlaðu føroysku framleiðsluni (sí s. 316) fara at minka niður í umleið 10,3% av BTÚ í 2002.

Tann føroyski landsbúskapurin, sum í 1992 kom í sína størstu kreppu nakrantíð, var longu 9 ár seinni komin so mikið væl fyri seg, at hann helst var sterkari enn nakrantíð fyrr. Heildarveitingin, sum í 2001 var um milliardina, hevur ongantíð fyrr í so stóran mun ligið uttanfyri almenna raksturin av Føroyum, og niðurskurðurin uppá 366 milliónir krónur, sum verður framdur í 2002, fer tí neyvan at merkjast alt fyri eitt. Saman við øktum almennum útreiðslum í valskeiðnum frá 1998-2002 fer niðurskurðurin í heildarveitingini kortini at hava við sær, at fíggjarlógin fyri 2002 ikki fer at hava eitt yvirskot uppá 600 milliónir krónur, áðrenn avdráttir til statin uppá 141 milliónir krónur eru goldnir, soleiðis sum verið hevur undanfarnu trý árini. Í fíggjarlógini fyri 2002 verður mett, at talan verður um eitt minni yvirskot uppá 159 milliónir, men tá eru hvørki avdráttir til statin ella eykajáttanir uppá fleiri tíggjutals milliónir krónur í valárinum 2002 drignar frá. Hóast raksturin av føroyska samfelagnum, sum tyngdist nakað í undanfarna valskeiði, framvegis er heftur at einum *samlaðum* ríkisískoyti uppá umleið 1 milliard krónur í 2002, so ber til at siga, at føroyski búskapurin hevur tikið nøkur týðandi stig fram ímóti at gerast sjálvberandi.

Hartil kemur, at bankabjargingarnar í fyrru helvt av 90-unum, sum høvdu við sær, at Landsstýrið við einum útleggi uppá 2,5 milliardir krónur gjørdist høvuðspartabrævaeigari í einum kreppuraktum Føroya Banka, saman við teimum góðu tíðunum innan vinnuna, sum komu aftur í seinnu helvt av 90-



Nýggja landsstýrið, sum varð skipað eftir løgtingsvalið 30. apríl 2002. Frá vinstru landsstýrismenninir Karsten Hansen, Páll á Reynatúgvu, Bill Justinussen, Bjarni Djurholm, Anfinn Kallsberg, løgmaður, Jørgen Niclasen, Annlis Bjarkhamar, Høgni Hoydal og Eyðun Elttør. Hetta er tað fyrsta níggjumanna landsstýrið.

unum, hava verið við til at menna Føroya Banka so mikið nógv, at hann frá 1993 til 2001 gav landskassanum eina skattainntøku og partabrævaavkast uppá 885 milliónir krónur. Verða hesi viðurskifti samanhildin við avtaluna millum Landsstýrið og stjórnina frá 10. juni 1998, sum hevði eitt virði uppá umleið 1,5 milliard krónur, og søluvirðið av Føroya Banka, sum í 2001 varð mett at vera 1,75 milliard krónur, so ber neyvan til at siga annað enn, at landskassin, tá samanum kom, eisini var komin rímuliga væl burtur úr partabrævabýtinum.[507]

Tær góðu tíðirnar verða av sjálvstýrisrørsluni fataðar sum eitt søguliga einastandandi høvi til at royna at vinna Løgtinginum tað evsta valdið í Føroyum, sum ríkisrættarkønir ikki eru heilt samdir um, at tað hevur. At fáa greiðu á stjórnarligu viðurskiftunum er eitt mál í sjálvum sær, sum landsstýrissamgongan metir skal síggjast í størri høpi enn tann tjóðskaparliga eyðmýking av føroyingum, sum gjørdist avleiðingin av donsku bjargingarætlanini í byrjanini av 1990-unum. Burtursæð frá tjóðskaparligum stoltleika, so er høvuðsendamálið við fullveldisætlan Landsstýrisins, at føroyska samfelagið bæði av føroyskum politikarum, útlendskum lánveitarum og altjóða stovnum verður mett út frá egnum førleika, soleiðis at ábyrgdarloysið, sum valdaði í politisku skipanini í Føroyum í 1980-

unum, ikki fer at endurtaka seg. Andstøðan í Løgtinginum, sum í atkvøðutali vann bæði fólkatingsvalið í november 2001 og løgtingsvalið 30. apríl 2002, heldur hinvegin, at tað er óðamannaverk at grunda tað føroyska fullveldið á búskaparligar uppgangstíðir, sum skjótt kunnu støðga. Landsstýrissamgongan frá 1998 helt kortini áfram aftaná løgtingsvalið 30. apríl 2002 við hjálp frá tí eina umboðnum hjá Miðflokkinum, sum tað eydnaðist at fáa við í sjálvt landsstýrissamstarvið, men bæði viðvíkjandi innihaldi og ferð varð sjálvstýrisætlanin hjá nýggja landsstýrinum nógv broytt. Sambært nýggja samgonguskjalinum, sum varð undirskrivað 6. juni 2002, var tað ikki fullveldi, men búskaparligt sjálvbjargni, sum var ítøkiliga málið, nýggja landsstýrið setti sær fyri at røkka. Kortini skuldi heildarveitingin ikki skerjast meir í valskeiðnum 2002-2006. Eisini ferðin í sjálvstýristilgongdini skuldi, í samsvar við úrslitið av løgtingsvalinum, setast nógv niður.

Størsta forðingin fyri at vinna Løgtinginum størri heimildir í Føroyum er framvegis tann, at føroyingar ikki eru samdir um, at hetta er eitt mál, sum tað er vert at stríðast fyri. Hóast danski *viljin* til at varðveita Føroyar sum ein part av danska eindarríkinum ikki er horvin við byrjanina av 21. øld, og hóast tað ikki kann roknast við, at altjóða samfelagið beinleiðis fer at stuðla føroyingum í sjálvstýrisstríði teirra, so er tað ein sannroynd, at ríkismyndugleikarnir líka síðan 1930, tá Stauning bjóðaði føroyingum eina fólkaatkvøðu um ríkisrættarligu viðurskiftini, hava viðurkent, at Føroya fólk hevur *rætt* til at taka fullveldi. *Rættin* til at taka fullveldi og staðfesta, at Løgtingið hevur evsta vald í Føroyum, hava føroyingar sambært serfrøðingum í altjóða rætti, og donsku ríkismyndugleikarnir í Keypmannahavn hava heldur ikki sýtt fyri, at so er. Tann avgerandi spurningurin er, um *viljin* til at nýta henda rættin er so mikið stórur millum føroyingar, at teir góðtaka at stríðast ímóti treytunum hjá donsku ríkismyndugleikunum uttan útlit fyri beinleiðis altjóða stuðli. Svarið uppá tann spurningin liggur framvegis og bíðar hjá føroyska fólkinum.

# *Kelduávísingar*

1 Rafn 1972, síðu XIII og XVIII
2 Debes 1990, síðu 98
3 Sami, síðu 94. Sí eisini Rafn 1972, síðu 1
4 Rafn 1972, síðu 65
5 Debes 1990, síðu 95
6 Sí t.d. Rafn 1972, síðu 13
7 Scheel 1953, síðu 9
8 Dicuil 1967, síðu 75-77
9 Brøgger 1937, síðu 93
10 Debes 1990, síðu 94
11 Young 1979, síðu 2
12 Holmsen 1961, síðu 94
13 Sami, síðu 55
14 Sami, síðu 93
15 Petersen 1974, síðu 16
16 Debes 1990, síðu 131
17 Petersen 1974, síðu 24 og 31
18 Sí t.d. Jespersen & Nolsøe 1999, síðu 21-23
19 Rafn 1972, síðu 19-21, 113-116, 119-120, 124-126, 127-128, 140-143, 158-160, 188-189, 209-213, 213-223 og 225-231
20 Rafn 1972, síðu 13 og 14
21 Sami, síðu 19-20
22 Roesdahl 1987, síðu 239
23 Sí t.d. Young 1979, síðu 79 & Scheel 1953, síðu 14
24 Campbell 1980, síðu 73
25 Young 1979, síðu 2
26 Rafn 1972, síðu 17, 113 og 119
27 Petersen 1974, síðu 39
28 Scheel 1953, síðu 11, sí eisini Rafn 1972, síðu 210
29 Scheel 1953, síðu 16
30 Sami, síðu 16
31 Rafn 1972, síðu 213
32 Scheel 1953, síðu 11
33 Debes 1990, síðu 107
34 Sí Mortensen 1998, síðu 115
35 Petersen 1989, síðu 38-42
36 Sami, síðu 37
37 Sí t.d. Rafn 1972, síðu 215 og 220
38 Høgnesen 1969, síðu 31
39 Jacobsen 1985, síðu 5
40 Høgnesen 1968, síðu 44
41 Thorsteinsson 1985, síðu 36
42 Rasmussen & Samuelsen 1965, síðu 19
43 Brøgger 1937, síðu 201
44 Thorsteinsson 1985, síðu 25
45 Rafn 1972, síðu 20, 113, 119, 124, 127, 140, 158 og 210
46 Sami, síðu 19, 108, 159 og 179. Sí eisini Young 1979, síðu 82. Young nevnir kortini ikki triðja dømið, sum er nevnt í Føroyingasøgu
47 Sí t.d. Petersen 1974, síðu 54
48 Rafn 1972, síðu 190
49 Sami, síðu 221-223
50 Sami, síðu 189-190
51 Thorsteinsson 1985, síðu 25
52 Scheel 1953, síðu 12
53 Debes 1994, síðu 13-14 og 31
54 Rafn 1972, síðu 189-193
55 Wylie 1987, síðu 11
56 Debes 1994, síðu 13
57 Debes 1995, síðu 19
58 Jespersen & Nolsøe 1999, síðu 22
59 Rafn 1972, síðu 225-226
60 Rasmussen & Samuelsen, síðu 19 og Young 1979, síðu 85
61 Rafn 1972, síðu 20
62 Eftir Zachariasen 1961, síðu 315. Sí eisini Jacobsen 1985, síðu XIX og 24
63 Debes 1994, síðu 13
64 Thorsteinsson 1985, síðu 22
65 Rafn 1972, síðu 188-189
66 Jespersen & Nolsøe 1999, síðu 21
67 Rafn 1972, síðu 115
68 Debes 1995, síðu 171
69 Høgnesen 1968, síðu 46
70 West 1974, síðu 17
71 Jacobsen 1985, síðu XIX
72 Viðvíkjandi ríkisrættarligu viðurskiftum Føroya í Noregs ríki í miðøld, sí t.d. Sandvik 1988
73 Debes 1995, síðu 34-35; Zachariasen 1961, síðu 10
74 Jacobsen 1985, síðu 5
75 Sami, síðu 27, sí eisini Høgnesen 1969, síðu 32

76 Petersen 1989, síðu 42; Petersen 1972, síðu 76
77 Petersen 1968, síðu 243-245
78 Zachariasen 1961, síðu 337
79 Andersen 1964, síðu 217; Zachariasen 1961, síðu 260-265
80 Young 1979, síðu 84
81 Petersen 1972, síðu 77-78
82 Joensen 1954-56, síðu 52
83 Debes 1950, síðu 128-129
84 Mortensen 1998, síðu 124
85 Debes 1995, síðu 81 og 84
86 Steining 1958, síðu 187
87 Rafn 1972, síðu 188
88 Debes 1995, síðu 65
89 Her grundað á samanteljing hjá Zachariassen 1961, síðu 399
90 Zachariassen 1961, síðu 22
91 Debes 1995, síðu 90
92 Jespersen og Nolsøe 1999, síðu 24
93 Høgnesen 1969, síðu 36
94 Petersen 1989, síðu 203
95 Debes 1995, síðu 175
96 Jespersen & Nolsøe 1999, síðu 24
97 Jacobsen 1985, síðu 27
98 Petersen 1989, síðu 44
99 Debes 1995, síðu 52; Petersen 1989, síðu 44
100 Debes 2000, síðu 226
101 Petersen 1963, síðu 187 & 189
102 Zachariassen 1961, síðu 331
103 Petersen 1989, síðu 202
104 Debes 1995, síðu 52
105 Sami, síðu 40
106 Sami, síðu 57-58
107 Steining 1958, síðu 184
108 Petersen 1989, síðu 54-55
109 Høgnesen 1969, síðu 42
110 Debes 1995, síðu 57
111 Høgnesen 1969, síðu 42
112 Gamalt handrit til løgtingssøguna
113 Sama
114 Debes 1993 (A), síðu 28
115 Pedersen & Tamm 1992, síðu 16-17
116 Høgnesen 1969, síðu 45
117 Sami, síðu 44-45
118 Petersen 1989, síðu 201
119 Sí t.d. Patursson 1939, síðu 33 ff
120 Petersen 1989, síðu 202-203
121 Høgnesen 1969
122 Wylie 1987, síðu 25-26
123 Debes 1994, síðu 33
124 Høgnesen 1969, síðu 64
125 Wang 1999, síðu 118
126 Harhoff 1993, síðu 45
127 Høgnesen 1969, síðu 62-77
128 Zachariasen 1961, síðu 33-34
129 Jespersen & Nolsøe 1999, síðu 24-26
130 Høgnesen 1969, síðu 13-15
131 Christiansen 1998, síðu 110
132 Petersen 1968, síðu 242
133 Høgnesen 1969, síðu 30
134 Debes 1993 (A), síðu 33-35
135 Thorsteinsson 1990, síðu 44
136 Christiansen 1998, síðu 111 og 113
137 Høgnesen 1969, síðu 76
138 Patursson 1939, síðu 38 og ávísing 18 í somu bók
139 Skjalið er endurprentað í Gamalt handrit til løgtingssøguna
140 Høgnesen 1969, ávísing 289
141 Sami, síðu 73-74 og 79-80
142 Jacobsen 1929 & Madsen 1999, síðu 109
143 Pløyen 1840
144 Petersen 1989, síðu 211. Sí eisini Høgnesen 1969, síðu 86 og ávísing 318, 319 og 320 á síðu XXXVI og XXXVII
145 Thorsteinsson 1990, síðu 160
146 Debes 1993 (A), síðu 38
147 Sí Jensen 1931 og 1934, har søgan hjá donsku stættartingunum frá 1830-1848 er viðgjørd. Eisini viðurskifti Føroya fáa umrøðu
148 Thorsteinsson 1990, síðu 83
149 Høgnesen 1966, síðu 93-94
150 Sami, síðu 85
151 Debes 1993 (A), síðu 40
152 Gamalt handrit til løgtingssøguna
153 Debes 1982, síðu 34
154 Endurgivið eftir Thorsteinsson 1990, síðu 296. Sí eisini síðu 291-292
155 Sami, síðu 291
156 Endurgivið eftir Thorsteinsson 1990, síðu 104
157 Sami, síðu 105
158 Debes 1994, síðu 23-25
159 Thorsteinsson 1990, síðu 72-73
160 Patursson 1939, síðu 67-68
161 Wang 1988, síðu 153-161, Wang 1994, síðu 42-46, Christiansen 1998, síðu 118

162 Sí t.d. Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 48-49
163 Winther 1850, síðu 4
164 Høgnesen 1952
165 Thorsteinsson 1990, síðu 230
166 Sami, síðu 278-280
167 Sami, síðu 306
168 Høgnesen 1952
169 Viðvíkjandi endurreisn Løgtingsins, sí Thorsteinsson 1990, síðu 301-340
170 Debes 1993 (A), síðu 96
171 Løgtingslógirnar frá 1852 og 1854 finnast í ávíkavist Thorsteinsson 1990, síðu 366-369 og Bang & Bærentsen 1901, síðu 94-99
172 Løgtingstíðindi 1915, skjal 6, og Løgtingstíðindi 1922, skjal 27
173 Wang 1988, síðu 188
174 Løgtingstíðindi 1886, síðu 68
175 Løgtingstíðindi 1905, síðu 157-158
176 Poulsen 1981, síðu 4
177 Jacobsen 1995, síðu 61-62
178 Debes 1993 (A), síðu 131
179 West 1974, síðu 124
180 Løgtingstíðindi 1906, síðu 13-14
181 Mitens 1969, síðu 228
182 Wang 1999, síðu 201-202
183 Bærentsen & Bang 1901, síðu 99
184 Debes 1993 (A), síðu 35
185 Poulsen 1981, síðu 4
186 West 1974, síðu 121
187 Debes 1993 (A), síðu 60
188 Steining 1953, síðu 123. Bærentsen & Bang 1901, síðu 99
189 Thorsteinsson 1990, síðu 366
190 Sami, síðu 359, og Danstrup o.a. (ritstj.) 1985, bind 11, síðu 286-287.
191 Bærentsen & Bang 1901, síðu 94-95
192 Debes 1982, síðu 53-54
193 Danstrup o.a. (ritstj.) 1984, bind 13, síðu 94
194 Debes 1993 (A), síðu 85-86
195 Sí, Thorsteinsson 1990, síðu 366. Sama orðing finst í 1854 lógini. Bang & Bærentsen 1901, síðu 95
196 Thorsteinsson 1990, síðu 361
197 Sami, síðu 278
198 Debes 1993 (A), síðu 60
199 Petersen 1989, síðu 202-203
200 Thorsteinsson 1990, síðu 341
201 Pedersen & Tamm 1992, síðu 18-19 og 26
202 Thorsteinsson 1990, síðu 309
203 Madsen 1999, síðu 128
204 Sí dagbókina hjá Hans David Matras, ein av teimum 12 tingmonnunum, sum partvíst er prentað í: Hans David Matras 1951, síðu 213-222
205 Steining 1958, síðu 221-223
206 Sami, síðu 224
207 Steining 1953, síðu 124
208 Steining 1958, síðu 223
209 Steining 1958, síðu 224
210 Løgtingstíðindi 1881, síðu 80
211 Færingetidende, nr. 8, juli 1852
212 Løgtingstíðindi 1880, síðu 90
213 Løgtingstíðindi 1881, síðu 18-30
214 Løgtingstíðindi 1884, síðu 74-76
215 Løgtingstíðindi 1890, síðu 104-105
216 Harhoff 1993, síðu 49
217 Pedersen & Tamm 1992, síðu 18-19
218 Joensen 1987, síðu 35
219 Viðvíkjandi politisku søguni fram ímóti 1906: Debes 1993 (A), síðu 118-147 & 1993 (B), síðu 81-84
220 Debes 1993 (A), síðu 131
221 Debes 1982, síðu 244
222 Wylie 1987, síðu 159
223 Løgtingstíðindi 1902, skjal 4, síðu 1-6
224 Patursson 1903, síðu 136
225 Viðvíkjandi Tilboðnum, sí Løgtingstíðindi 1906, síðu 16 ff
226 Debes 1991, síðu 85
227 Debes 1982, síðu 299
228 Debes 1993 (A), síðu 146
229 Petersen 1989, síðu 242
230 Debes 1982, síðu 158
231 Føringatíðindi nr. 1, januar 1890
232 Debes 1982, síðu 311
233 Debes 1993 (B), síðu 85-88
234 Wåhlin o.a. 1994, síðu 34-35
235 Waag 1967, síðu 4
236 Løgtingstíðindi 1922, skjal 27, síðu 10-11
237 Petersen 1989, síðu 256-257
238 Viðvíkjandi Slesvig spurninginum, sí Rerup 1987, síðu 44-58
239 Rokkan 1995, síðu 245
240 Nauerby 1992, síðu 6
241 Thorsteinsson 1985, síðu 244-247
242 Løgtingstíðindi 1920, síðu 184

243 Danstrup o.a. (ritstj.) 1985, bind 11, síðu 508
244 Debes 1993 (B), síðu 78
245 Bang (ritstj.) 1978, Bind 6, síðu 10
246 Hannover & Norin (ritstj.) 2001, síðu 92-93 og 282-283
247 Sí Danstrup o.a. (ritstj.) 1985, bind 11, síðu 496 og 504-505
248 Løgtingstíðindi 1922, skjal 27, síðu 10-11
249 Danstrup o.a. (ritstj.) 1984, bind 13, síðu 234-235
250 Løgtingstíðindi 1902, skjal 4, síðu 1-6
251 Løgtingstíðindi 1920, síðu 185 (teksturin vísur til grein 1 í grundlógini, men helst er talan um ein feil). Sí Mitens 1966, síðu 252-292, har tað av samanhanginum framgongur, at talan er um grein 2
252 Løgtingslógin frá 1923 finst í Bonnevie & Mitens 1932, bind 1, síðu 706-720
253 Steining 1953, síðu 152
254 Samanteljingin av valstøðum byggir á Waag 1967, síðu 15-53
255 Lovtidende for Kongeriget Danmark for Aaret 1930, síðu 1858
256 Lovtidende for Kongeriget Danmark for Aaret 1939, afdeling A II, síðu 1411
257 Lovtidende for Kongeriget Danmark for Aaret 1935, síða 696
258 Løgtingstíðindi 1924, síðu 2 og skjal 2
259 Løgtingstíðindi 1936, síðu 19
260 Bang & Bærentsen 1901, síðu 97
261 Bonnevie & Mitens 1932, síðu 717
262 Løgtingstíðindi 1886, síðu 68
263 Pedersen & Tamm 1992, síðu 18
264 Løgtingstíðindi 1916, skjal 6, síðu 4
265 Løgtingstíðindi 1922, skjal 27, síðu 11
266 Bang & Bærentsen 1901, síðu 89
267 Bonnevie & Mitens 1932, síðu 718
268 Løgtingstíðindi 1880, síðu 90
269 Løgtingstíðindi 1930, síðu 4
270 Løgtingstíðindi 1928, skjal 20, síðu 107 ff.
271 Løgtingstíðindi 1924, síðu 27-31
272 Mitens 1969, síðu 222
273 Steining 1953, síðu 174
274 Løgtingstíðindi 1935, síðu 7
275 Petersen 1989, síðu 268
276 Løgtingstíðindi 1936, skjal 1, síðu 2 & Løgtingstíðindi 1940, skjal 1, síðu 2
277 Steining 1953, síðu 148-149
278 Skála 1992, síðu 16
279 Steining 1953, síðu 174
280 Løgtingstíðindi 1902, skjal 4, síðu 6
281 Løgtingstíðindi 1905, síðu 34
282 Bonnevie & Mitens 1932, síðu 719-720
283 Mitens 1966, síðu 288
284 Debes 1991, síðu 109.
285 Løgtingstíðindi 1930, síðu 5
286 Løgtingstíðindi 1916, síðu 191 ff.
287 Løgtingstíðindi 1917, skjal 3, síðu 1
288 Løgtingstíðindi 1916, síðu 194
289 Wåhlin o.a. 1994, síðu 75-76
290 Løgtingstíðindi 1917, skjal 3, síðu 4
291 Løgtingstíðindi 1917, skjal 3, síðu 3-4
292 Wåhlin o.a. 1994, síðu 76
293 Løgtingstíðindi 1917, skjal 3, síðu 5
294 Wåhlin o.a. 1994, síðu 76, og nota 15 á síðu 234
295 Sami, síðu 101
296 Sami, síðu 80
297 Løgtingstíðindi 1918, síðu 251-253 og 270
298 Bilag til Beretning til Landstinget 1920, Aktstykker, síðu 36
299 Wåhlin o.a. 1994, síðu 117-123, og Petersen 1989, síðu 251-252
300 Beretning til Landstinget 1920 & Bilag til Beretning til Landstinget 1920
301 Beretning til Landstinget 1920, síðu 3-4
302 Rasmussen 1987, síðu 235
303 Jacobsen 1927, síðu 67
304 Løgtingstíðindi 1923, skjal 62, síðu 12
305 Løgtingstíðindi 1923, skjal 62, síðu 11
306 Rasmussen 1997, síðu 148
307 Sami, síðu 165-173
308 Sí Waag 1967, síðu 4
309 Steining 1953, síðu 245
310 Debes 1991, síðu 108
311 Mitens 1966, síðu 202-203, og West 1974, síðu 157
312 Løgtingstíðindi 1930, síðu 185 og skjal 10, síðu 6
313 Mitens 1966, síðu 51
314 Patursson 1931
315 Debes 1991, síðu 107-108
316 Dalsgaard 1997, síðu 255-256
317 West 1974, síðu 124-130
318 Dalsgaard 1997, síðu 471

319 Forslag og betænkninger angivne af Den Færøske Landbokommission 1911. Tillæg til forslag og betækninger angivne af den færøske landbokommission 1911.
320 Stevnuskráir flokkanna standa í Mitens 1966, síðu 15-22
321 Gráa Bók 1932, síðu 3
322 Sami, síðu 9
323 Debes 1991, síðu 116
324 West 1974, síðu 157
325 Dalsgaard 1997, síðu 255-256
326 Sørensen 1998, síðu 201
327 Mitens 1969, síðu 286
328 Parliamentary Debates 1940, síðu 746-747
329 Her endurgivið á donskum eftir Müller 1945, síðu 20-21
330 Mitens 1969, síðu 228
331 Müller 1945, síðu 23-24
332 Sørensen 1998, síðu 197
333 West 1974, síðu 183
334 Mitens 1969, síðu 294
335 Sami, síðu 289
336 Løgtingstíðindi 1940, eykatingsetan í apríl, síðu 4-6
337 Løgtingstíðindi 1940, eykatingsetan, síðu 9 og 11
338 Mitens 1969, síðu 271
339 Sørensen 1998, síðu 197
340 Christiansen 1998, síðu 122
341 Mitens 1969, síðu 299
342 Waag 1967, síðu 149
343 Mitens 1969, síðu 79
344 Viðvíkjandi føroyska útflutninginum undir krígnum, sí West 1974, síðu 170
345 Tausen 1990, síðu 75-76
346 Mitens 1969, síðu 221-230
347 Inntøkur Løgtingsins, sí Løgtingstíðindi fyri nevndu ár, skjal 1, síðu 2
348 Mitens 1969, síðu 227
349 Løgtingstíðindi 1954, Eykatingsetan, síðu 261-263
350 Müller 1945, síðu 24
351 Mitens 1969, síðu 235
352 West 1974, síðu 191
353 Dalsgaard 1997, síðu 417-418
354 Mitens 1969, síðu 299
355 Sørensen 1998, síðu 200-203
356 Mitens 1969, síðu 253
357 Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 65
358 Sørensen 1998, síðu 204
359 Her endurgivið á donskum eftir Müller 1945, síðu 29-30
360 Sørensen 1998, síðu 204-205
361 Mitens 1969, síðu 256
362 Sørensen 1998, síðu 205-206
363 Sami, síðu 208
364 Mitens 1969, síðu 275-276
365 Sami, síðu 276
366 Valskráirnar til løgtingsvalið 1943 eru at finna í Mitens 1969, síðu 13-17
367 Sørensen 1998, síðu 212-213
368 Sami, síðu 213-214
369 Sami, síðu 214
370 Her endurgivið eftir Harhoff 1993, síðu 53-54
371 Mitens 1969, síðu 299. Sí eisini Müller 1945, síðu 90-94
372 Skála 1992, síðu 34. Stórir partar av 5. parti byggja á keldutilfar úr bókini hjá Skála
373 Skála 1992, síðu 45. Sí eisini Løgtingstíðindi 1947, síðu 188
374 Upprit av munnliga orðaskiftinum ... 1946, síðu 12
375 Sami, síðu 66-69
376 Sami, síðu 59
377 Sami, síðu 69-70
378 Føroyar 1946
379 Sí t.d. Wang 1988, síðu 53 & Skála 1992, síðu 106
380 Skála 1992, síðu 41
381 Thorsteinsson 1985, síðu 264-265
382 West 1972, síðu 188
383 Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 502
384 Mitens 1969, síðu 320-321
385 Sami, síðu 321
386 West 1974, síðu 178
387 Thorsteinsson 1999, síðu 34 og 38
388 Johansen 1999, síðu 20
389 Heimastýrislógin, sum varð samtykt í Løgtinginum tann 5. desember 1947, kunngjørd sum lóg í Dimmalætting tann 31. mars 1948 eftir reglunum í ...Midlertidig Bestemmelser", er endurprentað í Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 112-122

390 Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 513
391 Løgtingstíðindi 1948, síðu 3-7. Sí eisini Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 122-131
392 Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 85
393 Sami, síðu 89
394 Lovtidende for Kongeriget Danmark for Aaret 1939. Afdeling A II, síðu 1413 (mín undirstriking)
395 Løgtingstíðindi 1948, síðu 6
396 Løgtingstíðindi 1980, síðu 77
397 Wang 1988, síðu 195
398 Løgtingstíðindi 1989, síðu 2
399 Wang 1988, síðu 95
400 Viðvíkjandi broytingum í valskipan og tingmannatali, sí Løgtingstíðindi 1948, síðu 13-18
401 Løgtingstíðindi 1977, síðu 239-240 og 277
402 Wang 1988, síðu 191
403 Løgtingstíðindi 1965, síðu 97-101
404 Sí t.d. Løgtingstíðindi 1948, síðu 24 ff
405 Upprit frá munnliga orðaskiftinum ... 1946, síðu 14
406 Løgtingstíðindi 1951, síðu 347-349
407 Løgtingstíðindi 1951, síðu 223-230
408 Fiscal Adjustment and Economic Progress 1999, síðu 122
409 Sí Løgtingstíðindi 1982 og 1983, har viðgerðin av nýggju skattalógini finst
410 Løgtingstíðindi 1949, skjal 1, síðu 2
411 Løgtingstíðindi 1953, skjal 1, síðu 2
412 Løgtingstíðindi 2000, fíggjarlógin
413 Sí Trap 1968, síðu 115, har útreiðslur ríkiskassans og landskassans frá 1948-1966 standa
414 Mitens 1969, síðu 227-230
415 West 1974, síðu 249
416 Hvítabók, fylgibind 1. 1999, síðu 41
417 Fiscal Adjustment and Economic Progress 1999, síðu 35
418 Mitens 1969, síðu 226-227
419 Løgmansrøðan 2001
420 Løgtingstíðindi 1955, síðu 137
421 Løgtingstíðindi 1960, síðu 52
422 Løgtingstíðindi 1948, síðu 74-76
423 Løgtingstíðindi 1960, síðu 53-55
424 Løgtingstíðindi 1970, síðu 183
425 Løgtingstíðindi 1975, síðu 448-449
426 Løgtingstíðindi 1992, síðu 208-216
427 Løgtingstíðindi 1998, tingmál nummar 73
428 Løgtingslóg nr. 12 frá 18. februar 1999
429 West 1974, síðu 185-186
430 Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 508
431 Wang 1988, síðu 175
432 Thorsteinsson 1999, síðu 87-88
433 Mitens 1969, síðu 68
434 Viðvíkjandi Vinnulánsgrunninum og fíggingarmøguleikum, sí Mitens 1969, síðu 58-70 og 226-227 & Petersen 1992. Sí eisini Beretning angående Sjóvinnubankin 1953, síðu 11-19, har samfelagsligu viðurskiftini í Føroyum og virksemið hjá Sjóvinnubankanum í tíðini fram til 1952 eru viðgjørd
435 West 1974, síðu 191-193
436 Mikkelsen 2001, síðu 30 og Mikkelsen 1996, síðu 267
437 Beretning angående Sjóvinnubankin 1953, síðu 199-200
438 Mitens 1958, síðu 182
439 Sami, síðu 196 – 197
440 Útflutningstøl upp til 1973 finnast í West 1974, síðu 231 og 242
441 Ein fullfíggjaður listi yvir yvirtøkur fram til 1988 finst í Wang 1988, síðu 229
442 Madsen 1999, síðu 233 ff.
443 Wang 1968, síðu 100
444 Elkær-Hansen 1992, síðu 143-148
445 Mitens 1969, síðu 227
446 Eftir Trap 1968, síðu 115
447 West 1974, síðu 250-251
448 Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 510
449 Frágreiðing um 80-árini 2000, síðu 36
450 Pedersen & Tamm 1992, síðu 26
451 Víðvíkjandi ríkisstuðli og heildarveiting síðan 1986, sí Hvítabók, fylgibind 1, 1999, síðu 41-42
452 Løgtingstíðindi 1999, tingmál nummar 64, síða 1
453 Ráfiskagrunninum er t.d. viðgjørdur í Mørkøre 1985 og 1993
454 Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 515
455 Hoydal o.a. 1992
456 Frágreiðing um 80-árini 2000, síðu 43

457 Sami, síðu 336
458 Hoydal 2000, síðu 58
459 Tølini eru endurgivin eftir Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 136. Meira útgreinaði tøl finnast í Frágreiðing um bygnaðartrupulleikar í føroyska búskapinum 1994, síðu 84
460 Frágreiðing um 80-árini 2000, síðu 43
461 Avtalurnar, sum Landsstýrið og stjórnin gjørdu frá 1992-1995 eru endurprentaðar í Rigsombudsmanden på Færøerne 1997, síðu 229-251
462 Krisen i den færøske økonomi 1994, síðu 117
463 Frágreiðing um 80-árini 2000, síðu 43 og 336
464 Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 518 og Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 136
465 Mikkelsen 2001, síðu 212
466 T.d. Hoydal 2000, síðu 69-74
467 Mikkelsen 2001, síðu 89, 137 og 174-175
468 Sami, síðu 76
469 Den Færøske Banksag, Beretning 1998, síðu 839, 860 og 868-871
470 Sami, síðu 969-970
471 Sami, síðu 18-31 og 1380-1390
472 Mikkelsen 2001, síðu 252-255
473 Krisen i den færøske økonomi 1994, síðu 32, 123-124 og 126
474 Den Færøske Banksag, Beretning 1998, síðu 24-25
475 Den Færøske Banksag, Beretning 1998 & Den Færøske Banksag, Bilag til Beretning 1998
476 Avtalan frá 10. juni 1998 er endurprentað í Rigsombudsmanden på Færøerne 1999, síðu 248-251
477 Mikkelsen 2001, síðu 173
478 Frágreiðing um 80-árini 2000
479 Sí eisini Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 90-91
480 Frágreiðing um 80-árini 2000, síðu 21-32
481 Sami, síðu 177-178
482 Det rådgivende udvalg for Færøerne 1989, síðu 16 & Rigsombudsmanden på Færøerne 1990, síðu 111-112
483 Løgtingstíðindi 1995, síðu 251
484 Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994
485 Frágreiðing um 80-árini 2000, síðu 108-111
486 Fregnir 10.-16. august 2001, síðu 3
487 Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya 1994, síðu 67-70
488 Christiansen 1998, síðu 110-111
489 Ross 1980, síðu 496
490 Meyer 1947, síðu 289-299
491 Ugeskrift for retsvæsen 1950, síðu 89 og Ugeskrift for retsvæsen 1951, síðu 1. Sí eisini Mitens 1969, síðu 337
492 Harhoff 1993, síðu 83-84. Sí eisini kap. 7, síðu 241-277
493 Sí Skála 1992, síðu 158-163
494 Sí Christiansen 1998, síðu 163. Sí eisini Harder 1979
495 Harhoff 1993, síðu 242
496 Petersen 1989, síðu 203
497 Svar hjá ríkisumboðsmanninum uppá fyrispurning frá løgtingsmanninum Bjarna Djurholm í 1997. Sí Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 525
498 Krisen i den færøske økonomi 1994, síðu 31-32
499 Thorsteinsson & Rasmussen 1999, síðu 518
500 Sami, síðu 509
501 Hvítabók, 1999
502 Hvítabók, fylgibind 1, 1999, síðu 16
503 Løgmansrøðan 2001
504 Rigsombudsmanden på Færøerne 2002, síðu 142.
505 Sami, síða 124
506 Landsbanki Føroya, 2001
507 Mikkelsen 2001, síðu 175

# *Bókmenta- og keldulisti*


**Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya:** *Álit frá nevndini, Landsstýrið setti 1. apríl 1993, at kanna stýrisskipanarviðurskifti Føroya*. Tórshavn 1994.

**Andersen, N:** *Færøerne 1600-1709*. Keypmannahavn 1895. Uppafturprentað við leitiorðum av Helga Justinussen, Tórshavn 1964.

**Bang, Jørgen (høvuðsritstj.):** *Gyldendals Tibinds Leksikon*, Bind 6. Keypmannahavn 1978.

**Bang, T.E. & Bærentsen, Christian:** *Færøsk Lovsamling*. Keypmannahavn 1901.

**Beretning angående Sjóvinnubankin:** *Afgivet af det ved statsministeriets skrivelse af 29. maj 1952 nedsatte udvalg*. Keypmannahavn 1953.

**Beretning til Landstinget:** *Beretning til Landstinget afgiven af Den af Tinget i Henhold til Grundlovens § 45 nedsatte Kommission til Undersøgelse af forskellige færøske Forhold*. Keypmannahavn 1920.

**Bilag til Beretning til Landstinget:** *Bilag til Beretning til Landstinget afgiven af Den af Tinget i Henhold til Grundlovens § 45 nedsatte Kommission til Undersøgelse af forskellige færøske Forhold. Aktstykker. Vidneafhøringer*. Keypmannahavn 1920.

**Bonnevie, Erik & Bærentsen, Christian:** *Færøsk Lovsamling*. Bind I, Tórshavn 1932.

**Brøgger, A.W.:** *Løgtingssøga Føroya*. Tórshavn 1937.

**Campbell, James Graham:** *The Viking World*. London 1980.

**Christiansen, Ólavur:** *Villinistíggir upplýstir – tær til verju – á marknaskilinum millum heimastýrið og fullveldi og millum ørmundarhús og valahús*. Tórshavn 1998.

**Dalsgaard, Jóannes:** *Fylking 75 ár. Ein rannsókn av verkamannarørsluni á Tvøroyri og ein lýsing av málum, menning, skipan og úrslitum hennara – við denti á tíðarskeiðið 1915-1951*. Tórshavn 1997.

**Danstrup, John o.a. (ritstj.):** *Politikens Danmarkshistorie. Folkestyrets fødsel 1830-1870*. Bind 11. Keypmannahavn 1985, 3. útgáva, 2. upplag.

**Danstrup, John o.a. (ritstj.):** *Politikens Danmarkshistorie. De nye klasser 1870-1913*. Bind 12. Keypmannahavn 1984, 3. útgáva, 2. upplag.

**Danstrup, John o.a. (ritstj.):** *Politikens Danmarkshistorie. Velfærdsstaten på vej 1913-1939.* Bind 13. Keypmannahavn 1984, 3. útgáva, 2. upplag.

**Debes, Hans Jacob:** *Nú er tann stundin … Tjóðskaparrørsla og sjalvstýrispolitikkur til 1906 – við søguligum baksýni.* Tórshavn 1982.

**Debes, Hans Jacob:** *Føroya Søga I. Norðurlond og Føroyar.* Tórshavn 1990.

**Debes, Hans Jacob:** *Jóannes Patursson. Ein byrjan til eina politiska ævisøgu.* Tórshavn 1991.

**Debes, Hans Jacob:** *Politiska søga Føroya 1814-1906.* Tórshavn 1993 (A).

**Debes, Hans Jacob:** *Ein kvistur spretti … Keldur til Føroya søgu 1879-1906.* Tórshavn 1993 (B).

**Debes, Hans Jacob:** *Ísland – land og ríki.* Tórshavn 1994.

**Debes, Hans Jacob:** *Føroya Søga II. Skattland og len.* Tórshavn 1995.

**Debes, Hans Jacob:** *Føroya Søga III. Frá kongaligum einahandli til embætisveldi.* Tórshavn 2000.

**Debes, Hans Jacob:** *Færingernes Land – Historien om den færøske nutids oprindelse.* Keypmannahavn 2001.

**Debes, Lucas Jacobsøn:** *Færøernes Beskrivelse.* Tórshavn 1950. Uppafturprent av Debes, Lucas Jacobsøn: *Færoe & Færoa Reserata. Det er: Færøernes og færøeske indbyggeris beskrifelse.* Keypmannahavn 1673.

**Den Færøske Banksag:** *Beretning afgivet af Undersøgelseskommissionen vedrørende den færøske banksag.* Bind 1-3. Keypmannahavn 1998.

**Den Færøske Banksag:** *Bilag til Beretning afgivet af Undersøgelseskommissionen vedrørende den færøske banksag.* Bind 4-5. Keypmannahavn 1998.

**Det rådgivende udvalg vedrørende Færøerne:** *Den økonomiske udvikling på Færøerne 1988.* Keypmannahavn 1989.

**Dicuil:** *Liber de mensura orbis terrae.* Ed. J.J. Tierney, Dublin 1967.

**Elkær-Hansen, Niels:** *Færøerne i hjemmestyrets og rigsfælleskabets tegn.* Prentað í Martensen-Larsen, Florian o.a. (ritstj.): *De kongelige amtmænd – en erindringsbog om amtmænd og amter før 1970.* Keypmannahavn 1992.

**Forslag og betænkninger angivne af Den Færøske Landbokommission:** *Nedsat i henhold til lov af 13. mars 1908*. Keypmannahavn 1911.

**Forslag og betænkninger angivne af Den Færøske Landbokommission, tillæg til:** *Nedsat i henhold til lov af 13. mars 1908*. Keypmannahavn 1911.

**Fiscal Adjustment and Economic Progress:** *An Optimal Fiscal and Legal Framework to Promote Economic Growth and Investment in Faroe Islands*, (Caragata álitið). Wellington 1999.

**Frágreiðing um bygnaðartrupulleikar í føroyska búskapinum:** *Endurreisingarnevnd Landsstýrisins Tórshavn 25. januar 1994*. Tórshavn 1994.

**Frágreiðing um 80-árini:** *Føroya Løgting § 19 nevndin*. Tórshavn 2000.

**Fregnir:** *Nr. 18, 10.-16. august 2001*.

**Føringatíðindi:** *Nr. 1, januar 1890*. Prentað í *Føringatíðindi 1890-1906*. Tórshavn 1969.

**Føroyar:** Føroyingafelagið, Tórshavn 1946.

**Færingetidende:** *Nr. 8, juli 1852*. Prentað í *Færingetidende*. Tórshavn 1985.

**Gamalt handrit til løgtingssøgu:** Ikki útgivið. Finst á Landsbókasavninum (eingi síðutøl).

**Gráa Bók:** *Betænkning afgivet af det af landbrugsministeriet under 15. juli 1930 nedsatte udvalg angående en særlig lovgivning, sigtende til fremme af opdyrkningen paa Færøerne*. Keypmannahavn 1932.

**Hannover, Karen & Norin, Ann-Sofi (ritstj.):** *Dansk kvindebiografisk leksikon*. Bind II, Keypmannahavn 2001.

**Harder, Kirsten:** *De dansk færøske forhold 1945-1948*. Odense 1979.

**Harhoff, Frederik:** *Rigsfællesskabet*. Århus 1993.

**Holmsen, Andreas:** *Norges Historie. Fra de eldste tider til eneveldets innførelse i 1660*. Oslo – Bergen 1961.

**Hoydal, Høgni o.a.:** *Grát mítt elskaða land*. Greinarøð í *Dimmalætting* í tíðarskeiðinum frá 7. til 28. november 1992.

**Hoydal, Høgni:** *Myten om rigsfællesskabet*. Keypmannahavn 2000.

**Høgnesen, Róland Waag:** *100 ár síðan Løgtingið varð endurreist*. Prentað í *Oyggjaskeggi – blað føroyinga uttanlendis*, apríl-mai 1952, 5. árgangur, nr. 3-4.

**Høgnesen, Róland Waag:** *Tá ið Føroyar komu upp í donsku stættartingini.* Prentað í *Fróðskaparrit*, 15. bók. Tórshavn 1966.

**Høgnesen, Róland Waag:** *Færøernes historie frem til den anden verdenskrig.* Prentað í Ølgaard, Anders (ritstj.): *Færinger – Frænder.* Keypmannahavn 1968.

**Høgnesen, Róland Waag:** *Færøernes stilling i det dansk-norske rige indtil 1855.* Serritgerð í søguvísindi við Københavns Universitet 1969. Ikki útgivið. Finst á Landsbókasavninum.

**Hvítabók:** *Støði undir einum sáttmála, ið skipar Føroyar sum eitt fullveldisríki í samstarvi við Danmark.* Tórshavn 1999.

**Hvítabók:** *Búskapur – ein sjálvberandi føroyskur búskapur*, fylgibind 1, Tórshavn 1999.

**Hvítabók:** *Fyrisiting – ein sjálvstøðug føroysk fyrisiting*, fylgibind 2, Tórshavn 1999.

**Jacobsen, Elin Súsanna:** *Rúsdrekka – siðir og ósiðir.* Tórshavn 1995.

**Jacobsen, M. A.:** *Føroya Amts Bókasavn.* Tórshavn 1929.

**Jakobsen, Jakob:** *Diplomatarium Faroense. Miðaldarbrøv upp til trúbótartíðarskeiðið – við søguligum rannsóknum.* Tórshavn 1985.

**Jacobsen, Jørgin-Franz:** *Danmark og Færøerne.* Keypmannahavn 1927.

**Jensen, Hans:** *De danske Stænderforsamlingers Historie 1830-1848.* Bind I. Keypmannahavn 1931.

**Jensen, Hans:** *De danske Stænderforsamlingers Historie 1830-1848.* Bind II. Keypmannahavn 1934.

**Jespersen, Kári & Nolsøe, Jens Pauli:** *Stjórnmálasøga Føroya.* Prentað í *Hvítabók – støðið undir einum sáttmála, ið skipar Føroyar sum eitt fullveldisríki í samstarvi við Danmark.* Tórshavn 1999.

**Joensen, Einar:** *Tingbókin 1615-54.* Tórshavn 1954-1956.

**Joensen, Jóan Pauli**: *Fra bonde til fisker.* Tórshavn 1987.

**Johansen, Sámal Tróndur F.:** *Færøerne under den kolde krig.* Prentað í *Føroyar í kalda krígnum.* Tórshavn 1999.

**Krisen i den færøske økonomi – herunder bankerne. Baggrund, foranstaltninger og konsekvenser – aktuelt og fremover:** *Rapport fra det af landstyre og regering nedsatte uafhængige udvalg af økonomisk sagkyndige*, (Gørtz-frágreiðingin). Esbjerg 1994.

**Lærarafólk í Føroyum 1870-1976:** Tórshavn 1976.

**Landsbanki Føroya:** *Fíggjarlógin 2002. Viðmerkingar um ávirkan á eftirspurning og konjukturstøðu.* Fíggjarnevndarskjal frá 30. november 2001, Tórshavn 2001.

**Lovtidende for kongeriget Danmark.** Keypmannahavn 1930.

**Lovtidende for kongeriget Danmark.** Keypmannahavn 1935.

**Lovtidende for kongeriget Danmark.** Keypmannahavn 1939.

**Løgtingstíðindi.** Tórshavn 1880-2001.

**Madsen, Heini:** *Færøernes hvornår skete det.* Keypmannahavn 1999.

**Matras, Hans David:** *Dahlerup-sakin avskrivað eftir dagbókini hjá H.D.Matras* Prentað í *Varðanum*, bind 29. Tórshavn 1951.

**Meyer, Poul:** *Færøernes retsstilling – nogle betragtninger i anledning af forslag til lov om Færøernes hjemmestyre.* Prentað í *Juristen 1947 nr. 29.* Keypmannahavn 1947.

**Mikkelsen, Richard:** *Bankvæsenet på Færøerne – et historisk rids.* Prentað í Nybo Andersen, Bodil o.a. (ritstj.): *Festskrift til Anders Ølgaard.* Keypmannahavn 1996.

**Mikkelsen, Richard:** *Færøerne i bankkrisens tegn.* Keypmannahavn 2001.

**Mitens, Edward:** *Fiskeri og fiskeeksport.* Prentað í *Færøerne*, Bind II, Keypmannahavn 1958.

**Mitens, Edvard**: *Eg minnist – løgtingsmaður 1916–1939.* Tórshavn 1966.

**Mitens, Edvard:** *Eg minnist – skrivstovustjóri Løgtingsins.* Tórshavn 1969.

**Mortensen, Andras:** *Ólavsøkuhaldið í Føroyum.* Prentað í *Varðanum*, bind 65, Tórshavn 1998.

**Müller, Eiden:** *Fem Aar under Union Jack.* Keypmannahavn 1945.

**Mørkøre, Jógvan:** *Ráfiskagrunnurin – gradistokkurin hjá føroyska samfelagnum.* Prentað í *Brá.* Nr. 6, 4. árgangur 1985.

**Mørkøre, Jógvan:** *Interessegrupper og strategier inden for det færøske fiskerierhverv.* Prentað í Johansen, Sámal T.F. o.a. (ritstj.): *Krisen på Førøerne – problemstillinger og perspektiver.* Roskilde Universitetscenter 1993.

**Nauerby, Tom:** *No Nation is an Island. Language, Culture, and National Identity in the Faroe Islands.* Århus 1992.

**Parliamentary Debates. House of Commons. Fifth volume of session 1939-40.** London 1940.

**Patursson, Jóannes:** *Færøsk politik – nogle uddrag og betragtninger*. Keypmannahavn 1903.

**Patursson, Jóannes:** *Færøsk selvstyre. Færingerne, et nordisk mindretal et norønt folk*. Udgivet i anledning af det af lagtinget vedtagne forslag om folkeafstemning. Tórshavn 1931.

**Patursson, Jóannes:** *Føroya Søga I. Úrdráttur úr stjórnarlagnum*. Tórshavn 1939.

**Pedersen, Karl Peder & Tamm, Ditlev:** *De kongelige amtmænd og deres historie – et tilbageblik*. Prentað í Martensen-Larsen, Florian o.a. (ritstj.): *De kongelige amtmænd – en erindringsbog om amtmænd og amter før 1970*. Keypmannahavn 1992.

**Petersen, Ludvig:** *Sandavágs søga*. Tórshavn 1963.

**Petersen, Poul:** *Ein føroysk bygd*. Tórshavn 1968.

**Petersen, Poul:** *Føroyar í søguni I*. Funningur 1974.

**Petersen, Poul:** *Føroyar í søguni II*. Funningur 1989.

**Petersen, Poul:** *Føroyar í søguni III*. Funningur 1992.

**Petersen, Sámal:** *Tingstaðurin á Tinganesi*. Prentað í *Fróðskaparrit*, 20. bók, Tórshavn 1972.

**Pløyen, Christian:** *Erindringer fra en Reise til Shetlandsøerne, Ørkenøerne og Skotland i sommeren 1839*. Keypmannahavn 1940.

**Poulsen, Jógvan:** *Eitt sindur um politisku gongdina áðrenn 1906*. Upprunaliga prentað í *Dimmalætting* 5. januar 1928. Her verður víst til endurprent í *Føroyatíðindi*. November 1981.

**Rafn, Carl Christian (ritstj.):** *Færeyinga Saga eller færøboernes historie i den islandske grundtext med færøisk og dansk oversættelse*. Tórshavn 1972.

**Rasmussen, Petur Martin & Samuelsen, Hanus A.:** *Føroya Søga*. Tórshavn 1965.

**Rasmussen, Petur Martin:** *Den Færøske Sprogrejsning – med særligt henblik på Kampen om Færøsk som Kirkesprog – i national og partipolitisk belysning*. Tórshavn 1987.

**Rasmussen, Petur Martin:** *Mangt er í brøgdum vunnið. Um politisku gongdina í málstríðnum*. Tórshavn 1997.

**Rerup, Lorenz:** *Nationale mindretal i Sønderjylland/Slesvig*. Prentað í Karlsson, Gunnar (ritstj.): *Nationale og etniske minoriteter i Norden i 1800- og 1900-tallet*. Reykjavík 1987.

**Rigsombudsmanden på Færøerne:** *Beretning 1990*. Keypmannahavn 1990.

**Rigsombudsmanden på Færøerne:** *Beretning 1997*. Keypmannahavn 1997.

**Rigsombudsmanden på Færøerne:** *Beretning 1999*. Keypmannahavn 1999.

**Rigsombudsmanden på Færøerne:** *Beretning 2002*. Keypmannahavn 2002.

**Rokkan, Stein:** *Stat, nasjon, klasse. Essays i politisk sosiologi*. 5. útgáva, Oslo 1995.

**Roesdal, Else:** *Vikingernes verden. Vikingerne ude og hjemme*. Keypmannahavn 1987.

**Ross, Alf:** *Dansk Statsforfatningsret*. Bind II, Keypmannahavn 1980.

**Sandvik, Gudmund:** *Ved trehundredeårsminnet for Christian V´ Norske Lov*. Fyrilestur frá 1988. Ikki útgivið.

**Scheel, A.F.G.:** *Løgtingssøga – frá landnámstíð til Sverra kong*. Prentað sum handrit í 1953. Ikki útgivið.

**Skála, Anfinnur í:** *Stjórnarskipanarmálið 1946*. Tórshavn 1992.

**Steining, Jørgen:** *Ældre Historie* og *Nyere Historie*. Prentað í *Færøerne*, bind I, Keypmannahavn 1958.

**Steining, Jørgen:** *Rigsdagen og Færøerne*. København 1953.

**Sørensen, Niels Arne:** *Storbritannien og det færøske styre 1940-45*. Prentað í tíðarritinum *Historie 1998*. Århus 1998.

**Tausen, Eirikur:** *Det færøske fiskerierhvervs udvikling under krigen*. Serritgerð í søguvísindi við Københavns Universitet 1990. Ikki útgivið. Finst á Landsbókasavninum.

**Thorsteinsson, Bjørn:** *Island*. Keypmannahavn 1985.

**Thorsteinsson, Jákup:** *Et Færø som Færø. Studier i Færøernes forfatningsmæssige stilling i forhold til Danmark 1834-1852*. Århus 1990.

**Thorsteinsson, Jákup & Rasmussen, Sjúrður:** *Rigsfælleskabet mellem Danmark og Færøerne*. Prentað í Stig Andersen, Ole o.a. (ritstj.): *Folketingets festskrift i anledning af grundlovens 150 års jubilæum den 5. juni 1999*. Keypmannahavn 1999.

**Thorsteinsson, Jákup:** *Hernaðarmál og politikkur*, prentað í *Føroyar í kalda krígnum*. Tórshavn 1999.

**Trap, J.P.:** *Danmark. Færøerne*. Bind 13, 5. útgáva, Keypmannahavn 1968.

**Ugeskrift for Retsvæsen.** Keypmannahavn 1950.

**Ugeskrift for Retsvæsen.** Keypmannahavn 1951.

**Upprit av Munnliga orðaskiftinum í donsk-føroysku sendinevndini í Keypmannahavn januar-mars 1946.** Tórshavn 1946.

**Wåhlin, Vagn o.a.:** *Mellem færøsk og dansk politik 1917 – 1920.* Tórshavn og Århus 1994.

**Wang, Zakarias:** *Færøsk politik i nyere tid.* Prentað í Ølgaard, Anders (ritstj.): *Færinger – Frænder.* Keypmannahavn 1968.

**Wang, Zakarias:** *Stjórnmálafrøði.* Hoyvík 1988.

**Wang, Zakarias:** *Stýrisskipan Føroya í fólkarættarligum ljósi.* Prentað í: *Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya. Álit frá nevndini, Landsstýrið setti 1. apríl 1993, at kanna stýrisskipanarviðurskifti Føroya.* Tórshavn 1994.

**Wang, Zakarias:** *Føroyar á vegamóti.* Tórshavn 1999.

**West, John F.:** *Færøerne – en nation og dens historie.* Keypmannahavn 1974. Umsett úr enskum eftir West, John F: *Faroe – the emergence of a nation.* London & New York 1972.

**Winther, Niels:** *Et embedsaristokratisk Udkast til en Kommunallov for Færøerne – angrebet med stadigt hensyn til Grundloven og Localiteterne.* Keypmannahavn 1850.

**Wylie, Jonathan:** *The Faroe Islands. Interpretations of History.* The University Press of Kentucky 1987.

**Waag, Einar:** *Val og valtøl 1906-1966.* Klaksvík 1967.

**Young, G. V. C.:** *From the vikings to the reformation. A chronicle of the Faroe Islands up to 1538.* Isle of Man 1979.

**Zachariasen, Louis:** *Føroyar sum rættarsamfelag 1535 – 1655.* Tórshavn 1961.